# 1. PARTUR: SAMANDRÁTTUR OG TILMÆLI

## 1.1 INNGANGUR

### 1.1.1 Oljuráðleggingarnevndin: Hvussu nevndin varð sett, samansett og við hvørjum setningi.

Í teirri avgerandi samtyktini hjá Føroya Løgtingi tann 24. september 1993 um leiting eftir olju og gassi í undirgrund Føroya, sum er endurgivin í fylgiskjali 1.1-1, var eisini fylgjandi áheitan á Landsstýrið:

*"Løgtingið tekur undir við Landsstýrinum í, at tað lógarfyrireikandi og útgreinandi arbeiðið, ið byrjaði tíðliga í ár, heldur fram við at gera uppskot til nýtímans undirgrundarlóg og aðra neyðuga lóggávu umframt uppskot til framtíðar treytir fyri leiti- og útvinningarloyvum. Haraftrat eigur greiða at fáast á, hvussu størst møguligt fyrilit kann havast fyri fiskivinnu og umhvørvi, og hvussu arbeiðsmøguleikar, vinnu- og samfelagsáhugamál verða tryggjað á bestan hátt, verður talan um leiting eftir og útvinning av kolvetnum á føroyskum øki."*

Sambært skrivi frá 24. mai 1994 frá løgmanni samtykti Landsstýrið tann 22. apríl 1994 at tilnevna eina nýggja oljuráðleggingarnevnd til:

"*at gera uppskot til framtíðar kolvetnispolitikkin, harímillum uppskot til nýggja undirgrundarlóg, almennar treytir fyri leiti- og útvinningarloyvi, avgerð um hvørjar leiðir í fyrsta umfari ætlast verða útbodnar, lóg um arbeiðsumhvørvis-, trygdar- og tilbúgvingarspurningar, neyðugar skatta- og avgjaldsreglur, ásetingar um at verja umhvørvis- og fiskiveiðiáhugamál og eina greinagerð til Løgtingið um møguleikar og framferð til at fremja føroyskan vinnubúskap og arbeiðsmøguleikar sum lið í føroyskum oljupolitikki*".

Við skrivi Landsstýrisins frá 27. mai 1994 varð heitt á niðanfyri nevndu um at gerast limir í ráðleggingarnevndini, umboðandi hvør sín sakkunnleika:

Stefan Hultberg, statsgeologur: Jarðfrøði og oljuleiting
Arne Nørrevang, savnsleiðari: Umhvørvi
Klaus Rasmussen, ríkisgóðkendur grannskoðari: Vinnu- og samfelagsbúskap
Jørgen Nørgaard, deildarstjóri: Løgfrøði og umsiting
Torleivur Hoydal, økisstjóri: Trygdarspurningar
Halgir Winther Poulsen, advokatur: Løgfrøði og landgrunsmál
Árni Olafsson, ráðgevi: Landgrunsmál og samfelagsbúskap
Súsanna Danielsen, deildarleiðari: Umsiting og umboð fyri landsskrivstovuna.

Sambært hesum skrivi skuldi nevndin takast við fylgjandi:

- at gera uppskot til Landsstýrið viðvíkjandi lóggávu- og útgreiningarspurningum
- at gera uppskot til kunngerðir v.m. sambært lóggávuni
- at gera uppskot til stevnumið fyri málsviðgerðini
- at gera tilmæli til Landsstýrið um avgerðir í týdningarmiklum málum, eitt nú veitan av kanningar- og útvinningarloyvum (konsessión), góðkenningar av útbygging av oljuleiðum, og spurningar um undirstøðukervi (infrastruktur), flutning og ílandføring av olju og avtalur við grannalond um hesi viðurskifti

- um Landsstýrið ynskir tað, ella um Oljufyrisitingin hevur tørv á hesum, at hjálpa til við at leggja til rættis kolvetnisstevnu landsins.

Tann 5. juli 1994 tilnevndi Landsstýrið tveir limir afturat eftir tilmæli frá vinnulívinum, og vóru teir:

Arne Poulsen, stjóri í Føroya Arbeiðsgevarafelag v.m., og

Magni Arge, formaður í felagsskapinum Føroya Oljuídnaður.

Árni Olafsson varð tilnevndur formaður og Súsanna Danielsen næstformaður í nevndini.

Í tilnevningarskrivi sínum til limirnar frá 27. mai 1994 legði Landsstýrið dent á, at nevndararbeiðið skuldi byrja skjótast gjørligt, og varð nevndararbeiðið mett at taka eini 2 - 3 ár.

Tá ið nevndin varð sett, bað Landsstýrið avvarðandi ríkismyndugleikar um at geva teimum limum, ið sótu í ríkisstørvum, loyvi at taka lut í arbeiðinum, vísandi til avtaluna millum Landsstýrið og ríkisstjórnina frá 22. desember 1992. Landsstýrið fekk játtandi svar frá ríkismyndugleikunum ávikavist 23. januar og 22. februar 1995, t.e. aftaná at stjórnin í protokollati frá 17. november 1994 hevði váttað sína gomlu tilsøgn um at veita Landsstýrinum sakkunnleika. Undan hesum tóku teir limirnir, ið arbeiddu í ríkisstørvum, eftir áheitan Landsstýrisins og við samtykki frá forsætismálaráðnum fyribils lut í nevndararbeiðinum.

Limirnir hava í nevndararbeiðinum verið fullvarir við, at teir av Landsstýrinum eru tilnevndir vegna sín sakkunnleika og ikki sum umboð fyri teir stovnar ella tær fyritøkur, teir starvast í. Hetta er eisini galdandi fyri tey tilnevndu vinnuumboðini, ið verða mett sum umboðandi vinnukunnleika og føroysk vinnuáhugamál yvirhøvur og ikki teir felagsskapir, ið hava givið Landsstýrinum tilmæli um tilnevning teirra.

Samanseting nevndarinnar er broytt í tíðini, hon hevur arbeitt:

Halgir Winther Poulsen, advokatur, fór úr nevndini 18. november 1994.

Stefan Hultberg, statsgeologur, fór við árslok 1995 úr nevndini, og kom Flemming G. Christiansen, statsgeologur, í hansara stað.

Súsanna Danielsen, deildarleiðari, fór úr nevndini 1. oktober 1996, og kom Rúni Joensen, løgmansfulltrúi, í hennara stað.

Sama dag kom eisini Henning Jacobsen, landsverkfrøðingur, inn í nevndina.

Arne Poulsen, stjóri, fór úr nevndini 1. februar 1997, og samstundis kom Árni Joensen, stjóri, inn í nevndina eftir tilmæli frá Føroya Arbeiðsgevarafelag.

### 1.1.2 Hví Oljuráðleggingarnevndin varð sett

Eftir at Føroya Landsstýri og stjórn Danmarkar í september 1992 høvdu rokkið eina prinsippsemju um, at málsøkið "ráevni í undirgrundini" skuldi yvirtakast sum sermál sambært heimastýrislógini, setti Landsstýrið við skrivi frá 11. desember 1992 niður eina Oljuráðleggingarnevnd.

Nevndin, ið sett varð, fór til verka í januar 1993 og læt Landsstýrinum frágreiðing sína á jóansøku 1993. Víst verður á innihaldið í hesi frágreiðing, vanliga nevnd "1993-frágreiðingin", ið umframt á føroyskum eisini finst á donskum og enskum.

Nevndin legði fram uppskot til forkanningarlóg við viðmerkingum. Eisini greiddi hon frá jarðfrøðiligu treytunum fyri oljuleiting og í stuttum frá ymiskum

síðum av oljuvirksemi og tess fylgjum fyri Føroyar. Nevndin skjeyt upp, at føroyskir myndugleikar tóku prinsippavgerð um, hvørt stevnast skuldi fram ímóti kolvetnisvirksemi í Føroyum, og um svarið varð játtandi, at boðað varð greitt frá hesum.

Landsstýrið legði uppskotið til forkanningarlóg fyri Løgtingið, sum tann 24. september 1993 samtykti lógaruppskotið saman við eini fráboðan um, at farast skuldi undir at fyrireika leiting eftir kolvetni við framleiðslu í hyggju, um treytirnar fyri hesum vístu seg at vera til staðar. Forkanningarlógin kom í gildi sum løgtingslóg nr. 179 frá 21. oktober 1993.

Tá lógin var komin í gildi, stovnaði Landsstýrið Oljufyrisiting, ið fekk tilhald saman við Føroya Náttúrugripasavni, jarðfrøðideildini, hvørs leiðari, Martin V. Heinesen, jarðfrøðingur, varð biðin um at leiða fyrisitingina.

Landsstýrið bað limirnar í Oljuráðleggingarnevndini halda fram sum arbeiðsbólkur, ið saman við tí nýggju Oljufyrisitingini skuldi fyrireika forkanningar í føroysku undirgrundini.

Úrslitið av hesum fyrireikingum var, at Landsstýrið tann 4. februar 1994 alment beyð seismikkfeløgum at geva tilboð um seismiskar kanningar. Arbeiðsbólkurin metti saman við Oljufyrisitingini um tey innkomnu tilboðini, samráddist við feløgini um treytirnar og gav Landsstýrinum tilmæli um, hvør ið skuldi fáa loyvi at gera forkanningarnar.

Síðan varð arbeiðsbólkurin niðurlagdur, men meginparturin av limunum varð tilnevndur limir í tí nýggju Oljuráðleggingarnevndini, ið sett varð á vári 1994.

### 1.1.3 Virksemi nevndarinnar

Nýtilnevnda Oljuráðleggingarnevndin helt fyrsta fundin tann 28. juni 1994, og síðan hevur nevndin hildið tilsamans 20 fundir, oftast í 2 dagar.

Harumframt hava nevndarlimirnir, skipaðir í eitt skiftandi tal av arbeiðsbólkum, hildið nógvar fundir um serlig evni, har stundum eisini onnur enn nevndarlimir hava tikið lut.

Oljufyrisitingin hevur verið skrivstova hjá nevndini.

Eisini hava nevndarlimirnir ráðført seg við myndugleikar í Føroyum, Danmark, Noregi, Bretlandi og Írlandi.

Somuleiðis hevur nevndin ráðført seg við sakkønar ráðgevar um ymiskar spurningar og havt samskifti við áhugað oljufeløg.

Afturat tí, at nevndin hevur gjørt frágreiðing og fyrireikað lóggávu, hevur hon í samsvari við setning sín virkað sum ráðgevi hjá Landsstýrinum og Oljufyrisitingini í ymiskum spurningum í sambandi við forkanningar- og leitivirksemi, og umboðað føroyskar oljumyndugleikar úteftir. Nærri er greitt frá hesum í ársfrágreiðingunum frá Oljufyrisitingini.

Fejl! Bogmærke er ikke defineret.

**Fylgiskjal 1.1-1**

**Løgtingssamtykt frá 24.9.1993 um leiting eftir olju og jarðgassi á føroyskum øki**

Løgtingsmál nr. 5/1993

**1.** Við uppskoti Landsstýrisins til løgtingslóg um forkanningar o.a.m. av undirgrund Føroya, løgtingsmál nr. 4/1993, er fyrsta stigið tikið til at staðfesta, um olja og gass, sum tað loysir seg at útvinna, finnast í føroysku undirgrundini. Lógaruppskotið er ein náttúrlig fylgja av avtaluni frá 22. desember 1992 millum donsku stjórnina og Føroya Landsstýri um yvirtøku av málsøkinum ráevni í undirgrundini sum føroyskt sermál.

**2.** Løgtingið má ásanna, at undirgrund Føroya, bæði undir landinum og undir havbotninum er lítið kannað, og at kunnleikin um jarðfrøðina er ófullfíggjaður. Stórur tørvur er á forkanningum til tess at leggja trygt støði undir eina møguliga grundleggjandi avgerð hjá Landsstýri og Løgtingi um at loyva leitivirksemi eftir olju og jarðgassi á økinum og undir avgerðir hjá oljufeløgunum um at fara undir tílíkt virksemi, tá ið fyritreytirnar eru fingnar til vega.

**3.** Løgtingið ásannar somuleiðis, at víddin á føroyska landgrunsøkinum fyribils er ásett við fráboðan donsku stjórnarinnar frá 7. mai 1985 í Statstidende, og at samráðingar eru við Bretland um endaliga landgrunsmarkið millum Føroya og Bretlands. Í mars í ár varð avtalað við donsku stjórnina, at Landsstýrið stendur fyri leiðsluni av hesum samráðingunum.

**4.** Løgtingið tekur undir við Landsstýrinum í, at tað lógarfyrireikandi og útgreinandi arbeiðið, ið byrjaði tíðliga í ár, heldur fram við at gera uppskot til nýtímans undirgrundarlóg og aðra neyðuga lóggávu umframt uppskot til framtíðar treytir fyri leiti- og útvinningarloyvum. Haraftrat eigur greiða at fáast á, hvussu størst møguligt fyrilit kann havast fyri fiskivinnu og umhvørvi, og hvussu arbeiðsmøguleikar, vinnu- og samfelagsáhugamál verða tryggjað á bestan hátt, verður talan um leiting eftir og útvinning av kolvetnum á føroyskum øki.

**5.** Løgtingið váttar, at sum skjótast eftir at løgtingslógin um forkanningar o.a.m. er komin í gildi, eiga gjøllari reglur at verða ásettar og stig tikin til at geva áhugaðum seismikkfeløgum og oljufeløgum loyvi til forkanningar. Løgtingið tekur eisini undir við, at tá greiða er fingin á

omanfyri nevndu viðurskiftum, helst eftir fáum árum, eigur fyrsta føroyska útbjóðingarumfarið at verða fyriskipað við tí í hyggju at geva loyvi til at leita eftir og at útvinna olju og jarðgass. Løgtingið vónar, at hetta fer at vera til gagns fyri landsins búskap og fer at bøta um arbeiðsmøguleikar landsins.

## 1.2 SPURNINGAR TIL UMRØÐUFejl! Bogmærke er ikke defineret.

### 1.2.1 Høvuðssetningurin

Samsvarandi sínum arbeiðssetningi og í samráð við Føroya Landsstýri, sum sett hevur Oljuráðleggingarnevndina, hevur hon skilt høvuðsuppgávu sína vera at *fáa til vega lógar-, umsitingar- og kunnleikafortreytirnar umframt aðrar viðkomandi fortreytir* fyri at kunna fara frá fyrsta skeiðinum við forkanningum viðvíkjandi kolvetni í føroysku undirgrundini, sum farið varð undir í 1994, til annað skeið: virkna leiting eftir kolvetni, sum aftur er neyðug fortreyt fyri uppaftur einum øðrum skeiði, sum er útbygging og kolvetnisframleiðsla.

Nevndin hevur evnað til karmar, bygdir á nýtíðar loyvisskipanir, sum kendar eru úr Útnyrðingsevropa.

### 1.2.2 Lógaruppskot og frágreiðing

Nevndin hevur lagt høvuðsdent á at evna til uppkast til eitt *uppskot um løgtingslóg um kolvetnisviksemi* (sí 6. part), sum kann vera lógargrundarlagið undir at geva loyvi at leita eftir kolvetni við rætti til síðan handilsliga at útvinna tað, ið funnið verður.

Samstundis hevur nevndin við støði í politiskum ábendingum, serliga í sambandi við løgtingsviðgerðina av uppskotinum til løgtingslóg um forkanningar, smbr. serliga við løgtingsviðtøkuna frá 24. september 1993, sum løgd er við sum fylgiskjal 1.1-1, í *frágreiðing* síni roynt at greiða frá fleiri týdningarmiklum viðurskiftum í sambandi við møguliga komandi kolvetnisvinnu við tí í hyggju at lýsa hóskandi politiskar valmøguleikar.

### 1.2.3 Støðugir og skiftandi partar av oljuskipanarlagnum

*Kolvetnislógin* er hugsað sum varandi karmur um leiti- og útvinningarvirksemið.

Nevndin hugsar sær, at landsmyndugleikarnir við heimild í lógini skriva út leiti- og framleiðsluloyvi, vanliga eftir at lýst eru *útbjóðingarumfør*, har oljufeløgini verða boðin at søkja um einkarrætt til at leita og síðani eisini at fáa rætt til at útvinna kolvetni í úrvaldum pørtum av undirgrundini sambært teimum treytum, ið ásettar eru í sambandi við útbjóðingarumfarið.

Nágreiniligu *loyvistreytirnar* kunna, alt eftir tørvi samfelagsins, *skifta* innan lógarkarmarnar frá umfari til umfar, og eftir hvørjar vánir oljufeløgini halda vera fyri at finna kolvetnisnøgdir í økjunum, sum verða boðin út.

Kortini má roknast við, at treytirnar verða støðugar, serliga á økjum sum hava stóran týdning fyri føroyska samfelagið. Aftrat hesum kemur, at oljufeløgini leggja dent á, at viðurskiftini eru støðug.

### 1.2.4 Høvuðsmál

*Høvuðsendamál* myndugleikanna við at seta í verk kolvetnisvinnu í føroysku undirgrundini verður at *skapa inntøkur, vinnumøguleikar og arbeiðspláss í Føroyum*. Við ongum slíkum fyrimunum til føroyska samfelagið hevur kolvetnisvirksemi onga meining. Tí fara ynski ella krøv hesum viðvíkjandi altíð at vera grundleggjandi partur av teimum treytum, sum settar verða fyri kolvetnisvirksemi. Harafurímóti kunnu krøvini alt eftir umstøðunum broytast bæði í styrki og innihaldi.

Í frágreiðing síni viðger nevndin spurningar í sambandi við føroyskar *vinnumøguleikar* við serligum denti á leitiskeiðið, og í hesum sambandi eisini *útbúgvingarspurningin* og umframt tað vánirnar, serliga tá ið nakað er frá liðið, at fáa inntøkur av *avgjøldum og skattum*. Harumframt verður skrivað um *at føra kolvetni í land* og um møguliga at skipa eitt *alment oljufelag*.

### 1.2.5 Treytir fyri oljuvirksemi

Eitt annað standandi og støðugt krav til kolvetnisvirksemið verður í mestan mun at *minka um tey hjáárin* og teir vansar, sum kolvetnisvirksemið fer at hava við sær, tá ið hugsað verður um umhvørvi, um aðrar vinnugreinir og samfelagið í síni heild.

Frágreiðingin roynir at lýsa *umhvørvisvandamálini* við kolvetnisvirksemi, serliga í leitiskeiðinum, sum nú stendur fyri durum, og víst verður á, hvussu roynt kann verða at minka hesar vandarnar. Sama er galdandi fyri teir vansar, sum kunnu verða *fiskivinnuni* fyri.

Kolvetnisvirksemið hevur eisini í sær *trygdarvansar* fyri tey, sum arbeiða í vinnuni, og fyri umhvørvið. Nevndin hevur tískil lagt sær nær at lýsa hesar vansar og at áseta, hvussu teir í størstan mun kunnu avmarkast.

Fortreytin fyri kolvetnisleiting er, at vánir eru at finna olju í rakstrarverdum nøgdum, og hetta verður so fortreytin fyri einum útbyggingarskeiði og einum framleiðsluskeiði. Heilt umráðandi eru tí *leitivánirnar*. Í nevndarfrágreiðingini eru dagførdar metingar av leitingarútlitunum fyri Føroyaøkið, við støði serliga í forkanningunum, sum gjørdar eru, meðan nevndin hevur arbeitt við frágreiðingini.

### 1.2.6 Avmarkingar í hesari frágreiðingini

Sum nevnt hevur setningur nevndarinnar fevnt bæði um at evna til neyðugu lógarkarmarnar fyri og aðrar staklutir í føstu skipanini og um nágreiniligu karmarnar og treytirnar fyri fyrsta útbjóðingarumfar.

Sum umrøtt í innbjóðing nevndarinnar, dagfest 4. oktober 1996, til oljufeløgini um at velja út øki til fyrsta útbjóðingarumfar, hava myndugleikarnir í hyggju at skipa fyri útbjóðingarumfari heilt skjótt, helst áðrenn 1997 er farið, tó soleiðis at útbjóðingarøkið verður valt, alt eftir hvussu støðan í enn óloystum spurningum viðvíkjandi *landgrunsmarkinum* móti Bretlandi tá er.

Nevndin hevur bæði arbeitt við tí varandi skipanini, framtíðarútlitum og eisini við teimum treytum, sum eiga at galda burturav fyri fyrsta útbjóðingarumfar. Men við Landsstýrið er avrátt, at nevndin skiftir frágreiðing sína sundur í tveir partar, soleiðis at nú verður latið úr hondum uppkast til uppskot um løgtingslóg um kolvetnis-

virksemi og ein frágreiðing við tilmælum um almennu og støðugu skipanina, men *ikki* viðvíkjandi teimum viðurskiftum, sum eru serstøk fyri fyrsta útbjóðingarumfar, og at nevndin heldur fram við at fyrireika tilmæli um útbjóðingarumfarið við tí fyri eyga, at boðið verður út, so skjótt sum tilber.

# 1.3 SAMANDRÁTTUR

## 1.3.1 Fyritreytir fyri eini føroyskari kolvetnisvinnu (2. partur)

### Støðan í oljubúskapinum og oljuleitingini (2.1)

Rákini eru so ymisk, nú Føroyar leggja til brots í oljuleitingini.

Stórur búskaparligur vøkstur um allan heimin hevur økt um eftirspurningin eftir kolvetni. Oljufeløgini leggja doyin á at varðveita og økja um sítt tøka tilfeingi. Marknaðurin fyri olju er óstøðugur eins og aðrir rávørumarknaðir. Oljuprísirnir eru ógvuliga skiftandi, og stór óvissa er um, hvussu prísgongdin verður í framtíðini. Á jarðgassi vaksa bæði eftirspurningur og framboð, ikki minst í Evropa.

Í Útnyrðingsevropa er kolvetni framleitt í stórum máti í trý áratíggju, og hóast leiti- og framleiðslukostnaðurin er høgur sammett við heimin annars, er framvegis nógv leitivirksemi, sum breiðir seg til nýggj øki við størri havdýpi, eitt nú vestanfyri Hetland, Miðnoreg, Írland og Føroyar. Hetta ber m.a. til, tí stór tøknilig framstig eru gjørd innan leiting og framleiðslu, og tí at fingnir eru til vega nýggir lønandi útbyggingar- og framleiðsluhættir, eitt nú havbotnsútgerð og flótandi framleiðsluútbúnaður. Tað stendur á marknaðinum fyri boripallar, ikki minst marknaðinum fyri teir stóru pallarnar, sum duga til dýpið undir Føroyum.

Útnyrðingsevropa, eisini Føroyar, er í dag í harðari kapping við oljuøki um allan heim, eisini lond, sum fyri stuttum ikki vóru atkomandi hjá altjóða oljufeløgunum, eitt nú londini í gamla Sovjetsamveldinum, sum kortini fyri ein part eru merkt av stórari politiskari óvissu. Sum lið í royndunum at spjaða fíggjarliga váðan út um heimin, fara oljufeløgini at hava áhuga fyri Føroyum, sjálvt um stór óvissa enn er um jarðfrøðina.

Samstundis sum oljuprísirnir hava lyndi til at liggja heldur lægri enn í áttatiárunum, og fleiri oljuøki eru latin upp, er maktjavnin millum oljufeløg og stjórnir farin at halla feløgunum til fyrimunar, so at stjórninar hava hildið tað verið skilagott at gera treytirnar fyri oljuleiting og -framleiðslu lagaligari, eisini í Útnyrðingsevropa.

### Útlitini fyri oljuvinnu undir Føroyum (2.2)

Fyrstu stigini til møguliga at byrja eina veruliga oljuvinnu undir Føroyum vórðu tikin við Løgtingsins týdningarmiklu avgerð 24. september 1993 (sí fylgiskjal 1.1-1), um at Føroyar fóru at bjóða út fyrsta umfar av loyvum til at leita eftir olju og jarðgassi, so skjótt ávísar grundleggjandi fortreytir vóru fingnar í lag.

Eftir tað kunnu framtíðarmøguleikar Føroya at byrja eina oljuvinnu serliga metast eftir tveimum grundleggjandi fyritreytum afturat. Tann fyrra er, um tey jarðfrøðiligu viðurskiftini á økinum tala fyri, at olja og jarðgass finnast í nøgdum, sum eru nóg stórar til, at tað er búskaparliga ráðiligt at fara undir at framleiða úr teimum. Hin fyritreytin er, at oljuídnaðurin hevur nóg stóran áhuga fyri at brúka teir neyðugu pengarnar til ta leiting, sum skal til fyri at finna rakstrarverdar nøgdir av kolvetni, so ein verulig oljuídnaðarlig menning kann gróðursetast og vara fleiri tíggjuáraskeið inn í framtíðina. Hendan seinna fyritreytin veldst nógv

um ta fyrru.

Við støði í teimum kanningum, sum hesi seinastu árini eru gjørdar við Føroyar, samanhildnar við kunnleikan um jarðfrøðiliga bygnaðin og kolvetnisfundirnir í grannaøkjunum - serliga vestanfyri Hetland - verður mett, at nakrar av teimum týdningarmestu jarðfrøðiligu fyritreytunum eftir øllum at døma eru fyri, at olja og/ella jarðgass kann koma fyri á føroyskum øki. Tó er kunnleikin til tey jarðfrøðiligu viðurskiftini enn ov lítil til, at sigast kann, um allar tær neyðugu fyritreytirnar eru loknar til tess, at olja/gass finst í føroysku undirgrundini í rakstrarverdum nøgdum.

Meðan kanningarnar eru farnar fram, hevur áhugin hjá oljufeløgum og tænastufeløgum annars sýnt seg á ymiskan hátt. Ídnaðurin ger áhaldandi kanningar á føroyskum øki, og samstundis hevur hann lagt seg eftir at knýta tætt samband við føroyskar myndugleikar og ídnaðarfyritøkur v.m. Í desember 1996 vóru 23 oljufeløg við í einum tilmælisumfari, har tey vístu á 108 heilar teigar og 26 teigapartar á føroyskum øki, sum feløgini ynskja tiknar við, tá øki skulu bjóðast út í tí fyrsta loyvisumfarinum.

Tann uppá seg stóri áhugin fyri føroyska økinum í løtuni stendst serliga av tí góðu gongd, sum seinastu árini hevur verið vestanfyri Hetland, har teir framvegis raka við olju út ímóti Hetlandsrennuni. Samstundis ger ídnaðurin alsamt tøknilig og kostnaðarsparandi framstig, sum kunnu fáa avgerandi týdning fyri leitimøguleikarnar á tí ógvuliga kravmikla føroyska økinum.

Leitingarligu fortreytirnar fyri at fara undir fyrsta útbjóðingarumfar á Føroyaleiðini mugu samanumtikið metast at vera *hampiliga* góðar. Hampiliga góðar, verður sagt, tí leiðin hóast fleiri góðar fyritreytir framvegis má metast sum útjaðari ("frontier") og vágafull ("high risk"), har tað enn ikki hevur borið til at vísa á, um kolvetni verulig er, og har óivað heilt stórar peningaupphæddir skulu setast í byrjunarleitingina, áðrenn tað (møguliga) verður rakt við fyrstu oljuna, ið kann framleiðast á Føroyaleiðini.

## 1.3.2 Uppskotið um kolvetnisskipan (3. partur)

### Val av kolvetnisskipan (3.1)

Tá kolvetnisskipan skal gerast, er nógv í at velja. Kolvetnisskipanir verða vanliga býttar sundur í tvey høvuðssløg: Øðrumegin eru framleiðslubýtissáttmálar ("Production Sharing Contracts", "PSC") og tænastusáttmálar ("Service Contracts"), og hinumegin eru loyvisskipanir, eisini róptar skatta/avgjaldsskipanir. Harafturat hava summi lond reinan landsrakstur, sum kann liggja í einum landsoljufelag.

Høvuðsmunurin er í viðurskiftunum millum stjórnina og oljufeløgini.

Gongdin hevur verið, at markið millum teir báðar høvuðsbólkarnar av skipanum ikki longur er so avgjørt.

Samstundis er loyvisskipanin broytt soleiðis, at staturin gjøgnum loyvistreytirnar og eftirlitið við, at tær verða hildnar, tryggjar sær, at leiting, útbygging og framleiðsla og stundum flutningur av kolvetni verða væl skipað samsvarandi yvirskipaðu áhugamálunum hjá samfelagnum. Ofta hevur eitt alment felag lut í loyvunum saman við teimum privatu feløgunum. Harafturat fær samfelagið sum ognari av tilfeinginum sín vinning í skattum og avgjøldum.

Øll lond í norðuratlantiska/norðurevropeiska økinum nærhendis Føroyum hava valt frábrigdi av loyvisskipanini. Tí er natúrligt at brúka hesa skipanina, uttan so at sannførandi próvgrundir eru fyri aðrari loysn.

Ein framkomin loyvisskipan verður hildin at kunna geva samfelagnum tað eftirlit, sum tað ynskir og megnar, við at kolvetnisvirksemið verður væl skipað og fer fram samsvarandi teimum málum, sum samfelagið hevur sett. Í hesum myndlinum orðar politiska skipanin stevnumiðini, lóggávuvaldið ásetur høvuðsreglurnar, og fyrisitingin liðar tær sundur í neyðugar smálutir og hevur eftirlitið við, at reglurnar verða hildnar. Loyvini verða givin teimum áhugaðu handilsligu oljufeløgunum undir demokratiskum eftirliti, fyri tað mesta eftir objektivum kriterium, sum eru ásett frammanundan. Samfelagið, sum eigur tilfeingið, kann tryggja sær eitt hóskandi viðurlag sum skatt ella avgjald og møguliga gjøgnum luttøku við landsoljufelag.

Oljuráðleggingarnevndin hevur við hesum í huga arbeitt við einari skipan, har greiður skilnaður er millum myndugleikarnar og handilsliga framleiðsluvirksemið. Í uppkasti nevndarinnar til løgtingslóg um kolvetnisvirksemi verður roknað við, at virksemið - í tann mun Landsstýrið sjálvt ikki fremur tað - verður latið øðrum upp í hendi við loyvi frá Landsstýrinum og undir eftirliti Landsstýrisins. Roknað hevur verið við, at gingið verður eftir loyvisskipanini, men vísir tað seg, at henda skipan ikki riggar nóg væl í føroyskum samanhangi, sjálvt eftir at treytirnar eru lagaðar til, sum gjørt verður frá einum umfari til annað, kunnu aðrar skipanir roynast seinni. Mett verður, at hetta kann gerast uttan at broyta tað lógarverk, sum nevndin skjýtur upp.

## Lógarkarmar (3.2)

Løgtingssamtyktin frá 24. september 1993 um leiting eftir olju og jarðgassi á føroyskum øki er uppistøðan til uppkastið hjá nevndini til *Uppskot um løgtingslóg um kolvetnisvirksemi*. Løgtingið samtykti, at gerast skuldi uppkast til eina nýtíðar undirgrundarlóg og aðra neyðuga lóggávu eins og uppkast til framtíðartreytir fyri loyvi til leiting og framleiðslu.

***Um altjóðarætt***

Galdandi fólkarættur gevur strandalondum *óskerdan rætt* til at leita eftir og útvinna náttúrutilfeingi á og í landgrunninum, smbr. kongliga fyriskipan nr. 259 frá 7. juni 1963. Landgrunsøkið er bráðfeingis lýst ("designerað") við fráboðan frá 7. mai 1985.

Tey *óskerdu rættindini* hjá strandalandinum eru einsæris, soleiðis at onnur lond bara við loyvi frá strandalandinum kunnu leita í ella útvinna tilfeingið úr landgrunninum. Tá slík útnýting skal fara fram, kann strandalandið byggja útbúnað v.m. og áseta trygdarøki kring hann. Á útbúnaðinum hevur strandalandið fullan myndugleika til at seta í verk tær fyriskiparnir, sum eru neyðugar. Í trygdarøkjunum hevur strandalandið tann myndugleika, sum er neyðugur til tess at tryggja útbúnaðin v.m.

At hava myndugleika til at áseta reglurnar fyri viðurskiftunum á útbúnaði og trygdarøkjum er ikki tað sama sum at hava fult yvirvaldsræði á landgrunsøkinum. Strandalandið má til dømis tola, at útlendsk skip sigla ígjøgnum tað, og at onnur lond leggja kaðalar og rørleiðingar eftir havbotninum.

***Myndugleiki heimastýrisins***

Sambært danskari lóg eigur danski staturin tey ráevni í undirgrundini, sum ikki fyri 1932 vóru útnýtt av einstaklingafeløgum. Henda rættarstøða varð varðveitt í Føroyum, eisini eftir at Heimastýrislógin varð sett í gildi í 1948. Tann undirgrundarlógin, sum er í gildi í Føroyum, er lóg nr. 181 frá 8. mai 1950 um leiting og útvinning av ráevnum í undirgrundini hjá Kongaríkinum Danmark**.**

Men málsøkið "ráevni í undirgrundini" varð nevnt á lista B í heimastýrislógini, og tað merkir, at málsøkið eftir samráðingar millum ríkismyndugleikarnar og heimastýrið kundi flytast til sermál. Heimastýrið ynskti tíðliga, at hetta varð gjørt, men ikki fyrrenn í 1992 eynaðist at gera eina avtalu, sum segði, at málsøkið samsvarandi heimastýrislógini varð flutt heimastýrinum sum sermál, tvs. heimastýrið hevur løggávu- og fyrisitingarmyndugleikan, tá umræður ráevni í undirgrundini.

Harafturat verður sagt í avtaluni um yvirtøkuna av málsøkinum, at heimastýrið rindar tær útreiðslur, sum standast av málsøkinum, og at møguligar inntøkur frá framtíðar ráevnisframleiðslu hava við sær samráðingar um at minka um statsins gjaldingar til Føroyar. Stjórnin staðfestir at enda í avtaluni, at Føroya Landsstýri í føroysku ráevnismenningini er hugað fyri at brúka danskan serkunnleika innan fyrisiting, gransking og vinnufyritøkur, treytað av at hann er kappingarførur. Sjálvt um málsøkið "ráevni í undirgrundini" er nevnt í summum avtalum millum stjórnina og Landsstýrið frá 1993 og 1994 í sambandi við endurfíggingina av føroysku uttanlandsskuldini, er málsøkisins støða sum sermál órørd av tí.

Myndugleiki heimastýrisins fevnir afturat land- og sjóøkinum eisini um ráevni á og í landgrunninum.

***Lógaruppskotið***

Brot 3.2.4. i kapitli 3.2 um lógarkarmin er í sjálvum sær ein samandráttur av úrvaldum pørtum av lógaruppskotinum. Í hesum broti verður roynt at knýta lógaruppskotið saman við einstakar kapitlar í hesi frágreiðing, og hann kann tí vera vegleiðandi hjá lesarum, sum hava áhuga fyri at kunna seg gjøllari um ávísar spurningar. Viðvíkjandi loyvisumførum kann serliga verða víst til brotið: *Loyvisskipanin í verki.*

***ES/EBS-reglur***

ES- og EBS-reglur um loyvis- og útbjóðingarpolitikk umfata ikki Føroyar, men í kapitli 3.2 er kortini eitt stutt yvirlit yvir ES/EBS-reglur av týdningi fyri olju/gass økið.

Roknað verður við, at um Føroyar fóru upp í ES ella EBS, hevði tað fingið avleiðingar fyri ta kolvetnisløggávuna, sum nevndin skjýtur upp. Roknast má til dømis við, at tann vinnuframapolitikkurin, sum nevndin hevur í hyggju sambært § 10 í uppkastinum til kolvetnisvirksemislóg, má broytast, tí ES-rætturin loyvir ikki, at munur verður gjørdur eftir tjóðskapi. Harafturat kann m.a. kravið um at føra kolvetni í land verða ávirkað.

**Fyrisiting (3.3)**

Krøvini til Oljufyrisitingina mugu verða, at hon hevur um hendi dagligu

fyrisitingina av oljuvirkseminum. Hon skal á professjonellan og trúverdugan hátt útinna myndugleikastarvið mótvegis oljufeløgum v.m., samstundis sum hon stuðlar politikarunum, sum hava ábyrgdina.

Fyrisitingin skal fylgja gongdini av fremsta plássi, upplýsa almenningin og politikarar, gera strategi, seta tiltøk í verk og gera lógaruppskot v.m. í eini gongd, sum alsamt er framsøkin og miðvís.

Spyrjast úrslit burtur úr leitingini, tykjast krøvini um eina forsvarliga fyrisiting eyðsýnd. Koma úrslitini ikki beinanvegin, verða krøvini hinvegin ikki minni til hugflog og atgerðir, so sett verða í verk átøk, ið birta upp undir, at hildið verður fram.

Í fyrstani, meðan leitað verður, verða uppgávurnar bæði almennar og ítøkiligar. Oljufyrisitingin røkir nakrar uppgávur best, og aðrar kunnu leggjast hjá øðrum myndugleikastovnum. Tær fyrisitingarligu uppgávurnar, sum taka seg upp í næstu framtíð, kunnu flokkast soleiðis:

- Fyrisitingarligar uppgávur
- Oljujarðfrøðiligar uppgávur
- Trygdar-, arbeiðsumhvørvis-, umhvørvis- og tilbúgvingaruppgávur
- Búskaparligar og vinnuligar uppgávur

***Fyrisitingarlig mál***

Fyrsta útbjóðingarumfar fer at krevja nógv í fyrstu framtíð. Setningurin verður eitt nú at velja øki, gera loyvisskipan við teimum treytum, sum skulu galda fyri loyvið, og gera frágreiðing til Løgtingið. Afturat útbjóðingarskjalinum skulu gerast tey marknaðarføringartiltøk, sum hoyra til.

Tingast skal um umsóknir um loyvi til leiting og framleiðslu (konsessiónir), og tingast skal við umsøkjararnar. Síðani skulu tilmæli gerast til teirra, sum skulu taka tær politisku avgerðirnar, og loyvi útskrivast.

***Oljujarðfrøðilig mál***

Í einhvørjari oljufyrisiting hevur jarðfrøðin avgerandi leiklut. Holl vitan um útlitini í undirgrundini er avgerandi í samráðingunum við oljufeløgini. Henda vitan er eisini neyðug til tess at kunna áseta hóskandi trygdar- og umhvørviskrøv.

Skulu góðar jarðfrøðiligar kanningar gerast, er neyðugt at hava breitt jarðfrøðiligt skil, sum røkkur út um teir serligu oljujarðfrøðiligu spurningarnar.

Jarðfrøðisavnið hevur bygt upp ein ávísan serkunnleika og royndir innan bæði oljujarðfrøðiligar og meiri vísindaligar uppgávur, eins og tað hevur breitt samband við útlendskar jarðfrøðiligar stovnar. Jarðfrøðisavnið hevur í forkanningarskeiðinum havt neyvt samarbeiði við Oljufyrisitingina, og tað er natúrligt at bygt verður víðari á hetta grundarlag. Tó má samarbeiðið verða greiðari skipað enn higartil.

Tann væntaða oljuleitingin og møguliga framleiðslan seinni fara at seta stór krøv um, at bygdur verður upp jarðfrøðiligur sakkunnleiki í Føroyum, fyrst og fremst til myndugleikabrúks, men eisini til tess at fáa eina betri almenna fatan av jarðfrøði Føroya.

***Trygdar-, arbeiðsumhvørvis-, umhvørvis-, og tilbúgvingarmál***

Myndugleikakrøv og myndugleikaeftirlit við trygd og arbeiðsumhvørvi byggja

á innaneftirlit, tí tað eru loyvishavanir ið hava ábyrgdina fyri frálandsvirkseminum.

Trygdarvandamálini í oljuvinnuni líkjast teimum í sjóvinnu og ídnað so sum trygd á sjónum og arbeiðsumhvørvi, men hon hevur eisini sínar serligu spurningar, eitt nú boringartrygd.

Áðrenn ein loyvishavi fær loyvi at bora, skal hann leggja eina boriætlan fyri myndugleikarnar til góðkenningar. Jarðfrøðingar og verkfrøðingar mugu arbeiða tætt saman um at góðkenna og hava eftirlit við boriætlanum.

Í umhvørvisspurningum fer ein nýggj kongalig fyriskipan um havumhvørvið væntandi at geva Landsstýrinum ávísar heimildir, sum hava týdning fyri framtíðar kolvetnisvirksemið.

***Búskapar- og vinnumál***

Áhugin hjá oljufeløgunum fyri føroyska økinum veldst um eina handilsliga støðutakan, har hugsað verður um útlitini, inntøkumøguleikarnar og møguleikar fyri kolvetnisframleiðslu aðra staðni í heiminum. Myndugleikarnir mugu meta um, hvussu stór búskaparlig krøv teir kunnu seta, fyri at virksemið kann vera áhugavert fyri báðar partar.

Krøvini til búskaparligt útbýti úr kolvetnisframleiðslu verða fyri ein part sett gjøgnum lóggávu og fyri ein part í samráðingum við oljufeløgini.

Til tess at seta hóskandi krøv krevst, at tú kennir eftirspurningin og innkeypsmannagongdina hjá oljufeløgunum væl, eins og tú hevur kunnleika til útboðið av vørum og tænastum hjá føroyskum vinnulívi og til tey menningarrák, sum eru í vinnulívinum.

Tann búskaparliga og vinnuliga uppgávan hevur eisini í sær eina eftirlitsuppgávu bæði við skattum og avgjøldum og teimum vinnuligu krøvunum. Á øllum hesum fyrisitingarligu økjum verður brúk fyri at seta í gildi og samskipa uppgávubýti og samarbeiði við aðrar myndugleikar og felagsskapir ella stovnar.

**Trygd, arbeiðsumhvørvi og tilbúgving (3.4)**

Leiti- og framleiðsluvirksemi á havinum krevur reglur um trygd, heilsu og arbeiðsumhvørvi. Gjørdar verða djúpar boringar undir høgum trýsti við vanda fyri spreingingum, sum tú ikki hevur tamarhald á. Viðgerðin av olju og gassi fer eisini fram undir høgum trýsti, og arbeiðsgongdin hevur við sær vanda fyri eldi og spreingingum. Hartil er sami váði í frálandsvinnu sum í vanligari skipaferðslu, og við Føroyar er hann ikki minstur.

***Reglur***

Myndugleikarnir mugu áseta karmar, sum virka við til, at oljuvirksemið fer forsvarliga fram. Ì øllum skeiðum hevur loyvishavin, fyristøðufelagið, verktakin og/ella undirverktakin ábyrgdina fyri trygd, arbeiðsumhvørvi og tilbúgvingarskipan.

Í kapitli 5 í uppskotinum til løgtingslóg um kolvetnisvirksemi, sum snýr seg um trygd, arbeiðsumhvørvi og tilbúgving v.m. fyri havstøð, fær Landsstýrið heimild til at gera kunngerðir, forskriftir og vegleiðingar, sum miða ímóti at lúka krøvini, ið sett verða fyri heilsu, umhvørvi og trygd.

*Tilbúgving*

Ein fyritreyt fyri kolvetnisvirksemi á havinum er ein tilbúgvingarskipan, ið kann tryggja mannalív, umhvørvi og virði.

Henda óhapp ella vanlukkur í sambandi við boring og framleiðslu á havinum, má loyvishavin (fyristøðufelagið) hava eina rakstrarmiðstøð, sum kann arbeiða í tøttum samstarvi við myndugleikarnar til tess at tryggja, at tamarhald fæst á tilburðinum bæði skjótt og væl, so skaðin á manning og umhvørvi verður sum minstur.

Sambært kapittul 5 í uppskotinum til løgtingslóg um kolvetni skal loyvishavin (fyristøðufelagið) skipa eina forsvarliga tilbúgving til tess at tryggja mannalív, umhvørvi og virði. Loyvishavanum (fyristøðufelagnum) verður í hvørjum einstøkum føri álagt at skipa eina tilbúgving fyri sítt virksemi, *áðrenn* loyvi verður latið at fara undir eina arbeiðsætlan.

Tað almenna má eisini hava sína egnu tilbúgvingarskipan, sum kann samskipast við skipanina hjá loyvishavanum til eina heild, sum tekur sær av fólki og umhvørvi, tá sjúka, óhapp ella vanlukka taka seg upp. Í hesum sambandi verður brúk fyri eini atgerðarnevnd.

*Kunngerðir og leiðbeiningar*

Kolvetnislógin eins og kunngerðir um innaneftirlit**,** váðalýsingar og tilbúgving verða grundkrøvini hjá myndugleikunum mótvegis loyvishavanum, fyristøðufelagnum, verktakum og undirverktakum.

Kravið um *innaneftirlit* hevur við sær, at pørtunum verður álagt at ganga eftir ávísum reglum til tess at tryggja, at ætlanirnar eru nóg dyggar, verða framdar í verki og røktar. Teir, sum hava arbeiðið um hendur, skulu eisini tryggja, at virksemið verður lagt til rættis, framt og røkt sambært teimum krøvum, sum verða ásett við lóg, kunngerðum, forskriftum og vegleiðingum eins og innanhýsis krøvunum hjá feløgunum.

Kravið um *váðalýsingar* (risikoanalyser) áleggur loyvishavanum (fyristøðufelagnum) at fáa til vega vitan um tann vanda, sum stendst av virkseminum, og á tann hátt fáa eitt grundarlag at taka avgerðir á sambært almennum og egnum trygdarkrøvum.

Kravið um *tilbúgving* fevnir um alt, sum ætlanin er at seta í verk til tess at verja menniskju, umhvørvi og virði, skuldi ein vandamikil støða ella vanlukka tikið seg upp, eitt nú eisini brádlig oljudálking. Talan kann verða um mong tiltøk, m.a. fráboðan, tiltøk at basa vandanum, bjarging, avflyting av manning og tiltøk at fáa viðurskiftini aftur í rættlag.

*Treytir fyri at fara ígongd*

Í kapitli 5, § 24 í uppskotinum til løgtingslóg um kolvetnisvirksemi verða sett ítøkilig krøv um innaneftirlit, váðalýsingar og tilbúgvingartiltøk mótvegis loyvishavum og fyristøðufeløgum. Á henda hátt verður á trygdarøkinum fingið til vega tað lógásetta grundarlagið at fara undir leiti- og metingarvirksemi. Á hesum grundarlag kunnu setast í gildi, kanska fyribils, mannagongdir fyri at góðkenna borieindir, sum skulu virka á føroyska landgrunninum.

*Umsiting av trygdar-, arbeiðsumhvørvis- og tilbúgvingaruppgávum*

Sum reglurnar eru, umsita fleiri myndugleikar uppgávur, ið kunnu hava

týdning fyri trygd v.m. í sambandi við kolvetnisvirksemi. Til tess at gera myndugleikum og loyvishavum, fyristøðufeløgum, verktakum og undirverktakum greitt, hvør ið ábyrgdina hevur, verður gjørd ein vegleiðing.

Loyvishavin (fyristøðufelagið) hevur skyldu til at fáa sær tey neyðugu loyvini frá teimum røttu myndugleikunum.

Oljufyrisitingin gevur í hvørjum einstøkum føri loyvishavanum (fyristøðufelagnum) loyvi til at fara undir virksemi og arbeiðsætlanir, t.d. í sambandi við leitiboringar og metingar, framleiðslu av kolvetnum og avrigging.

Skipað verður ein atgerðarnevnd**,** har ovasta leiðslan í avvarandi myndugleikastovnum situr, og henda nevnd kemur saman, um ein vanlukka hendir. Nevndin hevur umsjón við støðuni og skipar fyri, at landsins tilbúgvingarskipan verður lagað til viðkomandi støðu og samarbeiðir væl og virðiliga við loyvishavan (fyristøðufelagið). Aðrar uppgávur hjá atgerðarnevndini verða at hava samband við ella samarbeiða við myndugleikar í øðrum londum eins og at kunna ta politisku leiðsluna.

## 1.3.3 Oljan og føroyski búskapurin (4. partur)

Hvussu eitt møguligt oljuvirksemi tekur seg upp í Føroyum, og hvørja ávirkan tað fær á føroyskan búskap veldst nógv um sínámillum ávirkan millum føroyska samfelagið og altjóða oljuídnaðin.

Tað eru vónirnar um nøktandi fíggjarliga úrtøku, ið eggjar oljufeløgunum til at leita eftir og útvinna kolvetni úr føroysku undirgrundini. Somuleiðis eru tað útlitini til samfelagsbúskaparligar fyrimunir, ið fær samfelagið at skapa karmar um loyvi til slíka leiting. Kolvetnisvirksemið hevur soleiðis sum fortreyt eina vón um búskaparligar fyrimunir fyri báðar partar, bæði oljuídnaðin og samfelagið.

Í samspælinum millum oljufeløgini og føroyska samfelagið fara partarnir ikki bert at hava ynski og krøv. Hvør parturin sær fer eisini at hava okkurt at bjóða fram. Feløgini kunnu bjóða kapital og sakkunnleika í leiting, framleiðslu og virking av kolvetni. Luturin hjá føroyska samfelagnum verður serliga at veita møguleikar fyri leiting og framleiðslu, ella rættin til eftir nærri avtalaðum treytum at ráða yvir ávísum pørtum av tí møguliga kolvetnistilfeinginum. Í ávísan mun fara Føroyar at brúka teir vinnu- og arbeiðsmøguleikar, sum liggja í sjálvum oljuvirkseminum og teimum tænastuveitingum, sum hoyra til. Hetta kann eisini vera eitt úrslit av teimum óbeinleiðis inntøkuárinunum, sum oljuvirksemið fer at hava við sær, til dømis tá fólk brúka av privatum inntøkum, sum eru vunnar í oljuvinnuni, og tá tað almenna brúkar inntøkur, sum eru frá oljuskatti.

Samfelagið vil hava teir øktu valmøguleikarnar, sum standast av inntøkuframgongd. Mótvegis feløgunum verður neyðugt at raðfesta ynskini og krøvini, tí størri krøv á einum øki minka um møguleikarnar fyri at fáa onnur krøv ígjøgnum.

**Vinnumøguleikar í sambandi við oljuvirksemi (4.1)**

Tað er ein greið politisk stevna, at kolvetnisvirksemið skal leggjast soleiðis til rættis, at tað kann hava við sær fleiri føroyskar arbeiðsmøguleikar eins og vinnuligan vøkstur og vinnuligt margfeldni í bæði styttri og longri framtíð.

Teir vinnuligu møguleikarnir verða ymiskir í teimum fýra skeiðunum í eini

oljuverkætlan. Avmarkað er, hvussu nógv virksemi stendst av kanning og leiting, men útbyggingin og framleiðslan kunnu vera grundarlag fyri týðandi strategiskum vinnumøguleikum.

***Keypsskipanin hjá oljufeløgunum***

Stóra fallið í oljuprísinum, seinast í 1986, hevur fingið oljufeløgini til at vanda sær nógv um kostnaðin. Samstundis hevur oljuvinnan sett í verk fastar mannagongdir fyri, hvussu innkeyp og útbjóðingar fara fram. Hesar mannagongdir fevna um eina forkvalifikasjón, tvs. nøkur objektiv minstukrøv fyri at sleppa upp í part at bjóða upp á eitt ávíst arbeiði. Hesi krøv siga eitt sindur um tey serligu krøv, sum oljuvinnan setir:

- Krøv til góðskukervi
- Krøv til stýring viðvíkjandi heilsu, umhvørvi og trygd
- Handilslig/fíggjarlig krøv
- At svara spurnartalvu á diskli.

***Tøk føroysk arbeiðsmegi***

Við ársenda 1996 varð føroyska arbeiðsmegin mett til 20.300 fólk. Av teimum var talið á arbeiðsleysum gjørt upp til 2.100, sum svarar til umleið 10%.

Útbúgvingarstigið í Føroyum svarar til útbúgvingarstigið í Norðurlondum annars. At fleiri uppá seg hava sjómansútbúgvingar í Føroyum kann metast sera hóskandi í sambandi við oljuvinnuna.

Yvirhøvur hava fólk við hægri útbúgvingum brúk fyri skeiðum omaná sína egnu útbúgving til tess at nema sær førleika til oljuvinnuna. Fólk við sjóvinnu- og handverksútbúgvingum kunnu við eitt sindur av eftirútbúgving fáa arbeiði í oljuídnaðinum. Tann neyðuga eftirútbúgvingin fevnir t.d. um trygdarskeið, ítøkilig skeið ella venjing til uppgávur á havstøð ella á útgerðarstøð.

Tað, sum serliga kann væntast at geva føroyingum arbeiði innan oljuídnaðin skjótt, er, at feløg fara at stovna skrivstovur í Føroyum, og at brúk verður fyri fólki í sambandi við eina útgerðarstøð og flutning yvirhøvur. Føroyingar kunnu eisini vera við til at manna boripallar og boriútbúnað.

Longu nú fáa føroyingar størv í oljuídnaðinum uttanfyri Føroyar. Teir fáa royndir, sum kunnu koma teimum til góða, søkja teir arbeiði í eini møguligari komandi oljuvinnu í Føroyum.

***Hvat hevur føroyskt vinnulív at bjóða oljuvinnuni***

Føroyska vinnulívið er merkt av, at fiskivinna, aling og fiskavirking í áratíggju hava verið høvuðsvinnan, sum meginparturin av tí føroyska ídnaðinum hevur tilknýti til. Kring virkini í fiskivinnuni hava sjálvsagt eisini tikið seg upp fleiri handverks-, ídnaðar- og tænastufyritøkur. Vinnan kann tí við eini ávísari tillaging verða før fyri at lata oljuvinnuni vørur og tænastur.

Síðani farið varð undir forkanningarnar summarið 1994, hava einstøk útlendsk fyristøðufeløg brúkt føroyskar tænastur. Vanliga fatanin er, at royndirnar hava verið góðar.

Ein fyrimunur við at hava útgerðarstøð og tyrlustøð í Føroyum er, at hetta gevur nógv annað virksemi. Í mongum førum verða ikki stór krøv sett til hetta "annað virksemi". Hetta er samstundis tað slagið av virksemi, sum hvørvur í

somu løtu, oljuvirksemið heldur uppat í Føroyum.

Skulu føroyskar ídnaðar- og tænastufyritøkur gera seg galdandi sum útvegarar í tí meiri kravmikla partinum av framtíðar frálandsvinnu, er neyðugt at arbeiða miðvíst við førleikanum. Tað mest ítøkiliga og viðkomandi kravið, sum fyritøkurnar longu nú kunna arbeiða við, er at leggja til rættis góðskustýringarskipan. Hetta stig er ikki burturspilt, tí tað fer at bøta um kappingarførið hjá fyritøkunum yvirhøvur, sama um ella nær olja verður funnin.

***Stovnseting og vøruflutningur***

Skulu oljufeløgini arbeiða trygt og forsvarliga við møguleika fyri góðum sambandi við teir røttu myndugleikarnar og hóskandi fyriliti fyri heilsu, umhvørvi, trygd, og tilbúgving, mugu tey sita nær virkseminum. Ein avleidd fylgja av hesum verður, at loyvishavarnir lata virksemi sítt ganga út frá Føroyum, og verkætlanir teirra fáa tænastur frá eini útgerðarstøð.

Tá framleiðslan kemur fyri, fer tað at krevja fastar støðir, men í leititíðini fer oljuídnaðurin at góðtaka nógv minni av tøkari útgerð. Ikki er neyðugt at hava tilfar á goymslu til alt møguligt, men tess meiri útgerð er á goymslu, tess betri fyri brúkaran.

Mesti parturin av tí neyðugu útgerðini og annað, sum t.d. serlig boriútgerð, pumpur, borimóra og eykalutir, má flytast til landið. Tilfar, sum kann fáast beinleiðis í Føroyum, er eitt nú brennievni, vatn og matvørur.

Fleiri havnir, sum eru, kunnu við avmarkaðum íløgum í eitt nú skrivstovu- og goymsluútbúnað til borimóru og lyftingarorku lúka tey krøv, sum sett verða eini útgerðarstøð.

Í leitiskeiðinum eigur tann útbúnaður, sum er, at verða nýttur, eins og gjørt er í kanningarskeiðinum síðani 1994.

Tað er ein fyrimunur, um undirútvegarar hjá útgerðarstøðini sita nærhendis henni. Verður støðin spjadd kring um í Føroyum, og samferðslan annars virkar væl, kanst tú meta framboðið av tænastum til slíkt støðarvirksemi sum eitt størri net av fyritøkum.

Flutningurin av tilfari til og frá leitivirkseminum kann gerast við einum veitingarskipi. Fólkið verður fyri tað mesta flutt við tyrlu. Eitt nýtíðar veitingarskip er eitt ógvuliga serútgjørt far. Hjálpar- og vaktarskipini eru ikki so sergjørd. Fleiri føroysk fiskiskip hava eftir neyðuga umbygging longu átikið sær uppgávur sum tilbúgvingarskip. Til hvørja boring verður vanliga brúkt eitt hjálpar- og vaktarskip við upp til 8 fólkum.

***Flutningur loftvegis***

Loftflutningurin er ein týðandi partur av samskiftinum í oljuvirksemi. Tørvur er á at flyta fólk og farm, sum hevur skund, til og frá økinum, har virksemið er.

Fyri føroyska samfelagið verða fyrimunirnir í, at loftferðslan til og frá frálandsútbúnaðinum gongur um føroyskan flogvøll:

- Munagott eftirlit við inn- og útferð: Umsitingarliga gevur tað betri eftirlit við komandi og farandi ferðslu á føroyskum øki.
- Vanlukkutilbúgving: Tað er trygdarligur fyrimunur at hava tyrlutilbúgving skipaða í Føroyum.
- Føroyskt loftferðsluvirksemi: Vinnuliga verður latið upp fyri eini týðandi

menning av føroyskari loftferðslu og virksemi, sum av tí stendst.

- Arbeiði: Menningin av føroyskum loftferðsluvirksemi hevur beinleiðis arbeiði við sær og eisini arbeiði í avleiddum virksemi. Tyrlustøð í Føroyum eggjar til at seta føroyska arbeiðsmegi á frálandsútbúnaðin.

Floghavnin í Vágum er einasta altjóða góðkenda floghavn í Føroyum. Tann útbúnaður, sum er á flogvøllinum, røkkur til tyrluvirksemið í byrjanini av eini oljuvinnu. Verður virksemið størri, verður neyðugt at gera íløgur í meiri útbúnað.

Beinleiðis arbeiði verður í byrjanini ikki stórt meir enn í dag, men longur frammi fer loftvegis flutningurin at kunnu geva nógv nýggj arbeiðspláss.

***Møgulig tiltøk at fremja arbeiði og veitingar***

Í uppkastinum til uppskot um løgtingslóg um kolvetnisvirksemi verður § 10 soleiðis orðað:

*"Í loyvum eftir § 6 verða reglur ásettar um brúk av føroyskari arbeiðsmegi, veitingar og tænastur frá føroyskum fyritøkum, um útbúgvingar v.m., umframt hvaðan loyvishavin rekur virksemi sítt."*

Fortreyt er, at virksemið hjá loyvishavanum sæst aftur í *einum veruligum búskaparligum virksemi í Føroyum* sum arbeiðspláss í Føroyum og við veruligari virðisøking ella einum íkasti í føroysku samfelagsframleiðsluna. Loysnir, sum hava í sær uppbygging av føroyskum førleika til at skapa virðisøking og arbeiði samsvara væl við ætlanirnar við lógartekstinum. Veitingar frá feløgum, sum bert eru skrásett í Føroyum sum eitt eiti, meðan tað veruliga arbeiðið og tann veruliga virðisøkingin liggja uttanfyri Føroyar, lúka ikki fortreytirnar. Eisini lýkur veruligt tænastu- og framleiðsluvirksemi fortreytirnar betri enn reint handilsvirksemi, og handilsvirksemi lýkur tær betri enn reint umboðsmannavirksemi. Havast skulu eisini í huga tær lønir og virkisánarainntøkur, sum ein veiting leggur eftir seg í Føroyum, og sum aftur kunnu elva til avleiddan eftirspurning, framleiðslu og arbeiði í Føroyum.

*Tørvur* Føroya á virðisøking og arbeiði kann verða eitt sindur ymiskur, alt eftir hvussu tíðirnar eru og teimum broytingum, sum standast av oljugongdini í Føroyum. Í dag merkist týðiligur tørvur á at skapa arbeiðspláss og virðisøking, men tekur eitt búskaparligt virksemi seg upp í kjalarvørrinum av týðandi oljufundum, verður áneyðin ikki so stór at fremja arbeiði og framleiðslu. Summar veitingar kunnu verða so stórar og dýrar, at tað kann elva til ólag í føroyska búskapinum og á føroyska arbeiðsmarknaðinum, um so er, at roynt verður at lata tær heilt ella partvíst úr Føroyum.

Nøkur krøv verða hildin at vera vælgrundað, longu áðrenn vinnuliga fyrilitið kemur fyri, og mugu tí væntast at verða millum tær almennu treytirnar í sambandi við eitthvørt útbjóðingarumfar. Tey eru eitt nú hesi:

- Tá loyvi verður latið, verður roknað við, at loyvishavin stovnar felag ella deild her á landi.
- Leitivirksemi krevur, at fyristøðufelagið setur seg niður her.
- Tá borað verður krevst, at trygdarútgerð og annað verður goymt og at útgerðarstøð í Føroyum verður brúkt.
- Fólkaflutningur til og frá boripalli fer um føroyska floghavn.
- Skulu fundir útnýtast, verður ein fyritreyt, at kolvetnið verður flutt í land í

Føroyum, uttan so at undantak verður gjørt frá hesum kravi.

Skulu onnur serlig ynski ella krøv setast fram í sambandi við fyrsta útbjóðingarumfar, veldst tað um støðuna, sum er, tá avgerðin um at bjóða út verður tikin. Kortini kann undir øllum umstøðum roknast við, at í hvørjum einstøkum útbjóðingarumfari verða í tilfarinum og loyvunum orðingar um, at loyvishavin brúkar føroyska arbeiðsmegi og veitingar frá føroyskum fyritøkum.

Reglur um samfelagsbúskaparligar fyrimunir til Føroyar og kanska hartil hoyrandi átøk innan útbúgving o.t. standa vanliga í avtalum, sum greina tær meiri almennu treytirnar frá myndugleikunum og lyftum frá oljufeløgunum. Fylgjast skal við í hesum gjøgnum fráboðanarskipanir og við metingum av støðuni, tá høvið býðst.

Ásetingar um búskaparligar fyrimunir skulu orðast og setast í verk, m.a. við atliti til tey serligu viðurskiftini í Føroyum, harímillum at føroyskt vinnulív í byrjunarstøðuni er heldur illa fyri, og við atliti til stovnsligar bindingar í sambandi við ríkisfelagsskapin við Danmark og millumlanda skyldur.

Roknað verður við nógvum fyrisitingarligum arbeiði bæði hjá oljumyndugleikunum og hjá øðrum vinnumyndugleikum. Hetta arbeiði eigur at verða gjørt í tøttum samstarvi við vinnulívið og tess feløg. Harafturat eigur útbúgvingar- og vinnulívspolitikkurin alment at verða soleiðis, at hann stuðlar upp undir royndirnar at fáa samfelagsbúskaparligar fyrimunir úr eini møguligari oljuvinnu.

**Føroyskt oljufelag (4.2)**

Ein máti hjá føroyingum at sleppa upp í møguligt oljuvirksemi á føroyska landgrunninum er at luttaka við egnum oljufeløgum. Í dag hava føroyingar hvørki nóg stóran kunnleika, royndir ella kapital. Møguleikarnir fyri, at hetta sum frá líður kundi verið fingið í lag gjøgnum privat oljufeløg, tykjast ógvuliga óvissir. Hinvegin tykjast møguleikarnir betri at skipa eitt alment oljufelag, soleiðis sum vit vita um í grannalondum, ið hava oljulóggávu, ið líkist tí, sum skotin verður upp fyri Føroyar.

Afturat uppgávuni sum handilsligt oljufelag við einum fyri ein part samfelagsbúskaparligum setningi kundi eitt alment oljufelag tikið sær av øðrum uppgávum. Felagið gevur ikki inntøkur í fyrstani. Tvørturímóti kann tað skerja skattingarmøguleikarnar hjá landskassanum. Í fyrstani má roknast við, at almenna felagið fær bara smáar samtakspartar. Roknast má eisini við, at felagsins ávirkan á avgerðirnar í samtakinum verður lítil. Felagið kann veita føroyska samfelagnum eitt ávíst innlit í raksturin afturat tí, sum eftirlitsmyndugleikarnir fáa. Felagið hevur neyvan týdning fyri møguleikarnar hjá føroyingum at fáa neyðuga olju og neyðugt gass. Tað kunnu vit tryggja okkum annan veg, sjálvt við ongum felagi. Eitt oljufelag kann, serliga óbeinleiðis, virka við til at skunda undir føroyskar veitingar og arbeiði til føroyingar. Hetta kann tó helst eisini tryggjast aðrar vegir. Tað verður avmarkað, hvussu nógv felagið kann ávirka veitingarmynstrið beinleiðis, men góð óbeinleiðis ávirkan kann hugsast. Eitt alment felag fer, gongur tað væl fíggjarliga, í longdini at kunna virka við til at fremja langfreistað samfelagsbúskaparlig mál olju viðvíkjandi.

Ognarmyndilin, sum her er greitt frá, er eitt felag, sum tað almenna eigur, og har einstaklingar kanska sum frá líður kunnu verða bodnir at seta í. Í longdini kann ein eisini hugsa sær fullkomna ella partvísa privatisering, men har fer spurningurin um at tryggja føroyska ávirkan at troka á. Byrjunarkapitalurin og hallið mugu tey fyrstu árini koma um landsins fíggjarlóg, meðan luttøkan í oljuleitingini verður goldin av teimum handilsligu feløgunum og útbyggingin við lántøku. Í longri framtíð kann tann danska skipanin við einum samarbeiði millum eitt statsfelag og eitt privat felag um eitt felags fyristøðufelag umhugsast.

Ikki fyrr enn farið er undir leitiskeiðið, verður greitt, um *grundarlag* er fyri at stovna eitt alment felag.

Syrgjast má fyri, at felagið fær professjonella leiðslu, og at felagið rekur samfelagsgagnligt virksemi við ábyrgd mótvegis politisku skipanini. Tað kann tí vera skilagott at taka sær ta tíð, sum neyðug er, til at fyrireika felagsins skipan.

Ein máti kann vera, at tað almenna í loyvunum tryggjar sær *rætt (optión)* til luttøku. Tað ger, at avgerðin um at luttaka kann takast á dyggast møguligum vitanargrundarlag, og gevur eisini tíð til gjølla at fyrireika eina slíka luttøku, tá stundin er komin.

**At føra kolvetni í land (4.3)**

Eitt mál, sum kann gerast aktuelt sum frá líður, er at føra olju og/ella gass í land í Føroyum.

Hóast ítøkilig støða til hendan spurning ikki nýtist at takast fyrrenn í

framleiðsluskeiðinum, hava oljufeløgini longu fyri fyrsta útbjóðingarumfari brúk fyri at vita, hvat myndugleikarnir halda um spurningin.

Teir tøkniligu møguleikarnir fyri at føra í land eru rørleiðingar ella tangaskip. Í báðum førum skulu gerast útbúnaðir á landi til at goyma og viðgera kolvetni. Í Føroyum eru pláss, har tað ber til at gera útbúnað til kolvetni.

Flutningurin av ráolju og gassi í land hevur ongan týdning fyri okkara møguleikar at fáa virkaða olju og virkað gass til vanlig brúk. Tað kann tryggjast á annan hátt, men verða olja og gass flutt í land í Føroyum, tryggjar tað eina sjálvstøðuga menning innan leiting og framleiðslu á Føroyagrunninum, sum er óheft av undirstøðukervinum og flutningsmøguleikunum á landgrunninum hjá grannalondunum. Flutningur í land fer eisini at tryggja eina menning í vinnulívinum, sum hevur við sær avleidda ávirkan á arbeiðsmøguleikarnar, skattainntøkurnar v.m.

Men vansar verða eisini. Vinnubúskapurin kann verða ovhitaður. Afturat koma fylgjur fyri umhvørvið, bæði inntriv í landslagið, har oljan skal koma upp á land, og størri vandi fyri dálking í fjøruni og har nærhendis.

Vilja oljufeløgini sleppa at føra oljuna í land, eru fleiri spurningar at hava í huga, eitt nú hvar leiðin liggur, hvussu stór framleiðslan er, tøkniligu flutningsmøguleikarnir, og um tað loysir seg at føra í land heldur enn at brúka aðrar møguleikar.

Til virki á landi er gjørt í Føroyum, ella so leingi myndugleikarnir ikki hava tikið endaliga støðu til at føra í land, verður neyðugt at kunna geva undantaksloyvi frá skylduni til at føra í land. Men eisini eftir at eitt virki er gjørt, kann tað koma fyri, at undantaksloyvi verður givið til ikki at føra kolvetni í land.

Tá avgerð um at føra í land skal takast, eiga tey umhvørvisligu sjónarmiðini at vera greinað og fáa tann ans, sum tað áliggur og sømir seg eini fiskivinnutjóð, ið eisini í framtíðini verður heft at fiskivinnu og fiskiídnaði.

**Útbúgving í sambandi við oljuvinnu (4.4)**

Møguleikarnir hjá føroyskari arbeiðsmegi og fyritøkum í einum møguligum oljuídnað á føroyskum øki eru nær tengdir at spurninginum, um at eiga tær røttu útbúgvingarnar eins og førleikanum hjá útbúgvingarverkinum og tess møguleikum til at stilla seg um til nýggj krøv.

Tøkniliga menningin krevur breiðar útbúgvingar, sum kunnu dagførast skjótt. Av tí, at tað er ídnaðurin, sum orðar krøvini til útbúgvingarnar, hevur tað týdning, at tætt samband er millum ídnaðin og útbúgvingarstovnarnar.

Tey førleikakrøv, sum oljuvinnan setir, laga seg eftir, hvat skeið í verkætlanini talan er um. Í leitiskeiðinum kann ikki roknast við serliga stórum virksemi ella tørvi á útbúnari arbeiðsmegi, og tær flestu uppgávurnar í sambandi við leitiboringar krevja servitan og vara rættiliga stutt. Eyðkent fyri útbyggingarskeiðið er, at virksemið er stórt og umskiftandi í rættiliga stutta tíð, meðan virksemið í framleiðsluskeiðinum verður minni enn í útbyggingarskeiðinum, men afturfyri meira støðugt og varandi.

Tá hugsað verður um, hvussu føroyska samfelagið er til støddar, og hvussu lítil arbeiðsmegin er, er greitt, at føroyingum ber ikki til at verða uppi í øllum lutum. Tí má veljast burtur úr í útbúgvingarpolitikkinum.

Til tess at skunda undir útbúgving, sum kann brúkast í oljuvinnu, er natúrligt í

sambandi við loyvissamráðingar gjøgnum arbeiðstilboð, upplæring og útbúgvingartilboð at binda oljufeløgini til at tryggja møguleikar fyri bøttum førleika hjá bæði privat og alment settum.

**Oljuskatting (4.5)**

Tað hevur stóran týdning, hvussu skattareglurnar fyri eitt møguligt kolvetnisvirksemi í Føroyum verða evnaðar til. Heilt nógv kann verða at skatta. Skattur og aðrar inntøkur til tað almenna verða óivað meginparturin av inntøkunum hjá føroyska samfelagnum frá einum møguligum oljuvirksemi. Samstundis kann tilevningin av skattareglunum fáa avgerandi týdning fyri áhugan hjá oljufeløgunum fyri føroyska økinum.

Stevnan fyri føroysku oljuskattareglunum verður sett saman av ymiskum lutum. Øðrumegin vil landið tryggja sær sum mest í skattainntøku, sum helst kemur skjótt inn og fellur javnt og samt. Hinvegin má ikki verða gloymt, at eru vit ov ágrýtin eftir at hækka og framskunda inntøkurnar, kann tað ávirka atburðin hjá oljufeløgunum á ein hátt, sum virkar ímóti hesum royndum. Eisini skulu ynskini um mestu inntøku metast saman við ynskjum um aðrar fyrimunir, t.d. vinnuligar.

Til tess at fáa sum mest í skatti, verða ofta fleiri skattapolitisk amboð tikin í nýtslu. Upp ímóti hesum stendur ynskið - ikki minst frá oljuídnaðinum - um at skipanin skal vera einføld og greið.

Ein fastur táttur í einihvørjari skattaloysn er partafelagsskatturin. Ómaksgjøld til at rinda kostnaðir verða eisini støðug.

Onnur fyribrigdi sum víddar- og framleiðsluavgjøld (royalties), ið ikki laga seg eftir skiftandi vinningsføri, verða ymisk frá øki til øki og/ella frá útbjóðingarumfari til umbjóðingarumfar, alt eftir oljuútlitunum, tá boðið verður út, og landskassans fíggingartørvi.

Ein møguligur serskattur á inntøkur frá kolvetnisframleiðslu kann einans hugsast sum eitt varandi fyribrigdi frá fyrstu tíð, um so er, at hesin skattur verður evnaður soleiðis til, at hann ógvuliga neyvt fylgir teimum broytingum, sum kunnu vera í vinninginum frá eini oljuverkætlan. Skal ein slíkur skattur vera við longu frá fyrsta útbjóðingarumfari, tá óvissan er stór bæði um olja finst, um útbyggingarkostnað o.s.fr., er best at bíða við at taka støðu til tað beint undan umfarinum.

Í sambandi við at fyrsta útbjóðingarumfar verður fyrireikað, kann støða takast til, hvørjar skattareglur skulu galda fyri framleiðsluvirksemi og annað virksemi á føroyskum landgrunni.

Brúk verður fyri lóggávu, sum tekur alt virksemi í sambandi við kolvetnisleiting og -framleiðslu á føroyska landgrunninum undir vanliga føroyska skatting. Nevndin er í ferð við at gera uppskot um hetta.

Hvat skatting av inntøku frá sjálvum framleiðsluvirkseminum viðvíkir, verður í ávísan mun brúk fyri serreglum, tí virksemið er so serligt. Tað er drúgt, krevur nógv fæ og er heimsumfatandi.

Tá skattastigið fyri framleiðsluvirksemi skal ásetast, verður neyðugt at finna eina javnvág millum øðrumegin ynskið um í mest møguligan mun at fáa fatur á tilfeingisrentuni, t.e. vinningur út um tað vanliga, ið fæst burtur úr at útnýta samfelagsins kolvetnisríkidømi, og hinumegin ta heimsumfatandi kappingina um

leitiorkuna hjá teimum handilsligu oljufeløgunum.

**Samfelagsbúskaparligar avleiðingar (4.6)**

Í løtuni ber *ikki* til at gera álítandi metingar um, hvørjar samfelagsbúskaparligar avleiðingar standast av, at føroyski landgrunnnurin verður latin upp fyri leiting eftir kolvetni og síðani framleiðslu úr møguligum fundum. Til tess er ov nógv óvist. Fyri tað fyrsta er tað óvist, hvussu stórt eitt *møguligt* leitivirksemi verður, og hvussu nógv føroyingar verða uppií. Møguleikarnir fyri at finna olju eru óvissir, eins og tað er óvist, hvussu skjótt leitingin fer fram, hvussu *møguligir* fundir verða útbygdir, og hvør føroyski parturin verður í tí. Loksins verður eitt *møguligt* framleiðsluskeið merkt av óvissu um, hvussu stór framleiðslan verður, hvussu prísirnir verða, hvussu leingi framleiðslan fer at vara, og hvør føroyski luturin verður í hesum.

Í frágreiðingini verður tí bert roynt at sipa til umleið støddir, sum kunnu ætlast, tá tað snýr seg um hugsandi leiti**-,** útbyggingar- og framleiðslugongd.

Tær búskaparligu avleiðingarnar fyri Føroyar verða serliga hesar:

- Loyvishavarnir skulu gjalda ómaksgjøld, avgjøld og skatt,
- føroyingar fáa beinleiðis arbeiði hjá loyvishavum og teirra undirútvegarum,
- føroyskar fyritøkur, sum lata til oljuvinnuna, fáa inntøkur og skulu eins og føroyskir løntakarar gjalda skatt til tað almenna,
- og loksins skulu ikki-føroysk feløg og løntakarar, sum hava inntøku av virksemi á føroyska landgrunninum, gjalda skatt til tað almenna í Føroyum.

Afturat hesum *beinleiðis* búskaparligu árinum frá eini møguligari oljuvinnu, verða eisini bæði góð og ring *óbeinleiðis* árin.

Avleiðingarnar av oljuvinnuni verða ymiskar frá skeiði til skeið.

Í forkanningarskeiðinum higartil hevur høvuðsvirksemið verið at skjóta seismikk, sum ikki ger nógv um seg í Føroyum.

Í leitiskeiðinum, sum nú verður fyrireikað, verður roknað við, at seismikkvirksemið verður størri, og harafturat koma leitiboringar v.m., sum kunnu hava eitt ávist arbeiði og umsetning við sær í Føroyum, men ávirkanin á arbeiðsstøðuna í landinum og búskapin sum heild verður mett at vera rættiliga lítil.

Finna feløgini olju, verður farið undir eitt metingarskeið við størri borivirksemi.

Útbygging av olju- ella gassfundum kann hava við sær nógv virksemi tey 2-5 árini, oljuleiðin verður bygd út. Búskaparliga árinið í Føroyum veldst um tær tøkniligu loysnir, ið valdar verða .

Hvat árin útbygging til havs fer at hava á føroyskan búskap veldst um, hvussu nógv føroyingar eru uppi í sum útvegarar.

Skal gass førast í land í Føroyum, verður neyðugt við eini rørleiðing. Olja kann førast í land í tangaskipum ella gjøgnum rørleiðingar. Skal oljumóttøkustøð byggjast, kann tað hava so nógv virksemi við sær, at neyðugt verður at seta í verk tiltøk til at tálma virksemið.

Samfelagsbúskaparliga verður tann føroyski áhugin fyri at fáa arbeiði í eini stuttari byggitíð í longdini minni enn fyri at sleppa at manna útbúnaðirnir í tí

meiri varandi rakstrarskeiðinum.

Framleiðsluskeiðið fer at hava við sær, at føroyingar varandi kunnu fáa arbeiði á frálandsútbúnaði, á rakstrardeplum uppi á landi og hjá føroyskum og útlendskum fyritøkum, sum á ymiskan hátt skulu arbeiða fyri virkini. Tær maritimu uppgávurnar, tilbúgving (standbyskip) og veitingar (supplyskip v.m.) kunnu geva vinnumøguleikar og arbeiði. Eitt møguligt alment oljufelag kann av álvara fara upp í virksemið.

Tá nøkur ár eru farin av framleiðsluskeiðinum, verður eisini møguleiki fyri almennum inntøkum sum avgjøld av teimum framleiddu kolvetnunum og skattur á sjálvari oljuframleiðsluinntøkuni eins og møguligt yvirskot av einum almennum oljufelag. Inntøkurnar verða ógvuliga ymiskar, og ikki kann sigast frammanundan, nær tær verða. Ein máti at handfara hendan trupulleikan er at koyra inntøkuna í ein serligan grunn, sum verður hildin uttanfyri vanligu fíggjarlógina hjá landskassanum.

Verða stórar oljuskattainntøkur brúktar, kann tað hava við sær búskaparligar javnvágar- og bygnaðartrupulleikar, sum kunnu fáa óheppið árin á føroyskan búskap, eitt nú kann vinnulív, sum ikki hevur við olju at gera, gerast veikari.

Tá metast skal um, nær hesin trupulleikin kann fáa týdning, eigur at verða minst til, at av avtaluni millum Føroya Landsstýri og stjórn Danmarkar frá 22. desember 1992 og seinni avtalum skilst, at stjórnin hevur lagt við, at oljuskattainntøkur fyrst og fremst skulu brúkast til at minka um skuld landskassans til statskassan, og tær fara eisini at elva til samráðingar um at minka statsins útreiðslur til Føroya.

Tað beinleiðis búskaparliga árinið av oljuvinnuni fer helst bert at vísa seg í stigum, so hvørt sum vinnan tekur seg fram.

Tey óbeinleiðis árinini kundu kortini komið fyrr, tí sjálvar *vónirnar* um oljuinntøkur kunnu eggja fólki til spekulanta atferð, sum t.d. kundi ávirkað prísin á jørð og aðrari fastari ogn upp eftir og havt við sær, at eigararnir settu sítt brúks- og íløguvirksemi upp.

Vónirnar um øktar skattainntøkur frá oljuni ella avleiddum virksemi kunnu eisini ávirka politikararnar til at seta meiri ferð á almenna virksemið, møguliga við læntum pengum. Av tí, at oljuskattainntøkur eru sera óvissar, kann slíkur atburður seta føroyska samfelagið verri fyri, enn tað hevði verið við ongum oljuvánum.

Verða leitiloyvi givin í 1998, fara tey í fyrsta umfari at hava við sær leitivirksemi við boringum og tílíkum árini 1999 til 2005. Verður olja funnin í rakstrarverdum nøgdum, t. d. árið 2003, kann fundurin útbyggjast árini frá 2005 til 2008, tá framleiðslan kann byrja.

Olju- og gassnøgdir kunnu bert útnýtast eina ferð, og tá ein leið er útvunnin í 10-30 ár, loysir tað seg ikki at gera meir við hana. Men munur er á, hvussu leingi ein einstakur fundur kann vara, og hvussu leingi tað kann loysa seg at framleiða úr einum heilum oljuøki.

Verða olja og/ella gass funnin undir Føroyum, verður talan neyvan bert um eina leið. Heldur verða Føroyar eitt kolvetnisøki, har nýggjar størri og smærri leiðir verða funnar, sum tíðin líður.

Royndirnar frá oljuøkjum, sum higartil eru útbygd, til dømis í Norðsjónum, benda á, at eitt heilt oljuøki kann vera virkið í eitt tíggjuára skeið fyri og annað eftir.

Hóast kolvetni, mótsatt fiski og hvali, bert er eina ferð og ikki endurnýggjar seg sjálvt alla tíðina, verður neyvan nakað frá natúrunnar hond - um so er, at føroyskt oljuøki verður útbygt - sum forðar fyri, *at kolvetnið kann verða eitt búskaparliga áhugavert tilfeingi fyri Føroyar í minst eini tvey ættarlið.*

At leggja ætlanir nú fyri tíðina, sum kemur eftir oljuøldina, er til fánýtis, tí so nógvar fortreytir verða broyttar til ta tíð. Verða Føroyar eitt oljuland, verður tað undir øllum umstøðum skilagott at umhugsa tiltøk til tess at varðveita fiskivinnuna so væl sum gjørligt, at vera við í virksemi uttanfyri Føroyar, sum hevur við oljuvinnu at gera, menna ikki-tilfeingisgrundaðar vinnur eins og at spara upp fæ, sum kann setast í peningakrevjandi vinnur og/ella verða standandi uttanfyri Føroyar við tí fyri eyga at gera tann føroyska búskapin tryggari í longdini.

## 1.3.4 Ávirkan frá oljuvirksemi (5. Partur)

**Fiskvinna og aling (5.1)**

Av tí, at fiskivinna og fiskiídnaður hava so stóran týdning fyri tað føroyska samfelagið, er tað týdningarmikið at leggja oljupolitikkin soleiðis til rættis, at fiskivinna og oljuídnaður kunnu arbeiða saman ella nærhendis hvør øðrum við minst møguligum vansum fyri fiskivinnuna.

Tær ósemjur, sum kunnu taka seg upp, av tí at oljuídnaður og fiskivinna arbeiða á somu leiðum, standast einamest av stríði um leiðir, men eisini av at fiskireiðskapur verður oyðilagdur og sjógvur dálkaður.

Stríð kann taka seg upp um leiðir orsakað av seismiskum skipum, boripøllum, framleiðslupøllum, tangaskipum eins og brúki av trygdarútbúnaði og fráfarnum boriholum, hjáholum, greinrørum, brunnrammum og ymiskum rørleiðingum.

Stríð um leiðir millum ymiskan fiskireiðskap er væl kent, og í Føroyum hava vit nógvar royndir at viðgera krøvini hjá standandi og drignum reiðskapi um leiðirnar. Á sama hátt hava vit í tí seismiska virkseminum higartil lagt okkum eftir at elva til sum minst av stríði millum fiskiveiðu og seismikk.

Tey fýra skeiðini í eini oljuverkætlan hava ymiskt árin á fiskivinnuna, og tey bøtandi tiltøkini verða tí eisini ymisk tey fýra skeiðini.

***Forkanningarskeiðið***

Einki seismiskt virksemi er loyvt undir Føroyum í tíðarskeiðinum frá 1. november til 15. apríl. Norðanfyri og vestanfyri Føroyar, tvs. á gýtingargrunnunum hjá nøkrum av teimum mest lønandi fiskasløgunum, er ikki loyvt at skjóta seismikk frá 1. november til 31. juli innanfyri 100 metrar dýpdarkurvuna, og á Føroya Banka verður ikki givið loyvi innanfyri 200 metra dýpdarkurvuna í tíðarskeiðinum frá 1. november til 31. juli.

Til tess at sleppa undan at fiskiskip og seismisk kanningarskip koma í trol, hevur í forkanningartíðini verið álagt loyvishavunum at hava ein fiskivinnusakkønan, sum myndugleikarnir hava ávíst, umborð á kanningarskipinum. Hansara uppgáva er at hava samband við bæði fiskiskip og fiskivinnumyndugleikarnar til tess at tryggja, at skipini ikki gera hvørjum øðrum fortreð.

Í loyvunum er eisini áløgd loyvishavunum ein almenn skylda at hava fyrilit fyri

fiskiskapinum. Eitt kort, sum vísir, á hvørjum leiðum nógvur fiskiskapur er ávísar árstíðir, fylgir við loyvinum.

Tann skipanin, sum varð fingin í lag í 1994, hevur víst seg at rigga.

***Leitiskeiðið***

Leitiskeiðið byrjar vanliga við seismiskari skjóting í teimum økjum, sum oljufeløgini hava fingið lutað til, og vanliga verður lagt fyri við umfatandi 2D og 3D kanningum á avmarkaðum økjum.

Nýggjari gransking um fylgjurnar av seismiskum kanningum á havinum sigur, at vandin er ikki so stórur fyri rogn, larvur og yngul. Hinvegin verður mælt til avmarkingar, til tess at ikki seismiskar kanningar skulu vera orsøk til fíggjarlig tap hjá fiskimonnum, og mælt verður til, at ongin seismisk skjóting verður á gýtingargrunnunum í gýtingartíðini. Hetta er serliga galdandi fyri fiskasløg, sum hava smá gýtingarøki og ferðast tætt.

Leitiboringar verða gjørdar við boripøllum, sum kunnu flytast. Ein slíkur pallur brúkar við trygdarøki eitt umráði, sum er 500 metrar. Er pallurin uppvarpaður, er eisini eitt uppvarpingarøki, har alt virksemi er bannað. Hvussu stórt uppvarpingarøkið er, veldst um, hvussu dýpið er. Akkersketurnar eru vanliga fýra-fimm ferðir dýpið, har pallurin er uppvarpaður.

Hvørjar fylgjur tað fær fyri fiskivinnuna, at oljuvinnan leggur seg á øki, er ymiskt, alt eftir hvat slag av reiðskapi verður brúkt - drigin reiðskapur, sum nót og trol, ella standandi reiðskapur, sum gørn og lína.

***Útbyggingar- og útvinningarskeiðið***

Hvørjar avleiðingar útbygging og útvinning fáa fyri fiskivinnuna, veldst um, hvussu útbygt verður. Rákið er nú, at brúktur verður alt meiri útbúnaður á havbotninum, sum er knýttur upp í flótandi framleiðslueindir ella støðugan móðurpall. Flutningsmátin fær eisini ávirkan á fiskivinnuna. Oljan kann verða flutt við tangaskipi ella gjøgnum rørleiðing.

Meðan bygt verður, verður brúk fyri meiri øki, eitt nú orsakað av bráðfeingis banni fyri at varpa upp og fiska á ávísum havleiðum í sambandi við at rørleiðingar og havbotnsútgerð verða løgd.

Ein framleiðslupallur fer at leggjast á eins stórt øki og ein boripallur.

***Avrigging av kolvetnisvirksemi***

Kolvetnisvirksemið skal, meðan framleiðslan er í gongd, liva upp til nógv fyrilit, m.a. fyri sigling, fiskivinnu og umhvørvi. Tá virksemið heldur uppat, og støða skal takast til framtíðina hjá frálandsútbúnaðinum, gera somu fyrilit seg galdandi.

***Endurgjald og skaðabøtur***

Royndir í okkara grannalondum hava víst, at tær vanligu endurgjaldsreglurnar eru ikki nóg góð verja fyri fiskivinnuna. Tí verður skotið upp, at afturat tí vanligu endurgjaldsregluni, sum áleggur endurgjald fyri skaðar, sum eru gjørdir, verða settar í verk reglur, sum meira bera dám av metingum um endurgjald fyri skaða og miss. Reglurnar, ið bera dám av meting, miða ímóti at fata um tvær støður:

1. skaða og miss, sum má metast at verða elvdur av kolvetnisvirkseminum,

tá ið ikki ber til at staðfesta, hvør skaðaelvarin er,

2. tá ið hald, fult og heilt ella fyri ein part, verður lagt á fiskileið, sum hevur við sær skerdar inntøkumøguleikar hjá fiskimonnum, sum vanliga reka vinnuligan fiskiskap á ávísa økinum.

Roknað verður við, at endurgjaldsskipanirnar verða umsitnar av eini skaðabótarnevnd, sum verður mannað við umboðum frá fiskivinnufeløgunum og loyvishavunum. Sambært lógini um kolvetnisvirksemi skal loyvishavin gjalda rakstrarútreiðslurnar av skaðabótarnevndini.

**Umhvørvi (5.2)**

Tað er meiri umráðandi fyri Føroyar enn flestu onnur lond at hava eitt reint havumhvørvi, tí fiskivinnan hevur so stóran týdning fyri føroyska búskapin.

Olja og oljuídnaður hava leingi verið mett sum ein stór hóttan fyri umhvørvið, men granskingin hesi seinastu árini hevur fyri ein part broytt fatanina av, hvat ein oljuleki kann orsaka á havinum. Olja er eitt natúrevni, og í natúrini finnast bakteriur, sum umseta olju til óskaðilig evni, ið kunnu fara upp í føðiketuna. Í stórum nøgdum og á viðkvomum leiðum kann olja tó elva til stóran skaða.

Harafturat brúkar oljuídnaðurin nógv ymisk evni, sum kunnu skaða vistskipanina, sleppa tey út í natúrina.

Hesi seinastu árini hevur oljuídnaðurin í samstarvi við myndugleikarnar skipað innanhýsis umhvørvisdeildir og innanhýsis eftirlitsskipanir, so at myndugleikarnir í okkara grannalondum hava eftirlit við innaneftirlitinum hjá feløgunum, og at tey lúka øll krøv og allar treytir.

Hetta merkir kortini ikki, at slakast kann í teimum umhvørvisligu krøvunum til oljuvirksemi, sum mangan stava frá altjóða sáttmálum, ið síggjast aftur í lóggávu landanna, eitt nú lógum um umhvørvisvernd, lógum til vernd av havumhvørvinum, lóg um trygd á skipum, kolvetnislóggávu v.m. Hesi lógarverk verða mangan umsitin í tøttum samstarvi millum t.d. umhvørvis-, kolvetnis- og fiskivinnumyndugleikar.

Tað eigur at vera krav, at tá farast skal undir seismiskar kanningar, boringar, útbyggingar og framleiðslu, eigur loyvishavin at greiða fyrisitingarligu myndugleikunum frá umhvørvisligum vandum og tiltøkum til tess at fyribyrgja og møguliga basa umhvørvisskaðum.

Fyri øki, sum verða mett umhvørvisliga serliga viðkvom fyri tí ymiska virkseminum, sum er, má heimild vera til at seta í gildi avmarkingar í øki og tíð, eins og serliga góð skjalprógv mugu vera fyri teimum vandum, sum eru fyri umhvørvið.

Skal olja seinni førast í land frá oljuútbúnaði á havinum, setir tað serlig krøv til eitt samansjóðað eftirlit við umhvørvinum bæði á havinum og uppi á landi, eins og møguligur framtíðar flutningur gjøgnum rørleiðingar á havbotninum reisir sínar egnu spurningar.

Við teimum í partinum nevndu grundleggjandi kanningunum av havumhvørvinum, sum longu eru settar í gongd í samarbeiði við oljufeløg, ið vísa áhuga fyri tí føroyska økinum, ella eru komnar langt í síni tilrættalegging, og við teimum uppskotum um lóggávu á økinum, sum verða løgd fram í hesi frágreiðing, heldur nevndin tað umhvørvisliga vera ráðiligt at fara undir eitt

útbjóðingarumfar nú.

***Umhvørvisreglur***

Roknast má við, at kolvetnisvirksemið bæði kemur undir reglurnar í vanligu havumhvørvislóggávuni og serreglurnar í lógini um kolvetnisvirksemi.

Uppkastið til løgtingslóg um kolvetnisvirksemi nevnir umhvørvisviðurskifti í fleiri ymiskum samanhangum; t.d. verður ásett í endamálsorðingini, at kolvetnisvirksemið skal leggjast til rættis við neyðugum fyriliti fyri umhvørvinum. Tá útbjóðingarumfør skulu setast í verk, skal Landsstýrið í frágreiðing til Løgtingið eisini greiða frá, hvørjar fylgjur tað væntaða oljuvirksemið kann hava fyri natúr og umhvørvi.

Í sambandi við útbygging av leiðum, leggjan av rørum og avrigging gevur lógaruppkastið Landsstýrinum møguleika fyri at krevja, at loyvishavin ger eina serliga meting av teimum umhvørvisligu fylgjunum. Harafturat fara reglurnar í uppkastinum um trygd og tilbúgving eisini at hava týdning fyri umhvørvisviðurskiftini hjá oljuvinnuni.

Galdandi lóg í Føroyum um vernd av havumhvørvinum er ein kgl. fyriskipan frá 1985, sum setir ta donsku lógina um havumhvørvi í gildi fyri Føroyar. Við heimild í hesi lóggávu kunnu gerast forskriftir um, hvørji evnafrøðievni og hvussu stórar nøgdir v.m. oljufeløgini kunnu lata fara í havið. Eftir teirri galdandi kgl. fyriskipanini er tað danski umhvørvismálaráðharrin, sum hevur heimild at geva út forskriftir um hesi viðurskifti, men Landsstýrið hevur uppgávuna at hava eftirlit við, at forskriftirnar verða hildnar. Kgl. fyriskipanin frá 1985 verður í løtuni endurskoðað, og væntandi koma nýggjar reglur um havumhvørvi í gildi í 1997. Hesar reglur fara væntandi at geva Landsstýrinum heimild til at gera forskriftir fyri útleiðing frá pøllum v.m.

Heimildirnar, sum Landsstýrið hevur sambært galdandi kgl. fyriskipan, eru lagdar Vaktar- og Bjargingartænastuni at umsita. Løgtingslógin um umhvørvisvernd (uppi á landi) verður hinvegin umsitin av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Tað hevði verið skilagott, serliga um Landsstýrið fær fleiri heimildir at gera forskriftir eftir eini nýggjari kgl. fyriskipan um vernd av havumhvørvinum, at latið Heilsufrøðiligu Starvsstovuna umsitið umhvørvislóggávuna á bæði landi og sjógvi. Tær reglur, sum eru í uppkastinum til løgtingslóg um kolvetnisvirksemi, sum snúgva seg um umhvørvisviðurskifti, eru oftast reglur um at hava fyrilit fyri umhvørvinum í ávísum atgerðum (leitiboringum, útbygging av leiðum v.m.). Hesi fyrilit eru sostatt ein innbygdur táttur í kolvetnisvirkseminum, og tí verður mælt til, at kolvetnismyndugleikarnir umsita hesa lóggávuna.

## Onnur ávirkan (5.3)

Afturat teimum árinum á arbeiði, búskap, fiskivinnu, umhvørvi v.m., sum nevnd eru frammanfyri, kann roknast við, at ein møgulig oljuvinna - alt eftir stødd og ferð - fer at ávirka samfelagsviðurskiftini annars.

Í føroyska orðaskiftinum higartil um olju og árin av henni eru vónirnar um, at ein møgulig oljuvinna kann hjálpa til at loysa teir aktuellu samfelagstrupulleikarnar blandaðar saman við ótta fyri ringum ávirkanum á føroysk samfelagsviðurskifti yvirhøvur og serliga á mentanina.

Brúk er fyri at kanna nærri, hvørja ávirkan ein møgulig framtíðar oljuvinna kann hava á samfelagslív og mentan í breiðari merking. Á henda hátt verður føroyska samfelagið ført fyri **at** fyrireika seg sum frægast til eina slíka gongd, **at** gera hóskandi stevnur til at fáa ávirkan oljuvinnunnar á føroyska samfelagið lagaða til samfelagsins egnu virði og stevnumið og **at** seta í verk tiltøk til tess at verja fyri møguligum óhepnum fylgjum.

Hvussu sterkar ávirkanirnar eru, veldst um, hvørjum skeiði í oljugongdini, samfelagið er statt á.

*Kanningarskeiðið* higartil hevur ikki sett nevniverd spor eftir seg. Roknað verður heldur ikki við, at eitt komandi *leitiskeið* fer at hava nógv árin við sær. Árinið í einum *útbyggingarskeiði* veldst um, hvørt kolvetnið verður *ført í land* í Føroyum. Um so verður, fara vit at uppliva eina stutta og ógvisliga byggitíð við øgiliga stórum árini. Í *útvinningarskeiðinum* skal roknast við einum stórum og áhaldandi samfelagsárini, tí tá má roknast við, at nógvir føroyingar arbeiða í oljuvinnuni, sum verður sjónlig í mongum samanhangum í Føroyum.

*Politiska skipanin* kemur undir ávirkan frá altjóða oljuídnaðinum og frá heimligum áhugamálum. Styrki hennara mótvegis seráhugamálum sleppur at standa sína roynd. Føroya viðurskifti til ríkisfelagsskapin verða ávirkað, serliga um veitingarnar úr Danmark halda uppat. Altjóða sambond Føroya, sum í dag serliga hava við fiskivinnuáhugamál at gera, kunnu í framtíðini í størri mun fara at snúgva seg um olju.

Sum frá líður kann væntast ein *skatta- og avgjaldsfloymur* inn í landskassan við teimum møguleikum, sum av tí standast, deils at gerast óheft av statskassanum, deils at veita skattalættar, at menna almenna sektorin ella at beina pengarnar yvir í nýggjar vinnur, bæði tær ið hava við olju at gera og ikki.

Gongst væl við oljuvinnuni, kann hon hava við sær *inntøkuframgongd*, sum kann broyta gamlar vanar og siðir. Væntandi er, at tann veruliga inntøkuframgongdin verður ójavnt býtt, og tað kann fáa politiskar fylgjur.

*Útlendska ávirkanin* fer at vaksa. Atburðurin hjá pengasterkum útlendingum kann leggja leiðina. Hugburðurin hjá teimum fremmandu feløgunum kann seta síni spor, m.a. á tann hátt at føroyingarnir, sum koma í starv hjá teimum, verða ávirkaðir at taka við teirra siðum og virðum.

Málsliga fer enskt at fáa størri leiklut, og vandi kann vera fyri, at føroyskt missir sína yvirvág, tvs. at tað verður ikki málið, sum verður talað manna millum í landsins høvuðsvinnu.

Í sambandi við fyrireikingina av teimum skeiðum í oljuvinnuni, sum kunnu koma eftir tí leitiskeiðið, sum hendan frágreiðingin leggur upp til, verður brúk fyri at greina nærri, hvørjar ávirkanir gongdin frameftir kann hava við sær fyri føroyska samfelagið í breiðari merking við tí í hyggju at fáa til vega grundleggjandi vitan at byggja ein hóskandi politikk á.

Fyribils kann nevndin vísa á hesi dømi um evni, ið kunnu vera viðkomandi:

- Íbúgvafrøði, arbeiðslív, vinnusamanseting.
- Politikkur inneftir og úteftir og samspælið hjá politisku skipanini við oljuídnaðin.
- Samfelagsfrøði og mentan, herundir málspurningurin.

Kanska kundi føroyska granskingarráðið verið biðið um at gjørt ein lista yvir

granskingarevni, at skipa fyri granskingarverkætlanum eins og fingið til vega og samskipað fíggingina av teimum.

Við teimum avbjóðingum í huga, sum ein oljuvinna kann verða fyri Føroyar, verður brúk fyri at menna ta føroysku granskingarorkuna, serliga innan samfelagsvísindi. Hetta fer at krevja játtanir á fíggjarlógini; men til einstakar ætlanir kunnu pengar væntast uttanífrá, eitt nú frá oljufeløgunum, kanska sum partur av avtalunum, tá loyvi verða givin.

## 1.4 NIÐURSTØÐUR OG TILMÆLI

### 1.4.1 Val av kolvetnisskipan

Við tí í hyggju at seta lógarkarmar um kolvetnisvirksemi í Føroyum og útinning av myndugleika tí viðvíkjandi, mælir Oljuráðleggingarnevndin til hetta:

- Víst verður á *uppkastið til løgtingslóg* sum stendur í 6. parti av frágreiðingini. Mælt verður Landsstýrinum til at leggja fyri Løgtingið til viðgerðar uppskot til løgtingslóg um kolvetnisvirksemi.

- Skuldi nærri tilknýti til ES ella EBS komið upp á tal, verður mælt Landsstýrinum til gjølla at kanna, hvussu hetta kann hugsast at ávirka kolvetnispolitikkin.

Viðvíkjandi *fyrisiting* hevur nevndin hesi tilmæli:

- Kolvetnisfyrisiting eigur at hava støði í tí Oljufyrisiting, sum longu er.

- Bygt verður víðari á samarbeiðið við jarðfrøðisavnið. Samarbeiðið verður soleiðis skipað, at Oljufyrisitingin ræður yvir jarðfrøðiligum sakkunnleika, men samstundis verða Føroyum tryggjaðar ein jarðfrøðiligur stovnur, sum kann átaka sær granskingaruppgávur óheftur av kolvetnismyndugleikanum.

- Trygdarfyrisiting eigur Oljufyrisitingini í høvuðsheitum at standa fyri, men kannað verður, um trygdaruppgávur møguliga kunnu verða lætnar øðrum myndugleikum.

- Umhvørvisumsiting sambært kongligu fyriskipanini um havumhvørvið eigur at verða hjá umhvørvismyndugleikunum; umhvørvisreglurnar í kolvetnisvirksemislóggávuni eiga at verða umsitnar av Oljufyrisitingini.

- Framleiðslugjøld og onnur avgjøld sambært kolvetnislóggávuni verða umsitin og uppkravd av Oljufyrisitingini. Skatting, harímillum ein møguligur serligur kolvetnisskattur, verður umsitin av skattamyndugleikunum. Annars verður mælt til samstarv millum kolvetnis- og skattamyndugleikarnar, sum eisini eigur at umfata fíggjarmálastýrið.

- Yvirlit eigur at fáast til vega yvir uppgávurnar hjá øðrum myndugleikum og stovnum í sambandi við eina kolvetnisvinnu, og alt eftir hvussu umfatandi uppgávurnar eru, tekur Oljufyrisitingin stig til, at reglur verða gjørdar fyri samstarvinum.

- Oljufyrisitingin tekur stig til at gjørd verður vegleiðing til oljufeløg v.m. um, hvørjir myndugleikar, ið taka sær av hvørjum málum.

Viðvíkjandi *trygdarspurningum* mælir nevndin til hetta:

- Skotið verður upp, at ein skipan verður sett í verk, har myndugleikarnir við kunngerðum og vegleiðingum seta ávís krøv til loyvishavan, fyristøðufelagið, verktakan og/ella undirverktakan viðvíkjandi krøvum til innaneftirlit, greining av vandum og av gongdini í teimum ymisku pørtunum av virkseminum, og viðvíkjandi hvørji og hvussu umfatandi tilbúgvingartiltøk, ið setast mugu í verk til tess at halda vandastiginum undir einum góðtakiligum marki.

- Mannagongd verður sett í verk viðvíkjandi góðkenning av borieindum, ið skulu virka á føroyska landgrunninum. Slík mannagongd (fyribils, um hetta verður mett hentast fyri at koma í gongd) eigur at byggja á reglurnar hjá Sjóferðslustýrinum og klassafeløgunum.

Serliga viðvíkjandi *tilbúgving* mælir nevndin til at:

- Arbeiðsbólkur sum skjótast verður settur at lýsa, hvørji tilbúgvingartiltøk landið í minsta lagi eigur at seta í verk, fyri at farið kann verða undir virksemið í leiti- og metingarskeiðinum, so tað slepst undan, at spurningurin um eina landsumfatandi tilbúgvingarskipan verður forðing fyri, at boriarbeiði kann fara í gongd á landgrunninum.

- Skotið verður upp, at sett verður ein atgerðarnevnd við ovastu leiðslunum fyri teimum myndugleikum, ið hava ábyrgd av trygdarviðurskiftum í sambandi við kolvetnisvirksemið. Atgerðarnevndin kemur saman, berst vanlukka á í kolvetnisvirkseminum á landgrunninum.

## 1.4.2 Oljan og føroyski búskapurin

Tá talan er um *vinnumøguleikar*, vísir nevndin til § 10 í uppkastinum til lógaruppskot, har ásett verður, at í loyvum til leiting og framleiðslu av kolvetni skal nærri ásetast hvussu og í hvønn mun loyvishavin skal brúka føroyska arbeiðsmegi og veitingar og tænastur frá føroyskum fyritøkum.

Hvussu tær vinnuligu treytirnar skulu vera í fyrsta útbjóðingarumfari eigur at verða avgjørt, tá treytirnar sum heild fyri hetta umfar verða ásettar.

Nevndin vísir á niðanfyri umrøddu almennu treytir fyri kolvetnisvirksemi, ið tykjast vælgrundaðar av øðrum orsøkum, men sum eisini kunnu hava vinnuligar fyrimunir við sær:

- Loyvi verða bert latin fyritøkum, ið hava sett seg niður í Føroyum, antin sum feløg ella sum deildir.

- Leitivirksemið krevir at fyristøðufelagið hevur rakstrardepil í Føroyum.
- Í sambandi við leitiboring krevst, at trygdarútgerð verður goymd í Føroyum, og at føroysk útgerðarstøð verður nýtt.

- Fólkaflutningur til og frá boripalli gongur um floghavn í Føroyum.

- Verður kolvetni funnið, verður framleiðslan førd í land í Føroyum, um undantak ikki verður loyvt.

Viðvíkjandi *føroyskum oljufelag* kemur nevndin við hesum tilmæli:

- Av tí, at munagóð føroysk luttøka í oljuvinnuni ígjøgnum luttøku í oljufelagsvirksemi fyrstu tíðina neyvan fæst í lag, einans við, at privat føroysk feløg fara upp í oljusamtøk á handilsligum grundarlag, verður ikki hildið skilagott at leggja dent á luttøku hjá privatum føroyskum feløgum, tá ið loyvi verða givin.

- Skilabesti mátin at tryggja føroyska luttøku í oljuvinnuni ígjøgnum føroyskt oljufelag verður tí fyribils mettur at vera, at tað almenna stovnar slíkt felag.

- Um landið longu í fyrsta útbjóðingarumfarinum eigur at treyta sær ein møguligan rætt (option) til luttøku hjá einum almennum oljufelag, og um so er, við hvussu stórum parti, má støða takast til, tá ið treytirnar í sambandi við fyrsta umfar sum heild verða orðaðar. Tað sama er galdandi fyri spurningin, hvørt felagið eigur at verða "borið"[1] ígjøgnum tey fyrstu skeiðini, og um so er, í hvønn mun.

- Verður tikið undir við tilráðingini frammanfyri, eigur Landsstýrið at seta nevnd at útgreina og koma við tilmælum um, hvørt eitt føroyskt landsoljufelag eigur at verða stovnað, og um so er, hvussu tað eigur at verða skipað viðvíkjandi ognarviðurskiftum, stýring, handilsligum og samfelagsligum endamálum, og hvussu leiklutur tess skal verða í mun til ta politisku og umsitingarligu skipanina og tað privata vinnulívið í Føroyum.

Til spurningin um *at føra kolvetni í land í Føroyum* sigur nevndin:

- Vísandi til strategiskar og vinnuligar grundgevingar fyri, at føroyskir myndugleikar eiga at hava møguleika at krevja, at ført verður í land í Føroyum, verður í lógini skotið upp at hava eina høvuðsreglu um skyldu at føra í land, men við heimild til at geva undantaksloyvi. Á henda hátt fáa myndugleikarnir í hvørjum einstøkum føri atgongd til at meta um, um fyrimunirnir at føra í land eru størri enn vansarnir og taka avgerð út frá tí.

Viðvíkjandi *Útbúgving í sambandi við kolvetnisvinnu* kann nevndin vísa á frágreiðingina frá teirri nevnd, ið sett varð av landsstýrismanninum í útbúgvingarmálum, og tekur Oljuráðleggingarnevndin undir við tilmælinum frá tí nevndini, serliga hesum viðvíkjandi:

- Neyðugt er at raðfesta útbúgvingartiltøkini soleiðis, at fyrst verður dentur lagdur á tær longur varandi útbúgvingarnar og síðan á tær styttru, og eftirútbúgving og

[1] At eitt felag "verður borið" av hinum parthavarunum merkir, at hini feløgini gjalda útreiðslurnar hjá viðkomandi parthava til leitingar og - sjáldnari - útbygging, møguliga soleiðis, at hesi útlegg heilt ella partvíst verða afturgoldin við partinum í framleiðsluni hjá borna felagnum. Ein "bering" fatar kortini vanliga *ikki* um kostnað í sambandi við eginrakstrarútreiðslur hjá felagnum.

vinnuvend skeið.

- Høvuðsdenturin eigur at verða lagdur á at bjóða út grundútbúgvingar. Serútbúgvingar og eftirútbúgvingarskeið í størri mát eiga at verða fingin til vega við samstarvsavtalum við útlendskar útbúgvingarstovnar.

- Føroyskir (granskingar)stovnar og føroyskur ídnaður og tænastur eiga at verða uppií verkætlanum á føroyskum øki. Hetta er serliga umráðandi, tá ið talan er um at fáa til vega og byggja upp vitan um serlig føroysk viðurskifti, t.d. á økjum sum jarðfrøði, samfelagsvísindi, umhvørvi, havfrøði o.s.fr.

Viðvíkjandi *skatting* av kolvetni og kolvetnisvirksemi vísir nevndin m.a. á hesi viðurskifti:

- Tørvur er á lóggávu, ið leggur alt virksemi í sambandi við leiting eftir og framleiðslu av kolvetni á føroyska landgrunninum undir føroyska skatting.

- Tørvur er á, at inntøka av kolvetnisvirksemi verður skattløgd sambært serreglum, lagaðar eftir teimum serligu eyðkennunum hjá hesi vinnu.

- Tørvur er á at finna røttu javnvágina millum øðrumegin ynski samfelagsins um at fáa fatur á tilfeingisrentuni og hinumegin heimsumfatandi kappingina um leitiorkuna hjá oljufeløgunum.

- Veikleikar eru í galdandi føroysku skattalóggávuni, ið verða sjónskari um oljuvirksemi kemur. Talan er m.a. um hesi viðurskifti:

    - tunn kapitalisering
    - bindandi svar frammanundan o.a.
    - skatting av vinningsbýti frá móður- til dótturfelag
    - dupultskattaavtalur
    - deildarvirksemi og skattur av kapitalvinningi (“exit-reglur”).

- Uppkast til uppskot til løgtingslóg um kolvetnisskatt og uppskot til skatta- og avgjaldsskipan fyri kolvetnisvirksemið sum heild verður gjørt og lagt fram í sambandi við, at treytirnar verða orðaðar fyri fyrsta útbjóðingarumfar.

### 1.4.3 Ávirkan frá oljuvirksemi

Til tess at leggja viðurskiftini millum oljuvirksemið og *fiskivinnuna* til rættis mælir nevndin til at halda fram við tí skipan, ið brúkt er síðan 1994. Seismikkvirksemið er avmarkað eftir árstíð og havleið. Avmarkingarnar eru ásettar í neyvum samstarvi millum oljumyndugleikarnar og fiski- og havfrøðiliga sakkunnleikan.

Serligar gætur hevur nevndin givið vandanum fyri stríð millum fiskiveiði og oljuvirksemi um havbotnsøki, og vísir nevndin á tiltøk at sleppa undan hesum.

Til tess at tryggja at fiskiskapur undir Føroyum eisini í framtíðini kann verða rikin trygt og uttan óneyðugan ampa, mælir nevndin til at:

- Fiskivinnuspurningar verða so tíðliga, sum tilber, tiknir við í oljuráðleggingina.

- Kannað verður, um tørvur er á fleiri avmarkingum, tá ið øki verða sett av til oljuídnaðin.

- Undan hvørjum útbjóðingarumfari leggur Oljufyrisitingin tey øki, ið ætlanin er at bjóða út, fyri fiskivinnumyndugleikarnar og aðrar viðkomandi myndugleikar, til tess at fáa at vita, hvørt og í hvønn mun økini eru viðkvom, tá umræður lívfrøði ella fiskiveiði.

- Fiskivinnumyndugleikarnir síggja til at hava útbúgvið starvsfólk, ið kunnu røkja áhugamálini hjá fiskivinnuni mótvegis oljuídnaðinum.

- Eisini áhugafeløgini í fiskivinnuni eiga at búgva seg til á hesum øki.

- Samstarvsnevnd verður sett við umboðum frá fiskivinnufeløgunum, fiskivinnumyndugleikunum, loyvishavunum og Oljufyrisitingini.

- Skotnar verða upp endurgjaldsreglur, smbr. kapittul 7 í uppskotinum til løgtingslóg um kolvetnisvirksemi.

- Havstøðir eiga at verða soleiðis gjørdar, at myndugleikarnir veruliga hava nakað í at velja, tá ið talan verður um at beina tær burtur, lata tær standa, søkkja tær ella føra tær til lands, tá ið støðinar ikki verða brúktar longur.

Av *umhvørvis*tiltøkum mælir nevndin til hesi:

- Útbjóðingartilfarið til fyrsta útbjóðingarumfar eigur at siga frá, at sakkunnleiki innan umhvørvi telur javnt við sakkunnleika innan tøkni og trygd.

- Forskriftir og leiðbeiningar verða gjørdar um tað at lata evni, ið brúkt verða við boring (borimóra v.m.) á sjógv, og hvussu loyvishavar skulu bera seg at við burturkasti, borispønum v.m.

- Tá ið boriætlanir verða góðkendar smbr. grein 14 í kolvetnislógini, eigur Oljufyrisitingin at leggja stóran dent á tað, ið hevur við umhvørvið at gera.

- Ì stórum útbyggingarætlanum verður grein 22 í kolvetnislógini um umhvørvisligar fylgjumetingar og almenna hoyring tikin í nýtslu.

- Tá framleiðsla er farin í gongd, eiga regluligar uppfylgjandi eftirlitskanningar at verða gjørdar av botndýralívi v.m.

- Umsitingin av reglum um at lata tilfar á sjógv, ið stavar frá leiting og framleiðslu av kolvetni, eigur at vera hjá verandi umhvørvismyndugleikum.

- Reglurnar í kolvetnisvirksemislógini, ið snúgva seg um umhvørvisviðurskifti, eiga at verða umsitnar av Oljufyrisitingini, men mælt verður til at oljumyndugleikar, umhvørvismyndugleikar og Vaktar- og Bjargingartænastan v.fl. samarbeiða um umhvørvisfyrisitingina sum heild.

Viðvíkjandi *aðrari ávirkan frá oljuvirksemi*, mælir nevndin til, at kannað verður, hvørja ávirkan framhaldandi oljumenning kann fáa á føroyska samfelagið í breiðari merking við tí í hyggju at fáa til vega vitanargrundarlag at byggja hóskandi politikk á.

Umhugsað eigur at verða at biðja Granskingarráð Føroya vísa á granskingarevni og skipa fyri granskingarætlanum og fáa til vega ella samskipa fígging av slíkum ætlanum.

Í hesum sambandi hevur nevndin víst á tørvin á at útbyggja granskingarførleikan innan samfelagsvísindi.

# 2. PARTUR: FYRITREYTIR FYRI EINI FØROYSKARI KOLVETNISVINNU

## 2.1 STØÐAN Í OLJUBÚSKAPINUM OG OLJULEITINGINI

Av tí, at støðan í heimsins oljubúskapi og gongdin í oljuleitingini um allan heim hava nógv at siga, tá myndugleikar og oljufeløg taka avgerðir, hevur Oljuráðleggingarnevndin havt hesi viðurskifti í huganum, meðan hon hevur arbeitt við fyrireikingunum til føroysku kolvetnislóggávuna og fyrsta føroyska útbjóðingarumfarið.

Í hesum parti verður í stórum dráttum greitt frá støðuni í oljubúskapinum og oljuleiting yvirhøvur við serligum denti á leitingar- og framleiðsluvirksemi á víðum havi í grannalagi Føroya, Útnyrðingsevropa.

Útnyrðingsevropa fevnir um fleiri ymisk jarðfrøðilig øki og er politiskt býtt sundur í landgrunnar, sum Noreg, Danmark, Týskland, Háland, Írland, Bretland og Føroyar ráða fyri. Økið røkkur sostatt úr Føroyum í útnyrðingi til Danmarkar í landsynningi og úr Barentshavinum í landnyrðingi til Írlands í útsynningi.

### 2.1.1 Útnyrðingsevropa sum oljuleitingar- og framleiðsluøki

Tað hevur verið leitað og framleitt í hesum øki síðani miðskeiðis í sekstiárunum. Tað er ymiskt, hvussu nógv virksemi hevur verið í hvørjum landi sær. Leitingin er hesi 30 árini farin fram undir ógvuliga ymiskum orkupolitiskum treytum, sum myndugleikarnir í teimum ymisku londunum sær hava ásett.

Búskaparstøðan og oljuprísurin hava verið fyri stórum broytingum. Men tann stóra tøkniliga menningin innan bæði leiting og framleiðslu hevur havt við sær, at stór sum smá oljufeløg í stórum tali framvegis leita á leiðunum í Útnyrðingsevropa. So hvørt sum undirstøðukervið (infrastruktururin) í oljuídnaðinum (serliga rørleiðingar til at flyta olju og gass í gjøgnum) er bygt út, eru alt smærri leiðir vorðnar lønandi. Víst er framleiðslan hildin uppat á mongum leiðum, men søgan sigur okkum, at um allan heim verður framvegis leitað í gomlum kendum kolvetnisøkjum. Djúphavstøkni, nýggir leitingarhættir, tvørboringar, bøttir útvinningarhættir og nýtslan av framkomnum seismiskum arbeiðshættum fara væntandi alsamt at hava við sær, at týðandi kolvetnisnøgdir verða ávístar á teimum kendu økjunum, eisini á víðum havi í Útnyrðingsevropa.

### 2.1.2 Orkustøðan í heiminum

Orkustøðan í heiminum og heimsbúskapurin ávirka hvørt annað sínámillum. Hesi seinastu árini hevur búskaparvøksturin verið 2-3% um árið, og orkutørvurin er eisini vaksin 2-3% árliga.

**Mynd 2.1-1**

Tøkar kolvetnisnøgdir, ið framleiðast kunnu úr undirgrundini um allan heim, vóru við ársenda 1995 mettar at vera umleið 1.017 MMM (milliardir) føt av olju og 139.000 MMM $m^3$ (rúmmetrar) av gassi. Av teimum eru 2/3 av tøku oljuni og 1/3 av tøka gassinum í Miðeystri. Í Útnyrðingsevropa vóru tøk umleið 15 MMM føt av olju, og tøkir vóru 4200 MMM $m^3$ av gassi. Tøka gassið í hesum øki svarar til 28 MMM føt í oljuvirði smbr. mynd 2.1-2. (Umrokningarfaktorar og talstøddir eru lýst aftast í brotinum).

**Mynd 2.1-2**

Hvussu nógv olja er tøk, veldst um oljuprísin og dollarakursin, tí sum tøk nøgd av eini prógvaðari oljunøgd í eini jarðgoymslu kann í fyrsta lagi bert metast tann parturin, sum kann vinnast út. Onnur fyritreyt er, at felagið, sum hevur hesa olju í hondum, kann útvinna hana við búskaparligum vinningi. Tað hevur týdning at gera sær greitt, at hugtakið tøk olja (reservar) er liðiligt. Fer oljuprísurin upp, kann tað merkja, at oljuleiðir, sum ikki hava verið mettar lønandi at byggja út, verða lønandi, og tað hevur aftur við sær, at nøgdin, sum verður skrásett sum tøkt tilfeingi, veksur. Samsvarandi kann eitt prísfall hava við sær, at tøka nøgdin minkar. Tað, sum vit vita um av tøkari olju í heiminum í dag, svarar til nýtsluna í 40 ár við javnari nýtslu. Hvussu langt tær tøku mongdirnar røkka, verður gjørt upp við R/P lutfallinum, sum er lutfallið millum tær tøku nøgdirnar, vit vita um, og framleiðsluna í árinum, smbr. mynd 2.1-3.

**Mynd 2.1-3**

Kolvetnisvinnan arbeiðir um allan heimin. Eyðkent fyri hana eru stór kapitalsterk feløg, sum fevna víða. Ráolja, jarðgass og úrdráttir úr teimum verða flutt um allan knøttin og eru eisini stórur partur av heimshandlinum.

Oljufeløgini hava handilsligan áhuga fyri, at nógv olja er tøk, og flest øll lond hava politiskt ynski um at kunna vísa á eitt munandi orkutilfeingi eitt áramál fram í tíðina. Bæði ídnaðurin og myndugleikarnir hava tí áhuga fyri at tryggja sær neyðugar tøkar nøgdir. Myndugleikarnir tryggja síni áhugamál gjøgnum útbjóðingarpolitikk, kolvetnislóggávu og ríkisluttøku í leiting og framleiðslu.

Útnyrðingsevropa, eisini Føroyar, er í dag í harðari kapping við leitingarøki um allan heimin. Til dømis eru øki latin upp, síðani Sovjetsamveldið datt sundur í 1990. Gassútflutningurin úr Russlandi veksur, og russiska statsfelagið Gazprom letur í dag 25% av gassnýtsluni í Evropa. Ein stór oljurørleiðing verður løgd til avskipingarhavn við Svartahavið, og 10 privat oljufeløg eru við í hesi ætlan. Meginparturin av teimum stóru altjóða feløgunum arbeiðir í teimum gomlu eystanlondunum. Menn vistu um olju har, men viðurskiftini vóru ikki kannað. Dømi eru Kazakhstan, Adzerbadjan og Uzbekistan.

Í hesum londum hava oljufeløgini aðrar trupulleikar enn í Útnyrðingsevropa. Trupulleikarnir har eru ofta av politiskum slag. Lóggávan er mangan alt annað enn greið, og í dagliga arbeiðinum noyðast feløgini at liva við einum stundum ógreiðum skrivstovuveldi. Men nógvastaðni í hesum londum er møguleiki fyri at raka við olju- og gassnøgdir. Tað eru kortini bara tey størstu feløgini, sum orka at taka upp á seg tann váða, sum virksemið út um leitingarváðan (t.e. vandin fyri einki at finna), ber í sær. Tey stóru oljufeløgini arbeiða um allan heimin, og nógv nýggj øki hava havt ella hava framvegis áhuga hjá teimum, t.d. Vietnam, Eysturkinahavið og Falklandsoyggjarnar. Eisini gomul kend oljuøki eru latin upp aftur fyri altjóða oljuvinnuni, eitt nú Venesuela.

Líkt er til, at tey stóru feløgini spjaða váðan kring um heimin. Amerikansku altjóða feløgini brúka meir enn 50 prosent av sínum leitingarfíggjarætlanum uttanlands, og tey fara at ganga undan í mongum nýggjum økjum, har váðin er stórur, men møguleiki eisini er fyri góðum vinningi.

### 2.1.3 Oljufeløgini og teirra uppstreymvirksemi

Tað eru serliga tey heilt stóru handilsligu altjóða feløgini og nøkur, nakað smærri, privat feløg, fyri tað mesta amerikansk og vesturevropeisk, sum arbeiða í Útnyrðingsevropa. Millum tey smærru feløgini eru feløg úr londum í sjálvum Útnyrðingsevropa. Afturat tí kemur, at statsfeløg í økinum í alt størri mun fara út um egið landamark.

Hvørji tey størstu altjóða privatu feløgini eru, sæst á einum almennum norskum yvirliti[2], har tey eru sett upp í raðfylgju alt eftir, hvussu nógv kolvetni tey høvdu tøkt í undirgrundini í 1994. Fimtan tey fremstu feløgini eru hesi: Royal Dutch/Shell, Exxon, Mobil, BP, Chevron, Amoco, Atlantic Richfield, Texaco, ELF, YPF, Phillips, Total, Unocal, BHP og Norsk Hydro. Hevði norska Statoil verið eitt privat felag, hevði tað sambært yvirlitinum komið inn ímillum Amoco og Atlantic Richfield, og privata norska felagið Saga er nr. 21 á listanum.

Meginparturin av hesum feløgum eru fleirliðað (integrerað) feløg, sum bæði fáast við at kanna, leita, útvinna, flyta og virka ráolju eins og býta út teir virkaðu úrdráttirnar og/ella brúka teir í egnum petrokemiskum virkjum.

Nøkur feløg, t.d. Saga, leggja høvuðsdentin á leiting og útvinning. Í vinnuni verður hetta nevnt *uppstreymvirksemi*. Finska statsfelagið Neste kann vera nevnt sum dømi um eitt oljufelag, ið leggur serligan dent á *niðurstreymvirksemi*, sum er at virka, selja og brúka úrdráttirnar í egnari petrokemiskari framleiðslu. Tað stendur tí ikki á einum lista sum hesum.

Í grundregluni kunnu *uppstreym- og niðurstreymvirksemið* ikki viðgerast hvørt sær, tí búskaparliga er neyðugt við loysnum, har øll gongdin ígjøgnum tey ymisku liðini frá leiting til smásølu er sjóðað saman í eina heild (integrerað).

Skulu oljufeløgini lúka síni egnu krøv um at fáa vinning burtur úr uppstreymvirkseminum og samstundis víðka tað, má nýggj tøk olja finnast í staðin fyri ta olju, sum útvunnin verður. Hetta setir ógvuliga stór krøv til leitingar komandi árini, og sum er, minka tær tøku nøgdirnar í heiminum eitt sindur. Fallið

[2] Kelda: Stortingsproposition nr 50 (1995-1996). Nærings- og energidepartementet, Oslo.

er størst í Evropa við 6-7% um árið og minst í Miðeystri, har tað er 1-2% um árið. Nýtt tøkt kolvetni á sama øki liggur ofta djúpari ella á smáum leiðum og verður tí dýrari at fáa hendur á. Feløgini kunnu bert fyri ein part vinna møguligan inntøkumiss aftur við at skerja kostnaðin fyri kanningar- og útbyggingarvirksemi. Í longdini er neyðugt, at tøk olja verður ávíst í nýggjum leitingarøkjum, har møguleiki er fyri at finna stórar keldur, og har kostnaðurin fyri hvørja leið og hvørt framleitt fat av olju er minni enn á teimum royndu leiðunum. Eydnast feløgunum ikki at finna nýggjar nøgdir sjálvi, keypa tey sær partar í teigum ella taka yvir onnur feløg.

Meginparturin av oljuni, sum framleiddur verður í dag, kemur úr vanligum leiðum. Sum frá líður má roknast við, at framleitt fer at verða úr óvanligum oljuleiðum uppi á landi so sum tjørusandi og leiðum við ógvuliga tungari olju.

Fleiri av teimum feløgum, sum arbeiða í Útnyrðingsevropa, hava víst áhuga fyri leiðunum undir Føroyum. Heili 19 feløg vóru uppií, tá borað varð longur niður í Lopransholið. Tá oljufeløgunum á heysti 1996 stóð í boði at siga føroyskum myndugleikum frá, hvørjum teigum undir Føroyum tey høvdu áhuga fyri, svaraðu 23 feløg.

## 2.1.4 Útbjóðingarumfør, leiting og framleiðsla

**Útbjóðingar-umførini**

Í summum londum, t.d. Noregi og Bretlandi, verða útbjóðingarumførini fyrireikað m.a. við at bjóða oljufeløgunum at siga sær, hvørjar leiðir tey halda, at útbjóðingarumfarið skal fevna um. Eisini í Føroyum hevur eitt slíkt tilmælisumfar ("nomineringsumfar") verið sum partur av fyrireikingunum til fyrsta útbjóðingarumfar.

Í Bretlandi varð 17. útbjóðingarumfar kunngjørt í 1994; í 1995 vístu feløgini á 691 teigar (=170.000 km$^2$), og teigarnir vórðu endaliga lutaðir út í 1997. Í Noregi endaði 15. útbjóðingarumfar í 1996, í Danmark endaði 4. umfar í 1995, og í Hálandi endaði 9. umfar í 1996. Boðað er frá nýggjum umførum í fleiri av hesum londum. Í Írlandi er "Rockall Trough" økið (í Rockall-rennuni) boðið út í landsins triðja umfari, og í Føroyum verður fyrsta umfar fyrireikað.

Tað er ymiskt, sum útbjóðingarumførini verða umsitin í teimum ymisku londunum, og har fleiri útbjóðingarumfør eru, verða kappingartreytirnar broyttar frá umfari til umfars. Í treytunum verður serligur dentur lagdur á arbeiðsætlanirnar, sum feløgini seta fram, men ofta verður eisini skeitt eftir, hvussu nógv av landsins vørum, tænastum og arbeiðsmegi ætlanin er at brúka, hvat støðan er til almenna luttøku, hvør skal vera fyristøðufelag, hvussu góð og væl grundgivin umsóknin er, og hvussu feløgini eru fyri at fremja uppgávurnar, tøkniliga og fíggjarliga. Har kappingin er hørð, verða feløgunum settar harðari fíggjarligar treytir, og tá ber eisini til at krevja meiri arbeiði gjørt fyri tey einstøku loyvini. Arbeiðsætlanirnar verða fyrst og fremst mettar eftir, hvussu nógvar boringar, feløgini ætla at gera, og hvussu nógvan seismikk tey bjóða seg fram at skjóta.

Við nýggjum ES direktivum er mannagongdin í orkumálum í ES-londunum kring Norðsjógvin stórliga broytt, og tað sama er hent í Noregi við EBS-sáttmálanum. Til tess at eggja til at leitað verður, hava fleiri lond við sonevndum "Open Door" innbjóðingum boðið oljufeløgunum aðrar møguleikar at sleppa uppí part. Tá kunnu tey eftir serligum reglum søkja um loyvi uttanfyri tey veruligu

útbjóðingarumførini. Oljufeløgini, sum í mong ár hava arbeitt í Útnyrðingsevropa, kenna orkufyrisitingarligu skipanirnar og skattareglurnar í teimum ymisku londunum. Hóast munur er á lóggávu og fyrisitingarreglum frá landi til land, tykjast feløgini sjáldan ivast í, hvussu lóggávan skal skiljast og virðast.

**Leitingin**

Vánirnar at finna olju og gass og tær búskapar- og arbeiðstreytir, sum oljufeløgini vænta í loyvunum, verða altíð avgerandi fyri áhugan hjá teimum at søkja um nýggj loyvi í einum ávísum øki. Tað er ymiskt, sum tað eydnast at raka við olju, men í Útnyrðingsevropa eydnast tað í miðal fimtu hvørja ferð, og tað er ofta, verður hildið. Ein heppin boring er ein, haðani tað eydnast at gera ein fund, t.e. við t.d. framleiðsluroyndum at fáa kolvetni upp úr holinum, sjálvt í smáum nøgdum. Minni enn so allar slíkar hepnar boringar enda við, at handilslig útvinning verður sett í verk. Vanliga verður tað bert úrslitið av heilt fáum prosentum av teimum. Her kann vísast á, at vestan fyri Hetland eru 170 hol borað, men bert á 4 leiðum hevur tað verið mett at loysa seg at fara undir framleiðslu.

Leitingarhættirnir eru nógv broyttir, síðani tær fyrstu boringarnar vórðu gjørdar í Norðsjónum í sekstiárunum. Fyrstu tíðina varð serliga leitað eftir einføldum kúputum íkomnum oljufellum. Oljan, sum var funnin á Ekofisk leiðini (fyrsti stóri oljufundurin á norska landgrunninum) og á teimum donsku kálkleiðunum omaná uppskotnum salthorstum, eru góð dømi um úrslit av hesum leitingarhátti. Tær mongu royndirnar og tann nógv bøtta tøknin bæði innan seismikk og boring hava gjørt, at hesi seinnu árini er fingin til vega betri vitan um, hvussu kolvetnini ferðast, hvussu fellurnar eru dánaðar og hvussu mong ymisk sløg av fellum eru, smbr. umrøðuna av hesum í brotinum 2.2.

So hvørt sum teldumegin er ment, er tann grundleggjandi seismiska tøknin vorðin nógv betri. Longu í leitingarskeiðinum verða nú brúktir trídimenjsonellir seismiskir arbeiðshættir í staðin fyri 2D seismikk. Við tí bøttu innsavningini og viðgerðini ber til at fá eina mynd av, hvussu vorðið er longur niðri í undirgrundini, og við betri tøkni at viðgera dátur ber til at kortleggja, hvussu goymslurnar í undirgrundini síggja út**.** So hvørt sum seismikkurin hevur tikið seg fram, eru mátingarnar í boriholunum (logging) vorðnar betri, og boritøknin hevur tikið seg so nógv fram, at vandin fyri ikki at raka við møgulig kolvetnisberandi øki, er nógv minni. Úrslitið av hesi gongd er, at oljufeløgini framvegis leita í teimum kendu kolvetnisøkjunum, og roknað verður við, at oljumyndugleikar fara at bjóða fleiri slík øki út har. Eisini fara feløg, sum eiga í útbúnaðinum (rørleiðingum v.m.), at skunda undir at menna nýggja tøkni, so framleiðslan kann halda fram, har tey longu hava fótin fastan.

Hóast nógv verður kannað og leitað, liggur ikki væl fyri at finna nýggjar leiðir í staðin fyri alt tað, sum útvunnið er í Norðsjónum. Tað sigur okkum, at tær høgligastu leiðirnar eru longu funnar. Hendan støðan kann verða lýst við úrslitunum av leitingunum og við hagtølunum fyri framleiðsluna í Bretlandi í 1996:

Á bretskum øki vórðu í 1996 gjørdar 83 leitiboringar, og í 17 av teimum varð rakt við olju, gass ella kondensat. Tað, sum her er funnið, svarar til, at 220 MM tunnur av olju og 85 MMM $m^3$ av gassi afturat eru at taka til. Hóast árið eydnaðist væl, merkir hetta, at feløgini einans fingu nýtt tilfeingi fyri 23 prosent

av tí olju og 28 prosent av tí gassi, sum útvunnin vórðu í árinum (ávikavist 940 MM føt av olju og 85 MMM $m^3$ av gassi). Í Noregi raktu teir við heldur meir av nýggjum tilfeingi í mun til framleiðsluna.

***Marknaðurin fyri boripallar***

Síðani 1994 hava alt fleiri leitiboringar verið gjørdar í Útnyrðingsevropa. Í 1996 vóru tær 130 í tali, og talið verður væntandi upp aftur størri í 1997. Tað stóra leitingarvirksemið sæst aftur í eftirspurninginum eftir boripøllum. So at siga allir boripallar, sum eru í framboði, eru í vinnu, og í dag er torført at fáa sáttmála um einstakar boringar við teir, sum eiga pallarnar. Gjaldið fyri pallarnar er eisini farið upp 50-100% hesi bæði seinastu árini. Mett verður, at eftirspurningurin eftir ikki minst pøllum til at bora á djúphavsleiðum veksur í framtíðini. Tað stendst av øktum áhuga fyri djúphavsleiðunum á t.d. Møre og Vøring økjunum í Noregi, leiðunum vestan fyri Hetland og í Meksikoflógvanum.

Í mars 1997 arbeiddu 80 pallar á víðum havi í Útnyrðingsevropa. 30 fingust við leitiboringar og 50 arbeiddu við at meta um funnar leiðir ella við at byggja tær út. Bert fáir av hesum pøllum duga til at bora á dýpunum undir Føroyum.

**Talva 2.1-1**

| Mars 1997 | Virknir boripallar | Boripallar, sum gera leitiboringar |
|---|---|---|
| Bretland | 43 | 15 |
| Noreg | 20 | 8 |
| Háland | 12 | 6 |
| Danmark | 5 | 1 |
| **TILSAMANS** | **80** | **30** |

***Nýggj leitiøki***

Tá ov lítil olja er tøk á økjum, sum eru lutað út, royna feløgini at finna sær aðra olju antin í sama øki ella aðrastaðni í heiminum. Á einum royndum leitingar- og framleiðsluøki kann nógv olja og gass vera á ótroyttum leiðum, sum krevja nýggja tøkni til leitingina ella kanska serliga til útvinningina.

Í Útnyrðingsevropa er Norðuratlantshavsleiðin - eitt nú vestan fyri Hetland og undir Føroyum - áhugaverd, fyri ein part tí, at her er nógv funnið og fyri ein part tí, at summi øki als ikki eru kannað við leiting í hyggju og kunnu goyma ógvuliga stórar oljuleiðir. Í dag ber til at vinna olju úr jarðløgum á alt størri dýpi. Gassleiðir eru ikki so eftirspurdar, tí ongar rørleiðingar eru til útflutningin av gassinum, og langt er til teir stóru gassmarknaðirnar. Nýggja tøknin til leiting og framleiðslu hevur latið hesar djúphavsleiðir upp, men monnum er greitt, at tær hava sínar avmarkingar, tí váðin er stórur og kostnaðurin høgur at liggja so frammarlaga í mun til tøkniligu menningina. Undirstøðukervið finst sjáldan, og íløgurnar í útbygging og framleiðsluútbúnað eru sera stórar.

Tá nýggj útjaðaraøki verða boðin út, her uppi í Føroyaøkið, kann gongdin eftir fyrstu leitingarnar verða tvinnanda. Verður nógv olja funnin, fer hon at draga nógv feløg til sín, og ferð kann koma á leitingarnar. Men gongst illa við teimum fyrstu leitingunum, rýma feløgini ofta skjótt, og ilt kann verða at eggja til nýggjan áhuga fyri slíkum økjum, sum krevja stórar íløgur. Eitt gott dømi um hetta er Grønland, har seks turrar royndarboringar vórðu gjørdar síðst í sjeytiárunum. Tað hevði við sær, at oljufeløgini mistu áhugan fyri økinum, og leitingin steðgaði upp í 20 ár. Nústaðni er áhugin fyri at leita í landgrunninum í Vesturgrønlandi kyknaður aftur.

Í Írlandi varð rakt við gassleiðina Kinsale Head í 1972, og framleiðslan byrjaði í 1978. Burtur úr leitingunum síðani 1972 er einans komin ein leið afturat, sum tað verður hildið vera lønandi at fara í holt við. Tað er Connemaraleiðin, ið verður útbygd nú.

Føroyar mugu sigast at vera eitt váðafult útjaðaraøki, ikki minst orsakað av tí stóra dýpinum og tí tjúkka basaltinum, ið liggur omaná jarðløgum, sum kanska eru oljuberandi. Verður rakt við olju, verður neyðugt at gera stórar íløgur, og økið má, sum umrøtt í broti 2.1.2, haldast alsamt at vera í kapping við útjaðarar aðrastaðni í heiminum, har váðin er stórur, men útlitini eisini góð. Av tí, at tey politisku viðurskiftini í Føroyum verða mett at vera støðug, fara feløgini kortini at hava áhuga fyri Føroyum sum lið í strembanunum at spjaða váðan út um heimin.

**Framleiðslan**

Eitt eyðkenni fyri frálandsvinnuna í Útnyrðingsevropa er, at leitingarnar og framleiðslan eru dýrar. Nevnt kann verða, at prísurin fyri at finna eitt fat av olju sigst liggja um 4-5 USD. Verður ikki roknað aftureftir við rentu, er prísurin einans 1,5 USD fyri fatið. Hesin munur vísir, hvussu stóran týdning tað hevur at stytta sum mest um tíðina, frá tí oljan verður funnin, til framleiðslan byrjar.

Rakstrarkostnaðurin í Útnyrðingsevropa er ymiskur. Úr 3,5 USD fyri fatið í Danmark uppi í 4,9 USD fyri fatið í Noregi. Í hesum viðfangi hevur tað m.a. nógv at siga, hvussu havdýpið er yvir leiðunum, har oljan er. Tað ber til at minka um kostnaðin. Sum dømi kann nevnast, at í Hálandi er framleiðslukostnaðurin síðani 1993 minkaður 25% fyri fatið í oljuvirði og er nú 4,3 USD fyri fatið í oljuvirði.

Í 1997 er oljuframleiðslan á víðum havi í Útnyrðingsevropa umleið 6 MM føt um dagin. Hetta svarar til 8-9% av framleiðsluni í øllum heiminum. Til samburðar er framleiðslan hjá OPEC-londunum umleið 30 MM føt. Í Útnyrðingsevropa er Noreg størsti framleiðari og Bretland næststørsti. Gassframleiðslan er 450 MM $m^3$ í miðal um dagin fyri árið. Bretland og Noreg eru eisini størstu gassframleiðarar. Oljuframleiðslan er støðug alt árið, men gassframleiðslan er umleypandi eftir árstíðunum og er nógv minst um summarið. Luturin hjá norðmonnum sum gassútflytarar til evropeiska marknaðin er vaksandi.

**Talva 2.1-2**

| **Januar 1997** | Daglig oljuframleiðsla MM føt/dag | Daglig gassframleiðsla MM $m^3$/dag |
|---|---|---|
| Noreg | 3,4 | 135 |
| Bretland | 2,5 | 350 |
| Háland | < 0,1 | 95 |
| Danmark | 0,2 | 25 |
| Írland | 0 | 8 |
| Týskland | < 0,1 | 0 |
| **TILSAMANS** | **6,2** | **613** |

### 2.1.5 Smáar leiðir, nýggjar útbyggingarloysnir og bøtt útvinningartøkni

Í 1996 varð á bretska landgrunninum farið undir framleiðslu á 21 nýggjum oljuleiðum, har tøka oljan er tilsamans 1300 MM føt. Á 11 av hesum leiðum var tøka oljan minni enn 50 MM føt í oljuvirði. Hetta dømi vísir, at oljufeløgini fara undir alt smærri leiðir. Hetta hevur verið gongdin, tí færri stórar leiðir eru eftir, undirstøðukervið er vorðið betri, og tiknir eru í nýtslu heilt nýggir og ódýrari framleiðsluhættir.

Hesi seinastu árini hevur eisini eydnast bæði Bretlandi, Noregi og Danmark at útbyggja smáar leiðir sum hjáleiðir hjá størri leiðum.

Fullfíggjað útgerð á havbotninum, "Subsea Completions", er ein annar máti at stýra borihøvdunum á havbotninum í staðin fyri at brúka hjápallarnar, sum hevur verið vanligt. Tá verða brunnahøvdini sett á botnin, og brunnarnir verða stýrdir antin gjøgnum eina boyu, sum liggur uppiyvir, ella gjøgnum kaðalar eftir havbotninum. Hendan havbotnsútgerð kann eisini brúkast saman við framleiðsluskipum, sum lata oljuna umborð í tangaskip á víðum havi.

**Óheftar útbyggingar-loysnir**

Tað er alt meira vanligt at skipa ta framleiddu oljuna umborð í tangaskip á leiðum, har ongar rørleiðingar eru. Tangaskipini føra síðani oljuna til lands. Har hesin mátin verður nýttur, er neyðugt úti á oljuleiðini at hava útgerð, sum kann viðgera oljuna, so lítið gass er eftir í henni ("stabilisering") til tess at gera hana klára at lata umborð í tangaskipið. Hendan mannagongd kann tí ikki beinleiðis nýtast saman við smáum ómannaðum hjápallum. Ber ikki til at hava oljuna á goymslu á leiðini á víðum havi, har hon verður útvunnin, kann nógv framleiðslutíð fara fyri skeytið. Síðani farið er undir at brúka framleiðsluskip, verða fermingarboyur vanliga bygdar inn í akkersskipanina hjá skipunum (tær sonevndu “turret”-skipanirnar).

Framleiðsluútbúnaður, sum flýtur og kann flytast, eru framleiðslupallar, serbygd framleiðsluskip eins og umbygd tangaskip og umbygdir boripallar. Hesin útbúnaður er serliga brúktur á stórum havdýpi, har ikki hevur borið til - ella tað hevur verið ov dýrt - at festa útbúnaðin í botn. Mátin hevur eisini væl kunna brúkst á oljuleiðum, sum eru langt burtur frá rørleiðingum, tí hesar framleiðslueindir hava vanliga goymslu- og fermingarmøguleikar sjálvar. Útgerðin kostar nógv, og tí hevur hendan útgerð mest verið brúkt á leiðum við nógvari olju. Oljuleiðin Foinaven vestan fyri Hetland er eitt dømi um hetta. Havdýpið er 500 metrar, og tøka oljan verður mett til 250 - 500 MM føt. Í fyrsta umfari er leiðin útgjørd við einum framleiðsluskipi, sum kann virka 80.000 føt av olju um dagin. Oljan verður framleidd upp í ein innbygdan tanga, haðani hon verður latin í flutningstangaskip.

Tað hevur víst seg hesi seinastu árini, at framleiðsluútbúnaður, sum kann flytast, kappast beinleiðis við tær vanligu útbyggingarnar, eisini á smærri oljuleiðum og á leiðum, har rør eru frammanundan. Til dømis verður oljan á Angus-leiðini beint vestan fyri danska-bretska markið í Norðsjónum útvunnin við framleiðsluskipinum Petrojarl-1. Her vóru 12 MM føt av olju tøk. Tey vórðu útvunnin eftir 18 mánaðum, upp í 25.000 føt um dagin. Á Fife-leiðini har í nánd liggur eitt umbygt tangaskip. Her verður hildið, at 34 MM føt av olju eru tøk. Ætlanin er at útvinna hana eftir 4-6 árum við 40.000 føtum um dagin.

Fleiri eyðsýndir fyrimunir eru við framleiðsluútbúnaði, sum verður leigaður: Undirstøðuskipan nýtist ikki at vera gjørd frammanundan, tørvurin á byrjunaríløgum er minni, og farast kann skjótt undir framleiðsluna. Byrjunaríløgur eru serliga boringar og eftirlits- og íbindingarútbúnaður ("wellhead platform" ella fullfíggjað útgerð á botni).

Nú frættist, at alt fleiri tangaskip og boripallar verða bygd um til framleiðsluútbúnað. Tí kann hugsast, at eftir fáum árum verður bygdur upp ein floti av umbygdum eindum, sum hava tað grundleggjandi útgerðina (tyrludekk, bluss ("flare"), “turret”-skipan v.m.), og sum tí bert, fyri at kunna virka sum fullfíggjaður framleiðsluútbúnaður, skulu hava tað neyðugu útgerðina at viðgera oljuna afturat. Slíkar eindir verða kanska leigaðar einum fyristøðufelag nú og øðrum tá.

Tann flótandi framleiðsluútbúnaðurin, sum letur framleiðsluna í tangaskip, kann væl setast í staðin fyri vanligar hjápallar, tá talan er um oljuleiðir, sum kunnu framleiða olju í stórum nøgdum, sum torført er at veita ígjøgnum verandi undirstøðukervi.

**Bøtt útvinning**

Við bøttum hættum at fáa oljuna upp hevur eydnast at longja framleiðsluskeiðið á mongum leiðum, sum, tá farið varð undir framleiðsluna, varð hildið at vara nógv styttri.

Leiðirnar kunnu útvinnast í eitt longri tíðarskeið, og meir kann fáast burtur úr teimum, tí bøtt er um útbyggingar- og goymsluútvinningartøknina**.** Oljufeløgini hava við 3D seismikki fingið eina meira álítandi mynd av goymslunum í undirgrundini og hava troytt leiðirnar betur við tvørgangandi framleiðsluboringum. Hendan gongd fer væntandi at halda fram, og tí fer at bera til at longja tíðina, sum leiðirnar kunnu brúkast, og tíðina, sum verður til at niðurskriva tær tøku tilfeingisnøgdirnar. Teir tøkniligu og búskaparligu fyrimunirnir galda sjálvsagt eisini møguleikarnar at fara undir framleiðslu á nýggjum leiðum, herundir leiðum á djúpum vatni, sum fyrr vóru hildnar at vera ivasamar. Tann lutfalsliga høgi oljuprísurin í 1996 hevur givið vinnuni fíggarligt rásarúm at halda fram við leitingar- og menningararbeiðið (Research & Development) og at menna tøknina.

Í Danmark hevur tann bøtta tøknin at útvinna oljuna og gassið havt við sær, at nógv meir fæst burtur úr leiðunum hjá DUC (Dansk Undergrundskonsortium) og samstundis er tað tøka tilfeingið uppskrivað. Upprunaliga varð hildið, at DUC kundi fáa 12% burtur úr Dan, Gorm og Skjold leiðunum. Nú verður hildið, at úrtøkan kann verða uml. 35%.

**Nýggj framleiðslutøkni**

3D seismikkur verður í mongum verkætlanum í dag brúktur saman við longum tvørgangandi boringum til at økja um lønsemið í framleiðsluútbúnaði, sum longu er í rakstri. Við 3D seismikkinum ber til at kortleggja randarøki og útjaðarabrotkubbar, sum ikki verða troyttir nóg væl við teimum boriholum, sum eru, og borað verður síðani í hesar leiðir við ógvuliga longum boringum (extended reach drilling).

Hugmyndin við 4D seismikki (tíðin er tann 4. dimensjónin) er, at tá væl liggur fyri, ber til við meiri 3D seismikki at staðfesta rørslur í goymsluløgunum við tíðini. Á hendan hátt ber til alla tíðina at stilla boringarmynstrið og framleiðsluætlanina til tess at fáa sum mest burtur úr. Í dag má 4D seismikkur sigast at vera eitt hugaligt útlit, men enn er ikki greitt, hvat hann fer at muna í verki.

Við smáum bólkum, mannaðir við fólki frá bæði fyristøðufeløgum og verktakum, hevur - sum roknað varð við í CRINE-frágreiðingini hjá bretsku stjórnini - eydnast at skerja kostnaðin og ikki minst tíðarskeiðið frá fyrstu íløgum til fyrstu inntøkur. CRINE-átakið (Cost Reduction Initiative in the New Era) hevði til endamáls at fáa til vega kappingarførar útbyggingar á alsamt smærri ivasomum olju- og gassleiðum á bretska landgrunninum. Hugmyndin var at minka um kostnaðin yvirhøvur við at spara óneyðugar partar av framleiðsluútbúnaði, brúka loysnir, sum royndust væl, aftur og bróta niður garðarnar millum teir ymisku partarnar í verkætlanunum (øðrumegin fyristøðufelagið og hinumegin teir, ið teknaðu og gjørdu útbúnaðin). Í frágreiðingini frá tí samsvarandi norska átakinum NORSOK verður dentur lagdur á, hvussu stóran týdning tað hevur at stytta tíðina frá fyrstu íløgunum til fyrstu inntøkurnar. Útreiðslurnar til leiting og tilrættalegging hava virkisbúskaparligan týdning í hesum viðfangi, tí tær koma tíðliga fyri og tyngja sostatt íløguætlanina í

langa tíð, áðrenn inntøkur frá framleiðsluni kunnu rinda tær aftur. Skal búskaparlig javnvág fáast í, skulu útreiðslurnar í hesum hvarvi í summum førum mótsvarast av tríggjar ferðir so stórum inntøkum í framleiðsluhvarvinum.

### 2.1.6 Búskaparligu umstøðurnar hjá uppstreymvirkseminum

**Oljuprísir**

Oljuprísir verða ikki ásettur alment, men verða skrásettir av óheftum feløgum. Tað kendasta er Platts Oilgram. Platts Oilgram skrásetir handlar, sum verða gjørdir við olju frá teimum stóru leiðunum í Útnyrðingsevropa, og almannakunnger hvørt kvøld ein prís fyri hvørja leiðina sær.

**Mynd 2.1-4**

Prísurin á ráolju frá øðrum leiðum kann verða avtalaður í mun til eina notering fyri prísin á eini aðrari leið. Prísurin fyri olju kann t.d. verða avtalaður ájavnt við Brent-prísin við ískoyti ella frádrátti, sum veldst um, hvussu góð oljan er, nær og hvar hon verður latin, eins og tey vanligu kappingarviðurskiftini, tá avtalan verður gjørd.

Brent-prísurin er tann, sum hevur mestu ávirkanina, og er prísurin á ráolju frá bretsku oljuleiðini Brent. Hendan olja verður eisini handlað á pappírsmarknaðinum (International Petroleum Exchange) í London sum oljufutures, t.e. olja, sum skal latast einaferð í framtíðini.

Av tí at olja er løtt at flyta, er gott samsvar við oljuprísirnar aðrastaðni, sum t.d. arabiska olju (Dubai) ella olju, sum verður noterað á eysturstrond USA (West Texas Intermediate). Er munur á prísinum, stendst hann í flestu førum av flutningskostnaði ella muni á góðsku. Sostatt kann tosast um ein heimsumfevnandi oljumarknað, sum alt meiri líkist øðrum rávørumarknaðum.

Oljuprísurin var ógvuliga ymiskur í sjeytiárunum og fyrst í áttatiárunum. Í 1972-73 og 1978-79 eydnaðist felagsskapinum hjá oljuútflytaralondum, OPEC, at brúka sítt vald og tvinga stórar hækkingar í oljuprísinum ígjøgnum. Fyrst í áttatiárunum gekst ikki so væl hjá OPEC-londunum at standa saman, og í 1986 fullu prísirnir nógv. Verður roknað í føstum prísum, er ráoljuprísurin kortini framvegis eitt sindur hægri enn í 1972.

Oljuprísirnir eru framvegis sera skiftandi. Seinastu tvey árini hevur Brent-prísurin á ráolju stundum ligið niðri á 16 USD fyri fatið og stundum uppi á 24 USD. Stór óvissa er um, hvussu gongdin verður í oljuprísinum í framtíðini. Felagsskapurin hjá londum, sum innflyta olju, IEA (International Energy Agency) hevur í einum yvirliti í 1995 arbeitt við tveimum ógvuliga ymiskum hugsandi gongdum fram til ár 2010. Í øðrum døminum rokna teir við støðugum realprísum á olju, umleið 18 USD fyri fatið, í hinum hava teir prísir, sum hækka fram til ár 2005 upp í 28 USD fyri fatið og síðani verða støðugir. Amerikanska orkumálaráðið hevur várið 1997 arbeitt við einum grunddømi við spakuliga hækkandi realprísum, upp í uml. 21 USD/fatið í 2015, men eisini við bæði einum dømi við lágum prísi, 14 USD og einum við høgum prísi, uppí uml. 28 USD/fatið í 2010.

Marknaðurin fyri jarðgass skikkar sær ikki rættiliga sum oljumarknaðurin. Víða um heimin økist framleiðslan og nýtslan av jarðgassi, men orsakað av

kostnaðinum og teimum tøkniligu forðingunum fyri at flyta gass kann ikki sum fyri olju tosast um ein veruligan heimsmarknað fyri jarðgass. Fyri føroyingar er skilabest at líta at gassmarknaðinum í Vesturevropa, sum er í stórum vøkstri, m.a. tí at jarðgass verður mett meiri umhvørvisvinarligt enn annað steinrunnið brennievni. Kostnaðurin at leggja rørleiðingar til at flyta og býta gassið út hevur við sær, at jarðgass verður selt eftir longum sáttmálum, sum mangan fevna um alla livitíðina hjá eini gassleið, t.d. 30 ár, og sum hava í sær reglur um at stilla prísin eftir ávísum ábendingum, t.d. vanligu prísleguni ella prísinum á øðrum, sum kann brúkast í staðin fyri jarðgass, t.d. olju og koli. Vanligt hevur verið, at almenn monopol hava havt útbýtingina av gassi í hondum. Bæði innan ES og í teimum einstøku londunum í Vesturevropa, serliga Bretlandi, verður arbeitt fram ímóti at gera gassmarknaðin fríari. Líkt er til, at hetta fer at hava við sær, at prísurin verður ikki so støðugur og fer at hava hug at falla.

**Leitingar- og framleiðslukor**

Orkuprísirnir og kappingin millum lond og leitingarøki í Útnyrðingsevropa og øðrum pørtum av heiminum hava havt stóra ávirkan á tey kor, sum boðin verða feløgunum, ið vilja leita eftir og útvinna kolvetni.

Fyrst í áttatiárunum, tá orkuprísirnir vóru høgir, og væntað varð, at teir fóru longur upp, høvdu ella fingu lond í Útnyrðingsevropa sær loyvistreytir, sum kravdu ríkisluttøku og nógvar eyka skyldur sum t.d., at leitað varð á leiðum, sum stórur ivi var um, og at skipað varð fyri uppvenjing og gransking v.m.

Flestu lond settu í verk eykaskatt fyri tær stóru inntøkurnar, sum vóru í ljósmála. Skattingin varð løgd soleiðis til rættis, at bert serliga høgar inntøkur vórðu skattaðar.

Danmark hevði t.d. 40% í partafelagsskatti, framleiðsluavgjøld (royalty) og ein serligan kolvetnisskatt, sum var 70% av serliga stórum inntøkum. Harafturat skuldi statsfelagið DONG luttaka við millum 20 og 50%, og hini feløgini skulda rinda tess part av leitingarkostnaðinum. Fingu feløgini leitingarloyvi á serliga áhugaverdum leiðum, varð loyvið tengt saman við loyvi á minni áhugaverdum leiðum, granskingar- og uppvenjingarskyldum v.m.

Av tí at orkuprísirnir hava verið so lágir, hevur verið slakað í treytunum. Í Danmark er partafelagsskatturin settur niður í 34%, og framleiðsluavgjaldið er tikið burtur fyri nýggj loyvi. Statsluttøkan er sett niður á 20%, har statsfelagið sjálvt rindar sín kostnað. Eisini er farið frá uppvenjingar- og granskingarskyldu; og leiðir verða ikki tengdar saman longur. Kolvetnisskatturin er varðveittur, men hevur higartil ikki givið inntøkur av týdningi.

Í Bretlandi var framleiðsluavgjald fyri nýggjar leiðir tikið burtur longu í 1982. Ein serligur kolvetnisskattur (PRT), sum upprunaliga var 75%, varð í 1993 settur niður í 50% fyri verandi leiðir og tikin av fyri nýggjar leiðir. Á sama hátt er partafelagsskatturin settur niður úr meir enn 50% í áttatiárunum í 33% í dag.

Í Noregi varð framleiðsluavgjaldið tikið burtur fyri nýggjar leiðir eftir oljuprísfallið í 1986 og varð í 1992 tikið burtur fyri gassframleiðslu. Sostatt gjalda bert gamlar oljuleiðir framleiðslugjald. Í 1992 varð skattaskipanin løgd um, so partafelagsskatturin varð settur niður úr 50,8% í 28%, samstundis sum serskatturin fyri oljuvinnuna varð settur upp úr 30% uppí 50%. Í ljósinum av vaksandi tilvitskuni um umhvørvið hevur Noreg sett eitt avgjald fyri kolsúrni ($CO_2$).

Norski staturin fekk sær góðan fyrimun av, at norska økið var so áhugavert,

men hevur eisini verið noyddur at laga seg til lægri oljuprísir og til treytirnar í loyvisdirektivum hjá ES.

Teir stóru møguleikarnir í norskum øki sóust serliga aftur í reglunum fyri statsluttøku. Fyrst í áttatiárunum skuldu útlendsk feløg bera partin hjá statsluttakaranum, sum var 50% av leitingarkostnaðinum. Tað merkir, at tey rindaðu tvær ferðir sín part, meðan norsk feløg sluppu heilt undan. Statoil hevði statsluttøkuna um hendi. Miðskeiðis í áttatiárunum varð parturin hjá statsfelagnum býttur sundur í ein beinleiðis almennan part og ein part til Statoil. Tá farið varð undir framleiðslu, kundi statsins partur hækkast upp í 80%.

Í seinasta loyvisumfarinum varð statsligi parturin minkaður niður í 39%, og har vóru eisini nøkur loyvi uttan statsluttøku. Glíðistigin (sum gav statinum ein størri part, alt eftir hvussu stór leiðin var) varð tikin burtur fyri nýggj loyvi og fyri fleiri loyvi, sum fyrr vóru givin.

**Hættir at minka kostnaðin**

Av tí, at tað er vágamikið og dýrt at leita eftir olju, ganga oljufeløg oftast saman í leitingarsamtøk við einum teirra sum fyristøðufelag fyri alt samtakið. Vanligt er, at úr tveimum upp í fimm feløg ganga saman í ein loyvisbólk. Somu bólkarnir standa vanliga saman um at útbyggja tær leiðir, sum spyrjast burturúr teirra leitingum.

Samarbeiðið hjá oljufeløgunum við veitingarfeløg og ídnaðarfyritøkur í "strategiskum samgongum" hevur havt við sær týdningarmikil tøknilig frambrot. Burtur úr hesum sannroyndum er komin tann nýggja mannagongd hesi seinastu árini, at skipaðar eru strategiskar samgongur til tess at útbyggja leiðir. Tað hevur víst seg, at hesin samarbeiðsháttur hevur bøtt um kappingarførið, og samgongurnar verða í dag mettar sum besta leiðin at skerja kostnaðin fyri útbyggingar á víðum havi. Tær strategisku samgongurnar eru í mongum førum grundaðar á avtalur um, at váðin og vinningurin skulu býtast millum oljufeløgini, ídnaðarfyritøkurnar og tænastuvinnuna hjá oljuídnaðinum. Tá útbyggingar verða gjørdar, kann talan t.d. vera um heildarverktøkusáttmálar **(**totalentreprise**)** av EPIC-slagnum (Engineering, Procurement and Installation Contract).

Samgongurnar verða oftast gjørdar fyri hvørja verkætlan sær, og tær ganga sundur ella fáa nýtt skap, tá verkætlanin er framd. Strategiskar samgongur og samarbeiði millum feløg fer væntandi at koma meiri fyri, tí bert tey heilt stóru feløgini kunnu halda fast við ein dagførdan sakkunnleika á øllum økjum.

## 2.1.7 Samandráttur

Føroyar leggja til brots í oljuleitingini í eini tíð við ymiskum rákum.

Stórur búskaparligur vøkstur kring um í heiminum hevur økt um eftirspurningin eftir kolvetni. Oljufeløgini gera nógv burtur úr at varðveita og økja um tær tøku nøgdirnar. Marknaðurin fyri olju er óstøðugur eins og aðrir rávørumarknaðir. Oljuprísurin broytist nógv, og stór óvissa er um, hvussu prísgongdin verður í framtíðini. Á jarðgassi økjast bæði eftirspurningur og framboð, ikki minst í Evropa, samstundis sum prísútlitið verður heldur óvissari.

Í Útnyrðinsevropa er kolvetni nú útvunnið í stórt mát í 30 ár, og hóast leitingar- og framleiðslukostnaðurin er høgur sammett við onnur øki í heiminum, er leitingarvirksemið framvegis stórt, og tað otar seg út á nýggjar leiðir á størri havdýpi, eitt nú vestan fyri Hetland, við Miðnoreg, Írland og Føroyar. Hetta gerst eitt nú við teimum tøkniligu framstigum, sum eru gjørd innan leiting og útvinning og við nýggjum lønandi útbyggingar- og framleiðsluhættum, herundir útbúnaði á havbotninum og flótandi framleiðsluútbúnaði. Tað økta borivirksemið hevur havt við sær, at nógvur eftirspurningur er eftir boripøllum, ikki minst teimum stóru pøllunum, sum hóska til dýpið undir Føroyum.

Útnyrðingsevropa, og eisini Føroyar, er í harðari kapping við oljuøki kring um allan heimin, eisini lond sum til fyri stuttum ikki vóru atkomandi hjá altjóða oljufeløgunum, t.d. londini í gamla Sovjetsamveldinum, sum tó fyri ein part eru merkt av politiskum ótryggleika. Av tí at oljufeløgini vilja spjaða váðan út um heimin, fara tey at hava áhuga fyri Føroyum, hóast stór óvissa enn er um jarðfrøðina.

Meðan oljuprísirnir liggja heldur lægri enn í áttatiárunum, og sloppið er framat fleiri oljuøkjum, er maktjavnin millum oljufeløg og ríkisstjórnir farin at halla feløgunum til fyrimunar, so stjórnirnar, eisini í Útnyrðingsevropa, hava hildið tað verið rætt at gera treytirnar fyri kolvetnisleitingum og framleiðslu lagaligari enn áður.

## Umrokningar og styttingar

| | | |
|---|---|---|
| 1 m$^3$ av olju | | = 33.315 ft$^3$ = 6.2898 føt (bbls) |
| 1 fat av olju | | = 0,159 m$^3$ (159 litrar) |
| 1 Nm$^3$ av gassi | | = 1 m$^3$ av gassi undur vanligum umstøðum (1 atm.og O$^o$ C) |
| 1 m$^3$ | | = 35.31 ft$^3$ |
| 1 Nm$^3$ av gassi | | = 0.00679 føt í oljuvirði |
| 1 m$^3$ í oljuvirði | | = 1 m$^3$ av olju ella 1.000 m$^3$ av gassi |
| M | = 103 | = 1 túsund (kilo) |
| MM | = 106 | = 1 miljón (mega) |
| MMM | = 109 | = 1 miljard (giga) |
| MMMM | = 1012 | =1 biljón (terra) |

## 2.2 ÚTLITINI FYRI OLJUVINNU UNDIR FØROYUM

Tá ið mett verður um framtíðarvánirnar fyri oljuvinnu undir Føroyum, eru nakrar grundleggjandi fortreytir at byggja á. Tvær tær týdningarmestu eru: 1) um jarðfrøðilig viðurskifti á leiðini gera tað sannlíkt, at kolvetni (olja og gass) kann vera í nóg stórum nøgdum, so tað loysir seg fíggjarliga at útvinna tað, og 2) um nóg stórur áhugi er í oljuvinnuni at leggja neyðugan pening í ta leiting, ið krevst, til tess at kunna finna kolvetni í rakstrarverdum nøgdum, og á tann hátt at skapa gróðrarlíkindi fyri veruligari oljuídnaðarligari menning, sum kann halda á fleiri tíggjuáraskeið inn í framtíðina.

Í brotinum 2.2.1 verður tikið saman um tann almenna kunnleika, ið er um jarðfrøðilig viðurskifti og kolvetnismøguleikar kring Føroyar. Nakað verður grundað á frágreiðingina, sum Oljuráðleggingarnevndin legði fram í juni 1993. Í hesi frágreiðing var fyribils greitt frá týdningarmestu oljujarðfrøðiligu heitunum, yvirlit var gjørt yvir jarðfrøðiligu søgugongdina á Føroyaleiðini, og mett var fyribils um leitivánirnar. Síðan hava áhaldandi forkanningar (í fyrstuni víðfevndar seismiskar kanningar, sum Western Geophysical Corporation gjørdi í 1994 og 1995) saman við nágreiniligari upplýsingum úr grannaøkjum, givið eitt nógv hollari upplýsingargrundarlag at meta um serstøku kolvetnisvánirnar undir Føroyum.

Grundað á nógvar viðkomandi tættir, bæði jarðfrøðiligar og tøkniligar og ikki minst "leitingarsálarfrøðiligar", verður í broti 2.2.2 mett um leitingarvánirnar á Føroyaleiðini sum heild, t.e. tann áhuga, ið oljuídnaðurin hevur í løtuni at fara undir oljuleitingar kring Føroyar av álvara. Eisini verða úrslitini frá tilmælisumfarinum, ið var á heysti 1996, løgd fram. Oljufeløgini vístu tá á nøkur ávís øki (teigar), sum tey halda vera áhugaverd í sambandi við fyrsta útbjóðingarumfar kring Føroyar.

Brot 2.2.3 tekur saman um høvuðstættirnar í jarðfrøðiligu tulkingini, sum gjørd er innanhýsis, grundað á upplýsingar, sum fingnar eru burtur úr forkanningum higartil, og í stuttum verður nomið við leitingarfortreytirnar fyri at seta í verk eitt fyrsta loyvisumfar.

### 2.2.1 Jarðfrøðiligar fortreytir og oljuvánir

Føroyski landgrunnurin liggur landafrøðiliga í Norðuratlantiska útjaðaranum (Atlantsmótinum) og er soleiðis natúrligur partur í tí útlitskervi av legugrýtislægdum, ið røkkur úr Írlandi (t.d. Porcupine lægdini, sí mynd 2.2-1) tvørtur um økini vestan fyri Hetland til økið úti fyri Miðnoregi (t.e. Møre og Vøring lægdirnar) norðanfyri. Tá ið mett verður í fyrstu atløgu um jarðfrøðiligu viðurskiftini í legugrýtislægdunum undir føroyska landgrunninum og kolvetnisvánirnar í teimum, hevur tað stóran týdning at royna at eftirgera, hvussu ymisku økini hava ligið í teirri torgreindu søguni um pláturørslur í jarðskorpuni og ta samsvarandi gongdina við legugrýtisgerð og gosvirksemi á Norðuratlantisku leiðunum.

Tó at staklutirnir í hesum eftirgerðum (myndlum) mangan eru svikaligir, kunnu teir kasta fyribils ljós á, hvar eldri legugrýtislægdir hava verið (serstakliga tær Permo-Triassisku og tær Jurassisku, sí mynd 2.2-2) og um

jarðfrøðiligar bygnaðir í høvuðsheitum. Harumframt kunnu víðar leiðir við ongum oljuútlitum, ið liggja undir jarðfrøðiliga sæð ungari djúphavsskorpu, sum hevur lagt seg seinastu stívliga 50 mió. árini, verða kortlagdar við myndlunum. Eisini kunnu samanburðir við leiðir, sum upprunaliga hava ligið tætt upp ímóti Føroyaleiðini, geva eina hóming av teimum týdningarmestu jarðfrøðiligu táttunum, sum brúktir verða í sambandi við útlitsmetingar.

<table>
<tr><th>Øldir</th><th colspan="2">Tíðarskeið</th><th>Aldur (mió. ár)</th></tr>
<tr><td rowspan="8">Nýøld</td><td rowspan="2">Kvarter</td><td>Holocen</td><td>0 - 0,01</td></tr>
<tr><td>Pleistocen</td><td>0,01 - 2</td></tr>
<tr><td rowspan="6">Tertier</td><td>Pliocen</td><td>2 - 5</td></tr>
<tr><td>Miocen</td><td>5 - 25</td></tr>
<tr><td>Oligocen</td><td>25 - 38</td></tr>
<tr><td>Eocen</td><td>38 - 55</td></tr>
<tr><td>Paleocen</td><td>55 - 65</td></tr>
<tr><td colspan="2">Krit</td><td>65 -145</td></tr>
<tr><td rowspan="3">Miðøld</td><td colspan="2">Jura</td><td>145 - 215</td></tr>
<tr><td colspan="2">Trias</td><td>215 - 250</td></tr>
<tr><td rowspan="6">Fornøld</td><td colspan="2">Perm</td><td>250 - 285</td></tr>
<tr><td colspan="2">Kol</td><td>285 - 360</td></tr>
<tr><td colspan="2">Devon</td><td>360 - 410</td></tr>
<tr><td colspan="2">Silur</td><td>410 - 440</td></tr>
<tr><td colspan="2">Ordovicium</td><td>440 - 505</td></tr>
<tr><td colspan="2">Kambrium</td><td>505 - 590</td></tr>
<tr><td colspan="3">Upphavsøld</td><td>590 - 4600</td></tr>
</table>

Note: in the printed table, Krit sits in the Miðøld rows; the row structure above places Miðøld spanning Krit, Jura, Trias.

**Mynd 2.2-2 Jarðfrøðilig tíðartalva**

Tá ið mett verður um oljuútlitini, t.e. útlitini at finna oljulindir, og hvussu stórir oljufundirnir kunnu vera, verður bygt á somu jarðfrøðiligu meginreglur, um tað snýr seg um stakar bygnaðareindir, heilar teigar (blokkar, sí mynd 2.2.-3), stór øki ella heilar legugrýtislægdir, og eingin serligur munur er á, um oljuídnaðurin ella myndugleikarnir gera metingarnar (mynd 2.2-4).

**LÍKNING FYRI STØÐUTAKAN:**

**Oljuvirðið** í dagsins prísum (NPV = Net Present Value) verður roknað soleiðis:

*(Sannlíkindi fyri fundi x Fundarstødd x Prís) - (Íløgur + Rakstur + Skattur/Avgjøld)*

Jarðfrøðiligi parturin er:

*Sannlíkindi fyri fundi x Fundarstødd:*

*Sannlíkindi* verður roknað út við at falda saman sannlíkindini (**p**) fyri hvørji luteind sær:

**p** (Móðurgrýti) x **p** (Búning) x **p** (Goymslugrýti) x **p** (Fella við tøttum takgrýti) x **p** (Fasa)

Tískil gerst tað samlaða sannlíkindi = 0, um bert sannlíkindi fyri einari av øllum luteindunum er = 0.

*Fundarstøddin* verður roknað frá fellumátunum:

*Hædd x Longd x Breidd x Umrokningartal*

**Mynd 2.2-4 Líkning, ið eitt oljufelag byggir sína støðutakan á í sínum prospektmetingum**

Veruligur møguleiki at finna olju ella gass er bara, um alt "oljukervið" virkar við rættari tíðarsøgu, soleiðis at 1) móðurgrýti er, 2) at tað er búnað við søkkingum og upphiting í jarðskopuni, 3) at oljan hevur kunnað leitað sær (migrerað) úr móðurgrýtinum og er savnað í poknutum goymslugrýti, sum er í 4) lokaðari skipan (oljufellu) við 5) tøttum takgrýti. Harafturat krevst 6) at samansavnaða oljan ikki seinni er umgjørd/oyðiløgd av hita ella bakterium. Eru ikki allir seks tættirnir við, og er tíðargongdin ikki røtt, er olja vanliga ikki í nøgdum, sum eru nóg stórar til, at tað loysir seg at fara undir útvinning. Í royndum verða ymisk leitimið[3] (prospekt) og leitimyndlar[4] (playtypur) lýst og mett hvør sær.

Á leiðini vestan fyri Hetland er við vissu staðfest, at "oljukervið" virkar,

3 Eitt **leitimið** (prospekt) er ein avmarkað bygnaðareind (strukturur) í undirgrundini, sum frá seismiskum kanningum v.m. kann hugsast at innihalda olju ella gass og við hesum kann vera eitt egnað stað at gera eina leitiboring.

4 Ein **leitimyndil** (playtypa) fevnir um teir ymisku jarðfrøðiligu tættirnar í felag við atliti at møguligum oljufundum á einum ávísum stað, t.e. móðurgrýti, goymslugrýti, fella og ta samlaðu søguna við búning, rensli (migratión) og savnan saman (akkumulatión) av olju, sum eru fortreytir fyri, at olja (ella gass) kann finnast í onkrum ávísum stað í undirgrundini (í einum leitimiði).

av tí at rakt er við nógvar og stórar fundir. Fundirnir eru knýttir at ymiskum leitimyndlum (sí seinni), sum eftir øllum at døma hava sama móðurgrýti, við somu búningarsøgu viðvíkjandi móðurgrýtinum og upprunarensli (migratión). Munurin er í goymslugrýti (reservoir), takgrýti, vond (strukturi) og nær oljan at enda er savnað í fellunum. Greitt er, at tá ið oljufeløgini meta um leiðirnar um Føroyar, halda tey útlitini vera góð fyri at somu leitimyndlar kunnu nýtast, sum á leiðunum vestan fyri Hetland.

***Móðurgrýti***

Eyðsætt tað týdningarmesta móðurgrýtið í sambandi við olju, sum funnin er á leiðini vestan fyri Hetland, er leirgrýti (fløgugrót) úr seinjura tíð **(**mynd 2.2-2) líkt tí fløgugróti, haðan meginparturin av oljuni stavar, sum er í Norðsjónum. Slíkt móðurgrýti verður hildið at vera víða um í teimum djúparu lægdunum undir jørð á okkara leiðum, men helst er lítið og einki til, ella er slagið vánaligt á flestum jarðfrøðiligum ryggjum og grunnum (sí mynd 2.2.-5). Grundað á kunnleika um alt tað Norðuratlantiska økið, Eysturgrønland tikið við, kann verða víst á annað móðurgrýti, bæði eldri (til dømis úr yngri Devon, yngri Karbon, yngri Perm og eldri Jura tíð) og yngri (til dømis miðkrit ella eldri Tertier tíð).

***Búning og upprunarensl***

Ógvuliga ymiskt er, hvussu Jura-móðurgrýtið er hitabúgvið, men vanliga er tað ovurbúgvið (gass verður gjørt) í flestu djúpu lægdunum undir jørð og búgvið (olja verður gjørd) ella óbúgvið oman á flestu ryggjum. Í djúpu lægdunum er olja helst gjørd longu í Krittíðini (fyri meira enn 65 mió. árum síðan) ella samstundis sum, og beint eftir, at tjúkkar basaltfláir vórðu gjørdar tíðliga í Tertiertíðini (fyri uml. 50 - 60 mió. árum síðan). Í sambandi við nakrar oljufundir vestan fyri Hetland verður hildið, at í minsta lagi tvey tíðarskeið við oljugerð/rensli hava verið, og eitt millumbil tá ið ein partur av fyrstu oljuni er oyðilagdur av bakterium. Stórur vandi kann eisini vera fyri hesum á føroyskum øki, men upplýsingargrundarlag at meta um hetta er ikki tøkt enn. Um annað móðurgrýti kanska eisini er har, fer tað at minka um óvissuna við leitingini. Alment er tó galdandi, at elsta móðurgrýtið hevur gjørt olju ógvuliga tíðliga, eftir øllum at døma áðrenn fellurnar vórðu gjørdar, meðan ovaru Krit- og Tertier-grótsløg ikki eru búgvin allastaðni á leiðunum.

***Jarðgoymslur og fellur***

Oljufundirnir vestan fyri Hetland, og tey eyðsæddastu leitimiðini annars tykjast at knýta seg at trimum ymiskum høvuðs-leitimyndlum (mynd 2.2-6):

1) Undan-rivu leitimið frá Miðøld jarðar ella eldri, t.e. knýtt at grótsløgum, sum eru eldri enn eitt skeið í krittíðini við nógvum rivugerðum í jarðarskorpuni ("rifting"). Dømi: Clair, Solan, Strathmore (sí mynd 2.2.-5).
2) Krit samtíðar-rivu leitimið (samstundis sum rivugerðirnar). Dømi: ongir stórir fundir, nøkur leitimið.
3) Paleocenur kanalsandur. Dømi: Foinaven og Schiehallion við

hjáfundum.

Í 1. slagnum er goymslugrýtið ógviliga ymiskt til aldurs, og sum oftast er tað klovnað grundfjall og sandsteinur úr Devon, Karbon, Trias og Jura tíð. Bygnaðirnir eru knýttir at umskaringum, men takgrýtið er sjófløgugrót úr seinari Jura- ella Krittíð.

Í 2. slagnum er goymslugrýtið sandsteinur úr Krittíðini. Oljufellurnar kunnu verða íkomnar av røringum í jarðskorpuni, ella fláabygnaðurin í sjálvum sær kann hava rættað skapið. Takgrýtið ella "innsiglið" er sjófløgugrót frá Krittíð og tættar umskaringarflatur.

Í 3. slagnum er goymslugrýtið gjørt úr Paleocenum kanalsandi, og fellan er annaðhvørt upprunalig stratigrafisk (í hesum førinum á tann hátt, at sandur liggur í "kílum" ímillum sjófløgugrótfláir) ella bæði stratigrafisk og íkomin av røringum.

Royndir frá øðrum basaltleiðum hava víst, at basaltið neyvan kann væntast at virka sum takgrýti.

Hóast mong í oljuídnaðinum tykjast halda, at "oljukervið" eisini virkar í pørtum á føroyska landgrunninum, er kortini greitt, at jarðfrøðiligu myndlarnir eru ófullfíggjaðir og innleiðandi, tí upplýsingargrundarlagið er so avmarkað, og eisini vanta djúpar boringar. Hetta hevur stóra leitingaróvissu við sær í einum fyrsta loyvisumfari. Til dømis er ógreitt, hvussu stór øki ovaru Jura og møguliga annað móðurgrýti fevnir um, eins og endurgerðirnar av geografiska umhvørvinum tá, sum kunnu vísa, hvar og hvussu goymslusandur møguliga hevur lagt seg ígjøgnum t.d. Jura, Krit og Paleocenu tíðarskeiðini, eru ógvuliga óvissar. Henda óvissa kemur fram í teimum ógvuliga ymisku myndlunum hjá teimum ymisku feløgunum.

Um lítast kann á, at "oljukervið" virkar í pørtum á føroyska landgrunninum, verður høvuðstrupulleikin hjá oljufeløgunum, tá ið leitað verður í fyrsta loyvisumfari, at finna tey leitimið, har borast kann uttan ovurhondsstóra jarðfrøðiliga óvissu. Í hesum sambandi eru basaltfláirnar og teirra tøkniligu avbjóðingar ógvuliga týðandi, tí ómetaliga trupult kann vera at vísa á stratigrafisk leitimið í paleocenum kanalsandi ("3" omanfyri), sum krevur nágreindan háupploysiligan "3D" seismikk, men tað er eftir øllum at døma lættari at raka við stórar umskarandi fláakubbar, sum liggja djúpari ("1" og "2" omanfyri) við vanligum "2D" seismikki. Tá ið tulkað og mett verður um leiðir við leitingarvánum úr jarðfrøðiligum sjónarhorni, verður dentur lagdur á at fáa greiði á, hvar ið til ber at leita við tí tøkni, ið tøk er, og hvar víst kann verða á áhugaverd leitingarmál við hesum kunnleika.

### 2.2.2 Leitingarvánirnar: Áhugin hjá oljuídnaðinum fyri føroyska økinum

Undanfarnu 3 árini, t.e. síðan farið var av álvara undir at fyrireika leitingar við Føroyar, er áhugin hjá oljuídnaðinum fyri føroyska økinum vorðin eyðsýndur á ymiskan hátt.

Grundað á áhugan, sum oljufeløgini høvdu fyri at útvega sær jarðfrøðiligan kunnleika á økinum, eru nakrar forkanningar gjørdar. Fyri ein part er farið undir tær við tiltøkum, ið myndugleikarnir hava tikið stig til (seismikkkanningar í 1994 og 1995 og arbeiðið at dýpa Lopra-1 brunnin í 1996), men í flestu førum hava tær verið gjørdar, tí at oljufeløg, seismikkfeløg o.o. hava vent sær til Oljufyrisitingina og biðið um loyvi at seta ymiskar forkanningarverkætlanir í gongd. Nakrar av hesum verkætlanum hava havt sum endamál at bøta um jarðfrøðiligu heildarfatanina á leiðini, aðrar hava havt neyvari atlit at kortleggingum á avmarkaðum partsøkjum. Leitingarhættirnir hava fevnt frá vanligum seismiskum, sigulmagns- og tyngdarmátingum til sigulmagnsmátingar frá flogførum við serútbúnaði og til ymiskar hættir at staðfesta, um kolvetnisslóðir eru á landi, á vatnskorpuni og havbotninum, men eisini til at fevna um meira royndarligar seismiskar leitingarhættir við serligum atliti at torføru jarðfrøðiligu umstøðunum á leiðini.

Samstundis sum neyðugi jarðfrøðiligi kunnleikin verður bygdur upp, savna fleiri oljufeløg seg í meiri og minni formligar bólkar við atliti at framtíðar samstarvi um leitingar á føroyska økinum.

Annar partur av oljuídnaðarfyrireikingum hevur sýnt seg við, at nógv umboð fyri oljufeløg og ymisk tænastufeløg hava verið í Føroyum. Í fyrstuni var serliga talan um samband við føroyskar oljumyndugleikar, men seinni er víðfevnt samband fingið í lag við føroyska vinnu í víðari merking.

Seinast hevur oljufelagaáhugin fyri føroyska økinum víst seg við, at 23 feløg - teirra millum størsti parturin av heimsins størstu handils-oljufeløgum - eftir áheitan frá Oljuráðleggingarnevndini á heysti 1996 vóru við í einum tilmælisumfari, har tey vístu á, hvørjar leiðir (teigar) tey, hvør sær ella í bólkum, vilja hava tiknar við, tá ið myndugleikarnir fara at gera av, hvørjar leiðir verða útbodnar í fyrsta útbjóðingarumfari, sum stendur fyri durum.

Úrslitið av tilmælisumfarinum má metast at vera ógvuliga gott. Tey 23 feløgini sendu 13 ymisk tilmæli, har tey vísa á 108 heilar teigar og 26 teigapartar (sí mynd 2.2.7), sum tey vilja hava við, tá ið útbjóðingarleiðin verður ásett. Feløgini vórðu biðin um at flokka teir teigar, sum tey hvør í sínum lagi valdu út, í tveir bólkar: "áhugaverdir" og "ógvuliga áhugaverdir". Burtur úr allari teirri úrvaldu leiðini lýstu eitt ella fleiri feløg 43 heilar teigar og 13 teigapartar sum "ógvuliga áhugaverdar". Sum heild samsvarar tilmælisúrslitið væl við okkara egnu jarðfrøðiligu metingar (sí niðanfyri).

At tilmælisúrslitið varð almannakunngjørt (tíðindaskriv tann 13. desember 1996) hevur ivaleyst eggjað oljuídnaðinum til gjølligari at meta um allar tær tilmæltu leiðirnar við at útvega sær fleiri upplýsingar og gera neyvari tulkingar. Harumframt fara seismisk feløg at brúka tilmælini sum íblástur til at savna fleiri upplýsingar við tí í hyggju at selja áhugaðum oljufeløgum tær.

Í løtuni tykist stórur áhugi at vera í altjóða oljuídnaðinum fyri føroyska økinum. Um hesin áhugi er nóg stórur til at oljufeløgini - í sambandi við ætlað útbjóðingarumfør - vilja binda seg til tær rættiliga stóru íløgurnar, sum vanliga fylgja við leitingarloyvinum, fer at verða treytað av náttúrugivnum eins og politiskum/fíggjarligum umstøðum.

**Leiðin vestur úr Hetlandi**

Samstundis sum Norðsjógvurin í oljuleitingarsamanhangi er komin á eitt búgvið stig, har ídnaðurin serliga savnar seg um at fáa meira burtur úr oljuleiðum, ið hann longu veit um, er oljuleitingarídnaðurin í Útnyðringsevropa farin at hyggja at "útjaðara"-leiðum, serstakliga miðnorska landgrunninum, Barentshavinum og leiðini vestan fyri Hetland. Seinastu fáu árini er áhugin meira farin út á størri dýpi fram við øllum Atlantsmótinum, eftir hellingini út ímóti djúpa Atlantshavinum.

Ein kjarnuleið í hesi trákkan út á Atlantsmótið hevur verið leiðin vestan fyri Hetland. Undanfarnu 25 árini hava langar og torgreindar oljuleitingar verið á hesari leið, og síðan byrjað varð í 1972 eru meira enn 130 boringar gjørdar. Nógv vónbrot hava verið, fyri ein part tí royndarholini mangan vóru "turr" tað fyrsta skeiðið, men eisini tí ein av teimum veruliga stóru oljufundunum (Clair, sum BP fann í 1977) hevur verið ógvuliga trupul, og ikki fyrr enn nú tykist vinnuligt grundarlag at vera fyri at fara undir at útvinna olju haðani.

Samstundis sum dýpdartøknilig framstig hava gjørt tað møguligt at leita á støðugt størri havdýpi, hevur myndin broytt seg ógvisliga upp ígjøgnum 1990-árini. Eftir at Amerada Hess fann tveir áhugaverdar fundir, sum kortini góvu lítið, fyrst í 1990-árunum á rættiliga grunnum sjógvi, hava nýggjari fundir á djúpum sjógvi (Foinaven, BP 1992; Schiehallion, BP 1993; Suilven, BP 1996) og hjáfundir í tilknýti til hesar (Cuillin, Alligin, Loyal) gjørt økið til eitt av teimum áhugaverdastu á bretska meginlandsgrunninum. Harafturat hevur eydnast at stytta tíðina frá tí, at olja verður funnin, til farið kann verða undir vinnu - frá vanliga 10 árum niður í helvtartíð.

Teir leitingarmøguleikar, sum bæði ídnaður og myndugleikar meta um, eru nógv treytaðir av samsvarsleitingum frá grannaleiðum við ávístum kolvetnismøguleika og út frá jarðfrøðiligum samanburðum sum heild. Leitingaráhugin á føroyskum leiðum er tí fyri ein stóran part íkomin av seinastu oljufundunum vestan fyri Hetland, av tí at nakrar av grundleggjandi jarðfrøðiligu fortreytunum fyri olju har verða hildnar at kunna síggjast aftur á føroyska landgrunninum. Samstundis verða tøknilig framstig alsamt gjørd, m.a. við djúphavsleiting, vatnrættari boritøkni (hevur við sær at vinnuútreiðslurnar verða nógv skerdar), minni kostnaðarkrevjandi útgerð (fyri ein part flytiligari), og við atliti at leitingum á leiðum sum teirri føroysku, sum liggja undir basalti.

Hepna gongdin vestan fyri Hetland, sum seinast kom til sjóndar ígjøgnum bretsku leitingarloyvini í 17. loyvisumfari fram við markinum ímóti hvítu leiðini eystan fyri og sunnan fyri Føroyar, setur týðiligan dám á áhugan, sum oljuídnaðurin nú hevur fyri føroysku leiðunum**.** Við kunnleika til skiftandi raðfestingarnar hjá oljuídnaðinum og tær stundum ógvuliga skiftandi fíggjarligu fortreytirnar - serliga av stórum broytingum í oljuprísum, sum verða stýrdar av rættiliga óstýriligum máttum - kann áhugin kortini skerjast

ógvusliga eftir rættiliga stutta tíð, um summar týðandi fortreytir verða broyttar.

### 2.2.3 Okkara jarðfrøðiligu tulkingar

Seinnu árini er stórt jarðfrøðiligt kanningararbeiði gjørt, serstakliga grundað á seismiskar og aðrar jarðalisfrøðiligar upplýsingar. Jarðfrøðisavnið og GEUS, ráðgevar hjá Oljufyrisitingini, hava gjørt hetta arbeiðið, og frágreiðingar eru skrivaðar at stuðla nevndini. Tulkingararbeiðið heldur støðugt fram, og m.a. fleiri frágreiðingar eru í væntu fram undir ætlaða útbjóðingarumfarið. Samstundis sum hetta myndugleikaarbeiðið verður gjørt, gera oljufeløgini (onkur støk, onnur skipað í bólkar) eitt stórt tulkingararbeiði í sínum fyrireikingum til leitingar, ið liggja fyri stavn. Høvuðsniðurstøðurnar frá hesum kanningum eru fyri ein part lagdar fyri Oljufyrisitingina og nevndina sum munnligar framløgur, í einstøkum yvirlitsfrágreiðingum, eins og týdningarmestu leitimyndlarnir eru nevndir í fleiri tilmælisskjølum frá fleiri oljufeløgum.

Ongar boringar eru enn gjørdar á føroyska landgrunninum, og tí er høvuðsdenturin í tulkingararbeiðinum higartil lagdur á at kortleggja tann jarðfrøðiliga bygnaðin. Metingarnar higartil um oljuvánir eru harafturímóti í høvuðsheitum bygdar á sammetingar við grannaleiðirnar, serliga leiðina vestur úr Hetlandi, har mong úrslit frá eldri og nýggjari leitingum eru fingin, og partvíst eisini á kunnleika um Eysturgrønland og leiðirnar út fyri Miðnoregi. Harumframt verður nógvur dentur lagdur á, um skilagóð leiting í roynd og veru kann verða framd, og eisini á hvussu væl tað er gjørligt at "síggja ígjøgnum" gosgrótsløgini (basaltið) við seismiskum og øðrum jarðalisfrøðiligum arbeiðsháttum.

Arbeiðið hevur havt við sær, at partleiðirnar, sum ein roynd, eru flokkaðar í nakrar bólkar, sum so við og við eru vorðnir meira nágreindir, og sum sjálvandi verða dagførdir so hvørt. Niðanfyri verður tikið saman um hesar flokkar, men neyðugt er, at kortgrundarlagið, sum sýnir nágreindu flokkingina teig fyri teig, verður hildið uttan fyri hesa frágreiðingina av kappingar- og trúnaðarávum.

A: Einki ella tunt basalt, tjúkt legugrýti, sjónsk bygnaðarmynstur (vendur). Møguleiki fyri bæði íkomnum og upprunaligum oljufellum (sí frammanfyri og heitisfrágreiðingar í frágreiðingini frá Oljuráðleggingarnevndini, juni 1993, 2. part, kap. 2.9). Hesar leiðir eru serstakliga á djúpum vatni (dýpi báðumegin 1000m).

B: Heldur tjúkkari basalt, tjúkt legugrýti, góðir møguleikar at síggja vendur. Í fyrsta umfari serliga møguleiki fyri íkomnum oljufellum. Hesar leiðir eru á markinum til flokk A-leiðirnar á rættiliga djúpum vatni (500 - 1000m).

C: Tjúkkari basalt, tjúkt legugrýti, rímiligir møguleikar at síggja vendur. Møguleiki fyri íkomnum oljufellum. Hesar leiðir liggja eitt sindur longri frá kendu oljuleiðunum vestur úr Hetlandi enn leiðirnar í flokkunum A og B (300 - 1000m djúpt vatn).

D: Rættiliga tjúkt basalt, týðiligar legugrýtisvendur, torført at meta um

legugrýtiseginleika, men møguleikar eru fyri fleiri sløgum av leitimyndlum**.** Hesar leiðir liggja langt frá oljuleiðunum á bretska landgrunninum (300 - 1000m).

E: Tjúkt basalt, bara summastaðni gjørligt at hóma tekin um legugrýti undir basaltinum.

F: Sum E, men færri upplýsingar.

G1: Tjúkt basalt, bara onnur sløg av jarðalisfrøðiligum kanningum enn vanligur seismikkur benda á møguleika við vondum og legugrýti niðriundir.

G2: Basaltbotnur. Eingin møguleiki at síggja legugrýti ella vendur við vanligum seismikki. Leiðir í hesi flokking eru um sjálvar Føroyar og á bankum og øðrum uppskotnum ryggjum.

H: Leiðir, sum verða tulkaðar at vera djúphavsskorpa við ongum legugrýti undir og við bara tunnum legugrýti omaná. Hesar leiðir eru serliga í ein útnyrðing og norður úr Føroyum á ógvuliga djúpum vatni.

Nevndu flokkingar avmynda serliga vaksandi jarðfrøðiliga leitingaróvissu - og helst við tí ein fallandi oljufelagsáhuga. Harafturímóti er, við kunnleikanum sum nú er, einki grundarlag fyri at siga, at samband er millum flokkingina (frá A til G) og veruligu oljuvánirnar, av tí at leitingaróvissan her er nógv tengd at tí stigi, tøknin er á í løtuni, og fráleikanum frá leiðum, har olja longu er funnin.

Tá ið mett verður um sannlíkastu leitimyndlar, sum nevndir eru frammanfyri, tykist tað vera møguligt, við tí upplýsingargrundarlagi og teirri tøkni, sum í løtuni er, at fara undir at leita eftir olju við útgangsstøði í øllum teimum nevndu leitimyndlunum (1, 2 og 3) á leiðini í flokki A og partvíst flokki B (møguliga eisini D). Leitimyndil 1 er helst tann einasti, sum í løtuni kann hugsast um á leiðunum í flokki C, og hesin sami myndil kann eisini roknast við at vera tann týdningarmesti í flokki B og D frá byrjan.

### 2.2.4 Niðurstøða

Við støði í týðiliga áhuganum hjá oljuídnaðinum og teimum innanhýsis jarðfrøðiligu tulkingunum, verður hildið, at frá einum oljuleitingarsjónarmiði er grundarlag undir at seta í verk eitt fyrsta útbjóðingarumfar kring Føroyar við stuttari freist.

Samanumtikið mugu leitifortreytirnar til eitt fyrsta útbjóðingarumfar á føroyskari leið soleiðis metast at verða *rímiliga* til vildar. Hetta skal skiljast soleiðis, at leiðin, hóast vóngóðu tættirnar sum eru nevndir frammanfyri, framvegis verður mett sum eitt "útjaðaraøki" og ein "hááðaleið" ("frontier" og "high risk" leið), har enn einki høvi hevur verið at víst á, um kolvetni veruliga er undir Føroyum, og har ógvuliga munadyggar íløgur mugu gerast í sambandi við fyrstu oljuleitingarnar, áðrenn tað (møguliga) verður rakt við fyrstu oljuna, ið kann framleiðast á føroyskari grund.

# 3. PARTUR: UPPSKOTIÐ UM KOLVETNISSKIPAN

## 3.1 VAL AV KOLVETNISSKIPAN

### 3.1.1 Ymiskar kolvetnisskipanir

Tá ið veljast skal kolvetnisskipan eru fleiri fyrimyndir í at velja. Til tess eru fleiri orsøkir. Fyrst er at siga, at skipanir í sambandi við oljuvinnu eru sprotnar úr fyrimyndum, sum eru læntar frá øðrum mineralvinnum. Harnæst eru oljuskipanirnar broyttar upp gjøgnum tíðina av tí, at tøkni, búskapur og politikkur eru broytt. Afturat hesum koma munir frá landi til lands, alt eftir, hvar í heiminum landið er, tess menningarstøði, politisku mentan og búskaparligu samfelagsskipan. At enda er eisini munur á ráevnum, hvar tey eru at finna og í hvussu stórum nøgdum. Innan fyri somu løgdømi fáa væl verið ymiskar skipanir í ymiskum kolvetnisøkjum samstundis.

Vanliga verða kolvetnisskipanir skiftar sundur í *tvey høvuðssløg*: Øðrumegin sáttmálar um *framleiðslubýti ("Production Sharing Contracts", "PSC")* og *tænastusáttmálar ("Service Contracts")* og hinumegin *loyvisskipanir* (eisini róptar *"Concession models") skatta-/avgjaldsskipanir ("royalty- tax models").* Í nøkrum londum er skipaður landsrakstur burturav, møguliga í landsoljufelag.

Høvuðsmunurin er í viðurskiftunum millum stjórnina og oljufeløgini.

*Landsrakstur* burturav er at kalla sjálvsagdur: Í fleiri londum verður tað mett sum landsuppgáva at leita eftir kolvetni, útvinna tað og møguliga viðgera, flyta og selja tað eisini.

Eitt brigdi av landsrakstri er *felagsframtaksskipanin ("joint venture-model")*, har ið landsfelagið ger handilsligan samstarvssáttmála við eitt ella fleiri privat altjóða oljufeløg um at leita eftir kolvetni, útvinna tað o.s.fr.

Í sáttmálum um *framleiðslubýti (PSC)* verður dentur lagdur á, at tilfeingið, sum er ogn samfelagsins, verður útvunnið undir fyriskipan av tí almenna, men oljufeløgini eru uppií. Stjórnin, í okkara føri Landsstýrið, eigur tað kolvetnið, ið útvunnið verður, men oljufeløgini fáa ein part av framleidda kolvetninum aftur fyri at seta váðafúsan kapital í verkætlanirnar og fyri sakkunnleika, arbeiðsmegi o.a. Feløgini marknaðarføra so kolvetnið, møguliga saman við pørtum av ella øllum kolvetninum, sum fellur landinum í lut.

Eitt meira víðgongt brigdi av hesum er sonevndi *tænastusáttmálin* ("Service Contract"), har luturin hjá altjóða oljufeløgunum er avmarkaður til, at tey eru verktakarar fyri stýrið ella fyri landsrikið oljufelag og fáa so gjald afturfyri, annaðhvørt kolvetni ella pening. Í tann mun feløgini átaka sær at váða nakað jarðfrøðiliga ella handilsliga, verður talað um ein "váða-tænastusáttmála", har ið handilsfelagið vanliga fær gjald, sum er partur av útvunna kolvetninum, fyri tað, felagið váðar.

Í *loyvisskipanini* fremur samfelagið myndugleika sín yvir kolvetnistilfeinginum við at veita oljufeløgunum eitt loyvi ella einkarloyvi til sambært ávísum treytum, her uppií at gjalda skatt og avgjøld, at útvinna kolvetni fyri egna rokning og egnan váða, soleiðis at útvunna kolvetnið er ogn felaganna. Tó kemur fyri, at stjórnin krevur, at tað, sum gjaldast skal í skatti og avgjøldum, burturav ella lutvíst verður latið sum kolvetni. Samfelagið, sum eigur ráevnini, krevur sostatt í høvuðsheitum

ánarainntøku sína við skattum og avgjøldum, men kortini í ávísum førum sum inntøku av at reka sítt egna oljufelag.

Loyvisskipanin útihýsir ikki tí, at *oljufeløg, sum eru almannaogn*, eru uppi í virkseminum sum loyvishavar. Hevur almenna felagið høvuðsleiklut í virkisfelagsskapinum, nærkast vit fyrr umrødda felagsframtaks-("joint venture") brigdinum av landsrakstrinum.

Søguliga sæð er loyvisskipanin tann upprunaliga. Í fyrstuni við heilt lítlum eftirliti frá myndugleika síðu.

Í summum londum, t.d. gamla Sovjetsamveldinum, varð sum liður í umskipan av samfelagsbúskapinum á sosialistiskum grundstøði farið yvir til *landsrakstur*. Aðrastaðni, eitt nú í Latínamerika (m.a. í Venesuela) og í Miðeystri, er landsrakstur fingin í lag á tann hátt, at privat, útlendsk oljufeløg eru tjóðartikin.

*Skipanin við sáttmálum um framleiðslubýti* er ment í triðja heiminum, serliga londum, sum áður vóru hjálond. Eitt nú hevur Indonesia verið undangonguland á hesum øki. Grundir kunnu gevast fyri hesi skipanini og eisini fyri landsrakstri burturav, annaðhvørt við at vísa til *ynski tjóðarinnar* um í mestan mun at ráða yvir egnum tilfeingi og egnari vinnumenning og/ella við at vísa til *sosialistiska* próvførslu fyri, at tað almenna skal eiga fyritøkurnar, og/ella at ætlanarbúskapur skal vera ráðandi. Henda skipanin er so sambærlig í londum merkt av ætlanarbúskapi, har ein av próvgrundunum kann vera at tryggja ríviligt av kolvetni, møguliga fyri kostnað niðanfyri heimsmarknaðarprís, til egnar nýtarar, serliga í ídnaðinum.

Sum høvuðsregla kann væntast, at altjóða, handilsligu oljufeløgini heldur vilja sleppa at arbeiða undir tí handilsliga virkisfrælsi, ið vanligt er undir loyvisskipanini. Men stjórnirnar kunnu alt eftir politiskari áskoðan hugsast heldur at vilja annaðhvørt varðveita alt virksemið undir egnari stjórn/landsriknum felagi ella at samstarva við altjóða feløgini sambært sáttmálum um framleiðslubýti ella tænastusáttmálum.

Men í ávísum londum verða tað oljufeløgini, sum heldur velja skipanina við framleiðslubýtissáttmála enn loyvisskipanina, av tí at tey ikki í nóg stóran mun líta á lóggávukervið í viðkomandi landi og støðu tess sum rættarsamfelag. Í hesum londum vilja feløgini heldur hava sáttmálarættarlig viðurskifti við myndugleikarnar, har høvi er at leggja møguligar tulkingarósemjur fyri óheftan gerðarætt.

Fleiri av teimum londum, sum sett hava í verk PSC-skipanina, høvdu frammanundan oljuútvinning, sum bygdi á loyvisskipanina, og høvdu megnað at útbúgvið serfrøðingar innanlands, sum vóru førir fyri at átaka sær uppgávur í sambandi við, at landið sjálvt skuldi gerast meira virkið í oljuvirkseminum. Soleiðis hevur eisini verið í londum, sum sett hava í verk reinan landsrakstur, við tað at tey hava tjóðartikið útlendsk feløg, ið virkaðu har í landinum frammanundan.

*Tænastusáttmálar* eru eisini víða um heim, serliga í Latínamerika, har ið stjórnirnar leggja stóran dent á, at tær sjálvar, sum oftast gjøgnum oljufelag, ið burturav er landsogn, hava evstu ábyrgd fyri leiting, útbygging og framleiðslu, soleiðis at altjóða handilsligu oljufeløgini eru at meta sum verktakarar hjá landsrikna oljufelagnum.

Í Vesturevropa og Norðuramerika er *loyvisskipanin* at kalla einaráðandi, men í fleiri londum í Evropa kann vísast á, at tað almenna er uppií, serliga oljufeløg sum tað almenna eigur. Hetta er galdandi bæði í Danmark, Noregi og fyrr eisini í Bretlandi, sum nú hevur latið ognaráhuga landsins í oljufeløgum yvir á privatar hendur. Grønland hevur eisini eitt alment oljufelag, Nunaoil, sum grønlendska

heimastýrið og danska ríkið eiga við helmingi í part.

Í Noregi hevur statsoljufelagið Statoil fingið litið til týðandi leiklut í nógvum oljuverkætlanum, eisini sum fyristøðufelag. At sleppa undan, at Statoil skal fáa so ovurhonds leiklut í norska samfelaginum, hevur Noreg í fleiri loyvum, saman við lutinum hjá Statoil, eisini tilskilað ríkinum sín serstaka lut, sum Statoil umsitur landsins vegna (fyri fíggjarmálaráðið).

Í Danmark hevur landsrikna felagið DONG (Dansk Olie og Naturgas) ikki havt so týdningarmiklan leiklut, tá ið hugsað verður um leiting og útvinning, men harafturímóti ein høvuðsleiklut, tá ið talan er um at flyta og selja útvunna jarðgassið.

Í Grønlandi hevur Nunaoil tikið lut í forkanningarætlanum sum fyristøðufelag, og væntandi verður felagið við í sáttmálum viðvíkjandi oljuloyvum sum "borin" samstarvsfelagi.

Gongdin hevur havt tað við sær, at skilnaðurin ikki longur er so hvassur millum tey høvuðssløg av skipanum ella myndlum, sum umrødd eru í innganginum. Markið millum ein PSC-sáttmála og ein váða-tænastusáttmála kan vera flótandi. Og í fleiri og fleiri PSC-sáttmálar koma nú staklutir, sum annars hava eyðkent loyvismyndilin, t.d. framleiðslugjald (royalty) og partafelagsskattur.

Samstundis er loyvismyndilin mentur á tann hátt, at ríkið, við loyvistreytunum og eftirlitinum við, at hesar verða hildnar, tryggjar sær, at leiting, útbygging og framleiðsla og stundum eisini kolvetnisflutningurin, verða framd við skili og í samsvari við grundleggjandi samfelagsáhugamál. Sum nevnt kemur eisini ofta fyri, at landsrikið felag er uppi í loyvinum saman við privatu feløgunum, samstundis sum samfelagið, sum tann ið tilfeingið eigur, krevur ágóða sín sum skatt og avgjøld.

Hvussu nýtti myndilin verður róptur, er tí í dag meira ein spurningur um hugmyndafrøði enn um veruliga innihaldið í skipanini, sum verður vald. Hvussu ein skipan so er ella nevnist, so eru nakrir grundleggjandi spurningar viðvíkjandi arbeiðs- og leiðslubýtinum og eisini inntøkubýtinum millum land og oljufeløg, sum støða má takast til.

Í fylgiskjalinum 3.1-1 er sett upp talva, sum ger grein fyri teimum skipanum, sum lýstar eru her frammanfyri.

### 3.1.2 Fortreytir fyri at velja oljuskipan fyri Føroyar

Tá ið ætlað hevur verið um, hvør oljuskipan verður mett at hóska Føroyum best, er bygt á tann veruleika, at øll lond kring Føroyar í Norðuratlants/Norðurevropaøkinum hava valt brigdi av loyvisskipanum. Tað tykist tískil natúrligt at brúka slíka skipan, uttan so at sannførandi próvgrundir eru fyri at brúka eina av hinum loysnunum.

Grundstøðið Føroyum viðvíkjandi er, at í landinum er ikki stórt av serkunnleika, tá ið um ræður kolvetnisleiting og -framleiðslu. Heldur ikki eru privatfeløg, sum fíggjarliga eru ment at fíggja slíkt virksemi. Væntast kann tí, at føroyingar á byrjunarstiginum verða lítið uppi í leiting og framleiðslu. Tí má oljuvirksemið í høvuðsheitum skipast av oljufeløgum, ið ikki eru føroysk.

Valdi myndilin má tryggja, at hesi feløg í fyrstu atløgu halda tað hava áhuga at arbeiða á føroyskum øki, ongantíð betur í so stórum tali, at kapping kemur í; í øðrum lagi mugu tey arbeiða soleiðis, at tað er í samsvari við føroysk samfelagsáhugamál. Harumframt mugu tey krøv, ið skipanin setur um uppílegging, kunna lúkast av føroysku umsitingini.

Ein nýtíðar loyvisskipan má haldast at kunna veita samfelagnum so mikið eftirlit, sum ynskiligt er, og sum tað kemst upp fyri, soleiðis at kolvetnisvinnan verður væl skipað og samsvarandi teimum málum, samfelagið setur. Í slíkum myndli orðar politiska skipanin málini, lóggávuvaldið setur upp høvuðsleikreglurnar, virkast skal eftir, og umsitingin greinir tær út so nágreiniliga, sum neyðugt er, og hevur neyðugu umsjónina við, at tær verða hildnar. Loyvi verður veitt áhugaðum handilsligum oljufeløgum eftir fólkaræðisligari mannagongd. Hetta verður gjørt samsvarandi uttanveltaðum metingarstøði, sum frammanundan er lagt. Undir slíkari skipan kann samfelagið, sum eigur tilfeingið, tryggja sær hóskiliga samsýning sum skatt og avgjøld, og møguliga sum frá líður, at eitt landsrikið oljufelag sleppur upp í part.

Nevndin hevur út frá hesum arbeitt við tí fyri eyga at evna til eina skipan, sum byggir á tað, at myndugleikaatgerðir og útvinningarvirksemi verða hildin greidliga hvørt frá øðrum.

Í royndini hjá nevndini at evna til uppskot til løgtingslóg um kolvetnisvinnu, verður miðað eftir, at annaðhvørt setur Landsstýrið sjálvt í verk alt forkanningar-, leiti- og útvinningarvirksemi, ella gera aðrir tað samsvarandi einum loyvi, Landsstýrið hevur latið, og alt virksemið verður at liggja undir landsstýriseftirliti.

Nevndin hevur, tá ið hon hevur evnað til lógaruppskot og viðmerkingar og eisini hesa frágreiðingina, bygt á ta hugsan, at skipanin verður lagað eftir tí, sum frammanfyri er lýst sum loyvisskipanin ella loyvismyndilin. Sýna royndirnar eftir fyrstu útbjóðingarumførini, at tað ikki fer eftir vónum, settar eru til, hvussu loyvismyndilin roynist í føroyskum høpi - sjálvt eftir at dagføringar eru gjørdar í loyvistreytunum, sum vanligt er at gera frá umfari til umfar - so kunnu samsvarandi hesum verða gjørdar aðrar skipanir fyri kolvetnisvinnu í framtíðini. Hetta ber uttan iva til at gera uttan at broyta lógarverkið, sum nevndin hevur skotið upp.

## Fylgiskjal 3.1-1 Ymsar kolvetnisskipanir

| | **Landsrakstur** | **Sáttmálaskipanir** | **Loyvisskipanir** |
|---|---|---|---|
| Ráevnisánari | Landið | Landið | Landið |
| Framleiðsluánari | Landið | Landið | Oljufelag |
| Tann, ið váðar | Landið | PSC: Oljufelag<br>Hevdbundin tænastusáttmáli: Landið/vertsland<br>Váða-tænastusáttmáli: Sáttmálahavin (oljufelag) | Oljufelag |
| Gjaldsháttur | Um rakstur | PSC: Í høvuðsheitum við kolvetni<br>Tænastusáttmáli: Í høvuðs-heitum við peningi | Í høvuðsheitum við peningi |
| Høvuðsamboð í sambandi við fíggjarviðurskifti | Fullkomið eftirlit við at verkætlanin verður framd | "Profit Oil" staðfestir, hvønn lut vertslandið skal hava av framleiðsluni.<br>"Cost Oil" staðfestir tann partin, oljufelagið kann mótrokna goldnar útreiðslur í.<br>Tann partin av fram-leiðsluni, sum eftir er, eftir "Profit Oil" og mótrokning upp til í mesta lagi "Cost Oil"-markið, kann ríkið / vertslandið leggja ymiskar skattir og ymisk avgjøld á. | Avgjøld, so sum royalty og skattir av ymiskum slagi |

## 3.2 LÓGARKARMAR

### 3.2.1 Støðið undir uppskotinum til løgtingslóg um kolvetnisvirksemi

Løgtingssamtyktin tann 24. september 1993 um leiting eftir olju og jarðgassi á føroyskum øki (løgtingsmál nr. 5/1993) er grundin undir *uppskoti nevndarinnar til løgtingslóg um kolvetnisvirksemi*. Løgtingið tók undir við Landsstýrinum í, at arbeiðið við útgreining og lógarfyrireiking, ið byrjaði á vári 1993, skuldi halda fram, og at uppskot skuldu gerast til nýtímans undirgrundarlóg og aðra neyðuga lóggávu eins og uppkast til framtíðar treytir fyri loyvi til leiting og framleiðslu. Løgtingið legði afturat, at tá ávísar treytir eru loknar, eigur fyrsta útbjóðingarumfar at verða hildið um veitan av loyvum til leiting eftir og framleiðslu av olju og jarðgassi. Løgtingssamtyktin í síni heild er endurgivin sum skjal 1.1-1 í 1. parti: *Samandráttur og tilmæli*.

Tá Løgtingið nevnir "...uppskot til nútímans undirgrundarlóg..." eiga tey lýti, ið galdandi undirgrundarlóg - lóg nr. 181 frá 8. mai 1950 - verður mett at hava, at verða havd í huga. Eitt nú eru í lógini ongar reglur um forkanningar, ei heldur beinleiðis heimild at skipa fyri útbjóðingarumførum. Greitt er gjøllari frá 1950-lógini í frágreiðingini frá Oljuráðleggingarnevndini frá juni 1993, í kapitli 5 um *setning Landsstýrisins*.

Samsvarandi hesum fekk Oljuráðleggingarnevndin sambært fyrisetninginum frá 22. apríl 1994 m.a. til uppgávu at gera uppskot til nýggja undirgrundarlóg, lóg um arbeiðsumhvørvi, trygdar- og tilbúgvingarspurningar og reglur um vernd av umhvørvis- og fiskivinnuáhugamálum. Hendan partin av fyrisetninginum roynir nevndin at greiða í uppskotinum til løgtingslóg um kolvetnisvirksemi.

Kapittul 3.1 um *Val av kolvetnisskipan* hevur eitt yvirlit yvir ymiskar kolvetnisskipanir og nakrar grundgevingar fyri teirri “loyvisskipan” (koncessions-model), ið lógaruppskot nevndarinnar byggir á. Í hesum sambandi kann vera hóskandi at minna á, at lógaruppskotið hvørki krevur nakran ávísan løgfrøðiligan bygnað ella kolvetnisskipan, men einans setir nøkur krøv til innihaldið í leiti- og framleiðsluloyvunum, smbr. almennu viðmerkingarnar pkt. 9 c).

Í hesum kapitlinum verða í broti 3.2.4 ávísir partar av lógaruppskotinum umrøddir, eins og víst verður á lógarviðmerkingarnar í neyðugan mun og á teir kapitlar í frágreiðingini, har viðkomandi spurningar eru gjøllari viðgjørdir. Av tí at roknað verður við, at kolvetnisvirksemið fyrst og fremst verður á landgrunninum, verður kortini fyrst, í broti 3.2.2, hugt eitt sindur gjøllari at reglunum um víddina av landgrunninum v.m. og at teimum karmum, ið altjóðarættur setir um heimildirnar hjá einum strandalandi at skipa fyritakssemi á landgrunninum. Heimildirnar hjá heimastýrinum at skipa fyri leiti- og framleiðsluvirkseminum verða stutt umrøddar í broti 3.2.3. Brot 3.2.5 hevur nakrar metingar um avleiðingarnar fyri kolvetnisskipanina av møguligum føroyskum limaskapi í ES ella EBS.

### 3.2.2 Um altjóðarætt

**Altjóða rættur og virksemi á landgrunninum**

Í september 1945 kunngjørdi amerikanski forsetin Harry S. Truman rættindi USA til natúruríkidømið á landgrunninum útfyri amerikansku strondina. Onnur lond fylgdu skjótt eftir, og rættindi strandalanda til natúruríkidømið gjørdust eftir stuttari tíð altjóða rættarsiðvenja. Tað var m.a. hendan gongdin, ið førdi til, at skipað varð fyri havrættarstevnuni í Geneve í 1958.

Stevnan endaði við, at fýra altjóða sáttmálar vórðu samtyktir, ein teirra var landgrunssáttmálin frá 29. apríl 1958. Tað er hesin sáttmálin, ið Danmark staðfesti í mai 1963, sum er grundarlagið undir kongaligu fyriskipan nr. 259 frá 7. juni 1963, ið lýsir danskan yvirvaldsrætt yvir leiting eftir og gagnnýting av natúruríkidømi á og í landgrunninum. Í verki er kongaliga fyriskipanin ein kunngerð um, at leitast og gagnnýtast kann sambært loyvi við heimild í undirgrundarlógini, men strangliga neyðug er hon neyvan, av tí at rættindini hjá strandalandinum til landgrunnin sambært landgrunssáttmálanum hvørki eru treytað av formligari landtøku ella staðiligari kunngerð.

Landgrunssáttmálin, ið varð mettur at vera staðfesting av altjóða siðvenjurætti, gevur strandalandinum *yvirvaldsrætt* yvir leiting eftir og gagnnýting av natúruríkidøminum á landgrunninum. Hendan rættarstøðan er eisini galdandi í havrættarsáttmálanum, ið varð undirskrivaður í Montego Bay á Jamaika tann 10. desember 1982, og sum kom í gildi tann 16. november 1994. Havrættarsáttmálin skipar havsins rættarviðurskifti á meira fullfíggjaðan hátt, men hann er ikki góðkendur av Danmark. Stórir partar av sáttmálanum mega undir øllum umstøðum haldast at vera galdandi sum siðvenjurættur, harímillum reglurnar um vídd landgrunsins og um búskaparøki (EEZ).

**Altjóða rættur og víddin á landgrunninum**

Sambært landgrunssáttmálanum frá 1958 kann yvirvaldsrættur strandalandsins víðkast at galda antin út á 200 metra dýpi ella so langt út, sum havdýpið loyvir gagnnýtslu av natúruríkidøminum á og undir havbotninum. Dentur verður við øðrum orðum lagdur á, um tað tøkniliga er møguligt at gagnnýta landgrunnin á so djúpum vatni. Tá ræður um setan av marki móti landgrunnum annara landa, leggur sáttmálin í fyrsta lagi dent á (sínamillum) avtalu, men fæst ikki avtala, eigur markið at vera miðlinja, uttan so at serligar umstøður tala fyri øðrum marki.

Funnist varð frá fyrsta degi at landgrunssáttmálanum frá 1958 av tí, at hann í roynd og veru einki ytsta mark setti fyri rættindum strandalandsins, tí tøkniligi framburðurin fór at loyva leiting og gagnnýting á alt størri dýpi. Hóast sigast kundi, at eitt ytstamark kortini var, av tí at sáttmálin mátti haldast at hava ein jarðfrøðiligan landgrunn sum fortreyt, var tað torført at staðfesta hann neyvt. Ytstamark landgrunsins er tí millum tey fyribrigdi, ið havrættarsáttmálin frá 1982 viðger. Sambært § 76 í havrættarsáttmálanum hava øll strandalond - sama um tey hava jarðfrøðiligan landgrunn ella ei - rætt til undirgrundina út á 200 fjórðingar frá grundlinjunum. Harafturat hevur strandalandið, um talan er um *natúrligt framhald* av landøkinum útum 200 fjórðingar, rætt til landgrunn, ið røkkur kantinum av meginlandsrondini. Nágreiniligar reglur eru um, hvussu ytsta mark á meginlandsrondini verður sett, soleiðis at ytsta mark er annaðhvørt 350 fjórðingar úr grundlinjunum ella ein linja, ið gongur í mesta lagi 100 fjórðingar úr 2.500 metra dýpdarlinjuni.

§ 76 í havrættarsáttmálanum má í dag roknast at avspegla galdandi altjóðarætt á hesum økinum, og sjálvt um Danmark ikki hevur staðfest sáttmálan, varð orðingin har løgd til grund sum fortreyt, tá føroyski landgrunnurin varð lýstur (designeret) tann 7. mai 1985. Hetta sæst m.a. av tíðindaskrivi uttanríkisráðsins, ið kunngjørt varð samstundis, har sagt verður, at Føroya-Rockall leiðin er ein háslætti, har Føroyar eru hægstu tindar í einum sonevndum undirsjóvar pinkumeginlandi. Somuleiðis verður sagt, at grannalondini hava lýst øki, ið eftir danskari áskoðan eru partar av Føroyska landgrunninum.

Tá tað ræður um markaseting móti grannalondum, sigur § 83 í havrættarsáttmálanum ikki annað enn at lond, ið liggja yvirav hvørjum øðrum ella marka móti hvørjum øðrum, skulu seta mark á felags landgrunni sambært avtalu grundaða á altjóðarætt sum ásett í § 38 í viðtøkunum hjá Altjóða Dómstólinum, við tí endamáli at fáa eitt hóskandi úrslit burturúr. Men § 38 í viðtøkunum hjá dómstólinum er í roynd og veru ikki annað enn eitt yvirlit yvir rættarkeldurnar til altjóðarætt, og funnist hevur tí verið at § 83 í havrættarsáttmálanum fyri at geva lítla vegleiðing og leggja lítið afturat grundarlagnum undir markaseting á landgrunninum. Grundin er helst tann, at § 83 er ein neyðsemjuloysn millum tey lond, ið á havrættarstevnuni vóru fyri "miðlinjustevnuni" og tey, ið løgdu størri dent á "hóskandi loysnir".

**Myndugleiki strandalandsins á landgrunninum**

Sambært altjóðarætti hava lond fullan yvirvaldsrætt á teirra landaøki, meðan yvirvaldsrætturin á sjóøkinum (søterritoriet) er avmarkaður av rættinum hjá øðrum londum til "óskaðiliga sigling". Fyri virksemi uttanfyri sjóøkið hjá einum landi er høvuðsreglan tann, at yvirvaldsrætturin er hjá flagglandinum, tvs. at einans tað landið, har eitt skip ella virki er skrásett, kann inna myndugleika yvir virkseminum, annaðhvørt talan er um lóggávu ella handhevjan. Ætlar eitt strandaland at útinna myndugleika á økjum uttan fyri sjóøkið, krevst serstøk heimild sambært altjóðarætti.

Omanfyri nevndu *yvirvaldsrættindi* til leiting eftir og gagnnýting av landgrunninum og hansara ríkidømi eru júst dømi um tílíkar altjóða heimildir. Talan er um einkarrættindi soleiðis at skilja, at hóast strandalandið ikki leitar eftir tilfeinginum á landgrunninum ella gagnnýtir tað, hevur eingin annar loyvi at gera tað uttan staðiligt samtykki frá strandalandinum. Til tess at fremja leitingar og gagnnýtslu á landgrunninum kann strandalandið seta upp havútbúnað o.a. (*installations and other devices*) og áseta trygdarøki rundan um tílíkar havstøðir. Í fylgiskjali 5.1-1 til kapittul 5.1 *Fiskivinna og aling* er gjøllari greitt frá, hvussu farast kann við tílíkum útbúnaði, tá brúk ikki er fyri honum longur.

Í uppskotinum til løgtingslóg um kolvetnisvirksemi hevur nevndin samsvarandi norskari og danskari venju roknað við, at altjóðarættur gevur strandalandinum myndugleika (jurisdiktion) yvir øllum virksemi í sambandi við leiting eftir og gagnnýting av náttúruríkidøminum á havbotninum og í undirgrundini, jbr. viðmerking til § 2 b um havstøðir. Tað eru sostatt neyvan avmarkingar sambært altjóðarætti í landsins rættindum at áseta rættarreglur fyri virkjum, ið nýtt verða til tílík endamál. Uppskotið til kapittul 5 um *Arbeiðsumhvørvi, trygd og tilbúgving v.m. fyri havstøðir* heimilar undir hesi fortreyt Landsstýrinum at gera nágreiniligari trygdarreglur. Í verki eigur kortini í stóran mun at verða litið á trygdarváttanir (certifikater) v.m. frá flagglandinum, tá talan er um flytandi eindir. Verður myndugleikin hjá strandalandinum brúktur at áseta ov nógvar "serføroyskar"

reglur, verður úrslitið ikki bert skrivstovuveldi, men leiting á føroyska landgrunninum verður eisini tarnað, av tí at boripallar til leitiboringar júst eru bygdir til altjóða virksemi. Landsstýrið kann sostatt í høvuðsheitum avmarka krøvini til viðurskifti, sum eru serstøk fyri leiti- og framleiðsluvirksemi á føroyskum øki, og sum seta krøv útum tey, ið havstøðinar longu lúka frammanundan.

Tað er somuleiðis við teirri fortreyt, at óavmarkað heimild er til skipan av viðurskiftunum á havstøðunum, at nevndin skjýtur upp, at føroysk lóggáva verður galdandi á havstøðunum og í trygdarøkjum rundan um tær; danska landgrunslógin hevur tilsvarandi reglur. Frávik frá hesi meginreglu kunnu verða gjørd í aðrari lóggávu ella reglum ásettum av Landsstýrinum. Rátt verður til at sýna varsemi við útinning av føroyskari lóggávu í trygdarøkjunum, sí viðmerkingarnar til § 3 stk. 2 í lógaruppskotinum.

Hugtakið *yvirvaldsrættindi* er ikki tað sama sum fullur yvirvaldsrættur á landgrunsøkinum, men skal skiljast sum *avmarkað løgdømi* (funktionel jurisdiktion) at gera neyðugar fyriskipanir galdandi fyri leiting eftir og gagnnýting av ríkidøminum á landgrunninum. Hetta sæst eisini greitt av teimum avmarkingum, ið galda fyri myndugleika strandalandsins:

Sáttmálarnir eru galdandi fyri rættindini hjá strandalandinum á landgrunninum, men ávirka ikki rættarstøðuna fyri sjógvin á landgrunninum og loftrúmið yvir hesum sjógvi. Ei heldur kann strandalandið útinna síni landgrunsrættindi soleiðis, at gingið verður sigling ella rættindum hjá øðrum londum ov nær. Umframt siglingarrætt á landgrunni strandalandsins er tað serliga rætturin hjá øðrum londum at leggja sjókaðalar og rørleiðingar, ið hava týdning. Føroyskir myndugleikar kunnu tí ikki seta seg ímóti, at rørleiðingar verða lagdar á føroyska landgrunninum, men teir kunnu sambært altjóðarætti seta ávísar treytir í hesum sambandi. Tað, sum lógaruppskotið um kolvetnisvirksemi ásetir um flutnings(transit)rørleiðingar, byggir á altjóðarætt, jbr. § 4 í *landgrunssáttmálanum* og § 79 í *havrættarsáttmálanum*.

### 3.2.3 Myndugleiki heimastýrisins at skipa fyri leiti- og framleiðsluvirkseminum

Um lóggávu- og umsitingarmyndugleika heimastýrisins yvir ráevnum í undirgrundini verður víst til almennu viðmerkingarnar til løgtingslóg nr. 179 frá 21. oktober 1993 um forkanningar o.a.m. av undirgrund Føroya (løgtingsmál 4/1993).

Danmark fekk sína fyrstu lóg um ráevni í undirgrundini í 1932. Ásett verður í § 1, at "*ráevni í undirgrund Danmarkar kongsríkis, sum higartil ikki hava verið gagnnýtt av privatum, hoyra danska ríkinum til, og leiting eftir og framleiðsla av tílíkum ráevnum verða tilskilað ríkinum*". Lógin varð sett í gildi í Føroyum tann 16. mars 1932.

Tá heimastýrið varð sett á stovn í 1948, og Føroyar fingu lóggávu- og umsitingarmyndugleika á týdningarmiklum samfelagsviðurskiftum, vórðu "ráevni í undirgrundini" verandi ríkismál. Málsøkið kom tó á lista B til heimastýrislógina, og sambært § 3 í lógini týddi hetta, at málsøkið kundi gerast føroyskt sermál eftir samráðingar millum heimastýrið og ríkismyndugleikarnar.

Tann í dag í Føroyum galdandi lóggáva á økinum er lóg nr. 181 frá 8. mai 1950 um leiting eftir og framleiðslu av ráevnum í undirgrund Danmarkar kongsríkis.

Lógin varð sambært § 11 sett í gildi í Føroyum "*við teimum avmarkingum, ið standast av lóg nr. 137 frá 23. mars 1948 um heimastýri Føroya*". Heimastýrið setti beinanvegin fram ynski um, at málsøkið ráevni í undirgrundini gjørdist sermál, men torført var at fáa veruligar samráðingar í lag um málið. Ikki fyrr enn tann 29. august 1988 eydnaðist at fáa gongd á rættiligar samráðingar, ið førdu til politiska semju tann 11. september 1992 um, at málið skuldi verða sermál. Semjan varð staðfest við avtaluni frá 22. desember 1992 millum stjórnina og Føroya Landsstýri.

Heimastýrið yvirtekur sambært avtaluni tær útreiðslur, ið standast av málsøkinum, og avtalað varð, at møguligar inntøkur av framtíðar ráevnisframleiðslu fara at føra til samráðingar um niðurskurð av ríkistilskotinum til Føroya. Avtalan endar við, at stjórnin sannar, at Føroya Landsstýri kann hugsa sær, til gagns fyri bæði føroysk og donsk samfelags- og vinnuáhugamál, at brúka sakkunnleika í danskari umsiting og gransking og í donskum vinnufyritøkum í menningini av føroyskum ráevnismálum, treytað av kappingarføri. Tær avtalurnar, ið vórðu gjørdar í 1993 og 1994 millum stjórnina og Landsstýrið í sambandi við endurfíggingina av føroysku uttanlandsskuldini og bankakreppuna, hava ikki broytt nakað í støðu ráevnismálsins sum sermál.

At málsøkið ráevni í undirgrundini er yvirtikið sum sermál, merkir at heimastýrið hevur yvirtikið lóggávu- og umsitingarheimildina. Undirgrundarlógin frá 1950 verður verandi í gildi sambært § 13 í heimastýrislógini í tann mun, hon ikki er í stríð við heimastýrislógina. Til 1950-lógin verður broytt ella sett úr gildi við løgtingslóg, verður hon eftir fastari venju fyri málsøki, ið eru yvirtikin sum sermál, lisin á tann hátt, at Løgting og Landsstýri hava tann myndugleika, sum sambært lógini eru hjá fólkatingi og donsku stjórnini. Tað merkir harafturat, at tey ráevni, ið lógin fevnir um, nú hoyra landinum til í staðin fyri ríkinum; hetta er eisini galdandi fyri ráevni á og í landgrunninum sambært omanfyri nevndu kongaligu kunngerð nr. 259 frá 7. juni 1963. Av tí at skattamál longu eru føroysk sermál, fær landið harafturat møguligar skattainntøkur v.m. av kolvetnisvirkseminum.

Oljuráðleggingarnevndin hevur hildið tað vera hóskandi, á sama hátt sum ásett í 1950-lógini, at lógaruppskotið nevnir, at kolvetnini á føroyskum land- og sjóøki og á landgrunninum hoyra landinum til. Kolvetnini kunnu tí bert útvinnast av øðrum, eitt nú oljufeløgum, við loyvi sambært lógini, meðan landið sjálvt kann seta leitititøk v.m. í verk, tá neyðugur peningur er játtaður og møgulig onnur lógarkrøv lokin.

Tað er hendan "ognarrættin", ið landið við loyvisskjalinum kann sigast at "býta um" við loyvishavarnar, tá kolvetnini eru tikin upp úr undirgrundini. Afturfyri ognarrættin til kolvetni, ið møguliga verða framleidd, átaka loyvishavarnir sær skyldu til at leita í tí økinum, teir hava fingið lutað til, og skyldu til at rinda gjøld v.m.

Afturat tí, sum greitt er frá frammanfyri, eigur dentur at verða lagdur á, at tað neyvan er heilt beinrakið at uppfata landsins rætt at skipa kolvetnisvirksemið sum avleiddan av privatrættarligum ognarrætti, sama um tað snýr seg um landaøkið, sjóøkið ella landgrunnin. Eingin ivi er um rætt landsins at skipa ráevnisleiting og -framleiðslu, men talan er um útinnan av almennum myndugleika heldur enn privatrættarligt virksemi, og tað eru tí umsitingarlig sjónarmið, serliga grundreglan um løgsama umsiting, ið seta markini fyri landsins skipanar- og umsiting-

arheimildum.

## 3.2.4 Serstakir partar av lógaruppskotinum

**Endamál við lógini**

Endamálið við lógini um kolvetnisvirksemi er í fyrsta lagi at leggja grundina undir eina "*varisliga og skynsama leiting eftir og gagnnýting av kolvetnistilfeinginum til gagns fyri føroyskan búskap og arbeiðsvinnu"* (§ 1, stk. 2,1 pkt.). Við varisligari og skynsamari leiting og gagnnýting verður dentur lagdur á tilfeingisfyrilit, ið m.a. ber í sær best møguliga troyting av hvørjum einstøkum kolvetnisfundi. Viðmerkingarnar til § 1, stk. 2 í lógaruppskotinum greiða gjøllari frá, hvussu hesin parturin av endamálsgreinini skal skiljast.

Tá sagt verður í endamálsgreinini, at leiting og gagnnýting skulu vera til gagns fyri búskap og arbeiðsvinnu í Føroyum, eigur hetta at verða sæð í beinleiðis samanhangi við løgtingssamtyktina frá 24. september 1993, ið nevnd er í broti 3.2.1, har Løgtingið segði seg vænta, at ein møgulig kolvetnisvinna fór at verða til gagns fyri Føroyar í so máta. Í viðmerkingunum til § 10 í lógaruppskotinum er í stuttum greitt frá, hvussu endamálið í lógini viðvíkjandi arbeiði v.m. kann hugsast at verða sett í verk. Eitt meira fullfíggjað yvirlit er at finna í 4. parti *Oljan og føroyski búskapurin*, har ein gjøllari gjøgnumgongd av búskaparligum og arbeiðsligum møguleikum er at finna.

Í øðrum lagi skal virksemið "*verða soleiðis skipað, at neyðug fyrivarni eru tikin fyri fiskiskapi, sigling, umhvørvis- og nattúruáhugamálum umframt øðrum samfelagsligum áhugamálum*" (§ 1, stk. 2, 2. pkt.). Lógarviðmerkingarnar geva eisini gjøllari lýsing av, hvussu hesi fyrilit skulu skiljast. Harafturat finnast gjøllari frágreiðingar um hesi fyrilit í 5. parti um *Ávirkan frá oljuvirksemi*. Í hesum sambandi eigur serliga at verða nevnt, at nevndin hevur latið vera við at greina hugtakið "onnur samfelagslig áhugamál" gjøllari í lógarviðmerkingunum til tess at varðveita eitt ávíst tulkingarfrælsi. Av tí at nevndin hevur havt ávirkan á mentan, mál, búsetingarmynstur v.m. í huga, finst góð vegleiðing um hvat hugsast kann at koma undir hugtakið í kapittul 5.3 um *Aðra ávirkan*.

**Lóggáva og umsiting**

Tað, sum við lógaruppskotinum verður miðað ímóti, er at leggja eitt tíðarhóskandi grundarlag undir byrjandi leiting eftir og seinni møguliga gagnnýting av kolvetnistilfeingi í undirgrund Føroya. Roynt verður í uppskotinum at leggja neyðugu grundina undir útvegan av vitan um olju ella jarðgass og at tryggja, at møgulig kolvetni verða gagnnýtt samsvarandi endamálinum við lógini.

Uppskotið til løgtingslóg um kolvetnisvirksemi er orðað sum rammulóg, ið bæði skipar loyvisveiting, tvs. veiting av neyðugum loyvum til oljufeløgini at leita eftir og framleiða olju og jarðgass, og allar partar av virkseminum, tvs. leiting og meting, útbygging av oljuleiðum og framleiðslu umframt avrigging. Lógin samskipar reglur, sum í Danmark og øðrum Norðsjóvarlondum finnast í fleiri lógum. Eitt nú hevur lógaruppskotið eitt kapittul um arbeiðsumhvørvi og trygd v.m., meðan hesi viðurskifti í grannalondunum eru skipað við serligari lóggávu. Endamálið við at savna reglurnar í eina lóg hevur verið at skapa eitt so einfalt og greitt lógargrundarlag sum gjørligt, ið samstundis gevur Landsstýrinum allar tær heimildir, ið nýtímans lóggáva á økinum vanliga gevur myndugleikunum, og sum er løtt at umsita. Oljuráðleggingarnevndin hevur harumframt við lógaruppskotinum lagt dent á, at lógaruppskotið viðger teir spurningar, sum í Norðsjóvarlond-

unum eru skipaðir við lóg.

Endamálið við lógini er ikki at taka avgerð um føroyska kolvetnispolitikkin, men at seta varandi karm um virksemið. Tilevning av oljupolitikkinum í verki verður væntandi gjørd so hvørt, sum útboðið verður, antin talan er um hvørji øki, ið útbjóðað verða til leitingar, ella fíggjarligar og aðrar treytir, ið samsvarandi kapitul 3 í lógini verða at seta í teimum loyvum, ið givin verða oljufeløgunum.

Hóast allar góðar ætlanir um eina "lættliga" umsiting, má roknast við, at menning av kolvetnisvirkseminum fer at krevja munandi umsiting. Hetta er ikki bert galdandi fyri umsitingina av sjálvum kolvetnisvirkseminum, men eisini fyri onnur øki, ið verða ávirkað av hesum virkseminum, eitt nú skatta- og umhvørvisumsiting. Víst verður um hesi evni til kapittul 3.3 um *Fyrisiting* og til tað, ið sagt verður um umsiting í teimum almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið.

**Forkanningar**

Skotið verður upp, at løgtingslóg nr. 179 frá 21. oktober 1993 um forkanningar o.a.m. av undirgrund Føroya verður sett úr gildi. Reglurnar í forkanningarlógini verða í staðin tiknar við í lógaruppskotið, serstakliga í §§ 4 og 5. Talan er ikki um broytingar av rættarstøðuni fyri forkanningar.

**Kapittul 3 í lógaruppskotinum**

Kapittul 3 í lógaruppskotinum *Leiting og framleiðsla*, ið hevur fýra partar (A-D), hevur á mangan hátt tær týdningarmestu reglurnar um skipan av kolvetnisvirkseminum. Hetta er serliga galdandi fyri kapittul 3 A um loyvi og treytir fyri leiting og framleiðslu, ið ásetir meginpartin av innihaldinum í sjálvum loyvunum, fyrst og fremst í §§ 8-12. Hesar reglurnar eru gjøllari lýstar í lógarviðmerkingunum. Viðvíkjandi § 10 verður eisini víst til 4. part *Oljan og føroyski búskapurin*. Niðanfyri, í partinum um *Loyvisskipanina í verki*, verður greitt frá gongdini í einum útbjóðingarumfari sambært §§ 6 og 7. Aðrar treytir kunnu verða settar enn tær, ið nevndar eru í §§ 6-12, og tí ber til eitt nú at seta reglur um landsoljufelag í loyvini, sí almennu viðmerkingarnar pkt. 9 c).

Í kapitli 3 B (§§ 13-17) í lógaruppskotinum eru nærri reglur settar um dygdarkrøv til kolvetnisvirksemið, samskipaða framleiðslu og at føra kolvetni í land. Nærri frágreiðing um hesi evni finst bæði í almennu viðmerkingunum og í viðmerkingunum til einstøku lógargreinirnar. Um § 17 kann eisini verða víst til kapittul 4.3 í frágreiðingini, sum er um *At føra kolvetni í land*.

Kapittul 3 C og D í lógaruppskotinum um ávikavist rørleiðingarútbúnað og avrigging av virkseminum er gjølla viðgjørt í viðmerkingunum til skjal 5.1-1 til kapittul 5.1 *Fiskivinna og aling*.

**Loyvisskipanin í verki**

Sambært § 6 í lógaruppskotinum kann Landsstýrið veita loyvi við einkarrætti til leitingar eftir og framleiðslu av kolvetnum á neyvt avmarkaðum økjum. Sambært § 8 eru loyvini eisini tíðaravmarkað. Sum høvuðsreglu verður roknað við, at loyvini verða givin eftir almenna fráboðan um, at tikið verður móti umsóknum, tvs. aftan á útbjóðingarumfør (koncessionsrunder), jbr. § 7 stk. 1. Ætlaða gongdin í einum útbjóðingarumfari er lýst í mynd 3.2-1. Tilmæli ("nomineringar") eru ikki kravd sambært lógaruppskotinum, men tað er ógvuliga vanligt í okkara grannalondum, at oljumyndugleikarnir heita á oljufeløgini um at vísa á øki, ið tey helst vilja hava við í einum komandi útbjóðingarumfari, tó uttan at hetta er bindandi fyri partarnar. Eftir avtalu við Landsstýrið skipaði Oljuráðleggingarnevndin fyri einum tílíkum tilmælisumfari á heysti 1996, jbr.

kapittul 2.2 *Útlitini fyri oljuvinnu undir Føroyum.*




**Mynd 3.2-1**

Tá landsstýrismaðurin, ið umsitir kolvetnismál, heldur tíðin er komin at hava eitt útbjóðingarumfar, verður frágreiðing til Løgtingið fyrireikað. Innihaldið í tílíkari frágreiðing er gjøllari umrøtt í lógarviðmerkingunum (§ 7, stk. 2), men í høvuðsheitum verður greitt frá, hvørji øki ætlanin er at bjóða út, loyvistreytunum (vanliga ásettar í einum *loyvismyndli*) og hvørjar avleiðingar útbjóðingarumfarið kann haldast at fara at hava fyri aðrar vinnur v.m. Tað má haldast at samsvara best við *stýrisskipanarlógina*, um Løgtingið ikki verður biðið um at "góðkenna" útbjóðingarumfarið og treytirnar. Fyriskipan av útbjóðingarumførum og veiting av loyvum eru umsitingarmál, og tað er tí avvarðandi landsstýrismaður, ið hevur ábyrgdina. Í almennu viðmerkingunum, jbr. viðmerkingarnar til § 7 stk. 2, er kortini roknað við, at frágreiðingin verður løgd fyri Løgtingið at fáa vissu fyri, at Landsstýrisins ætlan fær parlamentariskan stuðul. Tílík vissa tryggjar ikki bert landsstýrismannin móti seinni misálitisváttan, men skuldi vónandi eisini medvirka til breiða semju um aðalstevnuna fyri kolvetnispolitikkinum. Semja um kolvetnispolitikkin hevði eisini stuðlað fyrisitingini í seinni samráðingum við tey oljufeløg, ið hava søkt um loyvi.

Eftir at Løgtingið hevur viðgjørt frágreiðingina, verður útbjóðingartilfarið gjørt liðugt eftir at møguligar tilráðingar frá Løgtinginum eru tiknar við. Av útbjóðingartilfarinum eigur at síggjast, hvørji viðurskifti dentur verður lagdur á, tá umsóknirnar verða viðgjørdar. Síðan verður útbjóðingarumfarið lýst í hóskandi altjóða tíðarritum við tilskilan av umsóknarfreist v.m. Umsóknarfreistin er vanliga úr hálvum upp í eitt heilt ár.

Tá umsóknirnar koma inn, skulu tær viðgerast, og hetta krevur stórt umsitingarligt arbeiði m.a. av jarðfrøðiligum/jarðalisfrøðiligum slag. Krøvini eru serliga stór, um fleiri søkja um sama øki, av tí at myndugleikarnir tá bæði noyðast at taka støðu til arbeiðsætlanirnar hjá teimum ymisku umsøkjarunum og gera av, hvørjar jarðfrøðiligar leitiætlanir tykjast trúligast, tá umræður at finna kolvetni. Viðgerðin av umsóknunum krevur nógvan serkunnleika, av tí at umsóknirnar mega verða mettar samsvarandi øllum viðurskiftum, ið dentur er lagdur á í útbjóðingartilfarinum. Talan kann vera um vinnuskapandi tiltøk, yvirlit yvir trygdar- og umhvørvisætlanir v.m. umframt løgfrøðiligar og búskaparligar metingar.

Eftir at yvirlit er fingið yvir tær innkomnu umsóknirnar, fer fyrisitingin undir samráðingar við tey feløg, ið søkt hava. Endamálið við tílíkum samráðingum er oftast at fáa ágóðan av teimum fyrimunum, sum kappingin um økini ber í sær, og á tann hátt fáa feløgini at átaka sær størri skyldur enn umsóknirnar í fyrstu atløgu geva vónir um, bæði fíggjarligar og hvat viðvíkir leiting.

Føroyska oljufyrisitingin hevur av góðum grundum ongar royndir í viðgerð av umsóknum og samráðingum við oljufeløg, og roknast má tí við, at hesin parturin av málsviðgerðini fer at taka longri tíð, enn vanligt er í grannalondunum, tá ræður um tey fyrstu útbjóðingarumførini. Avmarkaða talið á starvsfólki í fyrisitingini ber eisini á sama borðið. Við neyðugari ráðgevarahjálp átti kortini at borið til at latið loyvini eftir um leið hálvum ári frá tí, at umsóknarfreistin er farin. Í lógaruppskotinum eru ongar reglur um framløgu fyri Løgtingið, eftir at loyvini eru givin, av tí at tílík mannagongd má haldast at vera í stríð við stýrisskipanarlógina, men nevndin hevur roknað við, at Landsstýrið kunnar Løgtingið á hóskandi hátt.

Sambært lógaruppskotinum er møguligt at veita loyvi uttan at útbjóðingarumfar hevur verið, men tó bert í serstøkum førum, jbr. viðmerkingarnar til § 7, stk. 1. Leggjast kann afturat, at frágreiðing Landsstýrisins sambært § 7, stk. 2 í lógini helst fer at hava ein part um útbjóðingarmannagongdir v.m.

**Aðrir partar av lógaruppskotinum**

Av øðrum reglum í lógaruppskotinum kann serliga verða víst á kapittul 5 um *Arbeiðsumhvørvi, trygd og tilbúgving v.m. fyri havstøðir*, ið hevur til endamáls at skapa eina eindarskipan fyri útbúnað og virki, ið verða nýtt í kolvetnisvirksemi á landgrunninum. Um tað skilagóða í tílíkari samskipan verður víst til almennu viðmerkingarnar pkt. 9 g). Teir vandar, ið kunnu standast av kolvetnisvirksemi, og uppskot um hvussu teir kunnu fyribyrgjast, eru gjøllari umrøddir í kapittul 3.4 í frágreiðingini *Trygd, arbeiðsumhvørvi og tilbúgving*.

Kapittul 4 í lógaruppskotinum um umhvørvisfylgjumetingar er gjøllari umrøtt í teimum almennu viðmerkingunum og viðmerkingunum til einstøku greinirnar. Ein heildarfrágreiðing um umhvørvisviðurskifti, og hvussu metingar av umhvørvisárinum kunnu ætlast at verða lagdar til rættis, er umrødd í kapittul 5.2 í frágreiðingini um *Umhvørvi*. Nevnt eigur at verða í hesum viðfangi, at reglurnar í lógaruppskotinum um umhvørvisviðurskifti, og serliga reglurnar um fyrilit fyri umhvørvinum, koma afturat tí, sum longu er galdandi sambært vanligu umhvørvislóggávuni, serstakliga lógini um havumhvørvi. Hesi viðurskifti eru eisini nærri lýst í kapitli 5.2.

Kapittul 7 í lógaruppskotinum um *Endurgjald og serligar reglur um skaðabøtur til fiskimenn* fyriskipar partvís endurgjald eftir vanligum reglum og partvís eina skipan um skaðabøtur til fiskimenn undir serligum umstøðum. Hesar reglurnar eru gjølla umrøddar í lógarviðmerkingunum, meðan eitt meira alment yvirlit yvir endurgjalds- og skaðabótareglur er at finna í kapittul 5.1 í frágreiðingini um *Fiskivinnu og aling*.

Umframt frammanfyri standandi umfatar lógaruppskotið reglur um eftirlit og myndugleikaviðgerð, reglur um afturkallan, ognartøku v.m., eins og reglur um revsing og gildiskomu. Víst verður til lógaruppskotið við viðmerkingum.

## 3.2.5 ES-/EBS-reglur

Føroyar eru ikki bundnar av ES- ella EBS-reglum um loyvis- og útbjóðingarpolitikk, jbr. brot 4.1.5 *Møgulig tiltøk at fremja arbeiði og veitingar*.

Tað man kortini vera hóskandi í stuttum at greiða frá teimum broytingum, sum møguligur ES-limaskapur ella luttøka í EBS hevði havt við sær í teirri kolvetnisskipan, ið lógaruppskotið hevur sum fortreyt. Niðanfyri nevndu ES-reglur, tvs. loyvisdirektivið (koncessionsdirektivet) og direktivið um mannagongdirnar fyri

tilboð innan veitingarøkið, eru eisini galdandi fyri EBS, og er tí óneyðugt at skilja millum ES og EBS. Í frágreiðingini verður heldur ikki roknað við møguligum skiftisskipanum, ið høvdu kunnað fingist við samráðingum um møguligan ES-limaskap ella EBS-luttøku. Fullfíggjað frágreiðing verður ikki givin um ES-lóggávu, ið hevur týdning fyri olju- og/ella jarðgassframleiðslu, m.a. eru reglurnar um gassflutning í rørleiðingum, ið umhugsaðar verða at seta í verk, ikki gjøllari umrøddar. Um orku- og oljupolitikkin hjá ES kann annars verða víst til kapittul 8 í frágreiðingini um *Møguleikar fyri samvinnu við Evropeiska Samveldið.*

**Loyvis-direktivið**

Loyvispolitikkurin hjá ES hevur síðan 1. juli 1995 verið skipaður sambært direktiv 94/22/EF frá 30. mai 1994 *um treytir fyri veiting og brúki av loyvum til forkanningar, leiting og framleiðslu av kolvetnum* (loyvisdirektivið). Direktivið er ein partur av stovnanini av innara orkumarknaðinum hjá ES.

Evropeiska Samveldið er nettoinnflytari av kolvetnum, og direktivið leggur tí dent á tað neyðturviliga í, at forkanning, leiting og framleiðsla verða framd á best møguligan hátt. Limalondini varðveita yvirvaldsrættin yvir kolvetnistilfeinginum, herundir rættin at gera av, hvørji øki skulu latast upp fyri leiting v.m., men í direktivinum verða mannagongdir fyri loyvisveitingum ásettar eins og tær treytir, ið limalondini kunnu leggja dent á, tá loyvi verða givin. Endamálið er at tryggja, at kolvetnisvirksemi, annaðhvørt tað snýr seg um forkanning, leiting, ella framleiðslu, verður fyristaðið uttan mannamun og undir treytum, ið fremja kapping til frama fyri best møguligu gagnnýting av tilfeingi limalandanna. Kolvetnisvirksemi eigur tí at verða loyvt øllum, ið hava neyðuga tøkniliga og fíggjarliga orku; treytirnar fyri loyvisveitingum eiga at vera kendar frammanundan og ópartískar. Reglurnar fyri virksemi sambært fingnum loyvum eiga eisini at vera kendar frammanundan. Fyrilit fyri kapping eru eisini avgerandi fyri reglunum í fyriskipanini um, at bæði loyvisskeiðini og økini, ið eru umfatað av loyvunum, eru avmarkað, so tað slepst undan at nakað einstakt felag fær einkarrætt.

Sambært direktivinum kunnu limalondini áseta treytir og seta krøv, sum eru grundað á hesi fyrilit: landsins trygd, fólkaheilsu, flutningstrygd, umhvørvisvernd, vernd av lívfrøðiligum tilfeingi, vernd av tjóðskaparligum dýrgripum av listarligum, søguligum ella fornfrøðiligum virði, trygd hjá útbúnaðinum og arbeiðsfólkinum, lagdar ætlanir um umsiting av kolvetnistilfeinginum (eitt nú hvussu skjótt kolvetnini verða uppi ella dygdargóða framleiðslu) umframt tørv á at tryggja gjøld og/ella skattainntøkur.

Í § 3 í direktivinum eru nágreiniligar mannagongdir ásettar fyri veiting av loyvum. Í høvuðsheitum er talan um annaðhvørt *almenna innbjóðing* at senda inn umsóknir ella *opnar dyr*, men í ávísum førum er eisini loyvt at nýta eina mannagongd við grannateigum (naboblokproceduren). Ymisku útbjóðingarhættirnir og loyvisveitingarhættirnir kunnu í stóran mun sigast at svara til tað, ið Oljuráðleggingarnevndin skjýtur upp, jbr. § 7, stk. 1 í lógaruppskotinum við viðmerkingum, har eisini verður greitt frá mannagongdini viðvíkjandi *opnum durum og grannateigum*. § 3 í direktivinum hevur harafturímóti gjøllari reglur um fyriskipan av almennari innbjóðing, at senda inn umsóknir, mannagongdina við opnum durum og ger at enda av, at limalondini - treytað av, at mannamunur ikki stendst av - varðveita møguleikan at lata vera við at veita loyvi, hóast almenna innbjóðing av umsóknum.

Loyvisdirektivið ásetir harafturat reglur um møguliga almenna luttøku í

kolvetnisvirkseminum, annaðhvørt talan er um beinleiðis luttøku ella gjøgnum eitt felag, sum tað almenna eigur. Er landið ella eitt alment felag partur av einum loyvishavabólki, kann luttøkan einans fremjast sambært grundreglum, ið eru lættar at skilja, objektivar, og sum ikki gera mannamun. Leiðslan av bólkinum skal vera óheft, og merkir hetta helst, at ikki er loyvt at seta sum treyt fyri at veita loyvi, at landið ella almenna felagið er fyristøðufelag. Harumframt er ikki loyvt landinum ella almenna felagnum at fáa upplýsingar um ella atkvøða um val av útvegarum, tvs. at hinir luttakararnir hava ikki skyldu at upplýsa landinum ella almenna felagnum um hesi viðurskifti. Endamálið er at tryggja, at landið ella almenna felagið ikki medvirka til at geva útvegarum, ið hoyra heima í landinum, fyrimunir.

**Direktiv um mannagongdir fyri tilboð innan veitingarøkið**

Ráðsdirektiv 93/38/EBF frá 14. juni 1993 *um samskipan av mannagongdunum innan vatn- og orkuveiting og flutnings- og fjarskifti* fatar um sáttmálar um keyp, bygging og tænastuveitingar. Direktivið, ið er ein víðkan av eldri direktivum um almenn innkeyp v.m., hevur týdning fyri oljuvinnuna, av tí at tað umframt almennar myndugleikar eisini fatar um almenn feløg og feløg, ið hava serrættindi ella einkarrætt at leita eftir og útvinna olju- og gassfundir í einum neyvari avmarkaðum øki. Loyvisdirektivið knýtir eisini beinleiðis samband við direktivið um tilboðsveiting, jbr. formælið og § 12.

Tað er ikki endamálið í hesum yvirlitinum at greiða gjøllari frá mannagongdunum fyri tilboðsveiting sambært ES-rættinum. Nóg mikið er at staðfesta, at endamálið við direktivinum er at tryggja, at sáttmálar um keyp, bygging og tænastuveitingar verða veittir sambært grundreglum, ið eru lættar at skilja, objektivar og handilsligar, ella við øðrum orðum uttan mannamun ella framíhjárætti fyri útvegarar, ið hoyra heima í landinum. Dómar, ið eru sagdir við støði í eldri direktivum, hava gjørt av, at reglur um at ávísur prosentpartur av heildarveitingunum skal vera úr ávísum øki, ella treytir um at keypa í landinum ikki einans eru í stríð við direktivini, men eisini eru at meta sum handilsforðingar sambært § 30 í Rómasáttmálanum.

**Avleiðingar av ES-limaskapi ella EBS-luttøku**

Sum nevnt frammanundan í hesum brotinum, er tað, ið her er sagt, ikki at meta sum ein fullfíggjað frágreiðing um ES-rættin á kolvetnisøkinum, og ei heldur er talan um fullfíggjaða frágreiðing um møguligar avleiðingar av tættari sambandi við ES. Skuldi ES-limaskapur ella EBS-luttøka komið upp á tal, verður tí neyðugt at kanna fylgjurnar av hesum gjøllari.

Fara direktivini at galda í Føroyum, er kortini gjørligt við umrøðuni frammanfyri, sum grundarlagi, at staðfesta nakrar broytingar, ið mega verða gjørdar í teirri skipan, sum lógaruppskotið skjýtur upp:

- Stevnumiðið um kolvetnisvirksemi uttan mannamun grundaðan á tjóðskap fer í fyrsta lagi at krevja broytingar í virksemisskapandi politikkinum, ið heimilaður er í § 10 í lógaruppskotinum. Dentur verður at leggja á, at fyritøkurnar verða stjórnaðar samsvarandi fakligum og handilsligum treytum.
- Hvat veiting av loyvum viðvíkur, fer Landsstýrið at hava skyldu at fylgja teimum ásettu mannagongdunum. Hetta fer tó helst ikki at gera stórvegis broytingar neyðugar av teimum tilætlaðu mannagongdunum. Loyvisdirektivið fer til dømis ikki at forða fyri, at eitt møguligt landsoljufelag tekur lut í

oljuvinnuni.

- Neyðugt verður helst at avmarka skylduna at føra oljuna í land sambært § 17 orsakað av møguligum handilsavlagandi avleiðingum.
- Verður avgerð tikin um, at landið skal taka lut í kolvetnisvirkseminum, annaðhvørt beinleiðis ella um eitt landsoljufelag, fer tað ikki at vera lógligt endamál við luttøkuni at tryggja føroyskum veitingum v.m. til skaða fyri aðrar útvegarar.

## 3.3 FYRISITING

Sum víst varð á longu í frágreiðingini frá Oljuráðleggingarnevndini til Landsstýrið í 1993, fer oljuleiting á føroyska landgrunninum at seta krøv um eitt dygt lógargrundarlag fyri virkseminum til frama fyri bæði landið og oljufeløgini, sum seta heilt nógvar pengar í. Føroyskir myndugleikar hava í oljumálinum fyri sær avbjóðingar, sum teir ikki hava sæð fyrr. Møguligar leiti- og framleiðsluætlanir verða nógv størri, dýrari og torgreiddari, enn føroyingar eru vanir við. Viðspælari og mótspælari er ein peningasterkur altjóða oljuídnaður, og virksemi sum hetta er drúgt. Avgerðirnar, sum tiknar verða, fara at hava árin fleiri tíggju ár fram í tíðina.

At fremja ein samfelagsliga forsvarligan oljupolitikk og rætta umsiting av eini framtíðar kolvetnisvirksemislóg v.m. krevur eina samsvarandi umsitingarliga orku. Krøvini til eina føroyska oljufyrisiting mugu vera, at hon fult og heilt kann útinna myndugleikanna dagligu umsiting av oljuvirkseminum. Hon skal á professjonellan og trúverdugan hátt útinna sína myndugleikauppgávu mótvegis oljufeløgum v.m., samstundis sum hon skal stuðla politikarunum, sum ábyrgdina hava. Hon skal fylgja gongdini á fremsta plássi, kunna almenning og politikarar, hjálpa til at koma við nýggjum hugskotum og gera stevnumið, taka stig og evna lógaruppskot til v.m. í eini alsamt framsøknari og miðvísari gongd.

Eydnast leitingin væl, tykjast krøvini um eina forsvarliga fyrisiting sjálvsøgd. Eydnast leitingin ikki beinanvegin, verða krøvini ikki minni til hugflog og atgerðir, soleiðis at stig alsamt verða tikin, sum kunnu skunda undir feløgini til at halda fram, tí allir hugsandi møguleikar eiga at verða kannaðir til tess at finna og útvinna tað kolvetni, sum kann vera í føroysku undirgrundini, til gagns fyri framtíðar arbeiðsmøguleikar og búskap.

Viðvíkjandi framtíðar fyrisitingarligu skipanini kann støði takast í verandi Oljufyrisiting, sum í forkanningarskeiðinum hevur bygt upp førleika á økinum, og sum higartil hevur knýtt samband við nógv oljufeløg v.m. og fingið í lag samarbeiði við fleiri viðkomandi myndugleikastovnar heima sum uttanlands.

Í hesum parti er fyrst ein stutt frágreiðing um ta oljufyrisitingarligu skipanina higartil. Síðani verður greitt frá teimum umsitingarligu uppgávum, sum væntast eini tvey ár inn í leitiskeiðið, harnæst verður mett um eina fyrisitingarliga skipan.

### 3.3.1 Skipanin higartil

**Oljuráðleggingarnevnd Landsstýrisins**

Í juni 1993 lat tann fyrra oljuráðleggingarnevndin Landsstýrinum sína frágreiðing. Í frágreiðingini var eitt nú lógaruppskot um forkanningar v.m. av føroysku undirgrundini, eitt tilmæli til Landsstýrið um at leggja fram uppskot til løgtingssamtyktar um, at Føroyar ætlaðu at lata upp fyri leiting eftir olju og jarðgassi, tá fyritreytirnar vóru fingnar í lag, og tilmæli um at Landsstýrið tók avgerð um, hvussu kanningarloyvi v.m. skuldu umsitast, og um at Landsstýrið setti eina serkøna nevnd, hvørs setningur var at gera uppskot til eina framtíðar kolvetnislóggávu. 24. september 1993 samtykti Løgtingið uppskotið um forkanningarlógina saman við uppskotinum til samtyktar, smbr. frammanfyri nevnda tilmæli, eitt nú at strategiska kanningararbeiðið viðvíkjandi framtíðar oljuvirksemi skuldi halda fram.

Sambært løgtingssamtyktini setti Landsstýrið 22. apríl 1994 eina nýggja oljuráðleggingarnevnd. Arbeiðssetningurin hjá nevndini var í stuttum:

- at gera uppskot til Landsstýrið viðvíkjandi lóggávu- og útgreiningarspurningum,
- at gera uppskot til kunngerðir v.m. sambært lóggávuni,
- at gera uppskot til stevnumið fyri málsviðgerðini,
- at gera tilmæli til Landsstýrið um avgerðir í týdningarmiklum málum, eitt nú veitan av leiti- og útvinningarloyvum (konsessión), góðkenningar av útbygging av oljuleiðum og spurning um infrastuktur (undirstøðukervi), flutning og ílandtøku av olju og avtalur við grannalondini um hesi viðurskifti,
- um Landsstýrið ynskir tað, ella um Oljufyrisitingin hevur tørv á hesum, at hjálpa til við at leggja til rættis kolvetnisstevnu landsins.

Annars verður víst til kapittul 1.1

**Oljufyrisitingin**

Í frágreiðingini frá fyrru Oljuráðleggingarnevndini í 1993 verður víst á krøvini um umsitingarliga orku, sum standast av at gera og fremja ein samfelagsliga forsvarligan ráevnispolitikk, gera lógaruppskot og útinna fullgóða umsiting av eini tíðarhóskandi ráevnislóggávu. Eisini verður víst á, at krøvini til eina føroyska ráevnisumsiting mugu vera, at hon skal kunna verða útbygd til at lúka tey krøv, ið standa fyri framman, og at hon skal kunna skerjast ella leggjast niður, um so er at ongin oljuvinna verður.

Sambært hesum hugsanum hjá Oljuráðleggingarnevndini stovnaði Landsstýrið í november 1993 eina Oljufyrisiting við støði í upprunaligu skrivstovuni hjá nevndini. Samstundis, sum Oljufyrisitingin higartil hevur virkað sum skrivstova hjá nevndini, er stovnurin útbygdur, soleiðis at ein alsamt størri partur av útgreinandi arbeiðinum verður gjørdur á stovninum, sum eisini hevur avgreitt og fyrireikað arbeiði fyri Landsstýrið so hvørt í dagligum málum, har kjarnin í arbeiðinum hevur verið at umsita forkanningarlógina. Landsstýrið hevur lagt umsitingina av forkanningarlógini til Oljufyrisitingina, herundir at veita og umsita forkanningarloyvini v.m.

Sambært Landsstýrisins samtykt frá 22. apríl 1994 skal Oljufyrisitingin hava hesar uppgávur um hendi:

- at arbeiða við ábyrgd mótvegis Landsstýrinum,
- at umsita mál sambært galdandi lóggávu, reglugerðum v.m.,
- at umsita mál, sum Landsstýrið leggur til stovnin,
- at geva Landsstýrinum ráð og vegleiðing í øllum spurningum innan økið, herundir uppskot til lógir, reglugerðir og generellar rætningslinjur,
- at umsita alt, ið beinleiðis hevur við málsøkið at gera, og at hava ábyrgdina av at samskipa alt virksemi við tilknýti til málsøkið við aðrar stovnar,
- at vera skrivstova hjá Oljuráðleggingarnevndini.

**Mynd 3.3-1** niðanfyri vísir eitt yvirlit yvir, hvussu kolvetnisøkið varð skipað:

**Løgmaður**




Politiskt hoyrir málsøkið undir løgmann, men umsitingarliga er tað frá 1. apríl 1997 at rokna vorðið ein partur av tí nýstovnaða Vinnumálastýrinum.

Menningin av Oljufyrisitingini er farin fram sambært tilmælinum frá fyrru Oljuráðleggingarnevndini um at byggja út í stigum samsvarandi gongdini. Oljufyrisitingin hevur síðani stovnanina verið at kalla í einum útbúgvingarskeiði og má í dag metast sum kjarnin í uppbyggingini av einum føroyskum oljufyrisitingarumhvørvi, sum savnar vitan um oljuvirksemi í samarbeiði við aðrar viðkomandi almennar stovnar, og sum alla tíðina brynjar seg til uppgávur, ið koma undan kavi innan framtíðar virksemi.

Upprunaliga var skrivarin í fyrru Oljuráðleggingarnevndini einasta starvsfólk á Oljufyrisitingini. Síðani eru fleiri starvsfólk sett, og við árslok 1996 vóru 9 fólk í starvi. Síðani 1. januar 1994 hevur leiðarin fyri Jarðfrøðisavninum á Føroya Náttúrugripasavni verið settur leiðari fyri Oljufyrisitingini. Harafturat telur manningin í dag ein umsitingarligan fulltrúa, ein løgfrøðing, ein búskaparfrøðing, ein trygdarverkfrøðing, ein fulltrúa við ábyrgd fyri vinnulívi og útbúgving og tríggjar skrivarar. Í 1997 eru normerað eitt starv afturat innan EDV-kunningartøkni, eitt løgfrøðingastarv og eitt hálvtíðarstarv sum fulltrúi í umsitingardeildini, eins og ætlanin er, at leiðarastarvið skal umskipast til eitt fulltíðarstarv.

Øll starvsfólkini eru í størri ella minni mun uppi í fyrireikandi arbeiðinum hjá Oljuráðleggingarnevndini fyri Landsstýrið, og umleið helmingurin av arbeiðsorkuni hjá Oljufyrisitingini varð í 1996 nýttur til hetta endamál.

Til og við 1996 vóru latin 14 forkanningarloyvi til ymisk seismikkfeløg og oljufeløg v.m. Tey fyrstu loyvini (1994 og 1995) høvdu nakrar serligar treytir av tí, at Landsstýrið helt tað hava avgerandi týdning frá byrjanini at fáa gjørt eina grundleggjandi og umfatandi seismiska kanning v.m. á øllum tí mest viðkomandi landgrunsøkinum kring Føroyar. Tí vórðu serlig loyvi givin tveimum ymiskum kanningarfeløgum, afturfyri at hesi bundu seg til at gera tær kanningarnar, sum ynsktar vóru. Síðani er atgongdin til at gera forkanningar vorðin sett í meira almennar karmar (hetta umfatar kortini ikki dýpdarboringar), og í dag kann eitt-

hvørt felag fáa eitt forkanningarloyvi, treytað av at ávísar megintreytir verða loknar. Gjaldast skal eitt umsóknargjald (10.000 kr) og eitt árligt loyvisgjald (75.000 kr.) og eitt nú eru gjørdar reglur, sum miða ímóti at verja fiskastovnarnar og reglur, sum snúgva seg um fyrilitið fyri fiskivinnuni (meir um hetta í kapitli 5.1).

Forkanningarnar higartil hava fevnt um nógvar kanningarhættir (sí brot 2.2.2) eitt nú dýping av Lopra-1 boriholinum, har eitt loyvi varð givið 19 oljufeløgum til í felag at kanna tey djúparu jarðløgini undir Føroyum. Tilsamans geva forkanningarnar bæði oljufeløgunum og myndugleikunum eitt gott jarðfrøðiligt dátugrundarlag í fyrireikingunum fram móti fyrsta loyvisumfarinum.

Sum heild hevur forkanningarskeiðið gingið fult so væl, sum væntað varð. Tað stóra kanningarvirksemið og samsvarandi áhugin millum oljufeløgini v.m. at vitja og skifta orð við føroyskar myndugleikar og ídnað hava elvt til nógv størri virksemi í Oljufyrisitingini, enn væntað var í frágreiðingini frá 1993. Hetta virksemi sæst m.a. aftur í fíggjarætlanini hjá Oljufyrisitingini hesi árini.

Yvirlitið niðanfyri vísir árligu játtanirnar hjá Oljufyrisitingini íroknað útreiðslur til nevndina:

| | 1993 | 1994 | 1995 | 1996 | 1997 |
|---|---|---|---|---|---|
| Játtan (mió . kr.) | 1,5 | 2,0 | 3,2 | 5,1 | 6,9 |

Ein serlig treyt í teimum fyrstu (einkar)forkanningarloyvunum var, at ein ávísur prosentpartur av teimum inntøkum, sum feløgini fingu við sølu av kanningarúrslitunum til oljufeløgini, skuldi falla landskassanum til. Landskassans inntøkur (frá avgjøldum og nevndu sølu) vóru í 1995 og 1996 á leið sama upphædd, sum játtanirnar til Oljufyrisitingina (og nevndina) í sama tíðarskeiði, og Landsstýrisins nettoútreiðslur higartil í sambandi við alla umsitingina av kolvetnisøkinum hava sostatt verið ógvuliga smáar.

Sambært Landsstýrisins samtykt um at stovna Oljufyrisitingina, hevur hon frá byrjanini virkað í tøttum samarbeiði við Jarðfrøðisavnið, sum hevur havt tær jarðfrøðiligu uppgávurnar, eitt nú goymslu av jarðfrøðiligum og jarðalisfrøðiligum kanningartilfari. Uppgávurnar eru fyri ein part loystar í samarbeiði við teir ráðgevarar, sum Oljufyrisitingin hevur sett til ymiskar jarðfrøðiligar granskingaruppgávur, og fyri ein part í samarbeiði við GEUS (Danmarks og Grønlands Geologiske Undersøgelser), sum Jarðfrøðisavnið hevur samarbeitt við í mong ár (sí niðanfyri).

**Jarðfrøðisavnið**

Jarðfrøðisavnið er ein av trimum deildum á Føroya Náttúrugripasavni, ið hoyrir undir landsstýrismannin í mentamálum. Ætlanin við Náttúrugripasavninum er lýst í løgtingslóg nr. 26 frá 17.08.55, við seinni broytingum:

a) at savna, varðveita og framsýna náttúrugripir, sum lýsa náttúru landsins,
b) at savna, varðveita og handfara náttúruvísindaligt tilfar.

Endamálsorðingin undir a) er í verki tulkað at fevna um savns-, framsýningar-, undirvísingar- og ráðgevingaruppgávur, meðan uppgávurnar undir b) hava fevnt um náttúruvísindaligar kanningar og gransking. At savna inn og varðveita náttúruvísindaligt tilfar er ein natúrligur liður í báðum førum.

**Mynd 3.3-2 niðanfyri vísir, hvussu Náttúrugripasavnið er skipað.**




Upprunaliga røkti Danmarks Geologiske Undersøgelse (DGU) allar jarðfrøðiligar uppgávur Føroyum viðvíkjandi. Í 1951 tók Landsstýrið á seg ábyrgdina av tí innsavnaða tilfarinum og setti á stovn Jarðfrøðisavnið, ið seinni gjørdist ein deild undir Føroya Náttúrugripasavni, tá tað varð sett á stovn í 1955. Eftir tað hava Jarðfrøðisavnið og DGU í felag røkt jarðfrøðiligu uppgávurnar viðvíkjandi Føroyum. Arbeiðið á DGU Føroyum viðvíkjandi verður samskipað av einum 5-manna stýri, har DGU velur tveir limir og Landsstýrið tveir, meðan tann fimti limurin, ið skal hava góðan kunnleika til Føroya jarðfrøði, verður valdur av hinum fýra limunum í felag. Fimti limurin hevur frá fyrstan tíð verið leiðarin á Jarðfrøðisavninum.

Tá málsøkið ráevni í undirgrundini varð yvirtikið sum føroyskt sermál í 1992, fekk Jarðfrøðisavnið við hesum ábyrgdina av øllum jarðfrøðiligum uppgávum hesum málsøki viðvíkjandi. Síðan Oljufyrisitingin varð sett á stovn í 1993, er tað jarðfrøðiliga arbeiðið sum áður nevnt gjørt í tøttum samstarvi við Oljufyrisitingina.

Sum ein liður í umfatandi broytingunum innan alt tað jarðfrøðiliga ábyrgdarøki tey seinastu árini, gjørdu Náttúrugripasavnið og DGU í 1994 fyri fyrstu ferð eina formliga samstarvsavtalu teimum jarðfrøðiligu uppgávunum Føroyum viðvíkjandi. Sambært avtaluni røkir Jarðfrøðisavnið serstakliga tær uppgávur, ið eru knýttar at ráevnisspurningum og jarðfrøðigoymslu í síni heild, meðan DGU serliga røkir meira vísindaligar uppgávur, ið formliga altíð verða gjørdar í samstarvi við Jarðfrøðisavnið, og DGU hjálpir harafturat Jarðfrøðisavninum í sínum arbeiði við atliti at ráevnum í undirgrundini og við royndunum at byggja upp tann neyðuga jarðfrøðiliga førleikan í Føroyum.

Stovnanin í 1995 av Danmarks og Grønlands Geologiske Undersøgelse (GEUS) førdi ongar serligar broytingar við sær í samstarvinum við Jarðfrøðisavnið, og arbeiðið á GEUS viðvíkjandi Føroyum verður framhaldandi samskipað av áður nevndu 5-manna nevnd. Sambært nýggju reglugerðunum fyri GEUS (settar í gildi frá 1. januar 1997) verður ein av 13 limum í stýrinum fyri stovnin valdur

eftir tilmæli frá Føroya Landsstýri, sum hevur valt leiðaran á Jarðfrøðisavninum sum sín lim.

Fyri tann jarðfrøðiliga stuðulin frá GEUS rindar Landsstýrið eina árliga upphædd, ið samsvarar lønarútreiðslunum til ein “senior”jarðfrøðing (400.000 kr. í 1996), og Landsstýrið letur GEUS skrivstovuhøli, har tað í dag starvast eitt vísindafólk og eitt skrivstovufólk. Samlaða “samstarvsjáttanin” er 655.000 kr. í 1997, og umframt nevndu útreiðslur verða ávísar kanningar- og goymsluútreiðslur við atliti at uppgávum av felags áhuga goldnar av hesi játtan.

GEUS rindar sjálvt okkurt um 1 mió. kr. árliga til ymisk arbeiði viðvíkjandi Føroyum. Harumframt ger GEUS ymiskar uppgávur, ið onnur rinda fyri, partvíst av handilsligum slag (fyri oljufeløg o.o.) og partvíst fyri tað almenna. Mest umfatandi arbeiði av hesum slag tey seinastu árini hevur verið tann sonevnda “Føroyar-Rockall verkætlanin”, ið varð sett í verk í 1987 fyri at styðja upp undir prófførsluna fyri kravinum um rættin til havbotnin á Hatton-Rockalløkinum uttan fyri føroyska 200 sjómílamarkið. Danska Orkustýrið - ið nú er lagt saman við Umhvørvismálaráðið - hevur goldið meginpartin av verkætlanini higartil. Verkætlanin hevur higartil kostað 25 mió. kr. Umframt at lata øll kanningarúrslitini frá Vestmanna- og Lopransboringunum (frá 1980 og 1981) til nýtslu, so hevur Føroya Landsstýrið higartil latið samanlagt 2,25 mió. kr. til hesa verkætlan frá 1989 til 1993. Verkætlanin, ið verður stýrd av eini felags dansk/føroyskari nevnd, verður væntandi liðug í 1997. Enn er ikki gjørt av, um og hvussu hon skal halda fram eftir tað. Jarðfrøðisavnið hevur umsitið ta føroysku játtanina til verkætlanina gjøgnum játtanina til “seismiskar kanningar”, ið nú verður nýtt til lønarútreiðslur v.m. á Jarðfrøðisavninum í tilknýti til forkanningarnar við atliti at komandi oljuleitingum. Árliga játtanin hevur tey seinastu árini verið 500.000 kr., ið samsvarar o.u. 1½ vísindalig ársverk.

“Seismikk-játtanin” verður latin yvir samlaðu játtanina í Landsstýrinum til undirvísing og verður sostatt ikki umsitin av landsstýrismanninum við høvuðsábyrgd fyri Jarðfrøðisavnið.

Meginparturin av játtanini til dagliga virksemið á Jarðfrøðisavninum verður latin gjøgnum høvuðsjáttanina til Føroya Náttúrugripasavn. Áðrenn forkanningarnar vórðu settar í verk, fevndi játtanin m.a. um lønarútreiðslur til 2 vísindafólk og 1 hálvtíðarsett skrivstovufólk. Í 1997 fevnir játtanin um tey somu 2 vísindastørvini, umframt eitt nýtt “senior”vísindastarv og samanlagt 2 hjálparfólk (á skrivstovuni og goymsluni).

Burturúr teimum íalt o.u. 4½ vísindaligu ársverkunum og 2 hjálparstørvunum á Jarðfrøðisavninum í dag eru sostatt nýjáttanir til 1 vísindafólk og 1½ hjálparfólk komnar afturat, síðan forkanningarnar byrjaðu. Av tí at leiðarin á Jarðfrøðisavninum nú samstundis er settur fyribils sum stjóri á Oljufyrisitingini, fæst hann í dag lítið við jarðfrøðiligt arbeiði. Ein heildarmynd av jarðfrøðiliga arbeiðinum í dag fevnir harumframt um serkøna hjálp, ið Oljufyrisitingin keypir sær uttaneftir í tilknýti til forkanningarnar. Útreiðslurnar í hesum sambandi samsvara o.u. 1½ ársverki.

Við atliti at framtíðarskipanini av tí samlaða jarðfrøðiliga arbeiðinum viðvíkjandi - bæði uppgávur í samband við leiting, men eisini aðrar uppgávur - er verandi skipan eyðsæð ov fløkt og óhóskandi, og tørvur er á eini nýmeting og umskipan, áðrenn oljuleitivirksemið byrjar av álvara (sí seinni).

### 3.3.2 Fyrisitingarligu uppgávurnar fyrst í leitiskeiðinum

Tær almennu uppgávurnar, sum tey komandi árini standast av hjálagda uppskoti til løgtingslóg um kolvetnisvirksemi, kunnu natúrliga býtast upp í hesar bólkar:

| | |
|---|---|
| *Fyrisitingarlig mál: (serliga løgfrøðilig):* | At gera lógaruppskot og áseta kunngerðir. At geva loyvi til forkanningar. At samráðast um og geva leitiloyvi. Ymiskar góðkenningar og umsiting annars. Eftirlit við virkseminum hjá loyvishavum. Altjóða samband |
| *Oljujarðfrøðilig mál:* | 1. Savna inn, varðveita og viðgera jarðfrøðiligt kanningartilfar. Útlitsmetingar og kortlegging av møguligum kolvetnistilfeingi.<br>2. Tilfeingisumsiting: Leititilrættislegging, spurningar um hvørjar leiðir skulu bjóðast út, samráðingar við oljufeløgini, góðkenning av arbeiðsskráum og ætlanum um oljuútvinning v.m. og eftirlit við virkseminum. |
| *Trygdar-, arbeiðsumhvørvis- umhvørvis- og tilbúgvingarmál:* | Gera reglur um og hava eftirlit við trygd, arbeiðsumhvørvi og tilbúgving, herundir eisini umhvørvisfylgjumetingar. |
| *Búskapar- og vinnumál:* | Evna til loyvistreytir og áhaldandi síggja til, at tær verða hildnar, til tess at landið skal fáa sum mest burtur úr oljuvirkseminum, og at føroyskt vinnulív og føroysk arbeiðsmegi fáa hóskandi lut í virkseminum. |
| *Innanhýsis fyrisiting og starvsfólkamál:* | Útbúgving og setan av fólki<br>Gera fíggjarætlan og hava eftirlit við henni<br>Málstýring, skjalasavn<br>Kunning og edv |

**Fyrisitingarlig mál**

Uppgávurnar fyrst í leitiskeiðinum verða summar av almennum slag, aðrar eru knýttar at ítøkiligum stigum í arbeiðsgongdini so hvørt. Oljufyrisitingin fer natúrliga at kunna taka sær av einum parti av uppgávunum, meðan aðrar liggja betri hjá øðrum almennum myndugleikastovnum.

***Almennar uppgávur***

Til tær almennu uppgávurnar hoyrir *fyrireiking av lógum*. Løgtingslógin um kolvetnisvirksemi verður sett í gildi áðrenn fyrsta útbjóðingarumfar kemur fyri. Tað verður neyvan neyðugt at gera stórvegis broytingar í hesi lóg tey fyrstu leitiárini.

Fyri eitt annað lógarøki av týdningi fyri kolvetnisvirksemið, vernd av havumhvørvinum, verður væntandi ein nýggj kgl. fyriskipan um havumhvørvi sett í gildi fyri Føroyar, áðrenn leitiskeiðið byrjar. Danska umhvørvisstýrið stendur fyri

arbeiðinum við teirri kgl. fyriskipanini, men ein arbeiðsbólkur, sum landsstýrismaðurin í umhvørvismálum hevur sett við umboðum fyri m.a. Oljuráðleggingarnevndina og Oljufyrisitingina, fylgir við.

Ta fyrstu leititíðina verður, sum skilst frammanfyri, neyvan brúk fyri stórvegis fyrisitingarligari arbeiðsorku til at gera lógaruppskot.

Hinvegin má roknast við, at nógv megi skal brúkast til *fyrisitingarligar kunngerðir* v.m. Uppkastið til løgtingslóg um kolvetnisvirksemi hevur í sær fleiri heimildir til Landsstýrið um at áseta neyvari fyriskipanir. Hetta er ikki minst galdandi fyri kapittul 5 í uppkastinum um arbeiðsumhvørvi, trygd og tilbúgving fyri havstøðir, sum fyrisetir, at fleiri fyriskipanir verða settar í gildi, áðrenn farið verður undir at bora. Fyriskipanir, sum skulu brúkast tíðliga, snúgva seg eitt nú um tilbúgvingarviðurskiftini hjá fyristøðufelagnum, boritrygd og trygdarøki kring havstøðir.

Kgl. fyriskipanin um havumhvørvi fer ætlandi at geva Landsstýrinum heimild til at avgera og fyrisita ávísar umhvørvisspurningar, sum eru av týdningi fyri kolvetnisvirksemið. Hesi øki eru serliga útlát í havið av evnum, sum verða brúkt, tá borað verður, og møguligar avmarkingar viðvíkjandi burturbrenning av gassi. Eins og í okkara grannalondum má roknast við, at hesi tøkniligu viðurskifti verða greidd við kunngerðum. Bæði tilevning av kunngerðum og fyrisiting í tí sambandinum fara væntandi at krevja fleiri starvsfólk hjá føroyskum umhvørvismyndugleikum.

Ásetan og uppkrevjan av ymiskum gjøldum, eitt nú umsóknargjøldum, loyvisgjøldum og møguligum leigugjøldum fyri kanningarleiðirnar v.m. fer ætlandi framvegis at liggja hjá Oljufyrisitingini. Tað sama fer væntandi at galda fyri framleiðslugjøld.

Væntandi fara skattamyndugleikarnir at umsita skattalógarmálini í sambandi við kolvetnisvirksemið. Sjálvt um hetta neyvan krevur nakrar stórvegis nýggjar fyriskipanir, fara vegleiðingar til oljufeløg, innanhýsis reglur v.m. óivað at krevja fleiri fólk og eyka útbúgvingar.

Kolvetnisvirksemið hevur stóran almennan áhuga í Føroyum. Politikararnir vilja eisini fylgja væl við gongdini á hesum øki. Í royndini sæst hetta aftur í einum almennum orðaskifti og í tí, at løgtingsmenn seta Landsstýrinum fyrispurningar í løgtinginum. Tessvegna má roknast við regluligum tørvi á kunning og upplýsing.

Tá fyrispurningar skulu svarast í løgtinginum, verður uppgávan hjá umsitingini at savna inn upplýsingar og gera uppkøst til svar. Mannagongdin hevur higartil verið, at Oljufyrisitingin og Oljuráðleggingarnevndin hava gjørt hetta arbeiði í felag.

Aðrar uppgávur hjá Oljufyrisitingini hava verið javnan at lata upplýsingar og at samskipa sambandið hjá oljufeløgunum við Landsstýrið. Roknast má við, at meiri arbeiði verður av hesum í leitiskeiðinum, enn tað hevur verið í forkanningarskeiðinum.

Av øðrum uppgávum, sum fara at krevja umsitingarliga arbeiðsorku, kann nevnast, at tað verður neyðugt javnan at lýsa og upplýsa um tær búskaparligu og vinnuligu fylgjurnar av kolvetnisvirkseminum.

Roknast má eisini við, at fyrisitingin skal vera uppi í at evna til langtíðar stevnumið, eitt nú spurningar um møguliga útbygging, útvinning, ílandføring, framtíðar loyvisumfør, møguligt føroyskt landsoljufelag, áhaldandi leitiætlanir og

stig at skunda undir áhugan hjá leitifeløgunum fyri nýggjum leiðum, metingar um kolvetnis- og leitimøguleikar og tilrættalegging av ítøkiligum stigum (áhaldandi loyvisumførum, møguligum øðrvísi framferðarháttum t.d. “Open Door”) smbr. viðmerkingarnar til § 7, stk. 1 í lógaruppskotinum.

***Ítøkiligar uppgávur***

Ítøkiligar uppgávur í sambandi við fyrsta útbjóðingarumfar verða eitt nú at velja út øki, gera loyvismyndil við teimum treytum, sum fylgja við loyvinum, og annars at gera ta frágreiðingina til Løgtingið, sum verður skotin upp í uppkastinum til løgtingslóg um kolvetnisvirksemi § 7, stk 2. Harafturat skulu útbjóðingarskjøl gerast, lýsingar og tíðindaskriv fyrireikast, eins og onnur marknaðarføringartiltøk skulu setast í verk.

Umsóknir um loyvi at leita eftir og útvinna olju og jarðgass (“konsessjónir”) skulu viðgerast og tingast um við umsøkjararnar, og síðani skulu gerast tilmæli til politiska støðutakan og loyvi gevast. Umsitingin má rokna við at fáa almikið at gera, tá hesar umsóknir verða viðgjørdar. Nógv handaligt arbeiði skal fáast frá hondini, eins og krevjandi samráðingar skulu verða við feløgini, sum søkja. Tá umsóknartilfarið verður viðgjørt, má roknast við, at neyðugt verður at brúka uttanhýsis arbeiðsmegi til eitt vist.

Dagliga umsitingin av loyvunum verður eitt nú at savna allar tøkar upplýsingar um undirgrundina, vera eygleiðari á fundum í samarbeiðsbólkum, lata ymiskar góðkenningar, eitt nú loyvi í sambandi við havstøðir, útbygging, útvinning og flutning eins og manningar- og skipanarætlanir v.m.

Ein serlig uppgáva verður at hava eftirlit við virkseminum.

Í sambandi við marknaðarføring og kunning verður neyðugt at gera kunningartilfar sum t.d. ársfrágreiðing v.m. og fyrireika og halda kunningarfundir, ráðstevnur o.s.fr. Ein onnur uppgáva er at marknaðarføra og upplýsa um útbjóðingarumfør, skriva lýsingar og tíðindaskriv og javnan hava samband við feløg, fjølmiðlar og myndugleikar.

Roknast má við, at starvsfólk á Oljufyrisitingini skulu sita í ymiskum nevndum, tí tey hava ein sakkunnleika, sum kann koma samfelagnum til góðar á annan hátt. Til dømis hevur tað longu verið hildið neyðugt, at fólk úr fyrisitingini sita í nevndum viðvíkjandi útbúgving og umhvørvi v.m.

**Oljujarðfrøðilig mál**

Jarðfrøðiligir spurningar hava avgerandi leiklut í eini og hvørji oljufyrisiting. Tá samráðast skal við oljufeløgini um teirra verkætlanir v.m., er tað av alstórum týdningi fyri úrslitið at kenna “vøruna, ið seljast skal”, t.e. oljuvánirnar í undirgrundini, út í æsir. Metingar um og góðkenningar av eini hóskandi og gagnligari oljuútvinning eru treytaðar av nágreiniligari jarðfrøðiligari vitan, eins og ásetan av neyðugum trygdar- og umhvørvisatgerðum seta krøv um jarðfrøðiligt innlit.

Ein treyt fyri, at oljumyndugleikin skal kunna gera sítt arbeiði til lítar, er, at hann fær atgongd til alt oljujarðfrøðiligt tilfar og øll kanningarúrslit. Viðgerð og handfaring av innkomna tilfarinum verður tí ein liður í oljumyndugleikaarbeiðinum. Sambært uppkastinum til løgtingslóg um kolvetnisvirksemi fær myndugleikin heimild at krevja, at oljufeløg v.m. lata inn avrit av øllum innsavnaðum kanningartilfari um føroysku undirgrundina, og við hesum fær oljumyndugleikin høvi at ogna sær størst møguligu jarðfrøðiligu vitanina. Ein tílík heimild er longu nú í lógini um forkanningar v.m. frá 1993.

Oljujarðfrøðiligu uppgávurnar kunnu í høvuðsheitum býtast upp í tveir bólkar:

1. *Myndugleikaarbeiði*, ið m.a. fevnir um oljujarðfrøðiligar spurningar av týdningi fyri útbjóðingarpolitikkin, samráðingar við oljufeløg um oljuleiti- og framleiðsluverkætlanir v.m. og eftirlit við jarðfrøðiliga virkseminum hjá loyvishavunum. Harumframt krevst jarðfrøðiligt innlit í sambandi við dagliga trygdareftirlitið í tilknýti til borivirksemið. Henda "tilfeingisumsiting" kann bert gerast til lítar í tøttum samstarvi við:

2. *Oljujarðfrøðiligar kanningar*, t.e. jarðfrøðilig kortlegging og tulking, metingar um oljuvánir bæði í síni heild og við atliti at serstakum økjum, útgreinandi metingar um tær ávísu oljuleiðirnar, dátuviðgerð og arkivering v.m.

Oljujarðfrøðiligar kanningar kunnu bert gerast nøktandi og til fulnar, um tær verða bygdar á ein breiðan jarðfrøðiligan kunnleika og vitan, ið røkka langt út um oljujarðfrøðiligu spurningarnar í sjálvum sær. Neyðuga breiða grundarlagið fæst gjøgnum gransking á hægri læristovnum, fróðskaparsetrum, jarðfrøðisøvnum v.m. Í nógvum londum eru harumframt serstakir almennir kanningarstovnar, hvørs høvuðsuppgáva er at gera nágreiniliga og umfatandi jarðfrøðiliga kortlegging og at nøkta landsins almenna tørv á jarðfrøðiligari vitan og kunnleika í síni heild. Dømi um tílíkar kanningarstovnar eru Danmarks og Grønlands Geologiske Undersøgelse (GEUS), Norges Geologiske Undersøgelse (NGU) og British Geological Survey (BGS). Í Føroyum skal Jarðfrøðisavnið nøkta henda tørv fyri Landsstýrið, og er tað sum áður nevnt vorðið gjørt í neyvum samstarvi við GEUS, hvørs ábyrgdarøki fyrst og fremst fevnir um Danmark og Grønland, men sum harumframt hevur ávísar skyldur mótvegis Føroyum í jarðfrøðiligum spurningum av felags áhuga.

***Skipanir í Noregi og Danmark***

Oljujarðfrøðiligu uppgávurnar verða skipaðar á rættiliga ymiskan hátt í teimum ymisku Norðsjóvarlondunum. Norska og danska skipanin eru góð dømi um tað.

Í Noregi, har land- og havøkini jarðfrøðiliga eru ógvuliga ólík, tekur Norges Geologiske Undersøgelse (NGU) sær av jarðfrøðiligari kortlegging v.m. á landi og í ein ávísan mun eisini á sjóøkinum, men allar tær oljujarðfrøðiligu uppgávurnar eru lagdar beinleiðis undir oljumyndugleikan (Oljedirektoratet í Stavanger). Oljedirektoratet varð stovnað í 1972 sum liður í eini bygnaðarumskipan, har Vinnumálastýrið (Industridepartementet) í Oslo skuldi starvast við grundleggjandi meginspurningum, endamálsorðingum, lógarkarmum og loyvisspurningum, Oljedirektoratet í Stavanger skuldi starvast við oljufyrisiting, leiti- og eftirlitsspurningum, meðan statsoljufelagið Statoil skuldi átaka sær at røkja landsins handilsligu áhugamál. Harumframt taka fróðskaparsetur, jarðfrøðisøvn v.m. sær av jarðfrøðiligari gransking, kunning og ráðgeving í einum breiðari høpi.

Í Danmark, har land- og havøkini jarðfrøðiliga í nógvum lutum eru rættiliga meinlík hvørjum øðrum, áliggur tað GEUS at taka sær av øllum almennum jarðfrøðiligum kortleggingaruppgávum, her undir kortlegging við atliti at oljuleiting v.m. Orkustýrið (Energistyrelsen, ið nú hoyrir undir Umhvørvis- og orkumálaráðið) varð sett á stovn við lóg nr. 194 frá 28. apríl 1976 um orkupolitiskar

fyriskipanir. Tess uppgáva er at ráðgeva umhvørvis- og orkumálaráðharranum og at umsita orkulóggávuna.

Stýrið skal m.a. umsita leiting eftir og framleiðslu av olju og jarðgassi v.m. og hava ábyrgdina av virksemiseftirlitinum viðvíkjandi trygd og arbeiðsumhvørvi o.a.m. Saman við GEUS savnar stýrið saman kanningartilfar og upplýsingar annars um undirgrundina til nýtslu í umsitingini. Eftirlitið við virkseminum tekur stýrið sær av við jarðfrøðiligum stuðli frá GEUS. Tríggir jarðfrøðingar og fimm verkfrøðingar starvast í stýrinum við jarðfrøðiligum og jarðgoymsluligum (“reservoir-”) spurningum. Jarðfrøðiliga arbeiðið v.m. verður lagt til rættis í felags arbeiðsbólkum og á samstarvsfundum, ið verða hildnir við jøvnum millumbilum.

GEUS nýtir eini 25-30 ársverk í oljuleitingarhøpi í Danmark og í altjóða høpi og o.u. 20 ársverk til uppgávur við tilknýti til oljuútvinningarspurningar. Beinleiðis stuðulin til Orkustýrið telur o.u. 5 ársverk. Harumframt verða 30-35 ársverk nýtt til oljuleitingaruppgávur í Grønlandi.

Í Keypmannahavn verður nú arbeitt við eini ætlan um at savna meginpartin av almennu jarðfrøðiligu kortleggingar- og granskingarstovnunum á einum stað innan karmarnar á einum “Geocentri”. Við hesum verður GEUS tey komandi árini knýtt nærri at jarðfrøðiligu og landafrøðiligu deildunum á fróðskaparsetrinum umframt jarðfrøðisavninum har og sonevnda “Dansk Litosfærecenter”. Almennu oljujarðfrøðiligu kortleggingaruppgávurnar fara við hesum at verða loystar lið um lið við eini røð av øðrum uppgávum í einum sera breiðum og partvíst samansjóðaðum jarðfrøðiligum granskingarumhvørvi, sum liggur leyst frá oljumyndugleikanum (Orkustýrinum), men tó framvegis í tøttum samstarvi við hann.

Ein stórur fyrimunur við norsku skipanini er, at oljumyndugleikin ræður sjálvur yvir øllum innkomnum kanningartilfari, upplýsingum og allari atkomiligari vitan um undirgrundina, og við hesum fær oljuumsitingin beinleiðis atgongd til og nyttu av hesi umfatandi vitan um tey jarðfrøðiligu viðurskiftini og av serkunnleikanum á stovninum sjálvum. Fyrimunurin í donsku skipanini er tann umfatandi serkunnleikin, ið fæst við einum so breiðum jarðfrøðiligum granskingarstovni sum GEUS. Av tí at ein oljufyrisiting ikki kann virka til fulnar uttan egnar jarðfrøðingar og verkfrøðingar, hava tílík størv altíð verið í Orkustýrinum. Tey veita í dag størstapartin av neyðuga jarðfrøðiliga og verkfrøðiliga arbeiðsíkastinum til dagligu oljuumsitingina. Fakliga endamálið er hvør sítt á einum umsitingarligum stovni sammett við ein granskingarstovn, og tí hava samráðingar tey seinastu árini millum hesar báðar stovnarnar einans snúð seg um, í hvønn mun og á hvønn hátt GEUS skal stuðla Orkustýrið. Harumframt eru innsavnaðu jarðfrøðiligu upplýsingarnir tengdir at strongum trúnaðarskyldum, ið avmarka møguleikarnar fyri at geva øðrum tað innlit og at skriva tær vísindaligu greinar ella átaka sær tað arbeiði fyri onnur, sum ein granskingarstovnur altíð vil tráa eftir. Danska skipanin ber so eisini tað við sær, at loyvishavar skulu lata inn tvey eintøk av kanningarúrslitinum til tað almenna, og ikki einans eitt, sum er nøktandi aðrastaðir, eitt nú í Noregi. Í løtuni verður arbeitt við at fáa broytt kravið, so tað framyvir verður nóg mikið at lata inn eitt eintak av kanningarúrslitunum, ið so skal varðveitast í eini felags goymslu hjá Orkustýrinum og GEUS.

Høvuðsmunurin millum ta norsku og ta donsku skipanina, tá tað ræður um

oljujarðfrøðiligu uppgávurnar, verður sostatt, at oljumyndugleikin í Noregi (Oliedirektoratet) sjálvur tekur sær av øllum uppgávunum, har tað í Danmark aftur ímóti er GEUS ið tekur sær av oljujarðfrøðiligu kortleggingini og fær savnað ta hartil knýttu vitanina, meðan Orkustýrið tekur sær av jarðfrøðiliga myndugleikaarbeiðinum við tilknýti til umsitingina av oljutilfeinginum.

Skipanirnar í Noregi og í Danmark eru nógv tengdar at serstøku umstøðunum í báðum londunum, tá tær vórðu settar í verk. Við byrjan av 1970-árunum varð Noreg ávegis at gerðast eitt veruligt oljustórveldi. Tá høvdu ongir av verandi jarðfrøðiligu stovnunum (NGU v.m.) í nakran serligan mun tikist við jarðfrøðiligar uppgávur við beinleiðis atliti at oljuvinnu við tað, at land- og havøkini, sum áður nevnt, eru ógvuliga ólík jarðfrøðiliga. Tí tóktist tað ikki einans gjørligt, men hartil skilagott, at allur tann neyðugi oljujarðfrøðiligi serkunnleikin skuldi byggjast upp í tí nýstovnaðu oljufyrisitingini (Oljedirektoratet). Tá Danmark skuldi seta sína nýggju skipan í verk í 1970-árunum og tíðliga í 1980-árunum, hevði Danmarks Geologiske Undersøgelse (nú GEUS) longu í nógv ár arbeitt við oljujarðfrøðiligum uppgávum, sum ein part av sínum samlaða kortleggingar- og granskingararbeiði, og har umframt tikist við eftirlitsuppgávur mótvegis loyvishavum.

***Føroyar***

Enn eru Føroyar stutt á leið komnar í oljuleiting. Framtíðar fyrisitingarskipanin eigur at taka hædd fyri verandi støðuni, so at sum mest fæst burturúr tí sakkunnleika, ið er til taks.

Jarðfrøðisavnið, ið er einasti føroyski jarðfrøðiligi “stovnurin” higartil, hevur fram gjøgnum tíðirnar tikið sær av øllum jarðfrøðiligum uppgávum fyri Landsstýrið, á landi og sjógvi - jarðfrøðiliga kortlegging, dátuviðgerð, savnsuppgávur, ráðgeving v.m. - ofta í samstarvi við onnur, serliga DGU (GEUS), tá tað ræður um tað fakliga arbeiðið. Tað tykist tí natúrligt, at Jarðfrøðisavnið frá byrjan fekk hesar somu uppgávur í tilknýti til forkanningarnar við atliti at oljuleiting um Føroyar. Formliga uppgávubýtið millum Jarðfrøðisavnið og Oljufyrisitingina hevur tó ikki higartil verið greitt orðað.

Tá tað í næstum skal farast undir ætlaða oljuleitiskeiðið, verður tað av alstórum týdningi, at tað almenna jarðfrøðiliga arbeiðið liggur í fastari kørmum enn higartil.

Jarðfrøðisavnið hevur fram ígjøgnum tíðirnar nomið sær serkunnleika og royndir innan vísindaligar uppgávur eins og innan oljujarðfrøðiliga yrkið, og tað hevur knýtt umfatandi samband við aðrar jarðfrøðistovnar uttanlands, eins og Oljufyrisitingin hevur knýtt samband við aðrar oljufyrisitingarligar stovnar. Jarðfrøðisavnið og Oljufyrisitingin hava hvør sær og í felag har umframt dúgliga samskift við oljuleitifólk hjá teimum ymisku oljufeløgunum. Í útgangsstøðinum eru tann fyrisitingarligi og tann vísindaligi “stovnurin” tætt knýttir at hvørjum øðrum, ikki minst grundað á felags leiðsluna higartil, og sostatt er tann jarðfrøðiligi serkunnleikin savnaður á einum stað, og tað gevur høvi at gagnnýta fámentu jarðfrøðiligu manningina til fulnar.

Ongin serligur munur er í Føroyum, sum í Noregi, millum land- og havøkini, tá tað ræður um jarðfrøði og oljuvánir í høvuðsheitum. Eins og á landi hylir basaltið eisini nærum allan landgrunnin og bankarnar kring Føroyar, men jarðfrøðin undir basaltinum verður í útgangsstøðuni ikki hildin at víkja stórvegis frá

undirgrundarviðurskiftunum uttanfyri basaltøkið. Frá tí sjónarhorninum eru Føroyar meira líkar Danmark enn Noregi. Einki greitt jarðfrøðiligt mark er millum olju- og ikki-oljujarðfrøði, heldur tvørtur ímóti við tað at nógvir av spurningunum, ið verða viðgjørdir í breiðum vísindaligum høpi, t.d. á hvønn hátt Føroyar jarðfrøðiliga eru partur av Norðuratlantska økinum, eru ógvuliga viðkomandi hjá oljujarðfrøðingum í teirra royndum at kortleggja, hvar ið oljuleiðir kunnu vera at finna. Tíðum hava báðir hesir fakbólkar tørv á at fáa innlit í og at arbeiða við tí sama kanningartilfarinum.

Hesir fakligu líkleikar eins og tørvurin á at fáa sum mest burturúr fámentu arbeiðsorkuni benda á, at eitt framhaldandi tætt oljujarðfrøðiligt samstarv millum fyrisiting og gransking kann vera til gagn fyri báðar partar. Fyri framtíðina verður hetta samstarv merkt av vaksandi krøvum frá fyrisitingini um oljujarðfrøðiligan kunnleika og orku, t.e. krøvum um at tað jarðfrøðiliga fakumhvørvið í Føroyum tilsamans verður munandi styrkt.

Samstundis sum dentur má leggjast á tann stóra týdning, tað hevur at tryggja eitt sterkt jarðfrøðiligt fakumhvørvi her heima, ið skal gerast kjarnin í framtíðar jarðfrøðiliga arbeiðinum Føroyum viðvíkjandi, má herðsla leggjast á, at tað í øllum førum verður stórur tørvur á at samstarva við útlendskar jarðfrøðistovnar, serstakliga tey fyrstu árini. Knýtta sambandið út í verð, her undir serliga tað søguliga samstarvið millum Jarðfrøðisavnið og GEUS, gevur gott grundstøði at byggja eitt framhaldandi samstarv á. Harumframt er tað av stórum týdningi at halda fram við og víðka um samstarvið við aðrar heimligar náttúruvísindastovnar, her uppi í hinar partarnar á Náttúrugripasavninum og Fróðskaparsetri Føroya.

Við atliti at tí jarðfrøðiliga partinum av framtíðar oljufyrisitingarligu skipanini eigur dentur m.a. at verða lagdur á:

- Tað er alneyðugt fyri eina oljufyrisiting at hava jarðfrøðiligan sakkunnleika.
- Ynskiligt er, at tað í Føroyum framhaldandi verður ein stovnur at taka sær av jarðfrøðiligum granskingarvirksemi, og at hesin er óheftur av oljumyndugleikanum.
- Verandi jarðfrøðiliga fakumhvørvið er sera lítið.
- Oljuleitingin, ið er í væntu, og møgulig seinni oljuútvinning fara at seta krøv um menning av jarðfrøðiliga sakkunnleikanum í Føroyum, serliga við atliti at myndugleikaarbeiði, men eisini við atliti at eini betri og breiðari heildarfatan av Føroya jarðfrøði.
- Føroyar fara neyvan at hava ráð til at byggja upp tvey ymisk jarðfrøðilig fakumhvørvi tey fyrstu mongu árini.
- Eftir øllum at døma fer oljufyrisiting og vísindalig gransking sum málsøki at hoyra undir hvør sín landsstýrismann.

Hesi viðurskifti benda á, at framtíðarskipanin eigur at hava við sær m.a.:

- at leiðslan á Oljufyrisitingini fær ræði yvir jarðfrøðiligum sakkunnleika - bæði tá ræður um játtanir og um starvsfólk,
- at játtanin til olju-jarðfrøðiliga gransking verður veitt yvir játtanina hjá landsstýrismanninum, ið umsitur kolvetnismál.
- at játtanin til jarðfrøðiliga gransking annars verður veitt yvir høvuðsjáttanina hjá tí landsstýrismanni, ið umsitur granskingarmál,
- at skipað eigur at verða soleiðis fyri, at eitt felags jarðfrøðiligt fakumhvørvi kann byggjast upp. Tað kann m.a. verða gjørt við felags starvssetingum í

serligum lyklastørvum, við at starvast verður undir somu lon, við felags dátu- og goymsluskipanum og við at gera formligar samstarvsavtalur millum tann fyrisitingarliga og tann granskingarliga stovnin.

**Trygdar-, arbeiðsumhvørvis-, umhvørvis- og tilbúgvingarmál**

Sum nevnt í kapitli 3.4 fer leiti- og útvinningarvirksemi til havs at krevja reglur um og eftirlit við heilsu, arbeiðsumhvørvi og trygd. Frálandsvirksemi má metast vágiligt, og tí hevur tað týdning, at bæði teir, sum arbeiða á grunninum, teir ið útvinna olju, útvegarar uppi á landi og myndugleikar eru við til at tryggja, at virksemið fer fram undir trygdarliga fult forsvarligum viðurskiftum. Trygdarfyrilitini galda bæði fólk, umhvørvi og virði.

***Søga og menningarrák***

Í forkanningarskeiðinum hava spurningar um trygd og arbeiðsumhvørvi ikki verið so átrokandi, sum teir væntandi verða í leitiskeiðinum. Kanningarnar úti á havi eru gjørdar við skipum, sum eru skrásett í øðrum londum, og tí eru skipsins eginleikar í sjónum og arbeiðsumhvørvið umborð mál, sum viðkoma flaggstatinum. Føroyingar hava einans skula tryggjað, at viðurskiftini millum t.d. seismikkskip og onnur skip, serliga fiskiskip, á kanningarleiðini er so gott sum møguligt, smbr. broti 5.1.3. Einasta kanningin higartil, sum hevur nortið við spurningarnar um boritrygd og arbeiðsumhvørvi, var stratigrafiska dýpingin av boriholinum í Lopra. Tá talan var um eina boring á føroyskum landøki, vóru reglurnar í lógini um arbeiðaravernd brúktar fyri arbeiðsumhvørvið, meðan Oljufyrisitingin - orsakað av, at ongar føroyskar reglur vóru fyri boritrygd - í loyvinum til dýpingina vísti til danskar reglur um boritrygd v.m. Danska Orkustýrið, sum hevur royndir at hava eftirlit við djúpum boringum á landi, veitti Oljufyrisitingini ráðgevarahjálp í sambandi við verkætlanina.

Myndugleikakrøv og -eftirlit í sambandi við trygd og arbeiðsumhvørvi eru í oljuvinnuni eins og øðrum ídnaðargreinum broytt hesi seinastu árini, soleiðis at krøvini verða málvís heldur enn útgreinandi. Tað gevur ídnaðinum størri frælsi til at velja tøkniligar og verkligar loysnir, og eftirlitið byggir meir á at brúka innaneftirlitsloysnir í staðin fyri myndugleikaeftirlit við øllum lutum í virkseminum. Henda gongd samsvarar við, at tað eru loyvishavarnir og ikki myndugleikarnir, sum hava høvuðsábyrgdina fyri frálandsvirkseminum.

Hóast hesa gongd verður tað eisini í framtíðini neyðugt við myndugleikakrøvum og -eftirliti til tess at tryggja, at virksemið fer forsvarliga fram. Tí stingur seg upp spurningurin um, hvussu umsitingin av trygdar- og arbeiðsumhvørvismálum best verður skipað.

***Eitt sindur um okkara grannalond***

Grannalond okkara hava skipað seg eitt sindur ymiskt, tá tað snýr seg um trygd og arbeiðsumhvørvi:

- Í Noregi hevur Oljedirektoratet bæði trygdarmál og arbeiðsumhvørvismál, sum hava við virksemi á landgrunninum at gera. Oljedirektoratet vísir í hesum málum til kommunu- og arbeiðsmálaráðið, meðan Oljedirektoratet í meiri tilfeingiskendum málum vísir til Vinnu- og Orkumálaráðið. Uppbýtið á ráðharrastovustigi varð framt eftir Alexander Kielland vanlukkuna, tá ein flótbúpallur koppaði í 1980.

- Í Danmark umsat Arbeiðseftirlitið upprunaliga eftirlitið við arbeiðsumhvørvinum og trygdini á teimum føstu frálandsútbúnaðunum, meðan spurningar um boritrygd lógu hjá orkumyndugleikunum. Tá lógin um havstøðir varð gjørd í 1981, vórðu allir trygdar- og arbeiðsumhvørvisspurningar á føstum havstøðum lagdir undir umhvørvis- og orkumálaráðharran og verða umsitnir av Orkustýrinum og Sjóferðslustýrinum.

- Í Bretlandi umsótu olju- og gassmyndugleikarnir (Department of Trade and Industry) bæði tilfeingisligar og trygdarligar spurningar til fyri fáum árum síðani. Trygdarspurningar eru nú undir Health and Safety Executive (HSE). At trygdarmál eru tikin burturúr, er eitt úrslit av Lord Cullen kanningini um Piper Alpha vanlukkuna í 1988, tá ein fastur framleiðslupallur sprongdist í luftina.

Í Noregi hava teir við øðrum orðum savnað tær útinnandi uppgávurnar hjá einum myndugleika, meðan teir hava skilt ta politisku ábyrgdina fyri trygdini og arbeiðsumhvørvinum frá hinari oljuumsitingini. Bretland hevur hinvegin valt at býta tær útinnandi uppgávurnar sundur, soleiðis at olju- og gassmyndugleikarnir ikki beinleiðis eru uppi í eftirlitinum við trygdini. Í Danmark hava teir savnað uppgávurnar hjá tveimum stýrum (Orkustýrinum og Sjóferðslustýrinum), sum vísa til somu ráðharrastovu (Umhvørvis- og Orkumálaráðið).

***Umsiting av kapitli 5 í lógini um kolvetnisvirksemi***

Í uppkastinum til løgtingslóg um kolvetnisvirksemi verður gingið út frá, at havstøðir, meðan tær arbeiða á landgrunninum, eru undir kolvetnislógini, tá tað snýr seg um trygd og arbeiðsumhvørvi. Hinvegin er ikki ætlanin, smbr. allýsingina av havstøðum í lógarinnar § 2, at havstøðir á veg til og frá boristøðum og oljuleiðum koma undir kolvetnislógina. Her verður sjóvinnulóggávan - serliga lógin um trygd á skipum - at galda og sjóvinnumyndugleikarnir hava ábyrgdina, og er útbúnaðurin skrásettur uttanlands, er ábyrgdin hjá flaggstatinum, men eisini undir eftirliti sjóvinnumyndugleikanna í Føroyum.

Eitt loyvi frá Oljufyrisitingini til at fara undir eina boring í leiti- og/ella metingarskeiðinum verður treytað av, at loyvishavin (fyristøðufelagið) hevur lagt fram boriætlanir, sum hava innbygt í sær tað trygdarstig, sum kapittul 5 í uppskotinum til kolvetnisvirksemislóg við kunngerðum og vegleiðingum krevur.

Tær boriætlanirnar, sum Oljufyrisitingin hevur fingið, verða nágreiniliga mettar úr trygdarligum og jarðfrøðiligum sýnishornum, áðrenn tær verða góðkendar av myndugleikunum.

Ein gjøgnumgongd og meting av boriætlanum verður tí gjørd í tøttum samarbeiði millum jarðfrøðiliga og verkfrøðiliga sakkunnleikan til tess at tryggja, at viðkomandi mál og krøv eru rokkin.

Hetta arbeiði fer stundum eisini at krevja uppklárandi fundir millum jarðfrøðingar/verkfrøðingar hjá loyvishavanum (fyristøðufelagnum) og jarðfrøðinga/verkfrøðingabólkin hjá Oljufyrisitingini.

Tað hevur stóran týdning fyri arbeiðið við trygdini, at tann jarðfrøðiligi og verkfrøðiligi sakkunnleikin arbeiða tætt saman um at góðkenna boriætlanir og um tað áhaldandi eftirlitið við boriætlanini. Hetta fer at gera tað neyðugt at byggja upp tað fakliga jarðfrøðiliga og verkfrøðiliga umhvørvið, sum skal til fyri at

umsita kolvetnisvirksemið.

Í prinsippinum forðar einki fyri, at tveir ella fleiri myndugleikar umsita ymiskar partar av somu lóg, men tað má haldast vera skilabest, at lógir, tá tað er gjørligt, verða umsitnar av einum myndugleika. Umsitingarliga man tað í Føroyum eisini vera skilabest at lata ein og tann sama stovnin (Oljufyrisitingina), tá tað ber til, umsita høvuðstættirnir í kolvetnisvirkseminum, eitt nú teir ið eru umfataðir av kapitli 5 í lógini um kolvetnisvirksemi.

Skotið verður upp, at spurningurin um møguliga at leggja ávísar partar av kapittul 5 til aðrar myndugleikar verður kannaður nærri. Síðan má tað vera ein tøknilig-umsitingarlig meting, um Vinnumálastýrið sjálvt vil byggja upp ein fakligan førleika innan øll tey øki, sum eru umrødd í kapitli 5, ella tað velur fyri ein part at leggja uppgávurnar út.

Av tí at væntað verður, at leitivirksemið á føroyska landgrunninum verður gjørt frá flótandi (skipslíkum) boriútbúnaði verður í brotinum 3.4.5 grundgivið fyri, at eftirlitið við arbeiðsumhvørvinum á havstøðum á landgrunninum, fyri fyrst verður hjá Sjóferðslustýrinum, sum longu hevur hesa uppgávu fyri skip og boriútbúnað undir flutningi. Í frágreiðingini er kortini lagdur dentur á, at Sjóferðsluustýrið, um so verður, skal røkja uppgávuna vegna og eftir áheitan frá teimum avvarandi føroysku myndugleikunum sambært lógini um kolvetnisvirksemi.

Landsstýrið og Sjóferðslustýrið hava longu eina samarbeiðsavtalu, sum m.a. nevnir málsøki, ið Sjóferðslustýrið umsitur vegna Landsstýrið sambært lógini um skipsuppmáting.

Tilbúgvingarspurningar, herundir luttøka í teirri atgerðarnevndini, ið skotin er upp at seta, er eisini ein uppgáva fyri Oljufyrisitingina.

***Umhvørvisumsiting***

Oljuvirksemið kann undir ávísum umstøðum vera ein hóttan fyri umhvørvið.

Vernd av umhvørvinum mótvegis kolvetnisvirksemi verður tryggjað av eini røð av lógum, kunngerðum, reglum og forskriftum, sum umframt oljulóggávu og lóggávu um vernd av umhvørvinum sum slíkum, eisini fevnir um trygdarfyri-skipanir ímóti at skaðilig evni sleppa út í náttúruna, ta tilbúgving sum eigur at vera til tess at beina burtur ella avmarka skaðar, og harumframt reglur um staðfesting av ábyrgd.

Tí er brúk fyri eini samanhangandi dygdargóðari fyrisiting til tess at tryggja, at málini verða framd, og at eftirlitið er í lagi.

Tað má haldast at vera skilagott at leggja Landsstýrisins umsitingarligu uppgávur sambært tí (komandi) kgl. fyriskipanini um vernd av havumhvørvinum til tann myndugleikan, sum umsitur landumhvørvið. Hetta kann hugsast at hava samvirkandi fyrimunir, samstundis sum møguleiki er fyri at byggja upp ein dygdargóðan og sterkan umhvørvismyndugleika við ábyrgd fyri bæði land- og havumhvørvi. Mælast kann til, at umhvørvismyndugleikin samarbeiðir við kol-vetnismyndugleikan í málum, sum hava týdning fyri kolvetnisvirksemið, so tað slepst undan at tvífalda tann serliga tekniska sakkunnleikan hjá oljumyndugleik-anum.

Ein hóskilig umhvørvisumsiting í sambandi við oljuvinnu treytar, at umsitingarliga orkan á umhvørvisøkinum verður ment.

Reglur í kolvetnisvirksemislógini, sum hava týdning fyri umhvørvið, snúgva

seg fyri tað mesta um, at fyrilit skal takast fyri umhvørvinum í sambandi við ítøkiligar atgerðir, antin tað eru myndugleikarnir, sum velja út øki, ella ein loyvishavi, sum hugsar um eina leitiboring.

Umhvørvisreglurnar í kolvetnisvirksemislógini kunnu við øðrum orðum sigast at vera ein innbygdur partur av øllum teimum kolvetnispolitisku og fyrisitingarligu umhugsanunum. Við hesum í huga mugu hesi umhvørvisligu fyrilit metast at vera ein partur, sum ikki kann loysast frá hinari oljuumsitingini. Tí tykist tað skilagott, at tær umhvørvisligu uppgávurnar sambært lógini um kolvetnisvirksemi eins og hin umsitingin, sum stendst av lógini, verða lagdar til kolvetnismyndugleikarnar.

Roknast má kortini við, at kolvetnismyndugleikarnir hava brúk fyri at ráðføra seg við aðrar myndugleikar og stovnar um umhvørvisligar síður av kolvetnisvirkseminum, t.d. í sambandi við umhvørvisfylgjumetingar. Tá kunnu kolvetnismyndugleikarnir seta serligar bólkar við luttøku frá øðrum myndugleikum, stovnum og sakkønum. Tá kolvetnismyndugleikarnir skulu góðkenna tilbúgvingarætlanirnar hjá fyristøðufeløgum, verður tørvur á at samarbeiða við aðrar myndugleikar, serliga Vaktar- og Bjargingartænastuna.

**Búskapar- og vinnumál**

Teir samfelagsbúskaparligu fyrimunirnir fyri Føroyar í sambandi við eitt møguligt kolvetnisvirksemi verða fyrst og fremst skattingarmøguleikar og vinnu- og arbeiðsmøguleikar, smbr. 4. part. Samfelagsins lutur til tess at fáa hesar fyrimunir verður at veita leiti- og framleiðslumøguleikar móti gjaldi fyri framleiðslurættindi. Áhugin hjá oljufeløgunum fyri Føroyaleiðini byggir á eina handilsliga støðutakan, har mett verður um útlitini, inntøkumøguleikarnar og aðrar møguleikar fyri kolvetnisvirksemi á øðrum økjum. Sostatt skulu setast krøv um gjald oljufelaganna fyri framleiðslurættindini í breiðum týdningi, og metast skal um, hvussu stór hesi krøv skulu vera, til tess at virksemið kann verða áhugavert fyri báðar partar.

Tá Løgtingið á heysti 1993 viðgjørdi kolvetnismálið, løgdu politikkararnir stóran dent á at tryggja føroysk vinnuáhugamál í kolvetnisvirkseminum. Eitt slíkt ynski hevur við sær, at ávíst samljóð má vera millum krøvini til oljufeløgini um fíggjarlig gjøld øðrumegin og tryggjan av føroyskum vinnuáhugamálum og arbeiðsplássum hinumegin.

***Búskaparmál***

Krøvini um búskaparligan ágóða av kolvetnisframleiðslu verða fyri ein part sett gjøgnum lóggávu og kunngerðir og fyri ein part í sambandi við loyvissamráðingarnar. Uppgávurnar verða m.a. at fyrireika uppkast til lógir og kunngerðir, loyvistreytir v.m., luttøka í samráðingum um tær við oljufeløgini og umsitingarlig mannagongd viðvíkjandi teimum búskaparligu/landsfíggjarligu pørtunum av oljuvirkseminum, eitt nú:

- loyvis- og víddaravgjøld
- framleiðslugjøld
- møgulig onnur serlig avgjøld og serligir skattir á framleiðsluvirksemi
- avgjøld og endurgjald fyri umsitingar- og eftirlitsútreiðslur.

Til tess at røkja hesar uppgávur krevst hollur kunnleiki til framleiðslu av

kolvetni á Føroyaleiðini og gongdina á olju- og gassmarknaðinum, kostnaðargongdina í framleiðsluvinnuni og gongdina í teimum samsvarandi búskaparligu treytunum í øðrum londum. Kunnleiki til oljufeløgini, teirra arbeiðsmannagongdir og eftirmetingarhættir v.m. er eisini neyðugur til tess at tryggja sær best møguligu samráðingarstøðuna við loyvisumsøkjararnar. Harumframt koma búskaparligar lýsingar av tí føroyska kolvetnisvirkseminum í breiðari merking, herundir metingar við tilknýti til løgtingsfíggjarlógina og langtíðarmetingar.

Viðvíkjandi umsitingini av loyvum fara serliga hesar myndugleikauppgávur at troka á:

- útrokning, innkrevjing og eftirlit við loyvis- og víddaravgjøldum eins og framleiðslugjøldum (royalty og kanska søla av avgjaldsolju)
- frásøgn um avgjøld v.m., ið verða goldin
- onnur uppfylging av búskaparligum/fíggjarligum treytum í loyvunum
- meting um og tilevning av grundarlagi fyri avgerðum viðvíkjandi teimum rakstrar- og samfelagsbúskaparligu og landsfíggjarligu tættunum av teimum ætlanum, sum oljufeløgini hava lagt fram og viðvíkjandi møguligum umsóknum um útbygging, ílandføring v.m.

Summar av hesum uppgávum fara fyri ein part at bera við sær uppgávur, sum verða røktar aðrastaðir á Oljufyrisitingini ella í øðrum pørtum av Vinnumálastýrinum og fyri ein part við uppgávur, sum aðrir myndugleikar røkja, t.d. Fíggjarmálastýrið.

***Vinnuligar uppgávur***

Í samráðingunum við oljufeløgini er tað uppgáva myndugleikanna eitt nú at tryggja føroysk vinnuáhugamál og føroysk arbeiðspláss í kolvetnisvirkseminum. Sambært § 10 í uppskotinum um kolvetnislóg skulu í loyvunum ásetast reglur um nýtslu loyvishavans av føroyskum veitingum, vørum og tænastum og um útbúgvingartiltøk v.m. Slík krøv verða sostatt samráðingartættir, sum skulu vigast upp ímóti øðrum tættum, tí vinnukrøvini mugu fyri ein part koma ístaðin fyri onnur búskaparlig krøv.

Til tess at seta slík krøv við skili krevst øðrumegin gott innlit í eftirspurningar- og innkeypsmannagongdir hjá oljufeløgunum og hinumegin kunnleiki til útboðið hjá føroyskum vinnulívi av vørum og tænastum og tey menningarrák, sum eru í vinnulívinum. Út frá hesum verður samráðst um krøv ella ynski til oljufeløgini viðvíkjandi arbeiði, innkeypi og upplæring v.m. Fylgt verður við hesum avtalum, eitt nú gjøgnum frásagnarskylduna hjá feløgunum.

Teir møguleikar, sum eru fyri at fáa í lag størri vinnuvirksemi orsakað av kolvetnisvirkseminum, eru nágreiniliga lýstir í 4. parti. Sambært hesi frágreiðing verður tað uppgávan hjá oljumyndugleikunum at seta krøv til oljufeløgini alt eftir veitingarmøguleikunum hjá føroyskum vinnulívi, at fylgja upp frásagnum um hetta og at upplýsa føroyska vinnulívið um væntað virksemi í sambandi við ætlanir um leiting, útbygging v.m. Sambært 4. parti verður tað ikki uppgávan hjá oljumyndugleikunum at standa fyri vinnuframavirksemi sum t.d. í sambandi við upplæring ella at tryggja kappingarføri og marknaðarføring v.m. Lagt verður sostatt upp til, at Oljufyrisitingin í staðin virkar í tøttum samstarvi við vinnuframamyndugleikarnar.

**Samband við aðrar myndugleikar**

Framtíðar kolvetnisfyrisitingin fer at seta krøv um samspæl millum Oljufyrisitingina og aðrar deildir, myndugleikar og stovnar innanfyri sum uttanfyri Vinnumálastýrið, og tí verður neyðugt at fáa í lag eitt dygdargott samarbeiði við tey.

Til tess at kunna røkja tær oljujarðfrøðiligu uppgávurnar krevst eitt væl skipað arbeiðsbýti og ein formlig samstarvsavtala við Jarðfrøðisavnið.

Skal nøkur formlig broyting henda við Jarðfrøðisavninum, krevur tað undirtøku frá avvarandi myndugleikum, tvs. landsstýrismanninum í mentamálum, og broytingin fer eisini at ávirka innanhýsis arbeiðið á Føroya Náttúrugripasavni, sum skal skipast eftir teimum nýggju umstøðunum.

Núgaldandi samarbeiðsavtalan millum Føroya Náttúrugripasavn og GEUS nevnir eitt nú leitispurningar, sum Oljufyrisitingin í framtíðini skal taka støðu til, og avtalan skal tí lagast eftir teimum broyttu umstøðunum.

Sum nevnt í kapitli 4.5 verður roknað við, at skattamyndugleikarnir fara at umsita kolvetnisskattalógina, men væntandi fer Oljufyrisitingin at umsita innkrevjing av avgjøldum, sum skulu latast sambært loyvunum. Tað er natúrligt, at Vinnumálastýrið (Oljufyrisitingin) hevur eitt formligt samarbeiði við skattamyndugleikarnar, har Fíggjarmálastýrið eisini er uppií. Eitt slíkt samarbeiði hevur ikki minst týdning fyri metingar og útrokningar, sum skulu vera avgerðargrundarlagið, tá framtíðar kolvetnisvirksemið skal leggjast til rættis og t.d. roynast skal frammanundan at meta um samfelagsbúskaparligar og landsfíggjarligar fylgjur av virkseminum.

Tann nýggja kgl. fyriskipanin um havumhvørvi fer væntandi at leggja ávísar havumhvørvisligar heimildir av týdningi fyri framtíðar kolvetnisvirksemið til Landsstýrið. Sum nevnt í kapitli 5.2 má tað haldast at vera skilagott, at sami myndugleiki umsitur hav- og landumhvørvi. Í málum, sum hava týdning fyri kolvetnisvirksemið, verður mælt til, at umhvørvis- og kolvetnismyndugleikarnir samarbeiða; kanska verður ein samarbeiðsavtala gjørd.

Oljufyrisitingin hevur hesi árini í sambandi við forkanningarvirksemið fingið í lag samstarv við Vaktar- og Bjargingartænastuna og Fiskirannsóknarstovuna. Roknast má við, at hetta samarbeiði verður útbygt, tá leitivirksemið byrjar, t.d. í sambandi við skipan av trygdargeirum og vali av útbjóðingarleiðum.

Omanfyrinevndu myndugleikar og stovnar koma væntandi uppí kolvetnisvirksemið rættiliga tíðliga í leitiskeiðinum og fyri ein part eisini áðrenn leitingin byrjar. Í kapitli 3.4 um arbeiðsumhvørvi, trygd og tilbúgving verða fleiri aðrir myndugleikar nevndir, sum á ymiskan hátt væntandi koma uppí kolvetnisvirksemið. Hjá hesum myndugleikum snýr tað seg í høvuðsheitum um uppgávur, sum teir longu umsita sambært egnum fyrisitingargrundarlag (heimildarboð m.v.), og tí fara uppgávurnar valla at hava við sær stórvegis eykabyrðar fyri hesar myndugleikar í byrjanini av leitiskeiðinum.

Skotið verður upp, at Vinnumálastýrið (Oljufyrisitingin) so skjótt sum álitið frá Oljuráðleggingarnevndini er lagt fram, tekur upp samband við aðrar myndugleikar um tær uppgávur, sum teir væntandi skulu taka sær av í sambandi við tað ætlaða leitivirksemið. Av tí at kolvetnisumsitingin øll er samansett av fleiri myndugleikastovnum, hevur tað stóran týdning, at Vinnumálastýrið ger vegleiðingar til oljufeløg v.m. um, hvørjir myndugleikar hava hvørjar uppgávur.

### 3.3.3 Samandráttur og tilmæli

**Samandráttur**

Krøvini, ið setast skulu Oljufyrisitingini, mugu vera, at hon skal kunna hava um hendi myndugleikanna dagligu fyrisiting av oljuvirkseminum. Hon skal á professjonellan og trúverdugan hátt útinna myndugleikauppgávuna mótvegis oljufeløgum v.m., samstundis sum hon skal stuðla politikarunum, sum ábyrgdina hava.

Fyrisitingin skal fylgja gongdini av fremsta plássi, kunna almenning og politikarar, gera stevnumið, taka stig og gera lógaruppskot v.m. í eini alsamt framsøknari og miðvísari gongd.

Eydnast leitingin væl, tykjast krøvini um eina forsvarliga fyrisiting sjálvsøgd. Eydnast leitingin ikki beinanvegin, verða krøvini ikki minni til hugflog og atgerðir, soleiðis at stig alsamt verða tikin, sum kunnu skunda undir at hildið verður fram.

Meðan fyrstu leitingarnar fara fram, verða uppgávurnar partvíst av almennum slag, partvíst meira ítøkiligar. Oljufyrisitingin tekur sær best av summum uppgávum, meðan aðrar kunnu leggjast øðrum myndugleikastovnum. Fyrisitingaruppgávurnar allar, sum troka á í fyrstu framtíð, kunnu verða býttar sundur í hesar bólkar:

- Fyrisitingarlig mál
- Oljujarðfrøðilig mál
- Trygdar-, arbeiðsumhvørvis-, umhvørvis- og tilbúgvingarmál
- Búskapar- og vinnumál

***Fyrisitingarlig mál***

Ein uppgáva, sum í fyrstu framtíð fer at krevja nógv, er fyrsta útbjóðingarumfar. Setningarnir verða eitt nú at velja øki, gera loyvismyndil við teimum treytum, sum skulu galda fyri loyvini, og frágreiðing til Løgtingið. Hartil skulu formlig útbjóðingarskjøl gerast saman við marknaðarføringarátøkum, sum hoyra til.

Samráðast skal um umsóknir um loyvi til leiting og framleiðslu (konsessiónir), og samráðast skal við umsøkjararnar. Síðani skulu tilmæli gerast til politikararnar og loyvi gevast.

***Oljujarðfrøðilig mál***

Í eini hvørjari oljufyrisiting hevur jarðfrøðin ein avgerandi leiklut. Í samráðingunum við oljufeløgini er holl vitan um oljuvánirnar í undirgrundini avgerandi. Jarðfrøðilig vitan er eisini neyðug til tess at kunna seta tey røttu trygdar- og umhvørviskrøvini.

Til tess at kunna gera dyggar oljujarðfrøðiligar kanningar er neyðugt at hava breitt jarðfrøðiligt skil, sum røkkur út um teir serligu oljujarðfrøðiligu spurningarnar.

***Trygdar-, arbeiðsumhvørvis-, umhvørvis-, og tilbúgvingarmál***

Myndugleikakrøv og myndugleikaeftirlit við atliti at trygd og arbeiðsumhvørvi byggja á innaneftirlit, tí tað eru teir, sum hava loyvini, ið hava ábyrgdina fyri frálandsvirkseminum.

Trygdin í oljuvinnuni er lík trygdini í sjóvinnu og øðrum ídnað, men hon hevur

eisini sínar serligu spurningar, eitt nú boritrygd.

Áðrenn eitt felag fær loyvi at bora, skal tað leggja eina boriætlan fyri myndugleikarnar til góðkenningar. Jarðfrøðingar og verkfrøðingar mugu arbeiða tætt saman um at góðkenna og hava eftirlit við boriætlanum.

Í umhvørvisspurningum fer ein nýggj kgl. fyriskipan um havumhvørvi væntandi at geva Landsstýrinum ávísar heimildir, sum hava týdning fyri framtíðar kolvetnisvirksemið.

***Búskapar- og vinnumál***

Áhugin hjá oljufeløgunum fyri føroyskaleiðini veldst um eina handilsliga støðutakan, har hugsað verður um útlitini, inntøkumøguleikarnar og møguleikar fyri kolvetnisframleiðslu aðra staðni í heiminum. Myndugleikarnir mugu meta um, hvussu stór búskaparlig krøv teir kunnu seta, fyri at virksemið kann vera áhugavert fyri báðar partar.

Krøvini um búskaparligan ágóða av kolvetnisframleiðslu verða fyri ein part sett gjøgnum lóggávu og fyri ein part í samráðingum við oljufeløgini.

Til tess at seta hóskandi krøv krevst góður kunnleiki til eftirspurningin og innkeypsmannagongdina hjá oljufeløgunum eins og kunnleiki til útboðið av vørum og tænastum hjá føroyskum vinnulívi og til tey menningarrák, sum eru í vinnulívinum.

Tann búskaparliga og vinnuliga uppgávan hevur eisini í sær eina eftirlitsuppgávu við skattum og avgjøldum eins og við teimum vinnuligu krøvunum.

**Tilmæli**

Kolvetnisfyrisitingin eigur at taka støði í núverandi Oljufyrisitingini, sum nú er ein deild í Vinnumálastýrinum. Oljufyrisitingin hevur í forkanningarskeiðinum bygt upp sakkunnleika á økinum og hevur knýtt samband við nógv oljufeløg v.m. og viðkomandi myndugleikastovnar heima sum uttanlands.

Brúk er fyri, at samarbeiðið við aðrar myndugleikar og stovnar verður formaliserað og samskipað.

Í framtíðar umsitingarligu skipanini má støði takast í viðurskiftunum í Føroyum. Roynt má verða at fáa sum mest burtur úr tí jarðfrøðiliga sakkunnleikanum, sum enn er avmarkaður.

Jarðfrøðisavnið hevur gjøgnum árini bygt upp ein ávísan sakkunnleika og fingið royndir í bæði oljujarðfrøðiligum uppgávum og meiri vísindaligum uppgávum. Jarðfrøðisavnið hevur bygt upp góð sambond við jarðfrøðiligar stovnar uttanlands. Jarðfrøðisavnið hevur í forkanningarskeiðinum havt tætt samarbeiði við Oljufyrisitingina, og tað er natúrligt framhaldandi at byggja á hetta grundarlag, tó soleiðis at samarbeiðsháttturin verður meiri formaliseraður og greiðari enn higartil.

Tá tann oljujarðfrøðiligi parturin verður skipaður, má havast í huga, hvussu týdningarmikið tað er hjá eini oljufyrisiting **at** hava jarðfrøðiligan sakkunnleika, **at** Føroyar framvegis hava ein stovn, sum kann útinna jarðfrøðiligar granskingaruppgávur óheft av myndugleikauppgávuni, og **at** ein væntað oljuleiting við framleiðslu seinni fer at seta krøv um at byggja upp jarðfrøðiligan sakkunnleika í Føroyum fyrst og fremst til myndugleikabrúks, men eisini til tess at fáa betri skil á Føroya jarðfrøði í breiðum týdningi.

Hesi viðurskifti tykjast at tala fyri loysnum, har tann oljufyrisitingarliga leiðslan hevur jarðfrøðiligan yrkiskunnleika hjá sær, og at pengar verða fingnir til

vega hvør sær til oljujarðfrøði og til jarðfrøðiliga gransking av meiri almennum slag. Samstundis eigur at verða tryggjað eitt felags yrkisligt umhvørvi, til dømis við persónssamanfalli í lyklastørvum, hølisfelagsskapi, felags dátu- og goymsluskipanum og við formaliseraðum avtalum millum umsitandi stovnin og vísindaliga stovnin.

Í trygdarmálum verður skotið upp, at spurningurin um at leggja ymiskar uppgávur til aðrar myndugleikar verður kannaður nærri. Tað er ein tøkniligumsitingarlig meting, antin Vinnumálastýrið sjálvt vil byggja upp yrkisligan førleika innan øll øki, sum nevnd eru í kapitli 5 í kolvetnisvirksemislógini, ella tað velur at leggja summar uppgávur út.

Í umhvørvisspurningum verður mælt til samarbeiði millum kolvetnis- og umhvørvismyndugleikarnar.

Væntandi skulu skattamyndugleikarnir umsita kolvetnisskattalógina, meðan Oljufyrisitingin skal umsita avgjøldini fyri loyvini v.m. Brúk er fyri einum formligum samarbeiði við skattamyndugleikarnar, sum eisini fevnir um Fíggjarmálastýrið. Eitt slíkt samarbeiði hevur ikki minst týdning fyri metingar og útrokningar, sum skulu vera avgerðargrundarlagið, tá framtíðar kolvetnisvirksemið skal leggjast til rættis, og roynt verður at siga frammanundan, hvørjar samfelagsbúskaparligar og landsfíggjarligar fylgjur fara at standast av virkseminum.

## 3.4 TRYGD, ARBEIÐSUMHVØRVI OG TILBÚGVING

Leiting eftir kolvetni og framleiðsla úti á havi krevja eins og annað ídnaðarvirksemi á landi reglur um trygd, trivnað og arbeiðsumhvørvi. Í sambandi við kolvetnisvinnu verður borað djúpt og undir høgum trýsti, og tá kann vandi vera fyri ótamdum spreingingum. Viðgerðin á oljustøðunum av tí funnu oljuni og gassinum fer eisini fram undir høgum trýsti, og í arbeiðsgongdini er tískil vandi fyri eldsbruna og spreingingum. Harumframt ber frálandsvirksemi í sær somu vandar, sum eru kendir innan vanliga sigling. Teir eru ikki minni undir føroyskum veður- og streymviðurskiftum.

### 3.4.1 Reglur

Ein av høvuðsuppgávunum hjá myndugleikunum er at evna til karmar, sum gera sítt til, at oljuvirksemið verður umsitið fullgott, bæði tá ið hugsað verður um trygdar-, umhvørvis- og tilbúgvingarviðurskifti. Tað hevur tí stóran týdning at leggja áherðslu á, at í teimum ymisku skeiðunum í oljuverkætlanini eru tað loyvishavin, fyristøðufelagið, verktakin og/ella undirverktakin, sum hava *ábyrgdina* av trygd, arbeiðsumhvørvi og tilbúgving.

Í 5. kapitli í uppskotinum til løgtingslóg um kolvetnisvirksemi, sum snýr seg um trygd, arbeiðsumhvørvi og tilbúgving o.a. fyri havstøð, fær Landsstýrið heimild at gera kunngerðir, forskriftir og leiðbeiningar, sum skulu fyribyrgja og miða ímóti at lúka tey krøv, sum samfelagið setur um heilsu, umhvørvi og trygd. Hetta kann skipast sum víst á mynd 3.4-1 í brotinum 3.4.3.

Reglurnar við heimild í lógaruppskotinum eru lýstar í mynd 3.4-1 í brotinum 3.4.3, og eru tær grundaðar á grundregluna um, at tað eru loyvishavi, fyristøðufelag, verktaki og undirútvegari sum skulu prógva fyri myndugleikunum, hvussu ætlanin er at halda reglurnar um trygd og arbeiðsumhvørvi.

Kunngerðir og leiðbeiningar eiga at vera orðaðar soleiðis, at tær hava bæði miðvís og starvslig krøv. Hetta er kendur arbeiðsháttur hjá oljufeløgunum.

Niðanfyri verður lýst tilbúgving, myndil fyri kunngerðir og leiðbeiningar, treytir fyri at fara undir virksemi og ein skipanarmyndil fyri umsiting.

### 3.4.2 Tilbúgving

Ein fortreyt fyri, at farast kann undir kolvetnisvirksemi á víðum havi, er, at skipað er tilbúgving, ið nóg væl kann tryggja mannalív, umhvørvi og virðir. Hetta er minst líka umráðandi sum tilbúgvingin fyri skipaferðslu annars.

Hendir óhapp, vanlukkua ella stórskaði við bori- og framleiðsluvirksemi á havinum, er umráðandi, at loyvishavin (fyristøðufelagið) hevur rakstrarmiðstøð í Føroyum, sum kann arbeiða neyvt saman við myndugleikunum fyri sum best at tryggja, at tamarhald væl og virðiliga fæst á støðuni, so at manning og umhvørvi fáa so lítlan skaða, sum møguligt er.

Sambært uppskotinum til kolvetnislóg, 5. kapittul § 26, hevur loyvishavin (fyristøðufelagið) ábyrgd av at fáa í lag tilbúgving, ið á hóskandi hátt tryggjar mannalív, umhvørvi og virðir.

Álagt verður loyvishavanum (fyristøðufelagnum) at gera tilbúgvingarætlan fyri

tiltøk, sum kunnu verða neyðug, *áðrenn* loyvi verður givið at fara undir eina verkætlan.

Ein tilbúgvingarætlan fevnir um ávaringar- og bjargingarætlanir og ætlanir fyri, hvat ið gerast skal, um vanlukkan verður henda ella hin, so sum dømi eru sett upp í talvu 3.4-1 í hesum brotinum. Tiltøkini, ið setast skulu í verk, og sum eru nevnd í yvirlitinum, fata um tey øki, sum myndugleikarnir og loyvishavarnir m.a. skulu samstarva um.

Ein lýsing av tiltaksgoymslum, útgerð og skipanarætlanum er partur av tilbúgvingarskipanini.

Tað almenna má eisini hava skipað eina myndugleikatilbúgving, sum kann samstarva við tilbúgvingarskipanina hjá loyvishavanum (fyristøðufelagið) og soleiðis vera ein heil skipan, sum tekur sær av manning og umhvørvi í sambandi við sjúku, óhapp ella stórskaði. Tá er neyðugt at skipa eina atgerðarnevnd, sí gjøllari um hetta í broti 3.4.5.

Til tess at stovna og halda uppi ta neyðugu tilbúgvingina og fremja tær atgerðir, sum reglurnar áseta, er neyðugt, at neyvt og gott samstarv er millum myndugleikatilbúgvingina og tilbúgving loyvishavans (fyristøðufelagsins).

Loyvishavin fer at byggja sína tilbúgvingarskipan á ynski frá myndugleikunum um t.d. ávaring og um, hvør ið skal takast upp í tær ymisku tilbúgvingarstøðurnar. Umráðandi er at lýsa læknaførleikan, sum er í sjúkrahúsverkinum, har ið fólk, sum møguliga hava fingið skaða, skulu viðgerast. Samskipan av flutninginum í Føroyum er annað øki, sum má greiðast. Møgulig bann fyri ferðslu á sjónum og møguligur steðgur í allari loftferðslu eru almenn viðurskifti, sum eisini mugu lýsast. Bumbuhóttanir, skaðilig geisling og brotsgerðir á bori- og framleiðsluútbúnaði eru dømi um støður, har loyvishavin og tað almenna mugu hava greitt ábyrgdar- og heimildarbýti. Greiða má fáast á viðurskiftunum við fjølmiðlar og náttúruverndarfeløg.

Verður tilbúgvingin, sum er lýst omanfyri, borin saman við frágreiðingina "Tilbúgving Føroyum viðvíkjandi", sum danska tilbúgvingarstýrið hevur greitt úr hondum 31/10-1994, verður neyðugt at seta ein serligan arbeiðsbólk at lýsa, hvat í minsta lagi krevst av eini myndugleikatilbúgving fyri at farast kann undir virksemi í leiti- og metingarskeiði. *Spurningurin um myndugleikatilbúgving má ikki gerast ein trongi, sum forðar fyri at borivirksemi á landgrunninum sleppur í gongd.*

**Talva 3.4-1 Dømi um tilburðir, skaða og tiltøk**

| Tilburðir á pallinum | Mann-skaði | Umhvørvis-skaði* | Slag av óhappi | Tiltøk, ið setast mugu í verk |
|---|---|---|---|---|
| Læknafrøðiligur | x | | Lækna-frøðilig | Flutningur á sjúkrahús |
| Lítil arbeiðsskaði | x | | Vanlukka | Flutningur á sjúkrahús |
| Stórur, víðfevndur arbeiðsskaði | x | x▪ | Vanlukka | Flutningur á sjúkrahús |
| Eldsbruni | x | x▪ | Vanlukka | Flutningur á sjúkrahús |
| Eldsbruni | | | Óhapp | |
| Eldsbruni/spreinging | x | x▪ | Stórskaði | Flutningur á sjúkrahús/ avflyting? |
| Pallur, ið rekur | x▪ | x▪ | Stórskaði | Flutningur á sjúkrahús Avflyting |
| Útblásing, eldsbruni, spreinging | x | x | Stórskaði | Avflyting |
| Útblásing | | x | Skórskaði | Avflyting |
| Gassútblásing | | | Stórskaði | Avflyting |
| **Tilburðir í sambandi við flutning/útgerð** | | | | |
| Tyrla rennir á pall | x | | Stórskaði | Avflyting |
| Tyrla dettur á sjógv | x | | Stórskaði | Bjarging, flutningur á sjúkrahús |
| Skip rennir á pall | x | | Stórskaði | Bjarging, avflyting, flutningur á sjúkrahús |
| Rekar | | | | Óneyðug manning flutt |
| Kavaravirksemi | x | | Vanlukka | Flutningur á sjúkrahús |

***** Umhvørvisskaði skal skiljast sum oljuleki á sjógv, sí tekst niðanfyri
▪ Skal tulkast sum møguligur skaði og ekstern tiltøk

Um olja brádliga fer at leka á sjógv, er tað loyvishavin (fyristøðufelagið), sum hevur ábyrgd av oljutilbúgvingini, sum skal skipast at handfara støðuna, sum hon er.

Fáa veður og streymur slíkan oljuleka inn móti landi í Føroyum, má loyvishavin (fyristøðufelagið) í samstarvi við myndugleikarnar búgva út tað, sum neyðugt er í strandatilbúgving móti oljudálking. Rekur olja á land, er tað loyvishavin (fyristøðufelagið), ið ábyrgd hevur, sum einsamallur ber útreiðslurnar av tilbúgvingini, útgerðini og uppreinsingararbeiðnum .

## 3.4.3 Myndil viðvíkjandi kunngerðum og leiðbeiningum

Mynd 3.4-1 í hesum brotinum sýnir ein myndil, sum lýsir sambandið millum kolvetnislóg og kunngerðir viðvíkjandi *innaneftirlit, váðagreining og tilbúgving*. Hesi mynda saman grundleggjandi myndugleikakrøvini mótvegis loyvishavanum, fyristøðufelagnum, verktakanum og/ella undirverktakanum.

Bygnaðurin, sum er lýstur á myndini 3.4-1, samsvarar við ta dagføring, ætlanir eru um at gera í norsku reglunum, og við ta dagføring, ið bretar framdu eftir "Piper Alpha"-vanlukkuna seinast í áttatiárunum. Norsku reglurnar, ið nú eru í gildi, eru ógvuliga víðfevndar og út í æsir, og tí er dagføring myndugleikanna arbeiðskrevjandi. Reglurnar siga í høvuðsheitum, hvussu pallar úr stáli og betongi skulu vera bygdir. Harafturímóti er minni dentur lagdur í virðisumsiting (asset management) í

framleiðslu- og avriggingarskeiðinum.

Reglurnar í lógaruppskotinum, vístar á mynd 3.4-1, byggja á ta grundreglu, at tað eru loyvishavi, fyristøðufelag, verktaki og/ella undirútvegari, sum fyri myndugleikunum skal ávísa, hvussu ætlanir eru lagdar fyri hesum, at halda trygdarreglur og arbeiðsumhvørvisreglur í øllum skeiðum í verkætlanini.

Brotastrikaði fýrakanturin á myndlinum vísir á tær kunngerðir, har krøv verða sett til leiðslubygnað, útgerðartilfeingi og ráð, sum krevja medvitna støðutakan av nevndu pørtum fyri at uppfylla krøvini í 5. kapitli í uppskotinum til løgtingslóg um kolvetnisvirksemi.

**Mynd 3.4-1 Skipan fyri kunngerðir og leiðbeiningar**




Krav um *innaneftirlit* hevur í sær, at álagt verður nevndu pørtunum neyðug, skipað tiltøk at tryggja, at tann dygd, sum krevst, verður løgd til rættis, rokkin og hildin við líka. Partarnir skulu eisini tryggja, at virksemið verður lagt til rættis, skipað, útint og hildið við líka sambært teimum krøvum, sum ásett verða í lógum, kunngerðum, forskriftum og leiðbeiningum og innanhýsis krøvum felaganna.

Endamálið við kunngerðini um *váðagreiningar* er at áleggja loyvishavanum (fyristøðufelagnum) at útvega vitan um tann váða, sum fylgir við virkseminum og harvið fáa til vega eitt avgerðargrundarlag samsvarandi almennum og egnum trygdarkrøvum.

Endamálið við kunngerðini um *tilbúgving* er at savna øll tilbúgvingarkrøv, ið viðkomandi eru. Tilbúgving er at skilja sum øll tey tiltøk, sum ætlan er at seta í verk, tekur vandastøða seg upp, ella vanlukka hendir. Endamálið við kunngerðini er at verja menniskju, umhvørvi og virði. Tilbúgving mótvegis bráðkomnari oljudálking og heilsutilbúgving eru tí partar av tilbúgvingarkunngerðini. Samanumtikið fevnir tilbúgvingin sostatt um tiltøk í samband við ávaringar og váðaavmarkingar, bjargingar, avflyting og normalisering.

**Myndil fyri**

Fyri at myndugleikarnir kunnu fáa innlit í, hvussu einstøku loyvishavarnir og

**leiðslu- og stýringar-skipanum**

fyristøðufeløgini ætla at lúka tað, ið verður ásett í kolvetnislógini, mugu myndugleikarnir fáa kunnleika um leiðsluskipanir, tiltaksgoymslur og mannagongd loyvishavans (fyristøðufelagsins).

Hetta verður gjørt við miðvísum kunngerðum og leiðbeiningum, sum umfata starvsviðurskifti, og sum rúma kendum lands- og altjóða standardum, reglum og leiðbeiningum.

Tær fýra kunngerðirnar og leiðbeiningarnar, sum fevna um stýring og skipan, virksemi, tøkni og skjalafesting, geva myndugleikunum eina heildarmynd av, hvussu trygdar- og arbeiðsumhvørvismetingar verða framdar við royndartilfari, váðaavmarkandi tiltøkum og áhaldandi umbøtingum. Harumframt verður tryggjað, at nóg mikið av skjalatilfari er tøkt í ymisku skeiðunum, og tá ið tær ymisku avgerðirnar skulu takast.

***Stýring og skipan***

Stýring og skipan fara at snúgva seg um tey stýringaramboð, arbeiðsgongdir og úrslit, sum partvíst deildin í Føroyum, partvíst móðurfelagið hevur ábyrgd fyri. Stýringarkervini skulu m.a. tryggja, at setta stevnumiðið framhaldandi verður umbøtt samstundis sum broytingarmannagongdirnar (tøkniliga, starvsliga, fyrisitingarliga og skipanarliga), sum til eina og hvørja tíð koma fyri, verða dagførdar.

Sum dømi um kervi, sum bera í sær slík sjónarmið, kunnu nevnast ISO 9000 góðskukervi, kervi, ið stýrir umhvørvi (ISO 14000) og kervi, ið rópast “Total Quality Management” (TQM).

***Virksemi***

Hetta fevnir um allar viðkomandi starvsviðtøkur í sambandi við ætlanir, bygging, uppseting, nýtslu, haruppi í eftirlaging og til endans burturbeining.

***Tøknifrøði***

Her er endamálið at kortleggja hugtakskrøv, krøv til tøknilig kervi og møgulig krøv til tilfarsliðir. Samstundis eiga almenn krøv at verða hildin frá serkrøvum á hesum økjum.

***Skjalafesting***

Hetta punktið skal m.a. fevna um skjalastýring, varðveitslu, sporføri og KT (kunningartøkni). Harumframt um skjalprógvan, støddarlýsing og frásagnarmannagongd.

## 3.4.4 Treytir fyri at fara ígongd

Í uppskotinum til løgtingslóg um kolvetnisvirksemi, 5. kapittul, § 24, verða sett fram ítøkilig krøv um innaneftirlit, váðagreiningar og tilbúgvingartiltøk mótvegis loyvishavum og fyristøðufeløgum. Við hesum verður á trygdarøkinum útvegað lógargrundarlag fyri at fara undir leiti- og metingarvirksemi.

Í myndlinum, sum sýndur er á mynd 3.4-1 í brotinum 3.4.3 um kunngerðir og leiðbeiningar, er eitt heildarkervi, sum eigur at galda í leiti- og metingarskeiðinum, útbyggingar- og útvinningarskeiðinum umframt avriggingarskeiðinum.

Teir boripallar og tey boriskip, sum nýtt kunnu verða í føroyskum øki í leiti- og metingarskeiðinum, fara klassafeløgini eftir øllum at døma at hava góðkent til far-

vatn, sum natúrligt man vera at bera seg saman við. Tað fer eisini at verða lættari at seta fram møgulig serføroysk krøv, um so er, at hesi verða sett í samband við altjóða viðurkendar standardir, kotir og kunngerðir, sum t.d. danska Sjóferðslustýrið nýtir, og sum eisini verða nýtt í uppskoti til løgtingslóg um kolvetnisvirksemi.

Donsku, norsku og bretsku myndugleikarnir hava evnað til reglur og leiðbeiningar fyri boritiltøkum á víðum havi. Stórur dentur er lagdur á trygd, bæði tá ið boritiltakið verður ætlað, og tá ið tað verður sett í verk. Føroysku myndugleikarnir (smbr. mynd 3.4-2 í brotinum 3.4.5) fara somuleiðis at evna til sínar egnu kunngerðir og leiðbeiningar samsvarandi uppsetta myndlinum á mynd 3.4-1 í brotinum 3.4.3.

Donsku myndugleikarnir (smbr. mynd 3.4-2 í brotinum 3.4.5) taka støði í donskum kunngerðum og leiðbeiningum, sum galdandi eru í Føroyum, og í føroyskum kunngerðum og leiðbeiningum, sum avvarðandi danskir myndugleikar umsita.

Skipast má ein mannagongd, tá ið borieindir, sum skulu virka á føroyska landgrunninum, skulu góðkennast. Slík mannagongd (fyribils, um tað er tað skilabesta í sambandi við byrjanarskeiðið) má byggja á tær reglur, Sjóferðslustýrið og klassingarfeløgini hava ásett.

### 3.4.5 Umsiting av trygdar-, arbeiðsumhvørvis- og tilbúgvingaruppgávum

Fleiri myndugleikar takast við trygd, arbeiðsumhvørvi og tilbúgving, smbr. mynd 3.4-2 í hesum brotinum, og fara tí í ávísan mun at fáa við kolvetnisvinnuna at gera. Lýsingin her niðanfyri av leikluti og uppgávum myndugleikanna mótvegis kolvetnisvinnu byggir á ta ábyrgd, sum teir nú umsita sambært galdandi reglum.

Umsitingarmyndilin (mynd 3.4-2) viðger einans teir partar av kolvetnisvinnuni, ið snúgva seg um trygd, arbeiðsumhvørvi og tilbúgving, og má tí lesast í samanhangi við fullfíggjaðu almennu umsitingina av kolvetnisvirkseminum smbr. kapittul 3.3 *Fyrisiting*.

Skal slíkur myndil roynast øllum pørtum munadyggur, er neyðugt, at ein vegleiðing verður evnað til, sum ger myndugleikum, loyvishavum, fyristøðufeløgum, verktakum og undirverktakum, greitt, *hvør ið ábyrgdina hevur og nær*.

Tað er skylda loyvishavans (fyristøðufelagsins) at útvega neyðugu loyvini frá avvarðandi myndugleikum.

*Oljufyrisitingin gevur í hvørjum einstøkum føri loyvishavunum (fyristøðufeløgunum) loyvi at fara undir virksemi og arbeiðsætlanir, sum t.d. í sambandi við forkanningar og metingar, kolvetnisframleiðslu og burturbeining.*

**Mynd 3.4-2 Umsitingarmyndil**




* Enn er ikki endaliga avgjørt, hvør ið umsitur hetta økið

Vísandi til umsitingarmyndilin eru 14 stovnar (5 danskir og 9 føroyskir), sum drignir kunnu verða inn í trygdarviðurskifti í samband við kolvetnisvinnu. Hesir stovnar hava hvør sær ábyrgd av og eisini eftirlit við tilmælum, lógum, kunngerðum o.ø. Afturat hesum kemur atgerðarnevndin, sum verður gjølligari umrødd niðanfyri.

Skotið verður upp at skipa eina atgerðarnevnd sett saman av ovastu leiðarunum fyri ymisku myndugleikastarvsøkini, sum eru í sambandi við kolvetnisvinnuna.

Nevndin kemur saman, um stórskaði hendir. Endamál nevndarinnar er neyvt at fylgja støðuni við tí fyri eyga at skipa tað, ið landið hevur at ráða yvir til bjargingarendamál á slíkan hátt, at landsins tilbúgvingarlutur verður lagaður at støðuni, sum hon er, og verður skipaður saman við tí hjá loyvishavara (fyristøðufelagnum) á munadyggan og tryggan hátt. Uppgávan hjá atgerðarnevndini verður eisini at hava samband við og samstarva við myndugleikar í øðrum londum, og so skal hon veita politisku leiðsluni upplýsingar.

Tað er sera týdningarmikið fyri trygdar-, arbeiðsumhvørvis- og tilbúgvingararbeiðið, at myndugleikarnir umsita hesi øki hóskiliga, greidliga og munadygt, uttan at ov mangir partar koma uppí. Ógreiðir og ógreiddir spurningar millum myndugleikarnar um arbeiðsbýtið kunnu hava við sær, at umráði ikki verða umsitin nøktandi, tá ið hugsað verður um skipan og eftirlit. Hetta kann fáa ógvuliga óhepnar avleiðingar.

Umsitingin er avmarkað og myndugleikarnir eiga tí at royna at draga sær gagn úr møguligum samorkuárini, sum vinst, verður dúvað upp á yrkisliga førleikan hjá teimum ymisku stovnunum tvørtur um stovnamørk. Men fyri at sleppa undan ógreiðum støðum er týdningarmikið, at greiðar avtalur verða gjørdar hesum viðvíkjandi.

Eitt dømi um slíkt samorkuárin kundi verið tann mátin, myndugleikarnir umsita arbeiðsumhvørvið umborð á boriskipum og á boripøllum, tá ið hesi liggja fyri

akkeri í boristøðu.

Sambært lóg um skipatrygd frá 18. juni 1993, hevur Sjóferðslustýrið umsjón við ljósi, ljóði, guvu og mans/maskinu tillaging umborð á skipum. Hetta er eisini galdandi fyri boripallar, ið verða sleipaðir. Verður litið Sjóferðslustýrinum upp í hendur eisini at hava hesa ábyrgd, tá ið borað verður á pallinum, fæst reglubundið og samanhangandi arbeiðsumhvørviseftirlit eisini í leiti- og metingarskeiðinum.

Í hesum sambandi eigur at verða nevnt, at Sjóferðslustýrið frammanundan er uppií í sambandi við eftirlit við bjargingarútbúnaði, meðan boripallurin borar og/ella framleiðir.

At brúka ein stovn, sum longu er uppi í arbeiðsumhvørvi, og fer at hava eftirlit við bjargingarútbúnaði, fer at hava stóran týdning fyri ta trygd og sostatt eisini tað arbeiðsumhvørvið, sum, meðan borað verður, skal galda fyri slíka skipan. Boring í føroyskum sjógvi við tí stóra vanda á sjónum tað ber í sær, er stór avbjóðing bæði fyri boritøknimanning og sjómanning. Trygg og fullgóð boring fer at verða treytað av tøttum og munadyggum samstarvi millum tær báðar manningarnar. Við hesum í huga tykist natúrligt at lata Sjóferðslustýrið, Landsstýrisins vegna og sambært kolvetnislógini, umsita arbeiðsumhvørvið á boripøllum og umborð á boriskipum í leiti- og metingarskeiðinum.

Oljufyrisitingin tekur sær av boritøkniligu trygdini, sum fevnir um heildarmeting av boripalli, brunnskapi, heruppi í boristarvsskipan og tilbúgving. Hetta má saman við umsiting Sjóferðslustýrisins av tí arbeiðsumhvørvisliga metast sum fullfíggjað skipan við atliti at trygdar- og arbeiðsumhvørvi frá myndugleika síðu.

### 3.4.6 Niðurstøða

Sambært 5. kapitli í uppskoti til løgtingslóg um kolvetnisvirksemi eru tað loyvishavin, fyristøðufelagið, verktakin og/ella undirverktakin, sum hava ábyrgd av, at trygdarviðurskifti og arbeiðsumhvørvisviðurskifti verða tryggjað í sambandi við tað virksemið, sum knýtt er at leiting, meting, framleiðslu og avrigging í sambandi við kolvetnisvinnuna.

Við kunngerðum og vegleiðingum fara myndugleikarnir at seta serkrøv til loyvishavan, fyristøðufelagið, verktakan og/ella undirverktakan við atliti at krøvum um innaneftirlit, váðagreining og gongdini í ymiska virkseminum og til nóg dygg og umfatandi tilbúgvingartiltøk, sum ætlanin er at seta í verk at røkka einum váðastøði, sum kann góðtakast.

Viðtøkurnar í uppskoti til løgtingslóg um kolvetnisvirksemi, 5. kapittul, § 24, við viðmerkingum, fara at vera nøktandi lógargrundstøði undir loyvi at fara undir leitiskeiðið.

Ein fyritreyt fyri at kunna fara undir boring á føroyska landgrunninum er, at útvegaðar verða tær neyðugu tilbúgvingarfortreytirnar, bæði hjá loyvishavunum og myndugleikunum. Harumframt verður skotið upp, at skipað verður ein atgerðarnevnd, ið neyvt skal fylgja við tilburðunum, tekur vanlukkustøða seg upp, og vera sambindingarliður við atliti til politikarar, myndugleikar í øðrum londum og altjóða tíðindastovnar.

Loyvishavin, fyristøðufelagið, verktakin og/ella undirverktakin skal við støði í serligu kunngerðunum og vegleiðingunum greiða myndugleikunum frá, hvørji ráð, hvørjar tilgongdir, hvat tøkni, hvørji verklig metingarstøði og hvørja skjalafesting ætlanin er at seta í verk til tess at ganga lógarendamálinum á møti.

Henda skipan byggir á meginregluna um innaneftirlit samsvarandi egnu trygdar- og váðamynd hjá loyvishavanum (fyristøðufelagnum) og ikki samsvarandi siðbundnum eftirlitsvirksemi við at gjøgnumganga tøkniliga útbúnaðin og síðan seta krøv smbr. lógum, kunngerðum, fyriskipanum og leiðbeiningum til tað, ið víkir frá.

Somuleiðis hevur loyvishavin (fyristøðufelagið) skyldu at útvega neyðugu loyvini frá ymisku myndugleikastovnunum, áðrenn innsendar arbeiðsætlanir verða settar í verk.

Lýstu myndlarnir samsvara við starvshátt oljuídnaðarins í dag. Myndugleikar í øðrum londum royna at laga seg til arbeiðshátt, sum miðar ímóti virkiskrøvum og miðvísum krøvum viðvíkjandi trygd og arbeiðsumhvørvi.

At enda verður tørvur á at skipa einfalda, fyribils mannagongd fyri góðkenning av teimum borieindum, sum virka skulu á føroyska landgrunninum í byrjanini av boriskeiðinum.

# 4. PARTUR: OLJAN OG FØROYSKI BÚSKAPURIN

Hvussu eitt møguligt oljuvirksemi tekur seg upp í Føroyum, og hvørja ávirkan tað fær á føroyskan búskap, veldst nógv um sínámillum ávirkan millum føroyska samfelagið og altjóða oljuídnaðin.

Tað eru vónirnar um nøktandi fíggjarliga úrtøku, ið eggja oljufeløgunum til at leita eftir og útvinna kolvetni úr føroysku undirgrundini. Somuleiðis eru tað útlitini til samfelagsbúskaparligar fyrimunir, ið fáa samfelagið at skapa karmar um loyvi til slíka leiting. Kolvetnisvirksemið hevur soleiðis sum fortreyt eina vón um búskaparligar fyrimunir fyri báðar partar, bæði oljuídnaðin og samfelagið.

Altjóða oljufeløgini hava yvirhøvur tað mál, at tað, tey fáast við, kastar nóg mikið av sær. Hesum máli røkka tey m.a. við at røkja ella vaksa um tær jarðgoymslur, tey hava. Fleirliðað feløg, ið hava egin reinsivirki (raffineringsvirki) og egið sølulið, vilja tryggja hesum liðum ráolju.

Áhugin hjá feløgunum at leita fevnir um allan heim. Nógv oljuøki um allan knøttin kappast um áhugan hjá feløgunum. Serstakur áhugi fyri føroysku undirgrundini kann vera liður í ætlaðari spjaðing av váðanum millum fleiri lond. Føroyar liggja í einum politiskt sæð friðarligum parti av heiminum tætt við vesturevropeisku og norðuramerikansku marknaðirnar og verða tí mettar áhugaverdar. Fyrimunir Føroya í so máta viga feløgini upp ímóti munum í leitivánum og rammutreytum, sum samfelagið leggur á, samanborið við onnur oljuøki.

Fyri samfelagið kann grundin at loyva kolvetnisvirksemi alment sigast at vera vónin um at fáa teir øktu valmøguleikarnar, sum knýttir eru at hægri inntøku.

Roynt verður at virka fram ímóti ávísum samfelagsbúskaparligum málum, t.d. at vaksa um arbeiðsmøguleikar, inntøkumøguleikar, privatar og almennar tænastur, bøta um trygd og verju ímóti fíggjarligum bakkøstum og at bøta um samfelagsins búskaparligu framtíðarmøguleikar við uppsparing og íløgum. Øll hesi búskaparligu mál kunnu ikki til fulnar verða rokkin samstundis. Verður meira ætlað til ávíst øki, verður ein at sættast við minni aðrastaðnis. Fíggjarligar nettofyrimunir noyðist samfelagið at viga upp ímóti møguligum ringum avleiðingum av ikki-fíggjarligum slagi.

Er kolvetni til, kunnu munagóðir fyrimunir verða við kolvetnisvirksemi, bæði fyri oljuídnaðin og samfelagið. Har verður ein fongur at býta. Bæði feløg og samfelag verða hvør í sínum lagi at raðfesta, hvørjar partar av honum tey leggja høvuðsdentin á.

Í samspælinum millum oljufeløgini og føroyska samfelagið fara partarnir ikki bara sum nevnt at hava ynskir og krøv. Hvør partur fer eisini at bjóða eitthvørt. Feløgini kunnu bjóða fíggjarstyrki og yrkisligan kunnleika í sambandi við leiting, útvinning og framhaldandi kolvetnisviðgerð. Íkastið hjá føroyska samfelagnum verður fyrst og fremst at lata upp fyri leiti- og útvinningarmøguleikum, t.e. rætt til eftir neyvari avtalaðum treytum at ráða yvir serstøkum pørtum av tí møguliga kolvetnistilfeinginum. Føroyar kunna eisini lata arbeiðsmegi og serkunnleika á nógvum økjum - veitingar, flutningur og aðrar tænastur.

Báðir partar fara at krevja sum mest fyri tað, teir lata. Um partarnir ikki nóg væl vilja varða um áhugamálini hvør hjá øðrum, kann menningin verða av ongum við tí avleiðing, at partarnir missa møguligar fyrimunir.

Samfelagsbúskaparligu fyrimunirnir fyri Føroyar í sambandi við oljuvinnu, ið kann taka seg upp í Føroyum, vórðu viðgjørdir í kapittul 10 í 1993-frágreiðingini: *Hvussu kann ein møgulig oljuvinna hugsast at fara at ávirka føroyska samfelagsbúskapin?* Víst verður til tað, sum har stendur.

Fyrimunirnir verða fyrst og fremst vinnu- og arbeiðsmøguleikar og skatta-inntøka. Skattamálini vórðu viðgjørd í kapittul 7 í 1993-frágreiðingini: *Skattir og avgjøld.* Víst verður til hetta.

Vinnu- og arbeiðsmøguleikarnir fara lutvíst at verða í sjálvum oljuvirksemi-num og tænastuveitingum, sum eru knýttar at tí, og lutvíst sum eitt úrslit av teimum óbeinleiðis inntøkuávirkanum, sum oljuvirksemið fer at hava við sær, t.d. tá ið inntøka fingin í oljuvinnuni verður brúkt, ella um tað almenna brúkar oljuskattainntøkurnar.

Í hesum partinum verða vinnuligu, arbeiðsligu og búskaparligu hugsanirnar lýstar. Í kapittul 4.1 verður greitt frá vinnu- og arbeiðsmøguleikunum, og í kapittul 4.2 verður serstaki spurningurin um eitt oljufelag tikin upp. Kapittul 4.3 lýsir hugsanirnar um, hvussu kolvetni kann verða flutt til lands. Í kapittul 4.4 verður greitt frá útbúgvingar- og upplæringarmøguleikum, sum miða ímóti og kunnu verða í sjálvari oljuvinnuni, og í kapittul 4.5 verða skattamøguleikarnir viðgjørdir. Endaliga verður í kapittul 4.6 greitt frá samfelagsbúskaparligu avleiðingunum.

## 4.1 VINNUMØGULEIKAR Í SAMBANDI VIÐ OLJUVIRK-SEMI

Vinnumøguleikarnir vórðu, sum nevnt í innganginum til kapitlið, viðgjørdir í kapittul 10 í 1993-frágreiðingini, sum víst verður til. Her varð m.a. víst á, at stórvegis vinnumøguleikar valla fóru at verða í sambandi við forkanningar-skeiðið; í leitiskeiðinum fara ávísir, men væntandi bara smávegis, møguleikar at vísa seg, men útbyggingar- og útvinningarskeiðið kundi farið at havt ógvisliga ávirkan, sum kanska krevur avmarkandi tiltøk frá myndugleikunum. Harumframt varð víst á, at tað fór at verða eitt politiskt val, hvørt, og um so er, hvussu nógv føroyskt vinnulív - og sostatt samfelagslív - átti at verði við í oljuídnaðarligari menning.

Tá ið løgtingið í tingsetuni 1993/94 viðgjørdi løgtingsmálið um forkanningar-lógina o.a.[5], legði avvarðandi løgtingsnevnd áherðslu á, at roynt átti at verða at tryggja sær, at oljuvinna, ið kundi taka seg upp, fór at geva føroyingum arbeiði og føroyskum vinnulívi møguleikar. Tað sama varð greitt undir løgtingsorða-skiftinum. Spurningurin varð eisini týðiliga og greitt nevndur í tí samtykt um olju- og gassleitingar í føroyskum øki, sum løgtingið gjørdi tann 24. september 1993 (løgtingssamtyktin er endurgivin sum fylgiskjal 1.1-1 í parti 1, Saman-dráttur og tilmæli).

Hesar hugsanir búðu eisini undir landsstýrisavgerðini um, at nýtilnevnda Oljuráðleggingarnevndin fekk størri vinnuligan yrkiskunnleika, m.a. tveir limir eftir tilmæli frá vinnufeløgunum, eins og hesi sjónarmið vórðu flættað inn í arbeiðssetningin hjá nevndini, smbr. broti 1.1.1.

Niðanfyri verður høvuðsdentur lagdur á spurningin um føroyskar vinnu- og

5 Sí Løgtingstíðindi, løgtingsmál nr. 4 og 5 frá 1993 (síða 75 - 83).

arbeiðsmøguleikar í leitiskeiðnum, men tá ið tað er viðkomandi, verða eisini atlit gjørd at einum útbyggingar- og útvinningarskeiði.

### 4.1.1 Eftirspurningur frá oljuídnaðinum

At oljuídnaðurin fer at spyrja eftir vørum og tænastum kann skapa grundarlag undir nýggjum arbeiðsplássum og nýggjum veitingarmøguleikum hjá vinnuvirkjunum. Hesir møguleikar eru ymiskir í hvørjum av teimum fýra skeiðunum í eini oljuverkætlan. Ávirkanin frá teimum báðum fyrstu skeiðunum - forkanningarskeiðinum og leiti- og metingarskeiðinum - er vanliga avmarkað, men seinnu útbyggingar- og útvinningarskeiðini kunnu verða grundarlag undir munadyggum strategiskum vinnumøguleikum.

Í løtuni er torført at meta um, hvussu stórt leitivirksemið verður beint eftir eitt loyvisumfar. Tað veldst sjálvsagt um, hvussu mong feløg søkja um og fáa loyvi og um loyvishavans arbeiðshátt.

Á nýggjum leiðum, sum teimum føroysku, kann væntast, at loyvishavar fara at brúka tíð at savna og greina 3D-seismikk, áðrenn farið verður undir boringar. Hildið verður, at ógvuliga fáir boripallar eru, kanska færri enn 10 í øllum heiminum, ið kunnu arbeiða undir teimum umstøðum, ið eru á teimum leiðum undir Føroyum, sum higartil hava verið hildnar at vera tær áhugaverdastu í oljusamanhangi. Her verður hugsað um dýpd, streym og veður. Útboðið av boripøllum kann sostatt fara at verða ein meinur trongi.

Tá ið oljufeløg fáa loyvi at leita á ávísari leið, spjaða tey vanliga váðan og kostnaðin við at skipa samtøk. Í hesum samtøkum kunnu feløgini brúka royndirnar hvør hjá øðrum og á tann hátt bøta um møguleikarnar fyri, at tiltakið fer at eydnast.

Í einum samtaki verður fyristøðufelag valt. Hetta er tað felag (vanliga felagið, sum eigur størsta lutin í bólkinum), sum stendur fyri virkseminum hjá samtakinum. Virksemið verður lagt til rættis og avtalað á fundum í einari fyristøðunevnd (Joint Operating Committee), har hvør partur hevur atkvøðurætt eftir sínum luti. Arbeiðslagið hjá oljufeløgunum er broytt seinnu árini, so feløgini royna at leggja sum mest av virksemi í hendurnar á verktakum uttanfyri felagið. Henda “outsourcing” ger at oljufeløgini fáa savnað seg um leitingina, sum tey meta sum kjarnan í sínum virksemi. Eftirspurningurin hjá fyristøðufelagnum í sambandi við leitiboringar verður sostatt býttur sundur í fleiri stórar og smáar undirverktøkur, sum víst á mynd 4.1-1. Hvussu stórur partur, ið verður útboðin, hvussu mangir verktakar, ið verða brúktir, og hvussu stór ábyrgd verður latin tí einstaka verktakanum, er ymiskt frá einum felagi til annað.

**Mynd 4.1-1 Samskipan í sambandi við boring**




Niðanfyri verður mett um eftirspurningin í sambandi við einstaka leitiboring. Tað verður ikki mett um, hvussu nógvar boringar kunnu væntast, men ein fatan fæst av, hvat slag av virksemi verður í sambandi við eina slíka boring.

**Virksemi í sambandi við leitiboring**

Leysliga mett kann væntast, at ein "vanlig" boring við Føroyar tilsamans varar í einar 10-12 vikur. Hendan meting byggir á, at ein miðalboring á føroyskari loyvisleið skal verða borað niður á 4.000 m, og á at miðal boriferðin verður tann sama, sum tá ið borað verður í Hetlandsrennuni (Bretland), Noregi (Haltenbank) og í Norðsjónum (Brent-leiðin). Lagt er upp fyri tarnandi umstøðum, so sum tjúkkum basaltfláum, óvanliga hørðum streymi og djúpum sjógvi á føroyskum leiðum, tá framætlað er frá hinum leiðunum til føroysku leiðirnar.

Vanliga verður talið av boringum ætlað eftir tí, at 2 boringar eru tað allarminsta til tess at kunna meta eftirfarandi um møguleikarnar í einum loyvisøki.

Allur kostnaðurin til eina leitiboring á føroyskari leið kann verða settur til umleið 30.000 kr./m. Eftir hesum at døma, kann allur miðalkostnaður fyri eina boring verða mettur til umleið 120 mió. kr. Niðanfyri verður gjølligari greitt frá eftirspurninginum hjá oljufeløgunum í sambandi við leitiboringar.

***Boripallur***

Kostnaðurin fyri ein boripall er vanliga uml. helvtin av kostnaðinum fyri eina leitiboring. Miðal pallkostnaður er her fingin frá oljufeløgum við grundarlagi í borivirksemi í Norðsjónum og líkum økjum. Sambært upplýsingunum liggur dagsgjaldið fyri boripall millum 100-150.000 USD (600-900.000 kr./samdøgur). Sum heild verður sagt frá, at dagsgjaldið fyri boripallar hækkar í løtuni, tí at leitivirksemið er vorðið nógv størri.

Væntandi verður tørvur á uml. 80 fólkum til at manna ein boripall at gera eina leitiboring. Tey arbeiða í 2 vaktum, 40 fólk í hvørjari. Hvør pallur hevur tvær manningar, ið skiftast um at vera úti á pallinum. Samanlagt verða 160 fólk knýtt at pallinum. Arbeitt verður í 2 ella 3 viku skiftum, t.e. 2-3 vikur á pallinum og 2-3 vikur frí. Nakað av manningaflutningi verður tí millum pall og land, og hann verður í høvuðsheitum við tyrlu. Tá ið stórur partur av manningini væntandi verður útlendingar, verður harumframt tørvur á flutningi til Føroya og úr

Føroyum og á plássi at liggja nátt í landi. Flutningur loftvegis verður gjølligari umrøddur í broti 4.1.4.

Vanliga leigar fyristøðufelagið ein boripall við manning frá einum tænastu-felagi. Fyristøðufelagið mannar sostatt bara nøkur fá størv á boripallinum, t.d. boristjóran og nakrar fáar jarðfrøðingar. Manningin annars fylgir við boripallinum.

Fyri tað slagið av boripøllum, sum eru førir fyri at arbeiða á teimum djúparu leiðunum við Føroyar, verður pallkostnaðurin væntandi 60% av øllum kostnaðinum ella uml. 75 mió. kr. fyri eina einstaka boring.

***Veitingarskip***

Av tí at goymsluplássið á boripalli er avmarkað, er neyðugt at hava regluligar veitingar til pallin. Hesin flutningurin er við veitingarskipum, sum vanliga eru sersmíðað skip. Veitingarskipið flytir veitingar frá eini útgerðarstøð til pallin eftir tørvi, men vanliga eina ferð um vikuna. Eitt veitingarskip kann sostatt, alt eftir hvussu langt er ímillum støð og pall, tæna fleiri pøllum. Eitt annað týdningarmikið arbeiði, sum veitingarskip kann taka sær av, er akkershandfaring. Veitingarskip, sum umframt veitingartænastuna eisini verður brúkt til akkershandfaring, skal hava ávísa stødd og serútgerð. Virksemið á útgerðarstøð og vøruflutningurin verða gjølligari lýst í broti 4.1.3.

Ógvuliga ymiskt er, hvat sagt verður, at veitingarskip kostar. Lægstu útrokningarnar vísa eitt daggjald, sum er um 30.000 kr. T/C ("Time Charter", sum merkir, at oman á hetta verður lagt brenniolja og havnagjøld). Marknaðurin fyri veitingarskip hevur verið lágur, men størri virksemi hevur hækkað daggjaldið nógv. Veitingarskip, ið eru oman fyri 3.000 tons, og sum kunnu taka sær av akkershandfaring, krevja stundum 100.000 kr. T/C í daggjaldi. Grundað á tað, ið nevnt er frammanfyri, og um so er, at veitingarskipið bara verður knýtt at einari leitiboring í senn, er kostnaðurin mettur at tátta upp ímóti 9 mió. kr. fyri hvørja boring.

***Hjálpar- og vaktarskip***

Umframt veitingarskip verða hjálpar- og vaktarskip - tilbúgvingarskip - brúkt í sambandi við leitiboringar. Hesi skip taka sær av trygdaruppgávum, og tey skulu alsamt vera dygst hjá boripallinum at verja útbúnaðin ella sum liður í bjargingarætlan, um stórskaði skuldi borist á.

Kostnaðurin er grundaður á daggjøld, sum eru ógvuliga ymisk, alt eftir skipaslagi, aldri, flaggi, manning, leiðum o.ø. Eisini kann verða talan um ymisk arbeiði, sum skip í hesum flokki verða leigað til og eru útgjørd til at røkja. Daggjøld kunnu sostatt eftir arbeiðssetningi liggja ímillum 15-25.000 kr. til uml. 40-50.000 kr. Verður bygt á hetta, verða allar útreiðslurnar til tilbúgvingarskip 3,5 mió. kr./boring.

*Tilfar*

Tilfar fatar um alla ta útgerð, sum brúkt verður í sambandi við beinleiðis borivirksemi. Í miðal verða hesar útgerðarnøgdir brúktar hvønn dag:

| | |
|---|---|
| vatn | 30,3 tons |
| kemisk evni | 25,3 tons |
| bori- og fóðrirør | 16,1 tons |
| pall-brennievni | 15,0 tons |
| baritt | 12,2 tons |
| sement | 4,6 tons |
| útgerð | 3,5 tons |
| annað | 22,0 tons |
| við øllum | 129,0 tons |

Tilfarskostnaður verður mettur til 12-15 mió. kr. ella uml. 12% av øllum boriútreiðslunum.

Harumframt eru tænastur á veitingarstaðnum, sum fata um goymsluhald og tilfarshandfaring, sum kann kosta uml. 30.000 kr. hvønn dag ella 2,5 mió. kr. fyri hvørja boring. Víst verður annars til brot 4.1.3, sum er um stovnseting og vøruflutning.

***Aðrar tænastuveitingar***

Av øðrum tænastuveitingum og undirveitingum kunnu verða nevndar støðufesting, kósseting (directional surveys), "at fiska upp" mista útgerð, kavingar, samskifti, vistaveiting, mórumátingar (“mud-logging”) og ravmagnsmátingar umframt aðrar sertænastur. Miðalkostnaður verður roknaður at vera uml. 12% av øllum borikostnaðinum ella uml. 15 mió. kr.

Rakstur og fyribyrgjandi røkt av útgerð er stórt og regluligt virksemi í oljuídnaðinum. Eisini tá ið óhapp berst á, sum hevur við sær, at útgerð skal verða umvæld og skift, sleppa tænastuvirki framat. Einstakar uppgávur verða loystar í landi, t.d. tá ið útgerð verður kannað ella stillað. Virkini, sum kunnu koma uppí slíkar uppgávur, eru mekaniskir verkstaðir, elektrikarar og skipasmiðjur.

***Royndir úr Noregi***

Nakað av skrivligum norskum tilfari er tøkt um royndir at lýsa búskaparliga árinið, leitivirksemi hevur á samfelagið. Í hesum sambandi kunnu nøkur høvuðsevni verða tikin úr tveimum frágreiðingum.

Í aðrari frágreiðingini frá Agderforskning/Asplan Viak Sør A/S "Da oljen kom til Sørlandet: Socio-økonomiske konsekvenser av petroleumsvirksomhed i Skagerak" verður m.a. búskaparliga árinið, sum leitivirksemi hevur á økið, viðgjørt. Drigið verður fram, at leitiskeiðið hevur tvey heilt serkend eyðkenni:

1) virksemið er bara fyribils,
2) virksemið er ógvuliga avmarkað.

Í frágreiðingini verður komið til ta niðurstøðu, at virksemið á landi undir ongum umstøðum verður serliga nógv. Tað eyðkennir júst leitivirksemið, at stór óvissa er, um peningurin, sum er lagdur í, nakrantíð fer at hava inntøkur við sær.

Fyristøðufeløgini fara tí, har ið til ber, at minka um kostnaðin. Hetta hevur m.a. við sær, at tey helst vilja brúka verandi undirstøðukervi. Á henda hátt kann sleppast undan upplæringarkostnaði, venjingartíð o.ø., og nýggjar íløgur í undirstøðukervi verða avmarkaðar.

Í aðrari frágreiðing "Ringvirkninger for Nordnorsk økonomi av petroleumsvirksomheten på midt-norsk sokkel" (Norut Samfunnsforskning 1993) verður greinað, hvussu stóra ávirkan leitivirksemi út fyri Miðnoregi hevur á búskapin í Norðurnoregi. Niðurstøðan í frágreiðingini er, at búskaparligu ávirkanirnar frá leitivirksemi eru rættiliga smáar. Frágreiðingin byggir á leitivirksemi út fyri Miðnoregi 1991.

**Keypsskipanin hjá oljufeløgunum**

Ógvisliga oljuprísfallið í 1986 hevur fingið oljufeløgini at ansa nógv betur eftir kostnaðinum enn áður. Samstundis hevur vinnan lagt fastar mannagongdir fyri keypi/útbjóðing. Virki, ið ætla sær at veita oljuvinnuni eitthvørt, eiga at geva hesum gætur.

Tá ið fyristøðufelagið skal seta í verk leiting, nýtir felagið bæði egna orku og uttanfelags verktakarar. Uttanfelags verktakarar verða vanliga nýttir at savna seismikk og at bora hol. Hetta merkir (t.d. í sambandi við borivirksemi), at fyristøðufelagið setur seg í samband við eitt borifelag. Hetta felag skipar fyri boring og útvegar meginpartin av teimum yrkislærdu fólkunum, sum neyðug eru til tess at fremja eina boring, og ger so boringina í tøttum samstarvi við jarðfrøðingar og tey, ið taka avgerðir hjá fyristøðufelagnum. Avgerðir viðvíkjandi hjálpar- og vaktarskipum, veitingarskipum, útgerð, samskifti, støðufesting o.ø. tekur fyristøðufelagið vanliga sjálvt.

Til 1986 bóru oljuleiting og -útvinna dám av støðugum vøkstri og stórum inntøkum. Í ídnaðinum varð lítið spart, og eldhugin tóktist markleysur.

Í 1986 fall oljuprísurin brádliga úr meira enn 30 USD fyri fatið niður í uml. 12 USD fyri fatið. Oljuídnaðurin, sum fekk sínar inntøkur skerdar við 2/3, fór ígjøgnum eina kreppu, sum hevði við sær, at fólk í hópatali vórðu søgd úr starvi, feløg vórðu løgd saman, og allur bygnaðurin og allur hugburðurin í ídnaðinum broyttist grundleggjandi.

Bjartskygni hevur nú tikið seg upp aftur í oljuídnaðinum, sum kortini hevur varðveitt kostnaðartilvitskuna. Ein og hvør kostnaður verður settur í samband við vónirnar um at kunna vinna pening, sum frá líður. Mong nýggj oljulond hava latið upp fyri altjóða oljufeløgum. Kostnaðurin av eini oljuverkætlan á føroyskum øki verður borin saman við aðrar møguligar íløgur og vandaliga greinaður, áðrenn avgerð verður tikin. Flestu lond, sum hava latið upp fyri oljuleiting, ansa eftir at áseta treytir, sum gera tað áhugavert hjá oljuídnaðinum at virka á teirra øki.

**Oljufelaganna góðskukrøv o.a.**

Bæði í Bretlandi, Noregi og Danmark hava fyristøðufeløg tikið stig til at seta í verk forkvalifikatiónsskipanir. Ætlanin við skipanini er, at gjørligt skal verða hjá fyristøðufeløgum at fáa sær skikkaðar útvegarar, sum so verða eggjaðir at bjóða upp á ávíst arbeiði. Skipanirnar fata um forkvalifisering, t.e. at nøkur saklig minstukrøv verða sett til tess at verða skrásettur. Hesi krøv endurspegla tey serligu krøv, sum oljuídnaðurin setur.

Til tess at vera skikkaður sum útvegari eftir donsku/norsku skipanini, skulu krøv verða lokin á hesum økjum:

1) Góðskukervi
2) Heilsa, umhvørvi og trygd
3) Handilslig/fíggjarlig krøv
4) At svara spurnartalvu á diskli

*Ad. 1, krøv til góðskukervi:* Útvegararnir skulu kunna skjalprógva, at teir hava sett í verk góðskukervi, sum lýkur krøvini í ISO 9000 raðnum ella tílíkum, ella at slík skipan er í gerð. Fyri staka vøru/tænastuveiting kann verða vikið frá kravinum. Um so er, verður tað viðmerkt í útboðslistanum.

ISO 9000 raðið fatar um 3 kravbólkar til góðskukervi - ISO 9001, ISO 9002 og ISO 9003:

ISO 9001 fatar um krøv viðvíkjandi vørumenning, konstruktión, framleiðslu, uppseting og tænastu. ISO 9001 er tann víðfevndasti standardurin og vendir sær til virki, sum í sambandi við vøru- ella tænastuveitingar sjálv standa fyri vørumenningar- og konstruktiónsarbeiði.

ISO 9002 fatar bara um krøv í sambandi við framleiðslu, uppseting og tænastu, men er annars tað sama sum ISO 9001. Tað verður mest brúkt á virkjum, sum fyrst og fremst veita standardvøru ella -tænastu, t.e. vørur uttan stórvegis krøv til vørumenningar- ella konstruktiónsførleika í sambandi við hvørja einstaka bílegging, men at vørurnar/tænasturnar eru gjørdar framman undan sølu/tilboði við hópframleiðslu í hyggju.

ISO 9003 fevnir um krøv til liðugtvørueftirlit og -royndir. Krøvini í hesum standardi eru munandi slakari enn ISO 9001 og ISO 9002, og standardin brúka einamest virki, sum veita einfaldar vørur, har góðskan á lidnu vøruni er lutfalsliga løtt at staðfesta. Tað eru fyrst og fremst smá virki, sum brúka ISO 9003-skipanina, og í Danmark t.d. eru virkini við góðkendum góðskukervi eftir ISO 9003 standardi ógvuliga fá sammett við tey, ið brúka hinar báðar.

*Ad. 2, krøv til heilsu, umhvørvi og trygd:* Stjórin í fyritøkuni skal skrivliga vátta, at virkið hevur ella er farið undir at gera eina formliga, skjalfesta stýringarskipan við atliti at heilsu, umhvørvi og trygd. Henda skipan skal í minsta lagi tryggja, at myndugleikakrøvini verða lokin.

Í ISO 9000 standardinum verður kravt, at øll myndugleikakrøv verða lokin, og skipanin við at gera eina skjalfesta stýriskipan er tann sama fyri góðsku sum fyri heilsu, umhvørvi og trygd.

*Ad. 3, handilslig/fíggjarlig krøv:* Forkvalifikatiónsskipanin krevur eina fráboðan frá góðkendum grannskoðara, har hetta verður váttað:

- at útvegarin er skrásettur í almennari virkisskrá,
- at virkið er mvg-skrásett, um tað krevst,
- at útvegarin ikki skyldar skatt og løn,
- at útvegarin ikki er í ferð við at átaka sær stóra skuld ella er undir almennari umsiting.

*Ad. 4, at svara spurnartalvu á diskli*: Spurnartalvan verður fylt út við øllum vørum og tænastuveitingum, sum útvegarin kann bjóða. Til hesa skráseting er

gjørdur serstakur navnalisti.

***Kostnaðarskerjing í sambandi við standardisering***

Í 90-unum hevur kostnaðarskerjing verið felagsnevnari hjá øllum oljufeløgum. Í royndunum at hava kostnaðin so lágan sum tilber, hevur nógv arbeiði verið gjørt at standardisera allar lutir og eindir, sum nýtt verða í oljvinnuni. Standardiseringin er ikki enn so umfatandi sum í mongum øðrum vinnum, men hetta arbeiðið er støðugt í gongd og fer væntandi at verða týðandi kappingartáttur.

Forkvalifikatión og standardisering eru ítøkilig tiltøk, sum eru sett í gongd til tess at skerja verkætlanarkostnaðin.

## 4.1.2 Føroysk veitingarútboð

Eftir at hava hugt at eftirspurninginum fara vit niðanfyri at hefta okkum við útboðssíðuna, bæði viðvíkjandi føroyskari arbeiðsmegi og hvørjar veitingar føroysk virki kunnu bjóða oljuídnaðinum. At enda verður hugt at, hvussu føroysk virki, sum hava í hyggju at fara upp í oljuvinnuna, kunnu laga seg eftir serstøku krøvunum í oljuídnaðinum.

Lýsingin er avmarkað til forkanningarskeiðið, t.e. skeiðið sum oljuvirksemið og føroyska vinnulívið í løtuni er í, við útliti til leitiskeið har vinnulívið skal víðka sínar royndir til at veita til nýggja vinnugrein.

**Tøk føroysk arbeiðsmegi**

Samfelagskreppan í 90-unum hevði við sær ógvisligar broytingar á føroyska arbeiðsmarknaðinum. Kreppan hevur havt stórt arbeiðsloysi við sær, men í hesum torføru tíðum hevur føroysk arbeiðsmegi samstundis víst síni evni at draga undan og laga seg bæði sum smidlig og flytfør arbeiðsmegi.

Arbeiðsloysið var sum mest í januar 1994 við skrásettum arbeiðsloysi uppá 22%, sum svaraði til sløk 4.800 fulltíðarstørv. Flytingin úr Føroyum hevur doyvt hesa gongd nakað við tað, at nógv vinnufør fólk hava søkt sær starv uttanlands, eina mest í Danmark. Samstundis eru lutfalsliga færri ung fólk komin aftur til Føroya eftir at hava nomið sær útbúgving í útlondum. Nettofráflytingin í 1993 og 1994 var so ógvislig, at hon hesi bæði árini svaraði til 8% av øllum fólkinum.

Yvirhøvur hevur eydnast fólki væl at fáa arbeiði í útlondum, bæði vanligt lønt arbeiði, føst størv, kjans við skipum undir fremmandum flaggi og sum sjálvstøðug vinnurekandi, t.d. í byggivinnuni í Týsklandi. Á føroyska arbeiðsmarknaðinum eru ikki trong yrkismørk sum t.d. í Danmark, og hetta hevur gjørt sítt til, at føroysk arbeiðsmegi hevur havt rættiliga lætt við at finna arbeiði og laga seg eftir umstøðunum.

Mong teirra, ið hava verið í útlondum kreppuárini, munnu ætla sær at koma aftur, um arbeiðsmøguleikarnir fara at batna. Hildið verður kortini, at fólkini, ið koma aftur, fara at verða tald í øvugtum lutfalli við tíðina, t.e. tess longri, ið líður, til betri arbeiðsmøguleikar taka seg upp, tess færri koma aftur, so hvørt sum tey grógva fastari har, tey eru flutt.

Sum nevnt frammanfyri er føroyska arbeiðsmegin ógvuliga flytilig, og tí er torført at geva rætta mynd av, hvussu stór tøka arbeiðsmegin er, av tí at hon fer at verða ymisk, alt eftir arbeiðsmøguleikunum.

Seinast í 1996 var føroyska arbeiðsmegin hildin at vera 20.300 fólk, tey arbeiðstøku vóru gjørd upp til 2.100, sum svarar til uml. 10%.

Hagtøl eru ikki, sum lýsa, hvønn førleika arbeiðsmegin hevur, og orsakað av strongu skrásetingarlóggávuni í Føroyum ber ikki til útvega slík hagtøl.

Útbúgvingarstøðið samsvarar við tað í Norðurlondum annars. Tó hava vit lutfalsliga fleiri sjómansútbúgvingar, sum verður hildið at koma serstakliga væl við í sambandi við oljuvinnuna.

Alment fara fólk við hægri útbúgving at hava tørv á yvirbygningsskeiðum til tess at nema sær førleika til oljuvinnuna. Tey kunnu vera t.d. serlig oljuløgfrøðilig og oljubúskaparlig skeið ella skeið um oljujarðfrøði fyri verkfrøðingar.

Fólk úr sjóvinnu- og handverksyrkinum fara við eitt sindur av eftirútbúgving at kunna fáa arbeiði í oljuídnaðinum. Neyðuga eftirútbúgvingin fatar um t.d. trygdarskeið, skeið ella venjingar til frálandsarbeiði ella arbeiði á útgerðarstøð.

At bøta um førleikan hjá arbeiðsmegini og kunnleikan til oljuvinnuna hava Føroya Oljuídnaður og Arbeiðsloysisskipanin roynt at útvega arbeiðspláss og læruppláss í oljuídnaðinum í grannalondunum. Við árslok 1996 høvdu uml. 20 fólk verið í slíkum størvum.

Í kapittul 4.4 Útbúgving í samband við oljuvinnu verður evnið viðvíkjandi førleikakrøvum gjølligari viðgjørt, herundir eisini hvussu føroysk arbeiðsmegi kann bøta um sín førleika til at taka á seg arbeiði í oljuídnaðinum.

Tað er í fyrstu syftu tað, at oljufeløgini fáa sær skrivstovu í Føroyum, serstakliga at fyristøðufeløgini stovna rakstrarfelag á staðnum, og tað virksemi, sum er knýtt at útgerðarstøð, og at føroyingar verða uppi í við tilbúgvingarskipum, sum væntandi fer at geva føroyskari arbeiðsmegi møguleikar í oljuvinnuni í byrjanini. Føroyingar fara eisini at kunna verða við til at manna boripallar og framleiðsluútbúnað. At boripalli verða uml. 160 fólk knýtt, helmingur teirra verður á pallinum í senn. Umleið helmingurin er borimanning, hini eru býtt ímillum seryrki sum t.d. mátingar og móruhandfaring og vanligt tænastuyrki sum t.d. vistaveitingar.

Longu sum er, fáa føroyingar størv í oljuvinnu í útlondum. Teir fáa royndir, sum kunnu koma teimum til góðar, søkja teir arbeiði í framtíðar oljuídnaði í Føroyum, um hann kemur.

Føroyingar í oljuídnaði í øðrum londum eru fyrst og fremst í yrki, har teir annaðhvørt brúka sín kunnleika til sjógv ella handverk, t.d. á veitingarskipum, á boripøllum og sum kavarar. Aðrir hava fingið starv á landi - tað veri seg sum verkfrøðingar ella í meiri fyrisitingarligum/búskaparligum yrkjum.

Eisini á yrkisøkjum, sum ikki beinleiðis koma undir oljuídnað, men sum standa fyri veitingum til ídnaðin, eru føroyingar í starvi, t.d. á virkjum, sum m.a. veita oljuídnaðinum EDV loysnir, og á virkjum, sum t.d. lata oljufeløgum og teirra verktakum elektrikarar.

Torført er at fáa yvirlit yvir, hvussu nógvir føroyingar eru í starvi í útlondum, eins og tað er trupult at meta um, hvussu nógvir kundu hugsast at komið heimaftur, men aðalmetingin er, at tey øki í oljuídnaðinum, har føroyingar starvast, eru víðfevnd. Hetta átti at bent á, at økini, har føroyingar munnu hava møguleika at starvast í framtíðar føroyskari oljuvinnu, eru ikki avmarkað til einstøk yrki. Sum frá líður skuldi møguleiki verið fyri, at føroyingar fáa starv á øllum økjum í oljuvirkseminum.

Eitt øki, ið gevur upp á seg nógv arbeiði, eru tey sonevndu frælsu yrkini. Oljuídnaðurin fer at geva grannskoðara- og sakføraravirkjum nýggj viðskiftafólk, og m.a. leigubilar, gistingarhús og handilsvirksemi sum heild fer at varnast, at virk-

semið veksur. Arbeiðið á hesum økjum fer tí at vaksa, og hildið verður, at so leingi arbeiðsmegi ikki tørvar, fara føroyingar at fáa nýggju størvini. Tá ið oljuvirksemið í Føroyum einaferð steðgar, fer virksemið á hesum økjum at falla aftur.

Virksemið, sum samfelagsliga er mest áhugavert, verður tað, sum megnar at verða verandi óheft av oljuídnaðinum. Í eini støðu, tá ið kapping er um arbeiðsmegina, verður tað tí skilagott, at føroyingar fyrst og fremst royna at nema sær førleika til tað virksemið, sum eisini fer at halda á í longri tíð. Um útbúgvingarnar, sum arbeiðsmegin hevur, og tey førleikakrøv, sum oljuídnaðurin setur arbeiðsmegini, verður mett um í kapittul 4.4 Útbúgving í sambandi við oljuvinnu.

**Hvat hevur føroyskt vinnulív at bjóða oljuvinnuni**

Føroyskt vinnulív er merkt av, at fiskiveiða, aling og fiskavirking í mong tíggjuáraskeið hava verið høvuðsvinnur. Hetta merkir, at meginparturin av føroyskum ídnaði er beinleiðis knýttur at teimum. Rundan um tey virki, sum fáast við fiskiskap og at virka fiskavørur, hevur natúrliga nógv av handverksídnaði og tænastuvirksemi tikið seg upp. Eisini eigur at verða víst á, at arbeiðsvalið hjá mongum natúrliga hevur miðað ímóti skipsførara- og maskinmeistaraútbúgving. Tí er fjøld av føroyingum nú í vinnu á høgum stigi í handilsflota og í frálandsvinnu í útlondum. Vinnan kann tí við smávegis dagføring verða før fyri at veita oljuvinnuni vørur og tænastur.

Vinnulívið hevur seinastu tvey árini víst alsamt størri áhuga fyri oljuvinnuni. Á oljustevnuni Offshore Europe 95 í Aberdeen vóru meira enn 20 privat virki umboðað, sum saman við øðrum feløgum og almennum myndugleikum vóru við á einum felagsbási.

Síðan farið varð undir forkanningar á sumri 1994, hava einstøk útlendsk fyristøðufeløg brúkt føroysku veitingarskipanina. Varhugin sum heild er, at royndirnar hava verið góðar, og at menningarmøguleiki avgjørt er til steðar.

Niðanfyri verða í stuttum lýstar tær veitingar, sum føroyska vinnan í løtuni kann bjóða oljuvinnuni.

***Havnir***

Føroyskar havnir hava í mong ár veitt føroyskum skipum tænastur og nú eisini alsamt fleiri útlendskum skipum. Vøksturin er m.a. tí, at seinnu árini hevur verið virkað fyri eini hugmynd um at marknaðarføra Føroyar sum tænastumiðdepil fyri veitingar og tænastur undir heitinum “North Atlantic Resource Centre“. Hendan hugmynd kann verða brúkt bæði í fiski- og oljuvinnu.

Í 1995 kannaði landsverkfrøðingurin í samstarvi við ráðgevafelagið E. D. Verkfrøði útgerðarhavnir til oljuvinnu. Kanningin vísir, at sum er lúka fleiri havnir støddarkrøvini[6] (longd og dýpd), sum sett verða útgerðarhavn. Tørvur fer kortini at verða á íløgum í m.a. goymslutangar, lyftikraft og goymslupláss.

Tá ið skip koma í havn, verða nógvar tænastuveitingar bodnar fram, sum t.d. umvælingar og viðlíkahald, vøruveitingar, vistaveitingar, drykkjuvatn, brenni-evni, burturbeining av burturkasti, vaskarítænasta, flutningur, manningarrøkt o.a.

***Skip***

Tilbúgvingarskip eru tey skipasløg, sum borivirksemið krevur sum tilbúgving. Fyri ein part eru tey útgerðarskip, sum vanliga eru serbygd og fyri ein part hjálpar- og vaktarskip, sum ofta eru umbygd fiskiskip, men nú eisini serbygd skip. Harumframt kann talan vera um før til akkers-handfaring, "eltibátar" og onnur stuðulsfør.

Føroysk vinna hevur ikki serútgjørd før tøk enn, men onnur minni útgjørd før kunnu verða útvegað í Føroyum.

***Skipasmiðjur, verkstaðir o.a.***

Í sambandi við tilbúgvingarfør og útgerðarvirksemi annars verður tørvur á tænastum frá skipasmiðjum og mekaniskum verkstøðum, sum kunnu taka upp-gávur á seg, sum røkka frá stálbyggingum til fínmekanikk og elektronikk. Uppgávurnar í oljuvinnuni kunnu verða veitingar til skip, men eisini til boripallar.

Í Føroyum eru 3 skipasmiðjur, ein við stórari turrdokk, umframt nakrar sleipi-støðir. Skipasmiðjurnar kunnu taka á seg arbeiði at byggja og halda bæði stál og timbur og standa fyri snikkarahandverki, mekaniskum handverki og el-hand-verki.

Umframt eru nógvir mekaniskir verkstaðir, sum lata, umvæla og halda útgerð, sum teir umboða. Nakrir verkstaðir gera eisini sjálvir t.d. oljutrýst-deksútgerð, el-talvur og ávaringarskipanir.

***EDV- og elektronikkvirki og fjarskifti***

Fleiri virki arbeiða við elektronikki, teld og samskifti. Í sambandi við marknaðarføring á oljustevnuni Offshore Europe 95 í Aberdeen vóru 6 virki í hesi vinnugrein, sum samskipaðu seg. Millum hesi 6 virki var Telefonverk Føroya Løgtings, sum hevur einarætt til fjarsendiøkið í Føroyum, og P/F Elektron, sum virkar sum dátudepil hjá m.a. almennu umsitingini og føroysku peningastovnunum. Útlendsk feløg hava sýnt ritbúnaðinum hjá telefonverkinum og dátudeplinum áhuga.

---

6 Útgerðarhavnir til oljuvinnu, landsverksfrøðingurin & P/F E.D. Verkfrøði, 1995.

Samskiftisøkið mennist við ógvisligari ferð, og á hesum øki fara nýggir møguleikar ivaleyst at taka seg upp hjá føroyska telefonverkinum. Nýggju møguleikarnir taka seg upp í sambandi við rationaliseringar á t.d. framleiðslupøllum, har nógv av virkseminum, sum nú krevur manning, fer at verða fjarstýrt úr landi.

Oljuútvinning kann harumframt geva telefonverkinum fyrimunir við at boðið, sum fartelefonin røkkur, verður longt, um loyvt verður, at basisstøðir verða settar upp á frálandsútbúnaði.

***Ídnaður***

Meginparturin av føroyskum ídnaði er knýttur at fiskavirking, og nógv virki hava tí eisini við ávísari umstilling møguleikan at lata vøru til oljuídnaðin. Eitt nýtt dømi er um virki, sum við at broyta støddir og tilfar hevur fingið góðar møguleikar at vera undirútvegari til oljuvinnuna við at virka, seta upp og gera liðugt net, tog, veir o.a.

Tey, ið gera máling, sápu og rustloysara, eru onnur dømi um ídnaðarvirki, sum í mong ár hava ment vøru at brúka í sambandi við sjóvinnu.

***Ferming/flutningur***

At útgerðarstøð verður í Føroyum fer at merkja, at tær stóru nøgdirnar av útgerð o.ø. skulu verða fluttar til Føroya. Hetta fer at vaksa um møguleikarnar hjá teimum virkjum, sum bjóða fram vøruavgreiðslu, vøruflutning, leigu, umsjón og umboðan.

Tvey farmafeløg eru, sum hava samband hvørja viku við Danmark, Svøríki, Noreg, Skotland, Ongland, Ísland, Háland og Týskland. Í løtuni eru 8-10 fráferðir úr Tórshavn um vikuna. Bæði feløg bjóða flutning til onnur mál í Evropa ella um allan heim.

Um floghavnina í Vágum koma og fara uml. 4.000 flogfør um árið, av hesum er umleið fjórðingurin tyrluflúgving innanoyggja. Fast flogsamband er til Keypmannahavnar, Århus, Billund, Reykjavíkar og um summarið til Glasgow og Narsarsuaq.

***Tyrluflutningur***

Í sambandi við frálandsvirksemi er vanligt at flyta manning og eykalutir loftvegis.

Í floghavnini í Vágum eru longu allir neyðugir hentleikar at reka loftferðslu bæði við tyrlum og flogførum. Tyrlustøð hevur eins og útgerðarstøð nógv virksemi knýtt at sær, t.d. flutning til støðina og aftur - bæði innan- og uttanlands. Harumframt gevur tyrluflutningur av føroyskari tyrlustøð føroyskari arbeiðsmegi og føroyskum vinnulívi beinleiðis samband við oljuvirksemi.

Evnið "Flutningur loftvegis" verður gjølligari viðgjørt í broti 4.1.4.

***Proviantur, vistaveiting og gistingarhús***

Fleiri føroyskar heilsølur hava proviantering sum serøki. Dømi eru eisini um, at hesi virki kunnu lata proviant til skip í havnum í útlondum fyri kappingarføran prís.

Fiskavørur hava í mong tíggjuár verið meginparturin av føroyska útflutninginum. Altjóða krøv til góðsku og reinføri eru herd nógv seinnu árini, og hetta hevur havt alsama menning við sær, og í hesum sambandi eru royndir og

serkunnleiki fingin á matvøruøkinum. Vistaveiting er tí eyðsæddur møguleiki hjá mongum virkjum.

Størri virksemi og ferðsla í Føroyum fer at vaksa um virksemið í hotell- og matstovuvinnugreinini og fer at gera, at ferðafólkatalið verður javnari allar árstíðirnar. At gera útgerðar- og/ella tyrlustøð í Føroyum fer at skapa tørv á gistingarplássum, t.d. tá ið manningar verða skiftar.

***Fíggjarligar veitingar***

Tilsamans eru fýra føroyskir peningastovnar, ein banki og tríggir sparikassar. Hvør teirra hevur fleiri deildir. Teir tríggir sparikassarnir hava einamest veitt byggi- og veðrættarlán, men síðan nýggja banka- og sparikassalógin kom í gildi í 1994, ber til hjá sparikassunum at veita vinnulívinum fígging á jøvnum føti við bankan. Teir fýra peningastovnarnir bjóða allar tær tænastur, sum peningastovnsvirksemi vanliga ger.

Á tryggingarøkinum eru fleiri tryggingarfeløg, ið sum heild øll eru samskipað í felags samtak. Tryggingarsambandið hevur áður havt einkarætt, men frá 1. januar 1997 ber til at stovna virki, ið kunnu kappast. Tryggingarvirksemi krevur kortini loyvi, og ímillum treytirnar fyri at fáa tað er, at felagið skal eiga heima í Føroyum, og at kapitalurin skal vera føroyskur. Føroysku tryggingarfeløgini fata um alla vanliga trygging; og sum natúrligt er í Føroyum, so er sjóvátryggingin víðfevnandi.

***Byggivinnan***

Í 80-unum var nógv at gera í byggivinnuni, nógv sethús vórðu bygd og tað almenna gjørdi eisini stórar íløgur í berghol, vegir, havnir og stovnar. Nógv av hesum arbeiði løgdu føroyskir verkfrøðingar til rættis, og føroyskir verktakar og handverksmeistarar gjørdu arbeiðið. Í 1990-árunum, meðan byggivirksemið hevur verið óvanliga lítið í Føroyum, hava nakrir teirra arbeitt á marknaðum í útlondum, t.d. í Týsklandi, Noregi, Danmark og í Íslandi.

***Ráðgevavirksemi***

Í sambandi við virksemi, knýtt at olju á føroyskum leiðum, krevst kunnleiki um føroysk viðurskifti, t.d. um umhvørvi, veðurlag og samfelagsviðurskifti. Ein partur av neyðuga kunnleikanum er í føroyskum ráðgevavirkjum og almennum stovnum, men eisini verður tørvur á at fáa til vega nýggjan kunnleika. Ein eyðsýndur arbeiðssetningur hjá føroyskum ráðgevandi virkjum, sum við sínum kunnleika til føroysk viðurskifti mugu verða hildin at hava serligan førleika á ymiskum økjum, bæði í sambandi við granskingarverkætlanir, og frágreiðingar og fylgjumetingar, fer at verða at savna, greina og bera útlendsku feløgunum kunnleika um føroyska samfelagið.

***Aðrar veitingar***

Oljuvinnuni tørvar nógvar aðrar tænastuveitingar, sum føroysk virki eru før fyri at lata, eitt nú:

- At leiga fastognir og at byggja nýggjar skrivstovubygningar. Væntandi fara útlendsk feløg at seta seg niður í Føroyum, lutvíst fyri at fáa betri samband við føroyskar myndugleikar og vinnulív, og lutvíst tí at lóggávan fer at krevja umboðan í Føroyum. Hetta fer at hava alstóran týdning fyri møguleikarnar hjá føroyskum vinnulívi at fáa samband við oljuvinnuna.
- Ráðstevnu- og skeiðmøguleikar. Fleiri gistingarhús hava góðar ráðstevnumøguleikar, og umframt er Norðurlandahúsið framúr væl skikkað til stór tiltøk. Sjómansskúlin, maskinmeistaraskúlin, teknisku skúlarnir og handilsskúlarnir í Føroyum hava sýnt áhuga fyri at skipa fyri skeiðum fyri oljuvinnuni. Eisini eru møguleikar í Føroya Brandskúla, um kravt verður, sum í øðrum londum, trygdarprógv á staðnum. Hetta krevur kortini, at Brandskúlin verður útbygdur.
- Av tí at lóggávan á oljuøkinum er føroysk, hevur hetta við sær, at føroysk sakføraravirki fáa arbeiði.
- Grannskoðarafeløgini, sum knýtt eru at altjóða grannskoðarafelagsskapum, fáa arbeiði, serstakliga um útlendsk feløg seta seg í Føroyum.
- Í Føroyum eru hesi klassaumboð umboðað: Bureau Veritas, Norsk Veritas, Lloyd's Register of Shipping og Germanischer Lloyd's.

***Royndir higartil***

Í 1994 fór Western Geophysical Corporation undir seismiskar kanningar. Tá ið spurt varð, søgdu umboð fyri Western Geophysical seg vera nøgd við føroysku veitingarnar. Tað snýr seg um umboðan, ferming, veitingar og brenniolju.

Í 1996 varð verkætlanin at dýpa boriholið í Lopra framd. 25% av umsetninginum í hesari verkætlan er farið til føroyska arbeiðsmegi og veitingar frá føroyskum virkjum. Tá ið fyristøðufelagið Dopas varð spurt, um tað var nøgt við føroysku veitingarnar, varð sagt, at føroyska arbeiðið sum heild hevur verið stak gott, og veitingarfreistirnar vanliga hildnar. Harafturímóti varð gjørt vart við, at kostnaðurin á serliga arbeiðsmegini bæði við og uttan yrkiskunnleika, samanborið við tað sum fæst burturúr, er hægri enn tað, tey eru von við í vinnuni. Dopas hevur tá ikki borið prísin á arbeiðsmegini saman við skandinavisk, men við bretsk viðurskifti.

Tað, ið nevnt er frammanfyri, gevur ábending um teir møguleikar, sum føroyskt vinnulív sum er hevur at útvega oljuvinnuni. Greitt er, at so hvørt sum virksemið í føroyskari oljuvinnu veksur, fara nýggir møguleikar at taka seg upp, og tørvur verður á alt meira serkunnleika á økjum, ið ikki eru nevnd her. Virki fara at gera samstarvsavtalur, summi verða partar av samtaksavtalum (“joint ventures”) við útlendsk feløg, og alt hetta fer at bøta um møguleikarnar hjá føroyskum vinnulívi at lata oljuvinnuni vørur og tænastur. Føroyskt vinnulív er júst eyðkent við evnum til skjótt skifti, tí virkini eru so smá.

Vansin við, at virkini eru so smá, er samstundis, at torført verður at arbeiða strategiskt, tí at virkini mugu arbeiða út frá stuttum ætlanarhvarvi. Um politikkur myndugleikanna á økinum, undir hesum eisini krøv til oljufeløgini, ikki eggjar

oljufeløgunum til at brúka føroysk virki og teirra kervi, og um myndugleikarnir ikki leggja greiðan veitingarpolitikk, m.a. um at stovna støðir í Føroyum, kann úrslitið verða, at virkini fáa ikki búgvið seg til at kappast á altjóða stigi.

**Hvussu lúka vit serkrøv frá oljufeløgunum**

Ein fyrimunur, sum ofta verður nevndur í sambandi við veitingar- og tyrluvirksemi í Føroyum, er, at hetta hevur so mangt annað virksemi við sær. Avleidda virksemið stavar frá ymiskum vøru- og tænastuveitingum og virksemi, sum øktur gjaldsstreymur ígjøgnum eitt lítið samfelag hevur við sær.

Í mongum førum eru ikki serlig krøv sett hesum avleidda virksemi. Hetta er samstundis virksemi, sum dettur niðurfyri í somu løtu, sum oljuvinnan gevst í Føroyum.

Í frágreiðingini "Karmar fyri føroyskari vinnu"[7], sum partarnir á arbeiðsmarknaðinum lótu frá sær í 1994, verður mælt til, at føroyskt vinnulív roynir at fáa vinnuligan førleika, sum eisini kann verða brúktur í oljuídnaðinum aðrastaðnis og í øðrum virksemi bæði í Føroyum og í útlondum. Oljuídnaðurin setur slíkum veitingum krøv, sum vanliga hava samband við trygd, umhvørvi og góðsku, sí eisini brot 4.1.1 Eftirspurningur frá oljuídnaðinum.

Umframt krøv um kappingarføran prís, verða eisini onnur krøv sett, eitt nú:

- krøv um útgreinaðar forskriftir eftir ávísum standardum,
- krøv til góðskukervi,
- lógarfest krøv til trygd, umhvørvi og heilsu,
- fíggjarkrøv,
- tøknilig krøv,
- krøv um tilvísingar til royndir við líkum veitingum,
- krøv um verkætlanarstýring,
- krøv um málkunnleika (enskt).

Hesi krøv eru víðfevndari enn tey, ið føroyskt vinnulív annars er vant við (ber saman frágreiðingina frá Føroya Oljuídnaði um krøv til útvegarar innan oljuvinnuna)[8].

Um føroyskur ídnaður og tænastuvirki skulu gera vart við seg sum útvegarar í kravmiklara partinum í framtíðar frálandsvirksemi kring Føroyar, er neyðugt við miðvísum arbeiði í vinnunum. Hetta arbeiðið kann verða gjørt á ymsan hátt, eitt nú:

- inni á virkjunum,
- í einum kervi við fleiri virkjum,
- í vinnugreinafeløgum,
- í samvinnu við onnur (útlendsk) virki (jointventure).

Ítøkiligastu og mest viðkomandi krøvini, sum virkini longu nú kunnu arbeiða við, er at fáa eitt góðskukervi at virka. Slíkt arbeiði kann undir øllum umstøðum verða neyðugt fyri at bøta um kappingargrundarlagið hjá virkinum, sama um ella

---

7 Karmar fyri føroyskari vinnu, 17. mai 1994

8 Krøv til veitarar innan oljuvinnuna, Føroya Oljuídnaður, nov. 1996

nær rakt verður við olju.

Arbeiði við góðskustýring eigur at verða stuðlað við einum miðvísum vinnufremjandi politikki við ítøkiligum tiltøkum, sum t.d. góðskuátøkum, útbúgving, tiltøkum til frama fyri vinnugreinina, stigvíst øktar játtanir eftir tørvi til stuðulsskipanina, sum er í gildi, um at uppbyggja góðskukervi (Grunnurin til ídnaðarfremjandi endamál) o.a. At seta í verk góðskukervi í útvaldum almennum fyritøkum, har fyriskipanar- og aðrar fortreytir eru, kundi eisini verið við til at styrkt yrkisliga umhvørvið um góðskustýring í Føroyum.

### 4.1.3 Stovnseting og vøruflutningur

Í hesum parti verða tey krøv viðgjørd, sum myndugleikarnir fara at kunna seta oljufeløgum um at seta seg niður í Føroyum og at lata virksemið ganga úr Føroyum. Greitt verður frá tí virksemi, ein útgerðarstøð hevur í ymisku skeiðunum í eini oljuverkætlan. Listi verður gjørdur yvir tað, ið helst eigur at vera tøkt á útgerðarstøð, og kannað verður, hvussu skilagott tað er at brúka føroyska útgerðarstøð, herundir eisini um ítøk krøv til útgerðarstøð kunnu verða lúkað. Nakrir møguleikar at skipa støðina verða settir upp, síðan verður tørvurin á veitingar- og tilbúgvingarskipum lýstur. Parturin endar við einari niðurstøðu við tilmælum um tiltøk, ið á besta hátt tryggja eitt skilagott útgangsstøði fyri oljuvirksemi á føroyskum leiðum.

Hóast hesin partur í trongari merking viðger evnið stovnseting og vøruflutning, má parturin verða settur í samanhang við tey brot, sum viðgera tiltøk til frama fyri føroysk vinnulívsáhugamál annars.

**Oljufeløg seta seg niður í Føroyum**

Skulu oljufeløgini hava trygt og dygt virksemi á føroyskum leiðum og møguleika at hava gott samband við viðkomandi myndugleikar og við nóg dyggum atliti at heilsu, umhvørvi, trygd og tilbúgving, mugu tey hava eina hóskandi umboðan her í sambandi við virksemið og hava rakstrarmiðstøð ella høvuðsskrivstovu í Føroyum.

Í kreppustøðu, tá ið fólk og umhvørvi standa andlit til andlit við eina vanlukku, verður tað eitt ófrávíkiligt myndugleikakrav til fyristøðufeløgini, at teirra virkisleiðsla er í Føroyum.

Ein fylgja av hesum kravi er, at loyvishavanir skulu lata sítt virksemi ganga úr Føroyum. Teirra verkligu arbeiði skulu fáa tænastur frá eini útgerðarstøð.

**Virkið hjá útgerðarstøð**

Ein útgerðarstøð kann veita kolvetnisvirkseminum tænastu øll tey fýra skeiðini, sum oljuverkætlan kann verða býtt í, smbr. kapittul 4 av 1993-frágreiðingini:

- forkanningar,
- leiting og meting,
- útbygging og útvinning,
- avrigging.

***Forkanningarskeiðið***

Forkanningarskeið krevur ikki margbroyttari og víðfevndari tænastu enn fiski- og farmaflotanum tørvar. Hetta verður váttað við royndunum frá forkanningarskeiðinum, sum er í gongd.

*Leiting og meting*

Tá ið virksemið verður økt til eisini at fata um leitiboringar, skulu munagóðir goymslumøguleikar vera tøkir. Ferðslan ímillum leitileiðirnar og støðina verður regluligari. Skipini, ið taka sær av flutninginum, verða serútgjørd før, sum fara at seta størri krøv til havnirnar. Ein útgerðarstøð skal vera før fyri at lata oljuvirksemið á sjónum tilfar og aðrar veitingar. Uppgávan hjá støðini er at lata goymslupláss, havn og aðrar hentleikar, sum virkjunum, ið hava ymisku tænasturnar, tørva. Av verkligum orsøkum kann tað vera fyrimunur at hava allar støðhentleikar á einum staði. Men av tí at leitiskeiðið, áðrenn nakað verður funnið, ber dám av fyribils tiltaki, og at tað tí ikki er ráðiligt at gera stórvegis íløgur til at veita hesum skeiði tænastur, er ein annar møguleiki at lata støðvirksemið vera spjatt um alt landið. Slík loysn kann standa við, so leingi sum veitingarskipini hava nóg góða tíð at heinta veitingar og tænastur frá ymsum støðum. Verður orkan hjá veitingarskipinum brúkt til fulnar, kann verða mett um fíggjarliga, hvørt støðvirksemið framvegis skal verða á ymiskum plássum.

Samfelda útboðið frá støðvirkseminum fevnir um allar tænastur, sum kervið av útgerðarplássum verðurført fyri at veita.

Fyristøðufeløgini kunnu av verkligum ávum hava hug til at seta sína rakstrarmiðstøð í nánd av eini útgerðarstøð, kanska enntá á sama øki sum støðin.

Verður olja funnin, verður farið inn í metingarskeiðið, har økt verður um borivirksemið. Men í leitiskeiðinum verður ikki neyðugt at hava fasta útgerðarstøð, har tænasturnar í høvuðsheitum verða veittar úr sama staði.

*Útbygging og útvinning*

Verður úrslitið av leitivirkseminum tað, at rakstrarverdar keldur verða funnar, skal støða verða tikin til, nær og hvussu oljuleiðirnar skulu verða útbygdar. Samstundis verður støða tikin til at grunda varandi útgerðarstøðir. Virksemið í útbyggingarskeiðinum ber eisini dám av at vera fyribils, hóast tað væl kann vara í mong ár. Stórar konstruktiónir og nógv útgerð verða flutt út á leiðina og fest har. Rákið er soleiðis, at framleiðsluvirksemið annaðhvørt er á skipum, sum koma liðugtgjørd á leiðirnar, ella á framleiðslupøllum, sum fyri tað mesta eru liðugt smíðaðir á landi, soleiðis at uppsetingin til sjós verður so stutt, sum til ber. Hetta minkar um tørvin á veitingum frá útgerðarstøð í byggiskeiðinum.

Tá ið útbyggingarsskeiðið er av, fer verkætlanin upp í longri og støðufastari útvinningarskeið. Tað er í samsvari við virksemið í hesum skeiði, at varandi útgerðarstøð skal verða bygd.

Stórur munur er á støðum, sum eru fyribils - vanliga til at tæna nýggjum leitileiðum - og støðum, sum verða grundaðar við tí í hyggju at verða brúktar í útvinningarskeiði, sum varir upp í eitt nú 30 ár.

*Avrigging*

Tá fíggjarligt grundarlag ikki longur er fyri at framleiða olju og gass á eini leið, skal framleiðsluútbúnaðurin verða burturbeindur fullkomiliga ella fyri ein part. Hetta avriggingararbeiðið hevur eisini við sær virksemi á útgerðarstøðini.

Avriggingarskeiðið er stutt. Hevur útgerðarstøðin ikki annað virksemi at veita, verður støðin riggað av samstundis, sum oljuleiðin verður avriggað.

**Krøv til útgerðarstøð í leitiskeiði**

Í øllum skeiðunum verður talan um at goyma og avgreiða vørur til oljuvirksemi. Í hesum sambandi verður tørvur á ávísum myndugleikareftirliti við virkseminum á støðunum. Við at brúka møguleikarnar í tolllógini at stovna frígoymslur á útgerðarstøðunum verða vørur og útgerð til oljuvirksemið nógv skjótari handfarnar.

Verður rakt við olju, verða ymiskar verkætlanir í gongd um somu tíð í ymiskum skeiðum á føroyskum leiðum. Í verki kann t.d. útbygging tí vísa seg at gerast meira áhaldandi virksemi á føroyskum leiðum, enn um einstøku verkætlanirnar verða mettar hvør sær.

Niðanfyri verða eyguni sett á leitiskeiðið.

Krøvini, ið sett verða útgerðarstøð í leitiskeiði, kunnu víkja ógvuliga nógv frá krøvunum í útbyggingar- og útvinningarskeiðinum. Av hesum er útvinningarskeiðið nógv tað týdningarmesta. Mótsett tí, ið er galdandi fyri fast støðvirksemi, fer oljuídnaðurin í sambandi við leitivirksemi at lata sær lynda eitt nógv meira avmarkað tilboð av tøkum hentleikum, har kostnaður og veitingartrygd eru týdningarmestu miðini at meta seg eftir.

Tí verður ikki neyðugt í sambandi við leitivirksemi á føroyskum leiðum at royna at svara til hentleikarnar á føstu og vælgrundaðu útgerðarstøðunum í t.d. Aberdeen, Stavanger og Peterhead. Tað verður ikki neyðugt, fyrr enn rakt verður við olju og gass í rakstrarverdum nøgdum, og hesar leiðir verða útbygdar.

Meginparturin av neyðugum tilfari og øðrum veitingum, t.d. serligari boriútgerð, pumpum, smyrjievnum og eykalutum til boripallin, má verða innfluttur til tey støð, sum lata virkseminum veitingar, har tey verða goymd, til tey verða brúkt á boripøllunum.

Tung útgerð, sum samstundis krevur stór goymsluøki, er serliga bori- og fóðrirør.

Ikki er neyðugt at hava tilfar á goymslu til alt, sum henda kann; men tess meira víðfevnandi goymslan er, tess betur er tað hjá brúkaranum (oljufeløgunum).

Veitingar, sum eru beinleiðis atgongdar í Føroyum, fata um brennievni, vatn og vistaveitingar.

Boripallar hava vanliga avmarkað goymslurúm - serliga til bori- og fóðrirør, sum krevja stórt goymslupláss. Rørgoymslan á pallinum miðar vanliga eftir, at haldast kann fram við boring, tá ið veðurlíkindi forða veitingum frá útgerðarstøðum. Hetta tilfar skal tískil verða flutt javnan (vanliga eina ferð um vikuna) saman við vistaveitingum frá útgerðarstøðunum, og burturkast o.a., verður so flutt aftur í land.

Sum dømi um útgerðarstøðir til leitivirksemi kann verða nevnt, hvussu farið varð um støðvirksemið í sambandi við leitingar á Haltenbankanum og Tromsøflaket og í norska partinum í Barentshavinum. Til at veita pøllunum á hesum leiðum tænastu vórðu nakrar framskotnar útgerðarstøðir settar á stovn, ið ikki

vóru fult útgjørdar. Sum líkt dømi kann eisini verða nevnt, at í sambandi við at British Gas fór undir leitiboring í Ermasundi, varð nýggj útgerðarstøð grundað í nánd av Portland. Boringin skuldi vara í 40 dagar, og ætlanin var, at varð ikki borað í fleiri støðum, skuldi støðin kunna verða niðurløgd, tá ið arbeiðið var liðugt. Týðandi er tó at viðmerkja í tí sambandi, at av tí at so langt var til undirstøðukervið, var eingin verulig kapping frá støðum, ið longu vóru. Óivað hevði borið til at tænt leitivirksemi í føroyskum øki av støðum bæði í Skotlandi og Noregi.

Eftir at grundleggjandi ítøk krøv til at grunda eitt veitingarvirksemi eru lokin, íroknað at til ber at brúka útgerðarstøðina ógvuliga regluliga, fer annað virksemi at ávirka hugin hjá ídnaðinum at brúka støðina. Ein listi yvir slík virkisemi, har tey týdningarmestu verða nevnd fyrst, kann síggja soleiðis út:

1. Hvussu lætt slepst til høvuðsstøðina hjá fyristøðufelagnum.
2. Mekaniskir verkstaðir/mekaniskur ídnaður.
3. El-innleggjarar og elektronikkvirki.
4. Skipasmiðjur.
5. Kavarar.
6. Hvussu lætt slepst til floghavn.
7. Umstøður at gista og eta.
8. Hvussu lætt slepst til ferjuhavn og farmastøð.
9. Hvussu lætt slepst til viðkomandi myndugleikar.
10. Tøkningar og arbeiðsmegi við kunnleika til frálandsoljuvirksemi.
11. Verkfrøðingavirksemi og ráðgevar.
12. Postur og fjarskifti.
13. Sjúkrahús, læknar, tannlæknar osfr.
14. Vanligir handilsmøguleikar.
15. Umstøður at taka sær av løttum (ítróttarmøguleikar, vertshús osfr.).

Týdningarmesta tilfarið, sum skal vera tøkt til tess at gera eina leitiboring, er hetta:

- borirør
- fóðrirør
- akkerseindir
- útgerð at brúka niðri í boriholinum
- borimóra
- ymisk evni (kemikaliur)
- brennievni
- vatn
- vistaveitingar til pallmanning

Eitt týðandi virksemi í sambandi við útgerðarstøðina er flutningur av burturkasti. Umleið 20-50% av øllum tilfari, sum flutt verður út á leiðirnar, verður flutt aftur í land. Fyri stóran part av hesum burturkasti verða sett trygdar- og umhvørviskrøv um handfaringina. At alsamt meira verður hugt at ytra umhvørvinum og møguligum dálkingarvandum í sambandi við oljuvirksemi, sum er so víðfevnandi sum ein boripallur, hevur fingið londini rundan um okkum at seta krøv um

serliga mannagongd fyri handfaring av burturkasti. Við at lata útgerðarstøðina hava hesa tænastu um hendi, fara útvegarar, viðskiftafólk og fyristøðufeløgini at kunna fáa burturkastið frá hondini á nøktandi hátt, og myndugleikarnir kunnu hava eftirlit við teimum nøgdum, sum fluttar verða út og inn, hvar og hvussu burturkastið verður goymt, fyribeint osfr.

Hugsandi er, at fyri tey flestu, sum eru undirútvegarar til útgerðarstøðina, hevði tað verið fyrimunur at hava sett seg nærindis støðini ella á henni. Er støðvirksemið spjatt um oyggjarnar, og undirstøðukervið annars virkar væl, kann útboðið hjá støðini verða mett sum eitt stórt kervi av føroyskum virkiseindum og tænastuveitandi eindum.

**Hvussu veruleikakent er at vænta føroyska útgerðarstøð**

Sum grundstøði fara bæði myndugleikar og feløg at vilja hava, at trygdarútgerð er tøk so tætt við leitiøkið, sum tilber, t.e. í Føroyum. Trygdarútgerð umfatar eldsløkkiútgerð og upptaksútgerð í sambandi við oljuleka, eisini stóran part av rakstrartilfarinum sum t.d. einstøk rør, akkerseindir, eindir til oljurør, flot, útgerð at brúka niðri í boriholinum og bulktilfar. Myndugleikakrav um hetta fer soleiðis at gera tað neyðugt við goymslu til hetta tilfar í Føroyum. Langt er ikki haðan og til at hava eina framskotna útgerðarstøð í Føroyum.

***Strategiskar metingar***

Útgerðarvirksemið er eitt miðsavnað logistikkvirksemi, har so at siga allar vørur og tænastur til boripallar og frálandsútbúnað verða beindar ígjøgnum. Útgerðarstøðin kann verða mett sum brúgv ímillum útbjóðarar og eftirspurningin eftir vørum og tænastum í oljuídnaðinum. Møguleiki Føroya at tryggja sær, at til ber hjá føroyskum virkjum at fáa ein rímiligan part av tí, sum oljuídnaðurin keypir av vørum og tænastum, kann vaksa, við tað at føroysk áhugamál taka sær av logistikkvirkseminum hjá útgerðarstøðini.

***Kappingarstøða***

Viðvíkjandi ítøkum krøvum til útgerðarstøð kunnu fleiri havnaløg lúka hesi krøv uttan stórvegis íløgur.

Tær eyka íløgur, sum tørvur verður á, skulu føroysk havnarløg virka sum útgerðarstøðir, kunnu fata um m.a. skrivstovu og goymsluumstøður (goymsluhøll og goymslupláss úti), goymslutangar til borimóru (sum tænastufelag/útvegari setur upp) og lyftikraft.

Seinnu árini hevur rákið týðiliga verið tað, at oljufeløg hava arbeitt tætt saman um støðhentleikar og veitingarskip. Hetta hevur týðiliga spart flutnings- og støðkostnað. Ognarviðurskiftini hesum hentleikum viðvíkjandi eru eisini broytt. Fleiri oljufeløg hava sostatt boðið alt logistikkarbeiði út, sum fatar bæði um støð- og flutningsvirksemi. Hetta hevur givið gróðrarlíkindi til at grunda stór sjálvstøðug útgerðarvirki, sum m.a. eru í Skotlandi og Noregi.

Í grannalondum okkara er ov mikið av útgerðarstøðum og veitingartænastum. Tey feløg, sum reka hesar fyritøkur, fara eyðvitað at hava áhuga í at fáa brúkt part av hesi avlopsorku at tæna virksemi á føroyskum leiðum.

Oljufeløgini fara at royna at minka sum mest um útreiðslurnar í sambandi við leitivirksemi, eisini útreiðslur til flutning av tilfari og útgerð. Ein máti at avmarka flutningskostnaðin er at brúka ta útgerðarstøð, sum er næst leitivirkseminum.

Havast skal í huga, at hóast talið av ítøkiligum fyrispurningum økist eftir,

hvussu stórt oljuvirksemið er á leiðini, so verður tann einstaka útgerðarstøðin í kapping, har tættir, sum kunnu ávirka allan kostnaðin fyri logistikkvirksemið nógv, kunnu gera av hvør støð, ið brúkt verður. Sum dømi um hetta kann verða nevnt:

a) íløgur at grunda nóg umfatandi útgerðarstøð,
b) hvussu lætt slepst til tilfar og aðrar veitingar í nánd,
c) um møguleiki er fyri stórrakstrarfyrimunum,
d) um útgerðarstøðin verður rikin effektivt.

Tættirnir nevndir frammanfyri draga tann vegin at fáa feløgini at brúka støðir, sum longu virka, heldur enn at grunda nýggjar støðir tætt við nýggj leitiøki. Myndugleikakrøv og -avgerðir kunnu eisini hava avgerandi týdning fyri, hvør støð verður brúkt.

***Tørvur á myndugleikakravi um at brúka føroyska útgerðarstøð***

Búskapurin í eini útgerðarstøð er treytaður av, hvussu nógv virksemið er. Eru fleiri leitiverkætlanir í gongd í senn í økinum, fara stórrakstrarfyrimunirnir, sum standast av hesum, at lætta um raksturin hjá støðini. Hægri virksemisstig rættvísger eisini, at útgerðarstøðin hevur størri útboð av vørum á goymslu, sum ger støðina uppaftur meira áhugaverda hjá oljufeløgum at nýta. Men út frá metingum um leitivirksemið á føroyskum leiðum kann ikki við vissu væntast, at føroysk útgerðarstøð fer at bera seg fíggjarliga tey fyrstu árini.

Hugsast kann, at um myndugleikarnir ikki krevja, at leitivirksemið skal virka úr føroyskari havn, fara fyristøðufeløgini og teirra verktakarar - serstakliga á byrjanarstignum og í sambandi við leitingar á leiðum í nánd av miðlinjuni til Bretlands - heldur at vilja gera sítt arbeiði sum higartil út frá útgerðarstøðum í Noregi og Skotlandi. Men tá ið virksemið kemur upp á eitt ávíst stig, sum samstundis tykist vera støðugt, ella um virksemið er tætt við Føroyar, kann hugsast, at oljufeløgini heldur fara at vilja hava, at virksemið verður úr føroyskari havn.

Havandi í huga, at logistikkvirksemið tekur ein ógvuliga avmarkaðan part av øllum kostnaðinum í sambandi við leitiboringar, fer ein verkætlanardýrkan, sum stendst av, at føroysk útgerðarhavn verður brúkt, valla at verða mett sum avgerandi forðing hjá oljufeløgunum. Flestu oljufeløg skilja týdningin, ein útgerðarstøð hevur fyri føroyska samfelagið og signalvirðið í at brúka hana.

Samfelagsbúskaparliga kann tað verða óheppið, at íløgur verða gjørdar í fleiri útgerðarstøðir í Føroyum, um virksemið bara kann rættvísgera íløgur í eina støð. Út frá tí virksemi, ið væntandi verður í forkanningar- og leitiskeiðinum, fer tað ikki at loysa seg at gera íløgur í tvífalt útgerðarvirksemi í fyrstuni. Oljufeløgini kunnu tó fata tað sum ein váða ikki at hava aðrar møguleikar í at velja, tí talan verður um einkarætt í støðvirkseminum. Men so leingi einkarætturin bara er í sjálvum støðvirkseminum, meðan onnur kapping, t.d. um móruveiting, stendur opin fyri fleiri útvegarum, skuldi ikki verið stórvegis tørvur á tvífaldum virksemi fyri støðtænastu í Føroyum bert fyri at tryggja kapping. Skuldi tað víst seg, at einkarstøðan skuldi roynst óheppislig, fara myndugleikarnir at síggja almennan áhuga í at lata fyristøðufeløgini sleppa at brúka aðrar útgerðarstøðir, møguliga eisini í útlondum.

Í samrøðum við oljufeløg hava umboð fyri Oljuráðleggingarnevndina fingið varhugan av, at tað fellur feløgunum natúrligt at hava leitivirksemi úr føroyskari havn. Tá ið trygdar- og umhvørvisatlit eru tikin við, tykist tað tískil ikki at vera órímiligt krav, at virksemið við útgerðarstøð skal vera í Føroyum.

***Hvar skal støðin vera?***

Sum nevnt kann skikkað pláss verða funnið til útgerðarstøðir ymsa staðni í Føroyum. Kortini verður undir øllum umstøðum neyðugt at gera mun á leiti- og útvinningarskeiðunum. Í fyrstu skeiðunum er valla meining í at tosa um útgerðarstøð á ávísum staði.

Í leitiskeiðinum eiga hentleikarnir, sum eru, at verða brúktir sum mest. Støðvirksemið verður soleiðis spjatt út á tey øki, sum at byrja við kunnu veita ta tænastu, sum oljuvinnuni tørvar í leitiskeiðinum. Henda loysn fer at verða natúrligt framhald av tí hátti, veitingarvirksemið hevur brúkt í sambandi við tær forkanningar, sum hava verið í gongd síðan 1994.

Hvaðan í Føroyum, virksemið í einum útbyggingar- og útvinningarskeiði skal ganga, er ikki undir arbeiðssetningi nevndarinnar at taka støðu til, men spurningurin kann verða sæddur úr samfelagsliga sjónarhornum, t.d. um landsætlan ella um vinnuframa.

Niðanfyri verða nakrir møguleikar settir upp, hvussu myndugleikar kunnu taka støðu til spurningin um, hvar støðin skal vera.

Tann einfaldasti møguleikin er, at landsmyndugleikar eru nøgdir við at krevja, at virksemið er úr Føroyum, men at teir lata vera við at leggja seg útí, hvar støðin skal verða, soleiðis at brúkarin, t.e. oljufeløgini, kunnu gera tað av. Við at meta støðvirksemið sum eitt ávíst pláss, kann verða komið í ta støðu, at ymsu feløgini velja ymisk pláss. Royndir úr t.d. Skotlandi vísa kortini, at marknaðurin fer at tryggja, at sum frá líður, verður ein skilagóð javnvág ímillum útboð og eftirspurning. Men kortini er hugsandi, at oljufeløgini helst vilja sleppa undan at taka støðu til ein spurning, sum fleiri øki í Føroyum halda vera serstakliga týdningarmiklan fyri sínar vinnumøguleikar í einum oljuvirksemi.

Annar møguleiki er at lata landsmyndugleikarnar taka avgerð, sum myndugleikarnir til dømis gera í Noregi. Til tess at tryggja, at staðurin er skynsamur í sambandi við oljuvirksemi í Føroyum, kundu myndugleikarnir avrátt, at staðurin varð valdur út eftir raðfesting frá teimum, sum í seinasta enda eru brúkarar, t.e. oljufeløgunum. Av tí at eingin landsætlanarmyndugleiki er, kundi landsstýrið sett ein arbeiðsbólk, sum kann vera førur fyri at meta um teir ítøku karmarnar eins og samfelagslig atlit, sum eiga at verða tikin við, tá ið staðurin verður kosin. Arbeiðsbólkurin kundi verið settur saman við umboðum fyri oljumyndugleikarnar, landsverkfrøðingin, umhvørvis- og friðingarmyndugleikarnar og møguliga aðrar myndugleikaáhugaðar og vinnulívsumboð, sum kundu viðgjørt raðfestingarlistan frá oljumyndugleikunum og møguliga tikið endaliga avgerð um stað ella lagt grundaða raðfesting til endaliga avgerð á politiskum stigi.

**Samskipan**

Í sambandi við útgerðarstøðina hava oljufeløgini stóran áhuga í veitingarvissuni, og í at óheppin ávirkan frá eini møguligari einkarstøðu verður sum minst. Føroyska samfelagið hevur stóran áhuga í at logistikkvirksemið veruliga tekur sær av føroyskum vinnuáhugamálum.

Einstøku oljufeløgini kundu møguliga sjálvi stovnað útgerðarstøðir. Men sum

nevnt er vanligt nú á døgum, at óheft veitingarvirki reka støðirnar.

Fleiri av óheftu útgerðarfeløgunum hava meira enn 20 ára royndir í at tæna frálandsvirksemi í Norðsjónum. Hesi feløg hava gott orð á sær í oljuídnaðinum, og oljufeløgini hava álit á tænastuni frá hesum feløgum. Tí verður tað trupult hjá nýggjum feløgum at fáa fótin fastan á hesum marknaði undir fríum marknaðartreytum.

Ein hugsandi møguleiki fyri at fáa útgerðarstøð í lag í Føroyum er, at útlendsk feløg við royndum á økinum stovna feløg í Føroyum. Hóast føroysk veitingarstøð kanska ikki tykist serliga lønandi tíðliga í leitiskeiðinum, kann hugsast, at eitt myndugleikakrav um at brúka føroyska støð kundi drigið slíkar fyritøkur til Føroya við vón um langtíðarvinning.

Frá føroyskari síðu verður ynskt, at føroysk virki og arbeiðsmegi sum mest verða drigin upp í arbeiðið. Føroysk virki hava logistiskar royndir í mong ár við fiski- og handilsflotanum, og tí er væntandi, at eitt ella fleiri føroysk feløg sjálvi, ella um neyðugt við stuðuli frá ella í samstarvi við eina roynda fyritøku á hesum øki ella við serkønum útvegaðum haðan, fara at kunna átaka sær at reka eina útgerðarstøð.

Tá ið eitt ella fleiri havnarløg og møguliga goymslupláss verða gjørd tilbúgvin, er ein møguleiki, at tað verður havnareigarin, t.e. kommunan á staðnum ella landsmyndugleikarnir, ið fáa hesi viðurskifti í rættlag, áðrenn farið verður undir at byggja útgerðarstøðina. Slík loysn fer at hava við sær, at útgerðarfelagið ella oljufeløgini leiga øki og bygningar v.m.

Aðrir møguleikar eru, at annaðhvørt oljufeløgini ella útgerðarfelagið gera íløgur, sum kommunur og landstýrið góðkenna. Slík loysn fer at merkja, at tann, ið íløguna ger, sum aðalreglu verður bundin til at beina burtur virkið, tá ið arbeiðið er av.

**Veitingarskip og hjálpar- og vaktarskip**

Tilfarsflutningur til leitileiðirnar og aftur fer við væntaða virksemisstiginum fyrstu árini at kunna verða nøktað við *einum* veitingarskipi. Fólkaflutningurin er mest við tyrlu. Sí brot 4.1.4 um flutning loftvegis.

Nýtíðar veitingarskip er eitt ógvuliga serútgjørt far. Sum er, eru ikki før tøk í Føroyum, sum kunnu verða brúkt sum veitingarskip uttan so, at stórar íløgur verða gjørdar. Skal veitingarskipið eisini verða brúkt til akkershandfaring, skal farið vera um 3.000 tons til støddar. Tí má væntast, at eitt veitingarskip verður leigað/langtíðarleigað. Gongur virksemið úr føroyskari havn, fer tað at vaksa um møguleikarnar hjá føroyingum at arbeiða á veitingarskipinum. Manningin kann vera ymisk eftir skipastødd og arbeiði, men tørvur er í mesta lagi á 8 fólkum at manna eitt veitingarskip.

Hjálpar- og vaktarvirksemið (ella tilbúgvingarvirksemið) setur ikki somu serkrøv. Fleiri føroysk fiskiskip hava - við neyðugari umbygging - longu átikið sær at verði tilbúgvingarskip, fyrst og fremst á norskum leiðum. Tí skuldi borið til hjá føroyskum skipum at fingið tað arbeiði, sum fer at vísa seg, av hesum slag. Til hvønn pallin er vanliga knýtt eitt hjálpar- og vaktarskip við í mesta lagi 8 fólkum.

**Niðurstøða og tilmæli**

Krøv viðvíkjandi skili og trygd tala fyri, at oljufeløgini mugu fáa sínar veitingar úr Føroyum.

Gongur oljuvirksemið úr føroyskum havnum, fer tað væntandi at geva muna-

góðan hjáágóða í føroyska samfelagnum, tí føroysk virki fáa møguleika at lata vørur og veita tænastur, og føroyingar fáa arbeiðsmøguleikar á veitingar- og tilbúgvingarskipum ella á boripøllum, sum teir annars ikki høvdu havt. Arbeiðsmøguleikarnir hjá føroyingum høvdu gjørst upp aftur betri, um manningarskifti hevði verið umvegis føroyska floghavn, smbr. brot 4.1.4 um flutning loftvegis.

Grundað á hetta fer nevndin at mæla til, at fyristøðufeløg á føroyskum leiðum verða bundin til at lata virksemið ganga úr føroyskari havn, tí at væntandi verður tilbúgvingarútgerð útvegað saman við útgerðarvirksemi.

Í leitiskeiðinum eigur at verða roynt at brúka útbúna, sum longu er tøkur, t.e. at virksemið kann vera úr fleiri havnum. Ikki fyrr enn í einum møguligum útbyggingar- og útvinningarskeiði fer málið um varandi stað at taka seg upp.

Hvussu stóran lut føroyingar eiga at hava, er treytað av tiltøkum frá føroyska vinnulívinum sjálvum, men hjálpt kann verða á leið, við at myndugleikarnir gera vart við, hvat teir kundu hugsað sær. Vilja myndugleikarnir í útbyggingarskeiðinum seinni vera við til at avgera, hvar støðin skal vera, kunnu teir í hesum sambandi eisini seta krøv um, at føroyingar eisini vera við til at reka støðina.

# 4. PARTUR: OLJAN OG FØROYSKI BÚSKAPURIN

Hvussu eitt møguligt oljuvirksemi tekur seg upp í Føroyum, og hvørja ávirkan tað fær á føroyskan búskap, veldst nógv um sínámillum ávirkan millum føroyska samfelagið og altjóða oljuídnaðin.

Tað eru vónirnar um nøktandi fíggjarliga úrtøku, ið eggja oljufeløgunum til at leita eftir og útvinna kolvetni úr føroysku undirgrundini. Somuleiðis eru tað útlitini til samfelagsbúskaparligar fyrimunir, ið fáa samfelagið at skapa karmar um loyvi til slíka leiting. Kolvetnisvirksemið hevur soleiðis sum fortreyt eina vón um búskaparligar fyrimunir fyri báðar partar, bæði oljuídnaðin og samfelagið.

Altjóða oljufeløgini hava yvirhøvur tað mál, at tað, tey fáast við, kastar nóg mikið av sær. Hesum máli røkka tey m.a. við at røkja ella vaksa um tær jarðgoymslur, tey hava. Fleirliðað feløg, ið hava egin reinsivirki (raffineringsvirki) og egið sølulið, vilja tryggja hesum liðum ráolju.

Áhugin hjá feløgunum at leita fevnir um allan heim. Nógv oljuøki um allan knøttin kappast um áhugan hjá feløgunum. Serstakur áhugi fyri føroysku undirgrundini kann vera liður í ætlaðari spjaðing av váðanum millum fleiri lond. Føroyar liggja í einum politiskt sæð friðarligum parti av heiminum tætt við vesturevropeisku og norðuramerikansku marknaðirnar og verða tí mettar áhugaverdar. Fyrimunir Føroya í so máta viga feløgini upp ímóti munum í leitivánum og rammutreytum, sum samfelagið leggur á, samanborið við onnur oljuøki.

Fyri samfelagið kann grundin at loyva kolvetnisvirksemi alment sigast at vera vónin um at fáa teir øktu valmøguleikarnar, sum knýttir eru at hægri inntøku.

Roynt verður at virka fram ímóti ávísum samfelagsbúskaparligum málum, t.d. at vaksa um arbeiðsmøguleikar, inntøkumøguleikar, privatar og almennar tænastur, bøta um trygd og verju ímóti fíggjarligum bakkøstum og at bøta um samfelagsins búskaparligu framtíðarmøguleikar við uppsparing og íløgum. Øll hesi búskaparligu mál kunnu ikki til fulnar verða rokkin samstundis. Verður

meira ætlað til ávíst øki, verður ein at sættast við minni aðrastaðnis. Fíggjarligar nettofyrimunir noyðist samfelagið at viga upp ímóti møguligum ringum avleiðingum av ikki-fíggjarligum slagi.

Er kolvetni til, kunnu munagóðir fyrimunir verða við kolvetnisvirksemi, bæði fyri oljuídnaðin og samfelagið. Har verður ein fongur at býta. Bæði feløg og samfelag verða hvør í sínum lagi at raðfesta, hvørjar partar av honum tey leggja høvuðsdentin á.

Í samspælinum millum oljufeløgini og føroyska samfelagið fara partarnir ikki bara sum nevnt at hava ynskir og krøv. Hvør partur fer eisini at bjóða eitthvørt. Feløgini kunnu bjóða fíggjarstyrki og yrkisligan kunnleika í sambandi við leiting, útvinning og framhaldandi kolvetnisviðgerð. Íkastið hjá føroyska samfelagnum verður fyrst og fremst at lata upp fyri leiti- og útvinningarmøguleikum, t.e. rætt til eftir neyvari avtalaðum treytum at ráða yvir serstøkum pørtum av tí møguliga kolvetnistilfeinginum. Føroyar kunna eisini lata arbeiðsmegi og serkunnleika á nógvum økjum - veitingar, flutningur og aðrar tænastur.

Báðir partar fara at krevja sum mest fyri tað, teir lata. Um partarnir ikki nóg væl vilja varða um áhugamálini hvør hjá øðrum, kann menningin verða av ongum við tí avleiðing, at partarnir missa møguligar fyrimunir.

Samfelagsbúskaparligu fyrimunirnir fyri Føroyar í sambandi við oljuvinnu, ið kann taka seg upp í Føroyum, vórðu viðgjørdir í kapittul 10 í 1993-frágreiðingini: *Hvussu kann ein møgulig oljuvinna hugsast at fara at ávirka føroyska samfelagsbúskapin?* Víst verður til tað, sum har stendur.

Fyrimunirnir verða fyrst og fremst vinnu- og arbeiðsmøguleikar og skatta-inntøka. Skattamálini vórðu viðgjørd í kapittul 7 í 1993-frágreiðingini: *Skattir og avgjøld.* Víst verður til hetta.

Vinnu- og arbeiðsmøguleikarnir fara lutvíst at verða í sjálvum oljuvirksemi-num og tænastuveitingum, sum eru knýttar at tí, og lutvíst sum eitt úrslit av teimum óbeinleiðis inntøkuávirkanum, sum oljuvirksemið fer at hava við sær, t.d. tá ið inntøka fingin í oljuvinnuni verður brúkt, ella um tað almenna brúkar oljuskattainntøkurnar.

Í hesum partinum verða vinnuligu, arbeiðsligu og búskaparligu hugsanirnar lýstar. Í kapittul 4.1 verður greitt frá vinnu- og arbeiðsmøguleikunum, og í kapittul 4.2 verður serstaki spurningurin um eitt oljufelag tikin upp. Kapittul 4.3 lýsir hugsanirnar um, hvussu kolvetni kann verða flutt til lands. Í kapittul 4.4 verður greitt frá útbúgvingar- og upplæringarmøguleikum, sum miða ímóti og kunnu verða í sjálvari oljuvinnuni, og í kapittul 4.5 verða skattamøguleikarnir viðgjørdir. Endaliga verður í kapittul 4.6 greitt frá samfelagsbúskaparligu avleiðingunum.

## 4.1 VINNUMØGULEIKAR Í SAMBANDI VIÐ OLJUVIRKSEMI

Vinnumøguleikarnir vórðu, sum nevnt í innganginum til kapitlið, viðgjørdir í kapittul 10 í 1993-frágreiðingini, sum víst verður til. Her varð m.a. víst á, at stórvegis vinnumøguleikar valla fóru at verða í sambandi við forkanningar-skeiðið; í leitiskeiðinum fara ávísir, men væntandi bara smávegis, møguleikar at vísa seg, men útbyggingar- og útvinningarskeiðið kundi farið at havt ógvisliga ávirkan, sum kanska krevur avmarkandi tiltøk frá myndugleikunum. Harumframt

varð víst á, at tað fór at verða eitt politiskt val, hvørt, og um so er, hvussu nógv føroyskt vinnulív - og sostatt samfelagslív - átti at verði við í oljuídnaðarligari menning.

Tá ið løgtingið í tingsetuni 1993/94 viðgjørdi løgtingsmálið um forkanningarlógina o.a.[9], legði avvarðandi løgtingsnevnd áherðslu á, at roynt átti at verða at tryggja sær, at oljuvinna, ið kundi taka seg upp, fór at geva føroyingum arbeiði og føroyskum vinnulívi møguleikar. Tað sama varð greitt undir løgtingsorðaskiftinum. Spurningurin varð eisini týðiliga og greitt nevndur í tí samtykt um olju- og gassleitingar í føroyskum øki, sum løgtingið gjørdi tann 24. september 1993 (løgtingssamtyktin er endurgivin sum fylgiskjal 1.1-1 í parti 1, Samandráttur og tilmæli).

Hesar hugsanir búðu eisini undir landsstýrisavgerðini um, at nýtilnevnda Oljuráðleggingarnevndin fekk størri vinnuligan yrkiskunnleika, m.a. tveir limir eftir tilmæli frá vinnufeløgunum, eins og hesi sjónarmið vórðu flættað inn í arbeiðssetningin hjá nevndini, smbr. broti 1.1.1.

Niðanfyri verður høvuðsdentur lagdur á spurningin um føroyskar vinnu- og arbeiðsmøguleikar í leitiskeiðnum, men tá ið tað er viðkomandi, verða eisini atlit gjørd at einum útbyggingar- og útvinningarskeiði.

## 4.1.1 Eftirspurningur frá oljuídnaðinum

At oljuídnaðurin fer at spyrja eftir vørum og tænastum kann skapa grundarlag undir nýggjum arbeiðsplássum og nýggjum veitingarmøguleikum hjá vinnuvirkjunum. Hesir møguleikar eru ymiskir í hvørjum av teimum fýra skeiðunum í eini oljuverkætlan. Ávirkanin frá teimum báðum fyrstu skeiðunum - forkanningarskeiðinum og leiti- og metingarskeiðinum - er vanliga avmarkað, men seinnu útbyggingar- og útvinningarskeiðini kunnu verða grundarlag undir munadyggum strategiskum vinnumøguleikum.

Í løtuni er torført at meta um, hvussu stórt leitivirksemið verður beint eftir eitt loyvisumfar. Tað veldst sjálvsagt um, hvussu mong feløg søkja um og fáa loyvi og um loyvishavans arbeiðshátt.

Á nýggjum leiðum, sum teimum føroysku, kann væntast, at loyvishavar fara at brúka tíð at savna og greina 3D-seismikk, áðrenn farið verður undir boringar. Hildið verður, at ógvuliga fáir boripallar eru, kanska færri enn 10 í øllum heiminum, ið kunnu arbeiða undir teimum umstøðum, ið eru á teimum leiðum undir Føroyum, sum higartil hava verið hildnar at vera tær áhugaverdastu í oljusamanhangi. Her verður hugsað um dýpd, streym og veður. Útboðið av boripøllum kann sostatt fara at verða ein meinur trongi.

Tá ið oljufeløg fáa loyvi at leita á ávísari leið, spjaða tey vanliga váðan og kostnaðin við at skipa samtøk. Í hesum samtøkum kunnu feløgini brúka royndirnar hvør hjá øðrum og á tann hátt bøta um møguleikarnar fyri, at tiltakið fer at eydnast.

Í einum samtaki verður fyristøðufelag valt. Hetta er tað felag (vanliga felagið, sum eigur størsta lutin í bólkinum), sum stendur fyri virkseminum hjá samtakinum. Virksemið verður lagt til rættis og avtalað á fundum í einari fyristøðunevnd (Joint Operating Committee), har hvør partur hevur atkvøðurætt eftir sínum luti.

---

9 Sí Løgtingstíðindi, løgtingsmál nr. 4 og 5 frá 1993 (síða 75 - 83).

Arbeiðslagið hjá oljufeløgunum er broytt seinnu árini, so feløgini royna at leggja sum mest av virksemi í hendurnar á verktakum uttanfyri felagið. Henda "outsourcing" ger at oljufeløgini fáa savnað seg um leitingina, sum tey meta sum kjarnan í sínum virksemi. Eftirspurningurin hjá fyristøðufelagnum í sambandi við leitiboringar verður sostatt býttur sundur í fleiri stórar og smáar undirverktøkur, sum víst á mynd 4.1-1. Hvussu stórur partur, ið verður útboðin, hvussu mangir verktakar, ið verða brúktir, og hvussu stór ábyrgd verður latin tí einstaka verktakanum, er ymiskt frá einum felagi til annað.

**Mynd 4.1-1 Samskipan í sambandi við boring**




Niðanfyri verður mett um eftirspurningin í sambandi við einstaka leitiboring. Tað verður ikki mett um, hvussu nógvar boringar kunnu væntast, men ein fatan fæst av, hvat slag av virksemi verður í sambandi við eina slíka boring.

**Virksemi í sambandi við leitiboring**

Leysliga mett kann væntast, at ein "vanlig" boring við Føroyar tilsamans varar í einar 10-12 vikur. Hendan meting byggir á, at ein miðalboring á føroyskari loyvisleið skal verða borað niður á 4.000 m, og á at miðal boriferðin verður tann sama, sum tá ið borað verður í Hetlandsrennuni (Bretland), Noregi (Haltenbank) og í Norðsjónum (Brent-leiðin). Lagt er upp fyri tarnandi umstøðum, so sum tjúkkum basaltfláum, óvanliga hørðum streymi og djúpum sjógvi á føroyskum leiðum, tá framætlað er frá hinum leiðunum til føroysku leiðirnar.

Vanliga verður talið av boringum ætlað eftir tí, at 2 boringar eru tað allar-minsta til tess at kunna meta eftirfarandi um møguleikarnar í einum loyvisøki.

Allur kostnaðurin til eina leitiboring á føroyskari leið kann verða settur til umleið 30.000 kr./m. Eftir hesum at døma, kann allur miðalkostnaður fyri eina boring verða mettur til umleið 120 mió. kr. Niðanfyri verður gjølligari greitt frá eftirspurninginum hjá oljufeløgunum í sambandi við leitiboringar.

***Boripallur***

Kostnaðurin fyri ein boripall er vanliga uml. helvtin av kostnaðinum fyri eina leitiboring. Miðal pallkostnaður er her fingin frá oljufeløgum við grundarlagi í borivirksemi í Norðsjónum og líkum økjum. Sambært upplýsingunum liggur dagsgjaldið fyri boripall millum 100-150.000 USD (600-900.000 kr./samdøgur). Sum heild verður sagt frá, at dagsgjaldið fyri boripallar hækkar í løtuni, tí at leiti-virksemið er vorðið nógv størri.

Væntandi verður tørvur á uml. 80 fólkum til at manna ein boripall at gera eina leitiboring. Tey arbeiða í 2 vaktum, 40 fólk í hvørjari. Hvør pallur hevur tvær manningar, ið skiftast um at vera úti á pallinum. Samanlagt verða 160 fólk knýtt at pallinum. Arbeitt verður í 2 ella 3 viku skiftum, t.e. 2-3 vikur á pallinum og 2-3 vikur frí. Nakað av manningaflutningi verður tí millum pall og land, og hann verður í høvuðsheitum við tyrlu. Tá ið stórur partur av manninginí væntandi verður útlendingar, verður harumframt tørvur á flutningi til Føroya og úr

Føroyum og á plássi at liggja nátt í landi. Flutningur loftvegis verður gjølligari umrøddur í broti 4.1.4.

Vanliga leigar fyristøðufelagið ein boripall við manning frá einum tænastufelagi. Fyristøðufelagið mannar sostatt bara nøkur fá størv á boripallinum, t.d. boristjóran og nakrar fáar jarðfrøðingar. Manningin annars fylgir við boripallinum.

Fyri tað slagið av boripøllum, sum eru førir fyri at arbeiða á teimum djúparu leiðunum við Føroyar, verður pallkostnaðurin væntandi 60% av øllum kostnaðinum ella uml. 75 mió. kr. fyri eina einstaka boring.

***Veitingarskip***

Av tí at goymsluplássið á boripalli er avmarkað, er neyðugt at hava regluligar veitingar til pallin. Hesin flutningurin er við veitingarskipum, sum vanliga eru sersmíðað skip. Veitingarskipið flytir veitingar frá eini útgerðarstøð til pallin eftir tørvi, men vanliga eina ferð um vikuna. Eitt veitingarskip kann sostatt, alt eftir hvussu langt er ímillum støð og pall, tæna fleiri pøllum. Eitt annað týdningarmikið arbeiði, sum veitingarskip kann taka sær av, er akkershandfaring. Veitingarskip, sum umframt veitingartænastuna eisini verður brúkt til akkershandfaring, skal hava ávísa støðd og serútgerð. Virksemið á útgerðarstøð og vøruflutningurin verða gjølligari lýst í broti 4.1.3.

Ógvuliga ymiskt er, hvat sagt verður, at veitingarskip kostar. Lægstu útrokningarnar vísa eitt daggjald, sum er um 30.000 kr. T/C ("Time Charter", sum merkir, at oman á hetta verður lagt brenniolja og havnagjøld). Marknaðurin fyri veitingarskip hevur verið lágur, men størri virksemi hevur hækkað daggjaldið nógv. Veitingarskip, ið eru oman fyri 3.000 tons, og sum kunnu taka sær av akkershandfaring, krevja stundum 100.000 kr. T/C í daggjaldi. Grundað á tað, ið nevnt er frammanfyri, og um so er, at veitingarskipið bara verður knýtt at einari leitiboring í senn, er kostnaðurin mettur at tátta upp ímóti 9 mió. kr. fyri hvørja boring.

***Hjálpar- og vaktarskip***

Umframt veitingarskip verða hjálpar- og vaktarskip - tilbúgvingarskip - brúkt í sambandi við leitiboringar. Hesi skip taka sær av trygdaruppgávum, og tey skulu alsamt vera dygst hjá boripallinum at verja útbúnaðin ella sum liður í bjargingarætlan, um stórskaði skuldi borist á.

Kostnaðurin er grundaður á daggjøld, sum eru ógvuliga ymisk, alt eftir skipaslagi, aldri, flaggi, manning, leiðum o.ø. Eisini kann verða talan um ymisk arbeiði, sum skip í hesum flokki verða leigað til og eru útgjørd til at røkja. Daggjøld kunnu sostatt eftir arbeiðssetningi liggja ímillum 15-25.000 kr. til uml. 40-50.000 kr. Verður bygt á hetta, verða allar útreiðslurnar til tilbúgvingarskip 3,5 mió. kr./boring.

***Tilfar***

Tilfar fatar um alla ta útgerð, sum brúkt verður í sambandi við beinleiðis borivirksemi. Í miðal verða hesar útgerðarnøgdir brúktar hvønn dag:

| | |
|---|---|
| vatn | 30,3 tons |
| kemisk evni | 25,3 tons |
| bori- og fóðrirør | 16,1 tons |
| pall-brennievni | 15,0 tons |
| baritt | 12,2 tons |
| sement | 4,6 tons |
| útgerð | 3,5 tons |
| annað | 22,0 tons |
| við øllum | 129,0 tons |

Tilfarskostnaður verður mettur til 12-15 mió. kr. ella uml. 12% av øllum boriútreiðslunum.

Harumframt eru tænastur á veitingarstaðnum, sum fata um goymsluhald og tilfarshandfaring, sum kann kosta uml. 30.000 kr. hvønn dag ella 2,5 mió. kr. fyri hvørja boring. Víst verður annars til brot 4.1.3, sum er um stovnseting og vøruflutning.

***Aðrar tænastuveitingar***

Av øðrum tænastuveitingum og undirveitingum kunnu verða nevndar støðufesting, kósseting (directional surveys), "at fiska upp" mista útgerð, kavingar, samskifti, vistaveiting, mórumátingar (“mud-logging”) og ravmagnsmátingar umframt aðrar sertænastur. Miðalkostnaður verður roknaður at vera uml. 12% av øllum borikostnaðinum ella uml. 15 mió. kr.

Rakstur og fyribyrgjandi røkt av útgerð er stórt og regluligt virksemi í oljuídnaðinum. Eisini tá ið óhapp berst á, sum hevur við sær, at útgerð skal verða umvæld og skift, sleppa tænastuvirki framat. Einstakar uppgávur verða loystar í landi, t.d. tá ið útgerð verður kannað ella stillað. Virkini, sum kunnu koma uppí slíkar uppgávur, eru mekaniskir verkstaðir, elektrikarar og skipasmiðjur.

***Royndir úr Noregi***

Nakað av skrivligum norskum tilfari er tøkt um royndir at lýsa búskaparliga árinið, leitivirksemi hevur á samfelagið. Í hesum sambandi kunnu nøkur høvuðsevni verða tikin úr tveimum frágreiðingum.

Í aðrari frágreiðingini frá Agderforskning/Asplan Viak Sør A/S "Da oljen kom til Sørlandet: Socio-økonomiske konsekvenser av petroleumsvirksomhed i Skagerak" verður m.a. búskaparliga árinið, sum leitivirksemi hevur á økið, viðgjørt. Drigið verður fram, at leitiskeiðið hevur tvey heilt serkend eyðkenni:

1) virksemið er bara fyribils,
2) virksemið er ógvuliga avmarkað.

Í frágreiðingini verður komið til ta niðurstøðu, at virksemið á landi undir ongum umstøðum verður serliga nógv. Tað eyðkennir júst leitivirksemið, at stór óvissa er, um peningurin, sum er lagdur í, nakrantíð fer at hava inntøkur við sær.

Fyristøðufeløgini fara tí, har ið til ber, at minka um kostnaðin. Hetta hevur m.a. við sær, at tey helst vilja brúka verandi undirstøðukervi. Á henda hátt kann sleppast undan upplæringarkostnaði, venjingartíð o.ø., og nýggjar íløgur í undirstøðukervi verða avmarkaðar.

Í aðrari frágreiðing "Ringvirkninger for Nordnorsk økonomi av petroleumsvirksomheten på midt-norsk sokkel" (Norut Samfunnsforskning 1993) verður greinað, hvussu stóra ávirkan leitivirksemi út fyri Miðnoregi hevur á búskapin í Norðurnoregi. Niðurstøðan í frágreiðingini er, at búskaparligu ávirkanirnar frá leitivirksemi eru rættiliga smáar. Frágreiðingin byggir á leitivirksemi út fyri Miðnoregi 1991.

**Keypsskipanin hjá oljufeløgunum**

Ógvisliga oljuprísfallið í 1986 hevur fingið oljufeløgini at ansa nógv betur eftir kostnaðinum enn áður. Samstundis hevur vinnan lagt fastar mannagongdir fyri keypi/útbjóðing. Virki, ið ætla sær at veita oljuvinnuni eitthvørt, eiga at geva hesum gætur.

Tá ið fyristøðufelagið skal seta í verk leiting, nýtir felagið bæði egna orku og uttanfelags verktakarar. Uttanfelags verktakarar verða vanliga nýttir at savna seismikk og at bora hol. Hetta merkir (t.d. í sambandi við borivirksemi), at fyristøðufelagið setur seg í samband við eitt borifelag. Hetta felag skipar fyri boring og útvegar meginpartin av teimum yrkislærdu fólkunum, sum neyðug eru til tess at fremja eina boring, og ger so boringina í tøttum samstarvi við jarðfrøðingar og tey, ið taka avgerðir hjá fyristøðufelagnum. Avgerðir viðvíkjandi hjálpar- og vaktarskipum, veitingarskipum, útgerð, samskifti, støðufesting o.ø. tekur fyristøðufelagið vanliga sjálvt.

Til 1986 bóru oljuleiting og -útvinna dám av støðugum vøkstri og stórum inntøkum. Í ídnaðinum varð lítið spart, og eldhugin tóktist markleysur.

Í 1986 fall oljuprísurin brádliga úr meira enn 30 USD fyri fatið niður í uml. 12 USD fyri fatið. Oljuídnaðurin, sum fekk sínar inntøkur skerdar við 2/3, fór ígjøgnum eina kreppu, sum hevði við sær, at fólk í hópatali vórðu søgd úr starvi, feløg vórðu løgd saman, og allur bygnaðurin og allur hugburðurin í ídnaðinum broyttist grundleggjandi.

Bjartskygni hevur nú tikið seg upp aftur í oljuídnaðinum, sum kortini hevur varðveitt kostnaðartilvitskuna. Ein og hvør kostnaður verður settur í samband við vónirnar um at kunna vinna pening, sum frá líður. Mong nýggj oljulond hava latið upp fyri altjóða oljufeløgum. Kostnaðurin av eini oljuverkætlan á føroyskum øki verður borin saman við aðrar møguligar íløgur og vandaliga greinaður, áðrenn avgerð verður tikin. Flestu lond, sum hava latið upp fyri oljuleiting, ansa eftir at áseta treytir, sum gera tað áhugavert hjá oljuídnaðinum at virka á teirra øki.

**Oljufelaganna góðskukrøv o.a.**

Bæði í Bretlandi, Noregi og Danmark hava fyristøðufeløg tikið stig til at seta í verk forkvalifikatiónsskipanir. Ætlanin við skipanini er, at gjørligt skal verða hjá fyristøðufeløgum at fáa sær skikkaðar útvegarar, sum so verða eggjaðir at bjóða upp á ávíst arbeiði. Skipanirnar fata um forkvalifisering, t.e. at nøkur saklig minstukrøv verða sett til tess at verða skrásettur. Hesi krøv endurspegla tey serligu krøv, sum oljuídnaðurin setur.

Til tess at vera skikkaður sum útvegari eftir donsku/norsku skipanini, skulu krøv verða lokin á hesum økjum:

5) Góðskukervi
6) Heilsa, umhvørvi og trygd
7) Handilslig/fíggjarlig krøv
8) At svara spurnartalvu á diskli

*Ad. 1, krøv til góðskukervi:* Útvegararnir skulu kunna skjalprógva, at teir hava sett í verk góðskukervi, sum lýkur krøvini í ISO 9000 raðnum ella tílíkum, ella at slík skipan er í gerð. Fyri staka vøru/tænastuveiting kann verða vikið frá kravinum. Um so er, verður tað viðmerkt í útboðslistanum.

ISO 9000 raðið fatar um 3 kravbólkar til góðskukervi - ISO 9001, ISO 9002 og ISO 9003:

ISO 9001 fatar um krøv viðvíkjandi vørumenning, konstruktión, framleiðslu, uppseting og tænastu. ISO 9001 er tann víðfevndasti standardurin og vendir sær til virki, sum í sambandi við vøru- ella tænastuveitingar sjálv standa fyri vørumenningar- og konstruktiónsarbeiði.

ISO 9002 fatar bara um krøv í sambandi við framleiðslu, uppseting og tænastu, men er annars tað sama sum ISO 9001. Tað verður mest brúkt á virkjum, sum fyrst og fremst veita standardvøru ella -tænastu, t.e. vørur uttan stórvegis krøv til vørumenningar- ella konstruktiónsførleika í sambandi við hvørja einstaka bílegging, men at vørurnar/tænasturnar eru gjørdar framman undan sølu/tilboði við hópframleiðslu í hyggju.

ISO 9003 fevnir um krøv til liðugtvørueftirlit og -royndir. Krøvini í hesum standardi eru munandi slakari enn ISO 9001 og ISO 9002, og standardin brúka einamest virki, sum veita einfaldar vørur, har góðskan á lidnu vøruni er lutfalsliga løtt at staðfesta. Tað eru fyrst og fremst smá virki, sum brúka ISO 9003-skipanina, og í Danmark t.d. eru virkini við góðkendum góðskukervi eftir ISO 9003 standardi ógvuliga fá sammett við tey, ið brúka hinar báðar.

*Ad. 2, krøv til heilsu, umhvørvi og trygd:* Stjórin í fyritøkuni skal skrivliga vátta, at virkið hevur ella er farið undir at gera eina formliga, skjalfesta stýringarskipan við atliti at heilsu, umhvørvi og trygd. Henda skipan skal í minsta lagi tryggja, at myndugleikakrøvini verða lokin.

Í ISO 9000 standardinum verður kravt, at øll myndugleikakrøv verða lokin, og skipanin við at gera eina skjalfesta stýriskipan er tann sama fyri góðsku sum fyri heilsu, umhvørvi og trygd.

*Ad. 3, handilslig/fíggjarlig krøv:* Forkvalifikatiónsskipanin krevur eina fráboðan frá góðkendum grannskoðara, har hetta verður váttað:

- at útvegarin er skrásettur í almennari virkisskrá,
- at virkið er mvg-skrásett, um tað krevst,
- at útvegarin ikki skyldar skatt og løn,
- at útvegarin ikki er í ferð við at átaka sær stóra skuld ella er undir almennari umsiting.

*Ad. 4, at svara spurnartalvu á diskli*: Spurnartalvan verður fylt út við øllum vørum og tænastuveitingum, sum útvegarin kann bjóða. Til hesa skráseting er

gjørdur serstakur navnalisti.

***Kostnaðarskerjing í sambandi við standardisering***

Í 90-unum hevur kostnaðarskerjing verið felagsnevnari hjá øllum oljufeløgum. Í royndunum at hava kostnaðin so lágan sum tilber, hevur nógv arbeiði verið gjørt at standardisera allar lutir og eindir, sum nýtt verða í oljvinnuni. Standardiseringin er ikki enn so umfatandi sum í mongum øðrum vinnum, men hetta arbeiðið er støðugt í gongd og fer væntandi at verða týðandi kappingartáttur.

Forkvalifikatión og standardisering eru ítøkilig tiltøk, sum eru sett í gongd til tess at skerja verkætlanarkostnaðin.

## 4.1.2 Føroysk veitingarútboð

Eftir at hava hugt at eftirspurninginum fara vit niðanfyri at hefta okkum við útboðssíðuna, bæði viðvíkjandi føroyskari arbeiðsmegi og hvørjar veitingar føroysk virki kunnu bjóða oljuídnaðinum. At enda verður hugt at, hvussu føroysk virki, sum hava í hyggju at fara upp í oljuvinnuna, kunnu laga seg eftir serstøku krøvunum í oljuídnaðinum.

Lýsingin er avmarkað til forkanningarskeiðið, t.e. skeiðið sum oljuvirksemið og føroyska vinnulívið í løtuni er í, við útliti til leitiskeið har vinnulívið skal víðka sínar royndir til at veita til nýggja vinnugrein.

**Tøk føroysk arbeiðsmegi**

Samfelagskreppan í 90-unum hevði við sær ógvisligar broytingar á føroyska arbeiðsmarknaðinum. Kreppan hevur havt stórt arbeiðsloysi við sær, men í hesum torføru tíðum hevur føroysk arbeiðsmegi samstundis víst síni evni at draga undan og laga seg bæði sum smidlig og flytfør arbeiðsmegi.

Arbeiðsloysið var sum mest í januar 1994 við skrásettum arbeiðsloysi uppá 22%, sum svaraði til sløk 4.800 fulltíðarstørv. Flytingin úr Føroyum hevur doyvt hesa gongd nakað við tað, at nógv vinnufør fólk hava søkt sær starv uttanlands, eina mest í Danmark. Samstundis eru lutfalsliga færri ung fólk komin aftur til Føroya eftir at hava nomið sær útbúgving í útlondum. Nettofráflytingin í 1993 og 1994 var so ógvislig, at hon hesi bæði árini svaraði til 8% av øllum fólkinum.

Yvirhøvur hevur eydnast fólki væl at fáa arbeiði í útlondum, bæði vanligt lønt arbeiði, føst størv, kjans við skipum undir fremmandum flaggi og sum sjálvstøðug vinnurekandi, t.d. í byggivinnuni í Týsklandi. Á føroyska arbeiðsmarknaðinum eru ikki trong yrkismørk sum t.d. í Danmark, og hetta hevur gjørt sítt til, at føroysk arbeiðsmegi hevur havt rættiliga lætt við at finna arbeiði og laga seg eftir umstøðunum.

Mong teirra, ið hava verið í útlondum kreppuárini, munnu ætla sær at koma aftur, um arbeiðsmøguleikarnir fara at batna. Hildið verður kortini, at fólkini, ið koma aftur, fara at verða tald í øvugtum lutfalli við tíðina, t.e. tess longri, ið líður, til betri arbeiðsmøguleikar taka seg upp, tess færri koma aftur, so hvørt sum tey grógva fastari har, tey eru flutt.

Sum nevnt frammanfyri er føroyska arbeiðsmegin ógvuliga flytilig, og tí er torført at geva rætta mynd av, hvussu stór tøka arbeiðsmegin er, av tí at hon fer at verða ymisk, alt eftir arbeiðsmøguleikunum.

Seinast í 1996 var føroyska arbeiðsmegin hildin at vera 20.300 fólk, tey arbeiðstøku vóru gjørd upp til 2.100, sum svarar til uml. 10%.

Hagtøl eru ikki, sum lýsa, hvønn førleika arbeiðsmegin hevur, og orsakað av strongu skrásetingarlóggávuni í Føroyum ber ikki til útvega slík hagtøl.

Útbúgvingarstøðið samsvarar við tað í Norðurlondum annars. Tó hava vit lutfalsliga fleiri sjómansútbúgvingar, sum verður hildið at koma serstakliga væl við í sambandi við oljuvinnuna.

Alment fara fólk við hægri útbúgving at hava tørv á yvirbygningsskeiðum til tess at nema sær førleika til oljuvinnuna. Tey kunnu vera t.d. serlig oljuløgfrøðilig og oljubúskaparlig skeið ella skeið um oljujarðfrøði fyri verkfrøðingar.

Fólk úr sjóvinnu- og handverksyrkinum fara við eitt sindur av eftirútbúgving at kunna fáa arbeiði í oljuídnaðinum. Neyðuga eftirútbúgvingin fatar um t.d. trygdarskeið, skeið ella venjingar til frálandsarbeiði ella arbeiði á útgerðarstøð.

At bøta um førleikan hjá arbeiðsmegini og kunnleikan til oljuvinnuna hava Føroya Oljuídnaður og Arbeiðsloysisskipanin roynt at útvega arbeiðspláss og lærupláss í oljuídnaðinum í grannalondunum. Við árslok 1996 høvdu uml. 20 fólk verið í slíkum størvum.

Í kapittul 4.4 Útbúgving í samband við oljuvinnu verður evnið viðvíkjandi førleikakrøvum gjølligari viðgjørt, herundir eisini hvussu føroysk arbeiðsmegi kann bøta um sín førleika til at taka á seg arbeiði í oljuídnaðinum.

Tað er í fyrstu syftu tað, at oljufeløgini fáa sær skrivstovu í Føroyum, serstakliga at fyristøðufeløgini stovna rakstrarfelag á staðnum, og tað virksemi, sum er knýtt at útgerðarstøð, og at føroyingar verða uppi í við tilbúgvingarskipum, sum væntandi fer at geva føroyskari arbeiðsmegi møguleikar í oljuvinnuni í byrjanini. Føroyingar fara eisini at kunna verða við til at manna boripallar og framleiðsluútbúnað. At boripalli verða uml. 160 fólk knýtt, helmingur teirra verður á pallinum í senn. Umleið helmingurin er borimanning, hini eru býtt ímillum seryrki sum t.d. mátingar og móruhandfaring og vanligt tænastuyrki sum t.d. vistaveitingar.

Longu sum er, fáa føroyingar størv í oljuvinnu í útlondum. Teir fáa royndir, sum kunnu koma teimum til góðar, søkja teir arbeiði í framtíðar oljuídnaði í Føroyum, um hann kemur.

Føroyingar í oljuídnaði í øðrum londum eru fyrst og fremst í yrki, har teir annaðhvørt brúka sín kunnleika til sjógv ella handverk, t.d. á veitingarskipum, á boripøllum og sum kavarar. Aðrir hava fingið starv á landi - tað veri seg sum verkfrøðingar ella í meiri fyrisitingarligum/búskaparligum yrkjum.

Eisini á yrkisøkjum, sum ikki beinleiðis koma undir oljuídnað, men sum standa fyri veitingum til ídnaðin, eru føroyingar í starvi, t.d. á virkjum, sum m.a. veita oljuídnaðinum EDV loysnir, og á virkjum, sum t.d. lata oljufeløgum og teirra verktakum elektrikarar.

Torført er at fáa yvirlit yvir, hvussu nógvir føroyingar eru í starvi í útlondum, eins og tað er trupult at meta um, hvussu nógvir kundu hugsast at komið heimaftur, men aðalmetingin er, at tey øki í oljuídnaðinum, har føroyingar starvast, eru víðfevnd. Hetta átti at bent á, at økini, har føroyingar munnu hava møguleika at starvast í framtíðar føroyskari oljuvinnu, eru ikki avmarkað til einstøk yrki. Sum frá líður skuldi møguleiki verið fyri, at føroyingar fáa starv á øllum økjum í oljuvirkseminum.

Eitt øki, ið gevur upp á seg nógv arbeiði, eru tey sonevndu frælsu yrkini. Oljuídnaðurin fer at geva grannskoðara- og sakføraravirkjum nýggj viðskiftafólk, og m.a. leigubilar, gistingarhús og handilsvirksemi sum heild fer at varnast, at virk-

semið veksur. Arbeiðið á hesum økjum fer tí at vaksa, og hildið verður, at so leingi arbeiðsmegi ikki tørvar, fara føroyingar at fáa nýggju størvini. Tá ið oljuvirksemið í Føroyum einaferð steðgar, fer virksemið á hesum økjum at falla aftur.

Virksemið, sum samfelagsliga er mest áhugavert, verður tað, sum megnar at verða verandi óheft av oljuídnaðinum. Í eini støðu, tá ið kapping er um arbeiðsmegina, verður tað tí skilagott, at føroyingar fyrst og fremst royna at nema sær førleika til tað virksemið, sum eisini fer at halda á í longri tíð. Um útbúgvingarnar, sum arbeiðsmegin hevur, og tey førleikakrøv, sum oljuídnaðurin setur arbeiðsmegini, verður mett um í kapittul 4.4 Útbúgving í sambandi við oljuvinnu.

**Hvat hevur føroyskt vinnulív at bjóða oljuvinnuni**

Føroyskt vinnulív er merkt av, at fiskiveiða, aling og fiskavirking í mong tíggjuáraskeið hava verið høvuðsvinnur. Hetta merkir, at meginparturin av føroyskum ídnaði er beinleiðis knýttur at teimum. Rundan um tey virki, sum fáast við fiskiskap og at virka fiskavørur, hevur natúrliga nógv av handverksídnaði og tænastuvirksemi tikið seg upp. Eisini eigur at verða víst á, at arbeiðsvalið hjá mongum natúrliga hevur miðað ímóti skipsførara- og maskinmeistaraútbúgving. Tí er fjøld av føroyingum nú í vinnu á høgum stigi í handilsflota og í frálandsvinnu í útlondum. Vinnan kann tí við smávegis dagføring verða før fyri at veita oljuvinnuni vørur og tænastur.

Vinnulívið hevur seinastu tvey árini víst alsamt størri áhuga fyri oljuvinnuni. Á oljustevnuni Offshore Europe 95 í Aberdeen vóru meira enn 20 privat virki umboðað, sum saman við øðrum feløgum og almennum myndugleikum vóru við á einum felagsbási.

Síðan farið varð undir forkanningar á sumri 1994, hava einstøk útlendsk fyristøðufeløg brúkt føroysku veitingarskipanina. Varhugin sum heild er, at royndirnar hava verið góðar, og at menningarmøguleiki avgjørt er til steðar.

Niðanfyri verða í stuttum lýstar tær veitingar, sum føroyska vinnan í løtuni kann bjóða oljuvinnuni.

***Havnir***

Føroyskar havnir hava í mong ár veitt føroyskum skipum tænastur og nú eisini alsamt fleiri útlendskum skipum. Vøksturin er m.a. tí, at seinnu árini hevur verið virkað fyri eini hugmynd um at marknaðarføra Føroyar sum tænastumiðdepil fyri veitingar og tænastur undir heitinum “North Atlantic Resource Centre“. Hendan hugmynd kann verða brúkt bæði í fiski- og oljuvinnu.

Í 1995 kannaði landsverkfrøðingurin í samstarvi við ráðgevafelagið E. D. Verkfrøði útgerðarhavnir til oljuvinnu. Kanningin vísir, at sum er lúka fleiri havnir støddarkrøvini[10] (longd og dýpd), sum sett verða útgerðarhavn. Tørvur fer kortini at verða á íløgum í m.a. goymslutangar, lyftikraft og goymslupláss.

Tá ið skip koma í havn, verða nógvar tænastuveitingar bodnar fram, sum t.d. umvælingar og viðlíkahald, vøruveitingar, vistaveitingar, drykkjuvatn, brenni-evni, burturbeining av burturkasti, vaskarítænasta, flutningur, manningarrøkt o.a.

***Skip***

Tilbúgvingarskip eru tey skipasløg, sum borivirksemið krevur sum tilbúgving. Fyri ein part eru tey útgerðarskip, sum vanliga eru serbygd og fyri ein part hjálpar- og vaktarskip, sum ofta eru umbygd fiskiskip, men nú eisini serbygd skip. Harumframt kann talan vera um før til akkers-handfaring, "eltibátar" og onnur stuðulsfør.

Føroysk vinna hevur ikki serútgjørd før tøk enn, men onnur minni útgjørd før kunnu verða útvegað í Føroyum.

***Skipasmiðjur, verkstaðir o.a.***

Í sambandi við tilbúgvingarfør og útgerðarvirksemi annars verður tørvur á tænastum frá skipasmiðjum og mekaniskum verkstøðum, sum kunnu taka upp-gávur á seg, sum røkka frá stálbyggingum til fínmekanikk og elektronikk. Uppgávurnar í oljuvinnuni kunnu verða veitingar til skip, men eisini til boripallar.

Í Føroyum eru 3 skipasmiðjur, ein við stórari turrdokk, umframt nakrar sleipi-støðir. Skipasmiðjurnar kunnu taka á seg arbeiði at byggja og halda bæði stál og timbur og standa fyri snikkarahandverki, mekaniskum handverki og el-hand-verki.

Umframt eru nógvir mekaniskir verkstaðir, sum lata, umvæla og halda útgerð, sum teir umboða. Nakrir verkstaðir gera eisini sjálvir t.d. oljutrýst-deksútgerð, el-talvur og ávaringarskipanir.

***EDV- og elektronikkvirki og fjarskifti***

Fleiri virki arbeiða við elektronikki, teld og samskifti. Í sambandi við marknaðarføring á oljustevnuni Offshore Europe 95 í Aberdeen vóru 6 virki í hesi vinnugrein, sum samskipaðu seg. Millum hesi 6 virki var Telefonverk Føroya Løgtings, sum hevur einarætt til fjarsendiøkið í Føroyum, og P/F Elektron, sum virkar sum dátudepil hjá m.a. almennu umsitingini og føroysku peningastovnunum. Útlendsk feløg hava sýnt ritbúnaðinum hjá telefonverkinum og dátudeplinum áhuga.

---

10 Útgerðarhavnir til oljuvinnu, landsverksfrøðingurin & P/F E.D. Verkfrøði, 1995.

Samskiftisøkið mennist við ógvisligari ferð, og á hesum øki fara nýggir møguleikar ivaleyst at taka seg upp hjá føroyska telefonverkinum. Nýggju møguleikarnir taka seg upp í sambandi við rationaliseringar á t.d. framleiðslupøllum, har nógv av virkseminum, sum nú krevur manning, fer at verða fjarstýrt úr landi.

Oljuútvinning kann harumframt geva telefonverkinum fyrimunir við at boðið, sum fartelefonin røkkur, verður longt, um loyvt verður, at basisstøðir verða settar upp á frálandsútbúnaði.

***Ídnaður***

Meginparturin av føroyskum ídnaði er knýttur at fiskavirking, og nógv virki hava tí eisini við ávísari umstilling møguleikan at lata vøru til oljuídnaðin. Eitt nýtt dømi er um virki, sum við at broyta støddir og tilfar hevur fingið góðar møguleikar at vera undirútvegari til oljuvinnuna við at virka, seta upp og gera liðugt net, tog, veir o.a.

Tey, ið gera máling, sápu og rustloysara, eru onnur dømi um ídnaðarvirki, sum í mong ár hava ment vøru at brúka í sambandi við sjóvinnu.

***Ferming/flutningur***

At útgerðarstøð verður í Føroyum fer at merkja, at tær stóru nøgdirnar av útgerð o.ø. skulu verða fluttar til Føroya. Hetta fer at vaksa um møguleikarnar hjá teimum virkjum, sum bjóða fram vøruavgreiðslu, vøruflutning, leigu, umsjón og umboðan.

Tvey farmafeløg eru, sum hava samband hvørja viku við Danmark, Svøríki, Noreg, Skotland, Ongland, Ísland, Háland og Týskland. Í løtuni eru 8-10 fráferðir úr Tórshavn um vikuna. Bæði feløg bjóða flutning til onnur mál í Evropa ella um allan heim.

Um floghavnina í Vágum koma og fara uml. 4.000 flogfør um árið, av hesum er umleið fjórðingurin tyrluflúgving innanoyggja. Fast flogsamband er til Keypmannahavnar, Århus, Billund, Reykjavíkar og um summarið til Glasgow og Narsarsuaq.

***Tyrluflutningur***

Í sambandi við frálandsvirksemi er vanligt at flyta manning og eykalutir loftvegis.

Í floghavnini í Vágum eru longu allir neyðugir hentleikar at reka loftferðslu bæði við tyrlum og flogførum. Tyrlustøð hevur eins og útgerðarstøð nógv virksemi knýtt at sær, t.d. flutning til støðina og aftur - bæði innan- og uttanlands. Harumframt gevur tyrluflutningur av føroyskari tyrlustøð føroyskari arbeiðsmegi og føroyskum vinnulívi beinleiðis samband við oljuvirksemi.

Evnið "Flutningur loftvegis" verður gjølligari viðgjørt í broti 4.1.4.

***Proviantur, vistaveiting og gistingarhús***

Fleiri føroyskar heilsølur hava proviantering sum serøki. Dømi eru eisini um, at hesi virki kunnu lata proviant til skip í havnum í útlondum fyri kappingarføran prís.

Fiskavørur hava í mong tíggjuár verið meginparturin av føroyska útflutninginum. Altjóða krøv til góðsku og reinføri eru herd nógv seinnu árini, og hetta hevur havt alsama menning við sær, og í hesum sambandi eru royndir og

serkunnleiki fingin á matvøruøkinum. Vistaveiting er tí eyðsæddur møguleiki hjá mongum virkjum.

Størri virksemi og ferðsla í Føroyum fer at vaksa um virksemið í hotell- og matstovuvinnugreinini og fer at gera, at ferðafólkatalið verður javnari allar árstíðirnar. At gera útgerðar- og/ella tyrlustøð í Føroyum fer at skapa tørv á gistingarplássum, t.d. tá ið manningar verða skiftar.

***Fíggjarligar veitingar***

Tilsamans eru fýra føroyskir peningastovnar, ein banki og tríggir sparikassar. Hvør teirra hevur fleiri deildir. Teir tríggir sparikassarnir hava einamest veitt byggi- og veðrættarlán, men síðan nýggja banka- og sparikassalógin kom í gildi í 1994, ber til hjá sparikassunum at veita vinnulívinum fígging á jøvnum føti við bankan. Teir fýra peningastovnarnir bjóða allar tær tænastur, sum peningastovnsvirksemi vanliga ger.

Á tryggingarøkinum eru fleiri tryggingarfeløg, ið sum heild øll eru samskipað í felags samtak. Tryggingarsambandið hevur áður havt einkarætt, men frá 1. januar 1997 ber til at stovna virki, ið kunnu kappast. Tryggingarvirksemi krevur kortini loyvi, og ímillum treytirnar fyri at fáa tað er, at felagið skal eiga heima í Føroyum, og at kapitalurin skal vera føroyskur. Føroysku tryggingarfeløgini fata um alla vanliga trygging; og sum natúrligt er í Føroyum, so er sjóvátryggingin víðfevnandi.

***Byggivinnan***

Í 80-unum var nógv at gera í byggivinnuni, nógv sethús vórðu bygd og tað almenna gjørdi eisini stórar íløgur í berghol, vegir, havnir og stovnar. Nógv av hesum arbeiði løgdu føroyskir verkfrøðingar til rættis, og føroyskir verktakar og handverksmeistarar gjørdu arbeiðið. Í 1990-árunum, meðan byggivirksemið hevur verið óvanliga lítið í Føroyum, hava nakrir teirra arbeitt á marknaðum í útlondum, t.d. í Týsklandi, Noregi, Danmark og í Íslandi.

***Ráðgevavirksemi***

Í sambandi við virksemi, knýtt at olju á føroyskum leiðum, krevst kunnleiki um føroysk viðurskifti, t.d. um umhvørvi, veðurlag og samfelagsviðurskifti. Ein partur av neyðuga kunnleikanum er í føroyskum ráðgevavirkjum og almennum stovnum, men eisini verður tørvur á at fáa til vega nýggjan kunnleika. Ein eyðsýndur arbeiðssetningur hjá føroyskum ráðgevandi virkjum, sum við sínum kunnleika til føroysk viðurskifti mugu verða hildin at hava serligan førleika á ymiskum økjum, bæði í sambandi við granskingarverkætlanir, og frágreiðingar og fylgjumetingar, fer at verða at savna, greina og bera útlendsku feløgunum kunnleika um føroyska samfelagið.

***Aðrar veitingar***

Oljuvinnuni tørvar nógvar aðrar tænastuveitingar, sum føroysk virki eru før fyri at lata, eitt nú:

- At leiga fastognir og at byggja nýggjar skrivstovubygningar. Væntandi fara útlendsk feløg at seta seg niður í Føroyum, lutvíst fyri at fáa betri samband við føroyskar myndugleikar og vinnulív, og lutvíst tí at lóggávan fer at krevja umboðan í Føroyum. Hetta fer at hava alstóran týdning fyri møguleikarnar hjá føroyskum vinnulívi at fáa samband við oljuvinnuna.
- Ráðstevnu- og skeiðmøguleikar. Fleiri gistingarhús hava góðar ráðstevnu-møguleikar, og umframt er Norðurlandahúsið framúr væl skikkað til stór tiltøk. Sjómansskúlin, maskinmeistaraskúlin, teknisku skúlarnir og handilsskúlarnir í Føroyum hava sýnt áhuga fyri at skipa fyri skeiðum fyri oljuvinnuni. Eisini eru møguleikar í Føroya Brandskúla, um kravt verður, sum í øðrum londum, trygdarprógv á staðnum. Hetta krevur kortini, at Brandskúlin verður útbygdur.
- Av tí at lóggávan á oljuøkinum er føroysk, hevur hetta við sær, at føroysk sakføraravirki fáa arbeiði.
- Grannskoðarafeløgini, sum knýtt eru at altjóða grannskoðarafelagsskapum, fáa arbeiði, serstakliga um útlendsk feløg seta seg í Føroyum.
- Í Føroyum eru hesi klassaumboð umboðað: Bureau Veritas, Norsk Veritas, Lloyd's Register of Shipping og Germanischer Lloyd's.

***Royndir higartil***

Í 1994 fór Western Geophysical Corporation undir seismiskar kanningar. Tá ið spurt varð, søgdu umboð fyri Western Geophysical seg vera nøgd við føroysku veitingarnar. Tað snýr seg um umboðan, ferming, veitingar og brenniolju.

Í 1996 varð verkætlanin at dýpa boriholið í Lopra framd. 25% av umsetninginum í hesari verkætlan er farið til føroyska arbeiðsmegi og veitingar frá føroyskum virkjum. Tá ið fyristøðufelagið Dopas varð spurt, um tað var nøgt við føroysku veitingarnar, varð sagt, at føroyska arbeiðið sum heild hevur verið stak gott, og veitingarfreistirnar vanliga hildnar. Harafturímóti varð gjørt vart við, at kostnaðurin á serliga arbeiðsmegini bæði við og uttan yrkiskunnleika, samanborið við tað sum fæst burturúr, er hægri enn tað, tey eru von við í vinnuni. Dopas hevur tá ikki borið prísin á arbeiðsmegini saman við skandinavisk, men við bretsk viðurskifti.

Tað, ið nevnt er frammanfyri, gevur ábending um teir møguleikar, sum føroyskt vinnulív sum er hevur at útvega oljuvinnuni. Greitt er, at so hvørt sum virksemið í føroyskari oljuvinnu veksur, fara nýggir møguleikar at taka seg upp, og tørvur verður á alt meira serkunnleika á økjum, ið ikki eru nevnd her. Virki fara at gera samstarvsavtalur, summi verða partar av samtaksavtalum (“joint ventures”) við útlendsk feløg, og alt hetta fer at bøta um møguleikarnar hjá føroyskum vinnulívi at lata oljuvinnuni vørur og tænastur. Føroyskt vinnulív er júst eyðkent við evnum til skjótt skifti, tí virkini eru so smá.

Vansin við, at virkini eru so smá, er samstundis, at torført verður at arbeiða strategiskt, tí at virkini mugu arbeiða út frá stuttum ætlanarhvarvi. Um politikkur myndugleikanna á økinum, undir hesum eisini krøv til oljufeløgini, ikki eggjar

oljufeløgunum til at brúka føroysk virki og teirra kervi, og um myndugleikarnir ikki leggja greiðan veitingarpolitikk, m.a. um at stovna støðir í Føroyum, kann úrslitið verða, at virkini fáa ikki búgvið seg til at kappast á altjóða stigi.

**Hvussu lúka vit serkrøv frá oljufeløgunum**

Ein fyrimunur, sum ofta verður nevndur í sambandi við veitingar- og tyrluvirksemi í Føroyum, er, at hetta hevur so mangt annað virksemi við sær. Avleidda virksemið stavar frá ymiskum vøru- og tænastuveitingum og virksemi, sum øktur gjaldsstreymur ígjøgnum eitt lítið samfelag hevur við sær.

Í mongum førum eru ikki serlig krøv sett hesum avleidda virksemi. Hetta er samstundis virksemi, sum dettur niðurfyri í somu løtu, sum oljuvinnan gevst í Føroyum.

Í frágreiðingini "Karmar fyri føroyskari vinnu"[11], sum partarnir á arbeiðsmarknaðinum lótu frá sær í 1994, verður mælt til, at føroyskt vinnulív roynir at fáa vinnuligan førleika, sum eisini kann verða brúktur í oljuídnaðinum aðrastaðnis og í øðrum virksemi bæði í Føroyum og í útlondum. Oljuídnaðurin setur slíkum veitingum krøv, sum vanliga hava samband við trygd, umhvørvi og góðsku, sí eisini brot 4.1.1 Eftirspurningur frá oljuídnaðinum.

Umframt krøv um kappingarføran prís, verða eisini onnur krøv sett, eitt nú:

- krøv um útgreinaðar forskriftir eftir ávísum standardum,
- krøv til góðskukervi,
- lógarfest krøv til trygd, umhvørvi og heilsu,
- fíggjarkrøv,
- tøknilig krøv,
- krøv um tilvísingar til royndir við líkum veitingum,
- krøv um verkætlanarstýring,
- krøv um málkunnleika (enskt).

Hesi krøv eru víðfevndari enn tey, ið føroyskt vinnulív annars er vant við (ber saman frágreiðingina frá Føroya Oljuídnaði um krøv til útvegarar innan oljuvinnuna)[12].

Um føroyskur ídnaður og tænastuvirki skulu gera vart við seg sum útvegarar í kravmiklara partinum í framtíðar frálandsvirksemi kring Føroyar, er neyðugt við miðvísum arbeiði í vinnunum. Hetta arbeiðið kann verða gjørt á ymsan hátt, eitt nú:

- inni á virkjunum,
- í einum kervi við fleiri virkjum,
- í vinnugreinafeløgum,
- í samvinnu við onnur (útlendsk) virki (jointventure).

Ítøkiligastu og mest viðkomandi krøvini, sum virkini longu nú kunnu arbeiða við, er at fáa eitt góðskukervi at virka. Slíkt arbeiði kann undir øllum umstøðum verða neyðugt fyri at bøta um kappingargrundarlagið hjá virkinum, sama um ella

11 Karmar fyri føroyskari vinnu, 17. mai 1994

12 Krøv til veitarar innan oljuvinnuna, Føroya Oljuídnaður, nov. 1996

nær rakt verður við olju.

Arbeiði við góðskustýring eigur at verða stuðlað við einum miðvísum vinnufremjandi politikki við ítøkiligum tiltøkum, sum t.d. góðskuátøkum, útbúgving, tiltøkum til frama fyri vinnugreinina, stigvíst øktar játtanir eftir tørvi til stuðulsskipanina, sum er í gildi, um at uppbyggja góðskukervi (Grunnurin til ídnaðarfremjandi endamál) o.a. At seta í verk góðskukervi í útvaldum almennum fyritøkum, har fyriskipanar- og aðrar fortreytir eru, kundi eisini verið við til at styrkt yrkisliga umhvørvið um góðskustýring í Føroyum.

### 4.1.3 Stovnseting og vøruflutningur

Í hesum parti verða tey krøv viðgjørd, sum myndugleikarnir fara at kunna seta oljufeløgum um at seta seg niður í Føroyum og at lata virksemið ganga úr Føroyum. Greitt verður frá tí virksemi, ein útgerðarstøð hevur í ymisku skeiðunum í eini oljuverkætlan. Listi verður gjørdur yvir tað, ið helst eigur at vera tøkt á útgerðarstøð, og kannað verður, hvussu skilagott tað er at brúka føroyska útgerðarstøð, herundir eisini um ítøk krøv til útgerðarstøð kunnu verða lúkað. Nakrir møguleikar at skipa støðina verða settir upp, síðan verður tørvurin á veitingar- og tilbúgvingarskipum lýstur. Parturin endar við einari niðurstøðu við tilmælum um tiltøk, ið á besta hátt tryggja eitt skilagott útgangsstøði fyri oljuvirksemi á føroyskum leiðum.

Hóast hesin partur í trongari merking viðger evnið stovnseting og vøruflutning, má parturin verða settur í samanhang við tey brot, sum viðgera tiltøk til frama fyri føroysk vinnulívsáhugamál annars.

**Oljufeløg seta seg niður í Føroyum**

Skulu oljufeløgini hava trygt og dygt virksemi á føroyskum leiðum og møguleika at hava gott samband við viðkomandi myndugleikar og við nóg dyggum atliti at heilsu, umhvørvi, trygd og tilbúgving, mugu tey hava eina hóskandi umboðan her í sambandi við virksemið og hava rakstrarmiðstøð ella høvuðsskrivstovu í Føroyum.

Í kreppustøðu, tá ið fólk og umhvørvi standa andlit til andlit við eina vanlukku, verður tað eitt ófrávíkiligt myndugleikakrav til fyristøðufeløgini, at teirra virkisleiðsla er í Føroyum.

Ein fylgja av hesum kravi er, at loyvishavanir skulu lata sítt virksemi ganga úr Føroyum. Teirra verkligu arbeiði skulu fáa tænastur frá eini útgerðarstøð.

**Virkið hjá útgerðarstøð**

Ein útgerðarstøð kann veita kolvetnisvirkseminum tænastu øll tey fýra skeiðini, sum oljuverkætlan kann verða býtt í, smbr. kapittul 4 av 1993-frágreiðingini:

- forkanningar,
- leiting og meting,
- útbygging og útvinning,
- avrigging.

***Forkanningarskeiðið***

Forkanningarskeið krevur ikki margbroyttari og víðfevndari tænastu enn fiski- og farmaflotanum tørvar. Hetta verður váttað við royndunum frá forkanningarskeiðinum, sum er í gongd.

*Leiting og meting*

Tá ið virksemið verður økt til eisini at fata um leitiboringar, skulu munagóðir goymslumøguleikar vera tøkir. Ferðslan ímillum leitileiðirnar og støðina verður regluligari. Skipini, ið taka sær av flutninginum, verða serútgjørd før, sum fara at seta størri krøv til havnirnar. Ein útgerðarstøð skal vera før fyri at lata oljuvirksemið á sjónum tilfar og aðrar veitingar. Uppgávan hjá støðini er at lata goymslupláss, havn og aðrar hentleikar, sum virkjunum, ið hava ymisku tænasturnar, tørva. Av verkligum orsøkum kann tað vera fyrimunur at hava allar støðhentleikar á einum staði. Men av tí at leitiskeiðið, áðrenn nakað verður funnið, ber dám av fyribils tiltaki, og at tað tí ikki er ráðiligt at gera stórvegis íløgur til at veita hesum skeiði tænastur, er ein annar møguleiki at lata støðvirksemið vera spjatt um alt landið. Slík loysn kann standa við, so leingi sum veitingarskipini hava nóg góða tíð at heinta veitingar og tænastur frá ymsum støðum. Verður orkan hjá veitingarskipinum brúkt til fulnar, kann verða mett um fíggjarliga, hvørt støðvirksemið framvegis skal verða á ymiskum plássum.

Samfelda útboðið frá støðvirkseminum fevnir um allar tænastur, sum kervið av útgerðarplássum verður ført fyri at veita.

Fyristøðufeløgini kunnu av verkligum ávum hava hug til at seta sína rakstrarmiðstøð í nánd av eini útgerðarstøð, kanska enntá á sama øki sum støðin.

Verður olja funnin, verður farið inn í metingarskeiðið, har økt verður um borivirksemið. Men í leitiskeiðinum verður ikki neyðugt at hava fasta útgerðarstøð, har tænasturnar í høvuðsheitum verða veittar úr sama staði.

*Útbygging og útvinning*

Verður úrslitið av leitivirkseminum tað, at rakstrarverdar keldur verða funnar, skal støða verða tikin til, nær og hvussu oljuleiðirnar skulu verða útbygdar. Samstundis verður støða tikin til at grunda varandi útgerðarstøðir. Virksemið í útbyggingarskeiðinum ber eisini dám av at vera fyribils, hóast tað væl kann vara í mong ár. Stórar konstruktiónir og nógv útgerð verða flutt út á leiðina og fest har. Rákið er soleiðis, at framleiðsluvirksemið annaðhvørt er á skipum, sum koma liðugtgjørd á leiðirnar, ella á framleiðslupøllum, sum fyri tað mesta eru liðugt smíðaðir á landi, soleiðis at uppsetingin til sjós verður so stutt, sum til ber. Hetta minkar um tørvin á veitingum frá útgerðarstøð í byggiskeiðinum.

Tá ið útbyggingarsskeiðið er av, fer verkætlanin upp í longri og støðufastari útvinningarskeið. Tað er í samsvari við virksemið í hesum skeiði, at varandi útgerðarstøð skal verða bygd.

Stórur munur er á støðum, sum eru fyribils - vanliga til at tæna nýggjum leitileiðum - og støðum, sum verða grundaðar við tí í hyggju at verða brúktar í útvinningarskeiði, sum varir upp í eitt nú 30 ár.

*Avrigging*

Tá fíggjarligt grundarlag ikki longur er fyri at framleiða olju og gass á eini leið, skal framleiðsluútbúnaðurin verða burturbeindur fullkomiliga ella fyri ein part. Hetta avriggingararbeiðið hevur eisini við sær virksemi á útgerðarstøðini.

Avriggingarskeiðið er stutt. Hevur útgerðarstøðin ikki annað virksemi at veita, verður støðin riggað av samstundis, sum oljuleiðin verður avriggað.

**Krøv til útgerðarstøð í leitiskeiði**

Í øllum skeiðunum verður talan um at goyma og avgreiða vørur til oljuvirksemi. Í hesum sambandi verður tørvur á ávísum myndugleikareftirliti við virkseminum á støðunum. Við at brúka møguleikarnar í tolllógini at stovna frígoymslur á útgerðarstøðunum verða vørur og útgerð til oljuvirksemið nógv skjótari handfarnar.

Verður rakt við olju, verða ymiskar verkætlanir í gongd um somu tíð í ymiskum skeiðum á føroyskum leiðum. Í verki kann t.d. útbygging tí vísa seg at gerast meira áhaldandi virksemi á føroyskum leiðum, enn um einstøku verkætlanirnar verða mettar hvør sær.

Niðanfyri verða eyguni sett á leitiskeiðið.

Krøvini, ið sett verða útgerðarstøð í leitiskeiði, kunnu víkja ógvuliga nógv frá krøvunum í útbyggingar- og útvinningarskeiðinum. Av hesum er útvinningarskeiðið nógv tað týdningarmesta. Mótsett tí, ið er galdandi fyri fast støðvirksemi, fer oljuídnaðurin í sambandi við leitivirksemi at lata sær lynda eitt nógv meira avmarkað tilboð av tøkum hentleikum, har kostnaður og veitingartrygd eru týdningarmestu miðini at meta seg eftir.

Tí verður ikki neyðugt í sambandi við leitivirksemi á føroyskum leiðum at royna at svara til hentleikarnar á føstu og vælgrundaðu útgerðarstøðunum í t.d. Aberdeen, Stavanger og Peterhead. Tað verður ikki neyðugt, fyrr enn rakt verður við olju og gass í rakstrarverdum nøgdum, og hesar leiðir verða útbygdar.

Meginparturin av neyðugum tilfari og øðrum veitingum, t.d. serligari boriútgerð, pumpum, smyrjievnum og eykalutum til boripallin, má verða innfluttur til tey støð, sum lata virkseminum veitingar, har tey verða goymd, til tey verða brúkt á boripøllunum.

Tung útgerð, sum samstundis krevur stór goymsluøki, er serliga bori- og fóðrirør.

Ikki er neyðugt at hava tilfar á goymslu til alt, sum henda kann; men tess meira víðfevnandi goymslan er, tess betur er tað hjá brúkaranum (oljufeløgunum).

Veitingar, sum eru beinleiðis atgongdar í Føroyum, fata um brennievni, vatn og vistaveitingar.

Boripallar hava vanliga avmarkað goymslurúm - serliga til bori- og fóðrirør, sum krevja stórt goymslupláss. Rørgoymslan á pallinum miðar vanliga eftir, at haldast kann fram við boring, tá ið veðurlíkindi forða veitingum frá útgerðarstøðum. Hetta tilfar skal tískil verða flutt javnan (vanliga eina ferð um vikuna) saman við vistaveitingum frá útgerðarstøðunum, og burturkast o.a., verður so flutt aftur í land.

Sum dømi um útgerðarstøðir til leitivirksemi kann verða nevnt, hvussu farið varð um støðvirksemið í sambandi við leitingar á Haltenbankanum og Tromsøflaket og í norska partinum í Barentshavinum. Til at veita pøllunum á hesum leiðum tænastu vórðu nakrar framskotnar útgerðarstøðir settar á stovn, ið ikki

vóru fult útgjørdar. Sum líkt dømi kann eisini verða nevnt, at í sambandi við at British Gas fór undir leitiboring í Ermasundi, varð nýggj útgerðarstøð grundað í nánd av Portland. Boringin skuldi vara í 40 dagar, og ætlanin var, at varð ikki borað í fleiri støðum, skuldi støðin kunna verða niðurløgd, tá ið arbeiðið var liðugt. Týðandi er tó at viðmerkja í tí sambandi, at av tí at so langt var til undirstøðukervið, var eingin verulig kapping frá støðum, ið longu vóru. Óivað hevði borið til at tænt leitivirksemi í føroyskum øki av støðum bæði í Skotlandi og Noregi.

Eftir at grundleggjandi ítøk krøv til at grunda eitt veitingarvirksemi eru lokin, íroknað at til ber at brúka útgerðarstøðina ógvuliga regluliga, fer annað virksemi at ávirka hugin hjá ídnaðinum at brúka støðina. Ein listi yvir slík virkisemi, har tey týdningarmestu verða nevnd fyrst, kann síggja soleiðis út:

16. Hvussu lætt slepst til høvuðsstøðina hjá fyristøðufelagnum.
17. Mekaniskir verkstaðir/mekaniskur ídnaður.
18. El-innleggjarar og elektronikkvirki.
19. Skipasmiðjur.
20. Kavarar.
21. Hvussu lætt slepst til floghavn.
22. Umstøður at gista og eta.
23. Hvussu lætt slepst til ferjuhavn og farmastøð.
24. Hvussu lætt slepst til viðkomandi myndugleikar.
25. Tøkningar og arbeiðsmegi við kunnleika til frálandsoljuvirksemi.
26. Verkfrøðingavirksemi og ráðgevar.
27. Postur og fjarskifti.
28. Sjúkrahús, læknar, tannlæknar osfr.
29. Vanligir handilsmøguleikar.
30. Umstøður at taka sær av løttum (ítróttarmøguleikar, vertshús osfr.).

Týdningarmesta tilfarið, sum skal vera tøkt til tess at gera eina leitiboring, er hetta:

- borirør
- fóðrirør
- akkerseindir
- útgerð at brúka niðri í boriholinum
- borimóra
- ymisk evni (kemikaliur)
- brennievni
- vatn
- vistaveitingar til pallmanning

Eitt týðandi virksemi í sambandi við útgerðarstøðina er flutningur av burturkasti. Umleið 20-50% av øllum tilfari, sum flutt verður út á leiðirnar, verður flutt aftur í land. Fyri stóran part av hesum burturkasti verða sett trygdar- og umhvørviskrøv um handfaringina. At alsamt meira verður hugt at ytra umhvørvinum og møguligum dálkingarvandum í sambandi við oljuvirksemi, sum er so víðfevnandi sum ein boripallur, hevur fingið londini rundan um okkum at seta krøv um

serliga mannagongd fyri handfaring av burturkasti. Við at lata útgerðarstøðina hava hesa tænastu um hendi, fara útvegarar, viðskiftafólk og fyristøðufeløgini at kunna fáa burturkastið frá hondini á nøktandi hátt, og myndugleikarnir kunnu hava eftirlit við teimum nøgdum, sum fluttar verða út og inn, hvar og hvussu burturkastið verður goymt, fyribeint osfr.

Hugsandi er, at fyri tey flestu, sum eru undirútvegarar til útgerðarstøðina, hevði tað verið fyrimunur at hava sett seg nærindis støðini ella á henni. Er støðvirksemið spjatt um oyggjarnar, og undirstøðukervið annars virkar væl, kann útboðið hjá støðini verða mett sum eitt stórt kervi av føroyskum virkiseindum og tænastuveitandi eindum.

**Hvussu veruleikakent er at vænta føroyska útgerðarstøð**

Sum grundstøði fara bæði myndugleikar og feløg at vilja hava, at trygdarútgerð er tøk so tætt við leitiøkið, sum tilber, t.e. í Føroyum. Trygdarútgerð umfatar eldsløkkiútgerð og upptaksútgerð í sambandi við oljuleka, eisini stóran part av rakstrartilfarinum sum t.d. einstøk rør, akkerseindir, eindir til oljurør, flot, útgerð at brúka niðri í boriholinum og bulktilfar. Myndugleikakrav um hetta fer soleiðis at gera tað neyðugt við goymslu til hetta tilfar í Føroyum. Langt er ikki haðan og til at hava eina framskotna útgerðarstøð í Føroyum.

***Strategiskar metingar***

Útgerðarvirksemið er eitt miðsavnað logistikkvirksemi, har so at siga allar vørur og tænastur til boripallar og frálandsútbúnað verða beindar ígjøgnum. Útgerðarstøðin kann verða mett sum brúgv ímillum útbjóðarar og eftirspurningin eftir vørum og tænastum í oljuídnaðinum. Møguleiki Føroya at tryggja sær, at til ber hjá føroyskum virkjum at fáa ein rímiligan part av tí, sum oljuídnaðurin keypir av vørum og tænastum, kann vaksa, við tað at føroysk áhugamál taka sær av logistikkvirkseminum hjá útgerðarstøðini.

***Kappingarstøða***

Viðvíkjandi ítøkum krøvum til útgerðarstøð kunnu fleiri havnaløg lúka hesi krøv uttan stórvegis íløgur.

Tær eyka íløgur, sum tørvur verður á, skulu føroysk havnarløg virka sum útgerðarstøðir, kunnu fata um m.a. skrivstovu og goymsluumstøður (goymsluhøll og goymslupláss úti), goymslutangar til borimóru (sum tænastufelag/útvegari setur upp) og lyftikraft.

Seinnu árini hevur rákið týðiliga verið tað, at oljufeløg hava arbeitt tætt saman um støðhentleikar og veitingarskip. Hetta hevur týðiliga spart flutnings- og støðkostnað. Ognarviðurskiftini hesum hentleikum viðvíkjandi eru eisini broytt. Fleiri oljufeløg hava sostatt boðið alt logistikkarbeiði út, sum fatar bæði um støð- og flutningsvirksemi. Hetta hevur givið gróðrarlíkindi til at grunda stór sjálvstøðug útgerðarvirki, sum m.a. eru í Skotlandi og Noregi.

Í grannalondum okkara er ov mikið av útgerðarstøðum og veitingartænastum. Tey feløg, sum reka hesar fyritøkur, fara eyðvitað at hava áhuga í at fáa brúkt part av hesi avlopsorku at tæna virksemi á føroyskum leiðum.

Oljufeløgini fara at royna at minka sum mest um útreiðslurnar í sambandi við leitivirksemi, eisini útreiðslur til flutning av tilfari og útgerð. Ein máti at avmarka flutningskostnaðin er at brúka ta útgerðarstøð, sum er næst leitivirkseminum.

Havast skal í huga, at hóast talið av ítøkiligum fyrispurningum økist eftir,

hvussu stórt oljuvirksemið er á leiðini, so verður tann einstaka útgerðarstøðin í kapping, har tættir, sum kunnu ávirka allan kostnaðin fyri logistikkvirksemið nógv, kunnu gera av hvør støð, ið brúkt verður. Sum dømi um hetta kann verða nevnt:

e) íløgur at grunda nóg umfatandi útgerðarstøð,
f) hvussu lætt slepst til tilfar og aðrar veitingar í nánd,
g) um møguleiki er fyri stórrakstrarfyrimunum,
h) um útgerðarstøðin verður rikin effektivt.

Tættirnir nevndir frammanfyri draga tann vegin at fáa feløgini at brúka støðir, sum longu virka, heldur enn at grunda nýggjar støðir tætt við nýggj leitiøki. Myndugleikakrøv og -avgerðir kunnu eisini hava avgerandi týdning fyri, hvør støð verður brúkt.

***Tørvur á myndugleikakravi um at brúka føroyska útgerðarstøð***

Búskapurin í eini útgerðarstøð er treytaður av, hvussu nógv virksemið er. Eru fleiri leitiverkætlanir í gongd í senn í økinum, fara stórrakstrarfyrimunirnir, sum standast av hesum, at lætta um raksturin hjá støðini. Hægri virksemisstig rættvísger eisini, at útgerðarstøðin hevur størri útboð av vørum á goymslu, sum ger støðina uppaftur meira áhugaverda hjá oljufeløgum at nýta. Men út frá metingum um leitivirksemið á føroyskum leiðum kann ikki við vissu væntast, at føroysk útgerðarstøð fer at bera seg fíggjarliga tey fyrstu árini.

Hugsast kann, at um myndugleikarnir ikki krevja, at leitivirksemið skal virka úr føroyskari havn, fara fyristøðufeløgini og teirra verktakarar - serstakliga á byrjanarstignum og í sambandi við leitingar á leiðum í nánd av miðlinjuni til Bretlands - heldur at vilja gera sítt arbeiði sum higartil út frá útgerðarstøðum í Noregi og Skotlandi. Men tá ið virksemið kemur upp á eitt ávíst stig, sum samstundis tykist vera støðugt, ella um virksemið er tætt við Føroyar, kann hugsast, at oljufeløgini heldur fara at vilja hava, at virksemið verður úr føroyskari havn.

Havandi í huga, at logistikkvirksemið tekur ein ógvuliga avmarkaðan part av øllum kostnaðinum í sambandi við leitiboringar, fer ein verkætlanardýrkan, sum stendst av, at føroysk útgerðarhavn verður brúkt, valla at verða mett sum avgerandi forðing hjá oljufeløgunum. Flestu oljufeløg skilja týdningin, ein útgerðarstøð hevur fyri føroyska samfelagið og signalvirðið í at brúka hana.

Samfelagsbúskaparliga kann tað verða óheppið, at íløgur verða gjørdar í fleiri útgerðarstøðir í Føroyum, um virksemið bara kann rættvísgera íløgur í eina støð. Út frá tí virksemi, ið væntandi verður í forkanningar- og leitiskeiðinum, fer tað ikki at loysa seg at gera íløgur í tvífalt útgerðarvirksemi í fyrstuni. Oljufeløgini kunnu tó fata tað sum ein váða ikki at hava aðrar møguleikar í at velja, tí talan verður um einkarætt í støðvirkseminum. Men so leingi einkarætturin bara er í sjálvum støðvirkseminum, meðan onnur kapping, t.d. um móruveiting, stendur opin fyri fleiri útvegarum, skuldi ikki verið stórvegis tørvur á tvífaldum virksemi fyri støðtænastu í Føroyum bert fyri at tryggja kapping. Skuldi tað víst seg, at einkarstøðan skuldi roynst óheppislig, fara myndugleikarnir at síggja almennan áhuga í at lata fyristøðufeløgini sleppa at brúka aðrar útgerðarstøðir, møguliga eisini í útlondum.

Í samrøðum við oljufeløg hava umboð fyri Oljuráðleggingarnevndina fingið varhugan av, at tað fellur feløgunum natúrligt at hava leitivirksemi úr føroyskari havn. Tá ið trygdar- og umhvørvisatlit eru tikin við, tykist tað tískil ikki at vera órímiligt krav, at virksemið við útgerðarstøð skal vera í Føroyum.

***Hvar skal støðin vera?***

Sum nevnt kann skikkað pláss verða funnið til útgerðarstøðir ymsa staðni í Føroyum. Kortini verður undir øllum umstøðum neyðugt at gera mun á leiti- og útvinningarskeiðunum. Í fyrstu skeiðunum er valla meining í at tosa um útgerðarstøð á ávísum staði.

Í leitiskeiðinum eiga hentleikarnir, sum eru, at verða brúktir sum mest. Støðvirksemið verður soleiðis spjatt út á tey øki, sum at byrja við kunnu veita ta tænastu, sum oljuvinnuni tørvar í leitiskeiðinum. Henda loysn fer at verða natúrligt framhald av tí hátti, veitingarvirksemið hevur brúkt í sambandi við tær forkanningar, sum hava verið í gongd síðan 1994.

Hvaðan í Føroyum, virksemið í einum útbyggingar- og útvinningarskeiði skal ganga, er ikki undir arbeiðssetningi nevndarinnar at taka støðu til, men spurningurin kann verða sæddur úr samfelagsliga sjónarhornum, t.d. um landsætlan ella um vinnuframa.

Niðanfyri verða nakrir møguleikar settir upp, hvussu myndugleikar kunnu taka støðu til spurningin um, hvar støðin skal vera.

Tann einfaldasti møguleikin er, at landsmyndugleikar eru nøgdir við at krevja, at virksemið er úr Føroyum, men at teir lata vera við at leggja seg útí, hvar støðin skal verða, soleiðis at brúkarin, t.e. oljufeløgini, kunnu gera tað av. Við at meta støðvirksemið sum eitt ávíst pláss, kann verða komið í ta støðu, at ymsu feløgini velja ymisk pláss. Royndir úr t.d. Skotlandi vísa kortini, at marknaðurin fer at tryggja, at sum frá líður, verður ein skilagóð javnvág ímillum útboð og eftirspurning. Men kortini er hugsandi, at oljufeløgini helst vilja sleppa undan at taka støðu til ein spurning, sum fleiri øki í Føroyum halda vera serstakliga týdningarmiklan fyri sínar vinnumøguleikar í einum oljuvirksemi.

Annar møguleiki er at lata landsmyndugleikarnar taka avgerð, sum myndugleikarnir til dømis gera í Noregi. Til tess at tryggja, at staðurin er skynsamur í sambandi við oljuvirksemi í Føroyum, kundu myndugleikarnir avrátt, at staðurin varð valdur út eftir raðfesting frá teimum, sum í seinasta enda eru brúkarar, t.e. oljufeløgunum. Av tí at eingin landsætlanarmyndugleiki er, kundi landsstýrið sett ein arbeiðsbólk, sum kann vera førur fyri at meta um teir ítøku karmarnar eins og samfelagslig atlit, sum eiga at verða tikin við, tá ið staðurin verður kosin. Arbeiðsbólkurin kundi verið settur saman við umboðum fyri oljumyndugleikarnar, landsverkfrøðingin, umhvørvis- og friðingarmyndugleikarnar og møguliga aðrar myndugleikaáhugaðar og vinnulívsumboð, sum kundu viðgjørt raðfestingarlistan frá oljumyndugleikunum og møguliga tikið endaliga avgerð um stað ella lagt grundaða raðfesting til endaliga avgerð á politiskum stigi.

**Samskipan**

Í sambandi við útgerðarstøðina hava oljufeløgini stóran áhuga í veitingarvissuni, og í at óheppin ávirkan frá eini møguligari einkarstøðu verður sum minst. Føroyska samfelagið hevur stóran áhuga í at logistikkvirksemið veruliga tekur sær av føroyskum vinnuáhugamálum.

Einstøku oljufeløgini kundu møguliga sjálvi stovnað útgerðarstøðir. Men sum

nevnt er vanligt nú á døgum, at óheft veitingarvirki reka støðirnar.

Fleiri av óheftu útgerðarfeløgunum hava meira enn 20 ára royndir í at tæna frálandsvirksemi í Norðsjónum. Hesi feløg hava gott orð á sær í oljuídnaðinum, og oljufeløgini hava álit á tænastuni frá hesum feløgum. Tí verður tað trupult hjá nýggjum feløgum at fáa fótin fastan á hesum marknaði undir fríum marknaðartreytum.

Ein hugsandi møguleiki fyri at fáa útgerðarstøð í lag í Føroyum er, at útlendsk feløg við royndum á økinum stovna feløg í Føroyum. Hóast føroysk veitingarstøð kanska ikki tykist serliga lønandi tíðliga í leitiskeiðinum, kann hugsast, at eitt myndugleikakrav um at brúka føroyska støð kundi drigið slíkar fyritøkur til Føroya við vón um langtíðarvinning.

Frá føroyskari síðu verður ynskt, at føroysk virki og arbeiðsmegi sum mest verða drigin upp í arbeiðið. Føroysk virki hava logistiskar royndir í mong ár við fiski- og handilsflotanum, og tí er væntandi, at eitt ella fleiri føroysk feløg sjálvi, ella um neyðugt við stuðuli frá ella í samstarvi við eina roynda fyritøku á hesum øki ella við serkønum útvegaðum haðan, fara at kunna átaka sær at reka eina útgerðarstøð.

Tá ið eitt ella fleiri havnarløg og møguliga goymslupláss verða gjørd tilbúgvin, er ein møguleiki, at tað verður havnareigarin, t.e. kommunan á staðnum ella landsmyndugleikarnir, ið fáa hesi viðurskifti í rættlag, áðrenn farið verður undir at byggja útgerðarstøðina. Slík loysn fer at hava við sær, at útgerðarfelagið ella oljufeløgini leiga øki og bygningar v.m.

Aðrir møguleikar eru, at annaðhvørt oljufeløgini ella útgerðarfelagið gera íløgur, sum kommunur og landstýrið góðkenna. Slík loysn fer at merkja, at tann, ið íløguna ger, sum aðalreglu verður bundin til at beina burtur virkið, tá ið arbeiðið er av.

**Veitingarskip og hjálpar- og vaktarskip**

Tilfarsflutningur til leitileiðirnar og aftur fer við væntaða virksemisstiginum fyrstu árini at kunna verða nøktað við *einum* veitingarskipi. Fólkaflutningurin er mest við tyrlu. Sí brot 4.1.4 um flutning loftvegis.

Nýtíðar veitingarskip er eitt ógvuliga serútgjørt far. Sum er, eru ikki før tøk í Føroyum, sum kunnu verða brúkt sum veitingarskip uttan so, at stórar íløgur verða gjørdar. Skal veitingarskipið eisini verða brúkt til akkershandfaring, skal farið vera um 3.000 tons til støddar. Tí má væntast, at eitt veitingarskip verður leigað/langtíðarleigað. Gongur virksemið úr føroyskari havn, fer tað at vaksa um møguleikarnar hjá føroyingum at arbeiða á veitingarskipinum. Manningin kann vera ymisk eftir skipastødd og arbeiði, men tørvur er í mesta lagi á 8 fólkum at manna eitt veitingarskip.

Hjálpar- og vaktarvirksemið (ella tilbúgvingarvirksemið) setur ikki somu serkrøv. Fleiri føroysk fiskiskip hava - við neyðugari umbygging - longu átikið sær at verði tilbúgvingarskip, fyrst og fremst á norskum leiðum. Tí skuldi borið til hjá føroyskum skipum at fingið tað arbeiði, sum fer at vísa seg, av hesum slag. Til hvønn pallin er vanliga knýtt eitt hjálpar- og vaktarskip við í mesta lagi 8 fólkum.

**Niðurstøða og tilmæli**

Krøv viðvíkjandi skili og trygd tala fyri, at oljufeløgini mugu fáa sínar veitingar úr Føroyum.

Gongur oljuvirksemið úr føroyskum havnum, fer tað væntandi at geva muna-

góðan hjáágóða í føroyska samfelagnum, tí føroysk virki fáa møguleika at lata vørur og veita tænastur, og føroyingar fáa arbeiðsmøguleikar á veitingar- og tilbúgvingarskipum ella á boripøllum, sum teir annars ikki høvdu havt. Arbeiðsmøguleikarnir hjá føroyingum høvdu gjørst upp aftur betri, um manningarskifti hevði verið umvegis føroyska floghavn, smbr. brot 4.1.4 um flutning loftvegis.

Grundað á hetta fer nevndin at mæla til, at fyristøðufeløg á føroyskum leiðum verða bundin til at lata virksemið ganga úr føroyskari havn, tí at væntandi verður tilbúgvingarútgerð útvegað saman við útgerðarvirksemi.

Í leitiskeiðinum eigur at verða roynt at brúka útbúna, sum longu er tøkur, t.e. at virksemið kann vera úr fleiri havnum. Ikki fyrr enn í einum møguligum útbyggingar- og útvinningarskeiði fer málið um varandi stað at taka seg upp.

Hvussu stóran lut føroyingar eiga at hava, er treytað av tiltøkum frá føroyska vinnulívinum sjálvum, men hjálpt kann verða á leið, við at myndugleikarnir gera vart við, hvat teir kundu hugsað sær. Vilja myndugleikarnir í útbyggingarskeiðinum seinni vera við til at avgera, hvar støðin skal vera, kunnu teir í hesum sambandi eisini seta krøv um, at føroyingar eisini vera við til at reka støðina.

### 4.1.5 **Møgulig tiltøk at fremja arbeiði og veitingar**Fejl! Bogmærke er ikke defineret.

Sum nevnt í innganginum til 4. part er tað eitt greitt politiskt endamál, at kolvetnisvirksemið skal leggjast soleiðis til rættis, at tað kann verða við til at skapa arbeiði og vinnuligan vøkstur og margfeldni í Føroyum bæði skjótt og sum frá líður.

Út frá tí, sum nevnt er í brotunum frammanfyri um eftirspurningin hjá oljuvinnuni, møguleikarnar fyri føroyskum framboði, spurningar um niðursetu og flutning v.m., skal niðanfyri í høvuðsheitum verða greitt frá, hvussu samfelagið kann royna at fremja ta føroysku luttøkuna í oljuvirkseminum, sum ynskjandi er.

Tilmæli um serstøk vinnupolitisk ynski og krøv at áseta í sambandi við fyrsta útbjóðingarumfar bíða til uppskot verður gjørt um umfarið sum heild.

**Lógarkarmurin**

Í tí uppkasti til uppskot til løgtingslóg um kolvetnisvirksemi, ið nevndin kemur við, verður henda orðing skotin upp í § 10:

*"Í loyvum eftir § 6 verða reglur ásettar um brúk av føroyskari arbeiðsmegi, veitingar og tænastur frá føroyskum fyritøkum, um útbúgvingar v.m.., umframt hvaðan loyvishavin rekur virksemi sítt."*

Tá ið henda lógargrein verður umsitin, verður ætlandi lagdur dentur á, at virksemið hjá loyvishavanum sæst aftur í *veruligum búskaparligum virksemi í Føroyum*. Hetta kann koma til sjóndar við, at arbeiðspláss verða skapt í Føroyum, og við at verulig virðisøking, t.e. eitt íkast til føroysku tjóðarúrtøkuna, kemur burturúr. Veitingar, har at kalla alt er innflutt, t.d. frá fyritøkum, ið bert av navni eru skrásettar í Føroyum, meðan veruliga arbeiðið og virðisøkingin eru uttanfyri Føroyar, uppfylla sostatt ikki endamálið við lógartekstinum í førum, har møguleikar eru fyri veruligum veitingum úr Føroyum. Alt annað líkt verður endamálið betur rokkið við veruligum tænastu- ella framleiðsluvirksemi enn við berum handilsvirksemi og aftur betur við slíkum enn við reinum umboðsvirksemi. Loysnir, ið hava við sær, at orka verður uppbygd í Føroyum til at skapa virðisøking og arbeiðspláss, verða mettar at samsvara væl við endamál lógarinnar. Eisini verður atlit havt at teimum inntøkum,

ein ávís veiting kann leggja eftir seg í Føroyum sum løn og virkisánarainntøku, og sum aftur kunnu føra til avleiddan eftirspurning, framleiðslu og arbeiði í Føroyum.

Eisini má hugsast um at lúka føroyska *tørvin* á virðisøking og arbeiði. Hesin tørvur kann skifta alt eftir, hvussu tíðirnar annars eru í Føroyum. Tey fyrstu oljuskeiðini kann stórur tørvur vera á arbeiði og virðisøking í Føroyum, men verður nógv olja funnin, og stórt virksemi tekur seg upp her á landi, verður minni brúk fyri at royna at fremja arbeiðs- og framleiðslumøguleikar í landinum. Eisini má hugsast um, at summar veitingar kunnu vera so stórar í vavi, at tær høvdu fingið ólag í føroyska búskapin og arbeiðsmarknaðin, um roynt varð at útvega tær burturav ella í størri mun úr Føroyum.

Politikkurin viðvíkjandi búskaparligum fyrimunum til Føroyar í sambandi við loyvi til oljuleiting og -framleiðslu eigur - eins og vinnulívspolitikkurin yvirhøvur - at verða orðaður og umsitin í samsvari við tær skyldur Føroyar hava sambært ríkisfelagsskapinum og sambært millumtjóða avtalum.

**Er neyðugt við reglum um samfelags-búskaparligar fyrimunir?**

Spurt kann verða, um tað er neyðugt við ásetingum, ið heita á oljuvinnuna um ella áleggja henni at koma við íkasti til arbeiði í og veitingar úr Føroyum. Og um ikki áhugin hjá oljuvinnuni sjálvari man muna nóg væl, serliga tá ið hugsað verður um, hvussu smáar avvarðandi vinnugreinar í Føroyum eru, og hvussu fáment arbeiðsmegin er.

Av royndum úr øðrum londum og av samrøðum við oljufeløgini skilst, at oljufeløgini og undirverktakarar teirra sjálvsagt helst vilja sleppa at gera av sjálvi, hvønn tey seta, og hvaðan tey keypa. Samstundis halda tey fyrimun vera í at brúka bæði arbeiðsmegi og veitingar úr teimum londum, tey arbeiða í, ofta tí at tað liggur best fyri ella kostar minst. Harumframt kann vera, at feløgini sum liður í langfreistaðari strategi vilja skapa eitt net av fíggjarligum sambondum í vertslandinum.

Møguleikin fyri, at munandi eftirspurningur eftir bæði arbeiðsmegi, vørum og tænastum kemur í av sær sjálvum, eigur tí ikki at verða útihýstur.

Tey øki, har feløgini møguliga av sær sjálvum fara at spyrja eftir arbeiðsmegi ella tænastum í Føroyum, eru nærri lýst í brotunum frammanfyri.

Hinvegin má ásannast, at Føroyar eru staddar nærhendis oljuøkjum, ið hava verið til í longri tíð, og skulu taka upp kapping við grannalond, ið hava verið í vinnuni í fjórðingsøld ella meir. Eitt oljufelag vil tí kanska heldur loysa uppgávur í Føroyum við servandum starvsfólki, felagið longu hevur, og við vørum og tænastum frá veitarum, felagið kennir frammanundan. Føroyskt starvsfólk skal fyrst lærast upp. Føroyskir veitarar eru kanska ókendir og skulu møguliga fyrst hava skjalprógv ella gerast dugnaligari, áðrenn teir verða mettir kappingarførir. Tí vilja feløgini kanska heldur arbeiða úr grannalondunum og brúka verandi arbeiðsmegi og útvegarar, um ikki myndugleikarnir lýsa eftir ella krevja, at feløgini beina eftirspurningi sínum til Føroyar.

Landsstýrið fer at hava størri trygd fyri at náa sínum málum við at spyrja ella krevja oljufeløgini eftir eini serstakari atferð. Feløgini eru von við slík ynski og krøv um allan knøttin. Innanfyri rímilig mørk fara feløgini neyvan at halda tey verða nakra forðing fyri teirra høvuðsendamáli, sum er at vinna pening burtur úr at framleiða kolvetni undir Føroyum. Serliga er hetta galdandi, um øll feløg fáa somu viðferð.

**Ásetingar við óbeinleiðis ávirkan á vinnu og arbeiði**

Ásetingar, ið út frá kolvetnispolitiskum ella øðrum - ikki vinnubúskaparligum - grundum verða settar feløgunum, kunnu óbeinleiðis stimbra vinnu og arbeiðsmøguleikar.

Tá ið leitiloyvi verður latið oljufeløgunum, verður roknað sum givið, at tað verður útskrivað dótturfelag ella deild, skrásett í Føroyum. Sostatt verður roknað við, at loyvishavin frá fyrstu stund er til staðar í Føroyum onkursvegna. Tá ið farið verður undir leitiboringar, verður roknað við, at fyristøðufelagið hevur sett á stovn rakstrarmiðstøð í Føroyum við fullførum ábyrgdarhavandi starvsfólkum, ið standa eftirlitsmyndugleikunum beinleiðis til svars.

At lúka omanfyrinevndu treytir kann í sjálvum sær skapa búskaparligt virksemi, t.d. í sambandi við eftirspurning eftir skrivstovuhølum og ymiskum tænastum.

Sama er at siga um lógarregluna um at føra kolvetni, ið framleitt verður, í land. Hóast høvuðsgrundgevingin fyri hesum kravi er av alment kolvetnispolitiskum slagi, kann tað, at kravið verður lokið, hava við sær munandi arbeiðs- og vinnumøguleikar, sum nevnt í broti 4.3. Tó er í lógaruppskotinum atgongd til at gera undantak frá kravinum um, at ført verður í land, sum viðhvørt kann koma væl við. Men undantaksloyvið kann eisini verða givið við vinnupolitiskum treytum.

Tá talan er um útgerðarstøð til borivirksemið, kann roknast við, at krøv um t.d. tilbúgving bert kunnu lúkast, um felagið er hjástatt á ein slíkan hátt, at hentast er at lata virksemið verða útgjørt úr føroyskari havn. Greiðast er tó at gera hetta til loyvistreyt. Útgerðarhavnin fer sjálv at skapa arbeiðspláss, men samstundis eisini at gera tað lættari hjá føroyskari arbeiðsmegi og føroyskum veitarum at sleppa fram at frálandsvinnuni.

Eitt krav, grundað við atliti til lóg og landaskil, um at fólkaflutningurin til og frá frálandsútbúnaði verður at ganga úr Føroyum og til Føroyar, smbr. brot 4.1.4, hevur væntandi búskaparligar avleiðingar við at geva arbeiði og inntøkur í føroysku flutningsvinnuni og við at lætta um atgongdina hjá føroyingum til at vera við í frálandsvirkseminum. Við tí denti, ið má leggjast á hesar óbeinleiðis ávirkanir, kann tað vera skilagott ikki bert at líta á loftferðslupolitikkin eina, men seta hetta sum krav, eisini í oljupolitikkinum hjá føroyskum myndugleikum.

Á einstøkum økjum kunnu krøv eisini verða sett av reglusemis- ella trygdargrundum, t.d. um staðkunnleika, ið kunnu vera til fyrimun fyri føroyska arbeiðsmegi. Øvugtan veg virka møgulig krøv, t.d. av trygdarávum, um kunnleika til fremmand mál, t.d. enskt, ið kunnu roynast, sum ein forðing hjá føroyskum umsøkjarum. Helst eru fá øki, har tað øvugta er hugsandi, nevnliga ein greiður tørvur á at krevja brúk av ella kunnleika til føroyskt mál í sambandi við oljuvirksemið, nakað ið kundi gagnað føroyingum, ið søkja sær arbeiði.

**Búskaparlig krøv ella tilboð?**

Tær búskaparligu treytir, ið settar verða í sambandi við hvørt einstakt útbjóðingarumfar, kunnu vera ymiskar bæði eftir tí føroyska tørvinum og eftir tí oljubúskaparligu støðuni, tá ið útboðið verður.

Heimildin í § 10 í kolvetnislógini at seta búskaparligar treytir, tá ið loyvi verða givin, kann setast í verk á ymiskan hátt. Myndugleikarnir kunnu velja at seta ófrávíkilig krøv og stirvnar treytir. Men tá ið hugsað verður um tað langa tíðarútlitið, og hvussu nógv óvæntað, ið henda kann í loyvistíðarskeiðinum, kann vera skilagott at orða treytirnar í rundum og almennum vendingum, har í fyrsta umfari verður lýst eftir tilboðum frá feløgunum undir teirri fortreyt, at samráðst verður partanna millum, um hvussu treytirnar skulu lúkast í verki. Alt eftir, hvussu stóran áhuga

feløgini hava fyri at søkja um loyvi í einum ávísum útbjóðingarumfari, kunnu myndugleikarnir gera feløgunum greitt, at dentur verður lagdur á tilboð á búskaparliga økinum, tá ið tvey ella fleiri samtøk kappast um sama havbotnsøki. Fyri tann umsøkjara, ið fær loyvi, eru slík tilboð at rokna sum fortreytir fyri loyvinum við teimum skyldum, sum standast av.

Víst kann verða til tær vanligu orðingarnar, tá talan er um arbeiði og keyp av vørum og tænastum, sum eisini eru kendar frá sáttmálunum hjá Landsverkfrøðinginum við høvuðsverktakarar uttaneftir, ella frá forkanningarloyvum, t.d. til tær serligu seismisku upptøkurnar í 1994-95 og í sambandi við Lopransboringina í 1996. Tær áseta vanliga, at loyvishavin bindur seg til í størst møguligan mun at gera brúk av arbeiðsmegi, vørum og tænastum úr vertslandinum, her Føroyum, tá ið hetta er gjørligt í verki og treytað av kappingarføri. Eisini átekur loyvishavin sær at seta somu krøv til sínar verktakarar og teirra undirútvegarar.

Alt eftir kappingarstøðuni og øðrum umstøðum ber til, tá ið loyvi verða givin til at leita eftir kolvetni og at framleiða tað, ið funnið verður, at fara longur við at útgreina, á hvørjum økjum lýst verður eftir føroyskum arbeiði og veitingum og at gera skyldurnar hjá feløgunum greiðari.

Tá ið slík ynski frá myndugleikunum og tilboð frá feløgunum verða orðað, er vert at hugsa um, at slíkar skyldur neyvan eru nóg mikið í Føroya serligu støðu, á gáttini til eitt leitiskeið. Tá ið vit fara í gongd, fjórðingsøld eftir grannalondini, má havast í huga, at tað ikki frá byrjan kann roknast við, at nóg mikið er til av føroyskari arbeiðsmegi við kravda førleikanum ella av føroyskum útvegarum við nóg stórum útboði av vørum og tænastum av teirri dygd, ið krevst, íroknað tíðarfreist.

Tí eru krøv og/ella lyfti um at brúka føroyska arbeiðsmegi og føroyskar veitingar ofta ikki fullfíggjað, uttan at krøv eisini verða sett um upplæring og útbúgving, sum kunnu gera tað møguligt at uppfylla treytirnar. Neyðugt er við eykaavtalum við oljufelagið og/ella við undirverktakarar tess um at útbúgva viðkomandi føroyska arbeiðsmegi og hjálpa føroyskum virkjum at ogna sær neyðugan førleika, møguliga við at gera avtalur um vørumenning.

Nærri ásetingar um nýtslu av føroyskari arbeiðsmegi og føroyskum veitingum kunna oftast verða gjørdar í einari avtalu, sum gjørd verður millum myndugleikarnar og loyvishavan, í sambandi við at myndugleikarnir útskriva loyvið.

**Uppfylging av búskapar-treytunum**

Í uppkastinum til § 14, stk. 3 í kolvetnisvirksemislógini, verður skotið upp at hava reglu um, at feløgini, tá ið tey leggja fram fyri myndugleikarnar eina útbyggingarætlan fyri oljuleið, tey hava funnið, eisini greiða frá, hvussu henda ætlan fer at ávirka búskap og arbeiðsmøguleikar í Føroyum. Týðandi sáttmálaskyldur kunnu ikki verða átiknar, fyrrenn ætlanin er góðkend av myndugleikunum.

Í Danmark, Bretlandi og Noregi hevur verið siðvenja, at góðkenning myndugleikanna av øllum størri anleggsarbeiðum ella keypum hevur givið myndugleikunum innlit í, hvør útvegari, verður valdur.

Viðgerðin av slíkari útbyggingarætlan er eitt av teimum “vegamótum” ella ein av teimum “varðum” á leiðini, har myndugleikarnir saman við loyvishavanum kunnu eftirmeta avrikið higartil á búskaparliga økinum og leggja til rættis komandi tiltøk.

Eins og í teimum londum nevnd eru, verður í § 11 í lógini skotið upp at hava heimild at áseta reglur um frágreiðingar, ið kunnu fata um ætlað ella gjørd innkeyp v.m. Forskriftir um hetta ger landsstýrið.

Undir Útbjóðingardirektivinum hjá ES (93/38/EBF), ið sum EBS-regla eisini er

galdandi í Noregi, er álagt at brúka ávísar kappingarfremjandi innkeypsmannagongdir. Eisini er bannað at krevja serrættindi fyri landsins egnu. ES-reglurnar áleggja rættiliga víðfevnandi krøv um at kunna skjalprógva øll keyp v.m., so myndugleikarnir fáa hildið eyga við, at framíhjárættindi eftir tjóðskapi ikki verða givin. Tey feløg, ið kunnu væntast at arbeiða á føroyska landgrunninum, mugu haldast at vera von við at virka bæði undir tí gamla regluverkinum í Norðsjóvarlondunum og undir ES-reglunum, eisini viðvíkjandi innkeypsmannagongdum og frágreiðingum.

Feløgini eru sostatt ikki óvon við frágreiðingarreglur. Føroyskar mannagongdir viðvíkjandi fráboðanum og eftirliti nýtast ikki vera so nágreindar sum tær omanfyri nevndu, burtursæð frá teimum heilt fáu og avmarkaðu økjum har føroyskur veitingaráhugi kemur upp á tal.

**Viðurskiftini millum føroyskt og útlendskt**

Roknast kann við, at oljuvirksemið - serliga í fyrstuni - fer at draga bæði arbeiðsmegi og virkir uttaneftir til Føroyar. Harvið fær oljuvirksemið í Føroyum tilført kunnleika, førleika, fæ og skipan.

Hóast virðið í hesum verður viðurkent, kann hetta verða sett í skugga av stúran fyri, at føroysk arbeiðsmegi ikki sleppur nóg væl framat, og fyri at føroysk virki ikki klára at taka tey aftur, sum koma uttaneftir, og tískil fara at tapa í kappingini. Møguliga fáa tey bert valið millum at verða yvirtikin av útlendingum ella at hvørva.

Henda stúran hevur djúpar røtur og eigur at verða tikin í álvara.

Fyri ta politisku skipanina í Føroyum er aðalendamálið, at oljuvirksemið sum heild einahelst kemur teimum, sum í Føroyum búgva, til góða og/ella skapar virðisøking í virkjum í Føroyum sum lið í eini heilskapaðari menning av tí føroyska samfelagnum.

Hetta aðalmál eigur at ávirka, hvussu føroyskir myndugleikar orða og umsita krøv og ynski til oljufeløgini um fyrimunir fyri føroyskt arbeiði og føroyskan búskap.

Tá ið krøv verða orðað, og eftirmett verður, hvussu væl tey eru lokin, er helst í hesum sambandi skilagott at leggja høvuðsdentin á slíkt, sum at persónar við tilknýti til tað føroyska samfelagið fáa hóskandi útbúgvingar, at yrkisligur førleiki og leiðsluførleiki verða bygd upp í Føroyum, og á samfelagsbúskaparlig eyðkenni: at í Føroyum verður arbeiði og virðisøking - nakað, sum við ávísum neyvleika kann lesast út úr rokniskapunum hjá føroyskum virkjum og úr frágreiðingunum hjá loyvishavunum og verktakum teirra.

**Tiltøk inneftir**

Sum áður nevnt er ikki nóg mikið at krevja ella vænta, at altjóða oljufeløgini spyrja eftir føroyskari arbeiðsmegi og føroyskum vørum og tænastum.

Politikkurin at fremja arbeiði og vinnu í Føroyum hevur eisini eina týðandi síðu, ið horvir inneftir í Føroyum.

Arbeiðsmegi viðvíkjandi mugu føroyskir myndugleikar sjálvir átaka sær at ganga á odda at tryggja føroyingum meira almennan útbúgvingarligan førleika til at arbeiða í virksemi, ið hevur við olju at gera. Tey meira serstøku tiltøkini, ið roknast kunnu við frá oljufeløgunum, eiga at hóska saman við hesum.

Nakað tað sama kann sigast um virki. Ein fortreyt er, at førdur verður ein vinnupolitikkur, ið ger tað hugaligt at varðveita, stovna og reka virki í Føroyum. Vilja vit heldur hava, at fólk í Føroyum stovna virki, enn at útlendskar fyritøkur stovna deildir ella dótturfeløg, er betri at royna at fremja tað fyrra heldur enn at forða tí seinra.

Á mongum økjum ber til at broyta lóggávu og umsitingarliga siðvenju í vinnuvin-

arliga borðið. Peikað hevur verið á hetta við onnur høvi[13], og skal tað tí ikki verða endurtikið her.

Oman á hetta koma tey miðvísu tiltøkini at gera føroysk virki betur før fyri at selja til ta ógvuliga serstøku oljuvinnuna. Kann roknast við, at knappur landskassa-peningur verður brúktur til vinnuframa, verður hann helst nýttur mest skynsamliga til at stuðla virkjum til at byggja upp slíkan førleika. Ein annar fyrimunur við hesum er, at ein hækkan av førleikastiginum hjá viðkomandi virkjum hevði eisini komið teimum til gagns, um lítið ella einki kom í lag av oljuvirksemi, ella eftir at eitt møguligt oljuskeið er av.

**Fyrisiting**

Tann politikkur, ið umrøddur er frammanfyri, kann alt eftir umstøðunum fara at seta munandi krøv bæði til Oljufyrisitingina og til aðrar myndugleikar.

At orða og neyvt vísa á ynski, krøv og treytir fyri ella at gera avtalur við oljufeløgini um arbeiði og innkeyp, krevur kunnleika bæði til føroysku møguleikarnar og til oljuvirksemið. Henda uppgáva skal røkjast av oljumyndug-leikunum, men krevur at aðrir vinnuvendir myndugleikar eins væl og vinnufeløgini eisini gera sítt.

At fremja førleikan hjá føroyskari arbeiðsmegi og føroyskum virkjum fer fyrst og fremst at hvíla á øðrum myndugleikum enn oljumyndugleikunum.

At fylgja við í teimum ætlanum, oljufeløgini hava um leiting, útbygging, framleiðslu v.m. og at kunna vinnuna ella avvarðandi vinnuframamyndugleikar um hetta, er ein uppgáva, sum í fyrstu syftu er hjá Oljufyrisitingini. Síðan stendur tað til vinnuna sjálva at fáa sum mest burtur úr hesi kunning.

Oljufyrisitingin skal eisini nýta orku til at hava eftirlit m.a. ígjøgnum tær frágreiðingar, oljufeløgini skulu lata at fylgja við í, um krøv, lyfti ella avtalur um føroyska meðvirkan verða uppfylt, og at tala at, um tey ikki verða lokin. Tann munabesti møguleikin fyri at løna feløgunum hetta aftur er tó minni eyðsýniligur: við næsta “vegamót”, sum ofta kann vera næsta útbjóðingarumfar, ber til at meta um, hvussu væl feløgini vilja ella duga at samarbeiða út frá avrikum teirra higartil.

Tá ið hinvegin er talan um veruliga marknaðarføring av oljuvendum føroyskum ídnaði yvir fyri oljufeløgunum ella undirútvegarum teirra, er væntandi, at tað mesta arbeiðið, t.d. við at skipa fyri luttøku á messum o.l., verður gjørt av vinnuni sjálvari og felagsskapum hennara, møguliga stuðlað av viðkomandi vinnuframamyndugleik-um. Men eisini her fer Oljufyrisitingin at kunna stuðla, m.a. við at vera við á ráðstevnum v.m. og eisini ígjøgnum sín kennskap við oljufeløgini.

Tí má væntast, smbr. kapittul 3.3 um fyrisiting, at ein deild í Oljufyrisitingini tekst við at orða búskaparlig ynski/krøv, at hava eftirlit við, at tey verða lokin, og hevur áhaldandi samskifti við vinnuframamyndugleikar, vinnulívið og oljufeløgini um møguleikar fyri arbeiði og veitingum v.m.

Tá tað snýr seg um møgulig krøv, ynski, lyfti og avtalur viðvíkjandi útbúgving, gransking v.m., og hvussu tey verða uppfylt, verður eisini talan um eitt arbeiðsbýti millum Oljufyrisitingina og aðrar viðkomandi stovnar og myndugleikar.

**Samandráttur**

Nøkur *krøv* eru so væl undirbygd longu av øðrum orsøkum enn teimum vinnu-ligu, at roknað verður við, at tey verða partur av teimum *almennu treytunum* í

[13] Sí t.d. álitið "Karmar fyri føroyskt vinnulív", Partarnir á arbeiðsmarknaðinum 1994

sambandi við eitt og hvørt útbjóðingarumfar, m.a. fylgjandi:

- Loyvi verða bert latin fyritøkum, ið hava sett seg niður antin sum feløg ella sum deildir, í Føroyum.
- Leitivirksemið krevur rakstrardepil hjá fyristøðufelagnum í Føroyum.
- Í sambandi við leitiboring krevst, at trygdarútgerð verður goymd í Føroyum, og at føroysk útgerðarstøð verður nýtt.
- Fólkaflutningur til og frá boripalli gongur um floghavn í Føroyum.
- Verður kolvetni funnið, verður framleiðslan førd í land í Føroyum, um ikki undantak verður loyvt.

Spurningurin um, hvørt tað í fyrsta útbjóðingarumfari eisini skulu verða sett *serstøk krøv* út um tey omanfyri nevndu, veldst um støðuna, tá ið avgerð verður tikin um útbjóðingina, og verður hesin spurningur tí ikki viðgjørdur nærri á hesum sinni.

Undir øllum umstøðum ber til at rokna við, at í sambandi við eitt og hvørt útbjóðingarumfar verða orðingar í útboðstilfari og loyvum um, at loyvishavin skal brúka føroyska arbeiðsmegi og veitingar úr Føroyum. Men hvussu víðfevnandi og hvussu neyv slík krøv verða í tí ávísa umfarinum, eigur at verða gjørt av í hvørjum einstøkum føri út frá eini meting av støðuni tá. Hetta er ikki minst galdandi fyri fyrsta útbjóðingarumfar.

Í sambandi við at loyvi verða útskrivað, verða ásetingar gjørdar um búskaparligar fyrimunir til Føroyar og møguliga um tiltøk viðvíkjandi útbúgving og øðrum hætt-um at økja um førleika. Hesar ásetingar verða helst feldar niður í avtalur, sum meira neyvt vísa á, hvussu meira alment orðaðar treytir frá myndugleikunum og lyftir frá feløgunum skulu setast í verk. Hesar avtalur skulu verða fylgdar upp við mannagongdum um ætlað og gjørd innkeyp v.m. og um eftirmeting av avrikinum, tá ið høvi býðst.

Ásetingar um búskaparligar fyrimunir skulu orðast og setast í verk, m.a. við atliti til tey serligu viðurskiftini í Føroyum, her uppií at føroyskt vinnulív í byrjunarstøð-uni er heldur illa fyri, og við atliti til stovnsligar bindingar í sambandi við ríkis-felagsskapin við Danmark og millumlanda skyldur.

Roknast má við munandi umsitingararbeiði bæði hjá oljumyndugleikunum og hjá øðrum vinnuligum myndugleikum. Hetta arbeiðið eigur at verða gjørt í neyvum samstarvi við vinnulívið og tess felagsskapir. Eisini eiga útbúgvingar- og vinnu-politikkurin yvirhøvur at verða orðaðir og førdir soleiðis, at teir styðja royndirnar at fáa búskaparligar fyrimunir burtur úr eini møguligari oljumenning.

## 4.2 FØROYSKT OLJUFELAG

Niðanfyri verður røtt um, at lata føroyska luttøku í eini møguligari kolvetnisvinnu vera soleiðis, at føroysk oljufeløg eru við, lutvíst við tí fyri eyga at reka handilsligt oljuvirksemi og lutvíst fyri at røkka samfelagsligum málum. Fyrst verður røtt um møguleikarnar at stovna fullkomiliga privat, handilslig oljufeløg; síðan um at stovna landsoljufelag undir tí almenna.

### 4.2.1 Føroyskur hugur at vera beinleiðis við í kolvetnisvinnu

Tekur kolvetnisvirksemi seg upp á føroyskum øki, tykist natúrligt, at føroyingar verða við, ikki bara í arbeiði hjá útlendskum oljufeløgum og við veitingum til teirra, men eisini beinleiðis í sjálvum oljufelagavirkseminum. Eins sjálvsagt og tað er, at skip, ið føroyingar eiga, eru við til at fiska føroyska fiskatilfeingið, eins natúrligt tykist tað at stevna eftir, at føroysk feløg sum frálíður verða við til at gagnnýta kolvetnistilfeingið í føroysku undirgrundini.

At byggja upp aðrar vinnugreinir enn fiskivinnu hevur leingi verið eitt av fremstu málunum, men striltið hevur gingist av náttúrugivnum vansum, sum t.d. at annað ráevnistilfeingi hevur skortað, at heimamarknaðurin er lítil, og at langt er til aðrar marknaðir. Hóast tað vinnulívspolitiskt áhaldandi verður roynt at menna vinnur, sum ikki bara eru grundaðar á ítøkiligt náttúrutilfeingi, nakað ið oljuinntøkur kanska kunnu vera við til at stimbra, er tó vert at minna á, at smá útjaðarasamfeløg sjáldan hava ráð til at vera tær vinnur fyriuttan, sum byggja á tilfeingið á staðnum. Oljuvirksemi undir Føroyum fer at førka tey, ið keypa vøru og tænastur knýtt at olju, tættari at føroysku útbjóðarunum og at skapa umstøður til, at føroyingar beinleiðis verða uppi í útvinningarvirkseminum.

Samanburður við fiskivinnuna heldur bara fyri ein part. Áðrenn farið varð undir havfiskiskap í Føroyum, var fiskiskapur ikki fremmandur, og tøkniligu og fíggjarligu krøvini vóru í fyrstuni ikki ovurhonds stór. Eftir stigvísa fíggjarsavnan og tøkniliga menning í mong tíggjuáraskeið kom føroysk vinna sum frá leið upp á sama stig, sum aðrar framkomnar fiskivinnutjóðir. Tá um oljuvinnu ræður, er ikki nóg hollur kunnleiki í byrjanarstøðuni, og fíggjarkrøv og váðar eru ovurhonds stór. Kostnaðurin av neyðugu leitingini hjá einum oljufelagi kann koma upp í hundraðtals milliónir krónur, uttan at trygd er fyri at finna rakstrarverdar nøgdir. Ein einstøk byggiverkætlan fyri eina oljuleið kann lættliga koma upp í 6-8 mia. kr., sum svarar til nógv meira enn alla árligu føroysku tjóðarúrtøkuna.

Nú eru Føroyar merktar av fíggjartroti við einari nettouttanlandsskuld, sum svarar til stívliga árs tjóðarúrtøku og einari bruttouttanlandsskuld, sum er næstan tvífalt tað. Búskaparliga er ikki skilagott í tílíkari støðu at leggja samfelagsins knappa fíggjartilfeingi í vinnu, sum setur stór fíggjarkrøv, hevur stóran váða og hevur langa afturgjaldstíð, sjálvt í besta føri.

### 4.2.2 Alment um oljufelagsvirksemi

Tað er ymist, hvat stig ein vil koma uppá, tá ið farið verður upp í oljuvirksemi:

a) Tann *óvirknasta* háttin brúka t.d. pensiónskassar og aðrir fíggjarstovnar, sum annaðhvørt keypa partabrøv í virknum oljufeløgum, læna til ítøkiligar kolvetnisverkætlanir ella eru óvirknir partar í oljufelagasamtøkum (um so er, at viðkomandi myndugleikar loyva hesum slagi av feløgum at verða við í leitisamtøkum. Noreg loyvir tí ikki). Hetta slag av luttøku krevur bara fæ og kunnleika at umsita pening.
b) Ein *virknari* luttøka treytar, at felagið umframt sítt fíggjarinnskot eisini kemur við sínum virkna íkasti av leiti-, útbyggingar- og útvinningarkunnleika í sambandi við avgerðir, ið verða tiknar í samtakinum. Hetta krevur eitt lið av kønum jarðfrøðingum, verkfrøðingum o.ø.
c) Virknasta luttøkan er, at ein eisini kann átaka sær arbeiði sum *fyristøðufelag* fyri eina leitiverkætlan. Hetta arbeiði setur stór krøv til samskipan og manning.
d) Loksins eru tað tey *fult samskipaðu fleirliðaðu (integreraðu) oljufeløgini*, sum afturat oljuleiting og -útvinning eisini eru uppi í flutningi, reinsing (raffinering) og sølu. Hetta setur ógvuliga stór fíggjar-, skipanar- og manningarkrøv.

### 4.2.3 Møguleikin fyri privatum føroyskum oljufeløgum

Einki forðar fyri at stovna føroysk oljufeløg við teirri ætlan at vera við í leitisamtøkum, sum verða skipað til at søkja um loyvi á føroyskum leiðum. Tey kunnu ogna sær hóskandi yrkisligan førleika uttaneftir, ella sjálvi stigvíst royna at byggja hann upp.

Kolvetnisleiting kring Føroyar í sambandi við fyrsta útbjóðingarumfar fer at seta stór krøv til yrkisligan sakkunnleika. Stórar upphæddir verða vágaðar til leiting og útbygging.

Ein varislig metan er, at ein felagskapur brúkar fyrst ½ mia. kr. til forkanningar og leitingar og síðan 8 mia. kr. til bygging o.a., tilsamans 8,5 mia. kr. í 5-7 ár, áðrenn inntøkurnar vísa seg, soleiðis at hesar upphæddir við rentum eru afturrindaðar kanska eftir 7-10 árum.

Í leitiskeiðinum verður nógv váðað jarðfrøðiliga, so at skilja, at vandin fyri ikki at finna kolvetni í lønandi nøgdum er stórur.

Tá ið rakt er við keldu, og útbyggingin fer í gongd, verða framvegis handilsligir váðar knýttir at framleiðsluvánum, oljuprísum o.ø. Fyri hvørt prosentstig, felag luttekur við, vágar tað smbr. tí, sum nevnt er omanfyri, á leið 85 mió. kr. eftir nøkrum árum, og so koma rentur omaná.

Altjóða oljufeløgini tryggja sín leitiváða á ymiskan hátt. Útreiðslurnar verða goldnar burtur av einum stórum jøvnum inntøkurensli frá oljuverkætlanum, sum longu eru í gongd. Skattliga royna feløgini at skipa seg soleiðis, at leitiútreiðslurnar koma til frádrátt í skattskyldugu inntøkuni í heimlandinum, soleiðis at tær fyri ein part verða mótsvaraðar við spardum skatti á loypandi inntøku. Tey spjaða harafturat váðan, lutvíst við at skipa samtøk, har hvørt felag eigur sín part, lutvíst millum lond, soleiðis at tey hava leitingar í gongd í fleiri oljuøkjum samstundis, soleiðis at sæð undir einum eru nóg stór sannlíkindi at raka við kolvetni. Harumframt hava feløgini vanliga munagott eginfæ at standa ímóti við.

Grundað á hetta sæst, at eitt hugsað føroyskt oljufelag, sum stovnað verður við tí í hyggju at vera við í einari einstakari føroyskari leitiverkætlan, stendur við

einum lutfalsliga stórum ótryggjaðum leitiváða. Teir einastu framman fyri nevndu hættirnir, sum tøkir eru til at minka um váðan, tykjast verða møguleikin fyri skattafrádrátti og at halda seg til ein ógvuliga lítlan part í samtakinum, helst væl undir 5%, um ikki felagið verður heilt ella partvíst borið av hinum samtakspørtunum.[14]

Verandi ella nýstovnaði føroysk feløg kunnu fáa ilt við at lúka treytirnar um "sakkunnleika, royndir, førleika og fíggjarorku", sum oljumyndugleikarnir smbr. § 6 í uppkastinum til lógaruppskot um kolvetnisvirksemi fara at seta samtaksluttakarunum. Viðurkennast má, at íkast frá føroyskum feløgum til fígging og oljukunnleika, uttanveltað sæð, valla mennir evnini av týdningi hjá samtaki at loysa leiti-, útbyggingar- ella útvinningaruppgávurnar. Hetta nýtist kortini ikki at útihýsa møguleikanum, at altjóða oljufeløg sum lið í eini føroyskari strategi vilja hava føroysk feløg við í síni samtøk.

Myndugleikarnir fara sum heild at halda eina og hvørja føroyska luttøku í oljuvinnu vera góða. Men at raðfesta tað høgt, at smá støk føroysk feløg eru við í umsøkjarasamtøkunum, tykist ikki undir umstøðunum, sum eru, at verða skynsamt, bæði út frá samfelagsfíggjarligum orsøkum, sum nevndar eru omanfyri, og grundað á royndir yvirhøvur úr øðrum londum um møguleikarnar hjá peningaveikum oljufeløgum at standa seg, sí niðanfyri. Verður hugsað um at byggja upp eitt oljuyrkisligt umhvørvi í Føroyum, er tað ongin fyrimunur at spjaða orkuna á nógv støk feløg.

Styrkin kundi verið størri, um nøkur føroysk vinnurekandi feløg tóku seg saman um eitt felags føroyskt oljufelag. Men við umrøddu fíggjarkrøvum í hyggju, og tí sum niðanfyri verður sagt um royndirnar í øðrum londum, hevði verið ivasamt, um tílíkt felag undir umstøðunum, sum nú eru, kundi fingið nóg stóra fíggjarliga og yrkisliga styrki til sjálvt at farið upp í samtøk og á nakran hátt kunnað gjørt vart við seg, so tað gjørdi mun.

Fyri ikki at lata nakran møguleika verða óumrøddan kundi ein máti verið nevndur, ið er at geva loyvi til leiting og útvinning til privatar føroyskar fyritøkur, sum ikki sjálvar høvdu kunnað lokið førleikakrøvini í § 6 í lógini, fyri síðan at lata tær fara út at leita eftir útlendskum samstarvsfeløgum, sum lúka hesi krøv. Tað hevði verið tað sama sum at stovnað eitt - uttanveltað sæð óneyðugt - ímillummannavirksemi, sum bara kundi fingið pening av teirri upphædd, sum annars hevði verið at býtt ímillum landskassan og oljufeløgini við førleikanum. Slík framferð hevði ikki verið sambærilig við aðaláhugamálini hjá føroyska samfelagnum og hevði kunnað skatt trúvirðið hjá føroyskum oljuumsitingarpolitikki.

Eitt oljufelag eigur at kunna útvega bæði fígging og yrkiskunnleika. Í Føroyum skulu bæði verða bygd upp úr ongum. Við bering kann sleppast undan teimum fíggjarkrøvum, sum knýtt eru at sjálvari leitingini, soleiðis at útvegaði eginpeningurin burturav kann verða nýttur til at byggja upp skipan og yrkisligan og handilsligan førleika. Bering má verða hildin at hava sum treyt, at tað er tað almenna og ikki einstaklingar, ið eiga felagið, smbr. niðanfyri.

---

[14] At eitt felag "verður borið" av hinum parthavarunum merkir, at hini feløgini gjalda útreiðslurnar hjá viðkomandi parthava til leiting og - sjáldnari - útbygging, møguliga soleiðis, at hesi útlegg heilt ella partvíst verða afturgoldin við partinum í framleiðsluni hjá borna felagnum. Ein "bering" fatar kortini vanliga ikki um kostnað í sambandi við eginrakstrarútreiðslur hjá felagnum.

***Danskar og norskar royndir***

Bæði í Danmark og Noregi hava royndirnar víst, at fíggjarkrøvini til veruliga burðardygg og virkin privat oljufeløg eru so stór, at neyðugt hevur verið við landsumfatandi samskipanum. Í so máta eru eitt nú Mærsk í Danmark og Norsk Hydro í Noregi undantøk.

Tá ið oljuvinnan kom í gongd í Noregi, var eitt privat partafelag, Norsk Hydro, sum kortini partvíst var útlendsk og partvíst ríkisogn, sum hevði bæði nóg stóra fíggjarstyrki og altjóða handilsroyndir til sjálvt at fara upp í oljusamtøk við týðandi pørtum.

Í norska Saga gingu fleiri - eftir føroyskum viðurskiftum stór - feløg, sum úrslit av trýsti frá stjórnini, saman at fáa til vega neyðugu styrkina. Saga hevði, tá ið tað varð stovnað í 1972, innskotsfæ á 1 mia. norskar krónur og hevði sambært egnum upplýsingum (miðskeiðis í 1996) eitt mett marknaðarvirði, sum var umleið 7 mia. DKK.

Í Danmark er Denerco skipað nakað líkt Saga og er kortini framvegis eitt rættiliga lítið felag við færri enn 10 fólkum í starvi, sum gera tað arbeiðið, sum nevnt er í b) í broti 4.2.2 omanfyri. Denerco er frá 1.1.1997 lagt um frá einum K/S (kommanditt felag) við 340 mió. kr. í innskotsfæi til eitt partafelag við 600 mió. kr. í partapeningi.

Denerco var upprunaliga danskt burturav, men í 1995, tá ið ØK við 26,38% tók seg burturúr, tók amerikanska oljufelagið Amerada Hess við hesum parti.

Leikpartin sum fyristøðufelag hevur Danop við uml. 70 starvsfólkum, har Denerco er ánari saman við almenna felagnum Dopas, smbr. niðanfyri. Í Danmark finst m.a. eisini eitt felag, sum LD-energi A/S, sum "Lønmodtagernes Dyrtidsfond" eigur, og sum rekur tað undir a) í broti 4.2.2 nevnda virkissniðið, lutvíst sum samtaksluttakari, lutvíst sum parthavi í Denerco.

Saga er eisini fyristøðufelag, men var á heysti 1996 við sínum 1400 starvsfólkum framvegis eftir altjóða máti eitt lutfalsliga lítið oljufelag. Tað fæst ikki í stórvegis máti við tey í broti 4.2.2 undir stavi d) nevndu virksemi. Uml. 40% av eginognini hjá Saga eru á útlendskum hondum.

***Samanumtøka***

Donsku og norsku royndirnar tala ikki fyri at seta álitið á fleiri smá, privat føroysk oljufeløg. Ein breið samgonga av føroyskum feløgum, tey sterkastu roknað uppí, man ivaleyst megna at útvega fæ, men valla nóg mikið til at kunna fara inn í oljuleitivirksemi og framleiðslu á føroyskum landgrunni, so tað munar. Neyðugi yrkisligi førleikin má eisini verða bygdur upp frá grundini.

Eitt møguligt myndugleikakrav ella -ynski um, at privatfeløg verða borin, nakað sum, smbr. niðanfyri, helst fer at minka landskassans inntøkumøguleikar frá einari oljuverkætlan, tykist torført at sameina við vanligar aðalreglur um at fara eins við øllum landsins borgarum.

Grundað á hetta tykist tað fyri fyrst skilabest hjá myndugleikunum at vera rættiliga uttanveltaðir í spurninginum, um privatir føroyskir partar eiga at vera við í samtakunum. Sum er, sæst ikki nøkur góð grund til beinleiðis at eggja til tílíka luttøku, men heldur eingin grund at mótvirka henni.

### 4.2.4 Hugsanin um eitt landsoljufelag

Lond, ið standa okkum nær, sum Danmark, Noreg og Grønland, hava oljufeløg, sum tað almenna eigur. Tað sama hevði Bretland fyrr. Í mongum londum í triðja heiminum standa almenn oljufeløg í miðdeplinum í oljupolitikki landsins. Afturat tí kemur, at føroyskt vinnulív fleiri ferðir hevur reist spurningin um onkursvegna at stovna føroyskt landsoljufelag (var m.a. við í samtykt á ársfundinum hjá Føroya Oljuídnaði í 1995), og tykist spurningurin at hava ávísan gróðrarbotn manna millum í Føroyum. Tí er vert at kanna møguleikarnar og fyrimunir og vansar við at stovna tílíkt felag.

Spurningurin er, hvørji áhugamál kunna verða røkt við tílíkum felag, ella um somu endamál kunnu røkkast á annan hátt. Eisini kann verða spurt um "kostnaðin" av einum almennum oljufelagi, bæði beinleiðis til stovnan, rakstur og váða, og óbeinleiðis m.a. við mistari skattainntøku ella á annan hátt.

Spurningurin er eisini, hvønn leikpart eitt landsoljufelag eigur at hava í tí samlaðu oljuskipanini, og hvussu felagið, um tað verður sett á stovn, eigur at verða skipað. Eisini verður neyðugt at ímynda sær, hvat oljufeløgini fara at siga um eitt - møguliga borið - landsoljufelag.

## 4.2.5 Leikpartar hjá einum landsoljufelag

*Politiska grundgevingin* fyri einum almennum oljufelagi kann annaðhvørt vera av *sosialistiskum* ella av *tjóðskaparligum* slagi, møguliga báðum. Sosialistiskt litaða grundgevingin kann t.d. vera, at framleiðslu av so týðandi ráevni eigur tað almenna at standa fyri, ella at alt fólkið eigur at eiga ta fæsavnan, sum stendst av oljuvirksemi, og sum tískil eigur at vera í almennum samanhangi. Tjóðskaparliga litaða grundgevingin kann vera, at tá ið landið og fólkið eiga tilfeingið, eigur tað ikki fullkomiliga at vera latið upp í hendurnar á útlendingum at gagnnýta. Eru eingi yrkisliga før og peningasterk privat innlendsk feløg, verður - eisini út frá ikki-sosialistiskum sjónarhorni - hildið neyðugt, at skipa virksemið í almennum samanhangi. Endaliga kann eisini verða tikið undir við einum almennum oljufelag fyri at røkja landsfíggjarlig áhugamál.

Í mongum oljuskipanum í menningarlondum hevur eitt landsoljufelag heilt týðandi leikpart. Tað hevur fingið einkarrætt til alla kolvetnisleiting og framleiðslu og kann gera arbeiðini í hesum sambandi annaðhvørt sjálvt ella við at gera sáttmálar við tvørtjóða, handilslig oljufeløg. Í mongum av hesum londum sæst kortini, at fullkomiliga ella partvíst verður vent aftur til at geva altjóðafeløgum loyvi at virka meiri ella minni sjálvstøðugt.

Her verður ikki mælt til eina skipan fyri Føroyar, sum líkist teirri omanfyri, men eina nýtíðar loyvisskipan, har leiting og framleiðsla fyrst og fremst verður í handilsligum oljufeløgum, sum kappast um at fáa loyvi tillutað eftir teimum treytum, sum føroyska samfelagið setur, og har samfelagið stýrir oljuvirkseminum við lógum, reglugerðum, loyvistreytum og innliti í virksemið hjá handilsligu virkjunum.

Í tílíkari loyvisskipan kann rúm eisini vera fyri oljufelagi, sum stjórnin eigur. Slík feløg eru, sum nevnt, virkin í Noregi, Danmark og Grønlandi og hava áður verið í Bretlandi.

Niðanfyri verður greitt frá, hvørjum málum roynt verður at røkka við slíkum landsoljufelag eins og felagsins skipan og arbeiðsháttum.

### 4.2.6 Endamál við einum føroyskum landsoljufelag

Kemur landsoljufelagið, fer tað at verða eitt amboð ella ein skipanarháttur, sum kann verða við til at røkka einum ella fleiri serstøkum kolvetnispolitiskum málum. Niðanfyri verða hesi endamál gjøgnumgingin:

- at byggja upp yrkisførleika
- eitt eyka ella eitt øðrvísi skattleggingaramboð
- beinleiðis ávirkan á avgerðartilgongdina
- høvi at fáa innlit í virksemið
- veitingartrygd og orkupolitikkur
- at tryggja verktøkur og arbeiðsmegi í landinum
- at fremja langtíðar samfelagsbúskaparlig mál

***Føroysk luttøka í oljuvirkseminum, førleikauppbygging***

Høvuðsgrundin fyri at stovna føroyskt landsoljufelag í sambandi við oljuleiting og -útvinning á føroyska landgrunninum man helst vera, umframt at vinna pening til landskassan og sostatt føroyska samfelagið, at tryggja, at føroyingar verða við í hesum virksemi. Á tann hátt kann føroyskur førleiki verða bygdur upp til at reka oljuleiting og -útvinning við virksemi, sum knýtir seg at tí, fyrst og fremst í sambandi við eitt føroyskt oljutíðarskeið, men eisini longri frammi við atliti at einum eftir-oljuskeiði, tá ið kunnleiki og førleiki vónandi kunnu verða tøkir at brúka eisini í útlondum.

Við at taka virknan lut, smbr. pkt. b) í broti 4.2.2**,** í einum samtaki ella fleiri ígjøgnum leiti-, útbyggingar- og útvinningarskeiðið, fer felag, sjálvt um tað bert hevur lítlan part, at kunna byggja upp kunnleika og royndir, sum í longdini kunna verða brúkt, fyrst við partvíst at verða við í fyristøðufelagsarbeiði og síðan við at átaka sær uppgávuna sum fyristøðufelag burturav, smbr. pkt. c) í broti 4.2.2.

Sum nevnt í broti 4.2.2 má førleiki byggjast upp frá botni. Hetta ber betur til í *einum* felag enn í fleiri smáum eindum hvør sær. Men tað má henda spakuliga og við natúrligum stevi. Í fyrstuni verður litið á serkunnleika uttaneftir, sum stigvíst kann venja eitt vaksandi lið av føroyskum oljuserkønum.

Umframt hetta vinnupolitiska aðalendamál verður kanska lagt eftir øðrum málum við einum almennum oljufelag. Nøkur teirra verða umrødd niðanfyri.

### *Eitt eyka ella eitt øðrvísi skattleggingarramboð*

Eitt endamál við einum landsoljufelag kundi verið at tryggjað sær ein størri lut til landið ("government take") enn annars. Vansin er kortini, at tað at vera við hevur við sær stórar íløgur í leiting og útbygging við tí handilsliga váða, sum fylgir við. Tá ið Føroyar, sum er, neyvan megna at fáa til vega neyðuga váðapeningin, fer bara at bera til at vera uppií, við at landsoljufelagið verður borið í minsta lagi ígjøgnum leitiskeiðið, møguliga eisini ígjøgnum útbyggingarskeiðið. Útbyggingarskeiðið kann eisini verða fíggjað við verkætlanarlánum, sum gera, at vinningurin nøkur ár fram í tíðina fullkomiliga ella fyri ein part verður mótsvaraður av rentum og avdráttum.

Í styttri framtíð fer landsoljufelag soleiðis ikki at verða væl skikkað at útvega landskassanum pening til onnur almenn endamál, men verður heldur ein landsfíggjarligur kleppur. Um oljuvinnan sum frá líður vignast væl, fer tann binding av teirri møguligu inntøkuni, sum verður í almennum oljufelag, at verða mett sum fyrimunur. Tí felagið verður helst at leggja ein stóran part av sínum vinningi av til at fíggja framhaldandi íløgur í oljuútbyggingar, hvørs búskaparligu ringávirkanir í høvuðsheitum koma til sjóndar í útlondum. Slíkur atburður fer at gera sítt til at tálma ovhitingarlyndið í føroyskum búskapi, sum oljuvinna, um hon eydnast, kann hava við sær.

Kravið um at verða borið fata útlendsku oljufeløgini sum eitt eykakrav frá myndugleikunum, sum tey vilja hava endurgoldið á annan hátt, t.d. við lægri skattum ella avgjøldum, enn tey annars høvdu góðtikið. Tí verður ikki talað um eina eyka, men heldur eina - seinkaða - øðrvísi inntøku hjá landskassanum. Av tí at summum privatum feløgum ikki dámar at fáa almennar felagar noyddar uppí við sær, kann tað kanska verða neyðugt at lata sær lynda, at landið fær ein minni heildarlut enn annars. Á byrjanarstignum, tá ið feløgini ivast í leitivánunum á føroyskum leiðum, fer eitt krav um almennan part at kennast sum ein byrða. Tí eigur ikki at verða miðað ímóti meira enn einum lítlum áhugaparti, sum hevur lítlan og ongan fíggjarligan týdning, og sum samstundis minkar um tapsvandan hjá landinum.

### *Beinleiðis ávirkan á avgerðartilgongdina*

Eitt endamál við einum landsoljufelagi í einum samtaki kundi verið at roynt at havt beinleiðis ávirkan á arbeiðsgongdir og avgerðartilgongdir hjá tí, fyri á tann hátt betur at kunna stýrt ferð og arbeiðshættum viðvíkjandi leiting, útbygging og framleiðslu.

Kortini er ivi um evnini hjá nýstovnaðum landsoljufelagi at ávirka. Felagið má eisini haldast at hava handilslig endamál, og má tí vanliga metast at taka sínar avgerðir eftir handilsligum metingum. Yvirhøvur fer felagið at hava ilt við at fáa størri ávirkan á avgerðir í einum samtaki, enn tað ið tess - ivaleyst lítli - luttøkupartur loyvir. Eisini kann vera torført at bera fram síni sjónarmið við tyngd, so leingi ein ikki sjálvur er við til at bera fíggjarligu byrðarnar hjá samtakinum.

Samfelagsinnlit í og -ávirkan á loyvishavavirksemið verður eftir øllum at døma best tryggjað ígjøgnum myndugleikaarbeiði, t.d. við at umsjónarmyndugleikin krevur at góðkenna leitiætlanir, arbeiðshættir, stórar avgerðir o.s.fr., og at hann hevur møguleika at taka loyvi aftur, um treytirnar ikki verða hildnar. Afturat hesum kemur tilvitskan hjá feløgunum um, at teirra atburður undir galdandi loyvi

fer at verða týðandi í komandi loyvistillutanum.

Vanliga er tað at blanda saman myndugleikauppgávuna og leikpartin, sum handilsligt oljufelag, óskynsamt bæði úr almennum og felaganna sjónarhorni, eins og tað eisini ger arbeiðssetningin truplari hjá leiðslu almenna felagsins. Ávirkanin kann eisini vera ein onnur, soleiðis at myndugleikaumboð við at taka lut í stýri felagsins betur koma at fata, hvussu oljufeløgini fata umheimin. Hetta hevði óivað verið nyttuligt, men hýsir eisini møguleikanum, at almennu áhugamálini verða fyri vanbýti.

Í hesum samanhangi kann verða upplýst, at í Danmark er fyri stuttum avgjørt, at umboð fyri teir myndugleikar, sum hava eftirlit við ríkisoljufelagnum, eiga ikki at sita í stýri felagsins.

***Møguleikin at fáa innlit í virksemið***

Myndugleikarnir hava sum er møguleikan innan fyri lóggávukarmar at seta sum loyviskrøv, at teir fáa innlit í allar viðkomandi upplýsingar og møguliga fáa eygleiðarastøðu, har avgerðir í samtakinum verða tiknar, og á tann hátt fáa uppaftur betri upplýsingar. Royndir sigast vísa, at uppaftur fleiri upplýsingar eru, sum landsoljufelag kann ogna sær við virknari luttøku í fyrireikingum til avgerðir, t.d. av handilsligum slagi, sum føroyska samfelagið ikki kann fáa innlit í á annan hátt. So í hesum føri kundi landsoljufelag havt eitt endamál.

***Veitingartrygd og orkupolitikkur***

Hjá øðrum londum hevur eitt endamálið við landsoljufeløgum verið at tryggja innlendsku oljuveitingina til javnan prís, stundum til serprís, við at oljufelagið, ið er við, vanliga eigur sín prosentpart av framleiðsluni í einum samtaki. Ella felagið kann keypa og selja víðari kolvetni, sum eitt samtak sambært loyvistreytum er bundið til at lata landinum í vørum. Í Danmark hevur veitingartrygdin havt týðandi leikpart í kolvetnispolitikkinum, ið førdur er, og ríkisfelagið DONG hevur havt lyklaleikpart við at føra í land og selja jarðgass í Danmark.

Føroyska oljunýtslan er eftir altjóða máti lítil.[15] Føroyar eru í neyðveitingarskipanini hjá IEA (International Energy Agency) undir donskum veingjarbreiði. Veitingartátturin er tí ikki so týdningarmikil. Tó er søgulig sannroynd, at tað er komið fyri, at veitingar úr Danmark ikki hava verið gjørligar. Um so var, kundi ein verið í teirri margháttligu støðu, at føroyskum brúkarum og føroyskum ídnaði tørvar olju ella gass, samstundis sum ráolja og jarðgass í stórum nøgdum vórðu flutt út av føroyskum leiðum.

Um føroyska landsoljufelagið er við í einum samtaki, fær felagið ein part av framleiðsluni, sum svarar til part felagsins í samtakinum. Verður framleiðslugjald kravt, er siðurin tann, at tað eftir ynski kann verða rindað í vørum. Hesin føroyski parturin av ráevnum átti at verið gott grundarlag undir samstarvi við loyvishavandi oljufeløgini um at tryggja Føroyum nóg stórar veitingar av lidnum oljuúrdráttum í truplum veitingartíðum. Eitt føroyskt oljuframleiðslufelag hevði kunnað havt sín leiklut, tá ið avtalur av hesum slag skulu setast í verk, men eisini við ongum tilíkum felag høvdu slíkar avtalur kunnað verðið gjørdar og settar í verk.

Hugsanin um í loyvistreytum - møguliga umvegis eitt landsoljufelag - at

[15] Oljuinnflutningur Føroya var í 1996 nakað omanfyri 220 túsund tons (sum samsvarar við 1,4 mió. føt). Til samanburðar kann verða víst á, at henda nøgd svarar til 4% av ætlaðu ársframleiðsluni á oljuleiðini Foinaven, sum sostatt væntandi framleiðir samsvarandi nøgd í 14 dagar.

áleggja oljuútvinslufeløgum at veita Føroyum lidnar oljuvørur niðanfyri heimsmarknaðarprís fyri á tann hátt at útvega ódýrt ravmagn og/ella at skerja orkukostnaðin hjá føroyskum ídnaði yvirhøvur, hevur verið tikin upp av og á.

Slíkur politikkur tykist hava nógvar grundgevingar ímóti sær. Oljufeløgini fara at hyggja at øllum teimum føroysku krøvunum tilsamans og tí krevja aðrar fyrimunir fyri Føroyar minkaðar, sum t.d. skattir og avgjøld. At ganga slíkum kravi á møti verður uppaftur torførari, av tí at tað ikki kann verða nøktað við at lata føroyskum reinsiverki ráolju, men krevur at liðugt virkaðir oljuúrdráttir verða latnir føroyskum brúkarum. Í Føroyum hevði úrslitið verið ein óbeinleiðis studningur latin ymiskari oljunýtslu, sum hevði havt við sær avlaging av prísum á ymiskum orkusløgum, t.d. á ravmagni gjørt úr vatnorku (ella vindorku) og ravmagn gjørt úr olju. Ivaleyst eru skilabetri mátar at veita føroyskum vinnulívi frama enn við at geva studning til oljunýtsluna hjá tí. Í hesum samanhangi kundi verið vert at nevnt, at tað at føra gass í land í Føroyum kundi havt sum hjáárin, at Føroyar á tann hátt fingu ódýra orku, smbr. kapittul 4.3 um at føra kolvetni í land.

***At tryggja verktøkur og arbeiðsmegi í landinum***

Í orðaskiftinum um føroyskt landsoljufelag hevur verið víst á leikpartin, tað kundi havt í einum samtaki sum talsmaður fyri føroyskari arbeiðsmegi og føroyskum veitingaráhugamálum.

Sjónarmiðið hevur verið tað, at felagið, við sínum tilknýti til føroyska samfelagið lættari enn útlendsku samtakspartarnir, fer at varnast føroyskar útbjóðarar og at hava áhuga í at taka teir við. Føroyska oljufelagið fer mótvegis fyristøðufelagnum at kunna virka sum "talsmaður" fyri føroysk útvegaraáhugamál.

At almenn oljufeløg í øðrum londum hava fingið tílíkan leikpart, er almannakunnleiki. Hetta gongur kortini ímóti nýggjum ráki í altjóða vinnupolitikki. Í loyvisdirektivinum hjá ES (94/22/EF frá 30/5-94) eru ásettar reglur, sum minka um ávirkanina hjá ríkisfelag á handilsligan rakstur; m.a. má ríkisfelagið ikki fáa nøkur tíðindi um ella brúka nakran atkvøðurætt í avgerðum um, hvørjar veitarar loyvishavin velur. Av tí at Føroyar eru ikki uppi í ES og EBS, eru tær ikki bundnar av hesum reglum.

Sum partur í samtaki fer landsoljufelagið ivaleyst at gera vart við føroyskar veitarar, men felagið fer hinvegin at vera bundið at felags stevnumiði, sum samtakið hevur um handilsligan rakstur. Tað verður soleiðis bara rætt ella møguligt í ávísan mun at vera við til at taka útbjóðarar úr landinum framum. Sum "vanligur" limur í samtakinum mugu ávirkanarmøguleikar felagsins metast at verða smáir. Sjálvt í leikpartinum sum fyristøðufelag fara møguleikarnir at verða avmarkaðir, tí keypt verður vegna alt samtakið, og hinir limirnir í samtakinum fara at gera nógv fyri at sleppa undan óneyðugum dýrkanum.

At fremja føroyskar veitingar umvegis alment ella hálvalment felag hevði kanska roynst munadyggari við einum felag í tænastuvinnuni, sum til dømis útgerðarstøðfelag, borifelag ella tílíkum. Umframt sjálvt at vera vinnurekandi føroyskt felag, hevði eitt tílíkt í ávísan mun kunna tikið onnur føroysk virki við í sínar undirútvegarasáttmálar, tó sjálvsagt undir tí tronga rásarúmi, sum atlit at egnum kappingarføri hevði loyvt. Eisini tílíkt felag hevði kravt nógv fæ, og drúgt er at byggja neyðuga førleikan upp.

Tað mest beinleiðis amboðið, og tí ivaleyst tað virknasta, hevði verið, um myndugleikarnir í sambandi við loyvini kravdu ella ynsktu fyrimunir fyri

føroyska samfelagið, undir hesum eisini at føroysk feløg komu við, og síðani miðvíst sóu til, at loyvishavarnir uppfyltu hesi krøv.

Kortini kann alment oljufelag fáa týdning fyri at menna eitt føroyskt "oljuumhvørvi", har føroyskar útvegarafyritøkur eru við og á tann hátt fáa viðkomandi upplýsingar og virðismikil sambond og gerast "sjónligari" hjá fyristøðufeløgnum og sostatt fáa størri møguleikar at fáa bíleggingar.

***At virka fyri samfelagsbúskaparligum málum langt fram í tíðina***

Ein grundgevingin fyri einum almennum oljufelag er, at hetta felag, um tað kann útvega sær rímiligan vinning við at arbeiða handilsliga, kann leggja eina strategi longri inn í framtíðina eftir heimlandsins áhugamálum enn altjóða oljufeløgini. Á alheimsstigi hugsa tey langt fram, men tá ið talan er um einstakt oljuøki, í hesum føri Føroyar, kann strategi teirra vera meira trongskygd og stuttfreistað. Tey kunnu leggja doyðin á tey kolvetnissløg, sum hóska best til teirra strategi, og útvinna leiðirnar so leingi dagliga framleiðslan er stór, og síðan sleppa sær burtur uttan atlit til langtíðartørvinum hjá samfelagnum á meira áhaldandi virksemi.

Eitt landsoljufelag, sum umframt síni handilsligu endamál eisini hevur eitt samfelagsbúskaparligt endamál, fer so hvørt sum tað veksur í styrki, at kunna leggja strategi, sum lítur longur fram og hevur fleiri tættir við. Harumframt fer tað at geva sær stundir at kanna leiðir, sum ikki í fyrstu atløgu tykjast lønandi, og leggja sítt virksemi til rættis grundað á langtíðar samfelagsbúskaparlig atlit. Vansin er, at myndugleikarnir kunnu leggja uppgávur á felagið, sum ikki beinleiðis loysa seg, og sum kunnu máa fíggjargrundarlagið undan felagnum og soleiðis eisini óbeinleiðis undan samfelagnum.

## 4.2.7 Skipan

***Almenn ogn***

Ein høvuðsspurningurin í sambandi við at stovna landsoljufelag er, hvussu nógv tað almenna skal verða uppií. Hvat tí viðvíkur, eru tríggir møguleikar:

1. tað almenna eigur alt
2. fyri ein part alment, fyri ein part privat
3. sum frá líður privat ogn.

Sum nevnt omanfyri, kann ikki í bræði verða roknað við privatum føroyskum oljufelag í nøkrum týðandi leikluti. Byrjast má heldur við einum almennum ella partvíst almennum felag. Felagið kann sum nevnt verða við sum borin luttakari og í fyrstuni hava fyri neyðini at útvega sær kunnleika uttaneftir.

Roknað er við, at landsoljufelagið verður fíggjað, við at játtað verður upphædd á løgtingsins fíggjarlóg til felagsins grundfæ. Ivaleyst verður brúk fyri fleiri eykajáttanum seinni, so hvørt sum undirskot hópast upp í tí - ivaleyst langa - skeiði, tá ið felagið fer at hava útreiðslur til dagligan rakstur, áðrenn avlop kanska kemur fram, sum felagið kann fáa part av.

Hetta verður frávik frá politikkinum, ið førdur hevur verið, síðan málsøkið "ráevni í undirgrundini" varð yvirtikið, har so at siga allar útreiðslukrevjandi uppgávur higartil hava verið latnar teimum handilsligu oljufeløgunum at taka upp á

seg.

***Møgulig privat luttøka***

Hugsað eigur at verða um beinanvegin ella kanska seinni, tá ið avlop er í ljósmála, at tekna ískoytisfæ hjá privatum og ímillum teirra hjá føroyskum íløgustovnum, sum t.d. tryggingarfeløgum, pensiónskassum, grunnum o.ø.

Ein máti at sameina ynskið um bering, sum krevur, at borna felagið er almenn ogn, og hinvegin ynskið um at fáa fyrimunirnar við privatum rakstri, er *"danska skipanin"*.

Danir hava felagið DONG, ið ríkið eigur 100%, sum ígjøgnum sítt dótturfelag Dopas í 1.-3. útbjóðingarumfari varð borið ígjøgnum oljuverkætlanir, vanliga við 20%. Hetta verður mett at hava spart felagnum leitiútreiðslur fyri 0,5 mia. kr. Til leitivirksemi hevur felagið havt 15-20 fólk í starvi. Árligu rakstrarútreiðslurnar hava verið 10-15 mió. kr. Fyrstu árini vóru harumframt stórar útreiðslur til at útvega sær egnan jarðfrøðiligan dátugrunn, serliga seismikk.

Dopas hevur í tíðarskeiðinum 1983-1996 fingið 600 mió. kr. í partapeningi, av hesum 250 mió. kr. í 1996 til at vera við í fjórða umfars loyvum og rinda fyri at taka lut í teimum.

Dopas er síðan við 50/50 grundarlagi farið inn í fyristøðufelagið Danop, har hin felagin, Denerco, er felag sett saman av fleiri donskum vinnufyritøkum og grunnum. Íkastið hjá Denerco kann fyri ein part vera vinnuligar royndir og kunnleiki, men eisini, til eitt ávíst, íløgufæ. Her skal tó viðmerkjast, at uppgávan sum fyristøðufelag verður útint vegna alt samtakið og tí krevur meir kunnleika enn fæ.

Danop I/S hevur ein innskotspening, sum er 60 mió. kr. Av hesum eru 17 mió. kr. inngoldnar. Yrkiskunnleiki er fingin partvíst við at seta kønar útlendingar í starv, partvíst við sáttmálum um upplæring. Í 2. og 3. danska útbjóðingarumfari varð Danop samráðst inn sum (med)fyristøðufelag, men í 4. umfari hevur felagið megnað at gerast fyristøðufelag, hóast ES forboð ímóti at geva innlendskum feløgum forrætt.

Leikparturin sum fyristøðufelag gevur høvi at byggja upp førleika, men vanliga ikki stóran fíggjarligan vinning, av tí at tað er eitt slag av "lønarbeiði" fyri samtakið.

Verður "danska skipanin" flutt yvir á føroysk viðurskifti, skuldi ájavnt við at stovnað varð eitt felag, sum landið eigur 100%, verðið stovnað privat felag. Síðan gera hesi bæði feløg samstarvsavtalur, herundir um við uppgávu- og útreiðslubýti at ganga saman um at stovna eitt fyristøðufelag, tá ið brúk verður fyri tí. Eitt privat felag sum tað, ið umrøtt er í broti 4.2.3, gjørt við innskotum frá fleiri lutfalsliga peningasterkum føroyskum keldum, kundi kanska verið við í slíkum felagi.

Harumframt er tað *"tann grønlandska skipanin"*, har Nunaoil er eitt ríkis-/landsfelag, sum danska ríkið og grønlendska heimastýrið eiga 50/50. Tað er við sum borin felagi í givnu loyvunum og hevur loyst ávísar uppgávur sum “fyristøðufelag”, m.a. í sambandi við seismiskt virksemi, t.d. í sambandi við verjuskipið "Thetis", sum ein part av tíðini arbeiðir sum seismikkskip við útgerð, sum Nunaoil eigur.

Nunaoil varð stovnað í 1985 og hevur nú 12-13 fólk í starvi. Partapeningurin var 75 mió. kr., tá ið felagið varð stovnað, og varð í 1995 hækkaður upp í 95 mió.

kr. Við árslok 1995 hevði Nunaoil 36,6 mió. kr. í heildarundirskoti, og 25,2 mió. kr. vóru bundnar í útbúnaði og í áognum. Fíggjarbindingin og -brúkið tilsamans tey fyrstu 10 árini, felagið hevur verið til, er soleiðis tilsamans 61,8 mió. kr.

*"Norska skipanin"* fatar um trý stór norsk tjóðfeløg: Statsfelagið Statoil, sum ríkið eigur einsamalt, Saga, sum er fullkomiliga privat, og gamla rótfesta partafelagið Norsk Hydro, sum er virkið á mongum økjum, og har staturin eigur stívliga 50% av partapeninginum.

Í Noregi varð Statoil stovnað í 1972, t.e. 7 ár eftir fyrsta norska loyvisumfarið og 5 ár eftir at fyrsta oljukeldan var funnin. Norski loyvispolitikkurin varð skipaður soleiðis, at staturin sjálvur setti saman samtøkini við hóskandi pørtum til Statoil og hini norsku feløgini. Høvuðsreglan var at tryggja Statoil 50% í tess part. Eftir at Statens Direkte Økonomiske Engagement (SDØE, smbr. brot 4.2.8 niðanfyri) í 1985 varð stovnað, fataði 50% parturin bæði um Statoil og SDØE. Nógv er vikið frá 50% partinum, sum nevndur er frammanfyri, fyrr oftast uppeftir, nú seinnu árini mest niðureftir.

Av tí oljutilfeingi, sum eftir er í norskari grund um árslok 1995, var 13% undir ræði hjá Statoil og 38% hjá SDØE. Fyri gassgoymslur vóru samsvarandi tølini ávikavist 14% og 49%.

Statoil er nú eitt fult samskipað, fleirliðað oljufelag, kortini við høvuðsdenti á útvinning. Marknaðarvirðið í Statoil er mett til uml. 80 mia. DKK. Eginognin svarar til 12. pláss ímillum heimsins oljufeløg, sum skrásett eru á partabrævamarknaðinum. Eisini mett í olju- og gassgoymslum hevur Statoil á leið somu støðu. Felagið hevur seinnu árini víðkað sítt leiti- og útvinningarvirksemi til onnur lond enn Noreg. Statoil-samtøkan hevur 14-15.000 fólk í starvi, av hesum eru uml. 9.800 í starvi hjá móðurfelagnum í Noregi. Starvsfólkatalið tilsamans í leiti- og útvinningarvirkseminum er um 8.000.

Í *Bretlandi* hevði ríkið av hernaðarstrategiskum orsøkum í síni tíð ognað sær partabrævameirilutan í tí felagi, sum seinni varð kent undir navninum BP. Harafturat hevur Royal Dutch Shell í ávísan mun verið mett sum privat "tjóðaroljufelag" bæði í Hálandi og Bretlandi. Tá ið norðsjóvaroljan skuldi útvinnast, varð BNOC (British National Oil Corporation), ið var ríkisogn burturav, stovnað. Í sambandi við privatiseringarpolitikkin hjá bretsku konservativu stjórnini varð bæði BNOC og parturin hjá stjórnini í BP avhendaður sum tjóðarogn í 1980-árunum.

***Tjóðar-/altjóða ogn***

Tá ið eitt av høvuðsendamálunum við landsoljufelag er at fáa føroyingar upp í part á øllum stigum, má fortreytin vera, at felagið er skipað soleiðis, at tann kapitalurin, sum hevur avgerandi ávirkanina, er føroyskur. So leingi felagið fullkomiliga er almenn ogn, er hetta eingin trupulleiki. Er felagið harafturímóti fyri ein part privat ogn, ella í framtíðini møguliga verður gjørt um til privat ogn, tekur spurningurin seg upp, hvussu høvuðsávirkanin verður avmarkað til føroyskar eigarar.

Ei heldur eigur ein at vera blindur fyri fyrimunum sum t.d. vinnuligum kunnleika og altjóða útsýni, sum kunnu fylgja við tí at hava skikkað útlendsk oljufeløg uppií, ella fyri teimum fíggjarkeldum, sum umboðaðar eru av útlendskum íløgustovnum, og sum umframt at krevja skilagóðan, handilsligan rakstur, vanliga lata vera við at blanda seg upp í dagliga virksemið hjá felagsleiðsluni.

## 4.2.8 Virkisháttur felagsins

***Stødd og luttøkuháttur***

Luttøka í leiti- og útvinningarvirkseminum fer út frá givnum umstøðum ígjøgnum eitt ávíst áramál at gera felagið ført fyri at menna seg frá veikari og óvirknari byrjan til ein virknari leikpart við munandi stødd.

***Møgulig rein fíggjarluttøka***

Í staðin fyri í byrjanini at leggja seg eftir at verða yrkisliga virkin í samtakinum, smbr. umrødda møguleika b) í broti 4.2.2 kundi møguleiki a) verið valdur, t.e. at vera við av peningaligum áhuga einans sum víst á frammanfyri. Hesin háttur verður brúktur í Noregi, har "Statens Direkte Økonomiske Engagement" sum nevnt eigur rættin til stóran part av oljugoymslunum. Har vóru luttøkupartarnir hjá Statoil í flestu loyvunum í 1984 býttir í *ein* part, sum er knýttur at Statoil og *ein*, sum er beinleiðis ríkislig fíggjarlig luttøka. Sambært skipanini verður ein partur av bruttoinntøkunum hjá Statoil beinleiðis fluttur ríkinum, ímeðan ríkið endurrindar part av útreiðslunum hjá Statoil til leiting og útvinning. Fyri loyvini eftir 1984 verður parturin hjá Statoil og parturin til "Statens Direkte Økonomiske Engagement" ásettur eftir metingum í hvørjum føri sær. Statoil umsitur ríkisins arbeiðsskyldur.

Við at avmarka tann møguliga almenna partin í loyvum, sum verða latin í fyrsta útbjóðingarumfari, til reint fíggjarliga luttøku, so at starvsfólk verða útbúgvin til at umsita ognarpartin einans og annars ikki vera uppií, høvdu útreiðslurnar til felagið sjálvt kunnað verið avmarkaðar. Eisini kundi verðið bíðað við at skipa luttøkuna sum serstakt felag. Alt eftir gongdini kann felagið varðveita óvirkna partin ella fara virknari uppí sum eitt beinleiðis og ágrýti landsoljufelag.

***Borin felagi***

Tá ið felagið fer upp í eina oljuverkætlan, kann verða roynt at sleppa undan stóru krøvunum til íløgupening og váða við at krevja, at eitt alment felag verður *borið* ígjøgnum verkætlanina, soleiðis at hini feløgini í einum samtaki gjalda útreiðslupartin hjá borna felagnum - vanliga í leitiskeiðinum, minni vanliga eisini

í útbyggingarskeiðinum. Verður ikki rakt við kolvetni, eru tað feløgini, sum bera, ið standa við missinum. Um rakt verður við, kunnu útreiðslurnar møguliga verða endurgoldnar, t.d. við at draga frá í partinum av framleiðsluni hjá borna felagnum, møguliga við avtalaðum rentugjaldi.

***Kravd ella sjálvkravd bering***

At hava eitt borið landsoljufelag við kundi hugsast at verið kravt ella verið valfrítt hjá umsøkjarafeløgunum. Tað kundi støða verið tikin til frá einum umfari til annað. At seta kravda luttøku á við føstum prosenti fyri øll loyvi í einum umfari hevði verið tað einfaldasta. Valfrælsi, t.e. at borna luttøkan er nakað, ið oljufeløgini kunnu bjóða saman við ella í staðin fyri aðrar vinnuligar fyrimunir fyri Føroyar, kann tó hava sínar fyrimunir. Á tann hátt verður luttøkan avmarkað til tey feløg, sum eru mest hugað at arbeiða saman við einum almennum felag. Feløgini, ið hava mótboð ímóti hesum, høvdu verið noydd at skotið upp aðrar fyrimunir fyri Føroyar. Harnæst er kanska møguligt, at tað helst verður á teimum mest áhugaverdu leiðunum, har kappingin ímillum feløgini er størst, at landsfelagið fær boðið part. Á tann hátt fer landsoljufelagið í fyrstuni at kunna savna sína avmarkaðu orku til tær mest áhugaverdu leiðirnar. Kanska er tað kortini soleiðis, at bara við at gera luttøkuna kravda kann partur til felagið verða tryggjaður. Men á tann hátt fer felagið eisini at brúka orku til prospekt, sum hildin verða minni áhugaverd.

***Tíðarhvarv***

Tað kann vera ein fyrimunur at lata felagið verða við í loyvum frá byrjan, serliga tá ið hugsað verður um at koma í gongd skjótast tilber við at byggja upp yrkisligan førleika. Royndir úr øðrum oljuøkjum vísa, at sannlíkast er at finna stórar keldur í fyrstuni. Er tað so, verður tað til størstan fyrimun bæði landsbúskaparliga og fyri búskapin hjá nýggjum felag, at tað er við frá fyrsta umfari. Umframt fer øll skipanin at tykjast stinnari og lættari at spáa um, eru allir tættir og allar treytir greiðar frá byrjanini.

Hinvegin verður tað teimum feløgum, sum bera, størri fyrimunur, at bíðað verður til seinni umfør, av tí at stóri váðin, sum longu er frammanundan í fyrstu umførunum, gerst størri av at bera almenna felagan.

Góðar grundir eru fyri at goyma avgerðina um at vera við og hvussu, til betur sæst, hvagar alt ber. Samstundis fær politiska skipanin stundir at hugsa um spurningin, um tað almenna eigur at vera við, og hvussu alt eigur at verða skipað. Við slíkari freist fer í fyrsta umfari at bera til at savna megina um at byggja upp eina Oljufyrisiting við nóg hollum førleika og útseta kostnaðin av at stovna og reka felag. Ein háttur at tryggja sær slíka freist er at treyta sær ein rætt *(option)* til borna luttøku, sum t.d. kann koma í gildi, tá ið komið verður fram til útbyggingina, ella tá útvinningarskeiðið byrjar. Á henda hátt fer felagið ikki uppí fyrr enn frá teirri løtu, tikið verður av rættinum. Slíkur rættur kann hava ávíst handilsligt virði, sum landskassin kann fáa ágóðan av, um avgjørt verður ikki at brúka rættin, men at selja onkrum øðrum hann.

***Hóskiligur luttøkupartur***

Hvussu stórur partur verður mettur hóskiligur í fyrsta umfari fyri borið landsfelag veldst um ymisk viðurskifti, herundir hvussu nógv landið vil váða í útbygg-

ingar- og rakstarskeiðinum, og hvussu kravið um luttøku fer at ávirka áhugan hjá oljufeløgunum at vera við í umfarinum.

Í broti 4.2.3 varð nevnt, at ein ikki veruleikafjar meting er, at tað fer at kosta einar 8 mia. kr. at útbyggja eina oljuleið, soleiðis at hvørt prosentstig fer at seta luttakaran fyri ein váða, sum er 80 mió. kr. umframt rentur. Verður t.d. hildið, at 5 samtøk fara undir slíkar útbyggingar sum úrslit av fyrsta umfari, fer hvørt prosentstig av luttøku at seta landskassan í váða sum er omanfyri 400 mió. kr. Ein 10% luttøka krevur sostatt 4 mia. kr., sum svarar til nógv meira enn árligu fíggjarlógina. Afturat hesum kemur handilsligi váðin, sum t.d. er knýttur at tí, at útbyggingin kann dýrka, framleiðslan svíkja, prísirnir falla o.a. umframt partin hjá felagnum í ábyrgdini, t.d. um vanlukka berst á. Ein luttøka við helminginum av hesum, t.e. 5%, er minni tyngjandi.

Handilsligu oljufeløgini leggja stóra áherðslu á jarðfrøðiligu óvissuna við nýggjum oljuøki sum Føroyum og vísa á, at tað at bera eitt landsfelag fer at økja fíggjarliga váðan við leitingini, við tað at landsfelagið ikki eigur part í útreiðslunum til miseydnaðar boringar. Hetta talar fyri annaðhvørt at sleppa kravinum um borið felag í fyrsta umfari ella í hvussu er at lata vera við at krevja at taka lut við høgum prosenti. Eisini sætt úr hesum sjónarhorni hevði ein borin 5% partur kunnað verið hóskiligur.

### 4.2.9 Rakstur felagsins

***Manning***

Sum liður í tí, at felagið stigvíst verður virknari uppi í leiting og útvinning, kundi verið byrjað í smáum við t.d. 8-10 starvsfólkum. Slík støðd hevði ikki kravt nógva byrjanarfígging (uml. 10-20 mió. kr. verður hildið at verða nóg mikið í fyrstu atløgu), umframt 5-10 mió. kr. árliga til rakstrarútreiðslur. Hetta ger tað samstundis gjørligt at fáa upplært føroysk starvsfólk í rættiliga stuttum tíðarhvarvi.

Starvsfólkabólkar, sum tørvur verður á í fyrstu atløgu, eru stjórar, løgfrøðingar, búskaparfrøðingar, jarðfrøðingar/jarðalisfrøðingar, verkfrøðingar umframt skrivstovufólk.

Flestu størvini krevja útbúgving frá lærdum háskúla við serútbúgving í oljuvirksemi omaná. Føroyingar eru, sum hava nakrar av teimum viðkomandi universitetsútbúgvingunum, men serútbúgvingin fer at krevja í minsta lagi tvey ár afturat sum skeið/eftirútbúgving og læru hjá oljufelag. Hugsandi er, at áhugaðir føroyingar við slíkum oljufelagsroyndum longu finnast. Stjórin og kanska nakrir av hinum mugu frá byrjan hava dyggar royndir við oljuvinnu. Hinum má verða treytað sum lið í loyvistreytunum, at tey verða útbúgvin hjá loyvishavandi feløgunum. Fer felagið skjótt til verka, fer tað at leita sær skikkaðar føroyskar umsøkjarar í kapping við Oljufyrisitingina og tey handilsligu oljufeløgini.

Um rakt verður við stórar oljukeldur ella ikki, fer starvsfólkaútbúgving og -læra til at virka á høgum stigi innan fyri altjóða virki av hesum slag at kunna koma væl við hjá samfelagnum og tess vinnumenning longur fram. Nakað tílíkt kundi eisini verið fingið við at krevja í loyvunum, at føroysk arbeiðsmegi verður útbúgvin og upplærd. Tað kann tó vera fyrimunur hjá føroyska samfelagnum, at í Føroyum er oljufelag, sum fólk hava at koma aftur til á síni yrkisleið í oljuvinnuni. Um oljufelag ikki er, kann Oljufyrisitingin kortini lúka hesa uppgávu

í ávísan mun.

Fær felagið viðrák, soleiðis at tað sum frá líður fer at taka á seg uppgávur sum fyristøðufelag, kann tað gerast eitt áhugavert arbeiðspláss hjá nógvum føroyingum. Nevnast kann, at Danop hevur uml. 70 fólk í starvi, tey 40 kortini leysari knýttir - mest útlendskir - serfrøðingar. Fer tað í longdini at eydnast av álvara, kann t.d. verða víst á, at norska felagið Saga, ið virkar sum fyristøðufelag á fleiri av teimum stóru norsku leiðunum, er komið upp á 1400 starvsfólk. Sambært felagnum ber kortini bara til at loysa kravmiklu uppgávurnar sum fyristøðufelag við einari lutfalsliga so lítlari starvsfólkamanning við at bjóða nógvar uppgávur út. Upplýst er, at tey bæði Mærsk feløgini, sum eru mest uppi í oljuvinnu, Mærsk Olie og Gas og Mærsk Contractors, hava uml. 6-800 starvsfólk hvørt.

Vansin, um feløgini hava eydnuna við sær, kann til sína tíð verða, tá ið hugsað verður um støddina á føroyska samfelagnum, at felagið fer at hava trupult við at útvega fólk, eins og høga lønarstigið í oljuvinnuni kann fáa sera óhepna ávirkan á aðrar vinnugreinar. Hetta seinasta er tó eisini galdandi fyri útlendsk oljufeløg og møguligan eftirspurning eftir arbeiðsmegi frá føroyskum ella útlendskum útvegarafeløgum.

***Jarðfrøðiligur dátugrunnur***

Tað er av stórum týdningi hjá einum og hvørjum virknum oljufelag at hava ein jarðfrøðiligan dátugrunn, sum serstakliga fatar um seismikk og boriholsupplýsingar. Tað krevur nógvan pening at byggja upp tílíkan grunn. Ikki kann verða roknað við, at tað almenna kann lata upplýsingar, sum latnar verða myndugleikum sum lið í loyvistreytunum, til fría nýtslu hjá landsoljufelag, sum verður rikið handilsliga í kapping við loyvishavarnar. Hinvegin fer landsoljufelagið sum samtaksfelagi at kunna fáa lut í teimum upplýsingum, sum samtakið fær til vega.

## 4.2.10 Ávirkan/leikpartur í føroysku politisku skipanini

Felagsins samband til hinar partarnar av tí almenna er týdningarmikið. Sjálvandi skal felagið verða týdningarmikil liður í einum føroyskum yrkisligum oljuumhvørvi. Hinvegin hevði tað verið gagnligt heilt frá byrjan at stremba eftir einum greiðum skilnaði ímillum myndugleikaleiklutin og oljufelagsleiklutin. Virkar alment felag sum ein samfeldur partur av Oljufyrisitingini, hevur tað við sær fyrisitingarligar og politiskar fløkjur og vekir órógv hjá felagsins samstarvsfeløgum í oljuídnaðinum.

Í Noregi verður sagt, at stór misnøgd var í fyrstuni við Statoil og tess stóru politisku ávirkan bæði frá pørtum í politisku skipanini og hjá oljufeløgunum, m.a. tí at leikpartarnir sum myndugleiki og oljufelag ikki vóru týðiliga sundurskildir tá.

Eisini úr øðrum londum frættist um trupulleikar, t.d. um so er, at almenna oljufelagið væntast at vera virkið í samráðingunum við handilsligu oljufeløgini um loyvistreytir o.a. Greitt er, at hóast tað almenna eigur eitt felag, hevur felagið síni egnu áhugamál at hugsa um, sum ikki altíð samsvara við tað, sum myndugleikarnir halda vera best fyri samfelagið sum heild.

Hvussu felagið skal virka í mun til almenna bygnaðin eigur at vera serstakliga væl umhugsað. Týdningarmikið er, at bæði stjórn og stýri felagsins verða vald

eftir yrkisligum førleika. Harafturat kundi ein hugsa sær eina umboðsnevnd, sum kundi virkað sum sínamillum upplýsingarliður ímillum stjórn felagsins og politisku skipanina.

Verður rakt við stórar olju- ella gasskeldur, og landsoljufelagið eigur stóran part í tí, er í lítla føroyska samfelagnum vandi fyri, at felagið fær so stóran part í landsbúskapinum, at tað fær sjálvstøðugt politiskt vald. Hetta kundi, um so var, verið mótvirkað við at tálma vøksturin í felagnum, partvíst við dúgliga at luta út av yvirskotinum, partvíst við sum í Noregi at lata ein part av almennu luttøkuni vera fíggjarliga luttøku burturav. Kortini kundi tað verið búskaparliga og/ella samfelagsbúskaparliga skilagott at latið felagið vaksið seg so stórt, sum til ber. Tá má roknast við, at felagsins politiska makt verður avmarkað á annan hátt, soleiðis at frá politiskari síðu verða lagdir greiðir karmar og yvirskipað samfelagslig stevnumið, og innan fyri hesi sleppur handilsliga stjórn felagsins at virka eftir handilsligum aðalreglum.

### 4.2.11 Samanumtøka

Sum skilst av tí, ið stendur frammanfyri, er ein máti at fáa føroyingar upp í oljuvirksemi á føroyskum øki at taka lut við egnum oljufeløgum. Í dag er í Føroyum hvørki nóg mikil kunnleiki, royndir ella peningur. Møguleikarnir fyri sum frá líður at bøta um hetta við privatum oljufeløgum, tykjast ógvuliga ótryggir. Møguleikarnir tykjast í fyrstu atløgu at verða betri við at skipa oljufelag í almennum samanhangi, soleiðis sum gjørt hevur verið í londum, sum standa okkum nær, og sum hava eina oljuskipan, sum líkist tí, skotin er upp fyri Føroyar.

Umframt arbeiðssetningin sum handilsligt oljufelag við samfelagsbúskaparligum stevnumiði, eru aðrar uppgávur, sum alment oljufelag kanska kundi tikið sær av. Sum skattleggingarambboð hevði tað í fyrstuni verið óhóskandi. Tvørturímóti kann tað minka um skattleggingarmøguleikar landskassans sum heild. Í fyrstuni má verða roknað við lítlum parti hjá tí almenna í samtakinum. Ávirkanin, sum felagið kann hava á samtakið, verður væntandi bara smávegis. Felagið fer at kunna geva føroyska samfelagnum eitt ávíst innlit í raksturin umframt tað, sum umsjónarmyndugleikarnir fáa. Orkuveitingartátturin er ikki so týðandi og kann helst eisini verða røktur, hóast einki tílíkt felag gongur ímillum. Eitt oljufelag kann, serliga óbeinleiðis, verða við til at fremja føroyskar veitingar og arbeiði. Hetta endamál hevði helst eisini kunnað verið tryggjað, um tann peningur, sum settur verður av til oljufelagið, heldur varð brúktur at styrkja myndugleikaarbeiðið á tí økinum. Beinleiðis ávirkan frá felagnum á veitingarlagið verður avmarkað, men munagóð óbeinleiðis ávirkan er hugsandi. Treytað av handilsligari viðgongd, fer eitt alment felag sum frálíður at kunna verða við til at fremja langtíðar samfelagsbúskaparlig mál í oljuvinnuni.

Ognarmynstrið, sum er lýst, er felag, ið tað almenna eigur, og sum seinni kann bjóða privatum at vera við. Í framtíðini kann eisini hugsast, at tað fyri ein part ella fullkomiliga verður privatiserað, og tá fer spurningurin um at varðveita føroyska ávirkan at taka seg upp. Byrjanarfæ og fulnaður fyri hallið tey fyrstu árini má útvegast yvir landskassans fíggjarætlan, men sjálv luttøkan í oljuleitingini verður goldin við, at handilsligu feløgini bera felagið, og útbyggingin verður fíggjað við lántøku. Sum frá líður kann verða hugsað um “donsku skipanina” við einum samstarvi ímillum eitt ríkis- og eitt privat felag um

eitt felags fyristøðufelag.

Almenna luttøkan kundi byrjað í smáum sum reinur fíggjaránaráhugi. Hetta tykist kortini ikki áhugavert frá einum vinnumenningarsjónarhorni. Heldur kann hugsast eitt lítið felag, sum er virkið í leiting o.ø. hjá samtøkum, og sum ikki fyrr enn aftaná langa tíð spakuliga fer upp í uppgávur sum fyristøðufelag. Í besta føri kann tað menna seg til eitt, eftir føroyskum máti, stórt felag, og so kann verða neyðugt at royna at avmarka politisku ávirkanina.

Um grundarlag er undir at stovna eitt alment felag, fer ikki at vísa seg, fyrr enn farið er undir leitingina.

Tá ið felagið verður skipað, má verða tryggjað yrkiskøn leiðsla, samstundis sum tryggjað verður, at felagið fremur samfelagsgagnligt virksemi við ábyrgd fyri hesum mótvegis politisku skipanini. Tað kann tí verða skynsamt at geva sær ta tíð, sum krevst, til at fyrireika hvussu felagið skal verða skipað.

Ein møgulig strategi er í loyvunum at tryggja tí almenna ein rætt (option) at koma uppí. Hetta hevði tryggjað, at avgerðin um luttøku hevði kunnað verðið tikin grundað á best møguliga upplýsing og hevði givið tíð til gjølliga at fyrireika tilíka luttøku, tá ið tíðin verður mett búgvin til tess.

### 4.2.12 Niðurstøða og tilmæli

Grundað á tað, ið skrivað er frammanfyri, kemur nevndin til hesar niðurstøður og tilmæli viðvíkjandi einum føroyskum landsoljufelag:

- At føroyingar fara upp í oljuvinnuna sum oljufelagsvirksemi fer neyvan innan fyri stutta tíð at bera serliga væl til bara við at luttaka í oljusamtøkum við privatum føroyskum feløgum á handilsligum grundarlagi. Tað tykist ikki skynsamt, tá ið loyvi verða útskrivað at leggja dent á, at privat føroysk feløg skulu verða við.
- Fyribils skilabesti hátturin at kunna koma uppí ígjøgnum eitt føroyskt oljufelag tykist vera, at tað verður stovnað undir tí almenna, at fíggjargrundarlagið undir felagsins stovnan og rakstri fyribils fæst umvegis landskassans fíggjarætlan, at fíggingin til at vera við í leitingini fæst við, at handilsligu feløgini bera føroyska felagið, og at útbygging av oljuleiðunum verður fíggjað við lántøku. Neyðugur serkunnleiki fæst til vega, partvíst við at útvega serfrøðingar uttaneftir, partvíst við avtalum við loyvishavarnar um at læra føroysk starvsfólk upp.

- Verður undirtøka fyri tí, ið stendur frammanfyri, eigur landsstýrið at seta nevnd at greiða og koma við tilmælum til, um og hvussu eitt føroyskt landsoljufelag eigur at verða skipað við atliti at ognarviðurskiftum, stýring, handilsligum og samfelagsligum stevnumiðum og leikparti tess í sambandi við ta politisku og umsitingarligu skipanina og tað privata føroyska vinnulívið.
- Tá allar treytirnar til fyrsta loyvisumfar verða orðaðar, skal støða takast til, um tað longu í fyrsta loyvisumfari skal vera ein treyt, at alment oljufelag fær rætt (option) at koma uppí, og um so er við hvussu stórum parti. Eisini má støða takast til í hvønn mun roknast skal við, at felagið verður borið gjøgnum leitiskeiðið.

## 4.3 AT FØRA KOLVETNI Í LAND

Ein spurningur, sum kann koma upp á tal í framtíðini, er at føra olju og/ella gass í land í Føroyum.

Orsøkin, til at Oljuráðleggingarnevndin longu nú tekur spurningin upp um at føra kolvetni í land, hóast hann ikki kemur fyri, fyrr enn farið verður undir framleiðslu, er, at oljufeløgini longu undan fyrsta útbjóðingarumfari mugu vita, hvørja støðu myndugleikarnir hava til hetta. Umframt hevur verið neyðugt, meðan arbeitt hevur verið við uppskoti til føroyska kolvetnislóg, at taka støðu til, um krevjast skal, at olja og gass, ið verða útvunnin, skulu førast í land her, so sum gjørt verður í kolvetnislóggávuni hjá fleiri øðrum londum.

Í roynd og veru verður ikki neyðugt at taka støðu til spurningin um at føra kolvetni í land, fyrr enn uppskot um útbygging av leiðum skulu góðkennast, eftir at rakstrarverdar keldur eru funnar.

### 4.3.1 Alment um hugburð myndugleikanna um at føra í land

Orsøkin til at myndugleikarnir í fleiri londum, haruppií Norðsjóvarlondunum Noregi, Danmark, Hálandi og Bretlandi - meira ella minni staðiliga og í hvussu er so tað umsitingarliga ber til - hava valt at eiga møguleika at krevja, at útvunnið kolvetni skal førast í land, er, at menn í hesum hava sæð ein møguleika at tryggja landinum nakrar fyrimunir.

Høvuðsfyrimunurin er, at myndugleikarnir á henda hátt hava ræði á tilfeinginum sjálvum, annaðhvørt við at fáa tað í land ella við at kunna seta treytir hesum viðvíkjandi, verður ynskt at fáa tað í land aðrastaðni. Á henda hátt fæst eisini innlit í, hvørjar treytir - fíggjarligar ella aðrar - verða settar, verður tilfeingið tikið í land aðrastaðni.

Søguliga orsøkin, til at Norðsjóvarlondini valdu at føra ráevni í land, er at finna í, at tey fóru undir framleiðslu av kolvetni seinast í sekstiárunum og fyrst í sjeytiárunum, eftir at tey í fleiri ár vórðu altsamt meira bundin av innfluttari olju. Umleið 1973 hækkaði oljuprísurin ógvisliga, og tað rakti handilsjavnan í hesum londum sera meint. Óvissan um oljuveitingar kendist ógvuliga ørkymlandi, og alt hetta hvesti áhugan hjá stjórnunum at tryggja sær rættin at føra kolvetnið í land.

Tað, at hesi londini, Danmark, Háland og Bretland, í meiri enn 20 ár hava varðveitt skylduna at føra í land, man benda á, at stjórnirnar í hesum londum hava mett hesa skyldu at tæna áhugamálunum hjá viðkomandi londum.

Hóast norðmenn fyrstu árini ikki hildu uppi skyldunum at føra í land, hevur norska stjórnin havt sera gott tamarhald á gongdini í frálandsoljuvinnuni til tess at leggja til rættis og stýra rákinum at tryggja sær, at øgiliga árinið av oljuvinnuni ikki gjørdist ov ógvisligt fyri norska búskapin, sum uppá seg er avmarkaður.

Seta føroyskir myndugleikar krav um, at ført verður í land her, eru teir ikki so bundnir, tá ið avgerð skal takast um útflutning av útvunna kolvetninum. Veljast kann tá, um flytast skal út við tangaskipum, ella um tað fíggjarliga og/ella samfelagsliga er ráðiligari at flyta kolvetnið við at leggja rørleiðingar inn á marknaðin ella møguliga knýta í tað kervið, sum lagt er í grannaøkjum.

Afturat hesum grundleggjandi strategisku áskoðanum eru eisini aðrir fyrimunir knýttir at avgerðini at føra í land her, bæði fíggjarligir og viðvíkjandi yrki og

arbeiðsplássum. Hesir fyrimunir koma fyrst til sjóndar í sambandi við sjálva íland-føringina, við viðgerðini og útflutninginum, og í øðrum lagi við at kolvetnið, ið ført verður í land, kann verða grundarlag undir reinsan (raffinering) á landi, orkuveiting og/ella petrokemiskum ídnaði.

Men vísast kann eisini á vansar. Vinnubúskaparligu avleiðingarnar kunnu verða, at alt fer á gos. Umframt tað, koma umhvørvisavleiðingarnar, bæði tað at landslagið í stóran mun verður órógvað, har ið ført verður inn á land, og so tað at vandin fyri stranddálking økist. Petrokemiskir ídnaðir og háorkuídnaðir, sum kunnu koma í kjalarvørrinum av hesum, at ført verður í land, kunnu eisini gerast umhvørvinum ein bági í stóran mun.

## 4.3.2 Áhugi føroyinga at føra í land

*Strategiska áskoðanin*, ið nevnd er frammanfyri viðvíkjandi almennu møgu-leikunum at ráða yvir tilfeinginum, verður eisini Føroyum viðkomandi.

Krav um at føra í land gevur í stóran mun føroyskum myndugleikum eftirlit við menningini í oljuvinnuni og við spurninginum um, hvussu hetta týðandi tilfeingið verður gagnnýtt. Føroyar verða tá ikki bundnar at rørkervum ella oljustøðum, ið onnur lond eiga, og harvið heldur ikki lagdar undir serkrøv av framleiðsluni ella avgjøld, sum hesi lond kunnu áseta.

Fyri Føroyar fer tað neyvan í sjálvum sær at hava týdning fyri *veitingartrygdina* av reinsaðum oljuúrdráttum til samfelagsnýtslu, um møgulig ráolja og gass verða førd í land í Føroyum ella ikki. Hetta má kunna tryggjast á annan hátt, m.a. við at gera avtalur um hetta, tá ið loyvi verða givin. Føroyski tørvurin á reinsaðum úrdráttum er í sjálvum sær ógvuliga lítil smbr. undirgreinina til brot 4.2.6.

*Reinsing* (sum seinastu mongu árini ikki hevur verið serliga lønandi vinna) hevði, um valt varð at fremja hana í Føroyum, sett stór plásskrøv og stór krøv til serútbúna arbeiðsmegi. Tað er neyvan nakað, ið talar fyri, at oljureinsiverk eiga at verða bygd í Føroyum enn á sinni, um nakrantíð.

*Orkuframleiðsla*, t.d. við gassriknum el-verkum við t.d. el-útflutningi fyri eyga, er ein møguleiki, ið kann umhugsast; somuleiðis *einfaldur petrokemiskur ídnaður* sum t.d. at framleiða metanol. Men stórir rúmmøguleikar eru neyvan fyri veruligari petrokemiskari- ella háorkukendari framleiðslu, t.d. aluminium ella handilstøð.

Hjá Føroyum kann tað hava áhuga at fáa tey *arbeiðspláss* og teir beinleiðis *vinnubúskaparligu fyrimunirnar*, sum knýta seg at flutninginum í land, viðgerðini og goymsluni á landi og útflutninginum av kolvetninum, sum ført er í land. Stutt frágreiðing um samfelagsbúskaparligu avleiðingarnar er at finna í brotinum 4.3.6 niðanfyri.

*Vansarnir*, serliga viðvíkjandi umhvørvinum, eiga sjálvandi at verða gjølliga umhugsaðir, tá ið gerast skal av, um førast skal í land í Føroyum ella ikki. Í hesum sambandi verður víst til brot 5.2.5 um umhvørvi og til umhvørvispartin (9. kapittul) í 1993-frágreiðingini.

### 4.3.3 At føra í land - hugburður oljufelaganna

Um oljufelag fer at vilja føra útvunna kolvetnið í land í Føroyum ella ikki veldst um fleiri fyritreytir, t.d. hvar ið oljuleiðin er, hvussu stór framleiðslan er, tøkniligu møguleikarnar at flyta kolvetni í land ella av landinum, men serliga hvussu tað fíggjarliga loysir seg at føra í land samanborið við aðrar møguleikar. Nakrir av hesum spurningum verða viðgjørdir niðanfyri.

Verður olja funnin nær landi, kann hugsast, at oljufeløgini halda tað vera sjálvsagt at føra hana í land í Føroyum.

Verður olja harafturímóti funnin á einstøddum øki langt úr landi, kann hugsast, at oljufeløgini ikki leggja í at føra í land í Føroyum. Í slíkum førum er fíggjarliga besta loysnin helst at avskipa oljuna á víðum havi og senda hana beinleiðis á marknaðin ella umvegis onkra útlendska oljustøð. Hugsast kunnu eisini føri, har fíggjarliga skilabesta loysnin verður at flyta oljuna gjøgnum rørleiðing, sum møguliga einaferð verður løgd frá oljukeldum, sum eru funnar vestan fyri Hetland.

### 4.3.4 Tøknilig viðurskifti

Áðrenn støða verður tikin til fyrst at áseta eina skyldu at føra í land og seinni at halda skylduni uppi, man vera skilagott at kanna tøkniligu møguleikarnar fyri hesum.

Antin verður kolvetni ført í land við tangaskipi ella gjøgnum rørleiðing. Í báðum førum skulu byggjast goymslur á landi til úrdráttirnar. Samstundis, sum bygdar verða goymslur og útbúnaður til oljuinnflutning, skal loysn finnast fyri kolvetnisútflutningi eisini.

Teir ymisku møguleikarnir fyri innflutningi/útflutningi av kolvetni eru:

- innflutningur gjøgnum rørleiðing og útflutningur gjøgnum rørleiðing,
- innflutningur gjøgnum rørleiðing og útflutningur við tangaskipi,
- innflutningur við tangaskipi og útflutningur gjøgnum rørleiðing,
- innflutningur við tangaskipi og útflutningur við tangaskipi.

Loysnirnar, sum hava í sær innflutning gjøgnum rørleiðing, krevja størstu økini á landi, av tí at neyðugt verður at seta upp útbúnað til at fyrireika oljuna til flutning við at taka gass úr henni (stabiliseringsútbúnað) og útbúnað at goyma gassið í. Loysnirnar við tangaskipum krevja heilt stór atløguøki, serliga til útflutningin, sum vanliga fer fram við stórum tangaskipum.

**At føra í land gjøgnum rørleiðing**

Rørleiðingsídnaðurin hevur longu vunnið á sera stórum trupulleikum, antin orsøkin til teir er streymviðurskifti, havdýpi, botnskapið ella umstøðurnar at sleppa til á landi.

Hóast viðurskiftini í føroyskum sjógvi kunnu vera ógvuliga trupul, má roknast við, at tað slepst um hesar forðingar við at laga tøkniligar loysnir úr øðrum økjum til viðurskiftini við Føroyar.

Ein serligur trupulleiki í sambandi við, at kolvetnið møguliga skal førast í land í Føroyum úr økjum á djúpum vatni í Hetlandsrennuni, har tað er ógvuliga kalt, er, at neyðugt verður at hita rørleiðingarnar til tess at sleppa undan, at voks legst í rørini

og typpir tey.

Hvør rørleiðingsloysn, ið verður vald, veldst nógv um hvussu verkætlanin fíggjarliga hongur saman, og hvat og hvussu nógv verður funnið.

Verður nógv gass funnið, og avgerð verður tikin um at útvinna tað, so man einasti tøkniligi møguleiki, sum eftir øllum at døma hugsast kann, vera at føra í land gjøgnum rørleiðing.

Dagliga framleiðslan av oljuni skal koma upp á eitt ávíst støði, áðrenn rørleiðingsloysnin, sum krevur sera stóra íløgu, kann brúkast. Hugsast má eisini um, at er olja við ymiskari góðsku á tí øki, sum ætlanin er at knýta í rørleiðingina, kann prísurin fyri ta rávøru, sum rennur gjøgnum leiðingina, gerast lægri enn fyri bestu góðskuna í økinum. Hesin tvørleikin kann loysast á tann hátt, at býtið av søluvinninginum av tí rávøru, førd verður gjøgnum rørleiðingina, lagar seg eftir góðskuni av tí, ið ført verður ígjøgnum. Dømi eru eisini at finna um, at samlaða fíggjarliga virðið kann lækka, av tí at sløg við ymiskari góðsku verða blandað saman. Til eru t.d. øki í Norðsjónum, har rørleiðingskervið gongur beinleiðis gjøgnum eitt framleiðsluøki, uttan at hetta er knýtt í rørleiðingskervið, av tí at oljugóðskan í økinum víkur ov nógv frá oljuni, sum fer gjøgnum leiðingina.

Møguleiki er eisini at lata kolvetnisútflutning fara gjøgnum rørleiðing. Verður henda loysnin vald, eru góðar grundir fyri at binda seg í rørkervi, sum tæna øðrum økjum, t.d. í Bretlandi. Ein annar møguleiki er at leggja rørkervi úr Føroyum beinleiðis inn á evropeiska meginlandið, men skal tað loysa seg, so skal nógv finnast undir Føroyum.

**At føra í land við skipi**

Tøkniliga er hetta annar møguleiki enn at føra olju í land gjøgnum rørleiðing. Fíggjarligar og umhvørvisligar metingar fara at ávirka valið avgerandi.

At føra í land við skipi krevur ikki so stórar íløgur sum at føra í land gjøgnum rørleiðing, men rakstrarútreiðslurnar eru hægri av skipaflutningi enn av flutningi gjøgnum rørleiðing. Eru rakstrarútreiðslurnar høgar, kann tað hava við sær, at øki gerast ólønandi fyrr, enn um rakstrarútreiðslurnar vóru lægri.

Skal eitt øki riggast av, verður vanliga léttari at rigga skipaloysnina, enn rørleiðingskervið av.

Verður hugt at hagtølunum fyri oljulekar, so hava fleiri óhapp verið í sambandi við skipaflutning enn við flutning gjøgnum rør.

**Útbúnaður á landi**

Tann útbúnaður, sum skal byggjast í sambandi við, at kolvetni verður ført í land, krevur heilt vítt øki. Innflutnings-/útflutningsútbúnaðurin kann t.d. vera rørkervi og goymslutangar, men tað kann eisini umfata havnaløg, og í tí sambandi er ein av avgerðandi spurningunum, tá ið økið verður valt, hvussu stór tangaskipini eru, ið føra skulu útflutta kolvetnið á marknaðin.

Verður flutt í land við skipum, verður talan um flutningsfyrireikaða olju (t.e. at gassið, sum saman við oljuni kemur upp úr dýpinum, er skilt frá), sum skal goymast og so flytast út við stórum tangaskipum ella gjøgnum rørkervi. Tann útbúnaður, sum í slíkum føri skal byggjast á landi, fer í høvuðsheitum at fevna um goymslutangar og inn- og útflutningsútbúnað.

Rørflutningur kann brúkast bæði til flutningsfyrireikaða olju og olju, sum ikki er flutningsfyrireikað. Verður ein rørloysn vald til at flyta inn olju, ið ikki er flutningsfyrireikað, verður neyðugt at byggja útbúnað til gassviðgerð. Og hesin útbúnaður krevur óføra vítt øki. Sama er galdandi, verður semja um at føra gass í land.

Landsverkfrøðingurin hevur í fyribils ummæli staðfest, at tað er ikki ómøguligt at byggja móttøkuútbúnað til olju og gass í Føroyum og harafturat tann útflutningsútbúnað o.a., sum hoyrir til.

### 4.3.5 Oljubúskaparligar metingar

Skal fíggjarligt grundarlag vera undir eini loysn við oljurørleiðing, skal útvunna nøgdin - so meta serfrøðingarnir - vera í minsta lagi 150.000 føt um dagin, og tað merkir, at í tjúgu ár streyma 1 mia. føt gjøgnum leiðingarnar, og hetta tilfeingið skal finnast innan fyri avmarkað øki.

Verður loysnin við oljurørleiðing vald, verður møguligt á landi at gagnnýta tey gasssløg, sum kunnu vera at finna í útvunnu ráoljuni. Ein gassleiðing til Føroya kann skapa møguleikar fyri at umskapa gassið til LNG (Liquefied Natural Gas) ella at brúka tað til orkuframleiðslu, sum í nøgd má væntast at fara langt upp um tørvin hjá føroyingum sjálvum, uttan so at bygdir verða upp orkukrevjandi ídnaðir, ella at ravmagn verður útflutt gjøgnum undirsjóvarleiðingar. Er gass at finna í sera stórum nøgdum, munnu ætlanir fara at verða um at flyta tað út gjøgnum rørleiðing til vesturevropeiska marknaðin. Sakkunnleikin metir, at verða funnir 200 mia. $m^3$ av gassi (sum í virði svarar til okkurt um 1,2 mia. føt av olju), so er fíggjarliga tilráðiligt at leggja slíka rørleiðing.

Og tá ið rørkervið er skipað, verða fíggjarligir møguleikar at útvinna olju ella gass úr smærri økjum enn teimum, ið tað loysir seg at útvinna við framleiðsluskipi.

### 4.3.6 Samfelagsbúskaparligar avleiðingar

Tá ið farið verður undir at byggja útbúnað at føra kolvetni í land við og serliga útbúnað á landi í hesum sambandi, má væntast ófført byggivirksemi, sum bara stutta tíð fer at halda sær á hesum stigi. Tá ið ætlanir verða lagdar um verkætlanina, og hvussu samfelagið eigur at laga seg til hesa ílandføring, man vera skilabest at vísa áhuga fyri framleiðsluskeiðinum, ið aftaná kemur, tí tað fer at vara longri og bera í sær meira varandi arbeiðspláss.

Víst kann verða til Sullom Voe í Hetlandi og Flotta í Orknoyggjum. Í Sullom Voe eru um 450 fólk í føstum starvi á oljustøðini, og um 250 fólk eru í starvi hjá øðrum fyritøkum, sum t.d. átaka sær umvælingararbeiði á støðini. Umframt tað eru nøkur fólk knýtt at arbeiðsplássum hjá havnarmyndugleikum og í loðstænastu o.ø., soleiðis at tilsamans arbeiða umleið 850 fólk í Sullom Voe. Í sambandi við støðina í Flotta arbeiða um 450 fólk.

### 4.3.7 Umhvørvi

Í sambandi við umhvørvisspurningar mugu øll gera sær greitt, at munadyggar trygdaratgerðir mugu setast í verk fyri at tryggja, at olja úr útbúnaði á landi ella úr tangaskipum ikki dálkar umhvørvið. Her verður ikki bara hugsað um vandan í sambandi við tangaskipaferðsluna, at skip kunnu fara á land ella renna saman, men eisini um ta dálking, sum helst ikki slepst undan, tá ið kolvetni skal flytast til og frá útbúnaði á landi. Sum dømi kann verða nevnt, at áðrenn olja verður førd av útbúnaðinum á landi yvir í tangaskip, skal barlastavatn pumpast úr skipunum. Í hesum vatni vera oljuleivdir, sum partvíst kunnu skiljast úr vatninum, partvíst

kunnu førast við rørleiðing út á djúpt vatn, har ið havstreymurin kann avmarka ávirkanina á staðnum.

Umhvørvisfyrilitið kann gerast avgerandi, tá ið myndugleikarnir einaferð skulu taka støðu til, um rætturin til at krevja, at olja skal førast í land í Føroyum, skal nýtast.

### 4.3.8 Niðurstøða og tilmæli

Spurningurin um at føra kolvetni í land í Føroyum liggur mong ár frammi í tíðini.

Til tess at tryggja sjálvstøðuga menning á føroyska landgrunninum, bæði tá ið hugsað verður um leiting og framleiðslu og fyri ikki at verða bundin av undirstøðukervinum (infrastrukturinum) og flutningsmøguleikunum á landgrunninum hjá grannatjóðunum, má metast, at tað tænir landsins áhugamálum, at tað bert verður í undantaksførum, at ført verður í land uttan fyri Føroyar, og slík undantøk kunnu bert gevast, um landsstýrið tekur undir.

Verður kolvetni ikki ført í land her, fáa vit ikki lut í tí vinnumenning og tí avleiddu ávirkan á arbeiðsmøguleikar, skattainntøkur o.a., sum annars koma um oljustøðir verða bygdar og riknar í Føroyum.

Bæði skipanarliga og vinnuliga eru góðar grundgevingar fyri, at føroysku myndugleikarnir eiga at hava møguleika at krevja, at ført verður í land í Føroyum.

Tað eru støð í Føroyum, har ið tað ber til at byggja oljustøðir, har kolvetni kann førast í land. Verður longu nú tikin avgerð um, at skylda er at føra í land kolvetni her, so fær landsstýrið eftirlit við kolvetnisflutninginum úr økjum á føroyska landgrunninum, og heilt frá tí at leitingin byrjar, verður sagt loyvishavum frá, at útgangsstøðið er, at kolvetnið skal førast í land í Føroyum.

Tá ið avgerðin um at føra í land skal takast, eiga øll umhvørvisviðurskifti at vera útgreinað, og tey eiga í viðgerðini at fáa ta tyngd, sum ein fiskivinnutjóð, ið eisini í framtíðini verður bundin at fiskiskapi og fiskivinnu, hevur skyldu til.

Út frá tí, sum her er ført fram, eigur tað at vera útgangsstøðið, at sett verður krav til fyristøðufelagið um, at kolvetni í føroyskum øki verður ført í land í Føroyum. Til útbúnaður er bygdur á landi í Føroyum, ella so leingi myndugleikarnir ikki hava tikið endaliga støðu til at føra í land, verður tørvur á at kunna geva undantaksloyvi frá kravinum um at føra í land. Men eisini eftir at oljuútbúnaður er bygdur, kann tað koma fyri, at tað ikki tykist skilagott at føra í land í Føroyum, og tá kunnu undantaksloyvi verða givin til at føra kolvetni til annað land.

Verður feld niður í lógina ein høvuðsregla um skyldu at føra í land og møguleikar fyri undantøkum, fáa myndugleikarnir høvi til í hvørjum einstøkum føri at meta um, hvørt fyrimunurin at føra í land vigar upp ímóti vansunum, og teir kunnu so taka avgerð út frá hesum metingum.

## 4.4 ÚTBÚGVING Í SAMBANDI VIÐ OLJUVINNU

Í hesum kapitlinum verður greitt frá ymiskum førleikakrøvum, sum menning av eini oljuvinnu fer at bera við sær, og greitt verður eisini frá, hvussu føroyskir myndugleikar kunnu tryggja best møguliga føroyska luttøku í eini møguligari oljumenning við at fara skynsamiliga og tilvitað til verka á útbúgvingarøkinum.

Spurningurin um, hvussu føroysk arbeiðsmegi og føroyskt vinnulív fara at megna at taka lut í eini møguligari oljuvinnu á føroyskum øki, er sum sagt neyvt tengdur at, hvørt útbúgvingarnar eru tær røttu, og hvørt útbúgvingarskipanin fer at megna at laga seg til tey nýggju krøvini og fer at fáa neyðugu karmarnar fyri at gera so.

Eftir áheitan frá Oljufyrisitingini - vísandi til 1993-frágreiðingina frá Oljuráðleggingarnevndini - setti landsstýrismaðurin við útbúgvingarmálum, eina útbúgvingarnevnd, sum skuldi gera uppskot til útbúgvingarpolitikk í sambandi við eina møguliga oljuvinnu á føroyskum øki. Nevndin legði úr hondum eina ávegisfrágreiðing í apríl 1995 og endaliga frágreiðing í januar 1996[16]. Setningurin hjá nevndini er nú støðugt at fylgja við í menningini á økinum og javnan at kunna landsstýrismannin. Nevndin er mannað við limum, ið umboða Oljufyrisitingina, Fróðskaparsetrið, Landsskúlafyrisitingina og ídnaðin. Oljufyrisitingin hevur formansskapin.

Hendan frágreiðingin verður rættiliga stutt, eftirsum evnið er lýst meira nágreiniliga í omanfyri nevndu nevndarfrágreiðing.

Fyrst verður í stuttum greitt frá, hvørji útbúgvingarkrøv ein møgulig oljuvinna fer at seta á ymisku menningarstigunum. Síðani verður bent á royndirnar aðrastaðni, og endiliga verður lagt upp til ein útbúgvingarpolitikk á økinum, har størsti denturin verður lagdur á, hvussu útbúgvingarpolitikkurin kann lagast til oljupolitikkin, og hvat vit í hesum sambandi kunnu vænta og krevja av fleirtjóða oljufeløgunum.

### 4.4.1 Krav um útbúna arbeiðsmegi

Til tess at fáa fatan av, hvør tørvurin verður á arbeiðsmegi í sambandi við eina oljuvinnu, er neyðugt at hyggja nærri at teimum ymisku skeiðunum, hvussu tey eru háttað, og hvat slag av virksemi er knýtt at teimum.

Tøl ella tíðarskeið verða ikki tilskilað, tí hetta er ov óvist enn; men leysliga verður mett um gongdina frá skeiði til skeið og lutvísa býtið ímillum ymisku yrkisbólkarnar.

Á talvuni niðanfyri er mett um, hvørjum fakbólkum tørvur væntandi verður á í ymisku skeiðunum í sambandi við eina oljuvinnu.

[16] Frágreiðing til landsstýrismannin í skúlamálum frá útbúgvingarnevndini innan oljuvinnu, Tórshavn, januar 1996.

**Talva 4.4-1 Yvirlit yvir fakbólkar, ið tørvur væntandi verður á í ymisku skeiðunum**

| Tørvur sæð í mun til ymisku skeiðini[17]: 🕑: stórur 🕐: miðal ☆: lítil | | | |
|---|---|---|---|
| | **Leitiskeið** | **Útbyggingarskeið** | **Framleiðsluskeið** |
| **Umsiting<br>-almenn og privat** | 🕐Búskaparfrøðingar<br>☆Grannskoðarar<br>🕑Jarð-/jarðalisfrøðingar<br>🕐Løgfrøðingar<br>🕐Samfelagsfrøðingar<br>☆Sakførarar<br>🕑Skrivstovu-/samskiftisfólk<br>🕐Umhvørvisfrøðingar<br>🕑Verkfrøðingar | 🕐Búskaparfrøðingar<br>🕐Grannskoðarar<br>🕑Jarð-/jarðalisfrøðingar<br>🕐Løgfrøðingar<br>☆Samfelagsfrøðingar<br><br>🕑Skrivstovu-/samskiftisfólk<br>🕐Umhvørvisfrøðingar<br>🕑Verkfrøðingar | 🕑Búskaparfrøðingar<br>🕑Grannskoðarar<br>🕑Jarð-/jarðalisfrøðingar<br>🕑Løgfrøðingar<br>☆Samfelagsfrøðingar<br>🕐Sakførarar<br>🕑Skrivstovu-/samskiftisfólk<br>🕐Umhvørvisfrøðingar<br>🕑Verkfrøðingar |
| **Tænastur** | 🕐Vistaveiting<br>☆Elektrikarar<br>🕐Mekanikarar<br>🕐Positionering<br>🕐Samskiftisfólk<br>☆Shippingtænastur<br>🕐Sjófolk<br><br>☆Teknikarar<br>☆Teldutænastur<br>☆Tyrlumanningar<br>➴Tryggingartænastur | 🕐Bankafólk<br>🕑Vistaveiting<br>🕑Elektrikarar<br>🕑Mekanikarar<br>🕑Positionering<br>🕑Samskiftisfólk<br>🕑Shippingtænastur<br>🕑Sjófólk<br>🕐Sjúkra- og heilsurøkt<br>🕑Teknikarar<br>🕐Teldutænastur<br>🕑Tyrlumanningar<br>🕐Tryggingartænastur | 🕑Bankafólk<br>🕑Vistaveiting<br>🕐Elektrikarar<br>🕐Mekanikarar<br>🕐Positionering<br>🕑Samskiftisfólk<br>🕐Shippingtænastur<br>🕑Sjófólk<br>🕐Sjúkra- og heilsurøkt<br>🕑Teknikarar<br>🕐Teldutænastur<br>🕑Tyrlumanningar<br>🕐Tryggingartænastur |
| **Annleggs-<br>virksemi** | | 🕑Elektrikarar<br>🕑Mekanikarar<br>🕑Spesialarbeiðarar<br>🕑Teknikarar<br>🕑Verkfrøðingar | ☆Elektrikarar<br>☆Mekanikarar<br>☆Spesialarbeiðarar<br>☆Teknikarar<br>☆Verkfrøðingar |
| **Avleitt virksemi** | | 🕐 Eyka virksemi vegna økt fólkatal og økt virksemi í samfelagnum sum heild[18] | 🕑 Eyka virksemi vegna økt fólkatal og økt virksemi í samfelagnum sum heild |

**Leitiskeiðið** Í leitiskeiðnum kann ikki væntast nógv virksemi ella stórur eftirspurningur eftir arbeiðsmegi. Í sambandi við royndarboringar verða uppgávurnar væntandi ógvu-

[17] Her er talan um lutvíst býti innan ymisku fakbólkarnar.

[18] Orsøkin til at nevna ***avleitt virksemi*** sum ein serligan tátt er í fyrsta lagi, at kanningar í Grampian-økinum í Skotlandi og kanningar í Noregi vísa, at fyri hvørji trý arbeiðspláss, ið skapt verða í oljuvinnuni, verður bert eitt sett av einum arbeiðstøkum. Hini fara annaðhvørt til fólk, sum frammanundan eru í øðrum størvum ella tilflytarar. Hetta ger, at størv verða leys aðrastaðni enn í oljuvinnuni. Harafturat fer økt virksemi í sjálvum sær at hava fólkavøkstur við sær, soleiðis at brúk verður fyri at kalla øllum útbúgvingum - jarðamøðrum og prestum eins væl og verkfrøðingum.

liga serligar og vara einans í eitt styttri tíðarskeið.

Allir rættindaánarnar skulu hava egnu deild ella dóttirfelag í Føroyum. Meðan royndarboringarnar fara fram, verður roknað við, at fyristøðufeløgini hava sjálvstøðuga rakstrardepil í Føroyum.

Hvat tænastum viðvíkur má væntast, at oljufeløgini fara at hava sínar egnu serfrøðingar við sær til flestu seruppgávurnar, meðan føroyska luttøkan fyrst og fremst verður á fyrisitingarliga økinum - í tí privata eins væl og almenna - og í sambandi við tænastuveitingar á sjónum, so sum veitingar- og tilbúgvingarskip, positionering og samskifti.

Í sambandi við veitingartænastur til royndarborivirksemið kann talan verða um fitt av flutningstænastum og vistaveiting. Nakað av virksemi er væntandi í sambandi við, at skip koma í føroyska havn at bunkra og proviantera.

**Útbyggingar-skeiðið**

Hetta skeiðið er vanliga merkt av stórum, skiftandi virksemi í *styttri tíðarskeið.* Stórir partar av virkseminum verða tengdir at byggingini av teimum tólum/virkjum, ið nýtt verða at fáa oljuna upp úr undirgrundini og í land, og virksemið verður tí merkt av, hvørji sløg av tólum/virkjum, ið verða nýtt.

Talan verður um rættiliga spesialiseraðar arbeiðsuppgávur, eitt nú tá ætlanir skulu gerast innan stýring og samskipan av byggivirksemi ella í sambandi við veitan av serligum háspesialiseraðum *tænastuveitingum*, t.d. innan ravmagnsverkfrøði, maskinverkfrøði ella teldutøkni. Stórur eftirspurningur fer eisini at verða eftir øllum sløgum av handverkarum og serarbeiðarum, t.d. sveisarum, stiladsarbeiðarum og kranaførarum.

Talan verður eisini her um veitingar- og tilbúgvingarvirksemi, og stórur eftirspurningur verður eftir øllum vanligum vørum, t.d. arbeiðsklæðum og matvørum umframt serútgerð. Eisini verður tørvur á flutningsmøguleikum, vaskimøguleikum og reingerð eins og allari vanligari heilsurøkt og -viðgerð og undirvísing á ymiskum stigum.

Um oljuvirksemið verður stórt, verður eisini talan um stórt avleitt virksemi.

**Framleiðslu-skeiðið**

Í hesum skeiðinum kann væntast eitt sindur minni virksemi enn í útbyggingarskeiðinum, men hinvegin er tað vanliga javnari og yvir eitt longri tíðarskeið. Ein fyrimunir við framleiðsluskeiðinum er, at vanliga er lættari at spáa um, hvat slag av virksemi verður, so møguleikarnir fyri at leggja til rættis eru sum oftast betri.

Av tí at framleiðsluskeiðið vanliga varar longur og er meira støðugt, kann roknast við, at fleiri fólk fara úr verandi størvum í størv innan oljuvinnuna. Tí kann eisini verða tørvur á arbeiðsmegi í flest øllum øðrum vinnubólkum, og *avleidda virksemið* má sum heild roknast við at verða eitt sindur størri enn í hinum skeiðunum.

### 4.4.2 Royndir viðvíkjandi útbúgvingarpolitikki í øðrum londum

Kanningar í Noregi, Danmark, Hetlandi og Grampian-økinum[19] vísa, at skipaður, miðvísur útbúgvingarpolitikkur einans varð lagdur í Noregi, tá oljuvinnan tók seg upp. Í hinum londunum varð farið undir útbúgvingarnar so hvørt, sum tað kom fram, at tørvur var á teimum, oftast tí at útbúgvingarstovnar ella oljufeløg tóku stig til útbúgvingarnar, ið mangan byrjaðu sum eftirútbúgving av fólki, ið frammanundan høvdu royndir av arbeiði innan ídnað ella fyrisiting.

Í Noregi var øðrvísi[20]. Í fyrstani hevði Noreg alt ov lítið av servitan innan oljuleiting og -framleiðslu og noyddist tí at seta útlendsk fakfólk.

Skuldu norskir myndugleikar og norsk vinna so líðandi tryggja sær størri ræði yvir oljuvirkseminum á norskum øki, var neyðugt sum skjótast at útbúgva norsk fakfólk á høvuðsøkjunum innan oljuleiting og -framleiðslu.

Oljuvirksemið bar í sær vaksandi eftirspurning eftir akademiskt útbúnari arbeiðsmegi, og snøgt sagt var ikki annar vegur at nøkta hendan eftirspurning enn at økja útbúgvingarorkuna yvirhøvur. Verandi lærugreinar vórðu skipaðar um og lagaðar til nýggju krøvini.

Fyri at styrkja oljuútbúgvingarnar varð peningur settur av á fíggjarlógini til 17 nýggj vísindalig størv innan oljulærugreinar við universitetini í Oslo og Bergen og við NTH (Norges Tekniske Højskole).

Somuleiðis varð skipað fyri eini røð av eftirútbúgvingarskeiðum við uttanstovns fyrilesarum, og oljufeløgini valdu í mongum førum at senda fakfólk síni á skeið við universitetið í Bergen heldur enn at senda tey á líknandi, dýrari skeið uttanlanda.

Harafturat varð sett í verk ein studningsskipan at hjálpa norðmonnum at útbúgva seg til oljuvirksemi. Serliga fingu verkfrøðingar styrk at eftirútbúgva seg á universitetum uttanlanda, sum NTH hevði samstarvsavtalur við. Skipanin var ein neyðloysn, til NTH fekk egna lærda útbúgving í petroleumstøkni í 1973.

Trupulleikan at fáa fatur á fólki við undirvísingarførleika á universitetsstøði loystu teir lutvíst við at leggja seg eftir at fáa fatur í eldri fakfólki, eisini eftirløntum, við breiðum royndum innan økið. Men útlendskir undirvísarar vórðu eisini keyptir, m.a. við tilboði um tvey skattafrí ár, og harafturat varð heitt á oljufeløg við skrivstovu í Noregi um at hjálpa til við at fáa gestafyrilesarar.

Norskir myndugleikar gjørdu púra greitt fyri oljufeløgunum, hvussu teir høvdu hugsað sær, at lutfallið millum norska og útlendska arbeiðsmegi í oljuvinnuni skuldi vera, og hetta gjørdi, at oljufeløgini løgdu seg eftir at fáa norska arbeiðsmegi. Oftast máttu teir norðmenn, ið settir vórðu, fáa eftirútbúgving - bæði eftirútbúgvingarskeið og upplæring á høvuðsskrivstovunum hjá feløgunum - áðrenn teir vórðu fullgóð arbeiðsmegi.

Seinast í sjeytiárunum - o.u. 10 ár eftir at fyrsta oljan varð funnin - sótu norðmenn við royndum úr sjó- og fiskivinnu í 9 av hvørjum 10 størvum, ið bóru sjóvinnuligt brá, so sum skrokkar, stabilisering, rakstur og viðlíkahald av maskinum o.s.fr., men teir vóru longri um at fáa hægru størvini, ið kravdu bæði ástøðiliga og verkliga útbúgving.

---

[19] Har størsti parturin av arbeiðinum er, ið er knýttur at skotsku oljuvinnuni, er.

[20] Sí bokina "Norsk Oliehistorie", Tore Jørgen Hanisch og Gunnar Nerheim, Leseselskapet, Oslo, 192, bind 1 s. 352 ff.

Almenna fyrisitingin - serliga Oljedirektoratet - hjálptist í stóran mun við upplæringartilboðum frá oljufeløgunum. Hetta varð millum annað fingið í lag við, at ein av loyvistreytunum var, at feløgini bundu seg til at taka starvsfólk úr fyrisitingini at læra upp. Talan kundi verða um skeið, ið vardu í fáar dagar ella í fleiri mánaðar.

Eftir áheitan frá hinum almenna skipaðu feløgini eisini fyri serligum eftirútbúgvingarskeiðum fyri lyklapersónar innan landsfyrisitingina. Skeiðini vórðu vanliga fíggjað soleiðis, at feløgini rindaðu fyri frálæruna og skeiðstilfarið.

### 4.4.3 Skipan av føroyskum útbúgvingarpolitikki

Hava vit røttu útbúgvingarnar og annars megna at laga okkum til oljuvinnuna, skuldi føroysk arbeiðsmegi verið eins væl fyri og onnur arbeiðsmegi í sambandi við eina møguliga framtíðar oljuvinnu á føroyskum øki. Men hugsa vit um støddina á føroyska samfelagnum - og harvið eisini um støddina á arbeiðsmegini - er ikki hugsandi, at vit orka at luttaka á øllum økjum sjálvi.

Útbúgvingarpolitikkur í sambandi við eina møguliga framtíðar oljuvinnu eigur tí at verða lagdur til rættis eftir einum setningi um, hvussu og í hvønn mun vit sjálvi *ynskja* at taka lut í vinnuni, og út frá teirri sannroynd, at úr einum arbeiðsmarknaðar- og arbeiðskapandi sjónarhorni er *ikki neyðugt* at luttaka á øllum økjum.

Í sambandi við útbúgving og útvegan av arbeiðsmegi til oljuvinnuna kunnu hugsast tvey uppløgd stevnumið: At fáa flest fólk í vinnu sum skjótast, ella meira tilætlað at leggja okkum eftir at fáa tey bestu, varandi arbeiðsplássini og laga útbúgvingarpolitikkin eftir hesum. Hesi bæði málini eru *ikki* fult sameinilig, og vandin við fyrra stevnumiðinum kann verða, at vit dúva uppá løtuvinning og hervið missa møguleikarnar at fáa meira varandi, betri løntu størvini við størri møguleika at ávirka gongdina í vinnuni. Her eigur eisini at verða hugsað um ta avmarkaðu arbeiðsmegina.

Neyðugt er at raðfesta útbúgvingarinnsatsin í tíð. Fyrst eigur at verða hugsað um tær longru útbúgvingarnar, sum krevja fleiri ára lestur og starvsroyndir. Styttri skotbrá krevst til tær styttru útbúgvingarnar, ískoytisútbúgvingarnar og verkligu skeiðini.

### 4.4.4 Hvar skulu útbúgvingarnar vera, og hvussu skulu tær skipast innihaldsliga

Tøknifrøðiliga menningin, ið seinastu tíðina er farin fram innan oljuvinnuna hevur havt við sær, at tørvurin á menniskjaligari arbeiðsmegi minkar. Bæði tey sonevndu verktakarafeløgini og oljufeløgini spyrja í størri mun eftir fleirtáttaðari arbeiðsmegi, t.e. fólk við breiðum útbúgvingum/royndum, soleiðis at til ber at nýta sama fólkið til fleiri ymiskar arbeiðsuppgávur. Hetta krevur góðar grundútbúgvingar, ið eru lættar at dagføra.

Útbúgvingar kunnu antin leggjast heilar á *einum* ávísum útbúgvingarstaði ella setast saman av pørtum frá *fleiri* útbúgvingarstøðum. T.d. nýtast serútbúgvingar ikki at kunna takast á sama staði sum grundútbúgvingarnar. Men vert er at hugsa um, at tað er vinnan, ið setir ítøkiligu krøvini til arbeiðsmegina, og tí er týdningarmikið, at neyvt samband er millum vinnuna og útbúgvingarstovnarnar.

Í Føroyum eiga vit í høvuðsheitum at leggja okkum eftir at veita so góðar grundútbúgvingar sum gjørligt. Tá tað snýr seg um serútbúgvingar og eftirútbúgvingarskeið, eigur at verða mett um, hvat loysir seg betur - at fáa avtalur í lag við útbúgvingarstovnar uttanlands, sum frammanundan veita hesar útbúgvingar, ella at gera tær í Føroyum. Fyrimunir við at senda næmingar út í heimin at útbúgva seg er, at teir koma í sjálvt umhvørvið at virka og læra at hugsa altjóðaliga, samstundis sum føroysku útbúgvingarstovnarnir fáa tættari samband við líknandi útlendskar stovnar - og so er tað sum oftast bíligari. Fyrimunir við at gera útbúgvingarnar í Føroyum og fáa lærarar hendavegin at undirvísa eru m.a., at tað virkar við til at skapa eitt fakligt umhvørvi í Føroyum og gevur íblástur til okkara egnu útbúgvingarstovnar og samfelagið yvirhøvur.

Útbúgvingarrákið í Evropa hevur seinnu árini verið móti altjóðageran av útbúgvingunum. Hetta hevur ført við sær, at útbúgvingarstovnarnir hava verið noyddir at laga egnu útbúgvingar eftir útbúgvingum í øðrum londum. Her eiga Føroyar ikki at standa uttanfyri, serstakliga ikki tá hugsað verður um, at oljuvinnan er ein altjóða vinna burturav.

Tí er umráðandi, at føroysku útbúgvingarstovnarnir eru sinnaðir at hugsa og virka altjóðaliga og knýta bond til stovnar í øðrum londum við oljuviðkomandi útbúgvingum.

Føroysku myndugleikarnir eiga at hjálpa skúlunum við ráðgeving og við at fáa í lag samstarv við útbúgvingarstovnar av sama slagi uttanlands. Fyri at útbúgvingarstovnarnir kunnu hava neyðugu, dagførdu vitanina um kunnleikakrøv og møguleikar á útlendsku stovnunum, er neyðugt við skipaðum og framhaldandi upplýsingarvirksemi. Neyðugt er eisini, at kunning um føroysku útbúgvingarstovnarnar og endaligu prógvini verður gjørd á øðrum málum, eitt nú á enskum.

Eisini verður neyðugt at samskipa útbúgvingarvirksemið innan oljuvinnu. Serstakliga eigur at verða kannað, á hvørjum økjum vit høvdu havt fyrimunir av felags skeiðum fyri fleiri fakøki, og metingar eiga at verða gjørdar av, hvørt tað loysir seg at gera útbúgvingar í Føroyum ella heldur at taka tær uttanlands.

Nakrir føroyskir útbúgvingarstovnar eru farnir undir at leggja til rættis útbúgvingarmøguleikar sum eru viðkomandi fyri oljuvinnu. Í byrjanini av 1997 hava Fróðskaparsetur Føroya, Tekniski Skúlin, Maskinmeistaraskúlin og Føroya Sjómansskúli gjørt samstarvsavtalur við samsvarandi norskar útbúgvingarstovnar. Endamálið er at byggja upp og fáa til vega fakliga upplæring til oljuídnaðin. Avtalurnar loyva umskifti av bæði næmingum og lærarum. Miðað verður ímóti, at fyrsta umskiftið skal verða eftir summarfrítíðina í 1997.

### 4.4.5 Upplæringar og útbúgvingaravtalur í sambandi við loyvi

Natúrligt hevði verið at pliktað tey oljufeløg, ið fáa loyvi at leita eftir og útvinna olju á føroyskum øki, til at virka við til at tryggja, at eitt hóskandi útboð verður av væl skikkaðari føroyskari arbeiðsmegi, ið verður før fyri at taka lut í vinnuni, og somuleiðis at tryggja at starvsfólk í almennu fyrisitingini fáa rætta førleikan. Feløgini kundu styrkt útbúgvingarstøði okkara á økinum við arbeiðs- og upplæringartilboðum og við at fíggja útbúgvingar á føroyskum og útlendskum útbúgvingarstovnum.

Úr øðrum londum eru oljufeløgini von við bæði at skipa fyri og at taka lut í útbúgvingarverkætlanum við tí fyri eyga at útbúgva ymiskligar partar av arbeiðs-

megini í viðkomandi landi. Ymiskir møguleikar eru:

- Arbeiðstilboð til føroyska arbeiðsmegi.
- At upplæra føroyska arbeiðsmegi - bæði úr vinnuni og úr almennu fyrisitingini - í oljufeløgunum við tí fyri eyga at leggja ein tryggan grundvøll av servitan á øllum økjum og øllum stigum - verkliga eins væl og leiðsluliga. Í hesum sambandi eigur eisini at bera til at sleppa at taka lut í innanvirkis skeiðum og evnislestrum, eins væl og aðrari innanvirkis upplæring, ið hevur týdning fyri oljuvirksemi á føroyskum øki, og at fáa verkliga og ástøðiliga upplæring á ymsum tøkniligum, fyrisitingarligum, handilsligum og marknaðarligum virkisøkjum.
- Serliga samansettar útbúgvingarverkætlanir fyri lyklapersónar - somuleiðis bæði úr almennu fyrisitingini og vinnuni.

Av tí at samfelag okkara er so lítið, og bæði fólkatal og fíggjarorka av hesum sama eru avmarkað, fer, tá samanum kemur, helst at loysa seg best at leggja seg eftir at fáa eitt heldur minni tal av upplæringarplássum, sum oljufeløgini fíggja heilt, heldur enn eftir fleiri, lutvís fíggjaðum plássum.

Royndirnar av upplæringaravtaluni í sambandi við fyrsta seismikkloyvið í 1994 vísa t.d., at føroysku vinnuvirkini, ið aloftast eru smá og bundin at einstøkum persónum, hava ilt við at rinda løn til starvsfólk, sum eru í upplæring, samstundis sum tey hava ilt við at vera tey fyri uttan. Men tær vísa eisini, at ilt er at fylla øll plássini, um talan er um nógv upplæringarpláss, har ávís servitan er ein fortreyt.

Eisini kann koma uppá tal at lata oljufeløgini:

- Halda skeið og evnislestrar í Føroyum.
- Gera studningar fyri lesandi og fólk í eftirútbúgving
- Stuðla føroyskum útbúgvingarstovnum, bæði við gestafyrilesarum, ph.d.-studningum og við at fíggja serskeið og verkætlanir.
- Lata undirvísingarútgerð.
- Seta í verk, taka lut í og fíggja granskingar- og menningarvirksemi, m.a. gransking, menning og royndir av ymiskum ætlanum og tøkniloysnum umframt vørumenning. Hetta eigur at verða gjørt í tøttum samstarvi við føroyskt vinnulív og føroyskar granskingarstovnar.

Á universitetum og øðrum hægri lærustovnum er tætt samband millum útbúgving og gransking, og dygdin í hesum er neyvt tengd hvør at aðrari. Føroyskir granskingarstovnar eiga tí at sleppa at taka lut í tí granskingarvirksemi, sum verður tengt at tí, feløgini gera á føroyskum øki.

Føroyskur ídnaður og ráðgevar (konsulentar) eiga eisini í mest møguligan mun at verða tikin við í tær verkætlanir, sum verða á føroyskum øki. Hetta eigur at verða gjørt bæði fyri at byggja upp kunnleika og servitan á føroysku (granskingar)stovnunum og til tess at tryggja, at vit sjálvi fara at fáa ávirkan á, á hvørjum økjum ein leggur seg eftir at granska og menna, og hvussu hetta verður gjørt. Her verður serliga havt í huga vitan, sum bert lutvíst kann verða keypt uttaneftir, av tí at talan er um heilt serlig føroysk viðurskifti, eitt nú innan jarðfrøði, samfelagsvísindi, umhvørvi og havvísindi.

Bæði í Noregi og í Danmark gera loyvishavar sáttmálar um granskingar- og

menningarverkætlanir, har teir binda seg til at fremja ávísan part av teirri gransking, sum hevur beinleiðis samband við viðkomandi land, í landinum.

Ein kann eitt nú tryggja sær, at omanfyri umrøddu tiltøk verða sett í verk, við at oljufyrisiting og oljufeløg - samstundis sum loyvini verða givin - gera sáttmálar, har loyvishavin pliktar seg til at javnan kunna myndugleikarnar um tiltøk á útbúgvingar-, granskingar- og menningarøkjunum, sum verða sett í verk sambært loyvistreytunum.

## 4.5 OLJUSKATTING

At tilevna eina skattingarskipan til eitt møguligt kolvetnisvirksemi í Føroyum hevur ómetaligan týdning. Her kunnu vera skattingarmøguleikar, so tað munar. Skattir og aðrar inntøkur til tað almenna verða helst tann týdningarmesta inntøkukeldan, sum føroyska samfelagið kann hava av møguligari oljuvinnu. Men hvussu skattingarskipanin kemur at síggja út, er eisini avgerandi fyri, hvussu áhugin hjá oljufeløgunum verður fyri føroyska økinum.

Ein fyribils gjøgnumgongd av hugtøkum og spurningum í sambandi við kolvetnisskatting varð gjørd í *1993-frágreiðingini, 7. kapitli*, sum víst verður til.

Niðanfyri verða teir grundleggjandi spurningarnar lýstir við at velja skattingarskipan, tey serføroysku vandamálini og møguleikarnar fyri einari skattingarskipan, sum er hóskandi til føroysk viðurskifti.

### 4.5.1 Endamál við oljuskatting

Endamálið við eini føroyskari oljuskattingarskipan má metast sum fjøltáttað. Eitt mál er at fáa so stóra skattainntøku sum møguligt, so skjótt sum møguligt, so javnt sum møguligt og so vist sum møguligt. Hinvegin er greitt, at eru vit ov ágrýtin eftir stórum og skjótum inntøkum, fer tað at ávirka atferðina hjá oljuídnaðinum soleiðis, at tað virkar øvugtan veg. Harumframt skal ynskið um stóra inntøku vigast upp ímóti ynskjum um aðrar fyrimunir, t.d. vinnuligar.

#### 4.5.1.1 Størsta inntøka

Sum umrøtt í 7. kapitli í 1993-frágreiðingini hevur námsframleiðsla, herundir oljuframleiðsla, tað eyðkenni, at hon gagnnýtir eitt *avmarkað náttúrutilfeingi, sum samfelagið eigur*. Samfelagið vil hava tilfeingið gagnnýtt, so tað verður til so stóra nyttu sum møguligt fyri samfelagið sum heild. Samfelagið kann skipa fyri gagnnýtsluni undir ymiskum skipanum, smbr. kapittul 3.1, annaðhvørt sum almenn fyritøka saman við privatum fyritøkum, men við samfelagsligari leiðslu og luttøku sum í framleiðslubýtissáttmálum, ella av privatum fyritøkum við samfelagsásettum treytum sum í loyvisskipanini.

Tilfeingisvirðið á avmarkaðum tilfeingi kemur vanliga fram soleiðis, at ein vinningur fæst, eftir at løn til arbeiðsmegi og renta til kapital (íroknað ískoyti fyri váðafýsni) eru drigin frá. Samfelagið má í grundini sigast at eiga hetta virði, sum eisini verður rópt *tilfeingisrenta*.

Av tí at oljuprísurin er tann sami um allan heim, tá ið lagt verður upp fyri góðsku og flutningi, er tilfeingisrentan ymisk alt eftir framleiðslukostnaðinum. Í økjum við sera lítlum framleiðslukostnaði, sum í Miðeystri, er tilfeingisrentan ein stórur partur av oljuprísinum, men í økjum við stórum framleiðslukostnað er tilfeingisrentan lægri. Tað føroyska økið má væntast at hoyra til tað seinna slagið. Á byrjanarstigi skal serliga roknast við tí stóru óvissuni um at finna olju, sum kann gagnnýtast vinnuliga; hetta ger, at oljufeløgini hækka tann partin av kravinum til rentingina, sum skal bera vandan fyri, at olja ikki verður funnin, sum kann gagnnýtast vinnuliga.

Eitt av høvuðsendamálunum við oljuskattingarskipanini er at tryggja samfelagnum so stóran part sum gjørligt av tí møguligu tilfeingisrentuni.

Hetta verður gjørt við at gera umstøðurnar (eisini skattaumstøðurnar) soleiðis, at framleiðslan verður so, at mest møguligt fæst burturúr, so tey virði, sum skulu býtast, verða so stór sum møguligt, og við at fáa sum mest av tilfeingisrentuni til samfelagið.

Málið kann eisini verða orðað sum *at fáa so stóra inntøku av oljuvirkseminum, sum jarðfrøðin, tøknifrøðin, oljuprísurin og alheimskappingin um at draga oljufeløgini til sín, loyva*. Hetta eru í høvuðsheitum tey viðurskifti, sum avgera skattingarmøguleikarnar.

#### 4.5.1.2 Skattainntøkan býtt yvir tíðina

Í Føroyum kann oljan í dag vera mett sum ein møguleiki at koma burtur úr álvarsligum búskaparligum trupulleikum.

Hvussu skattainntøkurnar ynskjast býttar yvir tíðina verður sjálvsagt ávirkað av tí búskaparligu støðu, føroyska samfelagið hevur verið í í nøkur ár við afturgongd, uttanlandsskuld, arbeiðsloysi, flyting av landinum, verri almennum tænastum, vánaligum virkisbúskapi og øktum skattatrýsti, og bert við lítlari framgongd í seinastuni.

Vónað verður, at oljan skal gera Landsstýrið ført fyri at gjalda skuldina aftur, hækka tøku inntøkuna hjá fólkinum við skattalætta og bøta um almenna tænastustigið við at skapa arbeiði og virksemi til føroyskar fyritøkur og harvið hægri privatar inntøkur og við at útvega landsskassanum inntøkur. Sum heild verður vónað, at oljuinntøkurnar skulu skapa grundarlag undir einum búskapi, sum hvílir í sær sjálvum í longdini.

Í verandi búskaparligu støðu er tað natúrligt at vilja hava skattingarskipanina soleiðis, at hon skjótt gevur inntøkur, ið muna. Sum sæst í næsta parti, so kann tað vera trupult at sameina hetta mál við stavnhaldið at fáa so stóra úrtøku sum møguligt, sum frá líður.

#### 4.5.1.3 Ein jøvn og viss inntøka

Tað er natúrligt, at myndugleikarnir ynskja ein inntøkustreym, sum kann metast um frammanundan, og sum er toluliga javnur.

Hetta er rættiliga trupult, tá ið tað snýr seg um oljuskatt og -avgjøld. Oljuvirksemi er sermerkt av óvissu og ótryggleika á nógvum økjum:

At byrja við er tað *óvist*, um leiting eftir olju endar við, at olja verður *funnin*, sum kann gagnnýtast vinnuliga. Er tað *gass* ið verður funnið, skulu ofta stórir trupulleikar viðvíkjandi flutningskervi loysast, áðrenn gassið kann verða selt.

*Framleiðsluvavið* er skiftandi og ikki altíð soleiðis, at tað kann sigast frammanundan. *Prísir* fyri olju og gass broytast ógvusliga bæði í styttri og í longri tíð. Tí verður umsetningurin ella søluinntøkan ógvuliga skiftandi.

Oljuprísurin verður ásettur í USD, og *dollarakursurin* kann eisini vera fyri stórum broytingum, bæði í innlendskum gjaldoyra og í gjaldoyrum, sum innflutningurin verður roknaður í, og sum eru knýtt at DEM, og tað kann hava líka stóran týdning fyri Føroyar. Keypiorkan í dollaranum kann sostatt vera sera skiftandi.

*Kostnaðarsíðan* kann vera trupul at stýra hjá feløgunum og torfør hjá myndugleikunum at ansa eftir og gera upp.

Avleiðingin av hesum er, at *skattagrundarlagið undir inntøkuskattum* kann fara upp og niður og við tí eisini *skattainntøkan til landskassan* av einum og hvørjum

skatti, sum er tengdur at veruligu viðurskiftunum í oljuvinnuni.

Í staðin fyri at laga skattaskipanina eftir at fáa støðuga skattainntøku er neyðugt at góðtaka óvissuna og heldur laga fíggjarviðurskiftini hjá tí almenna í Føroyum til at loyva innanhýsis útjavning av skiftandi oljuinntøkum. Hetta kann t.d. verða gjørt við at stovna *grunnar* uttan fyri landsskassan, har skiftandi inntøka ár fyri ár kann verða inngoldin, og har pengar kunnu verða útgoldnir til landskassan í jøvnum árligum upphæddum.

### 4.5.1.4 Ávirkan av skattingini á atferðina

Eitt týðandi endamál er annaðhvørt at miða eftir, at skattingin *ikki hevur nakra ávirkan á atferðina*, ella hinvegin við vilja at royna at fáa skattingina at *ávirka atferðina á skilabesta hátt*.

Fyrimunurin við einari skattaskipan, sum *ikki ávirkar* atferðina hjá feløgunum, er, at feløgini ikki verða tarnað at skapa so stóra virðisøking og so stórt avkast sum møguligt í mun til íløgurnar. Vertslandið er eisini áhugað fyri hesum, tí harvið fæst størri “fongur” at býta millum oljufeløgini og samfelagið.

Minstakravið er at royna at bera so í bandi, at skattaskipanin *ikki styggir* altjóða oljuídnaðin burtur frá at seta í verk oljuleiting og framleiðslu í føroysku undirgrundini. Føroyar kappast í dag við tvey grannalond, sum hava sera lagaligar skattaskipanir; tey eru Bretland, har inntøkan frá nýggjum leiðum einans verður skattað við 33% í partafelagsskatti, og Írland, har partafelagsskatturin einans er 25%. Men eisini atferðin annars viðvíkjandi leitivavi og -ferð, at seta framleiðslu í gongd og við útvinningarferðini kann í meir ella minni mun verða ávirkað við avgjalds- og skattareglum, um ynski er um tað. Møguleikarnir at ávirka atferðina við skattareglum skulu kortini ikki yvirmetast.

### 4.5.1.5 Endamálini hjá Føroyum og hjá oljuídnaðinum

Fyri at kunna meta um, hvørja ávirkan oljuskattingin kann hava á atferðina, er neyðugt at hyggja nærri at atferðini hjá oljufeløgunum, og hvussu tey síggja skattingina.

Oljufeløgini mugu væntast at halda skatt vera neyðugan, hóast illa kendan. Men hinvegin vita tey, at allar stjórnir meta tey og vøru teirra sum vælegnaða at bera skattabyrðar.

Oljuídnaðurin virkar um allan heim og samanber tí skattaskipanir í ymisku londunum. Ráðgevarafyritøkur fylgja alla tíðina við gongdini í oljuskattingini allastaðni og royna at raðfesta londini eftir, hvussu hart tey skatta oljuvirksemi.

Tað er trupult heilt greitt at gera av, hvussu tyngjandi skattaskipanin er í einum landi samanborið við onnur lond. Her veldst ikki bert um skattingina tilsamans, men eisini hvussu hon er samansett av skattasløgum. Og hon má samanberast við leiti- og framleiðslumøguleikar á staðnum.

Eitt, sum er sera týðandi, sæð við felagseygum, er, hvussu *tíðarbýtið* av skattinum sær út, og hvussu hann viðger *váða*.

*Tíðarbýtið* hevur týdning, tí tað sum eyðkennir eina oljuverkætlan[21], er at long tíð gongur frá útreiðslunum til leiting og útbygging, til nøkur inntøka kemur;

[21] Um gongdina í einari oljuverkætlan, sí Frágreiðing frá Oljuráðleggingarnevndini í 1993, 4. kapittul.

talan er ofta um nógv ár. Ein oljuverkætlan er sostatt ógvuliga kapitalkrevjandi og gjaldføristyngjandi hjá oljufeløgunum. Oljuídnaðurin er tí ikki serliga fegin um skatt, sum økir útreiðslurnar ella minkar um inntøkurnar, áðrenn inngjaldingarnar, helst við rentum, hava vigað upp ímóti upprunaligu útgjaldingunum. Feløgini meta skatt og avgjøld, sum verða kravd inn í hesum tíðarskeiði, sum eitt óynskt lán til skattamyndugleikarnar.

*Váða*metingin hevur sera stóran týdning. Oljufeløgini fara í holt við forkanningar og síðani leitiboringar, hóast tey meta tað rættiliga óvist, um tey enda við at finna olju, sum kann gagnnýtast vinnuliga. Flestu boringar eru úrslitaleysar. Tær fáu boringar, sum eydnast, skulu bera kostnaðin av teimum, sum miseydnast. Og gjaldingin av hesum kemur langt aftaná. Oljufeløgini hava ilt eyga á skattum, sum ikki í nóg stóran mun leggja upp fyri kostnaði, sum tey hava havt til úrslitaleysar leitiboringar og til útbygging og rakstur. Tey meta slíkar skattir sum eina øking í váðanum.

Meiri olja verður funnin í einum øki, minni tykist leitiváðin at vera, og betur kunnu myndugleikarnir loyva sær at seta stór krøv, eisini á skattaøkinum.

Í tann mun vertslandið áleggur oljufeløgunum *avmarkingar í tí, tey havast at*, t.d. við at krevja at innlendsk arbeiðsmegi og innlendskar vørur og tænastur skulu nýtast (hetta hendir ofta), vilja feløgini - av røttum ella ikki - hava lyndi til at meta slík krøv sum øking í kostnaðinum til leiting, útbygging og framleiðslu; hetta ger, at tey hava eitt meira vakið eyga eftir krøvum um avgjøld og skatt. Øll tey almennu krøvini eiga tí at vera tikin sum ein heild.

Í fylgiskjali 4.5-1 eru nøkur dømi, sum vísa, hvussu oljufeløgini viðgera váðaligar og tíðarkrevjandi verkætlanir, og hvussu tey rokna, um ein verkætlan eigur at verða sett í verk.

#### 4.5.1.6 Aðrar skattligar avleiðingar

Í tann mun aðrir búskaparligir fyrimunir (t.d. av arbeiðsskapandi og vinnuligum slag) verða náddir, kanska við lægri skattainntøku sum fylgju, fer hetta í øðrum umfari at geva eitt størri skattingargrundarlag.

At enda skal gerast vart við, at tær samfelagsbúskaparligu og vinnubúskaparligu rembingar, sum eru í kjalarvørrinum av kolvetnismenning, kunnu ávirka kappingarevnini millum vinnugreinarnar og eisini inntøku- og ognarbýtið í føroyska samfelagnum soleiðis, at tað í sær sjálvum krevur broytingar í føroysku skattaskipanini.

### 4.5.2 Skatta- og avgjaldsamboð

Fyri at fáa bestu skattingina er ofta neyðugt at brúka fleiri ymisk skattapolitisk amboð. Ímóti hesum ynski stendur ynskið - ikki minst frá oljuídnaðinum - at gera skipanina einfalda og greiða.

Niðanfyri verða nøkur av teimum mest vanligu amboðunum lýst, og mett verður, hvussu væl tey hóska í føroyskum høpi.

#### 4.5.2.1 Ómaksgjøld og avgjøld

Roknað verður við, at *ómaksgjøld* verða kravd fyri umsóknir og loyvi og víddaravgjøld fyri øki á havbotninum, sum rættindi eru fingin til.

Ætlanin við ómaksgjøldunum er, at oljuvirksemið ikki skal kosta

skattaborgarunum í Føroyum pengar. Tey skulu bera fyrisitingarliga kostnaðin av at viðgera umsóknir og skriva loyvi. Á sama hátt kunnu gjøld verða kravd fyri útreiðslur hjá myndugleikunum, t.d. til eftirlit.

Í *víddaravgjøldini* ber til at leggja eina reglu, sum ávirkar atferðina við tað, at tey kunnu vera lutfalsliga hækkandi (progressiv), sum tíðin fer, soleiðis at feløgini verða eggjað til at gera av, um tey vilja hava økið sjálv at kanna og gagnnýta, ella um tey vilja lata rættindini frá sær, so tey kunnu latast øðrum feløgum, sum eru betur før fyri at gagnnýta tað.

So leingi eitt oljufelag ikki hevur funnið olju í einum øki, vil tað illa góðtaka nakað stórvegis avgjald. So skjótt olja er funnin, sum kann gagnnýtast vinnuliga, broytist støðan, soleiðis at ávís avgjøld kunnu verða kravd m.a. fyri at fáa felagið at fara í gongd við at gagnnýta tað á hóskandi hátt.

Tað er ilt at siga, um roknast kann við so stórum inntøkum í hesum sambandi, at tað munar í landskassanum.

### 4.5.2.2 Uppboðssøla av rættindum

Eitt víðgongt amboð at fáa *skjóta inntøku* er at bjóða rættindi út til hægstbjóðandi.

Hesin háttur er gamal og verður brúktur í ávísan mun til oljurættindi, serliga í Norðuramerika er hann nógv brúktur.

Ástøðiliga er hetta kanska ein eyðsýndur háttur hjá tí almenna at ogna sær afturroknaða virðið á tilfeingisrentuni, um roknað verður við, at feløgini fara at bjóða yvir hvørt annað, til tað felag, sum kann gagnnýta tað væntaða tilfeingið best, og sum hevur lægsta rentingarkravið, stendur eftir við hægsta boði.

Hesin háttur er kortini ikki væl egnaður, um óvissan er stór, tá ið metast skal um væntaðu tilfeingisrentuna í einum útbjóðaðum øki. Støðan í Føroyum er, at umframt óvissuna um oljuprísir í framtíðini v.m. hava vit sum heild eitt lítið kannað øki og sostatt stóran váða í leitingini; tí er uppboðshátturin illa hóskandi. Feløgini fara ikki at hætta sær at bjóða høgt í slíkum føri, og tí verða tilboðini ikki nøktandi fyri landskassan. Landskassin fer tí sjálvur at bera ein stóran part av byrðuni av óvissuni, serliga í sambandi við váðan í leitingini.

Harumframt verður tað fæ, sum feløgunum tørvar fyri at bjóða upp á rættindini, ikki tøkt til at fíggja leitivirksemið, sum skuldi ført til, at olja verður funnin.

Sum er, er tí neyvan hugsingur um at nýta uppboðsháttin í Føroyum.

### 4.5.2.3 Framleiðslugjøld (royalty)

Avgjøld, sum broytast við *framleiðslunøgdini* ella *framleiðsluvirðinum,* eru søguliga kend. Tey kunnu í ávísan mun nøkta kravið um toluliga vissa og javna inntøku av oljuni. Harafturat kunnu tey verða kravd tíðliga, longu tá ið framleiðslan byrjar.

Tað mest støðuga framleiðslugjaldið, sæð við føroyskum eygum, hevði verið ein føst upphædd í krónum fyri hvørja framleidda eind, soleiðis at framleiðslunøgdin var einasti broytiligi faktorur. Harvið hevði allur váðin viðvíkjandi bæði prísbroytingum og dollarakursi ligið á oljufeløgunum. Av somu orsøk høvdu hesi illa viljað góðtikið eitt avgjald, sum verður roknað soleiðis.

Tað mest vanliga er at rokna framleiðslugjaldið (royalty) sum ein fastan prosentpart av framleiðsluvirðinum, uppgjørt í USD. Tað mest einfalda framleiðslugjaldið er ein fastur prosentpartur, men glíðandi stigar verða eisini

brúktir, t.d. soleiðis at avgjaldsprosentið hækkar annaðhvørt við framleiðsluni tilsamans ella við øktari dagligari framleiðslu á viðkomandi leið. Í fylgiskjali 4.5-2 eru dømi víst um nakrar skipanir við framleiðslugjøldum.

Sæð frá landskassans sjónarmiði hevur framleiðslugjaldið tveir stórar fyrimunir: Annar er, at inntøkan kemur inn tíðliga og er til at rokna við í fíggjarætlanum; hin er, at inntøkan einans broytist við inntøkusíðuni á verkætlanini, t.e. við framleiðslunøgd og við prísi, og er ikki tengd at kostnaðarsíðuni hjá oljufeløgunum. Hetta merkir, at tá ið avgjaldið skal roknast, er nóg mikið at halda seg til framleiðslunøgd og prís, sum eru rættiliga løtt at staðfesta, og at tað ikki er neyðugt at ganga eftir útreiðsluuppgerðunum hjá feløgunum, sum kunnu vera torgreiddar. Eitt avgjald, sum ikki er knýtt at útreiðslusíðuni, fer heldur ikki at linka kostnaðartilvitskuna hjá felagnum.

Nevndu fyrimunir, sæð við landsstýriseygum, eru týðandi vansar, sæð við oljufelagseygum. Eitt framleiðslugjald, sum skal gjaldast tíðliga, tyngir um gjaldførið hjá felagnum. Eitt framleiðslugjald verður roknað sum eitt slag av bruttoskatti út frá bruttovirðinum á framleiðsluni uttan mun til framleiðslukostnaðin. Tað skilir ikki ímillum oljuleiðir við høgum og oljuleiðir við lágum kostnaði fyri hvørt fat av olju, sum verður framleitt. Fyri oljufeløgini verður tað tí ikki ávirkað av, hvussu vinningsførið av verkætlanini er. Oftast má roknast við, at vinningurin veksur lutfalsliga hækkandi við framleiðsluvirðinum Eitt avgjald við einum føstum prosenti av framleiðsluvirðinum broytist tí lutfalsliga lækkandi (degressivt) við vinninginum av verkætlanini. Í teimum førum, har raksturin ríður um snarið, kann framleiðslugjaldið gera eina lønandi oljuleið ólønandi ella skunda undir, at verandi leið má steingjast.

Tað, sum kann viga eitt sindur, men ikki heilt, upp ímóti hesum atfinningum frá feløgunum, er at lata avgjaldsprosentið broytast við ávísum støddum, sum fylgja yvirskotinum betur, enn bruttoframleiðsluvirðið ger. Eitt nú kann framleiðslugjaldið vera lutfalsliga vaksandi (progressivt) við framleiðslunøgdini (t.d. um dagin) og møguliga við oljuprísinum. Harvið verður fyrilit havt fyri, at stórar leiðir við høgari framleiðslu vanliga eru meiri vinningsførar enn smáar leiðir við lágari framleiðslu, og eisini at ein ávís prísbroyting ávirkar yvirskotið lutfalsliga meir. Eitt avgjald, har prosentið fellur við fallandi framleiðslunøgd, minkar eisini um vandan fyri, at leiðir verða stongdar í ótíð, tí móti endanum hava leiðirnar ofta fallandi dagliga framleiðslu.

Sæð frá landskassanum má sigast, at framleiðslugjøld, ið hvussu er tey, sum eru roknað sum fast prosent av framleiðsluvirðinum, eru óneyv amboð at krevja inn tilfeingisrentu av einari oljuleið, tí tað ið landskassin fær inn bert í lítlan mun broytist við tilfeingisrentuni.

Tí kann framleiðslugjaldið sum amboð ikki verða nýtt einsamalt.

Framleiðslugjøld verða brúkt víða hvar. Men her er vert at undirstrika, at oljulond her um leiðir, Noreg, Danmark, Bretland og Írland krevja, sum er, ikki framleiðslugjøld inn av nýggjum leiðum. Kappingarviðurskiftini tala sostatt fyri at nýta hetta amboð við varsemi.

#### 4.5.2.4 Partafelagsskatting

Tað er ein spurningur, um partafelagsskattur skal umrøðast sum eitt slag av oljuskatting. Tað má vera natúrligt, at inntøkur, sum verða vunnar av kolvetnisframleiðslu í føroysku undirgrundini, koma undir somu skatting, sum

onnur vinna í Føroyum. Verða tey ikki staðiliga tikin undan almennari skattskyldu, skulu oljufeløg, sum eru við í framleiðsluni, gjalda inntøkuskatt í Føroyum av vinningi í framleiðsluvirkseminum. Vanliga eru fyritøkurnar partafeløg, og skulu tær tí gjalda føroyskan partafelagsskatt.

Kortini er tørvur á *lóggávu*, sum bæði tekur støðu til serligar spurningar um, hvussu skattskylduga inntøkan av oljuframleiðsluvirksemi skal gerast upp, og sum flytir markið fyri inntøkuskattskylduna út um sjóøkið til at fevna um allan landgrunnin.

Tær serligu reglurnar um skatting av inntøkum av kolvetnisframleiðslu og skatting av virksemi á landgrunninum verða helst savnaðar í einari kolvetnisskattalóg - eftir danskari og norskari fyrimynd.

Nevndin er komin rættiliga langt at fyrireika eitt uppkast til uppskot um føroyska kolvetnisskattalóg við viðmerkingum og kann við stuttum skotbrá gera tað liðugt at lata Landsstýrinum.

Tá ið skattskylduga inntøkan hjá ein einum oljufelag skal gerast upp, er neyðugt at hava *tey serligu viðurskiftini í framleiðsluvirkseminum* í huga, sum t.d. ta - ofta longu - tíðina, tá ið felagið hevur leitiútreiðslur, sum føra við sær, at olja annaðhvørt verður funnin ella ikki. Síðani kemur ein rættiliga long útbyggingartíð við ómetaliga stórum íløguútreiðslum. Inntøkurnar av framleiðsluni koma ofta eftir stuttari tíð í hæddina og halda sær á hesum stigi í nøkur ár og falla síðani, til tær koma niður á eitt stig, har tað ikki loysir seg at halda fram; síðani kemur ein tíð við halli av útreiðslum til at rigga av.

Hesi serligu eyðkenni við oljuframleiðslu krevja, at serligar reglur verða umhugsaðar, eitt nú um hvussu leingi undirskot kunnu førast fram, avskrivingarreglur viðvíkjandi framleiðsluútgerð o.a.

Ein viðkomandi skattapolitiskur spurningur er, hvørt - ella í hvønn mun - tað skal vera *loyvt at flyta undirskot, ávikavist yvirskot frá kolvetnisframleiðslu til aðra vinnu og hinvegin*.

Tey fyrstu árini við leitingum og møguligari útbygging fara tey luttakandi feløgini at hava stóra negativa skattskylduga inntøku. Hevði hon kunnað verið drigin frá aðrari skattskyldugari inntøku í Føroyum, høvdu persónar og feløg í Føroyum, sum ikki hava samband við oljuvinnuna, kunnað fingið skattafyrimun við at fara inn í oljuframleiðslu.

Seinni, tá ið oljuverkætlanirnar geva stórar skattskyldugar inntøkur, fara tey, sum hava inntøku av oljuframleiðslu, kanska at royna at fáa ein skattafyrimun av at fara inn í vinnugreinir, sum ikki hava samband við framleiðsluvirksemi, og sum hava skattligt undirskot.

Í báðum førum kann verða *máað burtur av skattagrundarlagnum hjá landskassanum*, so tað munar. Um sleppast skal undan hesum, er eitt hugskot at gera eitt mark (sokallað “ring fence” ella “girðing”) millum inntøku av kolvetnisframleiðslu og aðra inntøku. Í summum londum er eitt sovorðið mark, í øðrum ikki. Í Føroyum skulu væntaðir fyrimunir og vansar av, at føroysk feløg fara í oljuframleiðslu, og/ella at oljufeløg fara í aðra vinnu í Føroyum, vigast upp ímóti tí møguliga skattainntøkumissi, sum kann verða avleiðingin. Helst verður roynt at minka um tiltøk, sum bara ella einamest hava skattasparandi endamál. Tá ið mett verður um vandarnar í hesum, er vert at gera greitt, at um føroysk feløg fara upp í oljuframleiðslu, og/ella um oljufeløgini fara upp í aðra vinnu í Føroyum, so gera tey tað neyvan, uttan so at tey vænta eitt positivt avkast av

íløgunum. *Spurningurin* um nevnda mark (“ring fence”) er *skattapolitiskur*, og tað er neyðugt at geva honum gætur.

Ein ógvuliga týdningarmikil síða av oljuskattingini er, í hvønn mun *altjóða oljufeløg* kunnu fáa skattin, sum verður goldin í Føroyum, *góðskrivaðan (fáa “credit”)* í heimlandinum.

Føroyar og oljufeløgini hava sum felags áhugamál, at skattingin í Føroyum verður soleiðis, at ein sovorðin skattagóðskriving fæst í heimlandinum. Fæst hon ikki, verður skatturin, sum verður goldin í Føroyum, bert ein útreiðsla, sum kann dragast frá, tá ið partafelagsskatturin í heimlandinum skal roknast. Harvið verður ein størri partur av tí yvirskoti, sum verður til av virkseminum í Føroyum, latin skattamyndugleikunum í heimlandinum, so at fongurin, sum skal býtast millum oljufelagið og føroyska skattavaldið, verður tað minni. Sostatt verður tað eisini truplari at fáa eina skatting til Føroyar, sum bæði føroysku myndugleikarnir og feløgini kunnu vera nøgd við.

Serliga verður dentur lagdur á, at góðskriving fæst í USA og Bretlandi, sum eru heimlond hjá heilt nógvum oljufeløgum.

Í hesum sambandi er ikki so neyðugt at gera avtalur við viðkomandi heimlond um, at *dupultskatting* ikki skal vera, tí flestu lond hava egna lóggávu, sum við ávísum treytum gevur feløgum, sum hava heimstað í landinum, rætt til fulla góðskriving fyri inntøkuskatt, sum er goldin uttanlands.

Høvuðstreytirnar fyri, at ein skattur kann vera endurgoldin, eru, at talan er um ein sannan inntøkuskatt, sum er roknaður av veruligum inntøkum, har veruligur kostnaður er drigin frá, íroknað avskrivingar av íløgum. Avmarkingar í reglunum at draga rakstrarkostnað frá, at føra undirskot fram, at avskriva av íløgunum ella krav um at rokna inntøkuna út frá øðrum prísum enn teimum veruligu marknaðarprísunum kann gera, at góðskriving verður torfør ella ómøgulig. Somuleiðis er tað ofta ein treyt fyri góðskriving, at inntøkan av oljuframleiðsluni er skattað á sama hátt sum onnur inntøka.

*Treytirnar hjá heimlondunum fyri góðskriving av skatti avmarka soleiðis møguleikarnar at evna eina inntøkuskattaskipan fyri oljuframleiðslu til.* Ein týðandi táttur er sjálvt skattaprosentið, av tí at heimlandið vanliga bara góðskrivar fyri skatt, sum svarar til egið skattaprosent, fyri partafelagsskatt ofta 30-35%. Ein føroyskur partafelagsskattur niðan fyri hetta (sum nú 27%) verður tí verri enn so altíð nakar fyrimunur hjá feløgunum, tí at góðskrivingarmøguleikin verður tað minni, og tað, sum ein partafelagsskattur er oman fyri hetta, verður ofta ein verulig byrða hjá feløgunum, tí tað kann vanliga ikki uppvigast við einari skattasparing heima.

Ein annar spurningur er, um oljuframleiðslufeløgini fáa loyvi til at arbeiða í Føroyum sum *deildir*, ella um tað verður kravt, at tey skulu skrásetast sum føroysk partafeløg. At feløgini hava møguleika at draga útreiðslur til forkanningar og leitingar og eisini avskrivingar av íløgum frá í skattskyldugu inntøkuni í heimlandinum talar fyri at loyva teimum at virka sum deild, áðrenn framleiðslan byrjar. Í Føroyum verður inntøkuskattingin tann sama, um virkið verður skipað sum deild ella sum dóttirfelag.

Eitt serligt vandamál hjá feløgum, men ikki hjá deildum, eru føroysku reglurnar um at afturhalda 35% av *vinningsbýti sum endaligan kelduskatt*. Eftir galdandi norðurlendska sáttmálanum um, at dupultskatting ikki skal koma fyri, hava Føroyar avmarkað seg til ikki at skatta vinningsbýti við meira enn 5%, tá ið

talan er um móður-/dótturfelagssamband. Í tí nýggja sáttmálanum, sum kemur í gildi 1. januar 1998, hava Føroyar góðtikið at sleppa skatting av vinningsbýti heilt, tá ið talan er um móður-/dótturfelagssamband. Í flestu londum verður sovorðin skattur ikki kravdur av vinningsbýti millum feløg í somu konsern. Føroyskar reglur við sama innihaldi mugu haldast vera treyt fyri, at føroyska partafelagsskattaskipanin verður mett borðbær í millumlanda høpi, eisini millum oljufeløgini.

Ein partafelagsskattur, sum tekur støði í skattskyldugari inntøku, uppgjørd eftir vanligum reglum - møguliga við ávísum tillagingum at leggja upp fyri sereyðkenni við oljuframleiðsluvirkseminum, gevur helst landskassanum eina skattainntøku, sum fyri tað fyrsta broytist við framleiðsluni, prísunum, avskrivingunum o.ø., og sum í øðrum lagi kann vera útsett rættiliga leingi, tí um feløgini eru heppin í virkseminum, fara tey at halda fram við leiting, útbygging av oljuleiðum o.s.fr.

Møguleikin at ávirka hesa samanseting av broytingum og útsetingum, t.d. við at avmarka frádráttarrættin fyri útreiðslur til 80% av bruttoinntøkuni, er umhugsaður, men sleptur, tí millumlanda skattaserfrøðingar meina, at hetta fer at gera tað sera torført hjá feløgunum at fáa skattagóðskriving í heimlandinum av føroyska partafelagsskattinum.

Ein sera týðandi ávirkan á tíðarbýtið av partafelagsskattinum stendst av *avskrivingarreglunum*, tí at tær stóru avskrivingarnar av eini verkætlan ofta eru tey fyrstu árini, tá ið framleiðslan úr oljukeldunum er mest. Vanligu føroysku reglurnar eru, at útgerð verður avskrivað við 30% av saldovirði.

Eitt møguligt *framleiðslugjald* og helst eisini ein møguligur serligur kolvetnisskattur, smbr. brot 4.5.2.5, skal sum ein treyt fyri góðskriving dragast frá, tá ið skattskylduga inntøkan verður gjørd upp.

Útreiðslurnar til at *enda eina oljuverkætlan* kunnu vera stórar, samstundis sum inntøkurnar av leiðini so líðandi minka og halda uppat. Hetta talar fyri at geva loyvi til at føra undirskot aftur, ið hvussu er frá tí ári, tá ið hildið verður uppat.

#### 4.5.2.5 Serligir kolvetnisskattir

Søguliga sæð eru framleiðslugjøld og partafelagsskattir mest vanliga samanseting av amboðum at tryggja landinum ein part av vinninginum av oljuframleiðslu.

Kortini er staðfest, at henda samanseting ikki altíð gevur tað bestu skattingina, tí hon gevur ikki tí almenna ein lutfalsliga vaksandi part av tí reina vinninginum ella tilfeingisrentuni. Hendan er ymisk frá einum stað til annað eftir framleiðsluviðurskiftunum, partvís sum tíð og oljuprísurin broytist og partvís eftir tøknifrøðiligum framstigum.

Oljuøki við sera *góðum framleiðslutreytum*, sum t.d. Miðeystur, Venesuela og Indonesia, hava so við og við gjørt reglur, sum tilsamans geva ríkinum ein sera stóran part av virðinum á tí kolvetni, sum verður framleitt.

Teir serligu *kolvetnisskattirnir*, sum t.d. eru nýttir í Norðsjóvarlondunum (Danmark, Noreg, Bretlandi og Hálandi), eru sermerktir av at vera íkomnir av teimum ógvusligu *oljupríshækkingunum* miðskeiðis og seinni í sjeytiárunum. Tí vinningi, sum oljufeløgini fingu av hesum, varð roynt at fáa fatur á við ymiskum sløgum av skattum. Í summum londum varð mest roynt at krevja inn løtuvinningin av príshækkingini (“windfall profits tax”), og í øðrum varð roynt at skatta eitt yvirskot, sum skuldi umboða tann “reina” vinningin, t.e. tað, sum yvirskotið var oman fyri vanliga renting (við váðanarískoyti) av íløguni. Hetta trongliga lýsta yvirskotshugtak varð ofta hart skattað í prosentum.

Í fylgiskjali 4.5-3 eru nøkur eyðkenni fyri kolvetnisskattunum í teimum fýra Norðsjóvarlondunum endurgivin. Her sæst t.d., at tann *danski kolvetnisskatturin* verður roknaður út frá vunnum inntøkum av oljuframleiðslu á danska landgrunninum fyri hvørja leið sær (t.e. innigirðing (“ringfencing”) av hvørjari leið sær), frádrigið rakstrarkostnað sum vanligt og goldnan partafelagsskatt, men íløgurnar verða drignar frá við árligum prosentligum ískoytum við tí fyri eyga at náa eina ávísa minsturenting. Skatturin av hesari serligu kolvetnisinntøku er 70%. Av tí, at inntøkuhugtakið er so trongliga lýst, er tað sjáldan, at tann danski kolvetnisskatturin gevur nakað serligt.

*Norski petroleumsskatturin*, sum verður roknaður fyri allan norska landgrunnin og ikki fyri hvørja leið sær, er 50% av einum yvirskotshugtaki, sum ikki er stórt trengri enn skattauppgerðin fyri partafelagsskattin, sum er 28%. Hann verður lagdur oman á partafelagsskattin, soleiðis at markskatturin (marginalskatturin) verður 78% (fyri gamlar leiðir skulu framleiðslugjøld roknast uppí, og tey kunnu dragast frá sum útreiðsla í báðum skattunum). Norski kolvetnisskatturin gevur Noregi javna og stóra inntøku.

*Bretski kolvetnisskatturin* (sum er 0 fyri nýggjar leiðir) verður gjørdur upp fyri hvørja leið sær og er ein útreiðsla, sum kann dragast frá, tá ið partafelagsskatturin verður roknaður.

Í *føroyskum sambandi* ber til at grundgeva fyri einum eyka skatti við at vísa á, at partafelagsskatturin, sum er 27%, yvirhøvur er minni enn tað, sum heimlondini hjá oljufeløgunum halda vera rímiligt. Tað er ivasamt, um føroyski skatturin hevði verið settur so lágt, um roknað varð við skattgjaldarum í milliardflokkinum. Harumframt kemur, sum nevnt, hugsjónin um, at samfelagið eigur at kunna ogna sær ein rímiligan part, um ein stór tilfeingisrenta verður staðfest.

Í veruleikanum høvdu helst *mong ár* gingið, áðrenn roknast kundi við, at kolvetnisskattur gjørdist nøkur inntøkukelda hjá landskassanum. Skattagrundarlag verður neyvan nakað, fyrr enn nøkur ár eftir, at framleiðslan er byrjað. Um ikki oljuprísirnir hækkað munandi, ella stór tøknifrøðilig framstig verða gjørd, eru útlitini uppaftur minni fyri skattligum vinningi í næstu framtíð.

Hetta kundi kanska talað fyri at bíða við at hugsa um serstakan skatt á oljuframleiðslu, til møguleikarnir fyri at krevja inn eina munandi inntøku vísa seg.

Á henda hátt kundu Føroyar í fyrstu syftu staðið seg væl, tá ið oljuskatting verður samanborin landanna millum. Men tað er ivasamt, um vantandi kolvetnisskattur fer at økja um áhugan, sum oljufeløgini hava fyri føroyska økinum. Oljufeløgini vita av royndum, at um stórur vinningur verður staðfestur, verður hann helst skattaður.

Tí kann hugsast, at eitt felag, sum hugsar skynsamt, heldur vil sleppa at síggja, hvussu ein sovorðin skattur kundi sæð út, enn at liva í óvissu. Í samrøðum við oljufeløgini er kortini komið fram, at flestu teirra halda tað vera óheppið at seta eyka skatt á oljuframleiðsluinntøku í gildi nú. Nøkur feløg hava lagt afturat, at tey høvdu fegin viljað fingið trygd frá myndugleikunum fyri, at eingin eyka skattur varð kravdur av framleiðsluinntøkum, sum stava frá fyrsta útbjóðingarumfari.

Nevndin hevur viljað lagt dent á at tryggja feløgum, sum hava áhuga fyri at arbeiða á føroyska landgrunninum langt fram í tíðina, so støðugar fortreytir sum møguligt. Hetta kundi talað fyri, at neyðugar lógarrammur og høvuðsreglur fyri ein serligan kolvetnisskatt vóru orðaðar longu nú.

*Niðanfyri verða nøkur sløg av eyka skatti av oljuframleiðsuinntøku viðgjørd uttan at velja nakra ávísa loysn, tí hon má helst bíða til avgerð verður tikin um at hava eitt útbjóðingarumfar.*

Ein vegur at farið at krevja skatt inn av stórum vinningum í oljuframleiðsluni kundi verið at *hækka partafelagsskattin*, sum í dag er lágur sammett við onnur lond. Varð hann hækkaður uppí 33-35%, høvdu tað ikki verið stórtíðindi uttanlands. Tó má nevndin rokna við, at tað, at partafelagsskatturin er 27%, er ein væl umhugsaður leikur í føroyska skattapolitikkinum, og tí ikki stendur til at broyta. Harumframt skal nevnast, at aðrastaðni sæst ein hugur til at lækka partafelagsskattingina. Tann munur, sum í dag er millum skattaprosentið í Føroyum og í viðkomandi londum, er kanska burtur tann dag, ein møgulig skatting av oljuframleiðslu kemur upp á tal.

Eitt hugskot kundi verið at latið partafelagsskattin verið meir enn *lutfalsliga hækkandi* (progressivan) við einum stigi uppi á 35% (ella meir) fyri inntøkur oman fyri eina ávísa - høga - upphædd (t.d. 10 ella 50 mió. kr. um árið). Hetta hugskot siga fleiri oljufeløg vera lættari at góðtaka enn ein veruligan eyka skatt av oljuinntøku, eisini tá ið góðskriving í heimlandinum verður havd í huga. Men hugskotið um lutfalsliga hækkandi (progressivan) partafelagsskatt fellur neyvan í góða jørð hjá verandi føroyska vinnulívi. Eisini vísa royndir, at progressivur skattur í partafeløgum kann elva til, at feløgini á ymsan hátt royna at sleppa sær undan. Tí er hesin møguleiki minni væl egnaður.

Eitt annað, sum kundi verið roynt, er eitt slag av *framleiðslugjaldi*, sum broytist í samsvari við eitt álítandi tal fyri reina vinningin, ella tilfeingisrentuna. Sum nevnt í broti 4.5.2.3 kundi eitt framleiðslugjald verið meir enn lutfalsliga

hækkandi alt eftir framleiðslunøgdini, prísi o.s.fr. Veikleikin í hesum loysnum er, at tær leggja ikki upp fyri munum í veruliga yvirskotinum, sum stavar frá kostnaðarsíðuni, um talan so er um leitikostnað, rakstrarkostnað ella íløgur. Kanska slapst uttan um hesar veikleikar við at binda framleiðslugjaldið - ikki at framleiðsluvirðinum í hvørjum tíðarskeiði, men at nettoinntøkuni (t.d. um árið). Men so nærkast vit aftur inntøkuskattahugtakinum.

*Tað besta* hevði verið ein skattur, sum miðar eftir at krevja inn ein rímiligan part av tí reina vinninginum hjá feløgunum, og sum helst *skal laga seg eftir* øllum hugsandi broytingum í inntøkusíðuni og útreiðslusíðuni og í øðrum viðurskiftum uttanum, t.d. viðvíkjandi prísi og gjaldoyra alla livitíðina hjá oljuverkætlanini.

Tann skattingarháttur, sum eina frægast lýkur hesa treyt uttan at vera alt ov fløktur, hevði verið ein skattur av tí sonevnda innanavkastinum ("rate of return" "*ROR"-skattur*). Við slíkum skatti verður roynt at krevja inn ein hóskandi part av tí vinningi, sum er til avlops, tá ið felagið hevur vunnið innaftur allar beinleiðis útreiðslur til leiting, rakstur og útgerð (uttan rentur), og harumframt fingið rentað íløgurnar við einum rentufóti, sum umboðar tað rentingarkrav, sum felagið kann góðtaka, íroknað ískoyti fyri váða í viðkomandi oljuøki. Vinning oman fyri hetta má felagið so býta við tað almenna við einum serligum skatti.

Skattagrundarlagið verður roknað soleiðis, at allar inntøkur minus allar útreiðslur verða fluttar frá ári til ár við einum *framskrivingarfaktori*, sum svarar til nevnda rentufót. Tá ið tað framskrivaða virðið av inntøkum minus útreiðslur verður positivt, skal skattur gjaldast.

Í fylgiskjali 4.5-4 eru dømi um, hvussu skattir av hesum slag verða roknaðir.

Ein skattur av "ROR"-slagnum krevur ikki stórvegis meiri av upplýsingum enn ein og hvør onnur inntøkuskattauppgerð, og sjálv framskrivingin er tekniskt einføld. Ein sovorðin skattur tykist meira einfaldur og greiður enn kolvetnis-skattirnir í Norðsjóvarlondunum, sum eru umrøddir omanfyri. Ein "ROR"-skattur setur heldur ikki stórvegis størri krøv til føroysku fyrisitingina enn partafelagsskatturin, smbr. umrøðuna av hesum í broti 4.5.2.4.

Tað hevði eisini lætt um skattafyrisitingarliga, um skatturin eins og í Noregi, men ikki í Danmark og Bretlandi, ikki var avmarkaður ("ring fenced") til inntøkuna av einari ávísari oljuverkætlan ella oljuleið, men soleiðis at hann - sum partafelagsskatturin - fevndi um inntøkur, sum felagið hevur av øllum virksemi í føroyska skattadøminum. Við hesum hevði landskassin í størri mun havt lut í váðanum, og tað hevði, annað óbroytt, økt virkisfýsnið.

Tað ber til at *finnast at* "ROR"-skatti. Eru bæði roknirentan og markskatturin høg, kann búskaparliga atferðin hjá feløgunum verða nakað avlagað og kostnaðartilvitskan viknað. Eisini kann verða víst á dømi um óhepna sínámillumávirkan millum henda skattin og onnur skattasløg. Afturat hesum kann tað vera torført at fáa góðskriving fyri ein sovorðnan skatt góðtikna, serliga tí at renta fyri fremmanda fígging ikki kann dragast frá, men ístaðin ein roknað renta - vanliga nógv hægri - fyri alla íløguna.

### 4.5.2.6 Aðrir skattir av inntøku av kolvetnisvirksemi

Umframt inntøkuna, sum oljufeløgini hava av sjálvari framleiðsluni, verða eisini aðrar inntøkur í sambandi við framleiðsluvirksemið. Talan verður fyrst og fremst um inntøkur frá *tilknýttum virksemi* hjá fyritøkum, sum veita vørur og tænastur, og sum gera arbeiði í samband við havstøðina og partvís eisini við

raksturin. Afturat hesum koma teir løntakarar, sum arbeiða í framleiðsluvirksemi ella í tilknýttum virksemi á føroyska landgrunninum. Er talan um føroysk feløg og løntakarar, verður inntøkan skattað í Føroyum sum vanligt, um annað ikki verður avgjørt. Feløg og persónar, sum hava bústað í øðrum londum, koma í mongum førum undir avmarkaða skattskyldu í Føroyum eftir reglunum um fast rakstrarstað. Fyri feløg, sum virka á landgrunninum, og sum ikki koma undir nevndu reglur, og fyri løntakarar verður skattskylda helst sett í gildi av inntøku, tey hava á føroyska landgrunninum eftir reglunum *í tí ætlaðu kolvetnisskattalógini*.

Ein týðandi táttur í hesum viðfangi eru møguligar *dupultskattaavtalur* við heimlondini hjá viðkomandi.

Sum nevnt í broti 4.5.2.4 um partafelagsskattin, er tað so, at tá ið dupultskatta-sáttmáli ikki er gjørdur, er vanliga møguligt hjá felag ella løntakara at fáa fulla góðskriving fyri goldnan skatt uttanlands upp til sama skattastig sum heima. Føroyski skatturin verður tí ikki nøkur verulig byrða, um hann ikki fer upp um tað, sum er vanligt í viðkomandi londum, t.d. um 30%. Her skal skoytast uppí, at sum er, er tann skattur, sum verður kravdur inn í Føroyum frá persónum við avmarkaðari skattskyldu, 42% + ½% til Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin. Harvið verður føroyski skatturin uppfataður sum ein eyka byrða, sum løntakararnir kanska royna at fáa aftur frá arbeiðsgevarunum, sum tí upplivir hetta sum eina dýrkan av virkseminum á føroyska landgrunninum. Leggjast skal afturat, at skattastigið fyri avmarkaða skattskyldu umborð á FAS-skipum er 35%. Eisini tá ið tað snýr seg um at senda starvsfólk til føroysku skrivstovurnar ella rakstrardeildirnar hjá feløgunum, verður tann høgi persónsskatturin í Føroyum uppfataður sum eitt vandamál.

Ikki minst hjá løntakarum og hjá smáum fyritøkum fer tað at vera uppfatað sum darvandi at skula stríðast við skattavaldið heima fyri at fáa goldnan skatt í Føroyum endurgoldnan. Fyri hesi sløg av skattgjaldarum hevði tað verið ein lætti, um dupultskattaavtalur vórðu gjørdar millum Føroyar og viðkomandi lond. Eisini hjá stórum fyritøkum sum framleiðslufeløgunum hevði ein dupultskattaavtala lætt um møguleikan at fáa goldnan skatt í Føroyum góðskrivaðan.

### 4.5.2.7 Byrðar og krøv annars

Oljufeløgini meta skatt sum eina og hvørja aðra útreiðslu. Tey leggja í útrokningum dent á yvirskot eftir skatting. Tey hyggja eisini at skattatrýstinum í ljósinum av, hvørjar aðrar byrðar og krøv tey sjálvi bjóða, ella myndugleikarnir leggja á.

Sum áður nevnt, fara krøv til sjálvt virksemið, sum virkini halda vera dýrkandi, eisini at vera uppfatað sum ein byrða á sama hátt sum avgjøld og skattir, og fara eftir teirra fatan at skerja evnini at bera skattabyrðar.

Krøv frá myndugleikunum ella tilboð frá feløgunum sum t.d. at hjálpa til í gransking, útbúgving ella tílikt uppfata feløgini sum útreiðslur, sum feløgunum í summum førum dámar betur enn skatt, tí feløgini sjálv partvís kunna fáa gagn av hesum. Útreiðslur til nevndu endamál kunnu vanliga dragast frá, tá ið skattskylduga inntøkan verður roknað.

### 4.5.2.8 Tollur og sølugjøld

Framleiðsluvirksemi á landi hevði verið innan fyri føroyska avgjalds- og

tolløkið. Útgerð og ráevni til framleiðsluna koma undir vanligar toll- og avgjaldsreglur, eisini MVG-reglurnar, uttan so at hildið verður, at ein útflutningsvinna sum hendan - eins og fiskivinnan - krevur serligar undantaksreglur afturat teimum, sum longu eru, t.d. um innflutning av byggiútbúnaði í einum avmarkaðum tíðarskeiði.

Framleiðsluvirksemi á landgrunninum uttan fyri tolløkið, sum lýst í toll- og avgjaldslóggávuni, kemur ikki undir føroyskar toll- og avgjaldsreglur, um tað ikki verður staðiliga lógarfest, at lógin skal fevna um útbúnað á landgrunninum. Í londum sum Danmark og Noregi verður hetta virksemi roknað sum verandi uttan fyri tolløkið. Avskipingar frá føroyska tolløkinum til virkini á landgrunninum verða tí mett eins og útflutningur, tá ið ræður um toll og avgjøld.

## 4.5.3 Kolvetnisskattalóg og skattalóggáva annars

Sum sagt, heldur nevndin tað vera skilabest at savna reglurnar um skatting av kolvetnisvirksemi í einari serligari kolvetnisskattalóg.

Í arbeiðinum at fyrireika eina slíka kolvetnisskattalóg er hædd tikin fyri, at kolvetnisskattareglurnar skulu sampakka við skattalóggávuna annars, tí at ein kolvetnisskattalóg skal innihalda neyðugar serreglur um kolvetnisskatting, meðan almennu skattareglurnar samstundis skulu vera galdandi (um annað ikki verður avgjørt).

Nevndin er, sum áður nevnt, komin langt at fyrireika eitt uppskot um kolvetnisskattalóg. Í hesum sambandi er komið fram á nøkur brek og/ella óheppin viðurskifti í almennu skattalóggávuni, sum kunnu koma sera illa við í møguligu oljumenningini. Tí heldur nevndin, at hesi vandamál mugu loysast so skjótt sum gjørligt:

- tunn kapitalisering
- bindandi svar frammanundan o.a.
- skatting av vinningsbýti frá móður- til dótturfelag
- dupultskattaavtalur
- deildarvirksemi og skatting av kapitalvinningi (exit-reglur).

### 4.5.3.1 Tunn kapitalisering

Møguleikin at avmarka rættin til rentufrádrátt í serligum førum hevur verið viðgjørdur í fyrireikingunum til uppskot um kolvetnisskattalóg. Orsøkin er, at deildir ella dóttirfeløg hjá útlendskum virkjum við lánsavtalum kunnu fara at hava eina fremmandafígging, sum er óveruliga stór og soleiðis minkar inntøkugrundarlagið undir partafelagsskattinum.

Henda støða kann fáa álvarsligar avleiðingar fyri samlaðu kolvetnisinntøkurnar til landsskassan. Í grundini er hetta eisini galdandi fyri deildir og dóttirfeløg hjá útlendskum feløgum, sum hava vanligt skattskyldugt virksemi í Føroyum. Men higartil hava avleiðingarnar av hesum ikki verið stórar. Spurningurin er sostatt ikki bara knýttur at kolvetnisvirksemi, og møguligar reglur um at avmarka rentufrádráttin eiga tí at vera settar í verk sum almenn skattaregla.

### 4.5.3.2 Bindandi svar frammanundan o.a.

Borgararnir vilja sjálvandi altíð ynskja, at skattamyndugleikarnir viðgera mál

skjótt og væl.

Í einari skattaskipan við meira fløktum reglum og meira samansettum feløgum og skattauppgerðum, enn vit higartil hava havt, verður tað uppaftur meira átrokandi, at viðgerðin er dugnalig. Her verður eisini hugsað um vælvirkandi samskifti millum skattaborgara og myndugleikar. Tí eiga myndugleikarnir at hava orku til at svara fyrispurningum frá skattaborgarunum innan rímiliga tíð og kanska innan fastar tíðarfreistir.

Ein annar háttur at gera rættarstøðuna hjá skattaborgaranum betri er, at skattaborgarin fær møguleika til at fáa *fulla* vitan um skattligu avleiðingarnar av ávísum ætlanum. Tað kundi verið skilagott at gjørt uppskot um reglur um bindandi svar frammanundan, soleiðis sum gjørt verður eitt nú í Danmark.

Hesar reglur áttu so at verið partur av almennu skattalóggávuni.

### 4.5.3.3 Skatting av vinningsbýti frá dóttur- til móðurfelag

Í arbeiðnum við uppskotinum til kolvetnislóg er roknað við, at tað, sum útlendsk feløg flyta heim av peningi, ikki verður skattað aftur.

Í skattaskipanum um allan heim er vanligt, at partafelagsskattingin er linari enn persónsskattingin. Afturfyri verður vinningsbýtið frá felagnum til partaeigararnar skattað. Hetta ger, at munurin millum persóns- og partafelagsskatt verður útjavnaður, men samstundis ger hesin munur á skattingini, at feløgini kunnu styrkja fíggjarstøðuna undir lagaligari skatting.

Í Føroyum verður vinningsbýti í dag skattað við 35%. Í nógvum øðrum skattaskipanum verður hetta ikki skattað, um vinningsbýtið er til móðurfelag. Flytingar av hesum slag innan konsernina verða sostatt loyvdar, og ikki fyrr enn vinningsbýti verður goldið út úr konsernini, skal skattur gjaldast av vinningsbýtinum.

Nevndin hevur í fyrireikingunum til uppskot um kolvetnisskattalóg arbeitt við tí fyritreyt, at galdandi reglur verða broyttar, soleiðis at vinningsbýti frá dótturfelag til móðurfelag ikki verður skattað.

Verður hugt at virkseminum hjá útlendskum feløgum í Føroyum í ljósinum frá galdandi skattareglum, er skattaskipanin bæði ósamsvarandi við seg sjálva og óhóskandi. Um eitt útlendskt felag virkar í Føroyum sum deild og ikki sum dótturfelag, verða flytingar til heimlandið eftir galdandi reglum *ikki* skattaðar. Hesin skattligi mismunur millum partafeløg og deildir sýnist ikki sørt óheppin.

#### 4.5.3.4 Dupultskattaavtalur

Eitt av endamálunum við einari kolvetnisskattalóg er at víðka staðbundnu skattskylduna, sum merkir, at skarin av teimum skattskyldugu verður størri. Henda víðkaða heimild til skatting kann renna seg ímóti dupultskattaavtalum, har Føroyar hava bundið seg til ikki, ella næstan ikki, at fremja slíka skatting.

Dupultskattaavtalur hava stóran týdning hjá teimum, sum virka tvørtur um landamørk, tí avtalurnar tryggja teimum, at tey ikki koma so fyri, at inntøkurnar verða skattaðar í fleiri londum ísenn. Fleirtjóða oljufeløg leggja stóran dent á, at slíkar avtalur eru. Kortini hava Føroyar eftir altjóða máti gjørt rættiliga fáar dupultskattaavtalur.

Tá ið dupultskattaavtalur ikki finnast, má tann skattskyldugi seta álit sítt á, at heimlandið hevur egnar reglur, sum tryggja móti dupultskatting.

Metast má um tørvin á nýggjum dupultskattaavtalum, og tær, sum eru, mugu verða eftirhugdar fyri at vita, um broytingar eru fyri neyðini.

#### 4.5.3.5 Deildarvirksemi og skatting av kapitalvinningi

Tá ið persónar ella virki fara undir skattskyldugt virksemi í Føroyum, skal virðið á rakstrartólunum, sum virkið hevur í byrjanini, ásetast til handilsvirði, sum avskrivingarnar verða roknaðar eftir. Galdandi føroysk lóggáva gevur hinvegin onga heimild til at skatta kapitalvinning, tá ið virkið heldur uppat, ella tá ið rakstrartólini verða tikin úr virkinum at nýta uttanlands.

Um ein borifyritøka verður biðin um at gera eina leitiboring við einum boripalli, sum fyritøkan sjálv eigur, so varðir hetta arbeiði kanska bara nakrar fáar mánaðir. Í inntøkuuppgerðini kunnu boritól og aðrir ognarlutir verða avskrivað við 30% av saldovirðinum. Tá ið arbeiðið er gjørt, er veruliga virðið á hesum ognum neyvan minkað 30%. Í øðrum londum eru tí reglur, sum tryggja, at kapitalvinningurin verður skattaður, tá ið virksemið heldur uppat (exit-reglur). Handilsvirðið á útbúnaðinum verður mett, og er yvirskot í mun til skattliga virðið, verður hetta skattað.

Hetta vandamál er ikki nakað eyðkenni fyri kolvetnisvirksemi, og tí eiga reglur at vera í *almennu* skattalóggávuni, sum tryggja, at virðið á rakstrartólum verður mett av nýggjum, tá ið tey fara úr rakstri, ella tá ið raksturin heldur uppat, soleiðis at tær skattligu avskrivingarnar, sum eru gjørdar, ikki eru størri enn tað, sum tólini eru minkað í virði í tí skattskylduga tíðarskeiðinum.

### 4.5.4 Avleiðingar av landsoljufelag fyri landskassans inntøkur

At eitt landsoljufelag tekur lut í oljuvirkseminum, nýtist ikki at hava stórvegis týdning fyri landskassans skattainntøkur, ið hvussu er ikki, um felagið arbeiðir undir somu treytum sum handilslig altjóða oljufeløg í einari oljuverkætlan, átekur sær sín part av leitingini, útbyggingini og rakstrarútreiðslunum og tann váða, ið fylgir við, og fær ein samsvarandi part av (virðinum á) tí kolvetni, ið verður framleitt. Tá virkar tað almenna felagið eins og eitt privat felag við tí muni, at tað ikki er uppií sum úrslit av fríum vali hjá hinum feløgunum.

Tær virkisbúskaparligu grundgevingarnar fyri einum almennum oljufelag eru viðgjørdar í kapitli 4.2. Her verður hugt at, hvussu eitt landsoljufelag kann ávirka landskassans skattainntøkur.

#### 4.5.4.1 Borin luttøka

Sum nevnt í kapitli 4.2, kann tað illa hugsast, sum búskaparliga støðan er í Føroyum í løtuni, at so nógvur váðafúsur privatur ella almennur peningur er, sum skal til fyri at luttaka í oljuleiting og framleiðslu í stóran mun.

Fyribils kann nøkur stórvegis føroysk luttøka bara koma upp á tal, um tað føroyska felagið verður borið ígjøgnum tað fyrsta skeiðið. Tað almenna í Føroyum fer neyvan at lata einum privatum felagi ein sovorðnan framíhjárætt, og tí má væntast, at talan verður um eitt felag, sum tað almenna eigur alt ella meginpartin av.

At eitt felag, sum t.d. hevur 5% av einum samtaki, verður borið gjøgnum ein part av verkætlanini - vanliga leitistigið - merkir, at útreiðslurnar verða bornar 100% av hinum luttakarunum, sum hava 95% av samtakinum.

Verður olja ikki funnin, bera tey allan váðan. Verður olja funnin, og felagið, sum varð borið, síðani tekur lut við 100% í útbygging og rakstri, verður ofta roknað við, at tey 5% av leitiútreiðslunum, sum hini feløgini tóku á seg, verða drigin frá í inntøkuni, sum tað borna felagið fær burturúr kolvetninum, inntil "skuldin" er afturgoldin, møguliga við handilsligari rentu. Hetta lættir um búskaparligu byrðuna hjá teimum, sum umboða tey 95%, men hesi hava so kortini havt váðan, og tað má gera, at ískoyti í roknirentuni, sum tey brúka, tá ið mett verður um eina verkætlan, verður størri.

Skal tað almenna felagið eisini berast gjøgnum útbyggingarskeiðið, verður byrðan uppaftur tyngri.

Um tað er neyðugt, at tað verður borið gjøgnum hetta skeiðið eisini, kann kjakast um. Eftir at olja er funnin, og tey handilsligu feløgini meta verkætlanina at vera haldgóða, átti tað ikki at verið trupult hjá einum føroyskum landsoljufelag at fingið fígging til verkætlanina.

Kredittvirðið hjá landskassanum verður størri, um kolvetni verður funnið, sum kann gagnnýtast vinnuliga. Fíggjarliga støða landskassans verður tó ikki munandi betri, fyrr enn gjaldingar av oljuskattum og øðrum koma, og hetta talar fyri at vera varin við at brúka tað økta kredittvirðið.

Verður almenna felagið eisini borið gjøgnum útbyggingarskeiðið, so merkir tað, at hinir luttakararnir skulu fíggja 100% av hesum, men at parturin hjá tí borna felagnum verður mótroknaður í tí partinum av framleiðsluvirðinum, sum fellur tí borna felagnum í lut, møguliga við rentum. Tað borna felagið fær tí einki pengayvirskot, fyrrenn tær bornu útreiðslurnar eru vorðnar fult mótroknaðar. Um verkætlanin miseydnast búskaparliga, soleiðis at inntøkurnar ikki viga upp ímóti útbyggingarkostnaðinum, so sita tey handilsligu feløgini eftir við hallinum. Tey handilsligu feløgini váða sostatt nakað afturat, um almenna felagið eisini skal berast gjøgnum útbyggingina.

Verður roknað við, at tað borna felagið ikki skal gjalda bornu útreiðslurnar aftur, er tann borna luttøkan búskaparliga sæð at samanbera við skatt á ávikavist leiting og útbygging ella, um alt verður borið, sum eitt avgjald á somu stødd, t.d. 5%, av einum avgjaldsgrundarlag, sum svarar til framleiðsluvirðið, har rakstrarkostnaðurin er drigin frá.

#### 4.5.4.2 Borin luttøka og skattur

Sjálvt um borin luttøka verður afturgoldin, kanska við rentum, so merkir tað, at

oljuverkætlanin er meira váðalig og gjaldføristyngjandi hjá teimum handilsligu luttakarunum. Tí minkar tað - annað óbroytt - um evnini og viljan at bera ávísar skattabyrðar. Sjálvt um tað er ilt at seta tal á hesa byrðu, má hetta takast við, tá ið avgerð skal takast um, hvussu skattaskipanin skal vera. Verður eitt landsoljufelag borið, ber tað í sær, at inntøkan av skatti og avgjøldum verður minni, enn hon kundi verið. Tey handilsligu oljufeløgini kunnu draga meirkostnaðin av at bera eitt alment oljufelag frá í skattskyldugu inntøkuni, og tí verður hetta partvís uppvigað av minni skatti.

### 4.5.5 Møguligar skipanir

Partafelagsskatturin man vera ein fastur táttur í einari og hvørjari skattaloysn. Ómaksgjøld í trongari merking til at bera útreiðslur munnu eisini fara at vera ein fastur táttur.

Aðrir møguligir tættir sum víddaravgjøld og framleiðslugjøld (royalties), sum ikki so lættliga laga seg eftir skiftandi vinningsføri, verða helst ymisk frá øki til øki og/ella frá útbjóðingarumfari til útbjóðingarumfar alt eftir, hvussu útlitini eru viðvíkjandi møguleikum og oljubúskapi, tá ið boðið verður út, og hvussu fíggingartørvurin hjá landskassanum er.

Ein møguligur serskattur kann bara hugsast sum varandi táttur í skipanini frá byrjan av, um hann rættiliga væl fylgir broytingunum í vinningsførinum, sum oljuverkætlanirnar kunnu hava. Um ein sovorðin skattur skal vera longu frá fyrsta útbjóðingarumfari, tá ið óvissan, um olja finst og um útbyggingarkostnað v.m. er stór, er frægast at bíða við at taka støðu til, til beint áðrenn umfarið verður hildið.

### 4.5.6 Samandráttur og niðurstøða

Í sambandi við fyrireiking til fyrsta útbjóðingarumfar skal støða takast til, hvussu skattaskipanin skal vera fyri framleiðsluvirksemi og annað virksemi í tilknýti til tað á føroyska landgrunninum.

Tørvur er á lóggávu, har alt virksemi í sambandi við kolvetnisleiting og -framleiðslu á føroyska landgrunninum kemur undir vanliga føroyska skatting.

Viðvíkjandi sjálvum framleiðsluvirkseminum er í ávísan mun tørvur á serligum reglum, tí hetta virksemi hevur serlig eyðkenni, eitt nú stóran kapitaltørv, langt tíðarhvarv, og er heimsumfatandi.

Tá ið skattastigið skal ásetast fyri skatting av framleiðsluvirksemi, ræður um at finna eina javnvág millum øðrumegin at fáa fatur á so stórum parti sum møguligt av tilfeingisrentuni (t.e. vinningur út um tað vanliga), sum fæst burturúr at gagnnýta tað kolvetnistilfeingi, sum samfelagið eigur, og hinumegin ta heimsumfatandi kapping, sum er um leitiorkuna hjá teimum handilsligu oljufeløgunum.

Tá ið bæði samfelagið og feløgini meta allar treytirnar viðvíkjandi útbjóðing av einum oljuleitiøki sum eina heild, verður hildið at vera skilagott at bíða við at gera uppskot til skattingarskipan, til umstøðurnar viðvíkjandi fyrsta útbjóðingarumfari eru vorðnar meira greiðar. Uppkastið til uppskot um skatting av kolvetnisvirksemi, sum nevndin hevur fyrireikað, verður tí gjørt liðugt og sent Landsstýrinum seinni saman við uppskoti um aðrar treytir fyri eitt útbjóðingarumfar.

Nevndin fer kortini at mæla til, at stig beinanvegin verða tikin til at lýsa niðanfyri nevndu vandamál betur í almennu skattalóggávuni, og at roynt verður at loysa hesi mál:

- tunn kapitalisering
- bindandi svar frammanundan o.a.
- skatting av vinningsbýti frá móður- til dótturfelag
- dupultskattaavtalur
- deildarvirksemi og skatting av kapitalvinningi (exit-reglur).

# Fylgiskjal 4.5-1 Nøkur dømi um búskaparligar metingarhættir hjá oljufeløgum

Netto-nútíðarvirðið (NPV) er ein av hornasteinunum, tá ið mett verður búskaparliga um eina verkætlan. Støði verður tikið í einari uppgerð av netto-pengastreyminum (NCF), har allar inngjaldingar og allar útgjaldingar í livitíðini verða tiknar við. NPV er eitt virði á NCF afturskrivað við einari ásettari roknirentu. Oljufeløg vilja hava eitt positivt NPV við einari høgari roknirentu, t.d 15%, sum liggur væl oman fyri fíggingarkostnaðin. Dømi (mió. USD):

| **Ár** | **Inntøkur** | **Íløgur** | **Rakstur** | **Skattir** | **NCF @0%** | **NPV @15%** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1996 | 0 | 2 | 0 | 0 | -2 | -1,7 |
| 1997 | 0 | 2 | 0 | 0 | -2 | -1,5 |
| 1998 | 0 | 3 | 0 | 0 | -3 | -2,0 |
| 1999 | 0 | 60 | 0 | 0 | -60 | -34,3 |
| 2000 | 70 | 60 | 20 | 30 | -40 | -19,9 |
| 2001 | 250 | 50 | 25 | 115 | 60 | 25,9 |
| 2002 | 225 | 50 | 25 | 100 | 50 | 18,8 |
| 2003 | 200 | 0 | 25 | 85 | 90 | 29,4 |
| 2004 | 170 | 0 | 25 | 80 | 65 | 18,5 |
| 2005 | 150 | 0 | 26 | 70 | 54 | 13,4 |
| 2006 | 130 | 0 | 27 | 65 | 38 | 8,2 |
| 2007 | 120 | 0 | 27 | 60 | 33 | 6,2 |
| 2008 | 115 | 0 | 28 | 65 | 22 | 3,6 |
| 2009 | 100 | 0 | 29 | 50 | 21 | 3,0 |
| 2010 | 85 | 0 | 30 | 40 | 15 | 1,8 |
| Tilsamans | 1.615 | 227 | 287 | 760 | 341 | 69,3 |

Væntaða pengavirði (EMV) er ein útrokning av NPV, har jarðfrøðiligi váðin er roknaður uppí. Dømi:

| **Úrslit** | **Sannlíkindi** | **NPV** |
|---|---|---|
| Olja verður ikki funnin | 90% | -5,2 mio. USD (íløgur í leiting, ið ikki gav úrslit) |
| Olja verður funnin | 10% | + 69,3 mio. USD |

*EMV: (90%*(-5,2))+(10%*69,3)=2,3 mió. USD*

Innanavkastið ella Rate of Return (ROR) er ein útrokning av, hvussu nógv íløgan kastar av sær. Útrokningin er bygd á allan pengastreymin. Um útrokningin vísir, at ROR er 12%, er verkætlanin líka lønandi, sum eitt lán fyri 12% í rentu er fyri útlænaran. Um NPV @X%=0, so er ROR=X. Í talvuni omanfyri við NCF og NPV kann ROR verða roknað til umleið 39%.

Maximum Sustainable Risk (MSR) sigur nakað um, hvussu nógv skattaskipanin skundar undir leitivirksemi. Er MSR stórt, góðtaka feløgini, at jarðfrøðiligi váðin er størri. MSR verður roknað soleiðis:

*(NPV+leitiíløgur)/leitiíløgur*

Dømi:

$$MSR=(69{,}3+5{,}2)/5{,}2=14{,}3$$

Hetta merkir, at um jarðfrøðiliga metingin er, at møguleikin fyri at finna olju ikki er verri enn 1:14, so røkka endarnir saman, við tí roknirentu, sum NPV er roknað við (í talvuni omanfyri er roknirentan 15%).

Afturgjaldingartíðin (ella Pay-Back Period) er ein útrokning av, hvussu long tíð gongur frá tí at ætlanin verður sett í verk til íløgurnar eru vunnar aftur. Oljufeløgini vilja hava so stutta afturgjaldingartíð sum møguligt. Tíðin verður roknað við afturskrivaða virðinum. Dømi:

| **Ár** | **NCF @0%** | **NPV @15%** | **Akk. NPV @15%** | **Pay-Back?** |
|---|---|---|---|---|
| 1996 | -2 | -1,7 | -1,7 | NEI |
| 1997 | -2 | -1,5 | -3,3 | NEI |
| 1998 | -3 | -2,0 | -5,2 | NEI |
| 1999 | -60 | -34,3 | -39,5 | NEI |
| 2000 | -40 | -19,9 | -59,4 | NEI |
| 2001 | 60 | 25,9 | -33,5 | NEI |
| 2002 | 50 | 18,8 | -14,7 | NEI |
| 2003 | 90 | 29,4 | +14,7 | JA |
| 2004 | 65 | 18,5 | +33,2 | |
| 2005 | 54 | 13,4 | +46,6 | |
| 2006 | 38 | 8,2 | +54,7 | |
| 2007 | 33 | 6,2 | +60,9 | |
| 2008 | 22 | 3,6 | +64,5 | |
| 2009 | 21 | 3,0 | +67,5 | |
| 2010 | 15 | 1,8 | +69,3 | |
| Tilsamans | 341 | 69,3 | | |

Í hesum føri er afturgjaldingartíðin umleið 8 ár.

Government Take (GT)/Company Take (CT): GT tilsamans er tann partur av búskaparligu rentuni, sum vertslandið fær í sín part. GT kann verða roknað út frá NCF ella sum afturskrivað virði. Út frá talvuni við NCF og NPV kann henda uppseting verða gjørd:

| | | |
|---|---|---|
| Inntøkur | | 1.615 |
| Íløgur | 227 | |
| Rakstur | 287 | |
| | 514 | 514 |
| Búskaparlig renta | | 1.101 |
| Skattir | | 760 |
| Nettovinningur | | 341 |

Í hesum dømi er GT @0%:

$$760/1.101=69\%$$

Tann partur, sum landið ikki fær, fáa feløgini. Lutur teirra (Company Take) verður í hesum føri:

$$100\%-69\%=31\%$$

## Fylgiskjal 4.5-2 Nøkur dømi um reglur um framleiðslugjald

Framleiðslugjaldið (royalty) kann vera eitt fast prosent av framleiðsluvirðinum ella ein fastur prosentpartur, sum er galdandi í avmarkaðum økjum við somu jarðfrøðiligu ella búskaparligu fortreytum. Framleiðslugjaldið kann eisini verða ásett eftir glíðandi stiga, har prosentið broytist við dagligu framleiðsluni, framleiðsluni higartil ella eftir einari samanseting av oljuprísi og framleiðslunøgd.

Framleiðslugjøld við føstum prosenti er mest vanligt. Her eru nøkur dømi:

| | |
|---|---|
| Rusland | 6,0% |
| Falklandsoyggjar | 9,0% |
| Malaysia | 10,0% |
| Alaska | 12,5% |
| Uzbekistan | 17,5% |

Í Nigeria eru ymisk prosent eftir hesum treytum:

| | |
|---|---|
| Á landi | 20,0% |
| Út á 200 m dýpi | 16,7% |
| Út á 500 m dýpi | 12,0% |
| Út á 800 m dýpi | 8,0% |
| Út á 1.000 m dýpi | 4,9% |
| Uttan fyri 1.000 m dýpi | 0,0% |

Í Marokko er framleiðslugjaldið bygt á tveir glíðandi stigar (innan fyri og uttan fyri 200 m dýpi). Uttan fyri 200 m dýpi verður hesin stigin brúktur:

| | |
|---|---|
| Tey fyrstu 29,2 mió. føtini | 0,0% |
| Síðani av dagligari framleiðslu upp til 50.000 føt | 7,0% |
| Síðani av dagligari framleiðslu upp til 100.000 føt | 10,0% |
| Síðani av dagligari framleiðslu upp til 150.000 føt | 11,5% |
| Síðani av dagligari framleiðslu yvir 150.000 føt | 14,0% |

Í Alberta í Kanada verða ymisk prosent brúkt. Nøkur eru knýtt at bæði framleiðslu og prísi. Fyri keldur, sum eru funnar eftir september 1992, og sum framleiða minni enn 4,1 føt um dagin, er prosentið 0. Er framleiðslan millum 4,1 og 39,5 føt um dagin, er prosentið lítið. Framleiðslugjaldið fyri keldur, sum geva 200 føt um dagin og prísin 17 USD fyri fatið, er 18%. Mesta framleiðslugjaldið eftir hesum stiga er 27%.

## Fylgiskjal 4.5-3 Nøkur eyðkenni fyri kolvetnisskatti í teimum fýra Norðsjóvarlondunum

| | Danmark | Noreg | Bretland* | Háland |
|---|---|---|---|---|
| Partafelagsskattur | 34% / 38% | 28% | 33% | 35% |
| Ring-fence | Ja | Hall á landi kann dragast frá vinningi á sjógvi | Ja | Nei |
| Serligur kolvetnisskattur | 70% | 50% | 75% | 70% |
| Frádráttur fyri kolvetnisskatt í útrokning av partafelagsskatti | Nei | Nei | Ja | Ja |
| Frádráttur fyri partafelagsskatt í útrokning av kolvetnisskatti | Ja | Nei | Nei | Ja |
| Kolvetnisfrá-dráttur (up-lift) | 25% í 10 ár | Íløgur undan 1987: 1,75% í 15 ár. Frá 1987: 5% í 6 ár | 35% av útvegan í árinum | 20% fyri rakstur og 70% fyri avskrivingar av støðisognum |
| Serligar avmarkingar í fíggjarligum kostnað av kolvetnisskatti | Nei | Nei | Ikki frádrátt fyri rentukostnað í kolvetnisskatti | Nei |
| Avskrivingar av framleiðsluútbúna | 30% av saldovirði | 16 2/3% linjuavskriving | 25% av saldovirði | Framleiðslutreytað avskriving |
| Framflyting av undirskoti | 15 ár | 15 ár | Óavmarkað | Kolvetnisskattur: Óavmarkað. Partafelagsskattur: 8 ár |
| Afturflyting av undirskoti | Nei | Ja | Ja | 3 ár fyri partafelagsskatt |
| Ognarføring av leitiútreiðslum | Ja | Ja | Ja | Ja, treytað av fundi |
| Framleiðslugjøld fyri nýggj rættindi | Nei (frá 1990) | Nei (frá 1986) | Nei (frá 1982) | 0-15% (frá 1976) |

* Serligur kolvetnisskattur í Bretland er ikki galdandi fyri loyvi, sum er givin síðani 1993.

# Fylgiskjal 4.5-4 Dømi um, hvussu ROR-skattur verður roknaður

Hugskotið við einari ROR-skattaskipan er at tryggja tí, sum ger íløguna, eina minstu renting av íløgu síni, áðrenn skattur verður goldin. Skatturin verður roknaður út frá nettopengastreyminum (NCF), eftir at eitt ásett ROR-mark er nátt. Grundarlagið undir ROR-skattinum kann verða ymiskt; tað kann vera eitt ávíst prosent ella ein glíðandi stigi. Í døminum niðanfyri er ROR 20% og skatturin 30%.

| Ár | NCF | NCF, har negativ tøl eru framskrivað við 20% hækking | Penga-streymur at skatta | ROR-skattur (30%) |
|---|---|---|---|---|
| 1996 | -2 | -2,0 | | |
| 1997 | -2 | -4,4 | | |
| 1998 | -3 | -8,3 | | |
| 1999 | -60 | -69,9 | | |
| 2000 | -40 | -123,9 | | |
| 2001 | 60 | -88,7 | | |
| 2002 | 50 | -56,4 | | |
| 2003 | 90 | +22,3 | 22,3 | 6,7 |
| 2004 | 65 | +65,0 | 65,0 | 19,5 |
| 2005 | -50 | -50,0 | | |
| 2006 | 38 | -22,0 | | |
| 2007 | 33 | +6,6 | 6,6 | 2,0 |
| 2008 | 22 | +22,0 | 22,0 | 6,6 |
| 2009 | 21 | +21,0 | 21,0 | 6,3 |
| 2010 | 15 | +15,0 | 15,0 | 4,5 |

Hóast nettopengastreymurin (NCF) er positivur í 2001, so er samlaða NCF-virðið, sum er framskrivað við 20% um árið, negativt til 2003. Tástani er íløgan rentað við 20%. Tann vinningur, sum er oman fyri hesa minsturenting, verður mettur at kunna skattast. Við einum skattaprosenti, sum her er 30%, fer ein stórur partur av vinninginum kortini til tann, sum ger íløguna.

Seinni í verkætlanini kann væl vera, at íløgur mugu gerast, t.d. fyri at gera útvinningina betri. Í døminum omanfyri er ein sovorðin íløga sett at vera gjørd í 2005. Avleiðingin av hesum verður, at nettopengastreymurin (NCF) verður negativur og verður tí framskrivaður frá 2005. ROR-skattur verður so ikki kravdur aftur fyrr enn í 2007.

## 4.6 SAMFELAGSBÚSKAPARLIGAR AVLEIÐINGAR

Gott hevði verið at kunnað endað 4. part um oljuna og føroyska búskapin við einari uppseting, sum vísti eftirfarandi forsagnir um samfelagsbúskaparligu avleiðingarnar av tí oljuvirksemi, sum kann standast av, at føroyski landgrunnurin verður latin upp fyri veruligari leiting eftir kolvetni, sum síðani kann hava framleiðslu við sær, um nakað verður funnið. Hetta gerst *ikki* enn, tí so nógvar *óvissur* eru. Í fyrstu atløgu er óvist, hvussu stórt leitivirksemið verður, og hvussu stórur føroyski luturin í tí verður. Møguleikarnir at finna kolvetni eru óvissir, og eisini er óvist, hvussu skjótt og hvussu bygt verður út, *um* olja verður funnin, og hvussu stórur føroyski leikluturin í hesum verður. Í einum útvinningarskeiði verða framleiðsluvavið, prísirnir og longdin á framleiðslutíðarskeiðinum óviss, og eisini føroyska luttøkan í hesum.

Hinvegin má verða ásannað, at tørvur er á sannlíkum tølum, sum geva ábendingar um, hvussu *nógv* arbeiði kann fara at verða, og á leið hvussu *stórar* upphæddir, ið kunnu koma uppá tal, tá ið hugsað verður um leiting, útbygging og framleiðslu. Her verður ætlað um, hvussu stór tøl talan kann verða um.

### 4.6.1 Samfelagsbúskaparligt íkast

Búskaparligu avleiðingarnar fyri Føroyar verða serliga hesar:

- ómaksgjøld, avgjøld og skattir, sum verða goldin av loyvishavunum
- arbeiði til føroyska arbeiðsmegi hjá loyvishavunum og útvegarum teirra,
- vinningur í føroyskum fyritøkum, sum selja til oljuvirksemið, og sum væntandi gjalda skatt til tað almenna eins og føroyskir løntakarar
- skattur frá ikki-føroyskum fyritøkum og løntakarum, sum hava vinning av virksemi á føroyska landgrunninum.

Fæst heimild at *skatta* inntøku, eisini løn, sum verður vunnin av virksemi á føroyska landgrunninum, kann ein ávís skattainntøka fáast til landskassan longu á byrjanarstigi, eisini frá útlendskum fyritøkum og arbeiðstakarum. Hvussu stór inntøkan verður, veldst um virksemið, um hvussu ein sovorðin skattskylda verður at umsita, og í hvønn mun Føroyar við dupultskattaavtalum sleppa skattakravinum móti viðkomandi.

Umframt *beinleiðis* búskaparlig árin av møguligum oljuvirksemi verða eisini *óbeinleiðis* - stimbrandi og tálmandi - árin.

Eitt av *stimbrandi árinunum* verður tað vanliga *multiplikatorárinið*, sum kemur av, at tey, sum vinna pening í fyrsta umfari, brúka hann til at keypa fyri. Teir sakkønu eru ikki á einum máli um, hvussu stórur tann vanligi multiplikatorurin í føroyska búskapinum er. Føroyski búskapurin er ógvuliga opin, og marginala innflutningskvotan er rættiliga stór, og tí verður multiplikatorárinið vanliga hildið at vera lítið. Í einari frágreiðing[22] hjá Búskaparráðnum og Landsbanka Føroya verður arbeitt við trimum møguleikum: 0,5, 1,0 og 1,5, tá ið talað verður um, hvat

[22]Búskaparráðið og Landsbanki Føroya: Frágreiðing um pengarensl millum Føroyar og Danmark, Tórshavn 1996, s. 32-33

multiplikatorárin danski statsstuðulin hevur á føroysku framleiðsluna.

Eitt annað árin, sum kann vera bæði gott og ringt, er sokallaða *acceleratorárinið*, sum merkir, at oljuvirksemið kann eggja føroyskum fyritøkum at gera íløgur í at víðka verandi framleiðsluorku, eitt nú maskinur, bygningar ella annan útbúnað. Tað kann vera ein veruligur tørvur á hesum íløgum, men royndir hava víst, at tørvurin ofta verður yvirmettur, soleiðis at fylgjan verður ov stór framleiðsluorka. Roknast má við, at íløgumynstrið verður skiftandi og fer at ganga upp og niður, og tað kann breiða seg til búskapin annars.

Millum tey *tálmandi árinini* ber til at hugsa sær, at oljuvinnurnar kunnu draga arbeiðsmegi, kapital og fyritaksemi frá øðrum vinnum, eitt nú fiskiveiðu og fiskavirking. Sum umtalað í kapitli 5.1, kann oljuvinnan møguliga minka um veiðumøguleikarnar hjá fiskivinnuni við at taka partar av havbotninum frá teimum. Ein møgulig framgongd í vinnum, ið hava við olju at gera, kann tí partvís verða javnað út av afturgongd í øðrum vinnugreinum, men helst verður nettoárinið ein framgongd fyri føroyska búskapin sum heild.

### 4.6.2 Avleiðingar í ymsum skeiðum í oljumenningini

Avleiðingarnar av oljumenningini verða ólíkar frá einum skeiði til annað.

Í *forkanningarskeiðinum* higartil hevur høvuðsvirksemið verið at skjóta seismikk. Tað verður gjørt á sumri við fremmandum seismikkskipum, og úrslitini verða síðani viðgjørd hjá viðkomandi feløgum uttanlands. Búskaparligi týdningurin í Føroyum av hesum virksemi hevur verið lítil. Í boringini í Lopra, sum var á landi, var týdningurin nakað størri, men kortini lítil í samfelagssamanhangi.

Í tí *leitiskeiði*, sum nú verður fyrireikað, verður roknað við framhaldandi at skjóta seismikk á sumri, men meir enn higartil. Harumframt verða leitiboringar frá flótandi boripallum, sum útlendingar eiga, og sum koma meiri ella minni fullmannaðir inn á føroyska landgrunnin í eitt tíðarskeið. Borivirksemið verður væntandi stýrt og røkt úr Føroyum, og tað kann geva nakað av arbeiði og umsetningi í Føroyum.

Ilt er at siga, hvussu umfatandi búskaparliga árinið verður í leitiskeiðinum, men í fylgiskjali 4.6-1 er eitt einfalt dømi uppsett at lýsa, hvussu stór tøl talan kann vera um.

Í døminum verður roknað við, at 5 samtøk gera seismiskar kanningar og 15 leitiboringar í 6 ár. Hetta virksemi er mett at geva 100 mió. kr. um árið í umsetningi í Føroyum. Virðisøkingin av hesum verður umleið helvtina av tí. Afturat hesum skal leggjast ein upphædd fyri skatt frá útlendingum, sum eru í hesum virksemi, møguliga einar 5-15 mió. kr., umframt ómaksgøld og víddaravgjøld, ið umleið svara til lønir og aðrar útreiðslur í sambandi við fyrisitingina av oljumálsøkinum.

Av hesum sæst, at við teimum fortreytum, sum eru í døminum, verður ávirkanin á arbeiðsvirksemið og búskapin í Føroyum sum heild lítil, bæði í sær sjálvum og samanborið við aðrar broytingar, sum kunnu verða føroyska búskapinum fyri í sama tíðarskeiði. Verður samanborið við týdningin av einari lítlari hækking í fiskaprísunum, einum vøkstri í fiskiveiðuni ella av tí parti av veiðuni í føroyskum sjógvi, sum verður landaður og virkaður í Føroyum, verður árinið av hesum á arbeiðsvirksemi, umsetning og fíggjarviðurskiftini hjá tí almenna helst væl størri og sjónskari.

Umframt tey tøl, sum nevnd eru, er møguleiki fyri, at føroyingar fáa arbeiði í frálandsvinnu í øðrum londum, og at føroysk virki selja til oljuvirksemi uttanlands.

Verða olja ella gass funnin, verður farið frá leitiskeiðinum yvir í eitt metingarskeið við fleiri boringum.

Um olja ella gass verða funnin, kann *útbyggingin* hava stórt virksemi við sær tey fyrstu 2-5 árini, sum útbyggingin av einari leið tekur, men hvussu hetta síðani hevur búskaparliga ávirkan á Føroyar, veldst um, hvørjar tekniskar loysnir verða valdar.

Tá ið ein leið verður útbygd, mugu fleiri boringar gerast, partvís til at fáa oljuna upp, partvís til at fáa vatn og gass niður. Brúk verður fyri byggivirksemi til útbúnað á havbotninum og til ein pall ella til eina flótandi framleiðslueind og møguliga eina goymslu. Framleidda oljan verður antin flutt við tangaskipum ella gjøgnum rør. Gass verður næstan altíð flutt í røri. Oljan ella gassið skulu førast í land í Føroyum, um myndugleikarnir ikki góðkenna, at tey verða flutt aðrastaðnis.

Í hvønn mun holini skulu borast áðrenn ella eftir at farið er undir framleiðsluna, veldst um framleiðsluhátt, sum eisini ger av, hvussu útbúnaðurin á havbotninum verður, og hvussu stór og samansett framleiðslupallurin ella -skipið verða.

Alt eftir hvussu stór og samansett leiðin er, og hvussu framleiðsluhátturin verður, kann samlaða útbyggingin av leiðunum undir Føroyum væntast at fara at liggja millum 7 og 20 mia. kr. Hvussu henda upphædd verður býtt millum ymisku partarnar, veldst um framleiðsluhátt.

Hvussu útbyggingin av leiðunum fer at ávirka føroyska búskapin, veldst um, hvussu stórur partur av veitingunum verður føroyskur. Hvørt prosentstig, sum verður føroyskur partur, kann geva millum 70 og 200 mió. kr. brutto, og íkastið til tjóðarframleiðsluna eini 10-50% av hesum, alt eftir slagi av veitingum, so at úrslitið kann fara at liggja millum 7 og 100 mió. kr.

Boring av framleiðsluholum o.ø., áðrenn framleiðslan byrjar, hevur ein størri eftirspurning við sær eftir somu veitingum, sum eru vanligar í leitiskeiðinum.

Hesar boringar og byggiarbeiði til havs hava við sær ein eftirspurning eftir siglingartænastum, sum t.d. vaktarskip.

Olju- ella gassleiðir, ið útlagdar verða á djúpum sjógvi undir Føroyum, fara helst at brúka væl av tøkniligum útbúnaði á ella undir havbotninum. Í nógvum førum kunnu íløgurnar koma upp í fleiri mia. kr. til slíkan útbúnað og til uppseting á botni. Hesin serligi útbúnaður verður gjørdur av nøkrum fáum heimsumfatandi fyritøkum, sum eru serkønar í hesum. Føroyskar undirveitingar verða torførar at fáa í lag.

Ein væntandi loysn fyri eina oljuleið á djúpum sjógvi er ein framleiðslueind, ið flýtur. Hon kann verða keypt ella leigað klár at brúka, nýbygd ella umbygd á stórari skipasmiðju, sum er til tað. Bara skrokkurin kann kosta 1-2 mia. kr. Harafturat koma ísett tól og útbúnaður til oljuútvinning við upphæddum um tað sama. Veitingar frá føroyskum skipasmiðjum og øðrum smiðjum av serligum lutum kunnu kanska koma upp á tal.

Mett verður, at leiðir sum Foinaven og Schiehallion vestan fyri Hetland og Norne uttan fyri Miðnoreg við nógvum útbúnaði á botni, boring av holum, og innseting av flótandi framleiðslueindum til oljuframleiðsluna, kosta frá umleið 4 mia. kr. at útbyggja í fyrsta umfari, um framleiðslueindin verður leigað sum í

Foinaven, soleiðis at raksturin verður tyngdur við árligari leigu, og einar 8-9 mia. kr., um hetta verður roknað inn í sjálva íløguna sum á hinum báðum leiðunum. Er ætlanin seinni at gagnnýta gass á somu leið ella olju nærindis, skulu eyka milliardíløgur gerast.

Verður føroyski veitingarparturin t.d. 5% av einari slíkari verkætlan, er umsetningurin av tí um 200-450 mió. kr., býttur yvir 2-3 ár. Hvussu nógv av virðisøking og arbeiði, ið kemur burtur úr hesum, veldst um slagið av veitingum.

Er dýpið minni, ella eru leiðirnar størri, kann væntast, at framleitt verður á framleiðslupalli. Hann kann við útgerð kosta einar 5-10 mia. kr. og viðhvørt uppaftur meir, og hann verður væntandi gjørdur á hóskandi stað, sum ikki er ov langt burtur, t.d. í Noregi ella í Bretlandi. Tað er neyvan skilagott at hava byggiarbeiði av hesari støðd í Føroyum, men tað kundi verið roynt at fingið hóskandi undirveitingar frá føroyskum skipasmiðjum og øðrum smiðjum. Sovorðnar veitingar kunnu koma upp ímóti nøkrum hundrað mió. kr. og vara í eini tvey ár.

At flyta gass í land í Føroyum krevur rørleiðing. Olja kann førast við tangaskipum, sum føroyingar kunnu eiga ella reka, men tað kann vera hóskandi at flyta olju við rørleiðing, um talan er um stórar nøgdir. Sovorðnar rørleiðingar verða bæði gjørdar og lagdar av serkønum fyritøkum, so her er møguleikin hjá føroyskum virkjum at vera við avmarkaður til onkrar hjálparuppgávur sum t.d. sigling.

Um útbúnaður at føra olju ella gass í land og útbúnaður til viðgerð og goymslu og útflutningsstøð skulu gerast, hevur tað stórt virksemi við sær í Føroyum. Virðið kann lættliga koma upp í 4-8 mia. kr., har meginparturin verður innflutt teknisk tól og lutir, men ein stórur partur verður arbeiði til bygging og útbúnað. Høvuðsverktøkurnar verða helst ógvuliga stórar eftir føroyskum viðurskiftum. Eftirspurningurin eftir arbeiðsmegi og undirveitingum á staðnum kann væl blíva størri enn framboðið, ikki bara har, sum oljan (ella gassið) verður førd í land, men um alt landið. Her kann verða nevnt, at tá ið støðirnar í Sullum Voe í Hetlandi og Flotta í Orknoyum vórðu bygdar, vóru fleiri túsund fólk í arbeiði; av hesum vóru tey flestu serkøn arbeiðsfólk hjá byggifyritøkum og útvegarum, sum komu uttaneftir. Men eftirspurningur var eisini eftir fyritøkum og arbeiðsmegi á staðnum.

Tá ið støðan er soleiðis, er helst brúk fyri, at Landsstýrið letur vera við at halda uppá føroyska luttøku í verkætlanunum, so sleppast kann undan óhepnum samfelagsbúskaparligum avleiðingum, tá ið útbyggingin er liðug. Kanska verður frægasta loysnin at innflyta liðugt framleiddar partar og eisini á annan hátt royna at minka um arbeiðið, sum skal gerast í Føroyum.

Tann føroyski samfelagsbúskaparligi áhugin verður í longdini ikki endiliga at skapa arbeiðspláss í einum stuttum útbyggingarskeiði, men heldur at upplæra fólk á staðnum at kunna virka á høgum stigi í rakstrinum av útbúnaðinum eitt tíðarskeið, sum væntandi verður langt.

Tí verður tað neyvan so, at Føroyar fara at gera eftir Nýfunnalandi, har myndugleikarnir í sambandi við Hibernia-leiðina løgdu doyin á at fáa so nógv sum møguligt av tí arbeiðskrevjandi betongarbeiðnum, og tað var einans búskaparliga gjørligt, tí at kanadisku samveldismyndugleikarnir stuðlaðu við tilskoti. Málsetningurin um arbeiðspláss varð náddur væl og virðiliga. Á sumri 1996 arbeiddu 5.100 fólk á Hibernia-ætlanini; av hesum 4.800 á pallarsmiðjuni Bull Arm, har 5.800 fólk arbeiddu árið fyri, tá ið arbeiðið var av tí mesta. Tá ið

pallurin verður liðugur á sumri 1997, verður hetta stóra arbeiðspláss fyribils tómt. Í nýfunnlendskum frágreiðingum verður dentur lagdur á framtíðar týdningin av teimum nógv færri arbeiðsplássunum, sum vórðu skapt til tekniskt krevjandi uppgávur innan formgávu og projektering, og á tað, at meginparturin av arbeiðsfólkunum á sjálvum pallinum og í rakstrarfyritøkuni í landi verða fólk haðani. Afturat hesum hava nógv fólk og fyritøkur har fingið førleika at arbeiða í oljuvinnuni sum heild. Skoytast kann uppí, at næsta leiðin í Nýfunnalandi, Terra Nova, verður útbygd við framleiðslueind, ið flýtur.

Bæði í útbyggingarskeiðinum og framleiðsluskeiðinum aftaná verður tað helst so, at samstundis sum farið verður inn í hesi skeið, heldur leitingin fram, møguliga við størri ágrýtni sum avleiðing av, at olja er funnin.

Møguligar nýggjar leiðir skulu so gjøgnum útbyggingarskeið samstundis sum verandi leiðir hava framleiðslu.

*Framleiðsluskeiðið* gevur møguleika fyri meira varandi arbeiði til føroyingar á frálandsvirkjum, í rakstrinum á landi og í føroyskum ella útlendskum fyritøkum, sum so ella so hava við útvinningina at gera. Siglingaruppgávur (tilbúgvingar- og veitingarskip) kunnu geva vinnumøguleikar og arbeiði. Eitt møguligt alment oljufelag kann nú av álvara fara uppí virksemið. Um olja og gass verða førd í land, kann tað hava varandi arbeiðspláss við sær.

Verður spurt, hvussu nógv eitt framleiðsluskeið kann hava við sær av arbeiði og inntøkuskapan í Føroyum, tá ið føroyskur skattur frá øllum, sum uppií eru, er íroknaður, kann verða mett, at ein leið sum Foinaven helst hevði kunnað skapt eini 100-200 arbeiðspláss um árið og eina virðisøking um einar 100 mió. kr. um árið, sum aftur kann føra multiplikatorávirkan við sær.

Í framleiðsluskeiðinum kemur møguleikin fyri *almennum inntøkum* sum avgjøld av framleiddum kolvetni og skattur av sjálvari inntøkuni av útvinningini og møguliga yvirskot hjá einum almennum oljufelag. Inntøkan til landskassan av øllum hesum verður óivað bæði ójøvn og óviss. Tí kann vera skilagott, sum nevnt í kapitli 4.5, at seta hesa inntøku inn í ein serligan grunn, sum verður hildin uttan fyri vanligu fíggjarætlanina hjá landskassanum. Alt eftir inntøkustreyminum og sakkønari meting um, hvat føroyski búskapurin hevur brúk fyri og tolir, kunnu pengar so verða játtaðir úr grunninum til fíggjarætlanina, har eisini verður avgjørt, í hvørjum lutfalli útreiðslur landskassans skulu fíggjast við oljupengum, við skattum og avgjøldum og við brúkaragjøldum.

Sum er, er tað trupult at siga, hvussu stórar skatta- og avgjaldsinntøkurnar møguliga verða, og hvussu tær kunnu ávirka búskapin. Í sambandi við eitt komandi uppskot um kolvetnisskatting og treytirnar fyri fyrsta útbjóðingarumfari verður roynt at gera forsagnir at lýsa hetta. Í mynd 4.6-1 er eitt einfalt roknidømi víst at lýsa, hvørji tøl talan kann verða um.

**Mynd 4.6.-1**




Myndin vísir eina leið av somu stødd og útbyggingarhátti sum Foinaven, sum verður funnin eftir trý ára leiting, tekur 3-4 ár at útbyggja, har íløgan er umleið 9 mia. kr., og sum síðani framleiðir í umleið 11 ár. Tilsamans kann leiðin framleiða 250 mió. føt, sum hava eitt virði upp á umleið 35 mia. kr. í ársins prísum í allari livitíðini við galdandi oljuprísum (18 USD/bb) og 2% í árligum prísvøkstri. Meginparturin av framleiðsluni verður fyrstu fimm árini. Skattainntøkurnar verða - alt eftir hvussu skattaskipanin er háttað - útsettar í nøkur ár, tí at skatturin fer ikki at virka til fulnar, fyrr enn leitiútreiðslur og íløgur annars eru avskrivaðar. Ein skatting við 27% partafelagsskatti fer at geva tilsamans 3,5 mia. kr. Verður framleiðslugjald upp á 2,5% lagt afturat og ein serskattur, sum ikki fer at virka, fyrr enn felagið hevur fingið íløgurnar rentaðar við einum ávísum prosenti, kann inntøkan koma upp ímóti umleið 4,5 mia. kr. Í hesum er ikki lagt upp fyri, at upphæddir, sum koma langt frammi í tíðini, hava minni virði enn upphæddir, sum fáast í dag. Hesi tøl eiga tí eisini at vera sæð í afturskrivaðum virðum, smbr. brot 4.6.3.

Sjálvt um oljuprísirnir verða støðugir, fara skattaupphæddirnar, sum hugsað verður um, at verða rættiliga ójavnar frá einum ári til annað; eini 3-4 ár inni í framleiðslutíðini verða tær upp á tað mesta. Inntøkan av partafelagsskatti fer at liggja millum 100 og 500 mió. kr. um árið. Eitt framleiðslugjald fer at fylgja

framleiðsluni og liggja millum 10 og 100 mió. kr. Ein møguligur serskattur verður eisini skiftandi, úr 0 í nøkur ár upp í einar 150 mió. kr. í nøkur ár. Skiftandi oljuprísir gera, at inntøkan verður uppaftur meira óstøðug.

Um roknað varð við lægri oljuprísum, t.d. 14 USD/bb, hevði tað verið ivasamt, um ætlanin hevði verið sett í verk. Um prísurin hevði hildið sær á hesum stigi alla framleiðslutíðina, hevði partafelagsskatturin givið umleið 1 mia. kr.; verður roknað við einum framleiðslugjaldi upp á 2,5%, kemur inntøkan upp á 1,3 mia. kr., og einki hevði komið inn í serskatti. Hægri oljuprísir, t.d. 23 USD/bb, høvdu givið umleið 4,5 mia. kr. í partafelagsskatti; og høvdu framleiðslugjald og serskattur eisini verið kravd, hevði inntøkan komið upp á 8,8 mia. kr.

Í roknidøminum er ikki lagt upp fyri, at hægri skatting møguliga kann minka um áhugan hjá oljufeløgunum at virka í føroyskum øki við tí avleiðing, at virksemið verður minni.

Í mynd 4.6-2 er roknað við, at fýra fylgjandi leiðir verða útbygdar, sum hava tilsamans 2 mia. føt býtt soleiðis:

(1) Fyrr umtalaða leið við 250 mió. føtum verður funnin í 2002,
(2) Ein leið við 1.000 mió. føtum verður funnin í 2004,
(3) Ein leið við 500 mió. føtum verður funnin í 2006,
(4) Ein nýggj leið sum (1) (250 mió. føt) verður funnin í 2008.

**Mynd 4.6.-2**




Tað sæst á myndini, at bæði útbyggingarkostnaðurin, bruttoframleiðsluinntøkan av oljuútvinningini og inntøkan av partafelagsskatti fara væntandi at skifta ógvisliga. Tann árliga inntøkan av partafelagsskatti fer við tí roknaða oljuprísinum (18 USD/bb) at liggja ímillum nakrar hundrað mió. kr. og umleið 4 mia. kr.

### 4.6.3 Vandin fyri "hálendsku sjúku"

Almennar útreiðslur í størri mát, sum ikki verða mótsvaraðar av skattainnkrevjing frá borgarunum, hava umframt positiva ávirkan á livifótin í royndum eisini ta negativu ávirkan, at lønar- og kostnaðarstigið hækkar við tí avleiðing, at kappingarførið í teimum vinnum, sum kappast við útheimin, versnar. Hetta fyribrigdi kom t.d. fyri í Hálandi, eftir at gass varð funnið í 1960´unum, og verður tí stundum kallað "hálendska sjúka". Í Noregi hava teir havt eyguni eftir hesum fyribrigdi og hava brúkt ymisk vápn ímóti tí, sum hava verið meiri og minni heppin. Í Føroyum eru líknandi royndir gjørdar við statsútreiðslunum í Føroyum, sum ikki verða mótsvaraðar av skattauppkrevjing í Føroyum.

Verður tað so, at ein stór almenn inntøka av oljuvirkseminum ger, at almennu útreiðslurnar økjast nógv, og/ella at tøka inntøkan í privata samfelagspartinum verður økt við skattalætta, kann tað ávirka búskaparligu javnvágina og bygnaðin,

sum kann vera óheppið fyri føroyska búskapin, bæði í fyrsta umfari og eisini í longdini. Eitt nú kann føroyska vinnulívið, sum ikki er knýtt at oljuvinnuni vikna, tí tað skal kappast við oljuvinnuna, sum bjóðar hægri lønir, og við almenna virksemið, sum verður størri, ella við privatu tænastuvinnuna, har eftirspurningurin verður størri eftir tænastum og arbeiðsmegi.

Ein møguleiki í hesum sambandi hevði kanska verið ein inntøkupolitikkur, har roynt verður at halda aftur og samstundis geva lønarinntøkum skattalætta.

Í politiska orðaskiftinum í Føroyum hevur verið ført fram, at tað kann vera skilagott at hava eina skipan fyri, hvussu møgulig skattainntøka av oljuni skal brúkast, ella rættari at verja vanliga føroyska búskapin móti alt ov stórum inntøkum, áðrenn inntøkustreymurin yvirhøvur kemur til sjóndar, og tað verður í fyrsta lagi eini 2 ár, eftir at framleiðsla er byrjað.

Til at meta um, hvussu átrokandi hesin spurningur man vera, kann vera vert at minna á, at í avtaluni millum Føroya Landsstýri og Danmarkar stjórn tann 22. desember 1992 og í seinni avtalum hevur danska stjórnin treytað sær, at oljuskattainntøka fyrst skal brúkast til at gjalda landskassaskuldina til statskassan aftur, og at samráðingar verða tiknar upp um at minka um blokkstuðulin og aðrar statsútreiðslur til Føroyar.

Skuld landskassans til statin var sambært Landsbankaroknskapinum 1996 5,2 mia. kr. um árslok 1996. Blokkstuðulin frá statinum til landskassan var sambært uppskoti til fíggjarløgtingslóg 1996 ætlaður til 860 mió. kr., og aðrar statsútreiðslur viðvíkjandi Føroyum eru sambært Árbók fyri Føroyar 1996 mettar til 0,4 mia. kr. í 1995. Sostatt verða tær fyrstu milliardirnar av møguligum oljuinntøkum burturveittar, áðrenn farast kann í holt við at byggja upp grunnar ella til at økja um eftirspurningin í Føroyum.

Tá ið upphæddir (skuld ella áogn) ein ávísan dag verða samanbornar við ein pengastreym í langa tíð, ella tá ið pengastreymar, sum hava ólíkt tíðarmynstur, verða samanbornir, er rættast at fram- ella afturskriva allar gjaldingar til somu tíð. Tey talvirði, sum tá eru roknað, kunnu betur samanberast.

Spurningurin um at kapitalisera blokkstuðulin er viðgjørdur í kapitli 4 s. 42-51 í álitinum, sum er nevnt í undirgrein 1. Har verður bygt á ætlaða blokkstuðulin í 1996 upp á 860 mió. kr. Verður roknað við hesum árliga stuðli (og einum prísvøkstri upp á 2% um árið) í alla tíð, og afturskrivað verður við rentuni á tí mest langfreistaða danska lánsbrævinum, 8,21% um árið, verður nútíðarvirðið á blokkstuðlinum 14,1 mia. kr. Verða fortreytirnar broyttar, t.d. at blokkstuðulin verður avmarkaður til at vara í 8 ár, og at hann verður afturskrivaður við tí rentu, sum svarar til tað, 7,06% um árið, verður nútíðarvirðið 5,6 mia. kr.

Um nútíðarvirðið á afturskrivaðum, mettum skattainntøkum av einari leið sum Foinaven er at siga, at partafelagsskatturin ikki gevur nakra inntøku, fyrr enn flutt undirskot frá leititíðini og avskrivingarnar av útbyggingini ikki longur forða fyri, at skattskyldug inntøka verður. Ein møguligur eykaskattur av “ROR-slagnum”, smbr. kapittul 4.5, kann ikki koma fyrrenn uppaftur seinni. Tí kemur meginparturin av skattainntøkuni, smbr. roknidømi í mynd 4.6-1 um eina einstaka leið, ikki inn fyrr enn mong ár eru liðin, og av hesum verður nútíðarvirðið munandi minni. Við roknirentuni upp á 8,21%, sum nevnd er omanfyri, verður nútíðarvirðið á partafelagsskattinum av einari leið sum Foinaven við galdandi oljuprísum mett at vera umleið 1,2 mia. kr., og tað er úti við 1/4 av skuld landskassans til statskassan ella 1/12 av metta nútíðarvirðinum á einum óendaligum blokkstuðli. Eftir hesum

roknistykki, sum byggir á fortreytir við stórari óvissu, skal partafelagsskattur, roknaður í nútíðarvirði, frá 4 tílíkum leiðum í senn til fyri at útjavna skuld landskassans til statskassan, og harafturat inntøkur frá 12 sama slag leiðum í senn fyri at útjavna nútíðarvirðið á blokkstuðlinum, sum hann er roknaður omanfyri.

Fortreytin um, at leiðirnar fara at virka samstundis, er heldur óverulig. Tað er rímiligari at vænta, at leiðirnar koma fram hvør eftir aðra, og at tær vera ólíkar í stødd. Verða fleiri leiðir funnar av sama samtaki, verður búskapurin betri í hvørjari leið, og skatturin av teimum fyrstu leiðunum verður útsettur, tí samtakið hevur útreiðslur av at finna og útbyggja tær seinnu leiðirnar. Umframt sjálva inntøkuna frá loyvishavunum, kann roknast við skattainntøku frá øðrum luttakarum í oljuvirkseminum og frá øðrum virksemi, sum stendst av oljuvinnuni.

Verður eitt framleiðslugjald upp á 2,5% talt uppí, verður nútíðarvirðið umleið 1,5 mia. kr. (ávikavist 30% av skuldini og 1/9 av blokkstuðlinum). Verður ein serskattur lagdur afturat hesum, kann nútíðarvirðið av inntøkuni koma upp á 1,6 mia. kr. Fortreytin um oljuprísin er avgerandi. Verður oljuprísurin einans 14 USD/bb, fellur nútíðarvirðið á partafelagsskattinum niður á ½ mia. kr. Um oljuprísurin verður 23 USD/bb, kemur nútíðarvirðið á teimum trimum nevndu skattasløgunum upp á ávikavist 2,2 mia. kr., 2,5 mia. kr. og 3,3 mia. kr.

Nútíðarvirðið á partafelagsskattinum frá teimum 4 leiðunum, sum eru lýstar í mynd 4.6-2, upp á tilsamans 2 mia. føt av olju, verður umleið 9 mia. kr., um oljuprísurin verður 18 USD/bb. Verður eitt framleiðslugjald upp á 2,5% lagt afturat hesum, kemur nútíðarvirðið upp á smáar 11 mia. kr., og við einum serskatti afturat veksur tað til 13,6 mia. kr.

Verður ístaðin roknað við, at oljuprísurin verður 14 USD/bb, verður partafelagsskatturin góðar 3 mia. kr. Við framleiðslugjaldi verður talið 5 mia. kr., og ein serskattur broytir ikki talið. Er oljuprísurin 23 USD/bb, verða tølini ávikavist okkurt um 16, 19 og 27 mia. kr.

Heldur ikki í hesum roknidømum er lagt upp fyri, at størri skattatrýst møguliga ger, at virksemið verður minni.

### 4.6.4 Ávirkan av væntan um at finna olju

Sum sæst frammanfyri í gjøgnumgongdini av einstøku skeiðunum í oljuútvinningini, fer beinleiðis búskaparligi týdningurin av oljumenningini helst at vísa seg so líðandi, sum menningin fer fram.

Óbeinleiðis búskaparligar avleiðingar av oljuvinnuni kunnu tó hugsast at koma fyrr av tí, at búskaparliga atferðin verður ávirkað av tí *væntan*, sum oljuvinnan hevur við sær. Tí kann hugsast, at væntanin um oljuinntøkur ger, at ymist verður gjørt ella sett í verk, sum kann hava veruligan búskaparligan týdning.

Her er skjótt at halda, at slík væntan kann fáa prísir á jørð og aðrari fastari ogn at vaksa, og tey, sum eiga sovorðna ogn, kenna seg ríkari enn fyrr og fara at brúka meir, læna meir og gera meiri íløgur enn fyrr. Her kann verða víst til royndirnar í Nýfunnalandi[23]. Har gjørdi leitivirksemið í 1970'unum, og serliga at Hibernia- leiðin varð funnin í 1979, at prísirnir á fastari ogn í St. John's vuksu av spekulatiónsávum. Av tí, at útbyggingin av leiðini dróg út (framleiðslan kom ikki í gongd fyrr enn í 1997, 18 ár eftir at leiðin var funnin), og aðrar leiðir av

[23] House, J.D.: "The Challenge of Oil", St. John's Newfoundland, 1985, Kapittul 7, s. 165-196

týdningi ikki vórðu funnar, fór luftin spakuliga úr marknaðinum, og prísirnir fullu aftur í sína gomlu legu.

Um oljumenningin ger, at fólk flytir uttaneftir í stórum tali, so leggur hetta trýst á bústaðarmarknaðin á staðnum við tí fylgju, at húsaprísir og húsaleigur vaksa. Hetta merkir, at eitt umbýti av inntøkum og ognum fer fram frá leigarum til eigarar og fer at kennast sum livikostnaðurin er hækkaður. Henda gongd fer eisini at hava størri byggivirksemi við sær.

Væntanin um meiri skattainntøkur beinleiðis av oljuni ella óbeinleiðis av øðrum virksemi, sum stendst av oljuni, kann ávirka tey, sum taka politiskar avgerðir, til at økja um almenna virksemið, kanska við læntum peningi, sum tey vóna fer at kunna verða rentaður og avdrigin við størri skattainntøku. Um so verður, at inntøkurnar, sum koma, ikki verða nóg stórar til hetta, so hevur væntanin um oljuinntøkur gjørt, at føroyska samfelagið verður verri fyri, enn tað hevði verið uttan oljuútlit.

## 4.6.5. Tá ið tíðin kemur inn í myndina

Verða rættindi tillutað í 1998, so verður tað helst at føra til leitivirksemi við boringum og øðrum í árunum 1999-2005. Verður nakað funnið hesi árini, sum kann gagnnýtast vinnuliga, t.d. í 2003, skal loyvishavin gera eina útbyggingar-ætlan, sum verður framd í árunum 2005-2008, og síðani kann framleiðslan byrja.

Olju- og gasstilfeingi eru avmarkað, og fyrr ella seinni kemur gagnnýtslan av einari leið til eitt vegamót, har hon ikki loysir seg longur. Men tá ið tíðin verður tikin við í myndina, er munur á einari einstakari oljuleið og einum heilum oljuøki.

Tær einstøku oljuleiðirnar hava ikki líka langa livitíð. Vanliga er dagliga fram-leiðslan mest eftir einum tveimum árum, og minkar hon síðani spakuliga, til leiðin verður stongd eftir 10-30 árum, um ikki nýggjar íløgur verða gjørdar í útvinningartøkni, ella ein nýggj nærliggjandi leið verður løgd afturat, so at fram-leiðslan verður størri aftur. Um ta risastóru norsku gassleiðina Troll, sum varð tikin í brúk í 1996, verður ætlað, at livitíðin verður eini 70 ár.

Verða olja og/ella gass funnin undir Føroyum í so stórum nøgdum, at tær kunnu gagnnýtast, verður neyvan talan um bara eina leið. Heldur verða Føroyar eitt kolvetnisøki, har størri og minni leiðir verða funnar so við og við.

Royndir í øðrum oljuøkjum, t.d. við Kaspiska Havið og í Meksikoflógvanum, vísa, at eitt oljuøki í síni heild varðveitir virksemið áratíggju eftir áratíggju. Í Norðsjónum er eftir 30 árum framvegis stórt virksemi við leiting, framleiðslu, út-bygging og betringum av leiðum o.ø., og áhaldandi íløgur í at dagføra útbúnaðin.

Hvussu búskapurin í olju- og gassútvinning sum heild fer at hátta sær, er ilt at siga, serliga tí óvissan er stór um eftirspurningin og prísgongdina. Tann nógva umtalan, sum $CO_2$-útleiðing fær, kann gera, at eftirspurningurin minkar, soleiðis at kolvetni, serliga olja, fær minni búskaparligan áhuga, væl áðrenn sjálvt tilfeingið er uppbrúkt.

Verður hugt burtur frá omanfyri nevndu síðu av málinum, so má væntast, at sjálvt um kolvetni er eitt endaligt tilfeingi, sum ikki endurnýggjar seg sjálvt eins og fiskur, hvalur og annað ger, so er neyvan nøkur natúrgivin forðing fyri, at *Føroyar kunnu verða verandi búskaparliga áhugaverdar sum kolvetnisøki í minst eini tvey ættarlið.*

Sum andsøgn kann norðhavssildin verða tikin sum dømi um eitt tilfeingi, sum verður hildið at endurnýggja seg sjálvt. Hon var eitt týðandi tilfeingi í Føroyum í eini 20 ár í 1950'unum og 1960'unum, men so hvarv hon og kom ikki fyri seg aftur fyrr enn miðskeiðis í 1990'unum, men eingin torir at siga, hvussu leingi tað varir. Henda óvissa merkir ikki, at føroyska fiskivinnan og føroyska samfelagið ikki hava havt hug at gagnnýta sildina, tá ið hon hevur verið til taks, hóast hesuferð, nú hon er afturkomin, sæst størri varsemi, tá ið tað kemur til at gera íløgur.

At gera ætlanir um tíðina eftir oljuøldina er bæði nú og tey næstu áratíggjuni øgiliga torført, av tí at nógvar vinnuligar fortreytir verða øðrvísi tá. Um so verður, at Føroyar gerast oljuland, so er tað ið hvussu er skilagott at umhugsa tiltøk at varðveita fiskivinnuna so væl sum møguligt, at taka lut í vinnuligum oljuvirksemi uttanlands, at menna vinnur, sum ikki byggja á tilfeingi, og at spara pening upp, sum kann setast í kapitalkrevjandi vinnugreinir og/ella verða standandi uttanlands at taka til fyri at styrkja føroyska búskapin í longdini.

## Fylgiskjal 4.6-1

### Føroyskur partur í oljuleitingini

Fortreytir: 15 leitiboringar á 120 mió. kr. í 6 ár (300 mió. kr. um árið), har 5 rættindahavarar gera í miðal 3 leitiboringar í 6 ár.

| | Tilsamans um árið (mió. kr.) | FR partur brutto (mió. kr.) | |
|---|---|---|---|
| Seismikkur | 150 | 6 | |
| Boripallur (50% av 200 mió) | 150 | 17 | |
| Vaktarskip o.t. | 6 | 6 | |
| Veitingarskip | 12 | 12 | |
| Tyrluflutningur (uttan fólk á boripalli) | 10 | 10 | |
| Ymsir sáttmálar viðv. borivirksemi | 132 | 13 | |
| Stovnan av skrivstovum (5 skrivstovur við 3 fólkum) | 16 | 12 | |
| Flutningsútreiðslur | 15 | 9 | |
| A-inntøkur annars (arbeiði í tænastuvirkjum) - 30 fólk á ½ mió. | 0 | 15 | |
| Leitikostnaður tilsamans | 491 | 100 | 20% |

Umframt hetta koma møguligar inntøkur sum umboðsvirksemi og annað, har umsetningurin kann vera stórur, men virðisøkingin lítil.

# 5. PARTUR ÁVIRKAN FRÁ OLJUVIRKSEMI

At farið verður undir at leita eftir kolvetni á føroyska landgrunninum og seinri at útbyggja oljuleiðir og framleiða kolvetni kann eisini hava aðrar fylgjur við sær enn tær beinleiðis vinnuligu.

Longu í forkanningarskeiðinum, ið tók seg upp í 1994, varð *fiskiskapurin* undir Føroyum ávirkaður. Henda ávirkan, ið kann skaða fiskiveiðuna, kann væntast at vaksa í einum leitiskeiði og møguliga eisini í einum útbyggingar- og framleiðsluskeiði. Eisini avriggingarskeiðið kann ávirka fiskiskapin. Hesi vandamál eru viðgjørd í kapitli 5.1 *Fiskivinna og aling*.

Oljuvirksemið hevur eisini týdning fyri *umhvørvið*. Leitiboringar og kolvetnisframleiðsla á havinum bera í sær vanda fyri ringum árini á havumhvørvið. Hesir spurningar eru viðgjørdir út í æsir í kapitli 5.2 *Umhvørvi*.

Umframt tær vinnubúskaparligu fylgjurnar, og tað árin á fiskivinnu og umhvørvi, ið nevnd eru omanfyri, umframt trygdarspurningin, kann ein oljumenning, um hon verður munandi og gongur í skjótara lagi, ávirka *samfelagslívið og mentanina* sum heild. Hesir spurningar, ið serliga kunnu fáa týdning í einum útbyggingar- og framleiðsluskeiði, verða í stuttum viðgjørdir í kapitli 5.3 *Onnur ávirkan*.

## 5.1 FISKIVINNA OG ALING

Fiskiskapur og fiskiídnaður mynda føroyskt vinnulív. Føroyar eru lýstar sum tað samfelag í heiminum, ið er mest heft at fiskiskapi.

Samanburður við onnur lond dregur fram hesa sannroynd. Talva 5.1-1 sýnir fiskiskap og útflutningstøl í nøkrum úrvaldum londum.

**Talva 5.1-1 Fiskiskapur og útflutningstøl fyri úrvald lond**

| | **Veiði-nøgd** | **Veiði-nøgd/ íbúgva** | **Innflutning-ur av fiski** | **Útflutning-ur av fiski *)** | **Útflut-ningur/ íbúgva** | **Íbúgvar** | **Nýtsla av fiski** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 1000 t | kilo | 1000 USD | 000 USD | 000 USD | 1000 | kg/íbúgva |
| Føroyar | 262 | 5.567 | 10.845 | 312.338 | 6.415 | 47 | 86,8 |
| Grønland | 140 | 2.552 | 4.270 | 290.037 | 5.196 | 55 | 80,3 |
| Ísland | 1.718 | 6.792 | 23.374 | 1.137.638 | 4.404 | 253 | 92,1 |
| Noreg | 2.562 | 606 | 310.352 | 2.302.346 | 471 | 4.227 | 41,1 |
| Danmark | 1.564 | 305 | 1.094.253 | 2.150.665 | 206 | 5.134 | 21,1 |
| Japan | 8.128 | 66 | 14.187.149 | 766.952 | -109 | 123.145 | 71,9 |

*) Nettoútflutningur
Tølini eru frá 1993, Kelda FAO

Helvtin av føroyskari veiði verður fiskað í sjónum um Føroyar, og henda veiða er grundarlagið undir fiskivinnuni á landi. Tað er tí ógvuliga týdningarmikið, at tær lógir og reglur, sum stýra samvirkanini millum fiskiskapin og ein framtíðar oljuídnað, skuldi hann komið, verða skipaðar soleiðis, at fiskiskapur verður sum minst ampaður. Stýringarnar mugu tó verða soleiðis, at tær ikki óneyðugt forða fyri framtíðar oljuvirksemi.

Sum heild má tað haldast at verða týdningarmikið at fáa mál, knýtt at fiskiskapi, so tíðliga sum til ber inn í ætlanarskeiðið við atliti at bæði fiskivinnuni og oljuídnaðinum.

Í 1993-frágreiðingini frá Oljuráðleggingarnevndini verður sambandið millum oljuídnað og fiskiskap lýst umframt tey umhvørvismál, sum viðvíkja fiskiskapi. Í frágreiðingini verður víst á, at neyðugt er gjølligari at lýsa, hvussu oljuídnaðurin ávirkar fiskiskapin, og hvussu áhugamál tengd at fiskiskapi best verða røkt.

Á næstu síðunum verður lýstur tann lutur, fiskiskapur hevur í samfelags-búskapinum, og ymisk viðurskifti og tættir, sum hava týdning fyri føroyskan fiskiskap. Harumframt verða royndir lýstar úr øðrum londum viðvíkjandi tvídrátti ímillum fiskiskap og oljuídnað, og uppskot er orðað til føroyskan politikk og løggávu á hesum øki.

## 5.1.1 Náttúrugrundarlagið undir fiskiskapinum og samfelagsbúskaparligur týdningur

Sum nevnt í innganginum stýrir fiskiskapur og vinna knýtt at honum, føroyskum vinnulívi. Fiskiskapurin letur fisk til fiskiídnaðin á landi. Her verður ymisk vøra úr fiski tilvirkað umframt fiskamjøl og fiskafóður.

Fiskur og fiskavørur eru grundarlagið undir 98-99% av allari útflutningsinntøku Føroya, tá ið skipaútflutningur ikki er tikin við.

Fiskivinnan hevur soleiðis avgerandi týdning fyri inntøku- og arbeiðsmøguleikar í Føroyum. Serstakliga í bygdum og býum aðrastaðni enn í Tórshavn eru fólk ógvuliga bundin at fiskivinnu og í fleiri førum at kalla fult og heilt.

Til miðskeiðis í 70-árunum vórðu meira enn tveir triðingar av føroyskari veiði veidd á fjarleiðum, men eftir at strandalondini fóru at víðka fískimarkið út á 200 fjórðingar, hava føroyskir fiskimenn verið noyddir at fiska meira undir Føroyum, soleiðis at umleið helvtin av allari veiðini tey seinnu árini er veidd í føroyskum øki.

Føroyski fiskiskipaflotin er hátøkniligur við framkomnum skipum, serstakliga fjarfiskaflotin, men eisini tey stóru skipini, sum fiska undir Føroyum, eru framkomin. Fiskiflotin hevur næstan bara føroyska manning og fær fyri tað mesta ábøtur á føroyskum skipasmiðjum. Nøkur av skipunum eru smíðað í Føroyum. Fiskiskapurin hevur tí havt við sær, at serkunnleiki á høgum stigi til sjógvin er bygdur upp, og hann fer at kunna verða brúktur í einum møguligum oljuídnaði.

Samstundis sum fiskiskapurin varð alsamt meira savnaður um Føroyar, vórðu nógv flakavirki bygd, sum vórðu grundað á at virka botnfiskasløg. Annar týðandi partur av fiskivinnuni, fiskamjøl- og fiskafóðurvinna, er grundaður á uppsjóvarsløg. Eisini rækjur og jákupsskeljar verða virkaðar.

Upp ígjøgnum áttatiárini er laksaaling vorðin týðandi vinna. Nakað av laksinum verður roykt í Føroyum. Alifiskur eigur 15-20% av føroyska útflutninginum nú.

Parturin hjá fiskiskapi og fiskiídnaði í øllum føroyska samfelagsbúskapinum kann m.a. lesast í talvuni niðanfyri. Talva 5.1-2 sýnir føroyska útflutningin býttan út á fiskavørur og aðrar vørur árini 1991 til 1995. Av talvuni sæst, at fiskavørur øll árini eru væl oman fyri 90% av útflutninginum.

**Talva 5.1-5.1.2. Føroyski útflutningurin 1991-1995**

| **Útflutningur** (mió. kr.): | 1991 | 1992 | 1993 | 1994 | 1995 |
|---|---|---|---|---|---|
| Fiskavørur | 2.631 | 2.398 | 2.052 | 2.026 | 1.992 |
| Aðrar vørur, skip ikki íroknað | 5 | 6 | 12 | 23 | 18 |

Talva 5.1-3 sýnir lønarútgjaldingar býttar út á vinnugreinar fyri árini 1992 til 1995. Av hesum skilst, at tær tríggjar vinnugreinarnar fiskiskapur, fiskiídnaður og aling eru 25% av øllum lønarútgjaldingunum hesi árini.

**Talva 5.1-3 Lønarútgjaldingar býttar út á vinnugreinar 1992-1995**

| **Lønarútgjaldingar** | 1992 | | 1993 | | 1994 | | 1995 | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | mió. kr. | % | mió. kr. | % | mió. kr. | % | mió. kr. | % |
| Fiskarí | 593 | 15 | 490 | 15 | 496 | 16 | 536 | 17 |
| Fiskavirking | 309 | 8 | 210 | 7 | 230 | 7 | 231 | 7 |
| Aling | 81 | 2 | 62 | 2 | 58 | 2 | 56 | 2 |
| Onnur vinna | 2.850 | 75 | 2.470 | 76 | 2.341 | 75 | 2.405 | 74 |

Talva 5.1-4 sýnir støddina á føroyska heimafiskiflotanum í 1995 (gjørd upp í fiskiloyvum), og hvørji fiskasløg ymisku skipabólkarnir fiska.

**Talva 5.1-4 Føroyski heimafiskiflotin 1995**

| **Skipabólkar** | **1995** | **Árlig veiða /skip** | **Høvuðsveiða** |
|---|---|---|---|
| **Lemmatrolarar** | tal | tons | |
| Yvir 1000 HK, djúpt vatn | 11 | 2.500 | Kongafiskur, svartkjaftur, upsi |
| Yvir 1000 HK | 3 | 1.400 | Upsi, toskur |
| **Partrolarar** | | | |
| Yvir 1000 HK | 27 | 1.400 | Upsi, toskur |
| 700-999 HK | 6 | 1.200 | Upsi, toskur |
| 400-699 HK | 0 | 900 | Upsi, toskur |
| Trolarar tilsamans | 47 | | |
| **Línuskip** | 19 | 1.000 | Toskur, hýsa, brosma, longa |
| **Garnaskip** | 6 | 1.000 | Havtaska, svartkalvi |
| **Onnur skip og bátar** | | | |
| Trolarar undir 400 HK | 3 | 330 | Toskur, hýsa, flatfiskur |
| **Línu- og snellubátar** | | | |
| Undir 15 BRT | 1.231 | 170 | Toskur, hýsa |
| 15-36 BRT | 57 | 260 | Toskur, hýsa |
| 40-60 BRT | 30 | 360 | Toskur, hýsa, upsi |
| Yvir 60 BRT | 14 | 440 | Toskur, hýsa, upsi |
| Onnur skip og bátar tilsamans | 1.335 | | |

**Fiskatilfeingið undir Føroyum**

Føroyska fiskameingið er sett saman av sløgum bæði norðaneftir og sunnaneftir. Summi øki undir Føroyum eru átøk Norðsjónum, onnur átøkari pólhøvum. Hvussu sløgini eru samansett, kann verða lýst við tveimum myndum. Mynd 5.1-1 sýnir tey handilsliga týdningarmestu sløgini á grunnunum. Mynd 5.1-2 sýnir sløgini í hellingini frá kantinum á grunnunum og niður ímóti dýpinum, har týdningarmikil sløg eru, sum kongafiskur og blálonga (djúpvatnstrolarar) og brosma og longa (línuskip). Á víðum havi uppi í sjónum er svartkjaftur og makrelur, og seinnu árini eru nøgdirnar av sild vaksnar nógv (nótaskip og frystitrolarar)

**Mynd 5.1-1 Týðandi sløg á Bankunum**

Kelda: Fiskar, Føroya Skúlabókagrunnur

**Mynd 5.1-2 Týðandi sløg á landgrunshellingini**

Kelda: Fiskar, Føroya Skúlabókagrunnur

Í fiskiskapi verður skilt ímillum fiskiskap eftir fiski uppi í sjónum, nevndur uppsjóvarfiskur, ið fiskaður verður við flótitroli og nót, og fiskiskap eftir botnfiski, ið fiskaður verður við botntroli - við lemma- ella partrolarum, línu og snellu.

Fyrst í 1997 royndu 7 nótaskip og 2 frystitrolarar eftir uppsjóvarsløgum. Hesin fiskiskapur er fyri tað mesta uttan fyri føroyska fiskimarkið, men parturin innan fyri føroyskt fiskimark fer væntandi at vaksa næstu árini. Nøkur fá skip royna eisini eftir havtasku og svartkalva við gørnum, men gørnini eru plásskrevjandi á fiskileiðunum.

Talvurnar niðanfyri sýna veiðitøl fyri botnfisk, uppsjóvarfisk og ídnaðarfisk. Hesar talvur kunnu berast saman við talvu 5.1-4, sum sýnir tøl fyri fiskiflotan.

**Talva 5.1-5 Botnfiskasløg, veidd undir Føroyum 1980-1995 (1.000 tons)**

| | Miðal 1980-89 | 1993 | 1995 |
|---|---|---|---|
| Toskur | 29 | 6 | 20 |
| Hýsa | 13 | 4 | 5 |
| Upsi | 40 | 33 | 27 |
| Brosma | 6 | 4 | 3 |
| Longa | 5 | 5 | 3 |
| Kongafiskur | 14 | 10 | 8 |
| Blálonga | 7 | 3 | 2 |
| Svartkalvi | 1 | 4 | 3 |
| Kalvi | 1 | 1 | 1 |
| Annar flatfiskur | 1 | 1 | 1 |
| Onnur botnfiskasløg | 2 | 1 | 1 |
| **Botnfiskasløg, tilsamans** | 120 | 72 | 74 |

**Talva 5.1-6 Onnur uppisjóvarfiskasløg, veidd undir Føroyum 1980-1995 (1.000 tons)**

| | Miðal 1980-89 | 1993 | 1995 |
|---|---|---|---|
| Sild | - | 2 | 188 |
| Gullaksur | - | 1 | 6 |
| Makrelur | 1 | 30 | 31 |
| Svartkjaftur | 147 | 136 | 113 |
| Hvítingsbróður | 16 | 29 | - |
| Hummari | - | - | - |
| Jákupsskel | 2 | 2 | 2 |
| Villlaksur | 1 | 0 | 0 |
| **Tilsamans** | 167 | 200 | 340 |

Mynd 5.1-3 sýnir veiðuna av botnfiski eftir fiskileiðum í árunum 1986 til 1994. Vanliga verður meira fiskað eystan fyri 7°00'V og millum 60°00'N og 62°30'N, men týdningarmiklar fiskileiðir eru eisini vestan fyri Mykines. Kortini byggja á miðalveiði fyri alt árið og í fleiri ár. Hesar myndir sýna tískil ikki tey stóru frávik, sum eru í árinum og eisini millum ár. Klingrurnar eru settar mitt í hagtalspuntarnar, sum eru eitt longdarstig x hálvt breiddarstig, og tølini kunnu tískil ikki avlesast neyvari.

**Mynd 5.1-3 Veiðan eftir botnfiski býtt eftir fiskileiðum 1986-1994**

Kelda: Fiskirannsóknarstovan

Tá ið mett verður um, um fiskileiðir eru týdningarmiklar eftir allari veiðini, má tað takast við, at fiskiskapur eftir ávísum fiskasløgum (og árgangir av fiskasløgum) bara er á ávísum leiðum, sum kanska liggja uttan fyri leiðirnar, vístar verða her. Til tess at fáa hollari heildarmynd av tí týdningi, ymisku leiðirnar hava, er neyðugt at hyggja at, hvar hvørt einstakt fiskaslag verður veitt.

Á sama hátt kann verða kannað, hvussu veiðan hjá hvørjum einstøkum skipabólki ella reiðskapsbólki býtir seg millum ymisku hagtalspuntarnar. Niðanfyri verður í stuttum greitt frá veiði eftir 3 fiskasløgum: toski, hýsu og upsa. Í hesum sambandi verður gjørt vart við, at fiskiskapurin eisini fataði um ymisk onnur fiskasløg, sum ikki verða gjølligari viðgjørd í hesum sambandi. Harumframt verður greitt frá býtinum millum veiði við troli og veiði við húki í føroyskum sjógvi.

**Toskur**

Samfelagsbúskaparliga hevur toskur verið týdningarmesta fiskaslagið í føroyskum sjógvi; í miðal hava 26.500 tons verið fiskað árliga seinastu 35 árini. Um várið (februar-apríl) savnast toskurin at gýta norðan fyri og vestan fyri Føroyar, mynd 5.1-4. Eftir tað spjaðist hann um meginpartin av landgunninum innan fyri 200-300 metra dýpi. Toskurin, sum ikki er kynsbúgvin, stendur inni á grynri vatni nærri landi.

**Mynd 5.1-4 Gýtingarleiðir, toskur**

Kelda: Fiskastovnar og umhvørvi 1996, Føroya Skúlabókagrunnur

Fiskiskapurin eftir toski frá 1986 til 1994 er vístur í mynd. 5.1-5. Mest varð fiskað eystanfyri og norðanfyri við størstu nøgdunum á innaru leiðunum.

Umframt toskin á landgrunninum er eisini sjálvstøðugur toskastovnur á Føroya Banka. Hesin stovnur er nógv minni enn stovnurin á landgrunninum. Í miðal eru fiskað um 2.000-2.500 tons av toski árliga. Í løtuni er stovnurin illa fyri. Tí eigur serligt varsemi at verða sýnt hesum stovni. Serliga eigur at verða hugsað um, at Føroya Banki er eitt sera avmarkað øki.

**Mynd 5.1-5 Fiskiskapurin eftir toski við troli býttur eftir fiskileiðum 1984-1994**

Kelda: Fiskirannsóknarstovan

**Hýsa**

Hýsa hevur eisini verið ein tann týdningarmesti fiskur til matna, sum veiddur er undir Føroyum. Árliga miðalveiðin hevur ligið um 16.200 tons seinastu 35 árini. Hýsan gýtir fyri tað mesta frá mars til mai víða um á landgrunninum og á bankunum vestan fyri oyggjarnar. Trý høvuðsgýtingarøki tykjast tó at vera, eitt norðanfyri, eitt eystanfyri og eitt vestan fyri Føroyar, mynd 5.1-6.

**Mynd 5.1-6 Gýtingarleiðir, hýsa**

Kelda: Fiskastovnar og umhvørvi 1996, Føroya Skúlabókagrunnur

Fiskiskapurin eftir hýsu 1986-1994 sæst í mynd 5.1-7. Mest verður fiskað inni við land í ein landnyrðing; vanliga er tað á grunna vatninum úr landnyrðingsleiðum í útsynningsleiðirnar, at týdningarmestu økini eru. Lutfalsliga nógv er eisini fiskað á Føroya Banka.

**Mynd 5.1-7 Hýsuveiði býtt eftir fiskileiðum 1986-1994**

Kelda: Fiskirannsóknarstovan

**Upsi**

Upsaveiðan undir Føroyum vaks javnt eftir seinna heimsbardaga fram ímóti miðjum 70-árunum. Síðan 1960 hevur árliga miðalveiðan ligið um 33.500 tons. Fiskiskapurin eftir upsa hevur serliga havt týdning undir Føroyum seinastu 20 árini. Tá fiskiskapurin kom í hæddina í 1991, vórðu 61.000 tons veidd undir Føroyum. Týdningarmesta gýtingarleiðin hjá upsa er eystan fyri Føroyar, men hann gýtur eisini norðan fyri og vestan fyri oyggjarnar, mynd. 5.1-8. Gýtingartíðin er serliga í februar og í fyrra helmingi av mars.

**Mynd 5.1-8 Gýtingarleiðir, upsi**

Kelda: Fiskastovnar og umhvørvi 1996, Føroya Skúlabókagrunnur

Mynd 5.1-9 sýnir upsaveiði býtt eftir leiðum. Fiskað verður serliga eystan fyri Føroyar millum 61°00’N og 62°30’N. Smávegis nøgdir verða veiddar norðan fyri og vestan fyri Føroyar.

**Mynd 5.1-9 Upsaveiði býtt eftir fiskileiðum 1986-1994**

Kelda: Fiskirannsóknarstovan

**Mynd 5.1-10 Fiskiskapur eftir botnfiski við troli býttur eftir fiskileiðum 1986-1994**

Kelda: Fiskirannsóknarstovan

**Veiða við troli og húki**

Veiðubýtið av trolveiddum botnfiski skilst av mynd 5.1-10. Víð øki eru friðað fyri trol, m.a. økini innan fyri 12 fjórðingar og rættiliga stór øki uttanfyri 12 fjórðingar. Hetta ávirkar býtið. Trolararnir veiða javnt um allan landgrunnin, men kortini eru leiðir, har fiskað verður meira enn aðrastaðnis. Serliga er tað eystan fyri Føroyar millum 62°00’N og 62°30’N og vestan fyri 9°00’V millum somu breiddarstig.

Býtið av húkaveiði uppá øki, mynd 5.1-11, er eitt sindur øðrvísi enn fyri trolarar. Meginparturin verður veiddur nærri landi, og ein lítil partur verður veiddur longri úti á landnyrðingsøkinum.

**Mynd 5.1-11 Línuveiða býtt eftir fiskileiðum 1986-1994**

Kelda: Fiskirannsóknarstovan

**Aling**

Síðan byrjanina fyrst í 80-árunum er alivinnan vaksin nógv, og nú hava 21 alarar aling um alt landið, sum víst á mynd 5.1-12

**Mynd 5.1-12 Alingin um alt landið**

Kelda: Fiskirannsóknarstovan

## 5.1.2 Oljuídnaður og fiskiskapur í sama øki

Fiskatilfeingið innan fyri føroyska fiskimarkið er hornasteinurin undir føroyskum samfelagsbúskapi, av tí at samfelagsinntøkurnar stava annaðhvørt frá føroyskum fiskiskapi í egnum sjógvi ella frá fiskirættindum í øðrum londum í býti við rættindi í føroyskum øki. Tann sínámillum ávirkan, ið kann taka seg upp, við at oljuídnaður og fiskiskapur vinna í sama øki, er tískil týðandi evni í føroyskum samanhangi. Tey trætumál, ið kunnu taka seg upp, eru í høvuðsheitum trætur um øki, men eisini um skaðar á fiskireiðskap og dálkingarskaðar.

Økistrætumál taka seg upp, tí at inn á fiskileiðir koma seismisk før, boripallar, vinnupallar, fermingarboyur umframt trygdargeirar og forboðsgeirar, har ikki er loyvt at leggja fyri akker ella fiska. Harafturat kemur undirsjóvarútbúnaður sum

t.d. borihol, ið fyribils eru frágingin, hjábrunnar, greinrør, brunnrammur og ymiskar rørleiðingar.

Viðmerkt eigur at verða, at økistrætur millum ymiskan fiskireiðskap er væl kent fyribrigdi, og í Føroyum eru nógvar royndir við at viðgera t.d. krøv hjá virknum og óvirknum reiðskapi á fiskileiðum. Á sama hátt hevur í seismikkvirksemi higartil verið roynt tað ítarsta at minka tvídrátt millum seismikk og fiskiskap sum mest.

**Verjutiltøk**

Hesi tiltøk kunnu verða:

- Tíðarbil
- Hvar rør verða løgd
- Hvar framleiðslupallar og fermingarboyur vera løgd
- Hvussu undirsjóvarútbúnaður og rørleiðingar eru háttað
- Kunngerðir/upplýsing
- Grót og grúsútblaking
- Niðurgraving
- Rutjarnsupprudding

***Tíðarbil***

Seismiskt virksemi ræðir fisk á leiðini og hevur við sær, at minni verður at fáa. Ein møguleiki at minka um hetta árin er at leggja seismiskt virksemi uttan fyri bestu fiskitíð. Víst verður eisini til brot 5.1.3.

Ávísar tíðir kann ávirkanin hava fylgjur fyri lívfrøðiligu viðurskiftini. Til dømis um gongdin hjá fiski á gýtingarleiðir ella steðgurin á leiðunum verða órógvað, umframt tað, at seismiskt virksemi hevur oyðandi ávirkan á rogn, larvur og yngul, smbr. brot 5.1.3. Seismiskt virksemi eigur tí alt tað, tað er gjørligt, at vera í tíðarbilum, tá ið árinið á lívfrøðiligu umstøðurnar er sum minst.

***Hvar rør verða løgd***

Í teimum førum, tá ið gjørt verður av at flyta ráevni ígjøgnum rørleiðing, má verða roynt at fáa loysn, sum beinir rørleiðingina út um góðar fiskileiðir; harum-framt má metast um loysnir við at grava niður, at breiða grús á o.a.

***Hvar ymiskur útbúnaður verður settur***

Útbúnaðurin eigur at verða settur soleiðis, at hann minst møguliga tarnar fiskiskapi á leiðini.

Tá ið rør verða løgd, er týdningarmikið at meta um, hvat slag av løguførum nýtast skulu. Til tess at sleppa undan akkersgryvjum eiga før um gjørligt at verða brúkt, sum hava dynamiska støðufesting. Før, ið brúka akker til tess at halda seg á staðnum og at draga seg fram, gera bakkar av botngrýti, sum hava við sær, at størri vandi er fyri, at trolreiðskapur verður fastur í botni.

***Hvussu undirsjóvarútbúnaður er háttaður***

Stór menning fer fram á hesum øki í løtuni. Serstakliga á norskum landgrunni verður roynt at gera undirsjóvarútbúnað, sum trolast kann tvørturum. Eitt olju-felag hevur t.d. gjørt eina loysn, har undirsjóvarútbúnaðurin er bygdur niður í eina grøv í havbotninum.

Henda menning hevur tó ikki havt við sær, at nakað munandi hevur verið slakað í spurninginum, hvussu stórur trygdargeirin skal vera m.a. av ótta fyri, at

ovurhonds dýrur útbúnaður fær skaða.

***Kunngerðir/upplýsing***

Tað er týdningarmikið at fáa allar viðkomandi kunngerðir sendar út til reiðarar og fiskimenn og at fáa í lag kunningarskifti millum reiðarar/fiskimenn, oljufeløg og myndugleikar. Fram um alt fyri at minka um óvissuna millum reiðarar og fiskimenn, sum virka í raktu økjunum, eins og sleppast kann undan skaða, sum stendst av vantandi kunning.

Allir partar, ið eru uppií, eiga í hesum sambandi at samstarva um at dagføra sjókort so hvørt, sum virksemisbyggingar fara fram á føroyska landgrunninum.

***Grót og grúsútblaking***

At leggja grót og grús oman á rørleiðingar og fylla hol í havbotninum við tí kann elva til trupulleikar og skaða fiskireiðskap.

***Niðurgraving***

Tá ið avgerast skal, um leiðing skal verða grivin niður ella ei, eigur at verða mett um samanhangin millum valda farleið, rørleiðingarslag, fiskiskap, streymviðurskifti og botngrýti á hesum leiðum.

***Rutjarnsupprudding***

Norskar royndir í Norðsjónum vísa, at í fyrstuni vóru stórir trupulleikar við burturkasti, sum elvdi til skaða, og at nógvur reiðskapur varð mistur. Trupulleikin var størstur tey fyrstu árini, men eftir at bæði fyriskipanir og mannagongdir vórðu bøtt, eru trupulleikarnir minkaðir. Úrslitini frá árligu uppruddingartiltøkunum benda kortini á, at lutir framvegis verða "mistir" fyri borð.

Norska oljustýrið hevur síðan 1981 havt árlig ruddingartiltøk í Norðsjónum, og hvørt ár verður eitt øki ruddað, ið er einar 1.200 ferkilometrar til víddar. Fiskivinnustýrið tekur fækkaðu endurgjaldsmálini sum tekin um, at hesi ruddingartiltøk hava virkað. Á sama hátt hevur Fiskivinnustýrið fingið góðar afturmeldingar frá fiskimonnum um rutjarnsupptakið. Tað skal í hesum viðfangi nevnast, at í ruddingartiltøkum er ikki bara komið fram á rutjarn frá oljuvinnu, men eisini rutjarn, sum hevur lagt seg ígjøgnum øldir frá fiskiskapi, sigling og krígsatgerðum.

Í sambandi við rutjarnsupptakið er Fiskivinnustýrið við í einum stýringarbólki saman við Norges Sjøkartverk, Norges Fiskarlag, Oljeindustriens Landsforening og Oljedirektoratet.

## 5.1.3 Tey fýra skeiðini

Sum nevnt í kapitli 4 í 1993-frágreiðingini, kann oljuídnaðarlig menning verða býtt í 4 høvuðsskeið:

- forkanningar
- leiting og meting
- útbygging og útvinning
- avrigging

Skeiðini, nevnd eru omanfyri, hava ymiska ávirkan á fiskiskapin.

Niðanfyri verður í stuttum greitt frá, hvussu forkanningar á føroyska landgrunninum verða stýrdar, og nomið verður við ávísar royndir. Síðan verður greitt meira alment frá, hvussu seismikkur verður brúktur, og hvussu hoyringarmannagongdir verða brúktar. At enda verða nevnd nøkur serstøk viðurskifti, sum knýta seg at hinum skeiðunum í eini oljuverkætlan.

**Forkanningarskeiðið**

Á heysti 1993 tók løgtingið prinsippavgerð um, at føroyski landgrunnurin skuldi verða latin upp fyri forkanningum við atliti at leiting eftir og framleiðslu av kolvetni. Samstundis samtykti Løgtingið løgtingslóg nr. 179 frá 21. oktober 1993 um forkanningar o.a.m. av undirgrund Føroya. Við hesum fekk Landsstýrið myndugleika at geva loyvi til forkanningar við tí atliti at leita eftir og at útvinna ráevni í undirgrundini umframt at gera vísindaligar kanningar, ið kundu hava týdning fyri leiting eftir og framleiðslu av kolvetni.

Forkanningarlógin byggir á tilmæli frá Oljuráðleggingarnevndini, smbr. 1993-frágreiðingini. Víst verður annars til kapittul 8 í teirri frágreiðingini um viðurskiftini ímillum oljuvinnu og fiskivinnu og kapittul 9 um fisk og umhvørvi, sum m.a. lýsir ávirkanina av seismikki á fiskastovnar, fugl og havsúgdýr.

Í tíðini frammanundan, at Landsstýrið tann 19. apríl 1994 gav Western Geophysical Corporation loyvi í tvey ár at kanna stórar partar av føroyska landgrunninum, vóru ráðleggingar millum Oljufyrisitingina, Fiskirannsóknarstovuna og Vaktar- og Bjargingartænastuna. Ráðleggingarnar høvdu til endamáls at tryggja, *lutvíst* at neyðugar gætur vórðu givnar virknum fiskiskapi, tá ið kannað varð seismiskt, smbr. eisini § 5 í forkanningarlógini, og *lutvíst* í tann mun tað var gjørligt at sleppa undan ella at avmarka skaða á rogn og fiskayngul.

***Fyrilit við fiskiskapi***

Til tess at sleppa undan, at fiskiskip og seismisk kanningarskip í óneyðugan mun ávirka virksemið hvør hjá øðrum, er í forkanningarloyvunum álagt loyvishavunum (kanningarskipinum) at hava eitt umboð, ið er kunnugt við fiskiskap og tilnevnt av myndugleikunum, við kanningarskipinum. Oljufyrisitingin veitir nú forkanningarloyvini, sí kunngerð nr. 10 frá 15. februar 1996, og Vaktar- og Bjargingartænastan tilnevnir umboð, sum kunnugt er við fiskiskap, og ger avtalur við loyvishavan um arbeiðsviðurskiftini hjá umboðsmanninum. Vaktar- og Bjargingartænastan sær í hesum sambandi til, at umboðið lýkur førleikakrøvini, m.a. at hann er navigatørur, at hann hevur hollan kunnleika til fiskiskap undir Føroyum, og at hann umframt føroyskt, dugir bæði enskt og norðurlendsk mál.

Arbeiðssetningarnir hjá fiskiveiðikunniga umboðnum við kanningarskipinum eru orðaðir í loyvunum. Í stuttum snúgva arbeiðssetningarnir seg um at samskifta bæði við fiskifør á kanningarleiðunum og fiskiveiðimyndugleikarnar á landi til tess at tryggja, at virksemini ikki renna saman. Í verki tosar fiskiveiðiumboðið við fiskiskip, sum eru á kósini hjá kanningarskipinum, og biður tey flyta seg, tí seismisk kanningarskip kunnu ikki lættliga skifta kós. Fiskiveiðiumboðið er bara at meta sum eygleiðari ella ráðgevi í viðurskiftum, sum hava við fiskiskap at gera, og hevur ongan myndugleika út um tann ráðgevandi, t.e. at hann, tá ið hann ger sítt arbeiði, er undir skiparanum á skipinum ella kanningastjóranum (the Party Chief).

Fiskiveiðiumboðið skrivar sínar eygleiðingar í eina loggbók, sum skal verða latin myndugleikunum í seinasta lagi 3 dagar eftir, at umboðið er komið í land. Loyvishavin fær ljóstak av loggbókini.

Afturat skipanini við fiskiveiðiumboði við kanningarskipum verður í loyvinum almenn skylda løgd á loyvishavarnar um at hava fyrivarni við fiskiskapi. Eitt kort, sum vísir á hvørjum leiðum, nógv verður fiskað ávísar tíðir, fylgir við loyvinum.

Nøkur seismikkfør hava hjálparskip (chaseboats) at sigla framman fyri seismikkskipinum til tess at ávara fiskifør á kósini hjá seismikkskipinum. Í seismiska virkseminum higartil hava krøv ikki verið sett um, at seismikkskipini skuldu brúka slík hjálparskip. Í okkara grannalondum verða heldur eingi krøv sett um hetta.

Skipanin við kravi um fiskiveiðiumboð við kanningarskipinum hevur sambært Vaktar- og Bjargingartænastuni virkað nøktandi, og skipanin hevur ikki givið orsøk til eftirlits- ella handhevjutrupulleikar.

***Fyrilit við lívfrøðiligum viðurskiftum***

Eftir samráð við Fiskirannsóknarstovuna vórðu longu í 1994 settar ávísar árstíðaravmarkingar inn í forkanningarloyvini.

Aðalgrundarlagið er, at einki seismiskt virksemi er í tíðarbilinum millum 1. november og 15. apríl, men vikið hevur verið frá tíðarbilinum í einstøkum førum, tá ið talað hevur verið um kanningar á leiðum sunnan fyri og eystan fyri Føroyar.

Á havleiðunum norðan fyri og vestan fyri Føroyar verður ikki loyvt at skjóta seismikk frá 1. november til 31. juli innan fyri 100 metra dýpdarlinjuna, t.e. fyri gýtingarleiðirnar hjá nøkrum av teimum týdningarmestu vinnuligu fiskasløgunum. Nøkur avmarkað undantøk kunnu tó verða givin.

Á leiðunum um Føroya Banka verða seismiskar kanningar ikki loyvdar innan fyri 200 metra dýpdarlinjuna í tíðarbilinum millum 1. november til 31. juli, tó kunnu smávegis kanningar verða loyvdar í bilinum millum 15. mai og 15. juni.

Tá ið vikið hevur verið frá, hevur hetta altíð verður gjørt eftir ráðføringar við Fiskirannsóknarstovuna.

***Royndir við skipanini í gildi***

Skipanin, sum gjørd varð í 1994, hevur víst seg at virka nøktandi, og tá ið landgrunnurin í 1996 varð latin upp fyri enn fleiri kanningum, hevði hetta ikki við sær, at loyvistreytirnar viðvíkjandi fiskiskapi og lívfrøðiligum viðurskiftum vórðu broyttar.

Kanningarskip og fiskiskip hava ikki ávirkað virksemið hvørt hjá øðrum

stórvegis, og fiskiveiðiumboðið hevur megnað at sæð til, at sloppið er undan óhepnum tilburðum. Í einum einstøkum føri varð fiskifar, sum lá á kósini hjá seismikkskipinum, biðið um at kappa línuna og fara av kósini í skundi. Fiskifarið gjørdi, sum biðið varð um, og fekk sínar útreiðslur og sín miss endurgoldinan frá seismikkfelagnum.

Kannað er ikki, um seismikkskjótingin, sum seinastu 3 árini er farin fram á landgrunninum, hevur ávirkað t.d. rogn og yngul. Ei heldur er kannað, um seismikkskjóting hevur ávirkað atburðin hjá fiski, t.d. hvusssu nógv fiskurin er ræddur av kanningarleiðunum. Oljufyrisitingin hevur ikki fingið klagur um slík viðurskifti, men ávísir partar av fiskiflotanum, t.d. skip, ið royna eftir svartkalva úti á hellingini eystan fyri Føroyar, halda seg síggja, at fiskiskapurin minkar beint eftir, at seismikkur hevur verið skotin á leiðini.

***Framtíðar seismiskar kanningar***

Um seismiska ávirkan á fiskiskap og fiskastovnar verður víst til kapittul 9 um fisk og umhvørvi í 1993-frágreiðingini. Seismikkur fer í framtíðini ikki bara at verða skotin sum partur av forkanningum, men verður harumframt liður í leitingunum hjá oljufeløgunum á leiðunum, har loyvi eru givin. Hetta fer at hava við sær, at nágreindar 2D og 3D kanningar verða gjørdar á avmarkaðum leiðum, sum gevur orsøk at hugsa um nýggjar treytir fyri framtíðar seismikkskjóting á føroyaøkinum.

Nýggj gransking av fylgjunum eftir seismiskar kanningar á sjónum leggur minni dent á avmarkingar í sambandi við seismiskar kanningar við atliti at rognum, larvum og yngli. Afturímóti verður mælt til avmarkingar við atliti at fíggjarligum missi, sum fiskimonnum kann verða fyri, orsakað av seismiskum kanningum, og mælt verður til, at gýtingarleiðir í gýtingartíðini verða vardar fyri seismiskari skjóting. Hetta serstakliga fyri fiskasløg við avmarkaðum gýtingarleiðum og við føstum ferðamynstri til gýtingarleiðirnar. At verja gýtingarleiðirnar í gýtingartíðini samsvarar við trygdaratlitini og regluna um fyrivarni, sum m.a. hevur við sær, at manglandi vísindaligur kunnleiki eigur ikki at vera undanførsla fyri at seta í verk verjutiltøk.

Í bóklinginum “Fiskastovnar og umhvørvi 1996“[24] verður í stuttum lívfrøðin lýst hjá teimum handilsliga týdningarmestu fiskastovnunum á føroysku fiskileiðunum, herundir gýtingartíðir og -leiðir. Við regluni um fyrivarni sum grundarlagi eigur seismiskt virksemi, sum kann ávirka gýtingarlag og gýtingaratburð, at hava fyrilit við *øllum* stovnum.

Sum nevnt í brotinum um seismiskar kanningar á føroyska landgrunninum eru ávísar árstíðaravmarkingar settar í gildi m.a. við atliti at gýtingini. Hesi atlit eru kortini í høvuðsheitum bara gjørd at teimum handilsliga týdningarmestu fiskasløgunum. Til ber at útvega neyvari lista yvir tíðir og leiðir til tess at lýsa, um tørvur er á fleiri avmarkingum, men hetta hevði kravt, at alt málið verður serliga kannað, og eisini at vandarnir verða greinaðir.

Sera lítil árstíðarfiskiskapur er á fiskileiðum undir Føroyum. Týdningarmestur er várfiskiskapur eftir toski og upsa við ymiskum reiðskapi og fiskiskapur við flótitroli eftir svartkjafti í mai. Ávirkanin á várfiskiskapin kann skerjast nógv, um seismiskar kanningar verða bannaðar í nánd av gýtingarplássunum í gýtingartíð-

[24] Fiskirannsóknarstovan: Fiskastovnar og umhvørvi 1996, Føroya Skúlabókagrunnur 1996

ini.

Fiskiskapur við flótitroli eftir svartkjafti er á 300-400 m dýpd báðumegin syðsta partin á føroyska landgrunninum í mai, tá ið svartkjafturin er á ferð norðureftir. Svartkjaftur hevur stóran sundmaga og hoyrir tískil betur, og tí má væntast, at seismikkur á hesum leiðum fer at ávirka fiskiskapin nógv.

Um stovnurin av norðhavssild, sum er í vøkstri, fer at taka upp aftur gomlu gongdina frá tíðini 1950-1968 sum væntað, fer annar týðandi árstíðarfiskiskapur at taka seg upp aftur, umframt at gýtingarleið tekur seg upp aftur eystan fyri Føroyar.

Annars verður fiskað um allar føroyskar leiðir alt árið. Hvørjar fiskileiðir, tiknar verða, veldst um fiskaslagið ætlanin er at veiða. Flestu fiskasløgini eru um allar leiðirnar, bara dýpdin avmarkar hvussu víða. Hvør leið, ið tikin verður, er stýrt av ymiskligum táttum sum skipastødd, reiðskapsslag og royndum, ið skipari hevur. Veður og streymur ávirka eisini, hvørjar leiðir, ið valdar verða. Tí er ilt at siga neyvt frammanundan, hvar seismikkur onga ella lítla ávirkan hevur.

Út frá upplýsingum í veiðidagbókum fer at bera til neyvari at spáa um ávirkanina. Hetta fer at krevja, at farið verður undir verkætlan at viðgera upplýsingar til hetta endamál. Ein trupulleiki er, at tøku veiðidagbøkurnar ikki altíð eru nóg eftirfarandi og neyvar, men til ber at bøta um tað.

Samantikið kunnu bara neyvari kanningar (sum tær, ið nevndar eru omanfyri) lýsa viðurskiftini, soleiðis at val av leiðunum í framtíðini verður gjørt á nógv neyvari upplýsingargrundarlagi fiskiskapi viðvíkjandi. Ber ikki til at gera hetta, mugu treytirnar fyri at skjóta seismikk leggja upp fyri við aðalregluni um varsemi og verða strangar.

Tá ið ein tíð væntandi líður, áðrenn nevndu kanningar verða settar í verk, verður skotið upp, at seismiskar kanningar tey næstu árini fylgja reglum, sum eru í gildi. Verða nágreindari seismiskar kanningar havdar í huga, t.d. smámeskaðar 2D og 3D kanningar, verður mælt til, at Oljufyrisitingin ráðførir seg við Fiskirannsóknarstovuna, áðrenn loyvi verða latin.

***Alment um hoyringarmannagongdir***

Í sambandi við útbjóðingarumfar er týdningarmikið at tryggja sær, at leiðir, ið mettar verða serliga viðkvæmar, smbr. frammanundan, annaðhvørt ikki koma undir útbjóðingina ella verða bodnar út við nógvum avmarkingum fyri seismiskt virksemi og boringar. Viðkvæmi kann vera atlit at fiskastovnsvernd ella atlit at nógvum fiskiskapi, sum javnan tekur seg upp, møguliga árstíðarfiskiveiði.

Tí verður mælt til, at Oljufyrisitingin framman undan hvørjari útbjóðing leggur leiðirnar, ætlanin er at bjóða út, fyri fiskiveiðimyndugleikarnar og/ella Fiskirannsóknarstovuna við fyrispurningi um nakrar av ætlaðu leiðunum eru lívfrøðiliga og fiskiveiðiliga so viðkvæmar, at serligar avmarkingar skulu leggjast inn í kanningarvirksemið ella í framleiðsluvirksemi í framtíðini í sambandi við útbjóðing, ella tá loyvi verða givin, ella um viðkvæmið kann vera so fínt, at leiðirnar eiga als ikki at koma undir útbjóðingina.

Við hesi mannagongd verður latið upp í hendurnar á fiskiveiðimyndugleikunum at síggja til, at nóg gott kunnleikagrundarlag er fingið til vega til tess at kunna svara spurningum av hesum slag, herundir at dyggar hoyringar verða gjørdar í fiskivinnuni.

**Leitiskeiðið**

Sum áður nevnt, byrjar leitiskeiðið vanliga við, at seismikkur verður skotin á útlutaðu leiðunum. Hesar kanningar eru nágreindar 2D og 3D kanningar í avmarkaðum økjum. Frammanundan at leitiboring verður sett í gongd, verður harafturat boristaðið kannað, áðrenn boripallurin verður settur. Hetta er eisini seismisk kanning, men munalítil sammett við vanliga seismiska kanning, tá ið røtt verður um styrki, øki, og hvussu leingi hon varar.

Leitiboring verður gjørd við boripallum, ið kunnu flytast. Slíkur pallur leggur hald á eitt øki eftir pallvíddini umframt trygdargeira, ið er 500 metrar. Í trygdarøkinum er alt virksemi og øll sigling bannað. Boripallurin kann vera dynamiskt støðufestur og møguliga eisini liggja fyri akkerum.

Er pallurin dynamiskt støðufestur og liggur ikki fyri akkeri, kann hann flyta seg í ein radius, ið svarar til 5-6% av dýpdini. 500 metra trygdarleiðin verður tí flutt í samsvari við, hvussu pallurin flytir seg.

Tá ið lagt verður fyri akker, verða umframt 500 metra trygdarøkið beinleiðis forðingar við pallakkerunum. Akkerleiðin verður ymisk alt eftir, hvussu dýpið er. Longdin á akkersketunum er vanliga 4-5 ferðir dýpið, har pallurin er lagdur fyri akker. Í akkersøkinum er alt virksemið bannað; kortini er loyvt at sigla tvørtur um akkersleiðirnar.

Hvørjar fylgjur, ið haldið, lagt verður á leiðirnar, fær á fiskiskapin, verður ymiskt alt eftir, hvørjum fiskireiðskapi roynt verður við - virknum, sum nót og troli, ella óvirknum, sum garni og línu.

***Trolfiskiskapur í sambandi við pallgrundir***

At boripallur verður settur á trolleið, fær í flestu førum fylgjur fyri fiskiskapin, men munur verður gjørdur á stødd á leið, og hvussu leiðin er skapað.

Á smáum og meira savnaðum trolleiðum, kunnu í ringasta føri heilar trolleiðir verða mistar ta tíðina, tá ið boripallurin liggur fyri akkeri, tí vanligu tógini ikki kunnu gerast.

Á víðari leiðum verður munur gjørdur á trolleiðum í hellingini, har stórir munir eru á dýpunum, og á flatari økjum, har dýpdarmunirnir eru smáir. Størri møguleikar eru at trola uttan um og rundan um ein boripall við smáum dýpdarmunum enn á leiðum við stórum dýpdarmunum.

Sum heild verða tættar trolleiðir við nógvum fiski at meta sum tær truplastu í sambandi við oljuvirksemi.

***Nótafiskiskapur***

Nótafiskiskapur er ikki knýttur at ávísum fiskileiðum á sama hátt sum botnfiskiskapur, av tí hetta er fiskiskapur, har fiskað verður eftir torvum á víðum havi. Við nótini má verða lagt upp fyri vindi og streymi, tá ið kastað verður. Við einum palli sum forðing verður stundum neyðugt at lata vera við at kasta. Men tá ið torvurnar flyta seg í mun til pallin, fer tað valla at hava tær stóru fylgjurnar.

***Óvirkin reiðskapur***

Tá talan er um standandi reiðskap sum gørn og línu, er økið, tikið verður til oljuvinnu, tað øki, pallurin leggur hald á umframt trygdarleiðirnar.

Fiskivinnumyndugleikar eiga altíð at verða hoyrdir áðrenn pallur verður festur.

**Útbyggingar-**

Hvørjar fylgjur ein útbygging fær fyri fiskiskapin er treytað av tí ætlan, bygt

**og útvinningarskeiðið**

verður eftir, og teimum brúktu tøkniligu loysnunum. Rákið tykist at vera, at undirsjóvarútbúnaður, sum er knýttur at flótandi framleiðslueind ella føstum móðurpalli, fer at verða meira brúktur. Loysnin er somuleiðis bundin at flutningsháttinum, ið brúktur verður - flutningur av leiðini umvegis boyuferming ella gjøgnum rørleiðing.

Økið, sum hald verður lagt á, fer at vaksa í vídd í sjálvum útbyggingarskeiðinum, tá ið vanligt er at hava bráfeingis akkersbann og fiskiveiðibann á ávísum leiðum. Slíkar forboðsleiðir verða av royndum ásettar, tá ið rørleiðingar verða lagdar, og undirsjóvarútbúnaður verður festur.

Við at brúka undirsjóvarútbúnað slepst sum aðalreglu undan trygdargeirum. Ein sannroynd er kortini, at hóast trolað kann verða tvørtur um tílíkan útbúnað, og at honum tí sum aðalreglu ikki tørvar trygdarøki, fara teir flestu at aftra seg við at trola tvørtur um slíka forðing, sum útbúnaðurin má vera. Somuleiðis fara feløgini sum høvuðsreglu at vilja verja útbúnaðin ímóti skaða, av tí at hann er ógvuliga kostnaðarmikil.

Viðvíkjandi rørleiðingum vísa kanningar, at trolað kann verða tvørtur um tær uttan nevniverdar trupulleikar, um trolað verður við vinkli inn ímóti rørleiðingini, sum er 40 stig ella meira. Kanningarnar eru gjørdar á 28, 30 og 40 tumma rørleiðingum, og úrslitini eru eins fyri allar víddir.

Ymisk sløg av skipum leggja rørleiðingarnar, men enn mugu allar rørleiðingar, sum eru 20 tummar ella meira í tvørmáti, leggjast av førum, sum brúka akker til støðufesting og framtak, tá ið rørini verða løgd. Hetta hevur við sær, at akkersgryvjur koma í botnin. Hvussu stórar tær eru, og hvussu long tíð líður, áðrenn tær eru slættaðar aftur, veldst alt um botngrýtið og streymviðurskiftini. Hesar gryvjur kunnu, beint eftir at rørini eru løgd, verða størri vandi fyri at skaða reiðskap.

Ein framleiðslupallur leggur hald á samsvarandi øki sum ein boripallur, kortini við einum eyka økismissi, sum stendst av akkersøkinum.

**Avrigging av kolvetnisvirksemi**

Kolvetnisvirksemið skal í rakstrarskeiðinum svara nógv atlit, m.a. atlit at sigling, fiskiskapi og umhvørvi. Tá ið virksemið steðgar, og støða skal takast til framtíðina hjá frálandsútbúnaðinum, gera somu atlit vart við seg. Í sambandi við avrigging skulu fiskiveiðimyndugleikarnir verða hoyrdir og fáa boð.

Útbúnaður, brúktur í frálandsvirksemi, kann, tá ið liðugt er at brúka hann, annaðhvørt verða burturbeindur heilt ella fyri ein part, ella farið kann verða frá honum. Tá ið farið verður frá honum, kann útbúnaðurin annaðhvørt verða brúktur í kolvetnisvirksemi í grannaøki ella møguliga verða brúktur í øðrum samanhangi. Burturbeining merkir vanliga, at útbúnaðurin verður upphøgdur, søktur ella tílíkt. Nýggjari útbúnaður, sum t.d. bori- og framleiðsluskip, verður nú smíðaður við tí í huga, at hann, tá ið virksemið steðgar á einari leið, kann verða nýttur á øðrum leiðum. At útbúnaður verður tikin úr einum øki fer tí í framtíðini ikki fyri vist at merkja, at beint verður fyri honum.

Í fylgiskjali 5.1-1 verða reglurnar um avrigging í uppkastinum til lóg um kolvetnisvirksemi og reglurnar, sum ásettar eru í fólkarættinum, umrøddar.

## 5.1.4 Samstarv millum myndugleikar, fiskivinnu og oljuídnað

Alment kann sigast, at sambandið millum fiskiskap og oljuídnað er merkt av innbygdum áhugastríði, við tað at tær báðar vinnurnar vilja hava brúksrættin til

somu havleiðir. Umframt er fiskiskapur treytaður av so reinum sjógvi sum gjørligt, meðan ikki slepst undan, at oljuvirksemi letur fremmand evni út í sjógv, sum kunnu hava ringa ávirkan á vistskipanirnar.

Til tess at minka mest møguligt um stríð og møgulig árin á umhvørvið, verður skotið upp, at formligt samstarv verður skipað millum myndugleikarnar, fiskivinnuna og oljuídnaðin t.d. við eini samstarvsnevnd, sum hevur umboð fyri fiskivinnufeløgini, fiskivinnumyndugleikarnar, loyvishavarnar og Oljufyrisitingina.

Farið eigur ikki vera undir nýtt virksemi - forkanningar, lata nýggjar teigar upp, leiting, framleiðslu, at leggja rørleiðingar ella at taka burtur útbúnað - uttan at fiskivinnumyndugleikarnir eru hoyrdir ella hava fingið boð í góðari tíð frammanundan.

Til tess at myndugleikarnir frá byrjan kunnu verða samstarvsfelagar á jøvnum føti og til tess at røkja fiskivinnuáhugamálini so væl sum gjørligt, er neyðugt, at eisini innanhýsis hjá fiskivinnumyndugleikunum eru fólk, sum hava beinleiðis ábyrgd av sambandinum fiskiskapi/oljuvinnu. Fiskivinnufeløgini eiga at vera varug við, at eisini tey hava sín lut í hesum samanhangi og eina ábyrgd at svara fyri.

### 5.1.5 Endurgjald og skaðabøtur

Í 1993-frágreiðingini kapittul 8.4, verður greitt frá teimum endurgjalds- og skaðabótaskipanum, ið galda fyri kolvetnisvirksemi í Danmark, Noregi og Bretlandi. Á næstu síðunum verður greitt frá teirri endurgjalds- og skaðabótaskipan, sum skotið verður upp í kapitli 7 í uppskotinum til løgtingslóg um kolvetnisvirksemi.

Royndir úr nevndu londum hava víst, at vanligar endurgjaldsreglur ikki geva fiskiskapinum nóg góða vernd. Nevndin heldur tað vera rætt, um føroyskir fiskimenn fáa í minsta lagi somu vernd, sum skipanir í øðrum londum veita móti reiðskapsmissi o.ø. og fyri skerdum inntøkumøguleikum orsakað av oljuvirksemi.

Í samsvari við hetta hevur uppskotið *lutvíst* eina vanliga endurgjaldsreglu, har endurgjald fyri gjørdan skaða skal latast sambært veruligum ábyrgdargrundarlagi, *lutvíst* reglur, sum meira bera dám av metingum um skaðabót fyri skaða og miss. Reglurnar, ið bera dám av meting, eru ætlaðar at taka við, tá:

1) *skaði og missur* má haldast at verða elvdur av kolvetnisvirkseminum, uttan at tað ber til at staðfesta, hvør skaðaelvarin er,
2) *hald* heilt ella fyri ein part verður lagt á fiskileið, sum hevur við sær skerdar inntøkumøguleikar hjá fiskimonnum, sum vanliga reka vinnuligan fiskiskap á leiðini.

Niðanfyri verður bæði endurgjaldsreglan og skaðabótareglan umrødd. Til endans verður nevndin, sum væntandi skal umsita skaðabótaskipanina, umrødd. Endurgjalds- og skaðabótareglurnar eru neyvari viðgjørdar í viðmerkingunum til lógaruppskotið (sí 6. part).

***Vanliga endurgjaldsreglan***

Lógaruppskotið hevur í hyggju, at loyvishavarnir, eins og longu er galdandi í forkanningarlógini, eru undir partleysari ábyrgd fyri allan skaða og miss, sum

skyldast olju- og gassvirksemi teirra.

Ábyrgdin, ið er óavmarkað, kann verða sett niður ella falla burtur um tann, ið varð fyri skaða, tilætlað ella av grovum ósketni hevur medvirkað til skaðan. Fyri at krevja endurgjald eftir vanligu endurgjaldsregluni skulu vanligar endurgjaldstreytir verða loknar, herundir at tann, ið hevur verið fyri skaða, kann sanna, at skaðin skyldast skaðaelvaranum. Endurgjald kann verða kravt fyri skaða á fiskiskip, fiskiútbúnað og fyri veiðimiss, um skaðarakti hevur eyðmerkt skaðaelvaran og prógvað, at skaðin stóðst av virksemi smbr. kolvetnisvirksemislógini.

Dálkingarskaði, sum eisini fatar um inntøkumiss, av tí at fiskimøguleikarnir eru skerdir av dálking, kemur undir vanligu endurgjaldsregluna (§ 34). Til dømis kann dálkningarskaði, sum rakar alibrúk, eisini verða kravdur eftir hesi reglu, um dálkingin kann prógvast at stava frá kolvetnisvirksemi sambært lógini. Harafturímóti kemur dálking frá einum tangaskipi ikki inn undir lógina um kolvetnisvirksemi, men má væntast at koma undir vanligu endurgjaldsreglurnar í sjólógini.

***Endurgjald í førum, tá ið skaðaelvari ikki er eyðlýstur***

Royndir frá grannalondum okkara vísa, at burturkast og leivdir frá kolvetnisvirksemi ofta er til ampa fyri fiskiskap, og at ofta er ikki gjørligt at eyðlýsa skaðaelvaran. Hetta er serliga galdandi í førum, tá ið fiskifør fáa lutir, sum stava frá kolvetnisvirksemi í fiskireiðskapin. Í Noregi eru tí gjørdar merkingarreglur við kravi um, at allir stórir lutir verða merktir, áðrenn teir verða fluttir frá landi. Henda aðalregla verður gjølligari umrødd í kapitli 5.2 *Umhvørvi*.

Tá ið skaðaelvarin ikki er kendur, hava vanligar endurgjaldsreglur við sær, at ábyrgdin ikki kann gerast galdandi. Tí er í lógaruppskotinum skotið upp, at loyvishavar sambært kolvetnisvirksemislógini ábyrgjast í felag um at veita skaðabót fyri skaða á fiskireiðskap, fiskiskip og fiskifør umframt fyri mista veiði og veiðitíð, um hildið verður, at skaðin ella missurin stava frá kolvetnisvirksemi. Royndir úr grannalondum okkara vísa, at vanliga - stundum við serfrøðingahjálp - ber til at vísa á, um lutur stavar frá kolvetnisvirksemi.

Lógarteksturin letur upp fyri, at loyvishavarnir á sama hátt sum í okkara grannalondum seta á stovn ein grunn at taka sær av umrøddu skaðabótum.

***Endurgjald fyri skerdar inntøkumøguleikar***

Rætturin hjá fiskimonnum at fiska á ávísum leiðum er valla soleiðis, at vanligar endurgjaldsreglur føra til endurgjald, um teir verða riknir burtur. Ávísar fyriskipanir í sambandi við kolvetnisvirksemið, t.d. útbygging av eini leið, har framleiðslueindir verða lagdar í longri tíð, kann hava við sær bæði fyribils og meira varandi trupulleikar og vansar fyri tann fiskiskap, sum vanliga er á leiðini.

Tí verður í lógaruppskotinum hildið skynsamt at skjóta upp, at í sambandi við góðkenningar til útbygging av eini leið, rørlegging og avrigging, verður tikin støða til spurningin um skaðabót frá loyvishavum til teir fiskimenn, sum verða raktir av hesum tiltøkum. Landsstýrið kann *annaðhvørt* sjálvt taka avgerð um skaðabøtur, tá ið umsóknir um loyvi til omanfyrinevndu tiltøk eru til viðgerðar, *ella* beina spurningin til avgerðar í serligari skaðabótarnevnd.

Ein fortreyt fyri at fáa skaðabót er, at tiltøkini fara at tarna ella darva vanliga fiskiskapinum á leiðini og hava skerdar inntøkumøguleikar hjá fiskimanninum við sær.

Tað er tann ella teir raktu fiskimenninir, sum skulu sanna, at treytirnar fyri at

fáa skaðabótarendurgjald eru loknar. Eftir lógaruppskotinum skal loyvishavin, sum hevur staðið fyri tí tiltaki, sum er til ampa fyri fiskiskap, rinda skaðabøturnar fyri skerdu inntøkumøguleikarnar.

At byggja eina leið út krevur landsstýrisgóðkenning, og fyri at fáa hana skal felagið lata Landsstýrinum byggiætlan. Ætlanin skal m.a. taka støðu til, hvussu felagið tryggjar, at virksemið ikki elvir óneyðugan vanda ella óneyðuga forðar fiskiskapi. Á tann hátt verður felagið noytt at taka støðu til fiskiskapin á leiðini. Eisini er hugsandi, at Landsstýrið av egnum ávum setur í verk kanningar, m.a. um hvørjar avleiðingarnar eru fyri fiskiskapin, áðrenn ein leið verður latin upp fyri kolvetnisvirksemi. Eftir lógaruppskotinum er harafturat møguligt, at Landsstýrið krevur, at umsóknir um útbygging av leiðum, rørlegging og avrigging hava serstaka meting av umhvørvisligu avleiðingunum, um hildið verður, at tiltøkini ávirka umhvørvið nógv.

***Skaðabótarnevndin***

Um tann, ið hevur verið fyri skaða, og skaðaelvarin ikki kunnu semjast, verður málið væntandi viðgjørt við vanligu dómstólarnar.

Gingið verður út frá, at skipanin við skaðabótum verður umsitin av einari nevnd, ið verður sett sambært lógini og við umboðum frá fiskivinnufeløgunum og loyvishavunum. Hesi umboðini velja í felag nevndarformannin.

Samanborið við Danmark og Noreg er hetta einfaldari skipan, tí bara *ein* endurgjaldsnevnd skal stovnast til at viðgera bæði málssløg. Sum nevnt omanfyri ber kortini til, tá ið hald verður lagt á fiskileið, at *Landsstýrið* avger spurningin um skaðabót.

Landsstýrið kann eftir uppskotinum gera neyvari reglur um málsviðgerð í skaðabótarnevndini. Hugsað verður serliga um reglur um rættargongd, t.d. freistir fyri skaðafráboðan í førum, tá ið skaðaelvari ikki er eyðnevndur.

Sambært uppskotinum til løgtingslóg um kolvetnisvirksemi skal loyvishavin rinda útreiðslurnar, sum standast av arbeiðnum hjá skaðabótarnevndini.

### 5.1.6 Kapping um arbeiðsmegi ímillum fiskiskap/fiskiídnað og oljuídnað

Í brotinum 4.1.2 um tøka føroyska arbeiðsmegi varð víst á, at tann serkunnleiki, sum bygdur er upp innan fyri fiskiskap, í givnum føri eisini kann brúkast í eini møguligari komandi oljuvinnu. Í hesum møguleika fyri øktum arbeiði liggur ein hóttan ímóti fiskiskapinum, tí talað kann verða um kapping um arbeiðsmegina - serliga í yrkisbólkum, har arbeiðsmegi longu frammanundan vantar, t.d. maskinmeistarar.

Av tí at bæði oljuvirksemi á landi og serliga frálandsoljuvirksemi vanliga lata bestu lønina, má haldast, at fiskiskapurin og fiskivinnan fáa stóra kapping um arbeiðsmegina, verður oljuídnaður av týdningi í Føroyum. Ávirkanin verður helst minni, hvat fiskatilvirking viðvíkur av tí, at ávíst arbeiðsloysi er millum óyrkislærd, og ov nógv arbeiðsmegi er á nógvum økjum, men arbeiðsloysið hevur í seinastuni verið fallandi, og um størri virksemi verður, kann arbeiðsmegi fara at vanta.

### 5.1.7 Samandráttur og tilmæli

Av tí ráðandi støðu fiskiskapur og fiskivinna hava í føroyska samfelagnum, er ein av teimum týdningarmestu táttunum at leggja oljupolitikk soleiðis til rættis, at fiskiskapur og oljuídnaður kunnu virka saman ella lið um lið við minst møguligum ampa fyri fiskiskapin.

Royndir úr øðrum londum siga, at ikki slepst undan, at møguligur komandi oljuídnaður - og fyri tann skyld eisini forkanningarvirksemið, sum longu er í gongd - fara at fáa avleiðingar fyri fiskiskapin undir Føroyum.

Afturímóti vísa royndir úr hinum londunum, at til ber at minka nógv um hesar avleiðingar við hóskiligum tiltøkum, bæði til tess at sleppa undan skaðaávirkan, men eisini tá ið skaðin er hendur, at skipa lóggávuna á økinum soleiðis, at møguleiki er at veita endurgjald fyri gjørdan skaða og mista inntøku. Í hesum sambandi kann verða víst á, at í Føroyum er ikki ókent at minka sum mest um tann skaða, sum ymiskur fiskireiðskapur ger á annan reiðskap, og í førda seismikkpolitikkinum hevur verið roynt at minka um vanda fyri stríði millum fiskiskap og seismiskt virksemi.

Til tess at tryggja at fiskiskapur undir Føroyum eisini í framtíðini kann verða rikin undir tryggum umstøðum og minst møguliga ampaður, fer nevndin at seta fram hesi uppskot:

- Fiskivinnuspurningar verða so tíðliga sum tilber tiknir við í oljuráðleggingina.
- Kannað verður, um tørvur er á fleiri avmarkingum, tá ið øki verða sett av til oljuídnaðin.
- Undan hvørjum útbjóðingarumfari leggur Oljufyrisitingin tey øki, ið ætlanin er at bjóða út, fyri fiskivinnumyndugleikarnar og aðrar viðkomandi myndugleikar til tess at fáa at vita, hvørt og í hvønn mun økini eru viðkvom, tá umræður lívfrøði ella fiskiveiði.
- Fiskivinnumyndugleikarnir síggja til at hava útbúgvið starvsfólk, ið kunnu røkja áhugamálini hjá fiskivinnuni mótvegis oljuídnaðinum.
- Eisini áhugafeløgini í fiskivinnuni eiga at búgva seg til á hesum øki.
- Samstarvsnevnd verður sett við umboðum frá fiskivinnufeløgunum, fiskivinnumyndugleikunum, loyvishavunum og Oljufyrisitingini.
- Skotnar verða upp endurgjaldsreglur, smbr. kapittul 7 í uppskotinum til løgtingslóg um kolvetnisvirksemi.
- Havstøðir eiga at verða soleiðis gjørdar, at myndugleikarnir veruliga hava nakað í at velja, tá ið talan verður um at beina tær burtur, lata tær standa, søkkja tær ella føra tær til lands, tá ið støðirnar ikki verða brúktar longur.

# Fylgiskjal 5.1-1

## 1 Reglur um avrigging í lógaruppskotinum um kolvetnisvirksemi

Uppskotið til lóg um kolvetnisvirksemi viðger spurningin um avrigging av kolvetnisvirkseminum í §§ 20 og 21. Loyvishavar verða kortini eggjaðir til longu, tá ið leiðbyggingarætlanirnar eru fyri, at taka støðu til, hvørji fyrivarni takast skulu um útbúnað, tá ið virksemið heldur uppat. Endamálið við hesum er ikki, meðan bygt verður, at gera av, hvussu avriggingin skal fremjast, men bara at síggja til at loyvishavi í sambandi við leiðbygging hugsar um, hvørjir avrigging-armøguleikar kundu verið brúktir, tá útbúnaðurin ikki longur verður brúktur. Loyvishavin skal í leiðbyggiætlanini í minsta lagi lýsa, um hildið verður gjørligt at beina útbúnaðin burtur ella ei.

Avriggingarreglurnar siga eins lítið og leiðbyggireglurnar um, hvør tøknilig loysn skal verða brúkt. Reglan í § 20 nevnir nakrar ræðismøguleikar og vísir á mannagongdirnar, hvussu avgerð um avrigging verður tikin, meðan reglan í § 21 bara er um landsins rætt til í summum støðum kostnaðarleyst at taka yvir útbúnað (hjemfaldsret).

Ræðismøguleikarnir eru sambært uppskotinum framhaldandi brúk sum liður í kolvetnisvirksemi eftir lógini, brúk við aðrari ætlan ella burturbeining heilt ella fyri ein part. Lógaruppskotið er kortini búgvið á tann hátt, at ræðismøguleikarnir skulu metast við atliti at galdandi altjóða normum. Lógaruppskotið er í ávísan mun framtíðartryggjað, soleiðis at ein broyting í fólkarættinum má væntast at verða gingin á møti innan fyri karmarnar í § 20. Í broti 2 niðanfyri er stutt yvirlit yvir galdandi fólkarættin á hesum øki.

Umframt reglurnar í lógini um kolvetnisvirksemi við tilvísing til altjóða normar eigur spurningurin um avrigging natúrliga eisini at verða avgjørdur í samsvari við aðra føroyska lóggávu, herundir serliga reglurnar í havumhvørvislógini.

Fyri gjølligari at fara ígjøgnum mannagongdirnar í sambandi við avgerð um avrigging verður víst til lógarviðmerkingarnar til § 20. Her er nóg mikið at stað-festa, at avrigging skal fremjast samsvarandi avriggingarætlan, sum loyvishavin hevur gjørt, og sum Landsstýrið hevur góðkent. Tá ið avriggingarætlanin verður løgd fyri Landsstýrið til góðkenningar, skal hon m.a. hava nøktandi upplýsingar um viðurskifti viðvíkjandi umhvørvi, fiskiskapi og sigling og uppskot um, hvat ið endaliga skal verða gjørt við útbúnaðin.

## 2 Fólkarættarinnar reglur um avrigging

### 2.1 Landgrunssáttmálin frá 1958

Geneve-sáttmálin um landgrunnin, sum Danmark hevur góðkent uttan fyrivarni fyri Føroyar, hevur í grein 5.5 eina reglu um, at frálandsútbúnaður skal beinast fullkomiliga burtur, tá ið virksemið er steðgað.

Burturbeiningarkravið er grundað á atlitið at fríari ferðslu á sjónum og aðrari lógligari nýtslu av havinum. Rørleiðingar verða ikki hildnar at forða fríari ferðslu ella á annan hátt forða fyri aðrari nýtslu av havinum og koma tí ikki undir skil-

markingina, sáttmálin hevur av útbúnaði, og tí falla tær uttan fyri kravið um burturbeining.

Landgrunssáttmálin varð til í eini tíð, tá ið kolvetnisvirksemi á sjónum var á sínum fyrsta stigi. Talan varð ikki um stór dýpi, og útbúnaðurin var lutfalsliga léttur at beina burtur.

Nú er alment góðtikið í altjóða samanhangi, at landgrunssáttmálin má verða tulkaður soleiðis, at kravt verður bara, at beint verður burtur, um hetta er neyðugt til tess at tryggja fría ferðslu og aðra nýtslu av havinum. Strandalond eru tí valla longur bundin av at beina burtur allan útbúnað, sum ikki longur verða brúktur.

## 2.2 Havrættarsáttmálin frá 1982

Havrættarsáttmálin frá 1982, sum kom í gildi tann 16. november 1994, men sum Danmark ikki enn hevur góðkent, avmyndar í ávísan mun ta menning, sum frálandsvirksemið hevur verið í við at gagnnýta kolvetniskeldur á støðugt størri dýpum. Grein 60.3 í sáttmálanum slakar soleiðis tað algilda burturbeiningar-kravið í Geneve-sáttmálanum og letur upp fyri, at farast kann frá útbúnaði, eftir at virksemið er endaliga steðgað. Greinin krevur harumframt, at upplýst verður um havdýpi, positión og støðd á øllum útbúnaði, sum ikki verður burturbeindur fullkomiliga. Havrættarsáttmálin letur ikki bara upp fyri øðrum ræðismøguleikum enn at beina burtur fult og heilt, men eggjar samstundis avvarðandi altjóða felagsskapum at orða neyvari reglur, smbr. 2.3.

## 2.3 IMO-leiðreglur

Sjóferðslusamskipanin undir ST, International Maritime Organisation, er stovnurin, sum eftir grein 60.3 í havrættarsáttmálanum, hevur myndugleikan. IMO góðtók í samtykt frá 19. oktober 1989 leiðreglur fyri at beina burtur havstøðir og annan útbúnað á landgrunninum. Samtyktin er formliga sæð ikki fólkarættarliga bindandi, men er alment góðtikin av flestu strandlondum, sum reka kolvetnisvirksemi á landgrunninum.

IMO-leiðreglurnar hava við sær, at útbúnaður, sum settur er grynri enn á 75 metra dýpi, og sum hevur undirbygnaðarvekt, ið er undir 4.000 tons, sum høvuðs-reglu skal beinast heilt burtur. Fyri frálandsútbúnað, sum verður settur upp eftir 1. januar 1998, er dýpdarkravið 100 metrar, og vektkravið er tað sama. Útbúnaður, sum er settur í økjum við størri dýpi, og sum hevur størri bygnaðarvekt, verður bara loyvt at rýma frá heilt ella lutvíst, um hetta ikki hevur við sær óneyðugar forðingar fyri aðrari nýtslu av havinum. Leiðreglurnar vísa í hesum sambandi á nakrar metingartættir, sum soleiðis eru karmarnir um heimildina hjá strandalondum. Tá ið mett verður um, hvørt útbúnaður kann verða standandi heilt ella fyri ein part, verður atlit havt at trygdini til sjós; til aðrar havsins brúkarar; ávirkan á havumhvørvið og livandi tilfeingið í havinum; kostnað og trygdarvanda um beint verður burtur; møguleikar fyri øðrum brúki og møguliga aðrar rímiligar orsakir til, at júst hesin útbúnaðurin eigur at verða standandi.

Sama hvat havdýpið er, ella hvussu tungur útbúnaðurin er, kunnu verða gjørd undantøk frá aðalregluni, um burturbeining ikki ber til, kostar óvanliga nógv ella ber við sær munandi vanda fyri starvsfólk og havumhvørvi.

Um strandalandið ger av, at útbúnaður fyri ein part skal beinast burtur, so at

tann útbúnaðurin, sum stendur eftir, ikki kemur undan, skulu í minsta lagi vera 55 metrar niður til teir partarnar, ið eftir standa. Um útbúnaðurin verður frágingin soleiðis, at hann kemur uppundan, skal hann verða hildin við líka, so hann ikki ferst. Harumframt skal útbúnaðurin verða væl og virðiliga avmerktur.

Leiðreglurnar siga harumframt, at allur útbúnaður, sum verður settur upp eftir 1. januar 1998, tøkniliga skal kunna beinast burtur, men reglurnar siga ikki, at hann skal beinast burtur.

## 2.4 Aðrar altjóða reglur

London-sáttmálin (Convention on the Prevention of Marine Pollution by Dumping of Wastes and other Matters) og Oslo-sáttmálin (Convention on the Prevention of Marine Pollution by Dumping from Ships and Aircraft), sum báðir eru frá 1972, vórðu við tveimum kunngerðum frá 26. november 1976 víðkaðir til eisini at galda fyri Føroyar. Danmark hevði annars í góðkenningini frá ávikavist 23. oktober 1974 og 28. juli 1972 tikið fyrivarni fyri Føroyum. London-sáttmálin er heimsumfatandi, Oslo-sáttmálin fatar landafrøðiliga um landnyrðingspartin av Atlantshavinum, og luttakandi londini eru Belgia, Danmark, Finnland, Frakland, Ísland, Háland, Portugal, Spania, Bretland og Týskland.

London-sáttmálin stýrir m.a. tí at søkkja (dumpa) frálandsútbúnað. Søkking kann bara fara fram sambært loyvi, ið frammanundan er givið frá strandalandi. Í fylgiskjali til sáttmálan verða skrásett evni, sum ikki eru loyvd at lata út í sjógv, sum bara kunnu latast útí sambært serligum loyvi, ella sum kunnu verða søkt eftir einum algildum undanloyvi. Um evni, sum bannað eru at sleppa á sjógv, eru á frálandsútbúnaði, má verða beint fyri teimum, áðrenn útbúnaðurin verður søktur.

Útbúnaður, ið verður standandi eftir, at liðugt er at brúka hann, og har endamálið tískil bara er at geva upp útbúnaðin, kemur inn undir søkkingar-reglurnar í London-sáttmálanum. At fara frá útbúnaði sambært IMO-leiðreglunum, har viðlíkahald og avmerkingar er tryggjað, fellur harafturímóti uttan fyri søkkingar-reglurnar í London-sáttmálanum

Oslo-sáttmálin fatar um at søkkja frálandsútbúnað við ella av skipum. Heldur ikki hesin sáttmáli setur nakað avgjørt forboð ímóti at søkkja frálandsútbúnað, men sigur, at eingir lutir kunnu søkkjast uttan loyvi frá strandalandinum. Ávísir stórir lutir, m.a. havstøðir, kunnu harumframt bara verða søktar á djúpari vatni enn 2.000 metrum og minst 150 fjórðingar úr landi. Í 1990 vórðu leiðreglur til Oslo-sáttmálan samtyktar, sum m.a. seta upp, hvørjir tættir skulu telja við, tá ið loyvi verður givið at søkkja frálandsútbúnað. Einstøk lond, ið útvinna kolvetni á landgrunninum, hava tikið fyrivarni við hesum leiðreglum.

Oslo-sáttmálin er nú lagdur saman við París-sáttmálanum um havdálking frá landi, sum Danmark góðkendi í 1975 uttan fyrivarni fyri Føroyar. París-sáttmálin fataði frammanundan um somu landaøki sum Oslo-sáttmálin. Nýggi samanlagdi sáttmálin hevur fingið heitið *Sáttmálin um vernd av havumhvørvinum í landnyrðingspartinum av Atlantshavinum*, men verður ofta nevndur OSPAR-sáttmálin. Í samband við undirskrivingina tók Danmark fyrivarni fyri Føroyum og Grønlandi.

Sáttmálin um vernd av havumhvørvinum í landnyrðingspartinum av Atlantshavinum er settur saman av einum rammusáttmála við ískoytum, sum hava neyvari reglur um m.a. dálking frá kolvetnisvirkseminum. Í frálandsískoytinum eru reglur um, hvørjir ræðismøguleikar eru fyri frálandsútbúnaði, ið ikki longur verða

brúktar. Um útbúnaður verður søktur ella givin upp, og um rørleiðingar verða søktar, krevst sambært reglunum loyvi, sum verður latið í hvørjum einstøkum føri. Herumframt verður víst á, hvussu meira útgreinaðar leiðreglur og reglur kunnu skipast.

Tá ið sáttmálin um vernd av havumhvørvinum í landnyrðingspartinum av Norðuraltantshavinum í 1992 varð undirskrivaður, varð í Ráðharrafráboðanini, sum er ein politisk yvirlýsing og ikki bindir limaríkini formliga, sett upp eitt mál við atliti at framtíðar frálandsútbúnað. Her verður m.a. nevnt, at útbúnaður, sum verður settur upp eftir 1. januar 1998, eigur at verða bygdur soleiðis, at myndugleikarnir veruliga kunnu gera av um útbúnaðurin, eftir at virksemið er steðgað, kann verða burturbeindur, søktur ella sleipaður til lands.

## 5.2 UMHVØRVIFejl! Bogmærke er ikke defineret.

Føroyar liggja mitt í stórhavi og hava verið mettar sum eitt øki, sum flyta kann út vøru úr einum tí reinasta sjógvi í heiminum. Hetta hevur verið og fer eisini at vera ein dygg sølupróvgrund, tá ið hugsað verður um fiskivinnu og alivinnu, væl at merkja um tað fer at eydnast at halda ávirkan av mannaávum á líka lágum stigi sum higartil.

Tí hevur havumhvørvið og tess varðveitan avgerandi týdning.

Í hesum kapitli verður fyrst í stuttum greitt frá føroyskum havumhvørvi í síni heild. Síðani verður greinað út, hvussu olja og oljuvinna ávirka umhvørvið alment. Harnæst verður sett upp eitt yvirlit yvir tað, ið umhvørvisfylgjumetingar rúma. Yvirlitið sýnir hvørji viðurskifti oljufeløgini taka við, tá ið tey viðgera umhvørvis-avleiðingarnar av einstøku tiltøkunum.

Í oljuvirksemi er stór og fløkjalig tøknifrøði, sum í ávísum førum kann roynast hóttan móti umhvørvinum. Sum sæst av tí, sum verður ført fram niðanfyri, eru hótt-anirnar umframt í oljuni sjálvari eisini í mongu viðgerðunum, háttaløgunum og úr-dráttunum, sum nýttir verða í sambandi við olju- og gassútvinning.

Hetta merkir, at umhvørvisvernd í sambandi við kolvetnisvinnu verður stýrd við víðfevndum kervi av lógum, kunngerðum, reglugerðum og fyriskipanum, sum um-framt at fevna um oljulóggávu og umhvørvisverndarlóggávu eisini fevna um trygd-aratgerðir móti, at skaðilig evni leka út í náttúruna, um ta tilbúgving, sum fáast skal í lag at sleppa undan ella at tálma skaðiligari ávirkan, og at enda um reglur sum stað-festa, hvør ið hevur høvuðsábyrgd, um illa vil til.

Tí eru áneyðir í einum samanhangandi lógarkarmi at tryggja havumhvørvið í sambandi við oljuvinnu, og á at skipa munadygga og samantengda umsiting at tryggja útinnan og eftirlit. Oljuráðleggingarnevndin hevur tí gjørt av at viðgera hetta økið fyri seg í seinasta broti (brot 5.2.5). Í hinum brotunum verður í støðum víst til hetta.

### 5.2.1 Havumhvørvið við og um Føroyar

Alt frá tí oljuídnaður tók seg upp, hevur hann verið mettur sum dálkingarkelda, og tað er tí natúrligt, at føroyingar óttast, at oljuvinna við Føroyar kann skaða fiskiskap og fiskasølu, sum fevna um meira enn 90% av útflutninginum.

Nýliga er komin ein frágreiðing, "Faroe Islands. An Environmental Statement", sum Environment and Resource Technology hevur skrivað fyri AMG-bólkin (Atlantic Margin Group). Frágreiðingin byggir á samrøður og fakligar, enn ikki prentaðar, upplýsingar frá viðkomandi føroyskum stovnum.

Í hesum parti verður tí bara lagt fram stutt yvirlit viðvíkjandi føroyska havum-hvørvinum. Verður hugsað um smálutir, verður víst til AMG-frágreiðingina, sum tó ikki er eftirfarandi í øllum lutum.

Føroyar eru evnaðar til úr basaltfláum, sum fyri tað mesta hella í landsynning. Sum máað er burtur av landinum, hevur strandalinjan fingið ymiskt skap.

Vestanfyri og norðanfyri hevur havið máað inn í hallið, so har er loddrætt berg upp í einar 700 metrar til hæddar. Eystanfyri máar havið móti hallinum, tí verða strendurnar lægri her, neskendar við lágum klettum og nasum niður móti sjónum.

Ísur, vindur og veður hava myndað dalar, sum vestan- og norðanfyri mest eru

hvammar. Sunnan- og eystanfyri eru myndað sund og firðir, sum innast oftast eru sandstrond/mórubotnur.

Hóast lítil munur er á flóð og fjøru við Føroyar (fyri tað mesta undir ein metur), er streymurin harður í sundunum og inni við land.

Longri útiá rekur ikki so hart, men streymurin er sera fjølbroyttur.

Ofta eru ódnarstormar, serliga um veturin.

Fleiri av fiskastovnunum eru støðufastir; teir gýta á landgrunninum og vaksa upp á grunnum vatni inni við land. Umframt tað ganga torvur av uppsjóvarfiskasløgum gjøgnum føroyskt havøki. Á firðum og í sundum eru løgd alibrúk serliga við laksi, og henda vinna er í støðugum vøkstri. Umframt tað veksur ungfiskur av ymsum slag upp inni við land.

Meiri verður sagt um hetta í kapitlinum 5.1 *Fiskivinna og aling.*

Staðbundin láturkópastovnur heldur til um oyggjarnar, men ilt er at meta um, hvussu stórur stovnurin er.

Serliga í bjørgunum heldur svartfuglur til í meingi, ið hevur altjóða týdning. Hesir fuglastovnar eru ikki friðaðir eftir altjóða sáttmálum ella serligari føroyskari lóggávu, men viðurskifti teimum viðvíkjandi liggja undir veiðilógini og fyriskipanum um fuglaveiðu. Harumframt eru øki undir fuglabjørgum byrsufriðað.

Svartfuglur ferðast ofta langt til havs í klekingartíðini at leita sær føði, og tá ið klekingartíðin er av, flýgur serliga lomviga-, álku- og lundastovnurin yvir opið hav um oyggjarnar og um Atlantshavið alt.

## 5.2.2 Oljudálking

"Frágreiðingin frá Oljuráðleggingarnevnd Landsstýrisins", 1993, viðgjørdi partvíst umhvørvisávirkan, sum oljuleki kann verða atvold til (2. partur, 9. kap.).

Umhvørvisavleiðingar av oljuvinnu í ávísum øki eru tengdar at, hvussu slík vinna verður rikin og umsitin.

Grannalond okkara og oljuídnaðurin sum heild hava tikið stór tøk at byrgja fyri oljulekum, og tey hava lagt sær nær at vera før fyri at minka sum mest um skaða, sum kundi verið, hendi eitt óhapp. Umframt tað má sigast, at tá ið hugsað verður um tær risastóru oljunøgdir, sum verða pumpaðar upp og fluttar um heimin allan, so eru lekarnir vorðnir nógv færri, sum árini eru liðin, ikki minst av tí at altjóða sáttmálar og felagsskapir sum t.d. IMO (International Maritime Organisation) hava sett so strong krøv. Í hesum sambandi er vert at hugsa um, at enn verður nógv fiskað í Norðsjónum, hóast oljuútbúnaðirnir har eru um 200 í tali.

Samstundis hevur greinilig gransking av umhvørvisavleiðingum av oljuleka á havi og við strendur staðfest, at oljuleki hevur ikki so altoyðileggjandi avleiðingar, sum higartil hevur verið hildið.

Tað er týdningarmikið at gera sær greitt, at olja, sum útvunnin verður, tá ið borað verður, er lívrunnið evni, myndað av livandi verum, sum hava ligið í jarðløgum og ikki eru farnar aftur í umferð í lívfrøðiliga umhvørvinum. Sæð burtur frá at svávulmongdin, nøgdin av køvievni og einstøkum øðrum evnum kann vera hægri enn í livandi verum, so eru eingi verulig eiturevni í olju, uttan so at nøgdirnar verða stórar, ella at alisligar/evnafrøðiligar gerðir fara fram. Av teimum kunnu tær súrevnaðu skapa sambond, sum valda størri skaða enn tær, sum ikki eru súrevnaðar.

Bakteriur, sum bróta niður olju, eru at kalla allastaðni, og tær verða í løtuni gjølla kannaðar. Virkið hjá hesum bakterium er treytað av flatuni, tær kunnu virka inná.

**Oljulekar á opnum havi**

Tá ið hugsað verður um oljulekar á opnum havi, so viðgjørdi 1993-frágreiðingin avleiðingarnar av slíkum rættiliga gjølliga.

Vanligt er at síggja olju á opnum havi. Hóast tað sambært altjóða sáttmálum er bannað, verða oljutangar reinsaðir í rúmum sjógvi. Slíkir lekar verða sjáldan staðfestir og fráboðaðir. Umframt tað seyrar natúrliga olja úr havbotninum upp í vatnskorpuna, men hetta eru smáar nøgdir.

Oljulekar leggjast í flestu førum sum tunn skón á vatnskorpuna. Í øðrum førum mylkist oljan í sjógv úr vatnskorpuni og nakað niður. Í fyrra førinum verður dálkingin serliga sjófuglum fyri, sum seta seg í dálkaðan sjógv. Fjaðrarnar klistra saman, vætan setur at holdinum, og fuglurin kólnar. Slík dálking er sera eyðsýnilig, tí fuglar, deyðir ella hálvdeyðir, reka upp á land. Nógv er gjøgnum árini gjørt við at reinsa fjøðurhamin á fugli og at sleppa teimum aftur. Men nýggjastu frágreiðingarnar frá fugla- og umhvørvisverndarfeløgum benda á, at almannastøðan hjá fuglunum í fleiri førum verður ávirkað so nógv, at hamurin oyðilegst so illa, at teir doyggja, hóast fjøðurhamurin er reinsaður. Mangt bendir tískil á, at slíkar bjargingarroyndir verða sleptar.

Serfrøðingar eru nú á døgum at kalla samdir um, at oljulekar hava avmarkaða ávirkan á fiskastovnarnar. Oljubitlar kunnu vera sum heilt smáir dropar (emulsion) ovast uppi í sjónum, smbr. mynd 5.2-2 í fylgiskjalinum 5.2-1, og av tí at rognkorn og fiskamurtar, sum eru upp í o.u. 20 mm til longdar, eru viðbrekin, kann hetta ávirka tey. Men sjóøkið er vítt, og oljulekin oftast lítil í samanburði við, og alla tíðina blandast oljan við sjógv, so roknað verður við, at møguliga økingin av deyðatalinum, sum spyrst burturúr, bara er ein lítil brotpartur av natúrliga deyðatalinum fyri stovnarnar, sum í nógv størri mun er knýtt at havfrøðiligum viðurskiftum so sum streymi, hitalagi og føðslumeingi.

Hesi viðurskifti eru tó heldur fløkjalig við Føroyar, av tí at sólarrangt streymrák er um oyggjarnar og á bankunum, soleiðis at møgulig dálking kann standa við í hesum streymkervinum í longri tíð, uttan so at hon verður brotin niður, sum tíðin líður. Óvissan um hesi viðurskifti hevur elvt fiskivinnumyndugleikum at mæla til, at gjølligari kanningar verða gjørdar.

Í ávísan mun er eisini vandi fyri, at fiskur verður dálkaður á tann hátt, at hann etur æti, sum hevur fingið olju í seg, soleiðis at oljuavleiðslan heldur á gjøgnum føðiketuna, og tað fer at ganga atsmakkur at fiskinum. Royndir hava tó víst, at fiskur sum frá líður evnar at skilja út slíka oljuavleiðslu, vanliga eftir tveimum-trimum vikum.

**Olja, ið rekur upp á land**

Heilt øðrvísi er við oljulekum, ið reka inn ímóti landi. Her eru avleiðingarnar sjónligar, og fjølmiðlarnir gáa væl um tær.

Avleiðingarnar eru ójavnar, alt eftir oljunøgd, hvussu strondin er skapað, hvussu streymviðurskiftini eru og ikki at gloyma, hvussu statt er við flóð og fjøru. Er talan um forberg, sum eru steyrrøtt, har ið munur á flóð og fjøru sæst, fær oljan ikki lagt seg og verður tí ei heldur liggjandi. Alisliga ávirkanin av streymi og serliga uppgangi hevur her stóran týdning, tí bæði streymur og brim skola oljuna burtur aftur. Vanlukkan við skipinum "Exon Valdez" er dømi um avleiðingar á meira vardari strond, soleiðis sum greitt verður frá seinni í hesum parti. Á strondum, har tað ikki er ábart, legst olja ofta sum ein skón, sum tó skjótt verður fyri ágangi og brotin niður, av tí at fløtan er so víð. Taravøkstur kann verða skaddur, liggur slík skón ov

leingi á plantunum, og ymiskt er frá plantuslagi til plantuslag og frá dýri til dýr, hvussu tey evna at verja seg fyri slíkari ávirkan.

Har ið sandur og/ella móra eru, t.d. innast á firðunum, kunnu avleiðingarnar verða øðrvísi. Her kann tað henda, at oljan verður blandað upp í hetta legugrýtið, og tá kann hon klumpast saman, so at niðurbrótingartíðin gerst longri. Í øðrum londum hevur tað verið so, tá ið olja er rikin á land, at størstan ans hevur tað vakt, at frítíðarøki so sum baðistrendur eru dálkað, soleiðis at tey, sum farin eru útí, hava gingið og vassað í tjørukendari olju. Tað hevur eisini vakt ans, at oyrur, har fuglur í meingi heldur til og leitar sær føði, hava verið dálkaðar. Her noyddust fuglarnir at rýma undan føðslutroti, tí at oljan hevði beint fyri tí, teir liva av.

Slík støð eru fá í Føroyum, og umframt tað røkka tey stutt í vídd.

Í sambandi við oljuvanlukkur upp gjøgnum tíðirnar, har nógv olja er likin á sjógv og skolað upp á land, er staðfest, at tað kann taka ár, áðrenn strendur og havsíða eru komin fyri seg aftur - men ikki tíggjutals ár, sum fólk hava stúrt fyri. Hetta kemst av bakteriunum, ið bróta niður olju, og sum áður eru umrøddar. Dúgliga verður granskað, hvussu vánirnar eru beinleiðis at basa oljudálking við at ala hesar bakteriur. Samstundis eru í fleiri førum - og við góðum úrsliti - gjørdar royndir at spræna køvievni og fosfor - tøð, kunnu vit rópa tað - á oljudálkað øki. Tá evna bakteriur, ið har halda til náturliga, uppaftur betur at bróta oljuleivdir niður.

Strandarudding verður gjørd sambært fyriskipanum, sum havumhvørvislóggávan ásetur, sí brot 5.2.5.

*Hóast her ikki verður gjørt so ovurhonds ógvisliga av, tá ið mett verður um vanlukkukendu avleiðingarnar av oljudálking, so merkir hetta á ongan hátt, at tað er ráðiligt at skerja krøvini til trygdaratgerðir og eftirlit við, at krøvini verða hildin. Til tess er - serliga Føroyum viðvíkjandi - knýttur alt ov stórur fíggjaráhugi, serliga í fiskivinnuni, við tað at føroyskur fiskur verður marknaðarførdur sum úrdráttur úr heimsins reinasta sjóøki. Tað er eisini møguleiki fyri, at siðbundna fuglaveiðan kann ávirkast, av tí at svartfuglur er viðbrekin, kemur hann at olju á sjónum.*

**Dømi um avleiðingar av tveimum vanlukkum**

Í fyrru frágreiðingini til Landsstýrið og omanfyri eru drignir fram teir skaðar, sum olja kann hava á umhvørvið. Her verður sagt frá tveimum ítøkiligum dømum úr nýggjari tíð.

Í mars í 1989 fór tangaskipið "Exon Valdez" á land í trongum sundi í Alaska. Olja legðist tá sum hylur á sjónum, og nógv rak á land og lá í tjúkkum løgum á strondini. Stórt uppreinsingararbeiði varð sett í verk, men av tí at oljudálkaða økið var so vítt, varð hetta arbeiðið ikki gjørt allastaðni.

Árini aftaná vórðu reinsaðu økini borin saman við tey, ið ikki vóru reinsað, og fleiri frágreiðingar lýsa úrslitið.

Tað vísti seg, at fleiri av reinsingarháttunum, nýttir vórðu, gjørdu størri skaða enn gagn, og at tað gekk nógv skjótari enn væntað hjá náttúruni sjálvari at fáa javnvág í umhvørvið. Tá ið stívliga eitt ár var farið, svam laksur niðan í áirnar, sum einki var, men einki varð fiskað drúgt tíðarskeið. Olja lá á strondunum í fleiri ár, taravøksturin minkaði nógv, og sama er at siga um tey dýr, ið halda til á strond og á botni inni við land - tey fækkaðust stórliga í tali. Ójavnt var, hvussu skjótt hesar verur fluttu aftur til oljudálkað øki, og árini aftaná varð staðfest, at vistskipanin javnvigaði ikki, og hetta hevði við sær, at samansetingin í vistskipanini broyttist. Men nú nærkast hon tí, hon upprunaliga var.

Oljuleivdirnar eru nú burtur flest allastaðir, og sum heild er vistskipanin at kalla

komin fyri seg aftur. Stórir partar av vísindunum vóru ovfarnir av gongdini. Serliga ovfarnir vóru fjølmiðlarnir, sum høvdu spáað óbótaligar oyðingar, sum fóru at standa við í tíggjutals ár.

Hitt dømið er vanlukkan, ið hendi tangaskipinum "Braer" við Hetland í januar 1993; tá lóku eini 85.000 tons av olju úr skipinum. Tá ið henda vanlukkan hendi, var hørð og drúgv vestanódn. Nakað av olju slongdist upp á land, og í stutta tíð varð staðfest, at grasbeiti og seyður vóru fyri skaða. Ein lítil partur av lekanum rak norðureftir og hótti alibrúk. Avleiðingarnar vóru tó at kalla ongar, men hetlendingar hildu uppat at flyta út laks, ikki tí at góðskan versnaði, men heldur tí at vanlukkan vakti so stóran ans víða um.

Nógv tað mesta av oljuni myldi stormurin til heilt smáar dropar niður í sjógv, og hetta spjaddist um stór øki eystan fyri vanlukkustaðið borið av streymi og undan ættini. Tá ið stutt tíð var liðin (nakrir mánaðir), máttu ørfínir mátingarhættir til at ávísa olju her, og á ongan hátt er staðfest, at dýralívið leið skaða í hesum havøki.

Hóast ikki hevur borið til at fylgt gongdini frá vanlukkustaðnum til havøkini eystanfyri, t.e. norðari partur av Norðsjónum, so er lítið at ivast í, at serligar bakteriur hava brotið niður oljumylkingina, og at staklutirnir frá niðurbrótingini eru tiknir upp í vistskipanina og hava ikki elvt varandi skaða.

Harafturímóti - og tað var óvæntað - eru funnar stórar nøgdir av oljuavleiðslu á og í havbotninum vestan fyri vanlukkustaðið og við Fair Isle. Í løtuni verður kannað, hvussu oljan er komin hagar, og hvat skaðaárin hon kann hava havt á tað, sum á og í botninum veksur og livir. Roynt verður ikki eftir botnfiski á hesum leiðum.

**Oljuleki við Føroyar**

Lekur olja á sjógv undir Føroyum, fær tað ávirkan dygst við har, ið lekin er, nærri sagt á leiðini har ið oljan rekur í vatnskorpuni. Undir vatnskorpuni verður ávirkanin eftir øllum at døma avmarkað, og tað, sum hendir, hendir ovastu fáu metrarnar uppi undir vatnskorpuni.

Her kann fuglur, æti og fiskamurtar halda til, og hesar verur kunnu vera fyri ávirkan.

Hugsa vit um olju, ið rekur upp á land í Føroyum, hvussu hon fer at skaða taravøkstur og dýralív, so veldst sjálvandi fyrst og fremst um, hvussu nógva olju talan er um, harnæst hvussu sterkir máttirnir eru, ið ávirka hana, t.d. brim og streymur.

Sum longu nevnt, sýna royndir, at á veðurbardum strondum eru avleiðingarnar av oljuleka rættiliga lítlar, av tí at oljan sleppir ikki at liggja sum ein skón oman á dýrum og taravøkstri í longri tíð.

Alment kann verða sagt, at kyrrupláss og veðurgóð pláss eru serliga viðbrekin. Í Føroyum eru hetta firðirnir, serliga fjarðarbotnarnir, men eisini sundini millum oyggjarnar, har ið streymur rennur stríður og í ringasta føri kann flyta ein oljublett fleiri ferðir aftur og fram gjøgnum sama sund.

Í hesum sambandi eru alibrúkini ógvuliga viðbrekin, og fiskur kann koma at smakka av olju langa tíð.

Umframt tað kann oljan hótta tey fuglasløg, sum leita sær føði á hesum leiðum, t.d. æður, másar og ymsar álkufuglar.

### 5.2.3 Umhvørvisávirkan í sambandi við tað, ið fer fram í eini oljuverkætlan

Tað vit vita, mugu vit vænta, at oljuvinna við Føroyar verður á víðum havi og

djúpum vatni.

Henda kann, at rundan um boriútbúnað verður vatnskorpan dálkað. Men tað kann eisini vera, at olja lekur úr sjálvum havbotninum, og at tilfar frá oljuboring fer at leggjast á botn.

Her verður nú sagt frá umhvørvisávirkan í sambandi við tey fýra skeiðini í eini oljuverkætlan:

- forkanning
- leiting og meting
- útbygging og útvinning
- avrigging

**Forkanningar**

Í forkanningarskeiðinum verður mest talað um seismiskar kanningar. Seismiskar kanningar við luftkanónum skaða ikki fisk, men í ávísan mun verður fiskur stygdur burtur av leiðunum, har seismikkur verður skotin, og óvist er, nær hann leitar sær inn aftur á slíkar leiðir. Olju- og fiskivinnumyndugleikar gera av, hvørja tíð á árinum og hvussu víða seismiskar kanningar verða gjørdar, soleiðis at gýtingargrunnar og góðar fiskileiðir verða ávirkað sum minst. Í frágreiðingini, ið latin varð úr hondum í juni 1993 (2. parti, 9. kap.), verður gjølligari greitt frá, hvussu slíkt virksemi ávirkar umhvørvið. Umframt tað verður víst til kapittul 5.1 *Fiskivinna og aling.*

**Leiting og meting, her uppi í boring**

Verður tað so, at oljufeløgini av álvara seta oljuleiting í verk við Føroyar, so fara feløgini at seta í verk sínar egnu seismisku kanningar (tví- og trídimensionalar) við nógv tættari linjuneti enn talan var um, tá ið forkanningar fóru fram. Roknað verður við, at somu fyriskipanir um umhvørvisfyrivarni og fyrivarni viðvíkjandi fiskiskapi verða galdandi tá, sum tá ið seismiskar kanningar vórðu gjørdar í forkanningarskeiðinum, soleiðis sum greitt verður frá í fiskivinnukapitlinum í hesi frágreiðing, sí kapittul 5.1.

Leitiskeiðið fevnir eisini um annað virksemi, og størsta týdning umhvørvisliga hevur tá veruliga boringin í havbotninum. Men leitiboringar eru ikki øðrvísi enn tær boringar, ið verða gjørdar, tá ið farið verður undir útvinningarskeiðið, og tí verða hesar boringar viðgjørdar saman her niðanfyri.

Av tí at tað er so óføra djúpt við Føroyar, verða fyrstu boringarnar eftir øllum at døma gjørdar úr flótandi eindum, so sum sagt er frá í frágreiðingini frá 1993, 2. parti, 4. kap.

Metast má um umhvørvisliga ábyrgdarvandan at brúka slíka tøkni, og úrslitið av slíkari meting má verða tikið til eftirtektar, tá ið fyriskipanir um reglur verða evnaðar til, men hetta hoyrir í størri mun undir trygdarviðurskifti.

***Borimóra***

Borað verður við borikrúnu, ið melur títt. Jarðløgini í undirgrundini verða tá malin sundur í smáar bitar, og hetta tilfarið verður flutt upp á tann hátt, at borimóra verður pumpað niður í holið og melur so uppaftur, m.a. eisini til at reinsa holið. Eitt annað týdningarmikið endamál við borimóru er at halda trýstið í boriholinum støðugt, so at holið ikki smokkar saman.

Tá ið hugsað verður um borimóru, hevur gongdin verið tann, at nú verður oljukend borimóra (Oil Based Mud - OBM), sum umhvørvisliga kann hava óhepnar

fylgjur, bara brúkt í serligum førum. Har ið tað tøkniliga ber til, verður vatnkend borimóra, sum ger umhvørvinum minst mein, nýtt, men í ávísum truplum førum verður falsgjørd oljumóra (Pseudo-Oil Based Mud - POBM) nýtt. Hon verður hildin at hava við sær lakari umhvørvisavleiðingar enn OBM. Nevnast kann, at í Foinaven-verkætlanini vestan fyri Hetland verður POBM nýtt í øllum boringum - í hvussu so er í fyrstu atløgu. Seinastu tíðina eru tó spurningar settir við, hvussu umhvørvisvinarlig POBM-evnini eru. Serliga er ivi um, hvussu vistskipanin greiðir at bróta hesi evni niður, í hvussu stóran mun tey møguliga dungast saman í livandi verum, og í hvussu stóran mun tey møguliga brúka súrevni og soleiðis elva til súrevnistrot í botnlegugrýtinum rundan um bori- ella varðveitslustaðið (deponeringsstedet).

Metast má um umhvørvisavleiðingar av hesum borimórusløgum, og viðkomandi myndugleikar mugu áseta nýtslureglur fyri nevndu sløg.

***Borispønir***

Tilfarið, sum kemur upp úr boriholinum, eru borispønir, t.e. boraða grótslagið í størri og smærri pettum. Saman við borispønun eru ávísar nøgdir av somu evnum, sum eru í borimóruni. Í flestu førum verða spønirnar vaskaðar, í ávísan mun reinsaðar, og so tveittar út aftur. Hetta kann hava óhepnar avleiðingar, partvíst tí at borispønirnar dálka rundan um seg, meðan tær søkka niður á botn, partvíst tí at tær dungast upp á botni. Í Norðsjónum eru fleiri dømi um slíkar spónheyggjar, sum í fleiri ár liggja sum oyðibotnur, har einki hægri dýralív er at finna. Í hesum førum tala vit um leivdir frá boringum við OBM.

Nú er tað vanlig mannagongd, at myndugleikarnir áleggja feløgunum at føra borispønirnar til lands, har tær verða reinsaðar og goymdar á ruskplássum. Nýggj tøkni letur upp fyri øðrum møguleikum: at spræna oljudálkaðar borispønir inn aftur hagar, oljan verður tikin upp.

***Onnur evni, ið skaða umhvørvið***

At virka ímóti trýstinum, serliga tá ið borað verður á stórum dýpi, verður evnið baritt nýtt. Hetta evnið kann hava í sær størri ella smærri mongdir av tungum metallum, sum tó ikki sleppa so lættliga út í umhvørvið, av tí at tey eru bundin í krystallkervinum í hesum evni. Álagt verður tá fyristøðufelagnum at kanna barittið regluliga og at senda greiningarfrásagnir til eftirlitsmyndugleikarnar.

Leggjast skal aftrat, at meginparturin av nýtta barittinum verður ikki tveittur í havið, men evnið verður brúkt umaftur, tá ið burtur úr er skilt.

Ein oljuboripallur er umframt tað at meta sum ein bygd við øllum ruski og frárensli, sum har er: húshaldsrusk, innpakkingartilfar og annað flutningstilfar verða førd í land og endurvunnin ella goymd. Frásetuvatn verður reinsað á pallinum, áðrenn tað rennur á sjógv, smbr. fylgiskjalið 5.2-1.

Umframt hetta verða í leitiskeiðinum nýtt fleiri evnafrøðievni, sum kunnu skaða umhvørvið, leka tey á sjógv. Tá ið gongd er komin á framleiðslu, verða viðurskiftini nógv fløkjaligari, við tað at ofta verða væl fleiri evnafrøðievni brúkt á hvørjum einstøkum oljupalli, oftast millum 100 og 150.

Við heimild í "Lóg um vernd av havumhvørvinum", sí brot 5.2.5, kann verða álagt fyristøðufelagnum at boða frá øllum evnum, sum møguliga dálka umhvørvið, og sum verða brúkt á einum boripalli (sum oftast eru hesi evni nevnd á lista, sum myndugleikarnir hava gjørt). Álagt verður felagnum at seta upp greiniligt yvirlit

yvir møguligar nøgdir av hesum evnum, sum leidd verða út í umhvørvið, og fyristøðufelagið hevur eisini ábyrgd av, at nøgdirnar ikki fara upp um loyvdu hægstumarkini, ið myndugleikarnir áseta ofta smbr. altjóða fyriskipanum. Verða nýggj evni tikin í nýtslu, skulu umhvørvisverndarmyndugleikarnir fyrst góðkenna tey, og tað áliggur fyristøðufelagnum eftir gjølligum forskriftum at skjalprógva, hvussu tey ávirka umhvørvið.

Vanlig mannagongd, sum natúrlig er at brúka við Føroyar, er, at fyristøðufelagið fyri oljufeløgini hevur innaneftirlit við, at allar reglugerðir verða hildnar, og regluliga sendir myndugleikunum greiniligar frágreiðingar eftir serligum fyriskipanum; frágreiðingar, sum eisini fevna um kanningar av øllum burturkasti, blakað ella veitt verður á sjógv av pøllunum. Olju- og umhvørvismyndugleikarnir hava eftirlit við, at fráboðanarskyldan verður hildin, og at frásagnirnar eru álítandi. Hetta verður t.d. gjørt á tann hátt, at myndugleikarnir skipa fyri eftirlitsvitjanum úti á pøllunum, bæði slíkum, har sagt er frá vitjanini frammanundan, men eisini slíkum, sum ikki eru fráboðaðar frammanundan.

**Útbygging og framleiðsla**

Myndugleikarnir, sum áseta reglur, skulu góðkenna allar verkætlanir og útbyggingar, bæði tøknilig viðurskifti, arbeiðshættir og trygdartiltøk. Í hesum sambandi er neyðugt, at Oljufyrisitingin og umhvørvisfyrisitingin hava regluligt samband sínámillum.

Í møguligum framleiðsluskeiði gerst helst vanligari og vanligari, at alt virksemið verður savnað á einstakari flótandi framleiðslueind. Frá eindum á botni verður olja førd upp til ta flótandi framleiðslueindina gjøgnum liðilig rør. Úr henni verður oljan pumpað beinleiðis í tangaskip, sum sigla hana til lands, sí 1993-frágreiðingina 2. part, 4. kap.

Á okkara leiðum, sum til veðurlag verða mettar millum tær mest baldrutu í heiminum, fer henda framleiðsluskipan at verða ábær fyri havsins megi, og tað setur stór krøv til tøknina, sum oljuídnaðurin tó heldur seg hava tamarhald á, tí fleiri slíkar skipanir eru virknar longu nú, m.a. vestan fyri Hetland.

Ætlast má um umhvørvisliga ábyrgdarvandan, verður henda tøkni nýtt, og hugsast má um vandan, tá ið gerast skal av, um útbyggingarætlanir skulu góðkennast ella ikki, men hetta hoyrir meira undir trygdarspurningar.

***Botndýralív við oljuútbúnað***

Eftir mynstri, ið ásett er í París-sáttmálanum, "Sáttmálin um at tryggja havumhvørvið í Landnyrðingsatlantshavi", sí fylgiskjal 5.1-1, brot 2.4 í kapitlinum 5.1 *Fiskivinna og aling*, eru í longri tíð gjørdar kanningar av botndýralívinum rundan um oljuútbúnað á havinum.

Í fyrstuni varð hildið, at stórur skaði hendi rundan um oljuútbúnaðin, men so við og við er komið fram, at longri og longri komið verður burtur frá boristaðnum, minni verður skaðin, og sjáldan er nakað árin at merkja, tá ið komið er nakrar fáar fjórðingar frá útbúnaðinum. Samstundis hevur tað roynst so, at broytingarnar, sum hendu í samansetingini av dýralívinum, líktust tí, sum hendir, tá ið onnur lívrunnin dálking fer fram, t.d. úr kloakkum. Hetta hevur við sær, at summi dýrasløg hvørva, meðan onnur, sonevndir “opportunistar” gerast ráðandi í dýrafelagsskapinum. Vøksturin, lýstur sum framleidd livandi vekt um árið, broytist bara í lítlan mun. Um nakað, kvinkar hann uppeftir. Afturat hesum kemur tó vandin fyri, at smakkur fer at ganga at fiski, sum hevur etið dálkað føðsludýr, men sum nevnt fara slík evni rætti-

liga skjótt úr aftur fiskinum.

Tá ið farið er undir framleiðslu, eiga myndugleikar at krevja, at eftirlitskendar eftirkanningar, sonevndar monitoringkanningar, verða settar í verk, t.d. triðja hvørt ár. Slíkar kanningar verða gjørdar sambært gjølliga skipaðum áminningartalvum, sum altjóða felagsskapir evna til, í hesum føri Working Group on Sea-Based Activities (SEBA) undir París-sáttmálanevndini, sí brot 5.2.5.

***Gass í sambandi við oljuframleiðslu***

Í sambandi við oljuútvinning kemur gass ofta upp úr boriholunum - í størri og smærri nøgdum. Í sambandi við framleiðsluna á pallinum guvar gass eisini ofta upp.

Boripallarnir hava útbúnað at fremja tað, teir rópa "blussing", t.e. at brenna gass, sum kemur upp í sambandi við framleiðsluna. Til hetta brúka teir langar "armar" ella bummar, sum síggja til, at brent verður langt frá sjálvum pallinum.

Men nógv tann størsti parturin av $CO_2$-guvu kemur úr ravmagnsgerum (generatorum), av tí at óføra nógv orka verður nýtt á útbúnaðunum.

Í Montreal-sáttmálanum er samtykt at avmarka brenningina sum mest, og talað verður um at leggja $CO_2$-avgjald á brenningar á útbúnaðum (norðmenn krevja slíkt avgjald í sínum øki).

Serliga tá ið tað snýr seg um stórar gassnøgdir, er vorðið vanligt at spræna, t.e. pumpa, gassið niður aftur í jarðgoymsluna. Hetta hevur týdning fyri goymslutrýstið, og í ávísum førum lættir tað um oljuframleiðsluna.

**At føra olju ella gass í land av oljuútbúnaðum**

Møguleiki er fyri, at olja ella gass verða førd í land í Føroyum.

Annaðhvørt verður hetta gjørt við rørleiðingum ella við tangaskipum. Og sjálvandi hevur hetta við sær aðrar umhvørvisvandar enn teir, ið nevndir eru frammanfyri.

Men slíkar ætlanir liggja langt frammi í tíðini, og so skjótt sum tøkniliga menningin gongur, kann væntast, at ein gjøllig útgreining av viðurskiftunum, sum tey eru í dag, ikki verður tíðarhóskandi um nøkur ár.

Her verða tí bara drigin fram nøkur høvuðssjónarmið viðvíkjandi hesum, at olja ella gass møguliga verða førd í land í Føroyum.

Rørleiðingar verða lagdar á ella í havbotnin. Sum føroyski havbotnurin er dánaður, verður eftir øllum at døma neyðugt at leggja útbúnaðin á sjálvan havbotnin á summum økjum, og hetta verður ein forðan fyri fiskiskap við botntroli. Slíkar rørleiðingar kunnu eisini ávirka dýralívið, við tað at tær skapa skjól, har tilfar hópar seg saman, t.d. í læborði undan streymrákinum á botninum.

Í Norðsjónum hava teir drúgvar royndir við rørleiðingum, og har ber flestu staðir til at grava útbúnaðin niður. Har ið hetta ikki ber til, verða verjugarðar bygdir um rørleiðingarnar, so sleppast kann undan, at fiskireiðskapur fløkist fastur. Umframt tað er merkt á sjókortunum, hvar ið bannað er at ankra ella tílíkt.

Verður ført í land við tangaskipum, má hugsast um, at ivaleyst verður støðan við Føroyar tann - í fyrstu atløgu - at ført verður í land eftir at lossað er úr flótandi framleiðslueind við teimum vandum, ið at tí eru bundnir. Øll hesi viðurskifti eru natúrligur partur av umhvørvisfylgjumetingunum (sí brot 5.2.4) fyri nevndu útbyggingarloysn.

Verður ført í land í Føroyum, verður tangaskipaflutningur størri vandi inni við land enn á opnum havi, av tí at møguligur oljuleki tá verður nærri landi, og tá er størri vandi fyri, at olja rekur upp á land ella kemur upp í fløkjaliga rákið í firðum

og sundum, har t.d. fleiri alibrúk eru.

Í sambandi við útbúnað á landi, tangar og virkisútbúnað, er vandi fyri leka í trongum økjum, og her verður víst á, at oljulekar gera størstan skaða, tá ið nøgdirnar gerast stórar í avmarkaðum økjum.

Í báðum førum skal oljan flytast av staðnum, har hon verður førd í land, og til marknaðin. Í mongum førum verður hetta gjørt við heilt stórum tangaskipum, og tað verður viðbrekið at stýra so stórum flótandi eindum í trongum føroyskum firðum og sundum. Umframt tað má havast í huga, at slík tangaskip, tá ið tey koma til Føroya, hava barlastavatn í tangunum. Í hesum vatni verða altíð ávísar nøgdir av olju frá undanfarna flutningi. Tí má setast upp útbúnaður til at reinsa barlastavatnið, áðrenn tað verður slept út í umhvørvið, og gjølla má ásetast, hvussu skal verða reinsað, og eftirlit má skapast við, at hesar ásetingar verða hildnar.

Verður ført í land, má frammanundan setast í verk ein sameind umhvørviskanning bæði á landi og sjógvi, so her verður ikki gjørt meira burtur úr hesum viðurskiftum.

**Tá ið riggað verður av eftir oljuvirksemi**

Tá ið oljuútvinningin er av, er eftir at beina burtur allan útbúnað, ið nýttur hevur verið. Burturbeiningin hevur serliga vakt áhuga, av tí at fólk og fjølmiðlar gjørdu so nógv burturúr, tá ið goymslupallurin "Brent Spar" skuldi beinast burtur. Í hesum føri høvdu bretskir myndugleikar umrátt seg væl og gjørt neyvar kanningar og vóru tá komnir fram til, at tá ið hugsað var um alt, so var besta loysnin at søkkja útbúnaðin á djúpum vatni, eftir at umhvørvisskaðilig evni vóru beind burtur fyrst. Alt hóvastákið, sum umhvørvisverndarfelagsskapir og fjølmiðlar gjørdu burturúr, hevði tað við sær, at "Brent Spar" nú liggur fyri akkeri á norskum fjørði. Fleiri uttanveltaðar kanningar eru gjørdar, og aftan á at tær eru útgreindar væl og virðiliga, er komið til ta niðurstøðu, at umhvørvisliga var besta loysnin at beina útbúnaðin burtur, sum upprunaliga varð skotið upp: at søkkja hann á djúpum vatni tá ið skaðilig evni vóru reinsað burtur.

Afturat hesum kann verða lagt, at so skjótt gongur við tøkniligu menningini í sambandi við oljuútvinning á stórum dýpi (sum eftir øllum at døma talan verður um í føroyskum øki í fyrstu atløgu), at ilt er longu nú út í odd og egg at siga, hvussu um tíggjutals ár skal gerast við útbúnað, sum ikki verður brúktur longur. Í uppskotinum til løgtingslóg um kolvetnisvirksemi § 20 verða tí settir upp fleiri møguleikar, sum eru orðaðir so breitt, at teir veita avriggingarvánir, sum í ítøkiligu støðuni tykjast skilagóðir, eisini umhvørvinum viðvíkjandi. Víst verður annars til lógarviðmerkingarnar í 6. parti og til fylgiskjalið 5.1-1 í kapittul 5.1 *Fiskivinna og aling*.

**Hugburður oljufelaganna til umhvørvis-fyrilit**

Gongdin í oljuídnaðinum hevur seinastu tíðina verið, at menn hava lagt sær nær at lækka útreiðslurnar - hetta av tí at oljuprísirnir eru lágir til tað.

Samstundis eru økini heilsa, trygd og umhvørvi løgd saman umsitingarliga í tað, ið rópt verður HSE (health, safety, environment).

Vandi kann vera fyri, at fyristøðufeløg til tess at vera so effektiv sum gjørligt seta heilsu- og trygdarmál frammanfyri umhvørvismál. Tey síggjast og merkjast beinleiðis og viðvíkja serliga teimum, sum arbeiða á og við oljuútbúnaðin. Harafturímóti er umhvørvið slíkt, ið ikki sæst beinleiðis, tá ið arbeitt verður á sjónum.

Harafturímóti liggur stórt trýst á oljuídnaðinum at sýna umhvørvisfyrilit, tí nú

tykjast tey vera best umtókt, sum siga seg vera "grøn". Flest øll oljufeløg hava serdeildir við lívfrøðingum, sum taka sær av umhvørvismálum. Hetta hongur eisini saman við tí ráki, ið nú ræður, at fyritøkurnar virka undir innaneftirliti mótvegis settu kørmunum og kunngerðunum.

Í sambandi við hesar umráðingar eigur at verða víst til tað kjakið, sum verið hevur um ymiskan hugburð til hesi viðurskifti millum eftirlitsmyndugleikarnar og oljuídnaðin, har ið myndugleikarnir halda seg til BAT (Best Available Technique, t.e. tøkni, so góð sum møguligt). Oljufeløgini halda seg vanliga til BATNEEC (Best Available Technique Not Entailing Excessive Cost, t.e. tøkni, so góð sum møguligt, sum ikki er órímiliga kostnaðarkrevjandi). Hesin skilnaður er nú nakað minkaður, av tí at oljufeløgini leggja doyin á at finna og brúka nýggja tøkni, sum miðar ímóti at minka vandan fyri umhvørvisskaða.

Hugburðurin er tó í ávísan mun ymiskur frá oljufelagi til oljufelag, og tað kann verða tikið við í umráðingunum, tá ið ætlast skal um umhvørvisliga førleikan og hugburðin hjá oljufeløgunum, tá ið loyvi verða latin.

### 5.2.4 Umhvørvisfylgjumetingar

Við heimild í kolvetnislógini, § 14, senda feløgini til góðkenningar gjølligar verkætlanir til ráðandi myndugleikar í sambandi við borivirksemi - eisini leitiboringar. Í hesum ætlanum skal eisini verða greitt frá vandum og tiltøkum at sleppa undan óhappum. Í hesum høpi verður eisini hugsað um umhvørvisviðurskifti í síni heild, og í føroyskum øki, sum er nýggj oljuleið, eigur serliga at verða hugsað um viðurskifti, ið hava við umhvørvið at gera.

Sum seinni er umrøtt, verða serligar umhvørvisfylgjumetingar skrivaðar, smbr. § 22 í kolvetnislógini, tá ið øki verða gjørd klár til útvinning.

Vanligt er í flestu grannalondum okkara, at evnað verður til ein fylgjumeting, har ein serligur partur viðger umhvørvisfyrilit, hvørja ferð øki verða boðin út. Nevnast skal tó, at í Noregi er tað so, at har krevja myndugleikarnir bara fylgjumetingar fyri oljuútbúnaðar undan framleiðsluskeiðinum, um so er, at økið umhvørvisliga verður mett at vera serliga viðbrekið. Hetta skal tó síggjast í tí høpi, at longu áðrenn loyvi verða givin til virksemi í nýggjum økjum, hava landsmyndugleikarnir evnað til fylgjumetingar. Í norskum øki, har ið oljuframleiðsla hevur verið í nógv ár, er ofta frammanundan gjørdar fylgjumetingar av ymisku økinum, áðrenn framleiðslan byrjaði, sum vísast kann til.

Tá ið farið verður undir serliga boriverkætlan - og so serliga, tá ið komið er í framleiðsluskeiðið - verður serstøk fylgjumeting fyri verkætlanina skrivað. Borisamtakið evnar til ella fíggjar slíka meting, sum verður send viðkomandi myndugleikum til góðkenningar.

Í sambandi við at Foinaven-økið vestan fyri Hetland varð útbygt, vórðu gjørdar fleiri metingar. Tann fyrsta teirra var fyribilskend, onnur nágreiniligari, triðja fullfíggjað, og alt endaði við eini stak vavmiklari og nágreiniligari atgerðarætlan í sambandi við oljuleka, "Oil Spill Contingency Plan" (atgerðarætlan um oljuleki berst á), sum bretskir myndugleikar góðkendu. Ætlanin miðar ímóti at lýsa øll hugsandi dømi um oljulekar og lýsir gjølliga tey øki, sum kunnu verða fyri dálking, og hvørji árin hugsast kunnu. Umframt verður út í æsir greitt frá atgerðum at avmarka útbreiðslu og ávirkan av møguligari dálking. Hetta fevnir eisini um tær strendur, sum

olja kundi rikið inná.

Í Noregi t.d. verða slíkar fylgjurmetingar sendar til felagsskapir og umsitingar-eindir, sum hugsast kunnu at hava áhuga fyri málinum ella vera partur í tí. Biðið verður um viðmerkingar frá hesum felagsskapum/eindum, og í hesum sambandi kunnu myndugleikarnir biðja um gjølligari metingar, um tað verður mett eftirynskj-andi. Føroyum viðvíkjandi krevur uppskotið til løgtingslóg um kolvetnisvirksemi í § 22 fylgjumetingar.

**Støðis-kanningar**

Til at gera grein fyri avleiðingunum av ávísum virksemi, er neyðugt at vita um viðurskiftini, áðrenn farið verður til verka. Neyðugt er tí, at náttúruviðurskiftini í økinum - sum í hesum sambandi skulu skilmarkast neyvari - verða so væl kannað, at møguligt verður seinni at staðfesta møguligar broytingar, hvussu miklar tær eru, og hvussu tær ávirka aðrar partar av náttúruviðurskiftunum sum t.d. føðsluketur í havinum.

Slíkar forkanningar verða nevndar *støðiskanningar* (“baseline”-kanningar).

Hesar kanningar byggja á ta vitan, sum longu er tøk í vísindaligum ritgerðum, og hesi úrslit kunnu gerast grundarlag undir fylgjumetingini. Men í flestum førum er tað so, at tann vitan, ið er til taks, ikki er nøktandi, og í hesum førum mugu olju-feløgini fíggja ískoytiskanningarnar, sum setast skulu í verk.

At siga sama mannagongd verður nýtt í slíkum kanningum - sum tær verða samansettar úr einum landi í annað.

Tá ið eitt øki er valt sum útbjóðingarøki - og ið hvussu er, áðrenn loyvt verður at byggja út og framleiða - verða tey náttúruviðurskifti, sum møguliga verða órógvað av tí virksemi, sum verður í økinum, kannað.

Vanliga verða fyrst alisligu viðurskiftini viðgjørd, tey, sum eru grundarlag undir teim lívfrøðiligu. Tað snýr seg um jarðfrøðina, hvussu havbotnurin er dánaður og um havfrøðiviðurskifti við streymi, hita og øðrum viðurskiftum í sjónum. Veður-lagsviðurskifti hava stórt árin, serliga viðurskifti viðvíkjandi vindi og hitalag, og umframt tað verður strandalendið lýst, og eisini hvussu strandaøkini eru dánað.

Parturin um lívfrøði greiður frá allari vistfrøðiskipanini í síni heild við hennara plantum og dýrum við serligum denti á tær verur, ið fíggjarliga hava týdning, so sum skeljadýr, krabbadýr, fiskar, fuglar og súgdýr.

**Sundur-greiningar av vandum**

Umhvørvisligu árinini, sum oljuvinna í síni heild kann hava við sær, verða serliga umrødd við atliti at møguliga vantandi vitan, sum eigur at verða útvegað til metingarnar og umráðingarnar um tiltøk at fyribyrgja skaðaárini.

Tá ið fylgjumetingar verða gjørdar fyri hvørt einstakt øki, ið bygt verður út, verður í stóran mun komið inn á sjálvan pallin og tey evni, sum hugsast kunnu fara at leka út í umhvørvið rundanum. Tað, sum fjølmiðlarnir gera mest burturúr, eru ótilætlaðir oljulekar, men í roynd og veru snýr tað seg um eitt ótal av øðrum kemiskum evnum, sum kunnu valda umhvørvinum skaða í minni og størri mun (sí tað, sum frammanundan er skrivað).

Ein fylgjumeting tekur samanum í eini nágreiniligari lýsing av øllum teimum tiltøkum, sum neyðug eru til at avmarka skaðaárin av virkseminum ella heilt at sleppa undan skaðum. Við atliti at oljuleka verður gjørd ein tilbúgvingarætlan í sambandi við oljulekar, sum greitt er frá frammanfyri í hesum brotinum.

Innihaldið í slíkum fylgjumetingum kann lesast sum tann hugburður, sum liggur undir fyrilitinum fyri umhvørvisspurningum í sambandi við ein komandi oljuídnað,

av tí at tey vandamál, sum oljufeløgini rokna uppí, verða lýst. Innihaldið í eini fyrimyndarligari fylgjumeting verður sýnt í fylgiskjalinum 5.2-2.

Skal arbeiðast við møguligum rørleiðingsútbúnaði, verða fylgjumetingar skrivaðar í hesum sambandi, men her verður ikki sagt nakað meir um innihaldið í slíkum, av tí at heilt nógv ár fara at ganga, áðrenn slíkur útbúnaður verður lagdur í føroyskan sjógv.

**Oljuvirksemi og umhvørvisgreiningar í føroyskum øki**

Sum áður nevnt, er neyðugt at hava góða fatan av umhvørvisstøðuni, sum hon er, áðrenn farið verður undir virksemi. Hetta ber í sær, at setast mugu í verk kanningar, og samanhangandi frágreiðingar mugu skrivast.

Í fyrsta umfari fevnir hetta arbeiðið um at savna vitan, upplýsingar og hagtøl, ið longu eru tøk. Nógv av hesum tilfari liggur longu á føroyskum stovnum. Harnæst verður lýst, hvat ið møguliga fattast í hesi vitan til at kunna samanbera frágreiðingar saman. Kanningar verða settar í verk at fullfíggja vitan okkara, og alt endar við eini samanhangandi frágreiðing.

BIOFAR-verkætlanin, sum er støðisvísindalig verkætlan undir felagsnorðurlendskum stýri, hevur fingið til vega væl av vitan um botndýrini á djúpum vatni við Føroyar og harumframt um hitalagið á botni. Meira spjatt eru eisini tiknar legugrýtisroyndir, sum geva upplýsingar um botnviðurskiftini. Men enn er heildarkortlegging av havbotninum og lívinum har ikki gjørd.

FARCOS-verkætlanin, sum seks oljufeløg fíggja, hevur sett sær sum endamál at kortleggja føroysku strendurnar, hvussu viðbreknar tær eru, verða tær fyri møguligari oljudálking. Verkætlanin er ætlandi liðug í 1998.

Fiskirannsóknarstovan hýsir nógvari vitan um havfrøðiviðurskifti, serliga um streymviðurskifti, æti og havvistskipanina, men ikki veit so væl við kunnleika, tá ið hugsað verður um streymviðurskifti inni við land í firðum og sundum.

Á Fiskirannsóknarstovuni og Náttúrugripasavninum eru miklar talmongdir um fisk, fugl, havsúgdýr og um botnviðurskiftini við Føroyar.

Landsverkfrøðingurin hevur í varðveitslu hóp av upplýsingum og talmongdum um streym, veðurlagsviðurskifti og serliga um alduhædd, sum hevur stóran týdning, tá ið oljufeløgini skulu leggja ætlanir um arbeiðshátt og boriútgerð.

Oljufeløg og umboð fyri vísindastovnar í Føroyum hava gjørt sáttmála við tí endamáli at samstarva um at fáa til vega nóg mikið av upplýsingum/talmongdum um føroyska havumhvørvið (lívfrøðiliga, alisliga og evnafrøðiliga). Hetta tilfar skal vera grundin undir teimum sundurgreiningum um vandar, sum gerast mugu, áðrenn nakar søkir um boriloyvi.

Vísandi til støðiskanningarnar av havumhvørvinum - nevndar í hesum brotinum - sum longu er farið undir í samstarvi við oljufeløgini, ið vísa føroyska økinum áhuga, ella sum eru fyrireikaðar væl áleiðis, og vísandi til tey uppskot um lóggávu á økinum, sum nevnd verða í hesi frágreiðing, kann staðfestast, at tað umhvørvisliga er ráðiligt at fara undir eitt útbjóðingarumfar nú.

## 5.2.5 Umhvørvisreglur av týdningi fyri kolvetnisvirksemið

Umhvørvisviðurskifti í sambandi við kolvetnisvirksemi verða í grannalondum okkara stýrd bæði av almennari umhvørvislóggávu og nøkrum serøkisreglum í kolvetnislóggávuni, t.d. serligum krøvum um tilbúgvingar, umhvørvismetingar o.a.

Hetta samspæl millum almenna umhvørvislóggávu og serøkiskrøv í kolvetnislóggávuni man eisini fara at verða lagið í Føroyum. Av hesum stendst natúrliga, at gott og virkið samstarv verður fingið í lag millum umhvørvis- og oljumyndugleikarnar.

At byrja við kann verða nevnt, at umhvørvismál verða ikki umrødd í heimastýrislógini. Forsætisráðið hevur í uppriti frá 1982 hildið, at umhvørvisvernd á landi kann heimastýrið yvirtaka sum sermál, men umhvørvið í havinum, einamest fyri síni altjóða eyðkenni, verður at meta sum felagsmál. Sjónarmiðini eru komin til greinar soleiðis, at umhvørvið á landi verður stýrt eftir løgtingslóg nr. 134 frá 2. november 1988 um umhvørvisvernd, og umhvørvið í havinum verður stýrt eftir kongligari fyriskipan nr. 318 frá 26. juni 1985, sí seinni. Saman við lógaruppskotinum um kolvetnisvirksemi fer kgl. fyriskipanin um vernd av havumhvørvinum at verða høvuðstátturin í tí umhvørvislógargrundarlag, ið viðkemur leitivirksemi til havs.

Niðanfyri verður greitt frá umhvørvsreglunum í uppkastinum til kolvetnisvirksemislóg, og síðani er stutt yvirlit yvir reglurnar í kgl. fyriskipanini um vernd av havumhvørvinum, sum eru av týdningi fyri kolvetnisvirksemið. Í brotinum verður eisini umrødd ein ætlað endurskoðan av kgl. fyriskipanini. Tá ið kolvetnisvirksemið tey fyrstu mongu árini væntandi fer at verða á sjónum, verður ikki greitt frá reglunum í løgtingslóg um umhvørvisvernd (á landi). Til seinast verður nomið við nakrar tættir, sum hava týdning fyri, at umhvørvismál fáa skjóta og munadygga myndugleikaviðgerð, hesin parturin eigur at verða lisin saman við kapittul 3.3 um *Fyrisiting*.

**Uppkastið til løgtingslóg um kolvetnisvirksemi og ytra umhvørvið**

Uppkastið til løgtingslóg um kolvetnisvirksemi sigur í endamálsgreinini (§ 1, stk. 2), at virksemið skal verða skipað við neyðugum atliti at m.a. umhvørvis- og náttúruáhugamálum. Ætlanin við endamálsgreinini er ikki at tala fyri ávísum umhvørvispolitiskum aðalreglum, men heldur á lógarstigi at minna myndugleikar og oljufeløg á at hava umhvørvið í huganum, tá ið virkisemið alt verður lagt til rættis, t.e. tættir sum umhvørvisávirkan og -avleiðingar eiga altíð at verða tiknir við, tá lagt verður til rættis.

***Landsstýrisfrágreiðing til løgtingið***

Fyri myndugleikarnar fær endamálsgreinin týdning í verki longu í samband við fyrireikingarnar til eitt útbjóðingarumfar. Áðrenn farið verður undir útbjóðingarumfarið, skal Landsstýrið greiða løgtinginum frá, hvørji øki ætlanin er at bjóða út og treytirnar fyri útboðnum (§ 7, stk. 2). Frágreiðingin skal m.a. upplýsa um avleiðingar, sum oljuvirksemið kann væntast at hava á náttúru og umhvørvi.

Harumframt kann verða víst á, at uppkastið til løgtingslóg um kolvetnisvirksemi sigur, at loyvi til leiting og framleiðslu bara kann verða veitt umsøkjarum, sum haldast hava neyðugan yrkisligan førleika (§ 6). Heitið yrkisligur førleiki fatar í hesum samanhangi vanliga um tøkniligan kunnleika og royndir, men hetta forðar ikki Landsstýrinum í útbjóðingarskjølunum at gera vart við, at umhvørvisligi sakkunnleikin hjá umsøkjarum telur við, tá ið loyvið verður latið. Hetta fer at hava við sær, at feløgini í umsóknunum mugu lýsa sínar áskoðanir á umhvørvið og sínar umhvørvisligu royndir o.a., sum ger myndugleikarnar førar fyri at meta um hesi viðurskifti á jøvnum føti við tøkniligan og trygdarligan yrkiskunnleika.

***Umhvørvislig aðalkrøv til virksemið, leiðbygging,avrigging o. a.***

Feløg, sum fáa loyvi at reka leiti- og vónandi framleiðsluvirksemi á føroyskum øki, skulu arbeiða dygt bæði umhvørvisliga og trygdarliga (§ 13). Í hesum sambandi er týdningarmikið at vísa á, at feløgini hava ábyrgdina av, at hetta dygdarstig verður hildið. Góðskutryggingarskipanirnar hjá feløgunum (innaneftirlit), sum verða gjølligari umrødd í kapittul 3.4 *Trygd, arbeiðsumhvørvi og tilbúgving*, eiga soleiðis eisini at fata um umhvørvisviðurskifti. Lógaruppkastið krevur harumframt, at feløgini fremja hóskilig tiltøk til tess at sleppa undan at skaða dýr og plantur og annars at dálka.

Leiðbyggingar skulu verða framdar í samsvari við leiðbyggirætlan, sum Landsstýrið frammanundan hevur góðkent (§ 14, stk. 2). Ætlanin skal m.a. hava upplýsingar og metingar um umhvørvisviðurskifti, soleiðis at tá ið Landsstýrið tekur støðu til ætlanina, kann tað taka hesi viðurskifti við og møguliga í góðkenningini seta serligar treytir, sum hava umhvørvisligan týdning. Avrigging fylgir somu mannagongd sum leiðbygging, smbr. § 20.

***Umhvørvisfylgjumetingar***

Umsóknir um loyvi ella góðkenning viðvíkjandi leiðbyggingum, rørleggingum ella avrigging skulu hava *serstaka* meting um umhvørvisfylgjur av umhugsaðum verkætlanum (§ 22). Landsstýrið kann víkja frá kravinum, um hildið verður, at nóg góðar upplýsingar um umhvørvisfylgjur av tiltøkunum eru tøkar, t.d. tí fylgjumetingar eru gjørdar viðvíkjandi líkum verkætlanum í sama øki. Verkætlanir, sum ikki verða hildnar at ávirka umhvørvið nakað serligt, koma ikki undir ásettu krøv um umhvørvisfylgjumetingar. At serstakar umhvørvisfylgjumetingar ikki skulu verða gjørdar, merkir kortini ikki, at umsøkjararnir sleppa undan at taka støðu til umhvørvismál, við tað at tey tá eiga at verða flættað upp í umsóknina, smbr. t.d. § 14, stk. 3.

Fylgisskjal 5.2-2 hevur yvirlit yvir, hvat umhvørvisfylgjumetingar neyvari kunnu hugsast at fata um.

Landsstýrið kann eftir lógaruppkastinum skipa fyri at hoyra myndugleikar, felagsskapir og aðrar partar, sum kundu verið ávirkaðir av ætlaðu verkætlanini.

***Tilbúgvingarviðurskifti***

Uppkastið til løgtingslóg um kolvetnisvirksemi (§ 26) áleggur loyvishavunum at halda eina fulldygga tilbúgving til vanlukku- og vandastøður, herundir eisini støður, sum kunnu føra dálkingar við sær. Loyvishavin (fyristøðufelagið) skal harumframt í slíkari støðu seta í verk tiltøk til tess at forða fyri ella minka um skaðaávirkan, t.e. at í sambandi við at olja rennur á sjógv liggur á loyvishava bæði skylda at avmarka lekan og at reinsa eftir hann. Loyvishavin skal eisini boða viðkomandi tilbúgvingarmyndugleikum frá óhappinum og alsamt kunna teir um tað, ið fyriferst.

Umframt hetta gevur uppkastið Landsstýrinum heimild at krevja tilbúgvingarsamstarv millum fleiri loyvishavar og í vanlukku- og vandastøðu at seta í verk neyðug bjargingar- og móttiltøk, um loyvishavin ikki ger tað. Víst verður annars til viðmerkingarnar til § 26 og til kapittul 3.4 um *trygd, arbeiðsumhvørvi og tilbúgving* til tess gjølligari at fáa lýst krøvini til tilbúgving loyvishavans, og hvussu tilbúgvingin møguliga kann verða samskipað við myndugleikatilbúgvingina.

***Endurgjaldsreglur***

Viðvíkandi ábyrgdar- og endurgjaldsreglum í samband við dálking verður víst til lógarviðmerkingarnar til § 34 og til brot 5.1.5 í kapitlinum *Fiskivinna og aling.*

**Havumhvørvislógin**

Danska havumhvørvislógin (tá lóg nr. 130 frá 9. apríl 1980 um vernd av havumhvørvinum) varð við kgl. fyriskipan nr. 318 frá 26. juni 1985 sett í gildi fyri Føroyar, sum heimilað var í § 70 í lógini. Gildið var eftir løgtingsins fatan bara fyribils, við tað at løgtingið vildi, at Landsstýrið fór undir samráðingar við ríkismyndugleikarnar um (umhvørvisliga) lóggávumyndugleikan í føroyskum sjógvi. Tá ið kortini varð samtykt, at danska havumhvørvislógin varð sett í gildi, var tað av bráðskundistørvi á føroyskum reglum við atliti at seta MARPOL-sáttmálan í verk. Sáttmálin hevði fingið altjóða gildi 1. oktober 1983, og løgtingið hevði samtykt hann 18. september 1984.

Gjølligari frágreiðing um gongdina í málinum, tá ið danska havumhvørvislógin

varð sett í gildi fyri Føroyar, fæst í løgtingsmálunum 17/1984 og 47/1985 og á bls. 47 - 53 í "Áliti um yvirtøku av undirgrundini II" (Hilduberg, Winther Poulsen og Olafsson, 1988).

Havumhvørvislógin hevur sum endamál "at forebygge og forhindre forurening af havmiljøet fra skibe, luftfartøjer og bevægelige eller fast anbragte platforme med olje og andre stoffer eller materialer, der kan bringe den menneskelige sundhed i fare, eller som kan skade de levende ressourcer og livet i havet eller være til gene for den retmæssige udnyttelse af havet, eller som kan forringe rekreative værdier. Loven har endvidere til formål at sikre opretholdelsen af et beredskab til indsats mod forurening på havet, på kysten og i havne” (§ 1).

Sambært kgl. fyriskipanini verða reglurnar fyri donsk skip, pallar og loftfør og fyri danskt sjó- og landgrunsøki at nýta til skip, pallar og loftfør skrásett í Føroyum og fyri sjó- og landgrunsøkið um Føroyar (§ 1a.).

Heimildin at áseta reglur er í flestu førum hjá ríkismyndugleikunum, men Landsstýrið hevur myndugleikan í øðrum førum, ið viðvíkja "fisketerritoriet ved Færøerne", t.e. innan fyri 200 fjórðingar. Ávísar góðkenningar skulu bæði ríkismyndugleikar (umhvørvisstýrið) og Landsstýrið geva.

***Reglur ið hava serligan týdning fyri kolvetnisvirksemið***

Av størsta týdningi fyri leiting eftir olju er kapittul 9 í lógini um vernd av havumhvørvinum. Kapittulin, ber yvirskriftina “Anden forurening af havet”, og í § 32 verður sagt:

*"Miljøministeren kan fastsætte regler til beskyttelse af havmiljøet om udledning i havet af stoffer eller materialer, der stammer fra undersøgelse eller udnyttelse af undersøiske mineralforekomster, herunder kulbrinter.*
*Stk. 2. Miljøministeren kan i medfør af stk. 1 fastsætte, at udledning af bestemte stoffer eller materialer ikke må finde sted, såfremt udledningen må antages at indebære væsentlig risiko for forurening af havmiljøet”.*

Lagt kann verða afturat, at Danmark hevur brúkt heimildina við at áseta kunngerð nr. 394 frá 17. juli 1984 "om udledning i havet af stoffer og materialer fra visse havanlæg”. Greiningin av burturveiting í kunngerðini er “enhver bortskaffelse i havet af stoffer og materialer, der er en direkte følge af efterforskning, herunder brøndtesting, og indvinding, herunder produktionsboring, af råstoffer i undergrunden under havbunden”. Samsvarandi fyriskipanir um at veita burtur á sjógv evni, ið stava frá kolvetnisvirksemi, eru í hinum Norðsjóvarlondunum og støðugt altjóða samstarv fer fram við tí stevnu at avdúka fylgjurnar av ymiskum kemiskum evnum, sum brúkt verða í sambandi við borivirksemi.

Annað øki, ið møguliga er týdningarmikið fyri kolvetnisvirksemið, er evnisbrenning á sjónum. Um hetta sigur § 33, at loyvi krevst frá umhvørvismálaráðharranum, men lagt verður afturat, at "Afbrænding af stoffer på fiskeriterritoriet ved Færøerne kræver tillige tilladelse fra Færøernes Landsstyre.”

Myndugleikin at gera reglur at verja havumhvørvið, tá um leiting og framleiðslu av kolvetni ræður, er sostatt hjá ríkismyndugleikunum. Harafturímóti hevur Landsstýrið umsjón við, at reglurnar verða hildnar innan fyri føroyska fiskimarkið. Hetta er eftir § 47, stk. 3, sum sigur:

"For fiskeriterritoriet for Færøerne udøves kontrollen efter stk. 1 og beføjel-

serne efter stk. 2 (*m.a. heimildin at gera kanningar á pallum, ritstj.)* tillige af Færøernes Landsstyre samt myndigheder, som Færøernes Landsstyre bemyndiger dertil."

Um tilbúgving verður sagt í kapitli 10, at innan fyri føroyska fiskimarkið og í føroyskum havnum stendur Føroya Landsstýri fyri arbeiðnum at basa olju- og evnisdálking, og stendur Landsstýrið eisini fyri at reinsa strandaleiðir. Skoytast kann uppí, at Landsstýrið í skrivi dagfest 18. desember 1989 hevur latið Vaktar- og Bjargingartænastuni (V&B) henda myndugleikan, og at løgtingið seinni hevur góðkent, at Føroyar taka undir við Keypmannahavnaravtaluni, sum snýr seg um sínámillum tilbúgvingarhjálp millum Norðurlond.

***Konglig fyriskipan verður endurskoðað***

Í brævi frá 11. mars 1996 til landsstýrismannin í umhvørvismálum hevur Oljuráðleggingarnevndin víst á tað óhepna í, at Landsstýrið ikki hevur myndugleikan at áseta reglur at verja havumhvørvið í sambandi við kolvetnisvirksemi.

Nevndin ger kortini vart við, at havumhvørvið sum kunnugt snýr seg um mangt annað enn oljuvirksemi, og at hon ikki heldur tað vera sín setning at viðgera burturveitingarreglur, skipan av umhvørvisumsiting o. a., við tað at hesi mál av røttum liggja undir umhvørvislóggávuni og umhvørvismyndugleikunum. Landsstýrismaðurin verður tískil biðin um at seta ein arbeiðsbólk at kanna hesi viðurskifti.

Landsstýrismaðurin fylgdi áheitanini og setti arbeiðsbólk í apríl 1996 við umboðum fyri Heilsufrøðiligu Starvstovuna, Vaktar- og Bjargingartænastuna, Fiskirannsóknarstovuna, Oljuráðleggingarnevndina og Oljufyrisitingina. Bólkurin skal m.a. hyggja at, hvørjar reglur Danmark hevur ásett við heimild í havumhvørvislógini, og um hesar við fyrimuni kunnu fáa gildi í Føroyum. Umframt skal bólkurin hyggja at tilbúgvingarviðurskiftum og meta um starvsfólkatørvin, sum stendst av at umsita havumhvørvislógina og fyriskipanirnar.

Landsstýrismaðurin hevur samstundis biðið danskar myndugleikar um at fara undir arbeiðið at gera uppskot til nýggja kgl. fyriskipan um havumhvørvisvernd. Nýggj kgl. fyriskipan hevði ivaleyst kortini komið til umrøðu, við tað at Danmark í 1993 fekk nýggja havumhvørvislóg, m.a. grundað á nýggjar altjóða skyldur. Nýggja danska havumhvørvislógin, lóg nr. 476 frá 30. juni 1993 við seinni broytingum, er enn meira enn 1980-lógin, ein rammulóg, og stendst hetta av ógvuliga útgreinaðu tøkniligu krøvunum á økinum.

**Nøkur fyrisitingarlig viðurskifti**

Kgl. fyriskipanin um havumhvørvið gevur, sum nevnt, Landsstýrinum ávísan myndugleika at gera reglur at galda innan fyri føroyska fiskimarkið. Myndugleikin er bara brúktur í einum føri, tað er at gera kunngerð um skipanir í føroyskum havnum at taka ímóti oljuleivdum o.ø.. Eftirlitið við hesum skipanum hevur Landsstýrið á jøvnum føti við tilbúgvingarskyldurnar lagt til Vaktar- og Bjargingartænastuna.

Vaktar- og Bjargingartænastan hevur givið til kennar, at teirra umhvørvissetningar av tørvandi arbeiðsmegi ikki higartil hava verið settir høgt, og at teirra tilbúgvingarútgerð ikki er nøktandi, um umhvørvisvanlukka skuldi borist á, t.d. um tangaskip skuldi rent á land.

Løgtingslógin um umhvørvisvernd (á landi) og kunngerðirnar, ið ásettar eru við heimild í lógini, umsitur umhvørvisdeildin (deildarleiðari og tveir

málsviðgerðar) á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Lagt kann verða afturat, at umhvørvisdeildin hevur ongantíð fingið tey starvsfólkini, sum hildin vórðu neyðug, tá ið løgtingslógin um umhvørvisvernd á landi varð samtykt.

Í Landsstýrinum hevur ein fulltrúi umhvørvismál sum part av sínum ábyrgdarøki.

Umsitingarliga orkan á umhvørvisøkinum er sostatt ikki nøktandi, um ætlanin er at hava dygga umhvørvisumsiting í sambandi við eina oljuvinnu.

***Nýggir setningar sambært havumhvørvislógini***

Sum áður nevnt væntast nýggja kgl. fyriskipanin at geva Landsstýrinum uppaftur meiri myndugleika at gera reglur, m.a. soleiðis at Landsstýrið kann gera kunngerðir um at veita evni á sjógv, ið koma av kolvetnisvirksemi. Harumframt má kolvetnisvirksemið væntast at krevja ávíst eftirlit við, at kunngerðirnar um burturveitingar o. a. verða hildnar.

Upplýst er frá danska umhvørvisstýrinum, at tveir fulltrúar umsita kunngerðirnar um burturveitingar. Í hesum sambandi eigur at verða nevnt, at á danska landgrunninum verður kolvetni framleitt, og tí fær umhvørvisstýrið støðugt umsóknir um góðkenningar at lata ávís evni á sjógv. Í einum leitiskeiði fer borivirksemið at verða spjatt og tørvurin á starvsfólki samsvarandi minni. Hvat umsjón viðvíkur hevur umhvørvisstýrið upplýst, at tey ikki fremja veruligt eftirlit, men at tey til eitt vist arbeiða saman við danska Orkustýrinum, soleiðis at starvsfólk úr Orkustýrinum, tá ið tey fremja eftirlit á boripallum, taka sýnisroyndir við til umhvørvisstýrið.

Tað má haldast at vera skynsamt at leggja Landsstýrisins setningar sambært (komandi) kgl. fyriskipan um havumhvørvisvernd til tann myndugleika, sum umsitur landumhvørvið. Hetta kann væntast at geva rakstrarfyrimunir í umsitingini, samstundis sum møguleikin er at byggja upp *ein* sterkan og dyggan umhvørvismyndugleika við ábyrgd bæði fyri land- og havumhvørvi. Mælt verður til, at umhvørvismyndugleikin samstarvar við oljumyndugleikan í málum, sum eru týdningarmikil fyri kolvetnisvirksemi, m.a. tí at serligi tøkniligi førleikin hjá oljumyndugleikanum kann verða brúktur av umhvørvismyndugleikanum.

Danska umhvørvisstýrið hevur mælt til, at føroyskir myndugleikar, um so er, at Landsstýrið tekur á seg ábyrgdina fyri teir partar av havumhvørvinum, sum hava við kolvetnisvirksemi at gera, verða uppi í viðkomandi pørtum í tí altjóða samstarvi, sum m.a. er í Working Group on Sea-Based Activities (SEBA) undir nevndini, sum hevur ábyrgd av sáttmálanum um havumhvørvisvernd í Útnyðringsatlantshavi, smbr. brot 2.4 í fylgiskjali 5.1-1. Arbeiðsbólkurin viðger m.a., hvørji borievni eiga ella eiga ikki at verða brúkt í sambandi við frálandsboringar. Ein samanlagdur umhvørvismyndugleiki kann væntast léttari at kunna taka á seg uppgávu, sum ta at taka lut í millumtjóða samstarvi.

Viðvíkjandi tilbúgvingarligum uppgávum verður víst til kapittul 3.4 *um trygd, arbeiðsumhvørvi og tilbúgving* fyri havstøðir, sum eisini nemur við myndugleikatilbúgving.

***Umsiting av umhvørvisreglunum í løgtingslógini um kolvetnisvirksemi***

Í hesum kapitlinum er áður greitt frá reglunum í uppkastinum til løgtingslóg um kolvetnisvirksemi, sum koma ytra umhvørvinum við. Av frágreiðingini skilst, at fyri tað mesta er talan um reglur, sum hava við sær, at umhvørvisatlit verða

røkt í sambandi við ítøkilig tiltøk, annaðhvørt tað er tá ið myndugleikarnir velja øki, ella tá loyvishavin hevur í hyggju at fara undir eina leitiboring.

Umhvørvisreglurnar í løgtingslógini um kolvetnisvirksemi kunnu við øðrum orðum sigast at vera samantvinnaðar við onnur kolvetnispolitisk og -umsitingarlig mál. Við hesum í huga verða hesi umhvørvisatlit at meta sum óloysiligir partar av oljuumsitingini annars. Tí verður mælt til, at umhvørvisuppgávurnar sambært løgtingslóg um kolvetnisvirksemi á jøvnum føti við aðra umsiting, sum stendst av lógini, verða latnar oljumyndugleikunum, smbr. tilmælini í kapittul 3.3 um *Fyrisiting*.

Haldast má kortini, at oljumyndugleikanir hava brúk fyri at leita sær ráð hjá øðrum myndugleikum og stovnum í sambandi við umhvørvisligu tættirnar í kolvetnisvirkseminum. Tørvurin á hesum væntast serliga at koma fram í sambandi við t.d. umhvørvisligar fylgjumetingar, og tí verður mælt til, at undir oljumyndugleikunum verða settir verkætlanarbólkar við umboðum fyri aðrar myndugleikar, stovnar og yrkiskøn. Harumframt verður tørvur á samstarvi við aðrar myndugleikar, t.d. Vaktar- og Bjargingartænastuna í sambandi við at oljumyndugleikarnir góðkenna tilbúgvingarætlanirnar hjá loyvishavunum (fyristøðufeløgunum).

## Fylgiskjal 5.2-1 Ymiskir lekar úr oljuútbúnaði

### Mynd 5.2-1 Boriútbúnaður sum møgulig dálkikelda




Boriútbúnaður fer at vera dálkingarkelda, um hann so stendur á botni ella flýtur. Við reglugerðum ber til at minka um slíka dálking, somuleiðis hava feløgini eisini áhuga fyri at minka um hana, av tí at tey leggja dent á at vera "grøn" í mannaeygum.

Lekar kunnu koma fyri beint við boriholið, so olja lekur beinleiðis í havið. Feløgini leggja doyin á at steðga slíkum lekum alt fyri eitt.

Av pallinum verður/verða:

1. Vanligt húshaldskloakkvatn úr íbúðarøkinum veitt á sjógv.
2. "Framleiðsluvatn" veitt á sjógv. Í tí er hópur av ymiskum evnum, sum ávirka umhvørvið á ymiskan hátt.
3. Regn og sjógvur úr arbeiðsøkinum veitt burtur. Í teimum kunnu vera umhvørvisskaðilig evni. Umframt tað verður vatn veitt á sjógv, sum hevur verið nýtt í ymiskum evnafrøðigerðum, og sum umhvørvisskaðilig evni eru í.
4. Borimóra og evni, sum nýtt verða, tá ið borimóran verður endurnýtt, beind burtur. Borispønir verða eisini beindar av vegnum.
5. Lekar, ið koma í av óvart.
6. Kølivatn frá virkseminum á boripallinum.

Vanligt rusk, t.d. pakkitilfar o.a. skal førast í land og beinast av vegnum.

Krav kann verða ásett um, at borispønir og onnur føst evni verða førd í land og beind burtur.

Fyri allar veitingar frá boriútbúnaði galda strangar reglur viðvíkjandi mest loyvda innihaldi av skaðaevnum og hægst loyvdu mongdum fyri hvørja tíðareind. Tingast verður áhaldandi um hesar reglur í París-sáttmálanevndini, sum árliga hevur fundir í

undirnevndum, og reglurnar verða vanliga settar í verk so hvørt í einstøku londunum. Feløgini hava vanliga innaneftirlit. Tað hevur við sær, at frágreiðingar regluliga verða sendar til myndugleikarnar, sum umframt tað sjálvir kunnu skipa fyri eftirlitsvitjanum á útbúnaðinum, bæði vitjanum, ið boðað er frá frammanundan, og slíkum, har eftirlitið kemur uttan at boðað er frá.

**Mynd 5.2-2 Náttúrligar tilgongdir eftir at olja er likin á sjógv**




Lekur olja á sjógv, legst í fyrstu atløgu skón á vatnskorpuna (*spreading*). Ein partur av oljuni kann verða súrevnaður (oxideraður) til skaðiligari samansetingar (*photooxidation*), men allir lættir tilfarsliðir guva so við og við upp í luftina (*evaporation*).

Er vindurin so hvassur, at aldurnar bróta, verður partur av oljuni malin í smádropar í luftini (*aerosol formation*) og ein annar partur mylgraður sum smádropar í sjógv (*dispersion*). Olja kann eisini søkka, við tað at hon loysist upp í sjógvi (*dissolution*), ella loksins við at hon kleimist upp í smábitlar í sjónum (*absorption*). Allir hesir tilfarsliðir eru ógvuliga smáir í vavi og hava tískil til tað stóran yvirflata. Tær bakteriur, ið forkoma oljuni, hava tískil stórt øki at virka inn á, og niðurbrótingin (*biodegradation*) fæst skjótt frá hondini.

Tað kemur eisini fyri, at havverur fáa í seg ella eta slíkar oljubitlar, og soleiðis koma teir inni í føðsluketuna (*ingestion by animal life*). Royndir hava víst, at slíkir oljubitlar heilt skjótt - tað snýr seg bara um vikur - verða brotnir niður og hvørva úr verunum, og harvið er beint fyri teimum.

Nakrir tilfarsliðir kunnu koma niður á botn, serliga slíkir sum eru kleimdir upp í smábitlar. Eisini her bróta bakteriur teir niður, ella taka botnverur teir til sín, bróta teir niður og sleppa sær av við teir.

Rekur olja upp á land, kunnu oljuløgini gerast tjúkkari. Bróta aldur, har olja liggur, fáa vit eina olju/vatnmylking, ið er tjúkk og kleimin (*mousse*), og sum kann leggjast á plantur, dýr og lendið. Stendur ætt og avfall á slíkar strendur, vaskast mylkingin leys og spjaðist, og avleiðingarnar verða ikki so ógvisligar (*penetration* og *release*).

Er ódnarstormur, sum tá ið "Braer"-vanlukkan hendi, kann olja, ið hurlað er upp í loft, fúka inn á land, men í Hetlandi var ávirkanin, til tað, stutt.

## Fylgiskjal 5.2-2 Umhvørvisfylgjumetingar

Fylgjumetingar eru týdningarmikil liður, tá ið metast skal um møguligar umhvørvisfylgjur av oljuvinnu, bæði umsitingarliga og tá tiltøk skulu setast í verk at sleppa undan ella at avmarka skaðaávirkan. Slíkar metingar kunnu fevna um heil øki ella verða avmarkaðar til einstaka oljuleið.

Við slíkum fylgjumetingum - tað verða oljufeløgini, sum evna til slíkar metingar fyri einstøku leiðirnar - fer at bera til at ætla um, um virksemið t.d. skal tíðaravmarkast, ella um fylgjumetingarnar kanska eru ófullfíggjaðar og skulu gerast meira fullkomnar. Oftast verður skipað fyri breiðum kunningarfundum, har áhugaðir stovnar og áhugabólkar verða spurdir til ráðs. Her verður sett upp yvirlit yvir innihaldið í eini fylgjumeting bygt á dømi úr Noregi, Bretlandi og Nýfunnalandi.

***Jarðfrøði***

Havbotnurin skal kortleggjast serliga viðvíkjandi alisligu og evnafrøðiligu samansetingini. Serliga verður eftir forskriftum, sum frammanundan eru givnar, kannað eftir, hvussu botnurin er dánaður, og hvørjum tilfari hann er úr. Hetta hevur serligan týdning, tá ið mett verður um broytingaravleiðingar, ið kunnu koma í, tá ið borað verður, og sum aftur kunnu ávirka lívfrøðiumhvørvið og í ávísan mun fiskiskapin.

***Havfrøðilig viðurskifti***

Her verða ráðandi havrákini í økinum lýst, hvussu hart og hvønn veg rekur, samstundis sum ymisk avvik eisini verða lýst. Undir Føroyum eru hesi viðurskifti serliga fløkjalig, av tí at tað á o.u. 500 metra dýpi og djúpari rekur heilt øðrvísi enn longri uppi í sjónum. Harumframt er talan um sjógv við ymiskum hitalagi. Hetta kann hava týdning, tá ið arbeitt verður við "risers", t.e. liðiligar slangur, sum føra olju frá pumpustøðum á botni til flótandi framleiðslueindir (Floating Production, Storage and Offloading - FPSO).

Havstreymarnir uppi í sjónum hava størstan týdning, tá ið talað verður um, hvussu møguligir oljulekar ferðast, (sí seinni undir brotinum um lekar, ið koma í av óvart).

Tá ið veðurlagsviðurskifti verða lýst, verður sagt frá aldumynstri og -hædd, og tá verða nevnd bæði miðaltøl og tað ógvisligasta, ið koma kann fyri.

Loksins verða evnafrøðiligu eginleikarnir í sjónum lýstir saman við bakgrundarinnihaldi av møguligum dálkingarevnum.

***Viðurskifti viðvíkjandi lofthavinum***

Vanliga veðurlagsmynstrið verður lýst, og tá verður sagt frá veðrinum tær ymisku árstíðirnar, miðaltølum og evstutølum, tá ið hugsað verður um vindferð og ætt, hvussu ofta haðrar ódnir koma fyri, mjørki, ringt sýni og grovt avfall, og hvussu trygt ella ótrygt tað er at arbeiða undir slíkum viðurskiftum.

Umframt hava vindferð og ætt stóran týdning fyri, hvørja leið møguligur oljuleki rekur, og hitalagið ger av, hvussu nógv ella lítið guvar burtur frá slíkum leka, og tískil eisini hvussu oljuavleiðsla, sum rekur undan ætt og við streymi, er sett saman.

***Strendurnar***

Strandarviðurskifti verða lýst bæði viðvíkjandi jarðfrøði og skapi. Serliga nógv

verður gjørt burtur úr at lýsa sjálva strandarlinjuna, ið kann verða dálkað, um olja lekur á sjógv. Kannað verður tí eftir, hvussu alda virkar á strondina, og serliga verður hugsað um, hvussu oyggjarnar eru dánaðar, har hart rekur í sundum við afturundirgerðum inni á firðunum. Hetta tí at ætlast skal um, hvussu t.d. havnaløg og alibrúk møguliga verða ávirkað.

***Lívfrøðiliga umhvørvið***

Av tí at mest verður fryktað fyri lívfrøðiligu avleiðingunum, hava teir partar, ið víkja at lívfrøðini, serligan týdning, tá ið mett verður um møgulig skaðaárin av tøkniligum ávum.

Grundleggjandi er at staðfesta, at best er, um støðiskanningar eru gjørdar, sum lýsa viðurskiftini, sum tey eru, áðrenn farið verður til verka, tí slíkar kanningar eru grundarlag undur eftirkanningum av møguligum broytingum, ið staðist hava av virkseminum.

Her verða øll plantu- og dýrasamfeløg lýst út frá vistfrøðiligum sjónarmiði, har ið allar broytingar fara at ávirka á ymsan hátt, bæði upp eftir í føðsluketunum og niðureftir; sagt verður frá árstíðarskifti, føðievnum fyri aðrar verur, hvussu stórir teir einstøku stovnarnir eru, hvussu verurnar tola evnafrøðiliga ávirkan, og hvussu dýrasløg, sum annaðhvørt svimja ella reka ígjøgnum økir, ferðast. Viðgjørt verður, hvussu tey ymisku samfeløgini tola umhvørvisbroytingar.

Út frá hesum skal lýsast:

- Sjóplantur; í Føroyum fastur tari. Í hvussu stóran mun tey ymsu tarasløgini eru at finna á ymisku strandasløgunum, og hvussu viðkvom tey eru fyri oljulekaárinum. Dýralívið á strondunum og við strendurnar, soleiðis at heildarmyndin lýsur útbreiðsluna av ymisku plantu- og dýrasamfeløgunum fram við strandarlinjuni. Umframt tað er ynskjandi, at sagt verður frá oleoklastum, t.e. verum, ið bróta niður olju. Hvar eru tær at finna, hvussu mangar eru tær, og hvussu skjótt nørast tær?
- Uppsjóvarvistfrøðiskipanin, sum er at finna í virkisøkinum, og hvussu viðkvom hon er mótvegis dálking. Her kunnu lyklaverur verða valdar burturúr, t.e. verur, sum annaðhvørt beinleiðis ella óbeinleiðis eru langt uppi í føðiketuni, við serligum atliti at fiski, fiskamurtum og ungfiski. Eisini í hesum førinum er ynskiligt at vita, hvussu statt er við verum, ið bróta niður olju - t.e. í uppsjóvarøki.
- Fiskur, her uppií serliga rognkorn og murtur, í hvussu stóran mun tey eru at finna í økinum tær ymisku ársins tíðirnar, hvussu viðkvom tey eru fyri dálking, hvussu nógv er til, hvussu ungfiskur ferðast í økinum og hvussu hetta skiftir frá árstíð til árstíð. Eru gýtingarøki í virkisøkinum, skal verða greitt frá, nær og hvussu leingi gýtt verður, og frá nøgdini av eggum og murti í økinum. Sagt verður frá, hvønn týdning økið hevur fyri fiskiskap, eisini tá ið talan er um ferðafisk.
- Havsúgdýraferðing og møgulig serkrøv um fyrilit fyri hesum í føroyskum sjógvi, har mest er um hvalabólkar at røða, sum ikki tykjast at ørkymlast stórvegis av oljuvirksemi.
- Fuglar eru serliga viðkvæmir mótvegis oljublettum á havinum, tí oljan oyðileggur teimum fjøðurhamin, og teir doyggja. Svartfuglur flytur úr bjørgum og urðum í Føroyum, partvíst saman við pisunum til føðsluøki á víðum havi, partvíst til økir, har teir hava vetrarvist; summi av hesum økjum kunnu verða millum tey, ið boðin verða út. Greitt verður frá, hvar ið búfuglur serliga heldur til, hvar ið

hann leitar sær føði, og fyri alt økið verður sett upp yvirlit yvir, hvørja tíð á árinum fuglur og ungfuglur heldur til hvar. Hetta verður sett í samband við myndlarnar, ið sýna, hvussu møguligir oljulekar fara at ferðast.

- Ávís sløg í vistskipanunum kunnu vera serliga viðbrekin fyri dálking, og hesi verða viðgjørd meira nágreiniliga. Í Føroyum hava handilslig fiskasløg serligan áhuga, og vandi kann vera fyri, at marknaðarprísir lækka, av tí at smakkur fer at ganga at fiskinum. Sagt verður tí frá veiðitølum fyri árstíðirnar, og flytifiskasløg verða eisini tikin við í metingarnar. Her verða sostatt eisini nevnd sløg, her uppií bleytdýr, sum í sær sjálvum ikki hava søluligan týdning, men sum handilsligur fiskur etur.
- Hóast dálkingarstigið í havinum um Føroyar higartildags hevur verið hildið at verið ógvuliga lágt, eigur at verða greitt frá, hvørji kemisk evni eru at finna í sjónum og í legugrýtinum, evni, sum kunnu metast sum dálking, og tað uttan mun til, um mett verður, at dálkingin er natúrlig bakgrundardálking ella skapt av mannaávum.
- Sambært undanfarnum royndum verður mett um førleikan hjá vistskipanini at taka upp í seg ella bróta niður dálkandi evni frá virkseminum.

### *Umhvørvisligar avleiðingar av virkseminum*

Fyri hvørja einstaka verkætlan, í ávísum førum fyri fleiri verkætlanir, ið hanga saman, verða evnað til fylgjumetingar.

Fyristøðufelagið skal evna til eina frágreiðing, áðrenn farið verður til verka í økinum. Í slíkari frágreiðing verða ymsu skeiðini í verkætlanini lýst, og mett verður um, hvussu tey møguliga fara at ávirka umhvørvið:

- Ávirkan á vistskipanina, serliga ávirkan á samanseting hennara og samspælið millum staklutirnar við serligum denti á broytingar, sum møguliga kunnu elva til størri broytingar.
- Møguligar savningartilgongdir í vistskipanini og staklutum hennara sambært tøkari vitan.
- Vantandi upplýsingar og vitan um, hvussu vistskipanin verður ávirkað. Viðurskifti, sum valda óvissu um forsagnir, sum settar verða fram.
- Krøv og reglur um fyrivarni, sum samstundis, sum víst verður til skrivaðar reglugerðir ella rímiligar metingar, kunnu setast til veruligar kanningar, upplýsingarsavnan og framtíðar fylgikanningar.

### *Árin av sjálvari verkætlanini*

Fyri hvørt skeið í virkisætlanunum skal verða gjørd ein meting av møguligum umhvørvisavleiðingum, her uppí serliga:

- Tí økinum kring virksemið, sum roknast kann við møguliga verður fyri slíkum árini.
- Oljulekum av øllum sløgum við serligum denti á at lýsa ávirkanina á fugla- og fiskastovnar, heruppií eisini møgulig árin á fiskiskapin: at fiskigrunnar fara fyri skeytið, at fiskireiðskapur verður oyðilagdur ella dálkaður, at smakkur fer at ganga at veiddum fiski og onnur árin á fiskiskap sum vinnugrein.
- Mongd og samanseting av flótandi tilfari, so sum borimóru, framleiðsluvatni,

fráveitingarvatni og spillvatni og mannagongdum, brúktar verða, tá ið beinast skal fyri hesum.

- Mongd og samanseting av evnum, sum guva upp í lofthavið, eisini tá ið gass verður brent, og frá øðrum keldum.
- Hvussu havbotnurin verður órógvaður, og á hvønn hátt fastarusk verður goymt, m.a. borispønir. Ætlast skal eisini um, hvussu tær møguliga ávirka royndina eftir fiski.

***Oljulekar, ið henda ótilvitað***

Av tí at størsti ekkin er knýttur at tí, at stórar olju- og gassnøgdir og nøgdir av ymiskum kemiskum evnum og øðrum dálkandi evnum møguliga leka á sjógv, verður - út frá tøkum taltilfari - greinað út, hvørja ávirkan møguligir oljulekar kunnu hava. Greiðast skal frá, hvat í ringasta føri kann henda, bæði tá ið hugsað verður um nøgd, møguliga útbreiðslu og ferðing, og hvussu møguligir lekar ávirka vistskipanina.

Longu meðan leitað verður, men alt meira, tá ið farið er undir framleiðslu, kann vandi vera fyri, at olja lekur á sjógv, partvíst av boripøllum, partvíst av FPSO, tá ið farið er undir framleiðslu, og partvíst úr tangaskipum, sum skulu føra útvunnu oljuna til reinsiverk á landi.

Í hesum sambandi verður settur upp ein myndil, sum sýnir, hvussu slíkir lekar fara at reka (Oil spill trajectory model). Myndilin skal byggja á upplýsingar fyri øllum bundnatølum (parametrum), ið viðkomandi eru, eitt nú hvønn veg, ið rekur, og hvussu hart, ætt og vindstig, hvørji evni eru í lekanum, og hvussu tey kunnu broytast, tá ið tey reka undan ætt og streymi, t.d. við tað at okkurt guvar burtur, okkurt verður brotið niður og ávísir staklutir verða umgjørdir.

Metast skal um árin á fugl og fisk og vistfrøðiskipanina í síni heild, og um avleiðingarnar av einum oljuleka sum rekur upp á land.

Tey háttaløg, ið brúkt verða, tá ið møgulig árin verða mett, skulu verða lýst so, at leikfólk kunnu skilja niðurstøður, og soleiðis, at serfrøðingarnir kunnu meta um tey háttaløg, sum nýtt er, og tær útrokningar, sum gjørdar eru.

***Tiltøk, sum skulu avmarka skaðaárin***

Her verður greitt frá teimum atgerðum, settar verða í verk, og tí útgerð, sum brúkt verður at fyribyrgja møguligum umhvørvisárinum í ymisku verkætlansskeiðunum, og at avmarka árin. Greitt verður frá fíggjarjáttanum og útgerð, sum eru tøk í sambandi við, at skaðaavmarkandi tiltøk skulu setast í verk, um olja lekur á sjógv, hvat slag og hvussu nógv útgerð er tøk, og hvussu verður hon goymd - á framleiðslueindini, á skipum í námind ella á landi? Harafturat verður lýst, hvussu long tíð væntast at ganga frá tí, at varskógvað verður um óhapp, og til reinsitiltøk kunnu setast í verk. (Hetta hoyrir tó upp í trygdarkapittulin, kap. 3.4).

Umframt tað verður gjølla sagt frá ætlanunum um at ansa eftir og hava eftirlit við oljuárini. Hesar lýsingar skulu vera væl og virðiliga og nágreiniliga úr hondum greiddar og greiða frá, um hesi tiltøk samsvara og møguliga umskarast við tiltøk, sum stjórnarmyndugleikarnir seta í verk.

## 5.3 ONNUR ÁVIRKAN

Umframt tað árin á arbeiðsmarknað, búskap, fiskivinnu, umhvørvi o.a., sum drigið er fram her frammanundan, kann roknast við, at møgulig oljumenning - alt eftir vavi og menningarferð - eisini fer at ávirka samfelagsviðurskiftini í síni heild.

Í føroyska samfelagskjakinum higartil um oljuna og ávirkan hennara hómast vónir um, at møgulig oljuvinna fer at gera sítt til at loysa teir trupulleikar, sum føroyska samfelagið hevur nú; men eisini hómast ein ótti fyri óhepnum árinum, sum oljuvinnan kann hava á føroysk samfelagsviðurskifti í síni heild og serliga á mentanina. Tað, ið summi síggja sum ein møguleika, meta onnur sum vanda.

Tá ið mett verður um vandan fyri skaðiligum árini á føroyskt samfelagslív og føroyska mentan, verður oljuvinna veruleiki, er gagnligt at ásanna, at Føroyar í dag *á ongan hátt* eru eitt afturlatið, siðbundið samfelag, sum er hýst úti frá ávirkan uttaneftir. Tvørturímóti hava Føroyar seinastu hálvuaðru øldina ment seg til at vera eitt rættiliga opið, fleirstreingjað og nýmótans samfelag við fjølbroyttum samstarvi við umheimin bæði vinnuliga og mentanarliga. Samskiftismenningin hesa seinastu tíðina við m.ø. fylgisveinasjónvarpi og Interneti hevur av álvara knýtt Føroyar at heimssamfelagnum.

Tað er eisini vert at leggja sær í geyma, at tað ikki nýtist at vera soleiðis, at Føroyar í framtíðini bara hava tveir menningarmøguleikar: *annaðhvørt* eina friðsama, hóvliga menning við ongari olju *ella* eina ógvusliga menning við olju.

Verður olja funnin, kann tað væl vera, at oljumenning kann hava við sær avgerandi broytingar í teimum grundleggjandi fyritreytunum, føroyska samfelagslívið hevur at virka eftir. Men eitt samfelag, sum higartil hevur grundfest tilveru sína á so skiftandi og úteftirhorvandi vinnugrundarlag sum fiskiskap og útflutning av fiskaúrdráttum, má væntast at hava vant seg við at umsita broytingar og ávirkan uttaneftir.

Ikki minst gongdin í búskapi og samfelagsviðurskiftum, nú ógvisligar skipanarbroytingar eru farnar fram, hevur víst, at Føroyar saktans kunnu koma í vandasjógv bæði búskaparliga, politiskt og samfelagsliga, uttan at olja er uppií - tað hava fyrst marglætisárini í 1980-unum og síðani kreppuárini í 1990-unum víst til fulnar.

Tað liggur nær at hugsa sær, at verður oljuvinna ikki veruleiki, so er hin kosturin ein áhaldandi búskaparlig naggatódn, sum hevur tað við sær, at fólk framvegis flyta av landinum, so fólkagrundarlagið, sum er fortreyt fyri framhaldandi menning av føroyskum máli og føroyskari mentan, skerjist.

Ein oljumenning kann vera *ein* av møguleikunum at venda slíkari óhepnari samfelagsgongd, men vandi verður tá eisini fyri, at broytingarnar taka seg upp við slíkari ferð, at virðismiklar samfelagsskipanir kunnu verða fyri skaða.

Neyðugt er at kanna gjøllari, hvørja ávirkan oljuvinna veruliga kann væntast at fáa á samfelagslív og mentan í síni heild. Soleiðis gerst føroyska samfelagið ført fyri so væl sum møguligt at fyrireika seg til slíka gongd, at leggja skilagóðar ætlanir, at fáa oljumenningarávirkanina á føroyska samfelagið at samtykkja við egnu virði og stavnhald samfelagsins og seta í verk tiltøk sum forða fyri møguligum óhepnum avleiðingum.

### 5.3.1 Ávirkanir í ymisku skeiðunum í eini oljumenning

Sum kunnugt hevur *forkanningarvirksemið*, sum higartil hevur verið, ikki havt við sær ávirkan av týdningi í føroyska samfelagnum.

Sum víst er í kapitlunum frammanundan, verður heldur ikki roknað við stórvegis ávirkan í tí *leitiskeiði*, sum møguliga liggur fyri framman.

Væntast kann ávíst seismikk- og borivirksemi á víðum havi, serliga í summarhálvuni. Sambandið við føroyska samfelagið verður óivað avmarkað til, at í Føroyum fer lyklamanning frá fyristøðufeløgunum og týdningarmestu útvegarafeløgunum at halda til. Umboð ella serfrøðingar frá hesum feløgum koma javnan higar í arbeiðsørindum, veitingarskip koma eina ferð um vikuna í føroyska havn, skiftismanningar fara at ferðast um flogvøllin o.s.fr. Í ávísan mun kann væntast (sí 4. part), at føroyingar og føroysk feløg fáa arbeiði úti á pøllunum, í landi og hjá oljufeløgunum uttanlands.

Í *útbyggingarskeiðinum* kann ávirkanin, bæði á búskapin og arbeiðsmarknaðin - og harvið eisini samfelagið - gerast ógvuslig ta stuttu tíð, tað stendur við. Henda ávirkan kemur í, tá ið útbúnaður, ið hevur samband við, at olja/gass skulu førast í land, verður settur upp á landi. Ovurstór byggiarbeiði kunnu, meðan tey eru í gongd, kollvelta eitt lítið samfelag, og ofta merkjast avleiðingarnar av slíkum arbeiði leingi á viðkomandi plássi. Í sambandi við verkætlanir av hesum slagnum ræður um at skipa so fyri, tá ið bygt verður, at óhepnu samfelagsligu avleiðingarnar verða so smáar sum møguligt.

Í *framleiðsluskeiðinum* verða árinsmøguleikar í víðari merking í longri tíð. Fyristøðufeløgini og útvegarafeløgini fara nú at stovnseta stórar rakstrardeplar í Føroyum, helst mannaðir bæði við føroyingum og fólki uttaneftir. Møguleikarnir fyri arbeiðsplássum til føroyingar á framleiðslueindum á víðum havi verða nógv størri, somuleiðis umborð á veitingar- og hjálparskipum, sum knýtt eru at eindunum. Væntast kann, at fleiri føroyingar fáa starv í olju- og útvegarafeløgunum, har teir skulu skifta ímillum at arbeiða í Føroyum og í útheimi. Virksemið á útgerð-ararstøðum fer at vaksa. Føroyskar fyritøkur og undirdeildir av útlendskum veitingarfyritøkum fara eisini at fáa uppgávur, og útlendskir serfrøðingar fara at ferðast ímillum í alt størri mun. Samanumtikið er væntandi at mangir føroyingar gjøgnum altjóðamerkta oljuheimin fáa nýggja ávirkan uttaneftir.

*Støðir, har kolvetni verður ført í land og viðgjørt*, kunnu útvega heilt nógv, upp á seg trygg, arbeiðspláss til bæði føroyskar og útlendskar serfrøðingar. Hesi arbeiðs-pláss kunnu gagna føroyska samfelagsbúskapinum í síni heild, men serliga á pláss-inum har arbeitt verður, har tey ivaleyst fara at ávirka alt bygdar-/býarsamfelagið - skipan tess og virkishátt.

*Politiska skipanin* fer at verða fyri alsamt størri ávirkan frá altjóða oljuídnaðinum, men eisini frá kreftum í Føroyum. Hvussu væl politiska skipanin megnar at handfara seráhugamál fer sanniliga at standa sína roynd. Viðurskifti Føroya við hinar ríkispartarnar og ríkisfelagsskapin sjálvan verða ávirkað, serliga um áralanga skipanin við játtanum og veitingum til Føroya úr Danmark heldur uppat. Altjóða sambond Føroya, sum í dag mest snúgva seg um fiskivinnuáhugamál, verða í framtíðini meira ávirkað av oljuviðurskiftum.

Tá ið nøkur ár eru liðin í framleiðsluskeiðinum, kann væntast, at *skattir og avgjøld* fáa tað at fløða í landskassanum, og av tí skapast møguleikar, partvíst at loysa seg frá veitingum úr danska ríkiskassanum, partvíst at veita fólkinum skattalætta og vaksa um virksemið hjá tí almenna, soleiðis at møguleikarnir gerast

betri at stuðla sosialum og mentanarligum endamálum og útjaðaraøkjunum. Nakað av peninginum kann møguliga veitast inn í nýggjar vinnugreinir, bæði við og uttan samband við oljuna.

Gongst væl við oljuvinnuni, kann hon hava við sær *inntøkuframgongd*, sum kann broyta gamlar vanar og siðir. Væntandi er, at tann veruliga inntøkuframgongdin í fyrstu atløgu verður ójavnt býtt, og tað kann í sjálvum sær ávirka samfelagshugburðin.

*Ávirkanin uttaneftir* verður stór. Atferðin hjá pengasterkum, valdsmiklum útlendingum kann gerast fyrimynd. Hugburðurin hjá fremmandu feløgunum t.d. til samfelagsspurningar kann fáa ávirkan bæði á tann hátt, at hesi feløg hava miklan mátt mótvegis landsins fjølmiðlum, og eisini soleiðis at teir føroyingar, ið fáa starv í hesum feløgum, koma inn í atferðar- og virðiskervi teirra.

*Á málsliga økinum* fara útlendsku mál oljufelaganna, serliga enskt, sum er ráðandi í oljuídnaðinum, at fáa alt størri leiklut. Meðan royndir og strev føroyinga at varðveita mál sítt og menna tað higartil serliga hava vent sær móti danska áribninum, sum er søguliga grundað, fara avbjóðingarnar í einum oljuvinnutíðarskeiði alt meira at koma úr enskum. Óttin fyri, at føroyskt missir sína yvirvág, skilt á tann hátt, at tað ikki longur verður natúrliga nýtslumálið í landsins høvuðsvinnu, kann vísa seg at vera væl grundaður.

## 5.3.2 Tørvur á útgreiningum

Tá tey skeið í oljumenningini, ið koma kunnu eftir leitiskeiðið, sum henda frágreiðing er við til at leggja støði undir, verða løgd til rættis, verður neyðugt gjølligari at gera grein fyri, hvør ávirkan í víðastu merking kann væntast at verða føroyska samfelagnum fyri av oljuávum, við tí fyri eyga at útvega dygdargott kunnleikastøði, tá ið skilagóður politikkur skal evnast til.

Sum umrøtt er í hvørjum kapitli sær, verður roknað við, at áhaldandi verður gáað um viðkomandi tvørleikar í sambandi við tey øki, sum henda frágreiðing viðger, og at teir eisini verða greinaðir út. Talan er t.d. um trygd, umhvørvi, sínámillum ávirkan millum frálandsvinnu og fiskivinnu, vinnu- og samfelagsbúskap, útbúgving o.s.fr.

Hvørji evni umframt hesi, ið eiga at verða tikin fram, fer helst at vísa seg í oljupolitiska orðaskiftinum, sum væntandi verður í sambandi við, at henda frágreiðing og uppskotið til løgtingslóg um kolvetnisvirksemi verða løgd fram. Tess greiðari politikararnir leggja fram sjónarmið síni um, hvat er, og hvat ikki er ynskiligt í framtíðar oljumenning, tess lættari verður at skilmarka tey øki, sum mugu granskast, og sum útgreiningar mugu gerast fyri, við tí fyri eyga at tilevna ein politikk á hesum økjum.

Víst kann verða á, at til er fjølbroytt tilfar av samfelagsligum fylgjugreiningum o.ø. í sambandi við oljumenning í samfeløgum, sum líkjast Føroyum. Leitað kunnu verða fram dømi úr Noregi, Skotlandi, Hetlandi, Orknoyggjum, Nýfunnalandi o.s.fr.

Neyðugur liður í vísindaligum kanningum av samfelagsbroytingum er dygdargóð, skjalprógvað vitan um samfelagið, sum tað var, áðrenn nýggja ávirkanin tekur seg upp.

Fyribils kann Oljuráðleggingarnevndin vísa á hesi dømi um evni, sum kunnu vera viðkomandi:

***Viðvíkjandi íbúgvafrøði, arbeiðslívi og vinnusamanseting:***

- Støðan í Føroyum, áðrenn oljumenningin av álvara tekur seg upp, verður lýst (støðiskanningar/"baseline-kanningar").
- Hvussu frálandsoljuvinna fer at ávirka búsetingarmynstrið, og eisini hvussu tað ávirkast, alt eftir hvar veitingarstøðir verða lagdar og kolvetni ført í land.
- Hvussu oljuídnaður, ið kemur uttaneftir, fer at ávirka føroyska arbeiðsmarknaðin og skipan hansara.
- Kapping/samlag millum fiskivinnu og oljuvinnu (út um tey viðurskifti millum fiskiskap og frálandsvinnu, sum umrødd eru í øðrum samanhangi).
- Møguleikarnir at brúka oljuvinnuna sum jarnbrot, tá ið hugsað verður um at menna útflutningsvinnur, ið byggja á vitan, og sum ikki beinleiðis hava samband við oljuvinnu.
- Avleiðingar av stórum byggiarbeiðum á bygdar-/býarsamfeløg.

***Viðvíkjandi politikki og øðrum:***

- Samspælið millum stóridnað, ið kemur uttaneftir, og politisku skipanina í Føroyum.
- Avleiðingar fyri samspælið millum Føroyar og hinar ríkispartarnar í danska ríkinum og fyri ríkisfelagsskapin.
- Avleiðingar fyri samband Føroya við heimlond oljufelaganna og við altjóða felagsskapir (ES, EBS, WTO o.s.fr.).

***Viðvíkjandi samfelagsfrøði og mentan:***

- Avleiðingar av møguligum ógvusligum inntøkuvøkstri, og í kjalarvørrinum av honum møguliga meira ójøvnum inntøku- og ognarbýti.
- Samfelagsligar og mentanarligar avleiðingar av, at útlendskir oljuserfrøðingar o.a. í stórum tali flyta til Føroya.
- Mentanarlig ávirkan og hugburðarávirkan frá "fíggjarligari elitu", ið kemur uttaneftir.
- Málsligar avleiðingar fyri føroyskt sum lítið máløki, tá ið ein vinna kemur uttaneftir, sum í høvuðsheitum arbeiðir á fremmandamáli, ið talað verður víða um heim, enskum, og av at møguligt stórt tal av fólki, ið talar fremmant mál, flytir til Føroya.
- Avbjóðingar fyri føroyskan samleika og føroyska mentan, tá ið oljuvinnan alt víðari og íðuligari setir føroyingar í samband við stóra umheimin.

Væntandi er, at hesar kanningargreinar og útgreiningar koma upp í ta gransking, sum longu fer fram í føroyskum granskingarumhvørvi ella millum føroyskar ph.d.- ella kandidatlesandi á útlendskum lærustovnum. Brúk verður fyri samstarvi við serfrøðingar, sum hava royndir í hesum umrøðuspurningum í øðrum londum.

Út frá politiskum ábendingum um, hvørjar spurningar dentur skal leggjast á, kundi møguliga verið heitt á Føroya Granskingarráð um at seta upp raðfestan lista yvir granskingarevni og at skipa granskingarætlanir og útvega ella samskipa fígging í hesum sambandi.

Neyvan man nakar ivi vera um, at tá ið hugsað verður um tær avbjóðingar, sum møgulig oljuvinna er fyri føroyska samfelagið, verður neyðugt at menna føroyska granskingarførleikan, sum hann nú er, serliga á samfelagsvísindaliga økinum.

Væntast kann, at tað fer at krevja játtanir á fíggjarlógini at menna føstu granskingarskipanina, men til einstakar verkætlanir kann verða roknað við játtanum uttaneftir, her uppi í frá oljufeløgunum, møguliga sum liður í teimum avtalum, ið gjørdar verða í sambandi við, at loyvi verða latin.

Tá ið tað snýr seg um á politiskum stigi at eyðmerkja spurningar, ið eru samfelagsviðkomandi og politiskar/umsitingarligar avgerðir í ljósinum av granskingar- og útgreiningarvirkseminum, kundi verið gagnligt hjá viðkomandi myndugleikum, ið avgerðirnar taka, at leita sær ráð hjá fólki við samsvarandi royndum úr londum ella økjum, sum hava verið fyri tilsvarandi oljumenning.

**Føroya Løgting.**
**Løgtingsmál nr. .......**

## U p p s k o t

## til

## løgtingslóg um kolvetnisvirksemi

### Kapittul 1
### Almennar reglur

**§ 1.** Lógin er galdandi fyri forkanningar o.a.m., leiting eftir, framleiðslu og flutning av kolvetnum gjøgnum rørleiðing á føroyskum land-, sjó- og landgrunsøki. Lógin er eisini galdandi fyri havstøðir, jbr. § 2, litra b.

*Stk. 2:* Lógin miðar móti varisligari og skynsamari leiting eftir og gagnnýting av kolvetnistilfeinginum til gagns fyri føroyskan búskap og arbeiðsvinnu í Føroyum. Virksemið skal verða soleiðis skipað, at neyðug fyrivarni eru tikin fyri fiskiskapi, sigling, umhvørvis- og náttúruáhugamálum umframt øðrum samfelagsligum áhugamálum.

**§ 2.** Í hesi lóg skilst við:

a) *Kolvetni:* jarðolja, dropagass, jarðgass og onnur kolvetni, sum náttúrliga eru í undirgrundini, og sum kunnu framleiðast flótandi ella í luftlíki.

b) *Havstøðir:*
(i) Fastur útbúnaður sum pallar, rørleiðingar og onnur virki og innrættingar á sjóøkinum og landgrunninum, ið verða nýtt til virksemi, nevnt í § 1.
(ii) Flytandi eindir sum boriskip, -reiði, framleiðslu-, goymslu-, íbúðar- og lík før, meðan tey eru støðuføst og verða nýtt til virksemi, nevnt í § 1.

**§ 3.** Kolvetni, nevnd eru í § 1, hoyra landinum til. Forkanning, leiting ella framleiðsla

kann einans setast í verk av øðrum við loyvi, fingnum sambært reglunum í hesi lóg.
*Stk. 2:* Føroyskur rættur annars er galdandi fyri havstøðir á landgrunninum og trygdarøki rundanum, er ikki annað ásett í aðrari lóggávu ella í reglum ásettum av landsstýrinum.

## Kapittul 2
## Forkanningar o.a.m.

**§ 4.** Landsstýrið kann veita loyvi til forkanningar við atliti at leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum í undirgrundini og til vísindaligar kanningar av undirgrundini, sum hava týdning fyri hetta virksemið.
*Stk. 2:* Verður ikki stytri tíðarfreist ásett í einum loyvi, er tað galdandi í 3 ár. Í loyvinum skal verða tilskilað, hvørji øki, tað fevnir um.
*Stk. 3:* Loyvi til forkanningar gevur rættindi til jarðfrøðiligar, jarðalisfrøðiligar, jarðevnafrøðiligar og jarðtøkniligar kanningar. Loyvið gevur ikki rætt at bora eftir ella at framleiða kolvetni, heldur ikki forrætt til seinni leitingar- og framleiðsluloyvi.

**§ 5**. Landsstýrið kann áseta treytir fyri einum forkanningarloyvi ella einum loyvi til vísindaligar kanningar, herundir um rindan av avgjaldi og ágávu og frágreiðing um gongdina í kanningunum og um úrslitini, og um trúnað.

*Stk. 2.* Landsstýrið kann áseta reglur um avgjøld og ágávu fyri at veita loyvi**.**

## Kapittul 3
## Leiting og framleiðsla

A. Loyvi og treytir.

**§ 6.** Landsstýrið kann veita loyvi við einkarrætti til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum á neyvt ásettum økjum við gjølla ásettum treytum. Loyvi kann bert veitast umsøkjarum, sum ætlandi hava neyðugan sakkunnleika, royndir, førleika og fíggjarorku. Tá avgjørt verður at veita loyvi, skal landsstýrið leggja dent á, í hvønn mun tað almenna fær innlit í og gagn av loyvda virkseminum.
*Stk. 2:* Í loyvi eftir stk. 1 skulu vera reglur um tey viðurskifti, nevnd eru í §§ 8-12, og harafturat kann landsstýrið áseta treytir, ið hildnar vera neyðugar.

**§ 7.** Loyvi til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum verður sum meginregla veitt eftir at alment er lýst eftir umsóknum.
*Stk. 2:* Áðrenn lýst verður eftir umsóknum, leggur landsstýrið eina frágreiðing fyri løgtingið um, hvørji øki ætlanin er at bjóða út, og um almennu treytirnar ætlanin er at seta. Í frágreiðingini skal metast um, hvørjar avleiðingar kolvetnisvirksemið kann hava fyri sigling, fiskiskap og aðrar vinnur, náttúru-, umhvørvis-, og onnur samfelagsáhugamál. Eisini verður mett um, hvat íkast virksemið fer at geva búskapi og arbeiðsvinnu.
*Stk. 3:* Landsstýrið kann lata vera við at geva teimum loyvi, ið søkt hava eftir almenna lýsing.
*Stk. 4:* Landsstýrið kann áseta krøv um gjald av ágávu fyri viðgerð av umsóknum og veiting av loyvum eftir § 6.

**§ 8.** Loyvi eftir § 6 til leiting verður veitt fyri tíðarskeið, ikki longri enn 12 ár, ið kunnu verða longd við upp til 2 ár í senn. Leitingarskeiðið alt kann tó ikki fara upp um 16 ár.
*Stk. 2:* Hevur loyvishavi lokið tær í loyvinum ásettu treytirnar fyri leinging av loyvinum, hevur hann krav um at loyvið verður longt við atliti at framleiðslu fyri eitt skeið, ið ásett verður í loyvinum, og sum ikki kann fara upp um 30 ár. Leingingin av loyvinum skal í minsta lagi galda fyri teir partar av økinum, ið fata um rakstrarverdar fundir, ið loyvishavi ætlar at framleiða. Landsstýrið kann sum treyt fyri at leingja loyvið krevja, at umsókn um góðkenning av leiðbyggiætlan sambært § 14, stk. 2 verður innsend innan nærri ásetta rímiliga freist.

**§ 9.** Ásett verður í loyvi eftir § 6 hvørjar arbeiðsskyldur loyvishavin skal lúka í

leitingarskeiðinum sambært § 8, stk. 1, og hvørji avgjøld loyvishavin skal rinda tí almenna. Eitt nú kann ásetast, at rindast skal rennandi avgjald, roknað eftir víddini av loyvisøkinum (víddargjald) og avgjald roknað eftir nøgd ella virði av framleiddum kolvetnum (framleiðslugjald).

**§ 10.** Í loyvum eftir § 6 verða reglur ásettar um brúk av føroyskari arbeiðsmegi, veitingar og tænastur frá føroyskum fyritøkum, um útbúgvingar v.m., umframt hvaðan loyvishavin rekur virksemi sítt.

**§ 11.** Í loyvum eftir § 6 ella í fyriskipanum ásettum av landsstýrinum sambært § 29 verða gjøllari reglur ásettar um, at loyvishavin skal lata inn fíggjarligar og roknskaparligar upplýsingar eins væl og upplýsingar um leitingar- og framleiðsluvirksemi sítt, umframt stakroyndir og aðrar upplýsingar um undirgrundina, hann hevur savnað í virksemi sínum.
*Stk. 2:* Í loyvum eftir § 6 kunnu ásetast reglur um trúnað viðvíkjandi teimum frágreiðingum og upplýsingum, nevndar eru í stk. 1.

**§ 12.** Í loyvum eftir § 6 verður ásett, við fyrivarni fyri reglunum í §§ 20 og 21, í hvønn mun skyldur loyvishavans standa við eftir at loyvisskeiðið er runnið, loyvið latið innaftur ella tikið aftur. Harafturat kann verða ásett, at landsstýrið, um arbeiðsskylda ella aðrar skyldur ikki eru loknar, kann krevja, at loyvishavin fult ella fyri ein part rindar ta upphædd, sum tað hevði kostað at lokið skyldurnar.

B. Virksemið

**§ 13.** Leitingar- og framleiðsluvirksemið skal vera forsvarligt og skynsamiligt og samsvarandi viðurkendari góðari altjóða venju undir líkum umstøðum. Virksemið skal vera umhvørvisliga og trygdarliga forsvarligt, og soleiðis at tað slepst undan kolvetnisspelli. Hóskandi atgerðir skulu setast í verk so tað slepst undan at skaða dýra- og plantulív og at dálka umhvørvið. Virksemið skal ikki vera til óneyðugan vanda ella tarn fyri skipaferðslu, loftferðslu, fiskiskap, ella annað virksemi ella elva skaða ella skaðavanda fyri rørleiðingar, kaðalar ella annan útbúnað.
*Stk. 2:* Viðgerðarstøðir, rørleiðingar og aðrar flutningsskipanir eiga at hava hóskandi stødd og leggjast soleiðis, at undirstøðukervið sum heild verður virkisført.

**§ 14.** Leiti- og aðrar boringar í undirgrundini mega ikki verða byrjaðar uttan so, at landsstýrið frammanundan hevur góðkent útgerð, arbeiðsætlan og mannagongd.
*Stk. 2:* Loyvishavin kann bert stovna havstøð ella virki og útbúnað á landi at brúka til kolvetnisframleiðslu og fara undir framleiðslu, um landsstýrið frammanundan hevur góðkent eina leiðbyggiætlan sum nevnd er í stk. 3, herundir framleiðslufyrireikingar og -gongd og tann útbúnað, ið nýtast skal.
*Stk. 3:* Ger loyvishavi av at útbyggja og framleiða ein kolvetnisfund, skal hann gera eina ætlan (leiðbyggiætlan), ið skal sendast til góðkenningar eftir stk. 2. Í ætlanini skulu vera upplýsingar og metingar um kolvetnisfundin og útvinning av honum, umframt upplýsingar og metingar av tøkniligum, fíggjarligum, trygdarligum, umhvørvisligum slagi og um fiskivinnu og siglingarviðurskifti saman við einari frágreiðing um týdningin av byggiætlanini fyri búskap og arbeiðsvinnu. At enda skal vera greitt frá, hvussu virki og útbúnaður kunnu verða frágingin, tá virksemið verður niðurlagt. Verður bygt í tveimum ella fleiri umførum, eigur ætlanin, so langt til ber, at fata um alla bygginguna.
*Stk. 4:* Góðkenning landsstýrisins av leiðbyggiætlanini, herundir seinni góðkenningar av serskildum byggistigum og støkum virkjum og virkislutum eftir reglum, givnar sambært § 24, skal vera fingin áðrenn gingið verður í munandi sáttmálabundnar skyldur, uttan so at landsstýrið frammanundan gevur sítt samtykki.
*Stk. 5:* Talar fyrilit fyri forsvarligari og skynsamiligari framleiðslu fyri tí, ella er tað neyðugt orsakað av týdningarmiklum sam-

felagsáhugamálum, kann landsstýrið gera broytingar í góðkendum framleiðsluætlanum og laga framleiðsluna samsvarandi til.

**§ 15.** Røkkur kolvetnisfundur um øki hjá fleiri loyvishavum, skulu teir samskipa leiting og møguliga framleiðslu. Slíkar avtalur skulu góðkennast av landsstýrinum. Fæst ikki semja um samskipan innan rímiliga tíð, kann landsstýrið geva boð um samskipan og áseta treytirnar.
*Stk. 2:* Røkkur kolvetnisfundur inn á landgrunn ella yvirvaldsøki hjá øðrum landi, kann landsstýrið, verður avtala um samskipan av leiting og framleiðslu gjørd við hetta landið, geva honum, ið loyvi hevur til føroyska partin, boð um at taka lut í tílíkari samskipan og áseta treytirnar.

**§ 16.** Eiga tveir ella fleiri kolvetnisfundir at verða samtroyttir av tí at fyrilit fyri tilfeingi, búskapi ella samfelagsáhugamálum tala fyri tí, kann landsstýrið, tá ið tað hevur ráðført seg við loyvishavarnar, geva boð um at hetta verður gjørt. Í hesum sambandi kann áleggjast loyvishava móti gjaldi at lata viðgerðar- og flutningsbúnað til nýtslu í tílíkum samstarvi. Semjast loyvishavarnir ikki um gjaldið, verður tað ásett av landsstýrinum.

**§ 17.** Kolvetni, ið ikki eru brúkt í framleiðsluni, sprænd innaftur, brend ella farin fyri skeytið, skulu takast í land í Føroyum, uttan so at landsstýrið góðkennir annað. Landsstýrið kann áseta treytir fyri góðkenningini.

C. Rørleiðingarskipanir

**§ 18.** Loyvi landsstýrisins krevst til tess at leggja og reka rørleiðingarskipanir at brúka í virksemi, fevnt av hesi lóg.
*Stk. 2:* Í einum loyvi kunnu setast treytir um rørlegu, støddir, ognarviðurskifti, annara rætt at brúka rørleiðingina, gjald v.m.
*Stk. 3:* Stk. 1 og 2 eru ikki galdandi fyri innanhýsis rørleiðingar í framleiðsluútbúnað á stakari leið.
*Stk. 4:* Røkkur rørleiðingin inn á landgrunn ella yvirvaldsøki hjá øðrum landi, kann landsstýrið, verður avtala gjørd við hetta landið um at leggja og reka rørleiðingina, geva honum, ið loyvi hevur til føroyska partin, boð um at taka lut í avrádda samstarvinum og áseta treytirnar.

**§ 19.** Loyvi landsstýrisins krevst til tess at leggja og reka undirsjóvar rørleiðingarskipanir til millumlandaflutning á føroyskum landgrunnsøki. Í góðkenningini skal tilskilast, hvar hesar rørleiðingar verða lagdar og treytir skulu setast um rímiligar atgerðir við atliti at leitingarvirksemi á landgrunninum, gagnnýting av náttúruríkidømi hansara og fyribyrging, avmarking og eftirliti við dálking frá rørleiðingum.

D. Avrigging av virkseminum

**§ 20.** Hildið kann einans verða endaliga uppat við rakstri og viðlíkahaldi av havstøð til framleiðslu, eftir at landsstýrið frammanundan hevur givið sína góðkenning. Loyvishavin skal við freist eftir stk. 3 leggja eina avriggingarætlan fyri landsstýrið við neyðugum upplýsingum og metingum um tøkni, trygd, umhvørvi, fiskiskap, sigling og búskap saman við uppskoti um hvussu havstøðin kann verða frágingin.
*Stk. 2:* Havstøðin skal samsvarandi altjóða reglum framhaldandi verða brúkt í kolvetnisvirksemi sambært hesi lóg, til annað endamál ella burturbeinast heilt ella partvís. Loyvishavin skal fremja avriggingarætlanina innanfyri ta freist og samsvarandi teimum treytum, landsstýrið hevur sett í góðkenning síni av ætlanini. Rennur freistin frá tí at hildið verður uppat at brúka havstøðina, skal loyvishavin boða landsstýrinum frá, tá hildið verður uppat.
*Stk. 3:* Avriggingarætlanin skal sendast inn í seinasta lagi tvey ár innan loyvishavin roknar við at hildið verður uppat at brúka havstøðina. Sama er galdandi um loyvisskeið eftir §§ 6 og 18 í hesi lóg eru runnin, hendir tað áðrenn roknað er við at halda uppat. Landsstýrið

kann krevja avriggingarætlanina fyrr, um umstøð-urnar tala fyri tí. Somuleiðis kann landsstýrið til hvørja tíð geva loyvishavanum boð um at prógva førleika sín at fíggja avriggingar-ætlanina ella veita neyðuga trygd, metir landsstýrið seg at hava grund til at halda, at loyvishavin ikki fer at hava neyðuga peningin tøkan.

**§ 21.** Tá skeiðið í loyvi eftir §§ 6 ella 18 er runnið, loyvið latið innaftur ella tikið aftur, hevur tað almenna rætt til uttan viðurgjald at yvirtaka viðkomandi útbúnað. Sama er galdandi tá hildið er endaliga uppat at brúka útbúnað, ið burturav er ætlaður til brúks á ávísa økinum.
*Stk. 2:* Rættur hins almenna eftir stk. 1 verður útintur av landsstýrinum. Avgerðin verður boðað loyvishavanum í sambandi við at landsstýrið tekur støðu til avriggingarætlan hansara eftir § 20 og hevur í seinasta lagi gildi tá 6 mánaðir eru farnir frá tíðini eftir stk. 1.
*Stk. 3:* Loyvishavin skal síggja til at búnað-urin við útgerð og neyðugum tilhoyri og tilfari verður avhendur tí almenna í forsvarliga viðlíkahildnum standi og leysur av møguligum skuldbindingum og øllum triðjamansrættindum. Tílíkar skuldbindingar og tílík rættindi detta burtur mótvegis tí almenna.

## Kapittul 4
## Meting um fylgjur fyri umhvørvið

**§ 22.** Loyvi ella góðkenningar eftir §§ 14, 18, 19 ella 20 viðvíkjandi verkætlanum, ið ætlandi fara at ávirka umhvørvið munandi, kunnu bert verða veitt eftir at mett er um umhvørvisligu avleiðingarnar, og eftir at avvarandi almenningur, myndugleikar og felagsskapir hava fingið høvi at siga sína hugsan.
*Stk. 2:* Landsstýrið kann veita undantak frá kravinum eftir stk. 1, tala umstøðurnar fyri tí.
*Stk. 3:* Landsstýrið kann áseta reglur um, at avvarðandi almenningur, myndugleikar og felagsskapir skulu fáa boð og verða hoyrdir.

## Kapittul 5
## Arbeiðsumhvørvi, trygd og tilbúgving v.m. á havstøðum.

**§ 23.** Loyvishavin, fyristøðufelagið, stjórin á havstøðini, arbeiðstakarar, undirarbeiðstakarar og aðrir arbeiðsgevarar skulu, hvør í sínum lagi, síggja til at arbeiðsumstøðurnar eru fult forsvarligar til trygd og heilsu, og at dygt eftirlit er við at arbeiðið verður gjørt forsvarliga.

**§ 24.** Landsstýrið kann, til tess at varða um trygdar-, heilsu- og umhvørvisatlit í sambandi við kolvetnisleiting, -framleiðslu og/ella -flutning, áseta nærri reglur fyri havstøðir, herundir reglur um:
a) vanligar skyldur hjá arbeiðsgevarum, formonnum, arbeiðstakarum og útvegarum v.m.,
b) skjalfesting viðvíkjandi heilsu- og trygdarviðurskiftum, eftirlitsskipanir, ið kunnu vera innaneftirlits- ella aðrar líkar skipanir, próvskjalaskipanir, og trygdar-bygnað annars.
c) gerð av virkjum og útgerð, góðkenning og loyvi til byggifyrireiking, bygging, innleggingar, brúk og burturbeining,
d) trygdar-, heilsu- og umhvørvisviður-skifti, arbeitt verður undir,
e) útbúgving og upplæring, hvíldartíð, frítíð, aldurskrøv og heilsukanningar.

**§ 25.** Á mannaðum havstøðum skal eigarin ella brúkarin tilnevna stjóra, ið hevur hægsta myndugleika á støðini í øllum lutum.
*Stk. 2:* Eigari ella brúkari av havstøð skal gera manningar- og verkskipan, ið sigur hvør stjórin er, hvørjir hava ábyrgdina av teimum ymisku høvuðssetningunum í rakstrartrygdini og ásetir leiðbeinandi reglur fyri samstarvi teirra, ið ábyrgdina hava.
*Stk. 3:* Landsstýrið kann, til tess at vissa sær at trygdin er í lagi, krevja at fáa ta í stk. 2 nevndu ætlan til góðkenningar og áseta gjøllari manningarreglur.

**§ 26**. Eigari ella brúkari av havstøð skal halda dygga tilbúgving til verju fyri vanlukku ella vanda, ið kunnu valda fólkaskaða ella deyða, umhvørvisdálking ella tingskaða. Eisini skal hann síggja til, at neyðug útgerð til eyðflytingar og bjargingar umframt ávaringar og fjarskifti er til taks. Hann skal í tílíkum førum skipa fyri neyðugum atgerðum at forða ella minka um fólkavanda og skaðafylgjur.
*Stk. 2:* Landsstýrið kann taka avgerð um ella áseta nærri reglur um tilbúgvingina, herundir um manning og útgerð, sum eigarin ella brúkarin skal hava til taks, hendir óhapp á støðini og um at fleiri loyvishavar skulu samstarva um tilbúgving. Í vanlukku- ella vandastøðu kann landsstýrið taka avgerð um at seta í verk bjargingartiltøk ella atgerðir at vinna á vanlukkuni og um, at aðrir skulu koma við neyðugari tilbúgvingarútgerð fyri eigarans ella brúkarans rokning.

**§ 27**. Rundan um havstøðir, tó ikki rørleiðingar, skulu vera trygdarøki. Landsstýrið ásetir víddina samsvarandi galdandi altjóða reglum og kann gera fyriskipanir um sigling, fiskiskap og flúgving á økjunum, herundir banna óviðkomandi skipum og flogførum at koma inn á økini.
*Stk. 2:* Landsstýrið kann av trygdargrundum áseta reglur um avmarkingar av uppankring og fiskiskapi við undirsjóvar rørleiðingar.

**§ 28**. Er álvarslig vanlukka hend orsakað av virksemi, ið kemur undir hesa lóg, ella tilburður, ið kundi elvt slíka vanlukku, ella munandi tingskaða, ella sjódálking, kann landsstýrið seta skaðanevnd at kanna og meta um hendingina og skriva frágreiðing. Landsstýrið kann áseta nærri reglur um virksemi nevndarinnar.
*Stk. 2:* Skaðanevndin hevur loyvi at kanna havstøðina ella leivdirnar av henni.
*Stk. 3:* Skaðanevndin kann krevja, at bøkur og onnur skjøl, ið hava týdning fyri kanningina, verða framløgd, og kann avhoyra eigaran ella brúkaran av havstøðini, starvsfólk og hvønn tann, ið verður hildin at kunna koma við upplýsingum, ið hava týdning fyri kanningina.
*Stk. 4:* Skaðanevndin kann krevja avhoyring í rættinum sambært reglunum í rættargangslógini.

## Kapittul 6
## Myndugleikaviðgerð og eftirlit v.m.

**§ 29.** Landsstýrið kann áseta gjøllari reglur um virksemi sambært loyvum eftir §§ 4, 6, 18, 19 og 20.

**§ 30**. Landsstýrið savnar allar tøkar upplýsingar um undirgrundina, ið fáast til vega í virksemi eftir hesi lóg.

**§ 31**. Landsstýrið hevur eftirlit við, at lógin og reglur og treytir settar sambært lógini verða hildnar.
*Stk. 2:* Landsstýrið kann áseta nærri reglur um eftirlit, góðkenning av stakroyndum og øðrum prógvum fyri, at reglur um trygd, heilsu og umhvørvi eru hildnar.
*Stk. 3:* Landsstýrið kann heimila lands- og øðrum almennum stovnum at umsita heimildir, ið lógin gevur landsstýrinum.
*Stk. 4:* Loyvishavarnir rinda útreiðslurnar av viðgerð myndugleikanna av málum um loyvi og góðkenning v.m. til virksemi eftir hesi lóg, og av eftirlitinum eftir stk. 1 sambært reglum, ásettum av landsstýrinum.

**§ 32**. Loyvishavar, eigarar ella brúkarar av havstøðum skulu lata allar upplýsingar, landsstýrið heldur vera neyðugar til eftirlitið við virksemi teirra eftir hesi lóg.
*Stk. 2:* At fremja eftirlitið kann landsstýrið áleggja loyvishava at lata inn stakroyndir, rátilfar, viðgerðarúrslit, tulkingar og metingar umframt tøkniligar og búskaparligar upplýsingar.
*Stk. 3:* Har tað er neyðugt til eftirlits, hava starvsfólk eftirlitsmyndugleikans til hvørja tíð, uttan dómsúrskurð móti neyðugum samleikaprógvi atgongd til allar partar av fyritøku, har virksemi er eftir hesi lóg.

*Stk. 4:* Tað liggur á eigara ella brúkara av havstøð eins og teimum, ið virka teirra vegna, at geva starvsfólki eftirlitsmyndugleikans alla neyðuga hjálp í kanningarvirksemi teirra.
*Stk. 5:* Umboð fyri eftirlitsmyndugleikan hava rætt at taka lut sum eygleiðarar á fundum í samstarvsnevndum hjá loyvishavum, sum í felag hava fingið loyvi eftir § 6.

**§ 33**. Eftirlitsmyndugleikin kann geva boð um, at viðurskifti, ið eru ímóti lógini ella reglum og avgerðum sambært lógini, verða fingin í rættlag beinanvegin ella innan nærri ásetta freist.
*Stk. 2:* Metir eftirlitsmyndugleikin, at tað er neyðugt til tess at forða hóttandi stórvanda fyri starvsfólksins ella annara trygd ella heilsu ella fyri umhvørvisdálking, kann hann geva boð um, at beinanvegin skal verða gingið ímóti vandanum, herundir at arbeiðið verður steðgað.

## Kapittul 7
## Endurgjald og serligar reglur um skaðabøtur til fiskimenn

**§ 34**. Loyvishavin skal endurgjalda tap, ið stendst av skaða, dálkingarskaði íroknaður, elvdur av virksemi sambært loyvinum, hóast skaðin stendst av tilvild.
*Stk. 2:* Hevur tann, ið varð fyri skaða, tilætlað ella av grovum ósketni, medvirkað til skaðan, kann endurgjaldið verða lækkað ella fella burtur.
*Stk. 3:* Endurgjald fyri dálkingarskaða kann verða lækkað ella fella burtur, verður tað prógvað, at náttúruhending, ið ikki slapst undan, krígs- ella yvirgangsatgerð ella líkar tvingandi umstøður (force majeure) munandi hava medvirkað til ella økt um skaðan undir umstøðum, ið ikki kundi roknast við fóru at henda, og sum loyvishavin ikki hevði ræði á.
*Stk. 4:* Við dálkingarskaða skilst í hesi lóg skaði ella tap orsakað av dálking, elvdari av kolvetnisfloymi ella -leka úr virki, borihol íroknað, og útreiðslur til rímilig tiltøk at forða ella avmarka tílíkan skaða ella tap, umframt skaða ella tap, ið standast av tílíkum tiltøkum. Skaði ella tap, sum eigarar, reiðarar og manning á fiskiskipum hava verið fyri orsakað av skerdum fiskimøguleikum, verða eisini mett at vera dálkingarskaði.

**§ 35**. Verða føroyskir eigarar, reiðarar og manning á fiskiførum fyri tapi, ið má metast at stava frá kolvetnisvirksemi til havs sambært hesi lóg, og ikki gerst av hvør skaðan voldi, jbr. § 34, skulu loyvishavarnir við samábyrgd veita skaðabøtur fyri skaða á fiskireiðskap, -skip, og -før umframt veiðu-miss og mista fiskitíð. Sama er galdandi fyri mista fiskitíð í sambandi við merking, upptøku og uppskiping av lutum, ið stava frá virkseminum. Loyvishavar kunnu stovna skaðabótagrunn við tí endamáli at gjalda krøv eftir hesi reglu, áðrenn farast kann eftir loyvishavunum.

**§ 36**. Loyvi ella góðkenning eftir §§ 14, 18, 19 ella 20 til fyritakssemi á sjóøkinum og landgrunninum, sum verður til hindurs ella ampa fyri fiskiskapi, ið vanliga hevur verið rikin av føroyskum fiskiførum har á leiðini, verða ikki givin, uttan so at landsstýrið samstundis tekur avgerð um at loyvishavin veitir eigarum, reiðarum og manning, hvørs inntøkumøguleikar verða skerdir av fyritaksseminum, skaðabøtur, ella landsstýrið hevur sent skaðabótanevndini eftir § 37 málið til avgerðar.

**§ 37**. Ein skaðabótanevnd við 5 limum ger av um tap er ella verður volt, og um skaðabøtur eiga at verða veittar eftir § 35 ella, tá landsstýrið hevur sent nevndini mál til viðgerðar, eftir § 36. Loyvishavarnir uppnevna í felag 2 limir, meðan felagsskapir umboðandi føroyskar skipaeigarar, reiðarar og manning á fiskiførum í felag uppnevna 2 limir. Partsumboðini í nevndini uppnevna í felag nevndarformannin, ið skal lúka treytirnar fyri at gerast landsdómari. Fæst ikki semja um formannin, verður hann uppnevndur av sorinskrivaranum.

*Stk. 2:* Loyvishavarnir rinda útreiðslurnar til skaðabøtur og rakstur av nevndini sambært reglum, ið landsstýrið ásetir. Landsstýrið kann gera av, at gjald skal rindast fyri viðgerð av málum í nevndini. Í aðrar mátar er gerðarrættarlógin galdandi. Landsstýrið kann harumframt áseta reglur um skaðabótagrunn, jbr. § 35.

## Kapittul 8
## Aðrar ásetingar

**§ 38.** Loyvi eftir hesi lóg eru undantikin rættarsókn og kunnu hvørki beinleiðis ella óbeinleðis avhendast uttan so at landsstýrið gevur loyvi til tess og góðkennir treytirnar.

**§ 39.** Landsstýrið kann taka eitt loyvi aftur
a) verða lógin, reglur ásettar sambært lógini, treytir og boð brotin grovliga ella ferð eftir ferð,
b) verða í umsókn um loyvi givnar skeivar ella villeiðandi upplýsingar,
c) boðar loyvishavin frá gjaldssteðgi, biður um samráðingar um neyðskuldarsemju, fer á húsagang ella í likvidatión ella kemur í líka støðu.
*Stk. 2:* Fær loyvishavin bøtt fyri sær, tekst loyvið ikki aftur eftir stk. 1, litra a, fyrr enn landsstýrið hevur givið boð um at viðurskiftini skulu verða rættað innan ávísa freist, og boðini eru ikki fylgd.

**§ 40**. Í loyvi kann ásetast, at ósemja millum landsstýrið og loyvishavan um, hvørt reglur ella treytir sambært hesi lóg ella í reglum ásettum sambært lógini ella í loyvi ella góðkenning, eru loknar, kann verða løgd fyri gerðarrætt til endaliga avgerð.

**§ 41.** Tá ræður um reglurnar í sjólógini um avmarking av ábyrgd fyri flytandi havstøðir, ið sjólógin fatar um, ábyrgist reiðarin, um ábyrgd er avmarkað, við upp til 20 milliónum SDR, sama hvussu stór havstøðin er. Ræður um fólkaskaða verður hendan upphæddin hækkað við 12 milliónum SDR.
*Stk. 2:* Endurgjald fyri dálkingarskaðar av kolvetnisvirksemi hevur ikki sjóveð eftir reglunum í sjólógini.
*Stk. 3:* Hevur reiðarin loyvi eftir § 6 til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum, galda reglurnar um avmarking av ábyrgd reiðarans ikki.

**§ 42.** Landsstýrið kann sum neyðugt er loyva, at føst ogn verður ognartikin til virksemi eftir hesi lóg.
*Stk. 2:* Kanningar, ið ikki taka langa tíð, og sum hava til endamáls at fremja fyritakssemi eftir hesi lóg, kann landsstýrið loyva á annansmans ogn, hóast tað kann hava við sær skaða ella ampa, ið fult endurgjald verður at veita fyri.
*Stk. 3:* Ognartøka eftir stk. 1 verður framd sambært reglunum í lóg nr. 63 frá 7. mai 1881 um skyldu at lata lendi til almennar vegir, havnir og lendingar umframt almennar skúlar í Føroyum. Sama er galdandi fyri avgerðir eftir stk. 2, fæst ikki semja um endurgjaldið.

## Kapittul 9
## Revsing og gildiskoma

**§ 43**. Við bót ella hefti verður hann revsaður, sum
a) rekur virksemi nevnt í §§ 4, 6, 18 og 19 uttan loyvi landsstýrisins,
b) riggar virkið av uttan góðkenning landsstýrisins eftir § 20, stk. 1 ella letur ikki rættstundis inn nøktandi avriggingarætlan eftir § 20, stk. 3,
c) brýtur §§ 23, 25 ella 26, ella letur ikki inn stakroyndir og aðrar upplýsingar eftir § 11, ella forðar fyri kanning, nevndar í § 28, stk. 2,
d) aktar ikki boð, givin eftir hesi lóg ella fyriskipanir, ásettar við heimild í lógini.
*Stk. 2:* Verður § 23 brotin, kann arbeiðsgevari bøta, sjálvt um brotið ikki er framt tillætlað ella av ósketni.
*Stk. 3:* Í fyriskipanum, ásettum við heimild í lógini, kann ásetast revsing, sum bót ella hefti fyri brot av reglunum í fyriskipanunum. Eisini kann ásetast, at arbeiðsgevari, sum brýtur

reglurnar, boð ella forboð sum ásett, kann bøta, sjálvt um brotið ikki er framt tilætlað ella av ósketni. Umskiftisrevsing verður ikki ásett fyri bót.
*Stk. 4:* Verður brotið framt av partafelagi, smápartafelagi, lutafelagi ella tílíkum feløgum, kann bótin verða kravd av felagnum sjálvum.

**§ 44.** Avgjøld og ágávur sambært hesi lóg kunnu krevjast inn við panting

**§ 45**. Lógin kemur í gildi tann_
*Stk. 2:* Løgtinglóg nr. 179 frá 21. oktober 1993 um forkanningar o.a.m. av undirgrund Føroya verður sett úr gildi.

## *ALMENNAR VIÐMERKINGAR*

1.Endamálið við lógaruppskotinum er at skapa eitt tíðarhóskandi støði undir byrjandi leiting eftir og møguligari seinni gagnnýting av kolvetnistilfeingi í undirgrund Føroya. Roynt verður at skapa fortreytir fyri at fáa staðfest, um olja og jarðgass finst á føroyskum land- og sjóøki og á føroyska landgrunninum, og at skapa trygd fyri varisligari og skynsamari gagnnýting av tílíkum fundum til gagns fyri føroyska búskapin og arbeiðsvinnu í Føroyum.

2. Ein fortreyt fyri lógaruppskotinum er løgtingssamtyktin frá 24. september 1993 um leiting eftir olju og jarðgassi á føroyskum øki (løgtingsmál nr. 5/1993). Løgtingið tók í hesi samtyktini undir við landsstýrinum í, at tað lógarfyrireikandi og útgreinandi arbeiðið, ið byrjaði á vári 1993, helt fram og at uppskot vórðu gjørd til nútímans undirgrundarlóg og aðra neyðuga lóggávu umframt uppskot til framtíðar treytir fyri leitingar- og útvinningarloyvum. Løgtingið staðfesti harafturat, at innan langt umleið átti at verða skipað fyri fyrsta útbjóðingarumfarinum til veitingar av loyvum til leitingar eftir og útvinning av olju og jarðgassi. Fyrst áttu tó forkanningar at verða gjørdar at lýsa jarðfrøðiligu uppbyggingina av landgrunninum, og víddin av honum at vera staðfest í samráðingunum við Stórabretland.

3. Um somu tíð, sum løgtingið gjørdi omanfyri nevndu samtykt, varð uppskot landsstýrisins til løgtingslóg um forkanningar o.a.m. av undirgrund Føroya samtykt (løgtingslóg nr. 179 frá 21. oktober 1993). Við heimild í lógini vórðu á vári 1994 loyvi givin Western Geophysichal Corporation at gera víðtøknar seismiskar økiskanningar, serstakliga av havleiðunum eystanfyri og sunnanfyri Føroyar. Tær miðvísu kanningarnar, ið tá vórðu gjørdar, eru síðan fylgdar av einari røð av forkanningum, figgjaðar av bæði seismikkfeløgum og oljufeløgum. Ein bólkur av oljufeløgum hevur harnæst við Dansk Olie- og Gasproduktion A/S sum fyristøðufelagi í 1996 gjørt eina kanningarboring til lands í Lopra at útvega meira jarðfrøðiliga vitan. Harafturat bað Oljuráðleggingarnevndin, sum landsstýrið setti tann 22. apríl 1994, í 1996 um tilmæli frá oljufeløgum um tey øki á føroyska landgrunninum, ið feløgini hildu áttu at vera tikin við í fyrsta útbjóðingarumfarið. Svarini frá feløgunum benda á, at stórur áhugi er fyri víðum økjum bæði eystanfyri og sunnanfyri Føroyar.

4. Við tí, sum omanfyri er greitt frá, í huga, heldur landsstýrið at tey úrslit, ið fingin eru burturúr teimum kanningum, ið higartil eru gjørdar, benda á at fortreytirnar fyri fyrsta útbjóðingarumfarinum á føroyskum øki skuldu verið reiðiliga góðar. Samráðingarnar við Stórabretland um landgrunsmarkið, sum hava verið førdar síðan 1991, eru framvegis ikki endaðar. Fortreyt løgtingsins um greiðu á markinum áðrenn skipað verður fyri einum útbjóðingarumfari, er tí ikki lokin. Lógaruppskotið verður hóast hetta lagt fram til tess at skapa neyðuga lógarkarmin, soleiðis at til ber at hava eitt útbjóðingarumfar so skjótt umstøðurnar loyva tí.

5. Umframt omanfyri nevndu løgtingslóg um forkanningar o.a.m. er galdandi lóggáva í dag í Føroyum lóg nr. 181 frá 8. mai 1950 um leiting eftir og útvinning av ráevnum í undirgrund Danmarkar kongsríkis. Lógin, ið sambært grein 11 er galdandi í Føroyum við teimum avmarkingum, ið standast av lóg nr. 137 frá 23. mars 1948 um heimastýri Føroya, kom í gildi í Føroyum tann 5. februar 1952 og verður verandi í gildi, eftir at málsøkið “ráevni í undirgrundini“ gjørdist føroyskt sermál sambært avtalu frá 22. december 1992, inntil hon verður broytt ella sett úr

gildi við løgtingslóg. Inntil tá verður lógin eftir fastari venju lisin á tann hátt, at løgting og landsstýri hava tann myndugleika, ið sambært lógini er hjá donsku stjórnini og fólkatinginum, tá tað ræður um mál, ið eru yvirtikin sum sermál. 1950-lógin, sum í Danmark er avloyst av lóg nr. 293 frá 10. juni 1981 um gagnnýting av undirgrund Danmarkar, er ikki brúkilig sum støði undir nútímans og framtíðar olju- og jarðgassvirksemi.

6. Lógaruppskotið byggir á tað lógaruppkastið, ið Oljuráðleggingarnevndin legði fram í frágreiðing sínari frá juli 1997.

7. Í uppskotinum verður skotið upp, at forkanningarlógin frá 1993 verður sett úr gildi og at samsvarandi reglur í kapitli 2 í uppskotinum koma í staðin, og at leiting eftir og framleiðsla v.m. av kolvetnum í framtíðini verða gjørd sambært reglunum í uppskotinum. 1950-lógin fer síðan bert at galda fyri onnur ráevni enn kolvetni, ið hendan lógin fevnir um. Tað merkir sambært grein 1 í lógini onnur ráevni enn kolvetni, ið ikki vórðu gagnnýtt av privatum fyri 23. februar 1932. Torført er at siga, um gamla lógin hereftir hevur nakað veruligt nýtsluøki, av tí at "námsvinna", sum hon hevur verið rikin í nógv ár í Suðuroy, altíð hevur verið mett at vera føroyskt sermál og tí ikki undir 1950-lógini. Fyri kortini ikki at skapa møguligt "rættarloysi", verður í hesum lógaruppskotinum ikki skotið upp at seta 1950 lógina úr gildi.

8. Lógin um kolvetnisvirksemi er ein rammulóg, ið setir reglur fyri bæði veiting av loyvum, t.v.s. neyðugu loyvini til oljufeløgini at leita eftir og framleiða ráolju og jarðgass, og øll skeiðini í virkseminum, t.v.s. leiting og meting, bygging og framleiðslu umframt avrigging av virkseminum. Harafturat eru serligar reglur í lógini um havstøðir, t.v.s. tær innrættingar og tann útbúnaður umframt støðuføst før, ið nýtt verða í virkseminum. Hesar serligu reglurnar svara til reglurnar í arbeiðsumhvørvis- og trygdarlóggávuni á landi og í lóggávuni um trygd á skipum. At enda eru eisini reglur í lógini, sum í Danmark finnast í landgrunslógini.

Í lógini eru reglur, sum í Danmark og øðrum Norðsjóvarlondum finnast í fleiri ymsum lógum. Endamálið við at savna hesar reglur í eina lóg hevur verið at skapa eitt so einfalt og greitt lógargrundarlag sum gjørligt undir virkseminum, ið gevur landsstýrinum allar tær heimildir, ið nútímans lóggáva á økinum vanliga gevur myndugleikunum, og sum er so løtt at umsita sum yvirhøvur gjørligt. Oljuráðleggingarnevndin hevur annars við lógaruppskotinum roynt at fáa tey málsevni við, sum í Norðsjóvarlondunum eru skipað í lóg.

Hinvegin er ikki roynt í lógaruppskotinum at taka avgerð um tann føroyska kolvetnispolitikkin. Lógin setir varandi karmar um virksemið, meðan oljupolitikkurin í verki væntandi verður tilevnaður so hvørt sum útboðið verður, sama tá talan er um hvørji øki verða bjóðað út til leitingar, ella fíggjarligar og aðrar treytir, ið samsvarandi kapitul 3, A, í lógini verða settar í teimum loyvum, ið givin verða oljufeløgunum.

9. *Høvuðsevnini* í lógini um kolvetnisvirksemi eru hesi:

a) Grein 3 í lógini ásetir samsvarandi galdandi rætti, at kolvetni, sum eru allýst í grein 2, litra a, hoyra landinum til og at onnur enn landið einans kunnu leita ella framleiða við loyvi sambært lógini. Hinvegin kann landsstýrið sjálvt fara undir tílíkt fyritakssemi, treytað av at neyðugur peningur er játtaður og møgulig krøv í aðrari lóggávu lokin. Endamálið við lógini er tí at skapa heimild fyri og nærri at skipa, hvussu onnur enn landsstýrið, og í fyrsta lagi

útlendsk oljufeløg, kunnu sleppa at leita eftir olju og framleiða hana á føroyskum øki.

b) Reglurnar í kapitli 2 (§§ 4 og 5) um *forkanningar o.a.m.* svara til reglurnar í galdandi forkanningarlóg frá 1993, tó í nýggju lógini avmarkaðar til bert at galda fyri kolvetni. Endamálið við tílíkum innleiðandi kanningum, serliga seismiskum kanningum, er at royna at fáa greiðu á, um grundir eru til at fara undir veruliga leiting, ið vanliga er ógviliga kostnaðarmikil, á einum øki.

c) *Loyvisveitingarskipanin* er ásett í kap. 3, petti A (§§ 6-12). Mannagongdin í sambandi við fyriskipan av útbjóðingarumførum og veiting av loyvum at leita eftir og framleiða olju og jarðgass hevur alstóran týdning. Tað er landsstýrismaðurin, ið hevur málsøkið undir sær, ið sambært lógini hevur heimild at veita oljuloyvi landsins vegna. Sambært grein 7 í lógini kunnu tílík loyvi sum høvuðsregla ikki verða veitt fyrr enn alment hevur verið lýst eftir umsóknum, og løgtingið hevur fingið frágreiðing um, hvørji øki landsstýrið ætlar at bjóða út og hvørjar høvuðstreytir ætlanin er at seta fyri loyvunum. Eftir at umsóknir eru innkomnar er tað landsstýrismaðurin, ið hevur ábyrgdina av viðgerðini av teimum og av teimum samráðingum, ið Oljufyrisitingin hevur við umsøkjararnar, áðrenn loyvini verða givin.

At málini fyrst skulu leggjast fyri løgtingið er í samsvari við venjuna í eitt nú Noregi og Danmark um parlamentariskt eftirlit við myndugleikunum á hesum týdningarmikla økinum. Í báðum londunum verða avgerðir um at bjóða nýggj øki út hildnar at hava stóran týdning, tí hóast óvist er um nakað verður funnið, er ein tílík útbjóðing eitt týdningarmikið amboð í stýringini av fyritakseminum sum heild og samfelagsligu avleiðingunum av virkseminum. Hildið verður, at tað samsvarar best við reglurnar í stýrisskipanarlógini um viðurskiftini millum landsstýrið og løgtingið, at frágreiðingin um ætlaðar útbjóðingar verður løgd fyri løgtingið at fáa at vita, um løgtingið tekur undir við ætlanum landsstýrisins. Er meiriluti í løgtinginum móti at boðið verður út við teimum treytum, ið skotnar eru upp, verður útbjóðingin ikki ólóglig, men viðkomandi landsstýrismaður kann tá koma í vanda fyri misálitisváttan. Er hinvegin meiriluti fyri at skipað verður fyri útbjóðing, kann frágreiðingin verða tikin til eftirtektar.

Í §§ 8-12 er víst á nakrar týdningarmiklar spurningar (leitingarskyldur, avgjøld, arbeiði í landinum otl.), sum støða í øllum førum skal verða tikin til í loyvunum, eins og áramálið, loyvini verða givin fyri, má vera í samsvari við tíðaravmarkingarnar í grein 8. Aðrar treytir kunnu verða settar av landsstýrinum enn tær, ið nevndar eru í lógini. Verður eitt nú avgerð tikin um, at eitt oljufelag, ið landið hevur stovnað, skal taka lut í virkseminum, kunnu reglur hesum viðvíkjandi verða tiknar við í loyvini samsvarandi grein 6, stk. 2 í lógini.

Umframt luttøku av einum landsfelagi kunnu aðrir møguleikar fyri beinleiðis samstarvi millum landið og altjóða oljufeløgini um dagliga virksemið eisini hugsast sambært lógini. Eitt nú kunnu nevnast "framleiðslubýtisavtalur", ið áseta at útvunnin olja verður býtt millum landið og eitt ella fleiri oljufeløg, tó fáa feløgini fyrst leitingar- og framleiðsluútreiðslurnar endurgoldnar. Teir sonevndu "tænastusáttmálarnir" eru ein annar møguleiki. Eitt sereyðkenni við

teimum er, at privata oljufelagið fær leitingar- og framleiðsluvirksemið goldið við rætti at keypa ein part av framleiddu kolvetnunum, møguliga fyri framíhjáprís. Í menningarlondum og í Latínamerika er almenni parturin ofta eitt felag, ið tað almenna eigur einsamalt.

Kapittul 3 í lógini byggir á ta í vesturheiminum vanligu “konsessiónsfyrimyndina“, men setir í aðrar mátar bert nøkur krøv til innihaldið í leitingar- og framleiðsluloyvunum. Lógin byggir á ta skipan, at veruligu avgerðirnar um val av útlendskum samstarvspørtum altíð verða tiknar av landsstýrinum. Somuleiðis skal eitt loyvi sambært grein 6 í lógini liggja sum grund undir øllum virkseminum, sama hvat løgfrøðiligt snið verður valt í hvørjum umfari.

Reglurnar í grein 10 í lógini um *arbeiðs- og vinnufremjandi politikkin* eru grundaðar á tann hugsunarhátt, at stavnhaldið um kolvetnisvirksemi til frama fyri búskapin og arbeiðsvinnu í Føroyum (§ 1, stk. 2, 1.pkt.) eigur at verða stuðlað við at leggja skyldur á oljufeløgini at taka undir við tí í verki. Álagt verður tí landsstýrinum, at hóskandi treytir skulu vera við loyvunum hesum viðvíkjandi. Orðingin av hesum reglunum í leitingar- og framleiðsluloyvunum er týðandi partur av uppskotinum til útbjóðingarumfør, ið leggjast skal fyri løgtingið sambært grein 7 stk. 2 í lógini, áðrenn oljufeløgini verða bjóðað at senda inn umsóknir. Sambært hesi lógargreinini skal frágreiðingin um hesi viðurskiftini m.a. meta um, hvat íkast kolvetnisvirksemið kann geva til búskap og arbeiði. Meðan grein 10 verður umrødd skal at enda verða víst á grein 14, stk. 3 og 4 um góðkenning av útbyggingarætlanum fyri leiðirnar, har kravd verður frágreiðing um týdningin av útbyggingarætlanini fyri føroyska búskapin og arbeiðsvánirnar, eins og kravt verður, at veitingar verða ikki umbidnar fyrr enn landsstýrið hevur góðkent leiðbyggiætlanina. Landsstýrið kann eisini hava vinnupolitisk sjónarmið í huga, tá umhugsað verður um undantaksloyvi skulu verða givin frá skylduni sambært grein 17 at taka oljuna í land í Føroyum.

d) Av reglunum um sjálvt *kolvetnisvirksemið* í kapitli 3, B, í lógini (§§ 13-17) er fyrst at nevna grein 13 um almenna dygdarstigið, ið virksemið á føroyska landgrunninum skal lúka. Høvuðskravið er, at arbeiðast skal samsvarandi góðum yrkissiði, trygdarliga forsvarligt og við neyðugum fyriliti fyri umhvørvi og øðrum viðkomandi áhugamálum, fiskiskapinum íroknaðum. Eftirlitið við loyvishavunum sambært grein 31, stk. 1 í lógini, ið Oljufyrisitingin hevur í hondum undir ábyrgd mótvegis landsstýrismanninum, hevur almennu leiðregluna í grein 13 at halda seg til umframt tey nógvu nágreiniligari krøvini í serreglum og loyvistreytum. Tær týdningarmiklu reglurnar um góðkenning frammanundan av boringum og uppseting av framleiðslu virkjum v.m. eru at finna í grein 14. Tílíkar góðkenningar verða hildnar at vera neyðugar, bæði av tí at djúpar hátrýstboringar eru vandamiklar og krevja góðan sakkunnleika og royndir, skulu tær verða vandaliga gjørdar, av tí at tær eru av stórum áhuga í leitingini, og av tí at landsstýrið sjálvandi eigur at samtykkja í uppseting av útbúnað, ið skal standa í longri tíð á føroyskum øki. Greinirnar 15 og 16 viðgera samskipanina av framleiðsluni úr einum fundi, ið fevnir um øki hjá fleiri loyvishavum, eisini á landgrunni annara landa, og samskipan av framleiðsluni úr fleiri fundum, ið liggja nær

hvørjum øðrum. At enda ásetir grein 17 eina meginreglu um, at framleidd ráolja og jarðgass skal takast í land í Føroyum. Í nógvum førum, og serliga tá tað ræður um jarðgass, verður tað hvørki tøkniliga ella fíggjarliga skilagott at føra kolvetnini til Føroya, og landsstýrinum er tí heimilað at samtykkja í, at tey verða send aðrar staðir. Roynt eigur kortini at verða at sleppa undan, at kolvetnisvirksemið á føroyska landgrunninum sum frá líður verður ovmikið einsíðis bundið av atgongd til rørleiðingar og oljustøðir hjá grannalondunum. Í samsvari við landsins áhugamál verður tí tann skipanin skotin upp, at framleiðslan bert í undantaksførum og við landsstýrisins loyvi kann verða tikin upp á land uttan fyri Føroyar. Á hendan hátt verður eisini møguligt hjá landsstýrinum at leggja treytir við, ið hava samband við vantandi vinnulívsframa fyri Føroyar orsakað av, at oljan ikki kemur upp í her.

e) Í kapitli 3, C og D, í lógini (§§ 18-21) eru reglurnar um stovnan og rakstur av *rørleiðingum* og um *avrigging av virkseminum*, tá framleiðslan heldur uppat. Landsstýrisins góðkenning frammanundan av tílíkum tiltøkum er neyðug av somu grundum, sum galdandi eru fyri útbyggingar av oljuleiðum sambært grein 14, stk. 2 í lógini. Í hesum sambandi verður tað lutur landsstýrisins at ansa eftir, at rørleiðingin í størst møguligan mun gerst liður í einum skilagóðum heildarundirstøðukervi til flutnings sum nevnt í grein 13, stk. 2 í lógini. Reglurnar um rørleiðingarútbúnað heimila harafturat landsstýrinum at leggja treytir við, ið kunnu fyribyrgja at ein stóreigari av rørleiðingum misnýtir sína ráðandi støðu og ræði á flutningskervinum til skaða fyri aðrar loyvishavar og landsins áhugamál í, at funnin kolvetni kunnu verða framleidd undir vanligum fíggjarligum treytum. Reglurnar um avrigging av virkseminum, tá framleiðslan er hildin uppat ella eitt loyvisskeið runnið, skulu bæði tryggja at gingið verður um tann brúkta útbúnaðin á skilagóðan hátt fíggjarliga, tøkniliga og umhvørvisliga, og at landið hevur rætt at taka við útbúnaðinum, um brúk framhaldandi er fyri honum í framleiðsluni ella til onnur endamál. Roknað er við, at spurningar um avrigging verða viðgjørdir í hvørjum føri sær við støði í uppskotum, sum loyvishavin letur myndugleikunum. Tílíkar avgerðir kunnu fáa stóra ávirkan á landskassan, annaðhvørt av tí at loyvishavin kann draga útreiðslurnar frá í skattaroknskapinum, ella av teimum útreiðslum, ið standast av burturbeining av útbúnað, ið verður yvirtikin av tí almenna.

f) Umframt vanligu myndugleikaheimildunum finnast í grein 22 í 4. kapitli í lógini fyriskipanir um serligar *metingar um fylgjur fyri umhvørvið* og við møguleika hjá almenninginum at siga sína hugsan um virkisætlanir í hesum sambandi. Í viðgerðini av eitt nú málum um útbygging av leiðum og legging av rørleiðingum fer Oljufyrisitingin at hava umhvørvisviðurskifti í huga í vanligu málsviðgerðini og í hesum viðfangi at taka umhvørvismyndugleikarnar við í ráðum. Harafturat verður tað hildið at vera skilagott at tryggja í lógini, at bæði almenningurin og allir avvarðandi felagsskapir og myndugleikar fáa møguleika at siga sína hugsan, áðrenn loyvi verður givið. Tílíkar mannagongdir eru vanligar í okkara grannalondum og eisini gjøllari umrøddar í sonevndu VVM-direktivinum hjá ES (85/337 EØF). Tá talan er um eina serliga mannagongd, ið vendir sær til almenningin og

byggir á eina serliga frágreiðing, verður skotið upp, at landsstýrið fær heimild at sleppa kravinum í serstøkum førum, har neyðugar upplýsingar longu eru til skjals í áður gjørdum árinsmetingum.

g) Reglurnar í kapitli 5 um *arbeiðsumhvørvi, trygd og tilbúgving v.m. fyri havstøðir* (§§ 23-28) hava til endamáls undir einum at skapa eina greiða skipan av øllum útbúnað, ið verður nýttur í kolvetnisvirkseminum á landgrunninum. Vóru ongar tílíkar reglur, høvdu vit als ikki havt nakrar trygdar- og arbeiðsumhvørvisligar reglur fyri føst framleiðsluvirki og rørleiðingar til havs, meðan búnaður í sigling hevði verið undir skipasýnislóggávuni, ið verður umsitin av danska sjóvinnustýrinum (skipaeftirlitinum). Tað hevði borið til at sett arbeiðaraverju- og brunalóggávuna, ið galdandi er á landi, í gildi fyri fastan frálandsútbúnað samsvarandi grundregluni í grein 3, stk. 2 í lógini. Men neyðugt hevði kortini verið at gjørt nýggjar serreglur afturat teimum, ið galdandi eru, og sum á mangan hátt eru ógviliga ymiskar til innihalds. Av tí at landsstýrið eigur at vera ført fyri at seta eina skipan í verk, ið fatar um alt trygdar- og arbeiðsumhvørvisliga økið, sama hvør útbúnaður nýttur verður, og tá tað er ein fortreyt fyri dyggum almennum eftirliti, at teir vandar, ið standast kunnu av tílíkum virksemi, kunnu metast sum partar av størri heild, verður kortini skotið upp, at serligar reglur verða gjørdar fyri “havstøðir“, sum eru gjøllari lýstar í grein 2, litra b) í lógini. Ofta verða tað einans tøkniligar ella fíggjarligar grundir, ið fara at gera av, um ein ávísur útbúnaður er fastur ella flytandi, og tí eiga somu trygdarreglur at vera galdandi, sama um tað snýr seg um fastan ella flytandi útbúnað, ið nýttur verður í oljuvirkseminum á sjónum. Hesar serligu reglurnar verða ikki galdandi á landi, tí har finst ikki tann serstaka samamsetingin av sjóváða og ídnaðarváða, ið eyðkennir virksemið á sjónum. Harafturat kemur, at til ber ikki í dag at vita, um leitingar- og framleiðsluvirksemi kann væntast á landi við teimum krøvum, ið hetta fer at seta til arbeiðaraverndarlóggávuna og -myndugleikarnar. Í kapitli 5 í lógini finnast, umframt ein almenn heimild at gera serreglur, serligar reglur um manning og fyriskipan í trygdarmálum, tilbúgving, trygdarøki og greining av sjóskaða.

h) Í lógarinnar kapitli 6 *um myndugleikaviðgerð og eftirlit* (§§ 29-33) eru serstakliga reglur um heimildir landsstýrisins sum eftirlitsmyndugleiki. Roknað verður við, at landsstýrið vanliga fremur myndugleika sín gjøgnum Oljufyrisitingina, men at hetta verður gjørt vegna tann landsstýrismannin, ið hevur ábyrgdina. Leiklutur landsstýrisins sum hægsti eftirlitsmyndugleiki krevur eina partleysa og sakliga umsiting, ikki minst í trygdarmálum, ið á sama hátt sum í øðrum londum skal lúkast samstundis sum landsstýrið veitir loyvi, skattleggur og umsitir landsins vinnubúskaparligu áhugamál. Í kapitli 6 finnast eisini reglur um skyldur loyvishavanna at endurgjalda landskassans útreiðslur av myndugleikaviðgerð og eftirliti og um rætt hjá eftirlitinum at senda umboð á fundir hjá samstarvsnevndum loyvishavanna (joint operating committees).

i) Í kapitli 7 um *endurgjald og serligar reglur um skaðabøtur* til fiskimenn (§§ 34-37) er dentur lagdur á partvís at skipa eitt fullgott og vanligt ábyrgdargrundarlag í teimum førum, har ein uttanfyri standandi verður fyri skaða av ávum teirra, ið reka oljuvinnu, og partvís at skapa eina serliga skipan um skaðabøtur til fiskimenn, ið verða raktir undir ávísum umstøðum, har eingin loyvishavi hevur borið seg at á ein hátt, ið ber endurgjaldsábyrgd við sær. Í fyrra førinum verður skotið upp, at ábyrgdin fyri skaðar, voldir av virkseminum, skal vera partleys ("objektiv"). T.v.s. at loyvishavin skal eisini endurgjalda hendiligar skaðar um vanligar endurgjaldstreytir eru loknar, eitt nú at tað er prógvað at ein ávísur loyvishavi hevur volt skaðan, og at loyvishavin hevur borið so at í kolvetnisvirksemi sínum, at hetta var orsøkin til skaðan. Hendan vanliga endurgjaldsreglan verður eisini brúkt í førum har hann, ið var fyri skaða, er fiskimaður. Uppískoytisskipanin um skaðabøtur minnir um skipanirnar í Danmark og Noregi og fyri ein part í Stórabretlandi, har royndirnar hava víst, at fiskimenn kunnu verða fyri tapi, uttan at nakar ávísur loyvishavi kann sigast at vera atvoldin, hóast skaðin má haldast at vera voldur av oljuvirksemi. Hugsast kann, at harraleysir lutir á havbotninum skaða fiskireiðskap v.m. Harafturat kann uppseting av einum framleiðsluvirki forða fyri vanliga fiskiskapinum har á leiðini, soleiðis at minni fæst burturúr hjá fiskimonnum. Mál um skaðabøtur skulu verða avgjørd av einari serligari skaðabótanevnd, har báðir partar eru umboðaðir, tó kunnu avgerðir í hesum málunum eftir umstøðunum verða tiknar av landsstýrinum.

## *VIÐMERKINGAR TIL EINSTØKU*

## *LÓGARGREINIRNAR*

**§ 1.** Lógin er galdandi fyri forkanningar o.a.m., leiting eftir, framleiðslu og flutning av kolvetnum gjøgnum rørleiðing á føroyskum land-, sjó- og landgrunsøki. Lógin er eisini galdandi fyri havstøðir, jbr. § 2, litra b.
*Stk. 2:* Lógin miðar móti varisligari og skynsamari leiting eftir og gagnnýting av kolvetnistilfeinginum til gagns fyri føroyskan búskap og arbeiðsvinnu í Føroyum. Virksemið skal verða soleiðis skipað, at neyðug fyrivarni eru tikin fyri fiskiskapi, sigling, umhvørvis- og náttúruáhugamálum umframt øðrum samfelagsligum áhugamálum.

*Viðmerkingar*
Í **§ 1, stk 1** verður sagt, hvat lógin er um og hvar hon hevur gildi. **§ 1, stk. 2** lýsir endamálið við lógini.

Lógin er ætlað at galda fyri øll skeið í eini oljuverkætlan, t. e. *forkanningar, leiting og meting, bygging og framleiðsla* umframt *avrigging.* Eisini er lógin galdandi fyri *flutning gjøgnum rørleiðingar* og á *havstøðum*, jbr. viðmerkingarnar til §§ 18 og 19 og § 2 litra b).

Tørvurin á *forkanningum* er serliga stórur á økjum sum teimum føroysku, sum jarðfrøðiliga eru lítið kannað. Við innleiðandi kanningum verður vanliga roynt, eitt nú við seismikki, at fáa betur skil á størri pørtum av jarðfrøðini.

Seinastu árini eru kanningar gjørdar á føroyska økinum sambært løgtingslóg nr. 179 frá 21. oktober 1993 um forkanningar o.a.m. av undirgrund Føroya, og hevur hetta økt kunnleikan um jarðfrøðiligu viðurskiftini. Forkanningarlógin varð bert ætlað at vera í gildi, meðan arbeitt varð við einari heildarlóggávu um kolvetnisvirksemi. Skotið verður tí upp, at ásetingarnar í forkanningarlógini verða fluttar yvir í kolvetnislógina, jbr serliga §§ 4 og 5, og at forkanningarlógin verður sett úr gildi, jbr § 45, stk. 2. Broytingar í rættarstøðuni forkanningum viðvíkjandi eru ikki skotnar upp.

Í *leitingarskeiðinum* verður kannað, um olja og/ella gass er til, og um kolvetni er til í so stór nøgdum, at talan er um rakstrarverdar fundir. Í hesum skeiði er vanligt at gera neyvari seismiskar kanningar o.a. og nakrar dýpdarboringar.

Leitingarskeiðið varir ofta í 5 – 10 ár og á jarðfrøðiliga minni kendum økjum kanska upp aftur longur.

Verða kolvetni funnin í stórum nøgdum at framleiðsla fæst burturúr, verður næsta skeið *byggi- og framleiðsluskeiðið.* Í hesum skeiði verður ætlað um, hvussu leiðin skal troytast, hvussu framleiðslueindin skal verða bygd og hvar, hvussu og nær oljan ella gassið skulu verða tikin í land. Eisini verður gjørt av, nær farast skal undir framleiðslu.

Tá ið framleitt er í nøkur ár, fara útreiðslur at reka og røkja leiðina upp um nettointøkurnar av leiðini, og tí steðgar framleiðslan. Tá tekur spurningurin um avrigging seg upp, herundir hvat gerast skal við framleiðslutólini. Hesin spurningur verður í lógini viðgjørdur saman við spurninginum um framleiðslu, og lógaruppskotið vísir í §§ 20 og 21 á mannagongd at brúka, tá riggað verður av.

**Stk. 1** staðfestir eisini, at lógin landafrøðiliga er galdandi á føroyskum land-, sjó- og landgrunsøki.

Føroyska sjóøkið er býtt í ein ytra og ein innara part, jbr. § 1, stk. 1 í fyriskipan nr. 599 frá 21 desember 1976. Ytri parturin er 3 fjórðingar úr beinum grundlinjum, meðan innari parturin er

sjógvurin innanfyri nevndu grundlinjur, eitt nú havnir, innsiglingar, pollar, vágir, víkir, firðir og sund.

Yvirvaldsrættur danska ríkisins yvir landgrunninum út fyri ríkisins strondum varð lýstur við kongaligari fyriskipan nr. 259 tann 7. juni 1963. Lýsingin fevnir eisini um føroyska landgrunnin. Sambært altjóða rætti er lýsingin grundað á landgrunssáttmálan frá 29. apríl 1958. Eftir hesum sáttmála kann yvirvaldsrættur strandalandsins yvir landgrunninum røkka, annaðhvørt til 200 metra dýpdarlinjuna, ella so langt út, sum tøknin loyvir gagnnýting.

Forsætisráðið hevur við fráboðan í Statstidende tann 7. mai 1985 fyribils ásett víddina á føroyska landgrunninum. Landnyrðingsparturin svarar til 200 fjórðinga fiskiøkið, men heldur seg nakað innan fyri fiskimarkið, m. a. har fiskimarkið umskarar bretska fiskimarkið og íslendska búskaparøkið. Útsynningsparturin svarar til tann partin av Føroya-Rockall rygginum, sum Danmark vegna Føroyar roknar sum natúrligt framhald av føroyska landgrunninum, men við virðing fyri 200 fjórðinga markinum hjá grannalondunum. Móti Bretlandi er 200 fjórðinga markið roknað úr Sankt Kilda og ikki úr Rockall. Út ímóti havdýpinum er markið sett varisliga, samanborið við reglurnar í grein 76 í havrættarsáttmálanum. Endalig áseting kann ikki væntast, fyrr enn landgrunsmørkini ímóti Íslandi, Bretlandi og á Rockall rygginum møguliga móti Írlandi eru ásett, annaðhvørt við samráðingum ella dómi.

Landgrunsmarkið millum Føroya og Noreg er sett í sáttmála millum Danmarkar og Noregs frá 15. juni 1979. Avtalaða markið er miðlinja, sum eisini er fiskimark. Fyribils er mark bert sett út á tað punktið, ið liggur 200 fjórðingar frá londunum.

Sambært **stk. 2, 1. pkt.** er endamálið við kolvetnislógini ein varislig og skynsamilig gagnnýting av kolvetnistilfeinginum til gagns fyri føroyskan búskap og arbeiðsvinnu í Føroyum.

Endamálsorðingin, sum vendir sær bæði til myndugleikar og loyvishava, leggur við orðunum *varisliga og skynsamiliga* áherðslu á tilfeingisfyrilit, t. e. at í framleiðsluni skal dentur leggjast á skynsamiliga og forsvarliga gagnnýting, bæði privat- og samfelagsbúskaparliga, soleiðis at sum mest fæst burturúr hvørjum einstøkum kolvetnisfundi. Hetta krevur m.a. neyvan kunnleika til goymslujarðfrøði og -tøkni. Ógvuliga ymiskt er, hvussu poknutar oljuleiðir eru, og hvussu trýstið er. Hvussu nógv fæst burtur úr eini goymslu veldst nógv um valda arbeiðslagið.

Tað verður hildið skynsamt, at loyvishavi, longu tá ið byrjað verður, er bundin av fyriliti um at umsita tilfeingið á hvørjari einstakari leið forsvarliga. Á tann hátt styttist ímillum endamálini, myndugleikar og loyvishavar hava við virkseminum. Hetta skuldi eisini lætt um, tá ið framleiðslugongd verður løgd til rættis, jbr. § 14, stk. 2. Tað liggur á myndugleikunum at taka avgerð um, hvussu kolvetnistilfeingið sum heild eigur at verða troytt, tá ið útbjóðingarumfør verða sett í verk, leiðbyggiætlanir og rørleiðingar verða góðkendar og í teimum serligu førunum, tá framleiðslan verður tillagað, jbr. § 14, stk. 5.

Í endamálsgreinini er eisini dentur lagdur á, at kolvetnistilfeingið skal verða brúkt til gagns fyri *búskap og arbeiðsvinnu*. Hetta samsvarar við avgerð løgtingsins frá 24. sept. 1993 (løgtingsmál 5/1993), sum leggur serligan dent á at stimbra vinnupolitikkin.

Í møguligum byggi- og framleiðsluskeiði kann føroyski parturin, hóast hann er lítil í mun til samlaðu arbeiðsmegina og veitingarnar, hava lutfalsliga stóra ávirkan á føroyskt vinnulív og føroyskan samfelagsbúskap.

Oljufeløgini fara í ávísan mun sjálvi at duga at síggja fyrimunirnar við at spyrja eftir vøru, tænastu og arbeiðsmegi í Føroyum, men í øðrum førum er hugsandi, at tey bara gera tað, um myndugleikarnir krevja tað, sum treyt fyri at feløgini sleppa at virka í Føroyum. § 10 heimilar slíkum treytum. Treytirnar mugu lagast eftir, hvørjar møguleikar føroyingar hava at bjóða tær tænastur feløgunum tørvar, tí tørvi, føroyska samfelagið hevur, og eftir krøvum, sum altjóða kappingin í kolvetnisvinnuni seta.

Royndir frá øðrum samfeløgum, sum hava verið fyri oljuídnaðarmenning, eru, at samfelagsbúskapurin kann verða ávirkaður ógvisliga, bæði beinleiðis ígjøgnum vinnulívið og óbeinleiðis ígjøgnum almennar inntøkur, sum kunnu føra til vøkstur í almennu útreiðslunum. Hetta kann hava ringa ávirkan á kappingarevnini hjá vinnulívinum annars. Týdningarmesti setningurin hjá føroyskum myndugleikum í hesum viðfangi verður, einamest ígjøgnum búskaparpolitikk, at stýra *ávirkanini* frá oljuvirkseminum á samfelagið og samfelagsbúskapin. Miðað eigur at verða móti, at fáa eitt vinnulív, sum stendur seg í altjóða kapping tann dagin, tá oljuídnaðurin fer at nærkast endanum.

Umframt hetta nevnir stk. 2, 2. pkt nøkur viðurskifti, sum bæði myndugleikar og loyvishavar skula ansa eftir, tá virksemið verður lagt til rættis.

Fyrilit skal verða havt við fiskiskapi, t. d. skulu kanningarskip ansa eftir fiskiskapi og aðrari sigling. Tá ið boriloyvi verða givin eftir § 14, stk. 1 kunnu avmarkingar verða gjørdar, t. d. í sambandi við fiskitíð og aðrar serligar treytir um fiskiskap.

Umhvørvis- og náttúruáhugamál eiga at verða vird. Hetta krav er galdandi við síðuna av reglunum um frágreiðingar og umhvørvisligar metingar, jbr. § 7, stk. 2 og § 22. Afturat kemur skylda loyvishavans í leitingar- og framleiðsluskeiðinum at arbeiða forsvarliga, tá tað ræður um umhvørvið, jbr. § 13. Harumframt fara umhvørvisatlit, m. a. reglur um at lata evni út í sjógv, at verða umsitin eftir heimildum í havumhvørvislógini (kongalig fyriskipan nr. 318 frá 26. juni 1985 ). Millum náttúrumálini kann t. d. verða nevnd ávirkanin, ið virksemið hevur á sjófugl.

Samfelagslig áhugamál eru tikin við bæði í endamálsgreinini og § 7, stk. 2 um frágreiðing landsstýrisins til løgtingið, áðrenn nýggj øki verða boðin út. Hildið verður, at tørvur er á at lýsa ávirkanina, sum oljuvirksemi fer at hava á samfelagið, og at síggja til at leggja virksemið soleiðis til rættis, at sleppast kann undan skaðiligari ávirkan.

---

**§ 2.** Í hesi lóg skilst við:

a) Kolvetni: jarðolja, dropagass, jarðgass og onnur kolvetni, sum náttúrliga eru í undirgrundini, og sum kunnu framleiðast flótandi ella í luftlíki.

b) Havstøðir:
   - (i) Fastur útbúnaður sum pallar, rørleiðingar og onnur virki og innrættingar á sjóøkinum og landgrunninum, ið verða nýtt til virksemi, nevnt í § 1.
   - (ii) Flytandi eindir sum boriskip, -reiði, framleiðslu-, goymslu-, íbúðar- og lík før, meðan tey eru støðuføst og verða nýtt til virksemi, nevnt í § 1.

---

*Viðmerkingar*

Ásetingin í **§ 2 litra a)** skilmarkar tey kolvetni, ið lógin fevnir um.

Í **§ 2 litra b)** verður heitið *havstøð* nýtt sum felagsheiti bæði fyri føstum útbúnaði, sum nýttur verður á sjóøkinum og landgrunninum, og flytandi eindum, meðan tær eru støðufastar, og verða nýttar til kolvetnisvirksemi á sjóøki og landgrunni.

Endamálið við hesum er at tryggja, at almenna eftirlitið við trygdar-, heilsu- og umhvørvisviðurskiftum í frálandsvinnu, jbr. eisini §§ 23 – 27 við viðmerkingum, verður munadygt. Hildið verður, at tann útbúnaður, ið § 2, litra b), fevnir um, sama hvørjum slagi hann er av, hevur við sær eins stóran vanda, og at tørvurin á nágreiniligum trygdarreglum, -eftirliti og -samskipan er stórur í frálandsvinnuni. Tí verður hildið skilagott at mæla til, at høvuðspartarnir í kolvetnisvinnuni, hvat viðvíkir trygd, heilsu og arbeiðsumhvørvi eru undir somu lóggávu. Við trygdini fyri øllum virkseminum í hyggju, hevur tað havt við sær, at hildið verður neyðugt at lata hugtakið *havstøð* eisini fevna um annan útbúnað enn hann, ið er í beinleiðis sambandi við havbotnin. Av praktiskum

grundum eru reglurnar í kap. 5 í lógini ætlaðar at galda, bæði tá ið havstøðin er fingin endaliga uppá pláss, men ikki enn tikin í brúk, og í tíðarskeiðnum til støðin er farin av plássinum, avriggað ella brúkt til annað endamál.

Flytandi eindirnar, nevndar eru í § 2, litra b) (ii), eru sum nevnt undir lógini, tá ið tær eru støðufastar og verða nýttar til tað í § 1 nevnda virksemið. Útbúnaður, sum verður sigldur ella sleipaður, er ikki undir lógini. Eftir hesum koma til dømis boriskip, framleiðsluskip, goymslufør, íbúðarfør, umframt fermingar- og lossingarútbúnaður o. a. undir skilmarkingina, meðan tey eru í kolvetnisvirksemi. Harafturímóti koma hjálpar-, vaktar- og útgerðarskip, rørleggingarfør, seismografisk skip og tangaskip ikki undir skilmarkingina, av tí at hesi skip hava ikki fast og støðugt tilknýti til virksemið. Afturat hesum kemur, at hesi skip og før eru undir aðrari og viðvíkjandi trygd nøktandi lóg, t.e. lóg nr. 98 frá 12. mars 1980 um skipatrygd við seinni broytingum. Viðvíkjandi trygd eru boriskip undir sjóferðslulóggávu, men hildið verður neyðugt, at hesi skip, tá ið tey bora, verða mett sum havstøðir, av tí at hetta gevur landsstýrinum høvi at áseta allar neyðugar trygdarfyriskipanir. Harumframt hevði tað verið skilagott, jbr. tí, ið nevnt er omanfyri um tørv á trygdarsamskipan og aðrari samskipan, at allar tær heimildir, neyðugar eru til eftirlitið, verða givnar landsstýrinum.

Skilmarkingin av flytandi eindum, skipum og førum hevur harafturat við sær, at tá ið tey eru undir kolvetnislógini, kunnu tey ikki avmarka sína ábyrgd sambært reglunum í sjólógini, jbr. § 41 við viðmerkingum.

Landafrøðiliga er lógin avmarkað til havstøðir, sum eru á ytra ella innara sjóøkinum, jbr. viðmerkingarnar til § 1, og føroyska landgrunnin. Á sjóøkinum hava Føroyar/Danmark eftir altjóða rætti fullan yvirvaldsrætt, jbr. myndugleikabýtið í heimastýrislógini. Á landgrunninum er yvirvaldsrætturin avmarkaður til leiting og gagnnýting av náttúrutilfeinginum á grunninum. Ósemja er um, hvussu langt heimildin sambært altjóða rætti til leitingar og gagnnýting av náttururíkidøminum røkkur, men sambært norskari og danskari venju verður hildið, at landgrunssáttmálin frá 1958, sum Danmark staðfesti í mai 1963, gevur strandalandinum løgdømi yvir øllum virksemi í sambandi við leiting og framleiðslu av m. a. kolvetnum á og í landgrunninum. Tað er sostatt samsvarandi altjóða rætti, at føroyingar seta í gildi rættarreglur fyri havstøðir við omanfyri nevndu endamálum. Somuleiðis kunnu føroyskir myndugleikar áseta og handhevja reglur um tvingsil móti teimum, sum við ongum rætti leita ella framleiða á landgrunninum, ella sum í virksemi sínum bróta galdandi reglur ella ásettar treytir.

Lógin er galdandi fyri bæði føroyskar og útlendskar havstøðir í virksemi á sjóøkinum og landgrunninum. Hetta er neyðugt til tess at skipa alt leitingar- og framleiðsluvirksemið á økinum, m.a. av trygdarávum.

---

**§ 3.** Kolvetni, nevnd eru í § 1, hoyra landinum til. Forkanning, leiting ella framleiðsla kann einans setast í verk av øðrum við loyvi, fingnum sambært reglunum í hesi lóg.

*Stk. 2:* Føroyskur rættur annars er galdandi fyri havstøðir á landgrunninum og trygdarøki rundanum, er ikki annað ásett í aðrari lóggávu ella í reglum ásettum av landsstýrinum.

---

*Viðmerkingar*

**Stk. 1** ásetir, at kolvetni er landsins ogn. Á landgrunninum merkir hetta sambært altjóða rætti, at landið hevur einarætt at leita eftir og gagnnýta ráevni, herundir kolvetni.

Kolvetni er eitt av teimum ráevnum, sum sambært lóg nr. 181 frá 8. mai 1950 um leiting eftir og útvinning av ráevnum í undirgrund Danmarkar kongaríkis er undir ognarrætti ríkisins, tí tey ikki fyrr enn 23. februar í 1932 hava verið gagnnýtt av privatum.

Heimastýrið hevur sambært avtalu 22. desember 1992 millum donsku stjórnina og Føroya landsstýri yvirtikið málsøkið “ráevni í undirgrundini“, t. e. tey ráevni, sum eru undir áðurnevndu undirgrundarlóg frá 8. mai 1950. Avtalan varð, eftir at løgtingið hevði góðkent hana, lýst í Kunngerðarblaðnum sum kunngerð nr. 96 frá 13. mai 1993. Sum skilst av hesum kann uttan iva verða staðfest, at kolvetni eru landsins ogn. Privat, eitt nú oljufeløg, kunnu bert reka virksemi, nevnt í § 1, við loyvi fingnum sambært lógini. Leitingar- og framleiðsluloyvi sambært konsessión eru at skilja soleiðis, at framleitt kolvetni gerast ogn loyvishavans.

Loyvi sambært hesi lóg, sleppir ikki loyvishavanum undan at søkja um loyvi og góðkenningar, sum verða kravd í aðrari lóggávu.

Við **stk. 2** verður annar føroyskur rættur settur í gildi fyri havstøðir á landgrunninum, jbr. § 2 litra b), og í trygdarøkjum uttan um tær, jbr. § 27. Ásetingin verður mett at fáa týdning á tann hátt, at føroyskur privatrættur og reglurnar um, hvørs lands rættur skal nýtast, verða galdandi. Í nógvum førum má haldast, at serligar almennar reglur fara at verða settar í gildi fyri oljuvirksemið, til dømis henda lógin og serligar umhvørvisreglur.

Hugtakið *føroyskur rættur* er at skilja sum bæði løgtingslógir, danskar lógir í gildi í Føroyum, kunngerðir o.l. og óskrivaður rættur.

Føroyskur rættur er ikki galdandi á havstøðum og trygdarøkjum, um onnur lóggáva staðiliga sigur annað, eitt nú um lógin beinleiðis ásetir annað gildisøki ella lógin má tulkast soleiðis, at hon bara er ætlað at galda á føroyskum landøki, (eitt nú løgtingslóg um haruveiðu). Somuleiðis galda reglurnar í kolvetnislógini um trygd á havstøðum v.m. (§§23 – 28) í staðin fyri løgtingslóg um arbeiðaravernd, brunalóg og aðrar lógir um trygd og arbeiðsumhvørvi, samsvarandi reglunum um *lex specialis.*

Tað kann tó eisini koma fyri, at tað fer ikki at vera skilagott at víðka føroyska lóg at galda uttanfyri sjóøkið, sjálvt um lóggávan ikki er til hindur fyri tí. Tað verður tí skotið upp, at landsstýrið fær umsitingarliga heimild til at áseta, at ávísir partar av føroyskari lóg ikki skula verða galdandi á havstøðum á landgrunninum og í trygdarøkinum rundanum tær.

Sum dømi um føri, har tað kann vera skilagott at áseta, at føroyskur rættur sum heild ikki skal vera galdandi á havstøðum, eru rørleiðingar til millumlandaflutning, jbr. § 19, hóast tær í roynd í veru eru havstøðir sambært lógini. Eitt annað dømi er útbúnaður til gagnnýting av fundum, sum røkka um mark til annað land. Í tílíkum førum verður ofta gjørd avtala við grannalandið um samtroyting og tá er ofta skilagott, at ein havstøð er undir sama løgdømi, uttan mun til hvørjumegin landgrunsmarkið hon liggur.

Serliga tá ræður um virksemi í trygdarøkinum kunna grundir vera til varsemi við at seta føroyska lóg í gildi. Strandalandið verður ikki hildið at hava eins víðar heimildir í trygdarøkinum sum á havstøðunum sjálvum, av tí at altjóða rættur bert loyvir strandalandinum at seta í gildi tiltøk, sum er neyðug at verja viðkomandi havstøð, jbr. grein 5(2) í landgrunssáttmálanum. § 27 um trygdarøki leggur tí dent á vernd av útbúnaðinum, jbr. eitt nú rættin at bannað óviðkomandi skipum at koma inn á øki. Stríð millum løgdømi flaglandsins og strandalandsins kann serliga hugsast, tá talan er um skip ella útbúnað skrásett í útlandinum, ið fáa loyvi at koma inn á trygdarøkini at arbeiða. Hesi skip o.l. – við manningum – mugu sjálvandi lýða reglur strandalandsins um sigling, ankring og arbeiði á økinum v.m. Men tá talan er um aðra føroyska lóg enn hana, ið beinleiðis viðvíkir vernd av (øðrum) havstøðum, kunnu góðar grundir vera at vísa varsemi. Í tílíkum førum eigur dentur at verða lagdur á, hvat tilknýti viðkomandi fremmanda skip o.l. hevur til havstøðirnar og virksemið á teimum. Eitt fremmant skip á trygdarøkinum kann sammetast við eitt útlendst skip á *innara sjóøkinum*, eitt nú í føroyskari havn: Føroyar hava sambært vanligum altjóða rætt løgdømi, men í verki verður tilíkt

løgdømi ikki útint, tá tað ræður um "innanhýsis ósemjur" umborð. Á trygdarøkjunum kann sostatt mælast til, at føroysk lóg – serstakliga er hon í stríð við reglurnar í flagglandinum – bert verður handhevja mótvegis útlendskum skipum v.m. er talan um verndarreglur samsvarandi endamálinum við trygdarøkinum ella um skipið ella útbúnaðurin er í trygdarøkinum í longri tíð og hevur tætt tilknýti til virksemið í økinum.

---

**§ 4.** Landsstýrið kann veita loyvi til forkanningar við atliti at leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum í undirgrundini og til vísindaligar kanningar av undirgrundini, sum hava týdning fyri hetta virksemið.
*Stk. 2:* Verður ikki stytri tíðarfreist ásett í einum loyvi, er tað galdandi í 3 ár. Í loyvinum skal verða tilskilað, hvørji øki, tað fevnir um.
*Stk. 3:* Loyvi til forkanningar gevur rættindi til jarðfrøðiligar, jarðalisfrøðiligar, jarðevnafrøðiligar og jarðtøkniligar kanningar. Loyvið gevur ikki rætt at bora eftir ella at framleiða kolvetni, heldur ikki forrætt til seinni leitingar- og framleiðsluloyvi.

---

*Viðmerkingar*
Endamálið við reglunum í **stk. 1 fyrsta parti** *(forkanningar)* er at skapa møguleikar hjá áhugaðum fyritøkum at fara undir fyribils kanningar av, um grundarlag er fyri miðvísari ráevnisleiting. Endamálið við forkannigararbeiðnum er sostatt at kortleggja eitt ávíst øki sum grundarlag undir eini fyribils meting av, um útvinnandi ráevni kunna verða í økinum.

Forkanningar fevna um kanningararbeiði sum t. d. jarðalisfrøðiligar kanningar, herundir seismiskar mátingar, og jarðevnafrøðiligar kanningar. Loyvi til forkanningar fevna vanliga eisini um sonevndar grunnar boringar, t. e. boringar fáar 100 metrar niður, men eftir umstøðunum kunnu eisini djúpari boringar verða gjørdar.

Reglurnar í **stk. 1 øðrum parti** *(vísindaligar kanningar)* hava til endamáls at tryggja innlit í vísindaligar kanningar av undirgrund Føroya, sum kunnu hava týdning fyri leiting eftir og útvinning av ráevnum í undirgrundini. Tílíkar kanningar kunnu vera munagott íkast til jarðfrøðiliga kortlegging av týdningi fyri útvinning. Við vísindaligar kanningar skiljast kanningar á staðnum og mátingar, ið krevja tøkniliga útgerð, t. d. tyngdarkanningar-, sigulmagns- ella seismiskar kanningar, radiometriskar mátingar, mátingar av hitastreymum o.a.m. umframt boringar. Vísindaligar kanningar, ið hava til endamáls at kortleggja onnur ráevni enn kolvetni, og kanningar, ið byggja á eldri mannagongdir, eitt nú innsavning av staklutum, ið liggja omaná lendinum, og ikki eru liður í oljuleiting, galda reglurnar ikki fyri.

Reglurnar í stk. 1 um at vísindaligar kanningar krevja loyvi, hava harafturat til endamáls at tryggja, at vísindaligar kanningar, herundir serstakliga møguligar boringar, verða gjørdar á trygdarliga forsvarligan hátt. Endamálið er eisini at forða fyri brotum móti reglunum og mannagongdunum í loyvislóggávuni gjøgnum vísindaligar kanningar, sum eisini hava vinnuligt virði.

Sambært § 4, stk 1 er tað landsstýrið, ið gevur loyvi til forkanningar og vísindaligar kanningar. Landsstýrið ásetir eisini gjøllari reglur fyri tílíkum loyvum, jbr. viðmerkingarnar til § 5, stk. 1 og galdandi forkanningarlóg § 2. Í verki hevur landsstýrið latið Oljufyrisitingini heimildir sínar, jbr. kunngerð nr. 10 frá 15 februar 1996. Oljufyrisitingin hevur orðað standarkrøv til loyvi til bæði forkanningar og vísindaligar kanningar.

Higartil eru forkanningarloyvi givin sambært forkanningarlógini, løgtingslóg nr. 179 frá 21 oktober 1993. Í 1994 og 1995 fekk bert eitt felag loyvi at skjóta seismikk við tí endamálið at fáa í lag eina víðfevnda kanning av føroyska landgrunninum innan fyri 200 fjórðingar. Nú er mannagongdin tann, at allar umsóknir vanliga verða játtaðar uttan so at nakað talar ímóti í tí einstaka førinum.

Sambært **stk. 2** kunna loyvi verða givin í upp til 3 ár, hóast ætlaðu kanningarnar kundu verið gjørdar eftir styttri tíð. Føroysku standarloyvini hava higartil ikki verið galdandi í meira enn eitt ár til tess at kunna broyta treytirnar sohvørt sum royndirnar gjørdust fleiri. Vanligt er í grannalondum okkara, at standarloyvi til forkanningar hava gildi í 2 – 3 ár móti gjaldi av fastari ágávu. Á henda hátt stendist loyvishavunum ógvuliga frítt at leggja kanningarnar til rættis samsvarandi praktiskum og handilsligum áhugamálum. Tað er ein fortreyt, at landsstýrið (Oljufyrisitingin) fær boð frammanundan, hvørjaferð kanningar verða settar í verk. Loyvi til vísindaligar kanningar vera vanliga einans givin til ítøkiligar kanningar.

Tey øki, ið eitt loyvi fatar um, eru ofta lýst í víðari orðing, eitt nú sum alt landøkið við innara sjóøkinum ella allur landgrunnurin ella ávísir partar av honum. Serlig fyrivarni verða tikin viðvíkjandi økjum, ið kunna vera partur av møguligum marknasamráðingum við grannalond.

Kanningarnar nevndar í **stk. 3, 1. pkt.** eru eisini nevndar í viðmerkingunum til stk. 1. Beinleiðis kanningar sum djúpar boringar, ið miða ímóti at fáa vitan um, hvørt kolvetni, ið kunnu útvinnast á rakstrarverdan hátt, finnast, koma ikki undir regluna. Heldur ikki tílík tiltøk, sum hava til endamáls at kortleggja útbreiðsluna av gjørdum fundum ella fyrireika gagnnýtingina av teimum.

Einkarrættur til útvinning av kolvetnisfundum verður sambært lógini givin í leitingar- og framleiðsluloyvi, jbr. § 6, stk. 1, sum harafturat gevur rætt til forkanningar í øllum økinum, loyvið er galdandi fyri. Í stk. 3, 1. pkt verður sagt, hvørjar kanningar eitt forkanningarloyvi gevur rætt til, og harafturat verður gjørt greitt í **stk. 3, 2. pkt.**, at forkanningarloyvi ikki kunna veita einarætt til boring eftir ella framleiðslu av kolvetnum. Harafturímóti fer væl at bera til at bora eftir einum forkanningarloyvi, serstakliga grunnar ella stratigrafiskar boringar, sum einans hava til endamáls at útvega vitan um undirgrundina. Í seinasta parti av regluni verður skotið upp, at eitt tílíkt loyvi ongantíð kann geva forrætt til seinni leitingar- og framleiðsluloyvi. Grundin er, at verða forrættindi veitt, fer tað at minka um áhugan hjá øðrum oljufeløgum at senda umsóknir inn í seinni útbjóðingarumførum. Hetta hevði ávirkað treytirnar, ið landsstýrið hevði kunnað fingið í hesum umførum.

Forkanningarloyvi við framíhjárætti eru ikki ókend í økjum, har feløgini meta vánirnar so ringar, at tað hevði ikki borið til at fingið sjálvt forkanningarvirksemi í gongd, uttan áhugað feløg høvdu fingið forrættindi. Tá forkanningarlógin frá 1993 varð fyrireikað, varð hildið, at oljufeløgini høvdu somikið av áhuga fyri føroyska økinum, at somu mannagongdir í kanningum kundu verða skotnar upp, sum tær í brúktar verða í Norðsjóvarøkinum. Áhugin hjá oljufeløgunum er framvegis stórur og grundir tykjast ikki vera til at broyta reglurnar.

---

**§ 5.** Landsstýrið kann áseta treytir fyri einum forkanningarloyvi ella einum loyvi til vísindaligar kanningar, herundir um rindan av avgjaldi og ágávu og frágreiðing um gongdina í kanningunum og um úrslitini, og um trúnað.

*Stk. 2:* Landsstýrið kann áseta reglur um avgjøld og ágávu fyri at veita loyvi.

---

*Viðmerkingar*

Til tess at tryggja eftirlitið við kanningunum (tíðarskeið, mannagongdir, útgerð og úrslit o.a.) og at útvega tí almenna so góðan kunnleika sum gjørligt til viðurskiftini í undirgrundini, verður í loyvunum sambært **stk. 1** ella í vanligum forskriftum, jbr. § 29 gjøllari ásett, hvørjar frágreiðingar skulu verða gjørdar, og á hvønn hátt loyvishavin skal senda myndugleikunum frágreiðingar um virksemi sítt. Eisini verður ásett her, hvørjar stakroyndir, rátilfar, viðgerðarúrslit, tulkingar v.m., skulu latast myndugleikunum, og nær hetta skal verða gjørt. Fyribils er tað bert í standartreytunum

hjá Oljufyrisitingini til loyvi til forkanningar og vísindaligar kanningar, at frágreiðingar og innlating av tilfari eru gjøllari viðgjørd, jbr. viðmerkingarnar til § 4.

Grein 5 í galdandi forkanningarlóg ásetir, at kanningar til havs skulu leggjast til rættis við neyðugum atliti fyri fiskiskapi. Sambært § 45, stk. 2 í hesum lógaruppskotinum verður skotið upp, at forkanningarlógin verður sett úr gildi. Hóast hetta verður rættarstøðan óbroytt, av tí at fyrilit fyri fiskiskapi og sigling er ein partur av endamálsorðingini í hesi lógini, jbr. § 1, stk. 2 við viðmerkingum.

Landsstýrið fer framvegis í forkanningarloyvum at seta treytir um m.a., at kravt kann verða, at seismisk kanningarskip taka fiskikønan eygleiðara við.

Higartil hevur fiskikøni eygleiðarin verið við skipum til kanningar við loyvi sambært forkanningarlógini. Eygleiðarin hevur bert ráðgevandi myndugleika. Høvuðsendamálið er at hava samband við møgulig fiskiskip á kanningarøkinum, soleiðis at tað slepst undan samanstoytum.

Av tí at endamálsreglan í § 1, stk. 2 ikki bert hevur boð til myndugleikarnar, áleggur reglan kanningarfeløgunum eina almenna skyldu til at hava fyrilit fyri fiskiskapi á kanningarøkinum. Verður tað neyðugt at útbyggja hesa skyldu við gjøllari reglum, gerst hetta við almennum forskriftum ella treytum í einstøku loyvunum sambært hesi regluni.

At enda kan verða nevnt, at § 4 í forkanningarlógini um ábyrgd loyvishavans verður sambært lógaruppskotinum sett í § 34 í kolvetnislógini. Hetta ber m.a. í sær, at ábyrgdarreglan er galdandi fyri alt virksemið sambært kolvetnislógini. Um hetta verður víst til § 34 við viðmerkingum.

Endamálið við regluni um trúnað í síðsta petti í hesi grein er at verja innkomið tilfar í eitt ávíst tíðarskeið, av tí at tílíkt tilfar bæði kann vera handilsligt loyndarmál og hava virði hjá teimum, ið hava forkanningarloyvi, at brúka til sølu ella umbýti. Tá skeiðið, ið vanliga er 5 ár, er runnið, kann hetta tilfar latast áhugaðum privatum – møguliga fyri gjald – soleiðis sum vanligt er í øðrum londum. Landsstýrið hevur í kunngerð nr. 10 frá 15. februar 1996 ásett, at tilfar, ið latið verður oljufyrisitingini sambært forkanningarlógini, kemur ikki undir lóg um alment innlit, meðan reglurnar um trúnað, sum ásettar eru í loyvinum, eru galdandi.

Ágávir fyri umsitingarútreiðslur og møgulig avgjøld verða ásett soleiðis, at tey ikki fara at minka um áhugan at gera forkanningar á føroyskum øki, av tí at tað almenna hevur sjálvsagdan áhuga í at fáa betri kunnleika til undirgrundina við forkanningum, ið aðrir gera. Í **stk. 2** verður skotið upp, at landsstýrið fær heimild at áseta almennar reglur um orðing og stødd av møguligum ágávum og avgjøldum. Áður nevnda kunngerð nr. 10 frá 15. februar 1996 setir umsóknargjaldið til kr. 10.000,00 og árliga loyvisavgjaldið til kr. 75.000,00.

---

**§ 6.** Landsstýrið kann veita loyvi við einkarrætti til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum á neyvt ásettum økjum við gjølla ásettum treytum. Loyvi kann bert veitast umsøkjarum, sum ætlandi hava neyðugan sakkunnleika, royndir, førleika og fíggjarorku. Tá avgjørt verður at veita loyvi, skal landsstýrið leggja dent á, í hvønn mun tað almenna fær innlit í og gagn av loyvda virkseminum.

*Stk. 2:* Í loyvi eftir stk. 1 skulu vera reglur um tey viðurskifti, nevnd eru í §§ 8-12, og harafturat kann landsstýrið áseta treytir, ið hildnar vera neyðugar.

---

*Viðmerkingar*

Ásett verður í **stk 1**, at tað er landsstýrið, ið veitir loyvi við einkarrætti til leitingar eftir og framleiðslu av kolvetnum úr undirgrundini. Sum nevnt í viðmerkingunum til § 3, ber einkarrætturin vanliga við sær, at loyvishavin gerst eigari av møguligum kolvetnum framleiddum í loyvisøkinum.

Leitingarvirksemi ber í sær nágreiniligar kanningar, m.a. dýpdarboringar á einum øki, har metingar av forkanningarútslitum vísa, at møguleikar eru at finna kolvetni.

Framleiðsluvirksemi fatar um alt tað arbeiðið, ið neyðugt er til framleiðslu av einum gjørdum kolvetnisfundi, jbr. viðmerkingarnar til § 1, stk. 1.

Loyvi sambært § 6 verða veitt sum felagsloyvi til leitingar og framleiðslu. Grundin er, at fyritøkur neyvan fara at gera íløgur við teimum stóru upphæddum, ið neyðugar eru til djúpar leitiboringar og onnur líknandi ovurdýr arbeiði, uttan so at tey frammanundan hava tryggjaðan rætt til framleiðslu og ogn (at selja víðari) av møguligari olju og í ávísan mun kenna treytirnar, ið fara at vera galdandi fyri framleiðsluna.

Í stk. 1 verður harafturat ásett, at loyvi verður givið fyri nærri avmarkað øki, ásett í loyvinum. Tað vanliga er, at alt økið verður býtt í teigar, og at loyvi verður givið til ein ella fleiri teigar (ásett við krosstølum). Harafturat kann loyvisøkið verða avmarkað í dýpd.

Tað stendst av stk. 1, 2. pkt., at tá ið loyvi verður givið, verður dentur lagdur á fíggjarstyrki, førleika, tøkniliga kunnleika og royndir umsøkjarans. Harafturat verður dentur lagdur á, at virksemi umsøkjarans er soleiðis skipað, at tað almenna fær int sítt eftirlit og sína umsjón við virkseminum. Í hesum sambandi ber til at krevja, at loyvishavin stovnar og varðveitir eitt skipað tilknýti til Føroyar, soleiðis at gjørligt verður at handhevja skatta-, avgjalds-, eftirlits- og ábyrgdarreglur mótvegis felagnum.

**Stk. 2** ásetir, at loyvini í minsta lagi skulu fevna um tey mál, ið umrødd eru í §§ 8 – 12, t.e. leitingarskeið, treytir fyri at leingja loyvið, arbeiðsskyldur, reglur um at brúka føroyska arbeiðsmegi, tænastuveitingar o. a., reglur um at senda inn upplýsingar, trúnað, og hvørjar skyldur, ið standa við, eftir tað at loyvið er gingið út.

Sum nú er, ber ikki til at spáa um allar tær treytir, sum kunnu verða viðkomandi hjá landsstýrinum at seta í einum loyvi. Tí verður at enda í § 6, stk. 2, sagt, at aðrar treytir, sum landsstýrið heldur verða neyðugar, kunnu verða settar. Til dømis er einki, ið forðar fyri, at loyvið eisini hevur reglur um granskingar- og íløgumál ella reglur um, hvussu føroyskt oljufelag, t.d. eitt landsoljufelag, kann vera við í virkseminum.

---

**§ 7.** Loyvi til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum verður sum meginregla veitt eftir at alment er lýst eftir umsóknum.

*Stk. 2:* Áðrenn lýst verður eftir umsóknum, leggur landsstýrið eina frágreiðing fyri løgtingið um, hvørji øki ætlanin er at bjóða út, og um almennu treytirnar ætlanin er at seta. Í frágreiðingini skal metast um, hvørjar avleiðingar kolvetnisvirksemið kann hava fyri sigling, fiskiskap og aðrar vinnur, náttúru-, umhvørvis-, og onnur samfelagsáhugamál. Eisini verður mett um, hvat íkast virksemið fer at geva búskapi og arbeiðsvinnu.

*Stk. 3:* Landsstýrið kann lata vera við at geva teimum loyvi, ið søkt hava eftir almenna lýsing.

*Stk. 4:* Landsstýrið kann áseta krøv um gjald av ágávu fyri viðgerð av umsóknum og veiting av loyvum eftir § 6.

---

*Viðmerkingar*

Tað fylgir av **stk. 1**, at vanliga verður lýst alment eftir umsóknum, tá ætlanin er at veita loyvi til leitingar eftir og framleiðslu av kolvetnum (eitt sonevnt útbjóðingarumfar). Endamálið er at fáa flest møgulig feløg við í leitingar- og framleiðsluvirksemið á føroyska økinum. Tess fleiri feløgini eru, tess størri trygd fæst fyri, at fleiri ymisk kanningarhugskot og -mannagongdir verða royndar. Hetta er avgerandi fortreyt fyri, at tilfeingið verður kortlagt til fulnar. Útbjóðingarumfør, har feløg verða biðin um at senda inn umsóknir um loyvi til ávís øki, føra til kapping, sum ikki fæst í sama mun, verður boðið út á annan hátt.

Stk. 1 forðar kortini ikki fyri, at landsstýrið, um umstøðurnar tala fyri tí, gevur loyvi uttan at lýst er alment. Fyri øki, har vánirnar ikki eru góðar, kann verða kunngjørt, at frítt er – kanska í avmarkaða tíð – at søkja um loyvi ("Open door"), soleiðis at loyvi kunnu verða veitt, sohvørt sum søkt verður. Umsøkjarin skal í slíkum førum ikki bíða eftir einum útbjóðingarumfari. Onnur føri, har tað kann vera skilagott ikki at skipa fyri útbjóðingarumfari, eru, tá tað vísir seg, at ein fundur, ið loyvi longu er givin til, ella ein møguligur fundur, røkkur inn á øki, har eingi loyvi eru veitt. Í tílíkum førum kann tað vera skilabetri at nýta ta mannagongd, at tann parturin av fundinum ella fundmøguleikanum, ið fer um mark, verður kannaður saman við tí partinum, ið loyvi er fingið til. Í mongum førum verður tað soleiðis, at handilsligt grundarlag bert er undir felags leiting- og gagnnýting av fleiri økjum undir einum. Eisini kann talan verða um, at eitt loyvi, sum ikki leingist meira eftir § 8, verður veitt av nýggjum, tí at tað hevur ikki verið gjørligt at gagnnýta kolvetnini til fulnar.

Í frágreiðingin, ið umrødd er í **stk. 2**, verða grundir givnar fyri, hvørji øki (teigar) ætlanin er at bjóða út, og týdningarmestu standartreytirnar lýstar, sum fara at galda fyri loyvini, ið ætlanin er at veita, tá avgerð er tikin um, hvørjar umsóknir verða játtaðar. Roknað verður við, at almennar treytir verða gjørdar sohvørt sum royndirnar verða fleiri og meiri vitan fæst um økini.

Standartreytirnar verða at finna í loyvisfyrimynd, ið fylgir við frágreiðingini. Í loyvisfyrimyndini er eisini tilskilað, hvørjar treytir vanliga ikki verða endaliga ásettar, fyrr enn samráðst er við umsøkjaran. Í hesum samráðingum verður helst størstur dentur lagdur á jarðfrøðiligu viðurskiftini í avvarðandi øki og hvussu tað almenna og umsøkjarin meta hesi viðurskifti.

Harafturat verða í frágreiðingini metingar um avleiðingar av oljuvirkseminum fyri sigling, fiskiskap og aðrar vinnur og fyri nátturu- og umhvørvisáhugamál. Harumframt verður greitt frá, hvat íkast virksemið kann geva til frama fyri búskap, arbeiðsvinnu og onnur samfelagsáhugamál. Frágreiðingin verður sostatt í høvuðsheitum um tey viðurskifti, nevnd eru í viðmerkingunum til § 1, stk. 2, sum víst verður til.

Grundin til at frágreiðingin "verður løgd fyri" løgtingið, er sum nevnt í punkt 9 c) í almennu viðmerkingunum tann týdningur, tað hevur at tryggja, at landsstýrið í so týðandi málum sum veiting av loyvum til oljuvirksemi tekur avgerðir, ið ein meirluti í løgtinginum kann taka undir við. Tá tað ikki er skotið upp, at løgtingið ella ein løgtingsnevnd skal góðkenna frágreiðingina, er tað fyrst og fremst av tí, at hetta helst hevði verið ímóti ætlanunum við stýrisskipanarlógini § 34, 2. pkt., sum sigur, at ein heimild til landsstýrið til áseting av rættarreglum av almennum slagi ikki kann verða treytað av, at reglurnar, sum ásettar verða, skulu hava góðkenning frá umboðum løgtingsins. Í øðrum lagi hevði tað kunnað verið serstakliga ógagnligt, um landsstýrið hevði verið løgfrøðiliga bundið í samráðingum við umsøkjandi oljufeløg at ganga undir treytir, ið løgtingið hevði sett landsstýrinum fyri at góðkenna frágreiðingina, og sum kanska vóru ógvuliga nágreiniligar.

Í Danmark og Noregi er vanligt at tílíkar ætlanir um útbjóðingarumfør verða lagdar fyri parlamentini. Í donsku undirgrundarlógini frá 1981 er harafturat ásett, at umhvørvis- og orkumálaráðharrin veitir loyvi til leitingar eftir og útvinning av ráevnum eftir at málið hevur verið lagt fyri orkupolitisku nevnd folkatingsins. Eisini her er talan um at "leggja málið fyri" politiskt, t.v.s. at staðfest verður, at nevndarmeiriluti fer ikki at mótmæla, at loyvi verða veitt sum ætlað. Skotið er ikki upp í lógaruppskotinum, at úrslitið av samráðingum við umsøkjararnar á sama hátt verður lagt fyri løgtingið, av tí at hetta verður hildið at vera ímóti grundstøðinum undir § 34 í stýrislógini. Henda regla er tó eftir landsstýrisins fatan neyvan til hindurs fyri, at landsstýrið á hóskandi hátt kunnar løgtingið um málið.

Innihaldið í loyvunum verður, sum omanfyri nevnt, ikki endaliga orðað fyrr enn samráðingar hava verið millum landsstýrið og umsøkjararnar um ymisk viðurskifti, herundir serstakliga um uppskot umsøkjaranna til arbeiðsskráir og brúk av føroyskari arbeiðsmegi v.m. Sum heild eigur kortini at

verða víst varsemi við at samráðast um ov stórar partar av innihaldinum í loyvunum, tí hetta væntandi fer at leingja um málsviðgerðina og gera hana torførari.
Í **stk. 3** verður staðfest, at landsstýrið verður ikki bundið at veita loyvi, sjálvt um lýst hevur verið alment eftir umsóknum.
**Stk 4** heimilar landsstýrinum, eitt nú í útbjóðingartilfarinum at krevja ágávu fyri at viðgera umsóknir og veita loyvi eftir § 6. Samsvarandi ágáva verður kravd fyri at viðgera umsóknir og geva loyvi sambært forkanningarlógini, jbr. viðmerkingarnar til § 5.

---

**§ 8.** Loyvi eftir § 6 til leiting verður veitt fyri tíðarskeið, ikki longri enn 12 ár, ið kunnu verða longd við upp til 2 ár í senn. Leitingarskeiðið alt kann tó ikki fara upp um 16 ár.
*Stk. 2:* Hevur loyvishavi lokið tær í loyvinum ásettu treytirnar fyri leinging av loyvinum, hevur hann krav um at loyvið verður longt við atliti at framleiðslu fyri eitt skeið, ið ásett verður í loyvinum, og sum ikki kann fara upp um 30 ár. Leingingin av loyvinum skal í minsta lagi galda fyri teir partar av økinum, ið fata um rakstrarverdar fundir, ið loyvishavi ætlar at framleiða. Landsstýrið kann sum treyt fyri at leingja loyvið krevja, at umsókn um góðkenning av leiðbyggiætlan sambært § 14, stk. 2 verður innsend innan nærri ásetta rímiliga freist.

---

*Viðmerkingar*
Loyvi eftir § 6 gevur einkarrætt til *leiting eftir og framleiðslu av* kolvetni á viðkomandi øki. Í viðmerkingunum til § 6 varð ført fram, at felagsloyvini til leitingar og framleiðslu eru neyðug fyri at fáa feløgini at brúka so stórar upphæddir, sum neyðugar eru til kolvetnisleiting. Talan er kortini ikki um óskerdan framleiðslurætt, men um rætt, sum er treytaður av, at olja ella gass verður funnið í leitingarskeiðnum. Loyvið er við øðrum orðum tvíliðað, har annað liðið bert gerst veruleiki, um nakað verður funnið í fyrra umfari.
Loyvi til leiting kann sambært **stk. 1** veitast fyri eitt tíðarskeið upp til 12 ár við møguleika til leinging við í mesta lagi tveimum árum í senn, tó soleiðis, at alt skeiðið fer ikki upp um 16 ár.
Neyvan verður tað vanligt, at byrjanarskeiðið verður 12 ár, men tørvur á longum leitingarskeiðum kann vera stórur í øki sum tí føroyska, sum í oljuvinnusamanhangi er nýtt, og har torførar veðurlags-, havfrøðiligar og jarðfrøðiligar umstøður valda.
Leinging av loyvi eftir stk. 1 kemur neyvan uppá tal gera serlig viðurskifti seg ikki galdandi, eitt nú kunna nóg góðar grundir verða givnar fyri, at tað ikki hevur verið gjørligt í tí upprunaliga tíðarskeiðnum at fáa greiðu á, um funnið kolvetni er rakstrarvert. Í loyvinum verða vanliga reglur um, hvørjar arbeiðsskyldur (arbeiðsskrá) loyvishavin skal lúka í loyvisskeiðinum, jbr. viðmerkingarnar til § 9. Sum treyt fyri leinging av skeiðinum kann verða kravt, at arbeiðsskráin verður økt. Eitt loyvi kann eisini verða longt fyri ein part av upprunaliga tillutaða økinum.
**Stk. 2** tryggjar loyvishavanum, um hinar treytirnar í loyvinum er loknar, rætt til at fáa loyvið longt. Tílík leingini skal í minsta lagi galda fyri tey økir, har rakstrarverdir kolvetnisfundir eru gjørdir. Leingingin kann, sum í grannalondum okkara, eisini vera galdandi fyri størri økir, alt eftir hvat veitta loyvið sigur um hetta. Framleiðsluskeiðið kann tó ikki vera longri enn 30 ár.
Nærri reglur verða í loyvinum um, hvørjar treytir skulu vera loknar og hvør mannagongdin skal verða, skal loyvið kunna verða longt. Eitt nú kunnu vera treytir um tøkniligar og fíggjarligar upplýsingar, ið loyvishavin skal leggja fram saman við váttanini um, at fundurin er rakstrarverdur og at loyvishavin ætlar at gagnnýta hann.
Ætlanin við regluni í seinasta punktum í stk. 2, er at forða fyri, at fundir, ið eru staðfestir at vera rakstrarverdir, liggja ónýttir. Víddargjaldið kann eisini medvirka til hetta, jbr. viðmerkingarnar til § 9.

**§ 9.** Ásett verður í loyvi eftir § 6 hvørjar arbeiðsskyldur loyvishavin skal lúka í leitingarskeiðinum sambært § 8, stk. 1 og hvørji avgjøld loyvishavin skal rinda tí almenna. Eitt nú kann ásetast, at rindast skal rennandi avgjald, roknað eftir víddini av loyvisøkinum (víddargjald) og avgjald roknað eftir nøgd ella virði av framleiddum kolvetnum (framleiðslugjald).

---

*Viðmerkingar*

Endamálið við at § 6 ásetir, hvørjar *arbeiðsskyldur* loyvishavin hevur í leitingarskeiðnum, er at tryggja, at mesta orka verður løgd í leitingararbeiðið. Vanliga eru arbeiðsskyldurnar at finna í arbeiðsskránni í loyvinum.

Skyldan kann verða útgreind, annaðhvørt sum gjøllari ásett arbeiðsmongd ella sum minstaupphædd, ið brúkast skal til leitingararbeiði á loyvisøkinum. Vanliga fer arbeiðsskráin eisini at hava reglur um tíðarætlan fyri arbeiði og peninganýtslu í leitingarskeiðnum.

Í arbeiðsskránni verða vanliga álagdar loyvishavanum skyldur at gera ávíst kilometratal av seismiskum kanningum og ávíst tal av leitingarboringum gjøgnum ávís jarðløg. Í arbeiðsskránni kunnu eisini vera reglur um, hvørjar ískoytiskanningar skulu gerast av gjørdum fundum við tí í hyggju at gera av, um fundirnir eru rakstrarverdir. Eftirlitið kann krevja fleiri kanningar at greina hesi viðurskifti. Krøvini til arbeiðsskránna verða vanliga lagað eftir teimum vónum, ið eru til eitt øki, áðrenn loyvið verður givið. T.d. kann verða kravt í arbeiðsskrá fyri eitt heldur høgt mett øki, at loyvishavin samstundis átekur sær leitingarskyldur á økjum í lægri meti, sum loyvi samstundis verða givin til.

Umframt at fremja arbeiðsskránna skal loyvishavin, verður hetta tilskilað í loyvunum, rinda landinum avgjøld.

Neyvan fer at bera til at hava avgjøldini óbroytt til tíð og stað. Ætlandi verða tey ásett í sambandi við hvørt útbjóðingarumfarið sær samsvarandi vónunum til tey øki, ið boðin verða út, marknaðarviðurskifti v.m.

*Víddargjaldið* er rennandi gjald, ið roknað verður eftir víddini av økinum, loyvið er galdandi fyri, vanliga soleiðis at goldið verður fastur prísur fyri hvønn ferkilometur. Gjaldið kann vera óbroytt alt loyvisskeiðið, men tað kann eisini vera soleiðis, at tað er óbroytt upprunaliga loyvisskeiðið og hækkar, verður loyvið longt, jbr. § 8, stk. 1. Verður skeiðið longt við framleiðslu fyri eyga, jbr. § 8, stk. 2, kann víddargjaldið møguliga hækka enn meira. Tílík hækkandi víddargjøld kunnu medvirka til, *at* loyvishavin bert søkir um leinging av leitingarskeiðinum fyri tey øki, hann ætlar at kanna, og *at* fundir, ið eru staðfestir at vera rakstrarverdir, ikki verða liggjandi ónýttir.

*Framleiðslugjaldið* (royalty) er eitt gjald, ið svarar til ein ávísan part av framleiðsluvirðinum av útvunnum kolvetnum.

Fyri myndugleikarnar hevur framleiðslugjaldið tann fyrimun, at tað tryggjar tí almenna ein part av inntøkunum frá kolvetnisframleiðsluni beinanvegin framleiðsluskeiðið byrjar.

Avgjaldið kann vera fastur prosentpartur, sama hvør framleiðslunøgdin er, men eisini kann verða brúktur ein stighækkandi prosentpartur, ásettur eftir framleiðsluni.

Nevndu avgjøldini skulu bert skiljast sum dømi. Ei heldur er reglan til hindurs fyri, at onnur gjøld verða kravd, eitt nú ágáva og sergjøld (bonus) av ymiskum slag.

Umframt reglur um støddina á gjøldunum, verða eisini reglur í loyvunum um gjaldstíðir, gjaldstreytir og um grundarlagið undir virðisásetingini av útvunnum kolvetnum.

Avgjøld sambært hesi reglu koma ikki í staðin fyri vanligan inntøkuskatt, herundir møguligan serskatt av inntøkum frá olju- og gassframleiðslu.

**§ 10.** Í loyvum eftir § 6 verða reglur ásettar um brúk av føroyskari arbeiðsmegi, veitingar og tænastur frá føroyskum fyritøkum, um útbúgvingar v.m., umframt hvaðan loyvishavin rekur virksemi sítt.

*Viðmerkingar*

Sambært hesi reglu skal í leitingar- og framleiðsluloyvunum støða takast til tílík viðurskifti, sum eru av avgerandi týdningi fyri, um samfelagið fær nakað burturúr oljuvirkseminum, umframt møguligan skatt og avgjøld. Her verður hugsað um útbúgving, brúk av føroyskari arbeiðsmegi og veitingar av vørum og tænastum frá føroyskum fyritøkum. Tað verður ikki hildið at vera skilagott at hava gjøllari reglur um hesi viðurskifti í lógini sjálvari, av tí at tílíkar reglur kortini ikki fáa týdning í verki uttan saman við meira nágreiniligum reglum í loyvunum. Á henda hátt gerst tað eisini møguligt at orða skyldurnar eftir at samráðingar hava verið við feløgini, ið søkja um loyvi. Handilsavtalur við grannalondini og tær broytingar í hesum avtalum, sum talan kann fara at verða um, verða viðurskifti okkara við ES broytt, tala eisini móti at seta ov bindandi reglur í lógina sjálva.

Í verki verða § 10 og treytirnar í leitingar- og framleiðsluloyvum, umframt umsitingarligar mannagongdir (eftirlit v.m.) av týdningi fyri brúk av føroyskari arbeiðsmegi og vinnupolitikkin annars at taka hædd fyri nevndu handilsavtalum, heimastýrislógini og møguligum seinni avtalum, eitt nú avtaluni frá 22. desember 1992 um ráevni í undirgrundini.

Í umsitingini av hesi reglu má roknast við, at dentur verður lagdur á, at loyvishavin arbeiðir á ein tílíkan hátt, at tað førir til *veruligt búskaparligt virksemi í Føroyum*, t.e. at arbeiðspláss verða útvegað, og at verulig virðisøking verður úrslitið, ella við øðrum orðum eitt positivt íkast til føroysku samfelagsúrtøkuna. Tey í § 10 nevndu viðurskifti kunna verða tikin við í umhugsan myndugleikanna saman við m.a. leitingarvirkseminum, tá veljast skal millum fleiri umsøkjarar, ið søkja um leitingarloyvi á sama øki. Tílík mál, sum her eru umrødd, verða tí ofta ein partur av samráðingunum við umsøkjararnar, áðrenn loyvi verða givin.

Niðanfyri verða nevnd summi av teimum krøvum, sum *kunnu* verða sett loyvishavum:

Hvat føroyskari arbeiðsmegi viðvíkir, verður møguligt í loyvunum ella í almennum fyriskipanum, jbr. § 29, at krevja, at loyvishavin í størst møguligan mun brúkar føroyska arbeiðsmegi. Harafturat kann verða kravt, at loyvishavin greiðir myndugleikunum frá tali av arbeiðsfólki, herundir føroyingum, umframt hvat loyvishavin ger til tess at læra fólkið upp og økja um førleika teirra. Endamálið eigur at vera at økja um førleikastigið hjá føroysku arbeiðsmegini, ið sostatt verður før fyri at átaka sær størv í øllum pørtum av virkseminum hjá fyristøðufelagnum. Álagt kann eisini verða loyvishavanum at síggja til, at arbeiðstakarar og undirarbeiðstakarar senda myndugleikunum líknandi frágreiðingar.

Tað er av týdning at tryggja føroyingum arbeiði hjá loyvishavum, arbeiðstakarum og undirarbeiðstakarum, men tað hevur ikki minni týdning at tryggja føroyskum fyritøkum veruligar møguleikar at luttaka í kappingini við aðrar um arbeiði og veitingar av vørum og tænastum. Álagt kann eitt nú verða loyvishavanum at fylgja mannagongdum, sum landsstýrið letur gera m.a. um lisitatiónir og upplýsingar um virksemið, ætlanin er at fara undir. Møguliga kann eisini verða álagt loyvishavanum, tá hann ger av hvør arbeiðstakari fær arbeiðið, at dentur skal leggjast á støðu arbeiðstakaranna til brúk av føroyskum vørum og tænastum, umframt vanligu kappingartreytirnar sum dygd, tænastu, veitingartíð og prís. Av tí at flestu føroysku fyritøkurnar eru smáar og hava avmarkaða fíggjarorku, kann tað kanska eisini fara at verða skilagott at leggja dent á, um útlendskir veitarar hava hug at samstarva við føroyskar fyritøkur. Tað er eisini møguligt hjá landsstýrinum at hava eftirlit við, um loyvishavin vil brúka føroyskar vørur og tænastur, tá leiðbyggiætlanin verður góðkend, jbr. § 14.

Í grannlondunum hava krøv um útbúgving serliga miðað ímóti at upplæra starvsfólk í oljuumsitingunum og á jarfrøðistovnum, t.e. løgfrøðingar, búskaparfrøðingar, jarðfrøðingar og verkfrøðingar v.m. Tílíkir møguleikar fara sjálvandi eisini at hava stóran týdning at byggja upp vitan hjá viðkomandi føroysku myndugleikum og stovnum (Oljufyrisitingini, Føroya Jarðfrøðisavni v.m.), men harafturat kann hugsast, at starvsfólk í vinnufyritøkum v.m. fáa tilboð um upplæring í ávísa tíð (on the job training). Somuleiðis kann verða kravt, at loyvishavin medvirkar til, at føroyingar, ið lesa viðkomandi lærugreinir, fáa møguleika fyri serlestur í olju- og gassvirksemi. Tað eigur eisini at kunna verða álagt loyvishavum at lata føroyskar útbúgvingar- og granskingarstovnar taka lut í granskingarætlanum á teimum økjum, ið loyvið fatar um.

Tað hevur stóran týdning, at kolvetnisvirksemið í størst møguligan mun verður rikið úr Føroyum. Tí kann verða kravt, at loyvishavin innan ávísa freist skal lata landsstýrinum eina ætlan um, hvussu virksemið er skipað, og hvar høvuðsstøðin er í leitingarskeiðnum. Tá framleiðslan verður byrjað, kann ein nýggj ætlan verða kravd.

---

**§ 11.** Í loyvum eftir § 6 ella í fyriskipanum ásettum av landsstýrinum sambært § 29 verða gjøllari reglur ásettar um, at loyvishavin skal lata inn fíggjarligar og roknskaparligar upplýsingar eins væl og upplýsingar um leitingar- og framleiðsluvirksemi sítt, umframt stakroyndir og aðrar upplýsingar um undirgrundina, hann hevur savnað í virksemi sínum.

*Stk. 2:* Í loyvum eftir § 6 kunnu ásetast reglur um trúnað viðvíkjandi teimum frágreiðingum og upplýsingum, nevndar eru í stk. 1.

---

*Viðmerkingar*

Í **stk. 1** verður rátt landsstýrinum til, at støða eigur at verða tikin í loyvi ella kunngerð til spurningin um innsending av bæði jarðfrøðiligum og fíggjarligum upplýsingum. Reglan, sum er vanlig í eftirlitslóggávu, hevur til endamáls at gera tað møguligt hjá eftirlitsmyndugleikanum at hava eftirlit við, at reglurnar í lógini og treytir ásettar sambært lógini verða hildnar.

Verður skyldan at lata upplýsingar brotin grovliga og ferð eftir ferð, kann loyvið verða tikið aftur, jbr. § 39 ella viðkomandi revsaður sambært § 43.

Fíggjarligar og roknskaparligar upplýsingar eru m.a. ársroknskapur, ársfrágreiðing, fíggjarætlanir og ætlanir um framtíðar fyritakssemi. Fíggjarætlanir og yvirlit yvir framtíðarætlanir fara, umframt at geva myndugleikunum kunnleika um viðurskifti loyvishavans og fíggjarorku, at hjálpa myndugleikunum at meta um støddina av kolvetnisvirkseminum, sum kann hava landsfíggjarligan týdning.

Av upplýsingum um leitingar- og framleiðsluvirksemið kunna verða nevnd úrslit av jarðalisfrøðiligum, jarðfrøðiligum og jarðevnafrøðiligum kanningum. Annars verður víst til viðmerkingarnar til § 30.

Viðvíkjandi **stk. 2** um trúnað er tað sama galdandi um upplýsingar sambært stk. 1, sum nevnt varð í viðmerkingunum til § 5, t.e. upplýsingarnar kunnu vera handilslig loyndarmál.

Tað verður ikki hildið at vera neyðugt at hava reglur um tagnarskyldu í lógini um kolvetnisvirksemi, eins og gjørt varð í § 7 í forkanningarlógini, ella at vísa til reglurnar í revsilógini um tagnarskyldu hjá almennum starvsfólki og øðrum medvirkandi. Grundin er, at spurningurin um tøgnskyldu er viðgjørdur í løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisiting, íð vísir til revsilógina. Tað verður tí hildið at vera nóg mikið, at loyvini vísa til fyrisitingarlógina og revsilógina, og at trúnaðarskeiðið, tá ræður um jarðfrøðiligar upplýsingar, verður tilskilað, jbr. § 30. Í loyvunum eiga eisini at vera gjøllari reglur um, hvussu myndugleikarnir kunna brúka upplýsingar frá loyvishavanum til kunningar, t.e. til almenn tíðindaskriv, ársfrágreiðingar v.m.

Verður kunngerð lýst um innsending av upplýsingum, jbr. omanfyri, kunnu reglur vera í kunngerðini sambært § 3, stk. 1 í løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um alment innlit, um at viðkomandi frágreiðingar v.m. vera undantiknar almennum innliti. Tílík undantøk eru longu gjørd, hvat viðvíkir upplýsingum frá forkanningum.

---

**§ 12.** Í loyvum eftir § 6 verður ásett, við fyrivarni fyri reglunum í §§ 20 og 21, í hvønn mun skyldur loyvishavans standa við eftir at loyvisskeiðið er runnið, loyvið latið innaftur ella tikið aftur. Harafturat kann verða ásett, at landsstýrið, um arbeiðsskylda ella aðrar skyldur ikki eru loknar, kann krevja, at loyvishavin fult ella fyri ein part rindar ta upphædd, sum tað hevði kostað at lokið skyldurnar.

---

*Viðmerkingar*

Endamálið við regluni í 1. pkt. er at tryggja, at tá ið loyvi gongur út, sama av hvørjari orsøk, er støða tikin til, hvussu verður við fíggjarligu skyldunum, til dømis avgjaldsskyldum ella skyldum at greiða endurgjaldsupphædd, sum liggur á loyvishava sambært reglum ella treytum, ásettum sambært lógini.

Hvat, ið gjørt skal verða við havstøðir hjá loyvishava, eftir at virksemið er steðgað, eru reglur um aðrastaðir, jbr. §§ 20 og 21. Møguligur útbúnaður á landi kemur undir avriggingartreytir, ið eru ásettar í loyvinum, jbr. viðmerkingarnar til §§ 20 og 21.

2. pkt. viðvíkir teimum førum, har ein loyvishavi ikki hevur lokið skyldur sínar, fult ella partvís, at gera ávís leitingararbeiði ella lokið aðrar líkar skyldur, ásettar í loyvinum. Í tílíkum førum verður tað oftast – eitt nú tá eitt loyvi er hildið uppat – hvørki gjørligt ella skilagott at krevja, at loyvishavin lýkur skylduna í verki, og landsstýrinum kann tí verða heimilað at krevja skylduna greidda í peningi.

Reglan byggir á ta fortreyt, at um landsstýrið er samt í, at eitt nú ein boriskylda ikki nýtist at vera lokin, m.a. tí at einki bendir á, at kolvetni fara at verða funnin, *kann* landsstýrið sleppa loyvishavanum frá at rinda tað, hann sparir við ikki at bora.

---

**§ 13.** Leitingar- og framleiðsluvirksemið skal vera forsvarligt og skynsamiligt og samsvarandi viðurkendari góðari altjóða venju undir líkum umstøðum. Virksemið skal vera umhvørvisliga og trygdarliga forsvarligt, og soleiðis at tað slepst undan kolvetnisspelli. Hóskandi atgerðir skulu setast í verk, so tað slepst undan at skaða dýra- og plantulív og at dálka umhvørvið. Virksemið skal ikki vera til óneyðugan vanda ella tarn fyri skipaferðslu, loftferðslu, fiskiskap, ella annað virksemi ella elva skaða ella skaðavanda fyri rørleiðingar, kaðalar ella annan útbúnað.

*Stk. 2:* Viðgerðarstøðir, rørleiðingar og aðrar flutningsskipanir eiga at hava hóskandi stødd og leggjast soleiðis, at undirstøðukervið sum heild verður virkisført.

---

*Viðmerkingar*

Í hesi reglu verða aðalkrøvini til leitingar- og framleiðsluvirksemi sett, herundir serliga at arbeitt eigur at verða forsvarliga og skynsamiliga. Í tilvísingini til altjóða mannagongdir liggur, at tøkni, tilfeingi og trygd eiga at verða havd í huga, tá mett verður um, hvat er forsvarligt og skynsamiligt. Metingin eigur eisini at byggja á tað, sum undir líkum umstøðum alment er viðurkent av oljuídnaðinum.

Sambært regluni í 2. pkt. er tað hann, ið fyri virkseminum stendur (loyvishavin), sum hevur ábyrgdina av at stovna, varðveita og útbyggja eitt fult forsvarligt trygdarstig, soleiðis at eisini slepst undan ráevnisspelli, jbr. § 23. Trygdarreglurnar í hesi lóg ella kunngerðir, gjørdar sambært lógini og myndugleikanna eftirlit og handhevjan er bara at meta sum eitt ískoyti og leiðbeining til at fremja í verki ætlan lógarinnar um fullgott virksemi. Tað er m. a. tí, at landsstýrið í § 24, litra b, fær myndugleikan at krevja, at loyvishavin byggir upp eina skipan fyri góðskutrygd (innaneftirlit).

Í 3. pkt. verður álagt loyvishavanum og hansara sáttmálapørtum at seta í verk hóskilig tiltøk til tess at verja dýr og plantur og umhvørvið annars, meðan pkt. 4 nevnir ymiskt virksemi av øðrum slagi og annan útbúnað, sum kolvetnisvirksemið ikki óneyðuga eigur at seta í vanda, forða ella skaða. Ætlanin við regluni er at tryggja, at sleppast kann undan, at fiskiskapur verður óneyðuga og órímiliga burturtrokaður. Virksemið verður mett at tarna fiskiskapi ella aðrari vinnu óneyðuga, hevði tað kunna gingið fyri seg á øðrum staði, til aðrar tíðir ella á annan hátt, uttan at tað hevði volt honum, ið rekur virksemið, tungar fíggjarligar, rættarligar ella verkligar trupulleikar. Um eitt virksemi er óneyðugt ella ikki, eitt nú samanborið við fiskiskap, má verða gjørt av í hvørjum einstøkum føri.

Reglan vendir sær serliga til loyvishavan og sáttmálapartar hansara, men eisini myndugleikarnir eiga, eitt nú tá góðkenningar verða givnar sambært lógini, at ansa eftir, at tey krøv, ið nevnd eru í regluni, verða lokin. Tað er m.a. tí, at víst verður til § 13 í § 14, stk. 2 um góðkenning landsstýrisins av tilrættalegging av framleiðsluni, gongdini og útbúnað. At lætta um hjá landsstýrinum í umsitingini av § 13, verður í § 14, stk. 3 um leiðbyggiætlanina álagt loyvishavanum at lýsa tey viðurskifti, umrødd eru í § 13.

Samanhangur er millum **stk. 2** og § 18, har ásett verður, at stovnan og rakstur av rørleiðingarskipanum krevur landsstýrisins loyvi. Í § 13, stk. 2 verður ásett, at tá viðgerðarstøðir og rørleiðingar verða bygdar, eigur neyðugt fyrilit at verða havt fyri virkisførinum av undirstøðukervinum. Endamálið við hesum er at tryggja, at fyrilit verður havt fyri teimum viðurskiftum, ið nevnd eru í viðmerkingunum til § 18, herundir at bæði viðgerðarstøðir og rørleiðingar verða tilevnað á tílíkan hátt, at tey í størst møguligan mun medvirka til samfelagsliga skilagóða flutningsskipan og viðgerðarorku.

Mett má verða um í hvørjum einstøkum føri, hvussu útbúnaður eigur at verða tilevnaður fyri at hóska sum best saman við kervinum sum heild. Sagt verður tí, at loyvishavin *eigur* at hava hesi viðurskifti í huga, og tað verða myndugleikarnir, sum sambært § 14, stk. 2 og § 18 fara at meta um, hvussu reglan verður brúkt í verki.

---

**§ 14.** Leiti- og aðrar boringar í undirgrundini mega ikki verða byrjaðar uttan so, at landsstýrið frammanundan hevur góðkent útgerð, arbeiðsætlan og mannagongd.

*Stk. 2:* Loyvishavin kann bert stovna havstøð ella virki og útbúnað á landi at brúka til kolvetnisframleiðslu og fara undir framleiðslu, um landsstýrið frammanundan hevur góðkent eina leiðbyggiætlan sum nevnd er í stk. 3, herundir framleiðslufyrireikingar og -gongd og tann útbúnað, ið nýtast skal.

*Stk. 3:* Ger loyvishavi av at útbyggja og framleiða ein kolvetnisfund, skal hann gera eina ætlan (leiðbyggiætlan), ið skal sendast til góðkenningar eftir stk. 2. Í ætlanini skulu vera upplýsingar og metingar um kolvetnisfundin og útvinning av honum, umframt upplýsingar og metingar av tøkniligum, fíggjarligum, trygdarligum, umhvørvisligum slagi og um fiskivinnu og siglingarviðurskifti saman við einari frágreiðing um týdningin av byggiætlanini fyri búskap og arbeiðsvinnu. At enda skal vera greitt frá, hvussu virki og útbúnaður kunnu verða frágingin, tá virksemið verður niðurlagt. Verður bygt í tveimum ella fleiri umførum, eigur ætlanin, so langt til ber, at fata um alla byggingina.

*Stk. 4:* Góðkenning landsstýrisins av leiðbyggiætlanini, herundir seinni góðkenningar av serskildum byggistigum og støkum virkjum og virkislutum eftir reglum, givnar sambært § 24, skal vera fingin áðrenn gingið verður í munandi sáttmálabundnar skyldur, uttan so at landsstýrið frammanundan gevur sítt samtykki.
*Stk. 5:* Talar fyrilit fyri forsvarligari og skynsamiligari framleiðslu fyri tí, ella er tað neyðugt orsakað av týdningarmiklum samfelagsáhugamálum, kann landsstýrið gera broytingar í góðkendum framleiðsluætlanum og laga framleiðsluna samsvarandi til.

---

*Viðmerkingar*
Her verða krøv sett um góðkenning landsstýrisins av ávísum fyritakssemi, sum t.d. boringar, leiðbygging og byrjan av framleiðslu. Harumframt verður landsstýrinum heimilað undir heilt serligum umstøðum at broyta góðkendar framleiðsluætlanir. Stk. 1 fevnir um allar boringar, leitiboringar íroknaðar, meðan stk. 2 – 5 bert hava týdning í teimum førum, har loyvishavin hevur gjørt rakstrarverdan fund, sum hann ætlar at seta í framleiðslu.
**Stk. 1** sigur, at boringar í virksemi eftir hesi lóg krevja góðkenning landsstýrisins. Loyvishavi, sum sambært loyvi eftir § 6 (konsessión) ætlar at bora á øki, ið loyvið fevnir um, hevur sostatt skyldu til at søkja um góðkenning. Ískoytisreglur um onnur arbeiði, herundir forkanningar av ymiskum slag, er ætlanin at seta í fyriskipanir sambært § 29.
Tá mett verður um eina umsókn, verða útgerð, arbeiðsætlan og mannagongd at hava í huga. Reglan hevur undirskilda heimild at krevja, at broytingar verða gjørdar í innsenda tilfarinum og trygdartiltøkum virkeminum viðvíkjandi, ið verða mettar at vera neyðugar at tryggja, at arbeiðið verður gjørt forsvarliga og skynsamiliga og forða fyri, at skaði verður voldur persónum, ognum, umhvørvi og útbúnað. Áherðsla verður løgd á, at landsstýrið eigur at gera eina heildarmeting av ætlaða arbeiðinum, herundir av trygd, jarðgoymslu og øðrum viðurskiftum, sum eru nevnd í § 13. Hugsast kann, at boriloyvi verður avmarkað til ávísar árstíðir fyri ikki at koma til hindurs fyri fiskiskap. Somuleiðis kunnu treytir verða settar umhvørvinum til frama.
Hóast góðkenning er fingin eftir hesi reglu, skulu møgulig loyvi, ið krevjast sambært aðrari lóggávu, verða útvegað, eitt nú loyvi at veita borievni á sjógv sambært havumhvørvislógini.
Sambært **§ 14, stk 2** krevst, at loyvishavin fær landsstýrisins loyvi, áðrenn hann fer undir *framleiðslu* av kolvetni. Umframt tað krevst, at landsstýrið góðkennir bæði framleiðslugongdina og framleiðsluútbúnaðin. Landsstýrið ansar eftir, áðrenn góðkenning verður givin, at tey viðurskifti, nevnd eru í § 13, eru í lagi, og fer eisini at tryggja, at verandi ella ætlaðar viðgerðar- ella flutningsskipanir verða brúktar á skilagóðan hátt. Tørvur kann serliga verða á hesum, tá framleiðslan er vorðin so stór, at eitt nú rørleiðingar eru lagdar av leiðunum inn á land ella oljuviðgerðarvirki eru bygd á landi.
**Stk. 3** krevur av loyvishavanum, vil hann hava góðkenning sambært stk. 2, at hann letur gera eina ætlan um bygging og rakstur av kolvetnisfundinum at leggja fyri landsstýrið til góðkenningar.
Í 2. pkt. er útgreinað, hvørjar upplýsingar og metingar skula vera í ætlanini. Á hendan hátt verður gjørligt hjá tí almenna at meta um líkindini at útvinna kolvetni úr jarðgoymslunum og at hava eftirlit við, at loyvishavin rekur virksemi sítt samsvarandi teimum ætlanum, ið liggja undir reglunum í § 13. Kravt verður eisini, at ætlanin hevur upplýsingar og metingar um týdningin av verkætlanini fyri búskap og arbeiðsvinnu. Á hendan hátt verður møguligt hjá landsstýrinum at meta um, hvørt byggiætlanin er samsvarandi aðalendamálinum við lógini, jbr. § 1, stk. 2 við viðmerkingum. Tá kravt verður í 3. pkt. at greitt skal verða frá í ætlanini, hvat gerast skal við virki og útbúnað, tá virksemið verður niðurlagt, er hetta við tí endamáli at eggja loyvishavanum til at meta um henda partin av virkseminum, longu tá leiðin verður bygd. Leiðreglur fyri, hvussu havstøðir, pallar v.m. skula verða beind burtur, tá tey ikki verða brúkt longri, eru m. a. at finna í samtyktini frá 19. oktober

1989 hjá ST-sjóvinnufelagsskapinum IMO, og eiga havstøðir samsvarandi hesum reglum at verða bygdar á ein tílíkan hátt, at tær kunnu verða burturbeindar. Annars verður víst til viðmerkingarnar til §§ 20 og 21.

Í seinasta pkt. í stk. 3 verður ásett, at verður bygt í fleiri umførum, skal ætlanin solangt tilber fata um alla byggingina. Tað fylgir náttúrliga av hesi reglu, at landsstýrið kann avmarka góðkenningina til viðkomandi part av ætlanini.

Ætlanin við regluni í **stk 4** er at forða fyri, at loyvishavin longu hevur gjørt sáttmálar um munandi veitingar, áðrenn hann sendir leiðbyggiætlanina til góðkenningar og á tann hátt leggur band á myndugleikarnar, tá ræður um hvør loysn skal verða vald. Loyvishavin átekur sær ógvuliga stórar skyldur í eini leiðbygging, og tað hevur tí týdning, at byggiætlanin verður góðkend av myndugleikunum so skjótt sum gjørligt, soleiðis at loyvishavin kann vera nøkulunda tryggur í, at fortreytirnar fyri íløgunum kunnu verða góðkendar av myndugleikunum. Til tess at fáa byggiætlanina góðkenda so tíðliga sum møguligt, hevur tað týdning, at myndugleikar og loyvishavi tosa saman óformliga, longu meðan loyvishavin ger ætlanina, soleiðis at tað slepst undan, at eitt ógvuliga stórt fyrireikandi arbeiði fer fyri skeytið orsakað av formligu málsviðgerðini.

Dentur verður lagdur á, at landsstýrisins góðkenning vanliga verður avmarkað til tær høvuðslinjur fyri bygging og rakstri, ið eru til skjals í teirri innlatnu ætlanini. Roknað eigur at vera við, at góðkenningarnar verða treytaðar av, at loyvishavin seinni, tá verkætlanin er gjøllari viðgjørd, sendur inn nýggjar metingar og sundurgreiningar, har tann góðkenda leiðbyggiætlanin verður undirbygd, meira viðgjørd og dagførd, jbr. eisini tilvísingina til § 24. Roknað má eisini verða við, at trygdarreglurnar, ið verða lýstar sambært § 24 fara at hava krøv um, at útbúnaðurin ikki verður tikin í brúk, fyrr enn serligt loyvi er fingið frá myndugleikunum.

Endaliga kann verða nevnt, at stk. 4 eisini kann brúkast til at tryggja landsstýrinum betri eftirlit við, at loyvishavin lýkur tær treytir, ið settar eru sambært § 10 um brúk av føroyskum veitingum og tænastum.

Í **stk. 5** er hugsað um tey føri, tá tann vitan, ið fingin er um jarðgoymsluna, talar fyri, at framleiðslugongdin, sum er góðkend sambært stk. 2, verður broytt í bráðskundi, t.d. fyri at tað slepst undan óbøtandi skaða av goymsluni.

Millum tey samfelagsáhugamál, hugsað verður um, er møguleikin fyri at broyta ásettu framleiðslugongdina í altjóða kreppustøðum, soleiðis at ásett verða annaðhvørt framleiðsluloft ella minsta framleiðsla.

---

**§ 15.** Røkkur kolvetnisfundur um øki hjá fleiri loyvishavum, skulu teir samskipa leiting og møguliga framleiðslu. Slíkar avtalur skulu góðkennast av landsstýrinum. Fæst ikki semja um samskipan innan rímiliga tíð, kann landsstýrið geva boð um samskipan og áseta treytirnar.

*Stk. 2:* Røkkur kolvetnisfundur inn á landgrunn ella yvirvaldsøki hjá øðrum landi, kann landsstýrið, verður avtala um samskipan av leiting og framleiðslu gjørd við hetta landið, geva honum, ið loyvi hevur til føroyska partin, boð um at taka lut í tílíkari samskipan og áseta treytirnar.

---

*Viðmerkingar*

Reglan í stk. 1 tryggjar, at ein fundur, sum er býttur ímillum ella fatar um fleiri øki, og sum fleiri loyvishavar hava fingið einkarrætt til, verður gagnnýttur sum ein heild við teimum støðis- og rakstrarfíggjarligu fyrimunum, hetta vanliga hevur við sær.

Ein avtala um samskipaða leiting og framleiðslu er vanliga rættiliga umfatandi og hevur m. a. reglur um, hvussu fundurin verður býttur millum loyvishavarnar. Í 2. pkt. verður staðfest, at tílíkar avtalur skulu verða góðkendar. Á henda hátt kann verða tryggjað, at einki er í avtaluni, sum gongur

ímóti samfelagsins áhugamálum. Í flestu førunum fer loyvishavans fíggjarligi áhugi í skynsamari nýtslu at tala fyri einari samskipan. Eftir 3. pkt. hevur landsstýrið møguleika at krevja samskipan, um so er, at loyvishavararnir ikki sjálvir eru førir fyri at semjast um eina avtalu. Í orðunum *innan rímiliga tíð* liggur m. a., at semja skal verða gjørd í so góðari tíð, at hædd kann verða tikin fyri samskipanini, tá framleiðslubúnaðurin verður bygdur. Reglan er eisini galdandi í teimum førum, har ein oljufundur røkkur um fleiri øki, ið sama fyritøka hevur loyvi í.

**Stk. 2** umrøður fundir, ið røkka inn á landgrunn ella yvirvaldsøki hjá øðrum landi. Ein samskipað leiting og framleiðsla kann eisini í tílíkum føri vera fortreyt fyri skilagóðari gagnnýting. Eisini í tílíkum førum kann reglan nýtast at tryggja samskipan. Tílíkar samskipanaravtalur verða vanliga gjørdar fyri hvønn fund sær eftir samráðingar landanna millum, sum eisini loyvishavarnir taka lut í. Umframt avtalurnar landanna millum er vanligt, at loyvishavarnir gera avtalur sínamillum.

---

**§ 16.** Eiga tveir ella fleiri kolvetnisfundir at verða samtroyttir av tí at fyrilit fyri tilfeingi, búskapi ella samfelagsáhugamálum tala fyri tí, kann landsstýrið, tá ið tað hevur ráðført seg við loyvishavarnar, geva boð um at hetta verður gjørt. Í hesum sambandi kann áleggjast loyvishava móti gjaldi at lata viðgerðar- og flutningsbúnað til nýtslu í tílíkum samstarvi. Semjast loyvishavarnir ikki um gjaldið, verður tað ásett av landsstýrinum.

---

*Viðmerkingar*

Henda regla loyvir, at § 15 eisini kann verða brúkt í førum, har tveir ella fleiri fundir eiga at verða samtroyttir av tilfeingis-, búskapar- ella samfelagsáhugamálum. Eitt nú kann tað hugsast, at smærri fundir fyrimunarliga kunnu verða samtroyttir við felags viðgerðargøgnum. Eisini kunnu kolvetni úr einum fundi verða viðgjørd á viðgerðarstøð hjá øðrum loyvishava, sum hevur nóg stóra avlopsorku. Roknað verður tá við, at hetta ikki er til hindurs fyri virksemið hjá eigaranum ella ger tað torførari.

Ætlanin er í stórst møguligan mun at lata partarnar sjálvar avtala einstøku treytirnar fyri samskipanini.

---

**§ 17.** Kolvetni, ið ikki eru brúkt í framleiðsluni, sprænd innaftur, brend ella farin fyri skeytið, skulu takast í land í Føroyum, uttan so at landsstýrið góðkennir annað. Landsstýrið kann áseta treytir fyri góðkenningini.

---

*Viðmerkingar*

Reglan ásetir skyldu at taka ta olju í land, sum framleidd verður á føroyska landgrunninum. Undantikin eru kolvetni, sum verða sprænd inn aftur í jarðgoymsluna, brend ella fara fyri skeytið í framleiðsluni. Landsstýrið kann veita undantaksloyvi frá kravinum og sambært reglunum í 2. pkt. seta treytir fyri undantaksloyvinum.

Hóast rakstrarverdir kolvetnisfundir verða gjørdir á føroyska landgrunninum, má avgerðin um at olja og/ella gass skal takast í land í Føroyum ætlast at liggja nakað langt inni í framtíðini. Vanliga verður støða tikin til, um olja skal takast í land, tá leiðbyggingin verður góðkend, jbr. § 14, og spurningurin verður vanliga viðgjørdur sum ein samanhangandi partur av byggingini og gagnnýtingini av kolvetnisfundinum. Góðkenna kolvetnismyndugleikarnir eina leiðbygging, heruppí loyvi at taka olju/gass í land í Føroyum, skal loyvishavin kortini síggja til eisini at fáa góðkenningar og loyvi frá øðrum myndugleikum. Eitt nú krevur bygging av móttøkustøðum á landi v.m. loyvi frá byggimyndugleikum á staðnum, náttúrufriðingarmyndugleikum,

umhvørvismyndugleikum v.m. Tað, at spurningurin um at taka oljuna í land verður viðgjørdur saman við útbyggingini og gagnnýtingini av leiðini sum heild, hevur tann fyrimun, at loyvishavin sambært § 22 skal gera eina meting um fylgjur fyri umhvørvið, áðrenn landsstýrið tekur støðu til leiðbyggiætlanina.

Tað verður neyvan búskaparligt og tøkniligt skil í at leggja rørleiðingar til Føroyar frá einstøkum og smáum kolvetnisfundum, ið møguliga harafturat liggja langt úr land. Í tílíkum førum verður neyðugt at føra kolvetnini við skipi (til Føroya ella uttanlands) ella gjøgnum rørleiðingar hjá grannlondunum (uttanlands). Inntil framleiðslan á landgrunninum hevur fingið eina ávísa støðd, má tí verða roknað við, at metingar í hvørjum einstøkum føri kunnu gera, at tað loysir seg best at senda kolvetnini beinleiðs á marknaðin ella til eina útlendska olju- ella gassmóttøkustøð. Somuleiðis kann verða roknað við, at umstøðurnar verða ymiskar fyri olju og gass orsakað av fíggjarligum og tøkniligum ávum.

At gera tað møguligt hjá tí almenna at tryggja eina í stórst møguligan mun sjálvstøðuga leitingar- og serliga framleiðslugongd á landgrunninum, og fyri ikki at gerast óneyðuga bundin av undirstøðukervinum og flutningsmøguleikunum á landgrunnum grannalandanna, má tað haldast at samsvara best við landsins áhugamál, um olja bert í undantaksførum verður tikin í land uttanlands og bert við loyvi frá landsstýrinum. Stóð tað feløgunum frítt at taka kolvetni í land, har tey vildu, hevði tað kunna hent, at kolvetnisvirksemið á føroyska landgrunninum sum tíðin leið gjørdist bundið av rørleiðingum og móttøkustøðum í grannalondunum, bundið av krøvum grannalanda um avmarking av teimum nøgdum, ið førast kundu ígjøgnum teirra leiðingar, og grannalanda krøvum um gjøld og vørulýsingar. Afturat hesum kemur, at verða kolvetnini tikin í land uttanlands fáa Føroyar ikki lut í teirri vinnumenning við avleiddum ávirkanum á arbeiði, skattainntøkur o. a., sum landið annars kundi havt í væntu, vórðu olju- og gassmóttøkustøðir bygdar og riknar í Føroyum.

Skyldan at taka kolvetni í land gevur við øðrum orðum landsstýrinum eftirlit við olju- og/ella gassflutningi av leiðum á føroyska grunninum. Tað, at skyldan verður staðfest í sjálvari lógini, ger, at loyvishavar fáa at vita, frá tí at leitingin byrjar, at kolvetnini skal verða tikið í land í Føroyum. Tað er at vænta, at leiðbyggiætlanir loyvishavanna fara at endurspegla hetta kravið, og góðar tøkniligar og fíggjarligar grundir skulu tala fyri, skal samtykki verða givið um at føra oljuna uttanlands.

2. punkt í regluni heimilar landsstýrinum at seta krøv, skal undantak verða gjørt frá kravinum um at taka kolvetni í land. Endamálið við hesum er tvíbýtt: *partvís* setir heimildin landsstýrið í betri samráðingarstøðu, tá ið støða skal verða tikin til at føra kolvetni í land uttanlands, og *partvís* gevur ásetingin landsstýrinum møguleikar at samráðast um vinnumenningar- og arbeiðsmøguleikar sum loysn í staðin fyri eina støð o. a. Tær treytir, sum landsstýrið man fara at seta fyri at víkja frá kravinum, fara fyri tað mesta at vera slíkar, ið virka arbeiðsskapandi.

---

**§ 18.** Loyvi landsstýrisins krevst til tess at leggja og reka rørleiðingarskipanir at brúka í virksemi, fevnt av hesi lóg.

*Stk. 2:* Í einum loyvi kunnu setast treytir um rørlegu, støddir, ognarviðurskifti, annara rætt at brúka rørleiðingina, gjald v.m.

*Stk. 3:* Stk. 1 og 2 eru ikki galdandi fyri innanhýsis rørleiðingar í framleiðsluútbúnað á stakari leið.

*Stk. 4:* Røkkur rørleiðingin inn á landgrunn ella yvirvaldsøki hjá øðrum landi, kann landsstýrið, verður avtala gjørd við hetta landið um at leggja og reka rørleiðingina, geva honum, ið loyvi hevur til føroyska partin, boð um at taka lut í avrádda samstarvinum og áseta treytirnar.

---

*Viðmerkingar*

Sum nevnt í viðmerkingunum til § 17 má ráolja frá einstøkum og smáum leiðum væntast at verða flutt til lands við skipi. Fær framleiðslan ávísa stødd, tekur spurningurin seg upp, um rørleiðingar skulu verða lagdar. At leggja rørleiðingar at flyta oljuna, kann geva fyrimunir, bæði hvat viðvíkir umhvørvinum og møguleikanum at gagnnýta smáar leiðir, sum valla verða settar í framleiðslu, er eingin rørleiðing til taks. Jarðgass verður flutt í land í rørleiðingum. Bara í teimum førum, tá ið stórar leiðir liggja langt burturi, kann tað loysa seg at dropa gassið og føra tað til lands í serbygdum tangaskipum.

Umhvørvisliga verður tað hildið vera meira vágið at pumpa olju úr eini fermiboyu ella einum goymsluskipi í eitt tangaskip enn at flyta hana gjøgnum rør, tí at vandin fyri leka er størri, tá ið soleiðis verður flutt, enn vandi fyri leka frá rørleiðing. Harafturat kemur, at oljuflutningur úr fermiboyu til tangakip ikki ber til í øllum veðri, og tí má framleiðslan í summum førum verða steðgað. Verða rørleiðingar brúktar, slepst mestsum undan framleiðsluslitum.

**Stk. 1** sigur, at tað at byggja og reka rørleiðingar at brúka í virksemi, sum hevur fingið loyvi eftir hesi lóg, krevur loyvi frá landsstýrinum. Endamálið við hesi reglu er at halda skil á, av tí at stendur feløgunum frítt at leggja rørleiðingar á grunninum, kann annað virksemi lættliga verða órógvað, eitt nú legging av samskiftiskaðalum, botntroling v.m. Gjørt verður vart við, at rørleiðingar eru havstøðir, jbr. § 2 litra b) (i), og tí undir trygdarkrøvum og eftirliti sambært kap. 5 í hesi lóg.

Slík loyvi kunnu eftir **stk. 2** verða treytað av krøvum um linjuføring, støddir, ognarviðurskifti, nýtslugjald v.m. Krav um at landsstýrið skal góðkenna linjuføringina, kann gera tað møguligt at royna at sleppa undan teimum vansum, sum kunnu standast av rørleiðingunum, jbr. viðmerkingarnar til stk. 1, eitt nú soleiðis at ávísar trolleiðir fáa frið ella at serligur útbúnaður verður gjørdur til verju av samskiftiskaðalum o. a.

Aðrar treytir um støddir, ognarviðurskifti, rætt hjá øðrum at brúka rørleiðingarnar og brúksgjald, kunnu medvirka til at tryggja, at rørleiðingar verða lagdar og riknar soleiðis, at tann vanliga sera stóri útbúnaðurin í stórst møguligan mun kann verða bygdur og rikin á samskipaðan og rímiligan hátt og soleiðis, at undirstøðukervið sum heild verður virkisført, jbr. § 13, stk 2.

Á sama hátt sum samfelagið hevur áhuga í, at kolvetnisvirksemið á føroyska landgrunninum ikki verður ov fast bundið at rørleiðingunum á landgrunnum grannalanda, jbr. viðmerkingarnar til § 17, hevur tað avgerandi týdning, at eitt nú ein verulig einkarrættarstøða viðvíkjandi rørleiðingum á landgrunninum ikki verður misnýtt av eigarunum mótvegis øðrum loyvishavum.

Avleiðingin av órímiligum krøvum um gjøld fyri flutning gjøgnum rørleiðingar, kann í ringast føri vera, at smáleiðir bera seg ikki orsakað av ov høgum flutningsgjøldum, og tí ikki verða gagnnýttar. Tí verður hildið skynsamt, um tað ber til at seta treytir í loyvunum sambært stk. 1 um flutningsorku í rørleiðingini við atliti at flutningi fyri triðjamann, kann hetta gerast á fíggjarliga forsvarligan hátt.

Innanhýsis rørleiðingar, sum eru ein samanhangandi partur av eini framleiðslueind, koma ikki undir regluna í **stk. 3**, av tí at hesar rørleiðingar væntandi verða viðgjørdar í sambandi við, at landsstýrið góðkennir leiðbyggiætlan, jbr. § 14. Rørleiðingar millum leiðir eru ikki undantiknar frá kravinum um serligt loyvi eftir stk. 1, jbr. stk. 3. Í hesum viðfangi kann verða nevnt, at § 18 ikki er galdandi fyri rørleiðingar til millumlanda flutning á landgrunninum, av tí at tær eru undir serligum reglum í § 19.

**Stk. 4** hevur í roynd og veru sama endamál sum § 15, stk. 2 um samskipan, av tí at reglan heimilar landsstýrinum, er avtala gjørd við grannaland um legging og rakstur av rørleiðing, sum fer um mark, at krevja, at tann, sum loyvi hevur til føroyska partin av rørleiðingini, tekur lut í avtalaða samstarvinum. Vanliga hava tey oljufeløgini, sum leggja rørleiðingina, eisini gjørt umfatandi avtalur um bygging og rakstur við samstarvspartar sínar í grannalandinum. Reglan heimilar eisini landsstýrinum at seta føroysku loyvishavunum treytir fyri luttøku teirra í samstarvinum. Reglan tryggjar soleiðis landsstýrinum ein avgerðarrætt inneftir, var millumlanda avtala á stjórnarstigi gjørd um umsjón og onnur myndugleikamál.

**§ 19.** Loyvi landsstýrisins krevst til tess at leggja og reka undirsjóvar rørleiðingarskipanir til millumlandaflutning á føroyskum landgrunnsøki. Í góðkenningini skal tilskilast, hvar hesar rørleiðingar verða lagdar og treytir skulu setast um rímiligar atgerðir við atliti at leitingarvirksemi á landgrunninum, gagnnýting av náttúrurikidømi hansara og fyribyrging, avmarking og eftirliti við dálking frá rørleiðingum.

*Viðmerkingar*

Rætturin at leggja undirsjóvarkaðalar og rørleiðingar verður roknaður sum eitt av havsins frælsum, men tá ið hesin rættur verður framdur á landgrunni hjá øðrum ríki, er neyðugt at viga ímillum áhugan hjá strandarríkinum og áhugan hjá ríkinum, ið ætlar at leggja kaðalarnar ella rørleiðingarnar. Í altjóða rætti eru reglur, sum viga áhugan hjá pørtunum ímóti hvør øðrum, í landgrunssáttmálanum grein 4, sáttmálanum um havsins frælsi grein 2 og 26 og í havrættarsáttmálanum grein 79. Síðst nevnda grein staðfestir í nr. 1 ein almennan rætt hjá øðrum ríkjum at leggja undirsjóvarkaðalar og rørleiðingar á landgrunni hjá strandaríki við virðing fyri tí, ið sagt verður í nr. 2 – 5.

§ 19 í lógini byggir á tær avmarkingar, sum altjóða rættur ger í løgdømi strandaríkisins yvir annara landa kaðalum og rørleiðingum á landgrunni strandaríkisins. Rørleiðingar til millumlanda flutning eru leiðingar millum lond, sum liggja á landgrunni hjá triðjalandi. Á føroyskum grunni er torført at ímynda sær slíkar leiðingar, men við teirri menning, ið er í flutningstøkni, verður hildið skynsamt at hava eina reglu, sum samsvarar við grein 79 í havrættarsáttmálanum.

Sambært regluni skal landsstýrið góðkenna linjuføringina og annars síggja til, at leiðingarnar serstakliga ikki eru til ampa fyri olju- og gassvirksemi og fiskiskap, sum er á grunninum. Harumframt kann landsstýrið seta í verk rímilig tiltøk til at fyribyrgja, avmarka og hava eftirlit við dálking frá rørleiðingum.

Viðmerkjast skal, at reglan bara er galdandi fyri rørleiðingar til millumlanda flutning á landgrunninum, t. e. rørleiðingar, sum ikki røkka inn á føroyskt sjóøki. Í teimum førum, tá ið rørleiðingar verða førdar tvørtur um sjóøki og møguliga upp á land, hevur strandaríkið sambært altjóða rætti størri rætt at áseta reglur, t.d. eftir § 18 í lógini, fyri tílíkar kaðalar og rørleiðingar.

**§ 20.** Hildið kann einans verða endaliga uppat við rakstri og viðlíkahaldi av havstøð til framleiðslu, eftir at landsstýrið frammanundan hevur givið sína góðkenning. Loyvishavin skal við freist eftir stk. 3 leggja eina avriggingarætlan fyri landsstýrið við neyðugum upplýsingum og metingum um tøkni, trygd, umhvørvi, fiskiskap, sigling og búskap saman við uppskoti um hvussu havstøðin kann verða frágingin.

*Stk. 2:* Havstøðin skal samsvarandi altjóða reglum framhaldandi verða brúkt í kolvetnisvirksemi sambært hesi lóg, til annað endamál ella burturbeinast heilt ella partvís. Loyvishavin skal fremja avriggingarætlanina innanfyri ta freist og samsvarandi teimum treytum, landsstýrið hevur sett í góðkenning síni av ætlanini. Rennur freistin frá tí at hildið verður uppat at brúka havstøðina, skal loyvishavin boða landsstýrinum frá, tá hildið verður uppat.

*Stk. 3:* Avriggingarætlanin skal sendast inn í seinasta lagi tvey ár innan loyvishavin roknar við at hildið verður uppat at brúka havstøðina. Sama er galdandi um loyvisskeið eftir §§ 6 og 18 í hesi lóg eru runnin, hendir tað áðrenn roknað er við at halda uppat. Landsstýrið kann krevja avriggingarætlanina fyrr, um umstøðurnar tala fyri tí. Somuleiðis kann landsstýrið til hvørja tíð geva loyvishavanum boð um at prógva førleika sín at fíggja avriggingarætlanina ella veita neyðuga

trygd, metir landsstýrið seg at hava grund til at halda, at loyvishavin ikki fer at hava neyðuga peningin tøkan.

---

*Viðmerkingar*

Eins og landsstýrið skal góðkenna, at havstøð verður sett á landgrunnin eftir § 14, stk. 2, má landsstýrið hava innlit í, hvat gerast skal við støðir, sum fara úr nýtslu. Ikki bara við fyriliti fyri fiskiskapi og sjóferðslu, men eisini tí at landið samsvarandi altjóða rætti er bundið at síggja til, at slíkar støðir verða burturbeindar heilt ella partvís. Harafturat kemur áhugin hjá landinum í, hvussu farið skal verða fram í teimum førum, tá ið støðin verður upphøgd, endurbrúkt ella frágingin. **Stk. 1** áleggur tí loyvishavanum skyldu at fáa góðkenning landsstýrisins, áðrenn hildið verður endaliga uppat við rakstri og viðlíkahaldi av havstøð til framleiðslu. Stytri framleiðslusteðgur, eitt nú til umvælingar, krevur ikki góðkenning landsstýrisins.

Kravið um innlating av avriggingarætlan er galdandi fyri *havstøðir*, soleiðis sum tær eru allýstar í § 2 litra b) í lógini. Framleiðsluskip og -pallar, framleiðslueindir á havbotni, ella rørleiðingar eri dømi um havstøðir, ið eru fevndar av kravi um avriggingarætlan. Útskifting av einstøkum lutum av einari havstøð, eitt nú viðgerðartólum, krevur ikki avriggingarætlan. At seta propp í eitt borihol krevur heldur ikki avriggingarætlan, men tó krevst samtykki frá myndugleikunum, av tí at hetta vanliga er treyt fyri borigóðkenning eftir § 14, stk. 1 og/ella sambært trygdarforskriftum fyri boring. Í hesum sambandi kann eisini verða viðmerkt, at góðkenning landsstýrisins av avriggingarætlan sleppur ikki loyvishavanum undan at søkja um loyvi og góðkenningar sambært aðrari lóggávu, t. d. umhvørvislóggávu.

Kravið um at loyvishavin skal leggja avriggingarætlanina fyri landsstýrið tryggjar, at avriggingin av einari leið verður viðgjørd eftir somu umsitingarligu mannagongdum sum byggingin av leiðini, jbr. § 14. Um freistirnar fyri innlatingini av avriggingarætlanini verður víst til viðmerkingarnar til stk. 3 niðanfyri.

Umframt landstýrisins góðkenningarheimildir og skyldur loyvishavans at senda inn avriggingarætlan ásetir stk 1 eisini reglur um innihaldið í ætlanini. Við regluni er dentur lagdur á, at loyvishavi í avriggingarætlanini tekur støðu til somu viðurskifti, sum eru galdandi í leiðbyggingini. Grundin til at álagt verður loyvishavanum at taka fíggjarligar upplýsingar við í avriggingarætlanina er, at avriggingarútreiðslur loyvishavans helst geva rætt til frádrátt sambært skattalóggávuni. Sum skattkrevjandi myndugleiki hevur tað almenna tí áhuga í at ansa eftir, at avriggað verður so bíliga sum møguligt. Fíggjarligu fyrimunirnir við einum møguleika skulu kortini sammetast við onnur krøv, eitt nú tøkni, umhvørvi, fiskiskap v.m. sambært regluni.

Mint eigur at verða á, at tá leiðbyggiætlanir verða góðkendar eftir § 14 verður sum høvuðsregla kravt, at virki og útbúnaður verða bygd soleiðis, at tey kunna burturbeinast. Í tí einstaka førinum kann kortini hugsast, at burturbeining av einari havstøð, eitt nú einari rørleiðing, má haldast at fara at kosta so nógv og at trygdar- og umhvørvisvandin er somikið lítil, at betri er at lata rørleiðingina verða liggjandi. Burturbeining – hóast hon er ein møguleiki sambært stk. 2 – er í roynd og veru ikki serliga skilagóð loysn í hesum føri. Í tílíkum førum fara partar av havstøðini altíð at verða burturbeindir, men høvuðsparturin verður liggjandi *(lutvís burturbeining).* Í hesum sambandi kann verða nevnt, at strandaríki eftir altjóða rætti ikki hava skyldu at beina rørleiðingar burtur, av tí at tær ikki vanliga eru til ampa fyri sigling. Annars verður eisini hildið, at rørleiðingar, verða tær reinsaðar fyri olju, fyltar við sjógvi og afturlatnar, eru ikki umhvørvisvandi.

Tá valt verður millum teir møguleikar, nevndir eru í stk. 2, hevur tað týdning at avriggingarætlanin og landsstýrisins góðkenningin av henni hava í huga ta loysn, sum best er fyri umhvørvi og fiskivinnu, tó soleiðis at fyrivarni má vera havt fyri tøkni, trygd og búskapi.

Mint verður á, at § 20 bert er galdandi fyri havstøðir. Hetta er tí at roknað verður við, at leiting og møgulig framleiðsla helst verður á sjónum. Verður talan um framleiðslu- ella viðgerðarútbúnað, móttøkustøðir v.m. á landi verður gjørligt at seta tilsvarandi treytir um avrigging í loyvi ella byggigóðkenningar.

**Stk. 2**, 1. pkt. sigur, hvat gerast kann við eina havstøð, sum ikki longur verður rikin ella hildin viðlíka. Tær kunnu *framhaldandi verða brúktar til kolvetnisvirksemi* eftir lógini, brúktar til *annað endamál* ella *burturbeindar* heilt ella partvís. Metast má um í hvørjum einstøkum føri, hvør møguleiki verður valdur og tey viðurskifti, nevnd eru í stk. 1, eiga at verða havd í huga. Hvussu stórur dentur verður lagdur á tey ymsu viðurskiftini í avriggingarætlanini veldst um, hvønn møguleika ætlanin er at brúka. Í málsviðgerðini kann landsstýrið altíð krevja fleiri upplýsingar. *Framhaldandi brúk til kolvetnisvirksemi* kann í verki koma uppá tal fyri nógvar havstøðir, eitt nú um loyvisskeiðið er runnið, men framvegis verður framleitt á leiðini, ella um havstøðin verður brúkt til tænastuveitingar til grannaleiðir. Er framleiðslan ikki hildin uppat, tá loyvisskeiðið er runnið, talar alt fyri, at loyvishavin søkir um nýtt framleiðsluloyvi, møguliga tá hann sendir inn avriggingarætlan. Endurnýgging av loyvinum er nattúrligasta loysnin í tílíkum førum og verður tí steðgað við avriggingini í nøkur ár.

Er havstøð bygd við endurbrúki á aðrari leið í huga, sum serliga kann koma uppá tal við flytandi eindum, er tílík endurnýtsla skilabesta loysnin. Hetta merkir, at havstøðin verður burturbeind av teirri leiðini, sum er undir avrigging.

*Brúk til annað endamál* kann eitt nú hugsast at vera sum fiskimið ella til granskingarendamál. Á hendan hátt slepst undan burturbeining og útbúnaðurin fær longri livitíð. Millum tær treytir, sum helst verða settar, áðrenn góðkent verður at ein havstøð kann brúkast til annað endamál, verður, at vandamikil evni og leysir lutir verða burturbeind. Harafturat fer landsstýrið at kunna tryggja sær, at greiða verður fingin á ábyrgdarbýtinum millum loyvishavan og møguligar nýggjar brúkarar, eitt nú viðvíkjandi skaða, avmerking og viðlíkahaldi.

*Burturbeining* kann sambært regluni verða heil ella partvís. Tá talan er um burturbeining verður útbúnaðurin annaðhvørt søktur, tikin í land ella endurbrúktur (til kolvetnisvirksemi ella annað endamál). Ofta verður talan um samansettar loysnir. Tá ið burturbeiningin bara er fyri ein part, er tað týdningarmikið, at loyvishavi í avriggingarætlanini lýsir, hvat hann hevur í hyggju at gera við tann partin, sum ikki verður burturbeindur. Sum áður nevnt, verður í leiðbyggiætlanini stórur dentur lagdur á, at skipanir og útbúnaður verða gjørd soleiðis, at tey tøkniliga sæð kunnu verða burturbeind.

Møguleikarnir, sum nevndir eru í stk. 2, loyva Føroyum at halda tær altjóða skyldur og leiðreglur, sum eru í gildi, eitt nú IMO-samtyktina frá 19. oktober 1989, sum setur upp leiðreglur um, hvussu havstøðir verða beindar burtur av landgrunninum. Gjøllari frágreiðing um altjóða reglur um hesi viðurskifti eru at finna í fylgiskjali 5.1-1 til kapittul 5.1 um *Fiskivinnu og aling* í frágreiðingini frá Oljuráðleggingarnevndini.

Møguleikarnir eru í lógarregluni orðaðir á tílíkan hátt, at teir eisini í framtíðini mugu haldast at fara at vera í samsvar við altjóða rætt. Verða Føroyar partur í altjóða sáttmálum, sum avmarka møguleikarnar, verður eisini møguligt at lúka hesar skyldur innan karmarnar um § 20.

Eftir stk. 2, 2. pkt. skal loyvishavin beina alt burtur innan fyri freist, sum landsstýrið ásetir og sambært teimum krøvum, sum landsstýrið hevur sett til góðkenning av avriggingarætlanini. Til dømis kann hugsast, at treytir verða settar um, at støðin skal verða avriggað á umhvørvisliga og trygdarliga forsvarligan hátt. Viðvíkjandi freistum til avrigging eigur loyvishavin at fáa eitt ávíst rásarúm, serliga tá ræður um burturbeining. Síðsta pkt. í stk. 2 viðgerð tey føri, har avriggingarætlanin samsvarandi freistunum í stk. 3 er góðkend áðrenn framleiðslan er hildin uppat. Í tílíkum førum góðkennir landsstýrið avriggingarætlanina undir teirri fortreyt, at hon verður

fullførd innan ávísa freist frá tí at framleiðslan helt uppat og verður tí álagt loyvishavanum at boða landsstýrinum frá, tá hildið verður uppat.

**Stk 3**, 1. pkt. ásetir freist loyvishavans at senda landsstýrinum avriggingarætlanina. Freistin er í seinasta lagi tvey ár innan at roknað verður við, at hildið verður uppat at brúka havstøðina. Tað kann vera torfør at áseta neyva tíð fyri, nær hildið verður uppat at brúka eina havstøð, men hugsað verður um, hvørjar ætlanir loyvishavin hevur. At ætlanin verður send landsstýrinum tvey ár innan hildið verður uppat at brúka havstøðina, skuldi gjørt tað møguligt hjá myndugleikunum at viðgjørt avriggingarætlanina forsvarliga.

Er loyvi eftir §§ 6 ella 18 úti, áðrenn roknað verður við at halda uppat, skal loyvishavin eftir stk. 3, 2. pkt. senda avriggingarætlanina inn í seinasta lagi tvey ár áðrenn loyvisskeiðið er runnið.

Sambært stk. 3 síðsta punktum kann landsstýrið krevja at fáa avriggingarætlanina fyrr, skuldi hetta verið neyðugt, eitt nú um framleiðslan í roynd og veru er steðgað, uttan at loyvishavin hevur boðað landsstýrinum frá hesum. Tað verður eisini hildið at verða skilagott at loyva landsstýrinum at krevja prógv um ella trygd fyri fíggjarligu evnum loyvishavans at rigga støðina av, um grundir kunnu vera at halda, at loyvishavin er fíggjarliga veikur.

---

**§ 21.** Tá skeiðið í loyvi eftir §§ 6 ella 18 er runnið, loyvið latið innaftur ella tikið aftur, hevur tað almenna rætt til uttan viðurgjald at yvirtaka viðkomandi útbúnað. Sama er galdandi tá hildið er endaliga uppat at brúka útbúnað, ið burturav er ætlaður til brúks á ávísa økinum.

*Stk. 2:* Rættur hins almenna eftir stk. 1 verður útintur av landsstýrinum. Avgerðin verður boðað loyvishavanum í sambandi við at landsstýrið tekur støðu til avriggingarætlan hansara eftir § 20 og hevur í seinasta lagi gildi tá 6 mánaðir eru farnir frá tíðini eftir stk. 1.

*Stk. 3:* Loyvishavin skal síggja til at búnaðurin við útgerð og neyðugum tilhoyri og tilfari verður avhendur tí almenna í forsvarliga viðlíkahildnum standi og leysur av møguligum skuldbindingum og øllum triðjamansrættindum. Tílíkar skuldbindingar og tílík rættindi detta burtur mótvegis tí almenna.

---

*Viðmerkingar*

Reglan gevur landinum rætt til í ávísum førum at yvirtaka ávísan útbúnað kostnaðarleyst. Talan er ikki um, at hann av sær sjálvum fellir til landið, men um rætt, sum landsstýrið *kann* brúka, um hetta verður hildið at vera rímiligt í ávísum førum.

**Stk. 1** ásetir landsins yvirtøkurætt. Rætturin kann verða brúktur, tá ið skeiðið í loyvi til framleiðslu eftir § 6 ella rørleiðingarloyvi eftir § 18 er runnið, loyvið latið innaftur ella tikið aftur, ella tá ið virksemið er endaliga steðgað.

Meðan § 20 bert er galdandi fyri havstøðir, er yvirtøkurætturin eftir § 21 galdandi bæði fyri havstøðir og útbúnað á landi. Harafturímóti er tað týdningarmikið at hugsa um, at einans virki, ið ætlað eru til brúks á ávísum øki, kunnu verða yvirtikin. Tá ræður um havstøðir merkir hetta, at tað almenna helst fer at kunna yvirtaka fastan útbúnað og innrættingar í § 2 litra b) (i), meðan flytandi eindir sum bori- og framleiðsluskip, ið eru bygd til brúks á fleiri leiðum, ikki koma undir regluna um yvirtøku. Í ávísum førum kann tað vera torført at taka dagar ímillum fastan útbúnað og innrættingar øðrumegin og flytandi eindir hinumegin. Summi sløg av útbúnaði sum, meðan framleitt verður, mugu haldast at vera fastur útbúnaður, kunnu í roynd og veru takast burtur og flytast. Orðini “burturav ætlaður til brúks í ávísa økinum“ hava til endamáls at draga fram, at tá hugsað verður um at brúka yvirtøkurættin má dentur leggjast á, um útbúnaðurin varð bygdur við tí endamálið at verða brúktur á meiri enn einari leið og um útbúnaðurin er innrættaður á tílíkan hátt, at

flyting og framhaldandi brúk til oljuvirksemi er bæði tøkniliga og fíggjarliga sannlíkt, t.e. at flyting av einari leið á aðra bert fer at krevja smávegis tillaðingar av útbúnaðinum.

Borireiði v.m., ið brúkt verða í leitingarskeiðnum, hava júst tað eyðkenni, at tey eru ætlað at verða brúkt allastaðir og fella tí uttanfyri regluna.

Í flestu førum kann roknast við, at útbúnaður á landi er soleiðis dánaður, at hann bert verður brúktur á staðnum, og skuldi tí ikki staðist trupulleikar av regluni, tá ræður um tílíkan útbúnað.

Gjørt verður greitt í **stk. 2**, 1. pkt., at tað er landsstýrið, íð umsitur landsins rættindi til yvirtøku av útbúnað eftir stk. 1. Eftir 2. pkt. skal avgerð landsstýrisins um yvirtøku boðast loyvishavanum, tá landsstýrið tekur støðu til avriggingarætlanina eftir § 20. Av tí at § 20 sum nevnt bert er galdandi fyri havstøðir, verða avriggingartreytirnar settar í møgulig loyvi til útbúnað á landi, soleiðis sum nevnt er í viðmerkingunum til § 20. Viðvíkjandi útbúnaði á landi verður støða landsstýrisins til yvirtøku tí fráboðað í sambandi við viðgerðina av avriggingarætlanini, ið nevnd er í loyvinum. Yvirtøkurættur landsins hevur gildi 6 mánaðir eftir, at loyvisskeiðið er runnið, loyvið latið innaftur, afturtikið ella virksemið er endaliga hildið uppat eftir stk. 1.

Sambært **stk. 3**, 1. pkt. hevur loyvishavin skyldu at síggja til, at útbúnaðurin við tilhoyrandi útgerð er í góðum og forsvarliga viðlíkahildnum standi, tá landið yvirtekur hann. Harafturat liggur á loyvishavanum, at útbúnaðurin er leysur av møguligum skuldbindingum og triðjamansrættindum. Eftir 2. pkt. detta bæði skuldbindingar og triðjamansrættindi burtur mótvegis tí almenna. Tað er tí skilagott av loyvishava og sáttmálapørtum hansara at hava regluna í huga og bera so í bandi, at møguligar skyldur, sum veð er veitt fyri, eru loknar, áðrenn loyvisskeiðið er runnið.

---

**§ 22.** Loyvi ella góðkenningar eftir §§ 14, 18, 19 ella 20 viðvíkjandi verkætlanum, ið ætlandi fara at ávirka umhvørvið munandi, kunnu bert verða veitt eftir at mett er um umhvørvisligu avleiðingarnar, og eftir at avvarandi almenningur, myndugleikar og felagsskapir hava fingið høvi at siga sína hugsan.
*Stk. 2:* Landsstýrið kann veita undantak frá kravinum eftir stk. 1, tala umstøðurnar fyri tí.
*Stk. 3:* Landsstýrið kann áseta reglur um, at avvarðandi almenningur, myndugleikar og felagsskapir skulu fáa boð og verða hoyrdir.

---

*Viðmerkingar*

Reglan svarar í høvuðsheitum til 28 a. í donsku undirgrundarlógini, sum heimilar Danmark at seta í gildi ES direktiv 85/337/EØF frá 27. juni 1985 um meting av ávirkanini á umhvørvi av ávísum almennum og privatum verkætlanum (VVM-direktivið), soleiðis at direktivið nú eisini verður at galda fyri verkætlanir til havs, sum koma undir undirgrundarlógina.

Umframt tey umhvørvisfyrilit, nevnd eru í hesi regluni, er ásett aðrastaðir í lógini, at alt virksemið sambært lógini skal verða lagt til rættis við neyðugum fyriliti fyri eitt nú fiskiskapi og umhvørvisáhugamálum, jbr. endamálsorðingina § 1, stk. 2. Harafturat skal landsstýrið í sambandi við útbjóðingarumførini leggja eina frágreiðing fyri løgtingið, jbr. § 7, stk. 2. Í frágreiðingini skal m.a. vera ein meting um avleiðingarnar av oljuvirksemi fyri fiskivinnuna og náttúru- og umhvørvisáhugamál. Harafturat skal loyvishavin í sambandi við stovnan av havstøðum v.m. arbeiða samsvarandi einari leiðbyggiætlan, ið er góðkend av landsstýrinum, jbr. § 14, stk. 2. Ætlanin skal m.a. hava upplýsingar og metingar av árinunum á umhvørvið og fiskivinnuna, jbr. § 14, stk. 3. Sama er galdandi fyri avriggingarætlanina, jbr. § 20.

**Stk. 1** tryggjar, at metingar verða gjørdar um fylgjurnar fyri umhvørvið, áðrenn loyvi ella góðkenningar verða veitt til leiðbyggingar, legging av rørleiðingum ella avrigging av leiðum, um so er at niðurstøðan av einari ítøkiligari meting av umsóknini verður tann, at verkætlanin munandi

ávirkar umhvørvið, herundir dýr og fisk í einum øki, og at tað er neyðugt at gera serstakar fylgjumetingar eitt nú fyri at útvega upplýsingar, ið ikki eru at finna í upprunaligu umsóknini.
Henda regla er ikki galdandi fyri forkanningar sum seismiskar upptøkur v.m., av tí at tílíkar kanningar bert hava smávegis ávirkan á umhvørvið. Tey tiltøk, sum kundu gjørst neyðug orsakað av seismikki og øðrum forkanningum kunnu setast í verk gjøgnum treytir í forkanningarloyvunum, jbr. § 5. Leitiboringar koma undir regluna, men fara kortini ikki vanliga at krevja umhvørvisfylgjumeting, av tí at tílíkar boringar ikki fara at hava munandi ávirkan á umhvørvi. Tala serlig viðurskifti fyri tí, kunnu tílíkar metingar tó verða kravdar, áðrenn leitiboringar byrja.
Í ávísan mun verða metingarnar grundaðar á vitan, íð longu er til taks, men harafturat má roknast við at grundleggjandi kanningar verða gjørdar av avvarðandi økjum, og ganga oljufeløg ofta saman um tílíkar kanningar í nýggjum oljuøkjum.
Sambært **stk. 2** fær landsstýrið heimild at veita undantak frá kravinum í stk. 1 eftir ítøkiliga meting í hvørjum einstøkum føri. Fráviksloyvi verða ætlandi bert givin í teimum førum, har tøk vitan, herundir fyrr gjørdar kanningar, er nóg mikil, ella har upplýsingarnar í umsóknunum um loyvi ella góðkenningar eftir §§ 14, 18, 19 og 20 mugu haldast at vera nóg góðar.
**Stk. 3** heimilar landsstýrinum at áseta reglur um, hvørjir myndugleikar, felagsskapir ella avvarðandi almenningur eiga at fáa boð og verða hoyrd við viðgerð av umhvørvisfylgjumeting.

---

**§ 23.** Loyvishavin, fyristøðufelagið, stjórin á havstøðini, arbeiðstakarar, undirarbeiðstakarar og aðrir arbeiðsgevarar skulu, hvør í sínum lagi, síggja til at arbeiðsumstøðurnar eru fult forsvarligar til trygd og heilsu, og at dygt eftirlit er við at arbeiðið verður gjørt forsvarliga.

---

*Viðmerkingar*
Í regluni verður tann vanligi trygdar- og heilsustandarin ("fult forsvarligt"), ið eigur at verða upphildin í sambandi við leitingar- og framleiðsluvirksemið, lýstur. Hesin standari verður grundarlagið undir teimum forskriftum, ið ætlandi verða gjørdar við heimild í § 24. Grein 23 er galdandi fyri allar partar av virkseminum, herundir eisini arbeiði og virksemi, sum gjøllari forskriftir ikki eru gjørdar um.
Annars verður víst til viðmerkingarnar til § 13, har undirstrikað varð, at tað er hann, ið stendur fyri virkseminum (loyvishavin), sum hevur ábyrgdina av at stovna, varðveita og útbyggja eitt fult forsvarligt trygdarstig. Høvuðsábyrgdin er sostatt hjá loyvishavanum, vanliga umboðaður av fyristøðufelagnum, men eftir umstøðunum kunna stjórin á eini havstøð, arbeiðstakarar, undirarbeiðstakarar ella aðrir arbeiðsgevarar koma undir sjálvstøðuga ábyrgd, jbr. orðini "hvør í sínum lagi".
Danska lógin um havstøðir hevur eisini tilsvarandi krøv um, at virksemið skal vera forsvarligt og undir dyggum eftirliti, tá tað snýr seg um kolvetnisvirksemi til havs. Sama er galdandi fyri donsku lógina um arbeiðsumhvørvi, jbr. §§ 15 og 16. Í lógaruppskotinum eru reglurnar strangari enn tær í løgtingslóg nr. 58 frá 24. mai 1974 um arbeiðaravernd, sum nýtir heitini "nóg væl vardir" og "gjølla eftirlit", jbr. § 5.
Sambært seinasta petti í lógarregluni er skylda at hava eftirlit við arbeiðsháttinum hjá øllum starvssettum og at arbeiðsgongdin í aðrar mátar er forsvarlig, eitt nú eigur eftirlit at verða havt við at arbeiðsforskriftir verða yvirhildnar og at møguligir skeivleikar í forskriftunum verða rættaðir sohvørt.
Brot móti regluni kann verða revsað við hefti ella bót, sbr. § 43 nr. 3.

**§ 24.** Landsstýrið kann, til tess at varða um trygdar-, heilsu- og umhvørvisatlit í sambandi við kolvetnisleiting, -framleiðslu og/ella -flutning, áseta nærri reglur fyri havstøðir, herundir reglur um:

a) vanligar skyldur hjá arbeiðsgevarum, formonnum, arbeiðstakarum og útvegarum v.m.,
b) skjalfesting viðvíkjandi heilsu- og trygdarviðurskiftum, eftirlitsskipanir, ið kunnu vera innaneftirlits- ella aðrar líkar skipanir, próvskjalaskipanir, og trygdarbygnað annars.
c) gerð av virkjum og útgerð, góðkenning og loyvi til byggifyrireiking, bygging, innleggingar, brúk og burturbeining,
d) trygdar-, heilsu- og umhvørvisviðurskifti, arbeitt verður undir,
e) útbúgving og upplæring, hvíldartíð, frítíð, aldurskrøv og heilsukanningar.

*Viðmerkingar*

Henda reglan veitir landsstýrinum heimild til at áseta gjøllari reglur fyri virksemi, ið hevur serligan týdning fyri trygd, heilsu, umhvørvi og arbeiðsumhvørvi, tá ræður um leiti-, framleiðslu- og flutningsvirksemi. Roknað verður við, at gjørdar verða reglur um boriútgerð, framleiðslu- og viðgerðarútbúnað, merking av útbúnaði, vistarhaldsrúm, kranar, fólka- og farmaflutning, lasting, brunaverju og eldsløkking, bjargingarútgerð, ravmagnsskipanir og -útgerð, umframt bori- og framleiðsluarbeiði, arbeiðstrygd og heilsuviðurskifti, trygdarbygnað o.a.

Nakrar lógir eru longu um trygdarviðurskifti, eitt nú løgtingslóg nr. 58 frá 24. mai 1974 um arbeiðaravernd, løgtingslóg nr. 78 frá 12. juni 1986 um eldsbruna o.a., og lóg nr. 98 frá 12. marts 1980 um skipatrygd v.m. Henda lóggáva er kortini ikki orðað við atliti til tey serligu viðurskifti, sum eru galdandi í leitingar- og framleiðsluvirksemi til havs. Í viðmerkingunum til § 2 litra b) varð sagt, at tørvurin á álítandi fyriskiping, eftirliti og samskiping er stórur í frálandsvinnuni tá ræður um trygd, heilsu og umhvørvi, og er tað tí ynskiligt, at hesi viðurskifti í mestan mun verða savnað í eina lóggávu. Harafturat varð dentur lagdur á í viðmerkingunum til § 3, at reglurnar í kap. 5 um trygd v.m. koma ístaðin fyri omanfyri nevndu lóggávu um arbeiðaravernd, brunaviðurskifti v.m. Hetta er kortini ikki til hindurs fyri, og tá serliga í eini byrjanartíð, at ein kunngerð lýst sambært § 24 vísir til hesa lóggávuna og á tann hátt letur ávísar reglur í hesi lóggávu fáa gildi í frálandsvinnu.

Viðmerkjast skal, at lógargreinin heimilar, at fyriskipanir verða gjørdar um onnur viðurskifti enn tey í litra a) – e) nevndu, um endamálið við fyriskipanini er at varða um trygd, heilsu og umhvørvi í leiting eftir, framleiðslu og flutningi av kolvetnum. Dømini nevnd í litra a) – e) mugu tó metast at vera kjarnin í teimum viðurskiftum, ið fyriskipanir fara at verða gjørdar um, hvat viðvíkir trygd v.m. Av tí at frálandsvirksemið er undir ógvusligari tøkniligari menning, hevur tað verið hildið skynsamari at geva landsstýrinum heimild at dagføra hesi viðurskifti í kunngerðum, heldur enn at fara í smálutir um trygdarviðurskifti í sjálvari lógini. Kunngerðirnar kunnu verða dagførdar eftir tøkniligu menningini og eftir tí millum- ella altjóða samstarvi um trygdarviðurskifti millum olju- og gassmyndugleikarnar, samstarvinum í ST sjóvinnufelagsskapinum IMO (International Martime Organisation) o.a.

Roknað má verða við, at tær reglur, ið verða lýstar við heimild í § 24 í stóran mun verða orðaðar samsvarandi altjóða samtyktum. Hetta ger seg ikki minst galdandi í sambandi við gerð av útbúnaði v.m., eitt nú í førum tá flytandi boripallar stundum arbeiða á einum landgrunni, stundum á øðrum. Trygdarkrøvini, ið sett verða til boripallar, eiga tí at vera rímiliga lík frá landi til land. Tað er tí, at IMO í eini samtykt frá 1989 heitir á limalondini, um at brúka sokallaða MODU-standaran, ið fyriskrivar reglur um bygging av og útgerð á “Mobile Offshore Drilling Units“. Verður standarin brúktur ella verður víst til hansara fer tað at lætta munandi um umsitingina.

Greinirnar 13 og 23 byggja á ta grundreglu, at tað er hann, ið stendur fyri virkseminum (loyvishavin), sum hevur ábyrgdina av, at virksemið er fult forsvarligt í øllum lutum og samsvarandi teimum krøvum lógin setir ella teimum krøvum, ið landsstýrið hevur sett í trygdarforskriftum. Eftir nútíðarfatan áleggur henda grundregla eisini loyvishavanum skyldu at seta í verk eina góðskutryggingarskipan (innaneftirlit), sjálvt um landsstýrið ikki skuldi havt brúkt heimildina í § 24 litra b) um innaneftirlit. Eitt krav til loyvishavan um prógv fyri, at ein tílík skipan er sett í verk, eitt nú í sambandi við eina leitiboring, kann tí verða sett við beinleiðis heimild í lógini.

Innaneftirlit loyvishavans eigur at vera fyrireikað og sett í verk sum ein eftirlits- og skjalfestingarskipan fyri leitingar- og framleiðsluvirksemi, ið tryggjar tey starvssettu, umhvørvi, útbúnað v.m. Ábyrgdarviðurskifti, reglur um frágreiðingar, rakstrar- og eftirlitsgongdir eiga at verða skjalfestar og endurskoðaðar regluliga. Innaneftirlitsskipanir loyvishavans eiga eisini at fevna um innaneftirlitsskipanirnar hjá øðrum, ið taka lut í virkseminum, t.e. arbeiðstakarar, undirarbeiðstakarar, reiðarar v.m. Vanliga verður tað latið upp í hendurnar á loyvishavanum og øðrum, ið luttaka í arbeiðnum, at gera av, hvussu innaneftirlitsskipanirnar verða uppbygdar. Landsstýrið kann kortini sum ein partur av eftirlitinum krevja, at broytingar verða gjørdar, um tað verður hildið neyðugt.

Víst verður annars til viðmerkingarnar til § 13, har sagt varð, at trygdarkunngerðir, lýstar sambært lógini, og myndugleikaeftirlitið og útinning einans skulu metast sum ískoyti og vegleiðing til uppfylling av endamáli lógarinnar um forsvarligt virksemi.

---

**§ 25.** Á mannaðum havstøðum skal eigarin ella brúkarin tilnevna stjóra, ið hevur hægsta myndugleika á støðini í øllum lutum.
*Stk. 2:* Eigari ella brúkari av havstøð skal gera manningar- og verkskipan, ið sigur hvør stjórin er, hvørjir hava ábyrgdina av teimum ymisku høvuðssetningunum í rakstrartrygdini og ásetir leiðbeinandi reglur fyri samstarvi teirra, ið ábyrgdina hava.
*Stk. 3:* Landsstýrið kann, til tess at vissa sær at trygdin er í lagi, krevja at fáa ta í stk. 2 nevndu ætlan til góðkenningar og áseta gjøllari manningarreglur.

---

*Viðmerkingar*
Reglan í **stk. 1** skal gera greitt, hvør til hvørja tíð hevur ovasta myndugleikan á útbúnaðinum, tá arbeitt verður sum havstøð. Fyristøðufelagið eigur tí at tilskila, hvør hevur ábyrgdina til hvørja tíð í teirri verkskipan, hann gera samsvarandi stk. 2.

Tann í **stk. 2** nevnda manningar- og verksskipan skal fevna um alt virksemið á støðini, íð skal verða viðgjørd sum ein heild, ið fevnir um eitt nú íbúðarpall/-skip til fólkið, viðgerðarpallar, tangar v.m., ið eru knýtt at boripallinum ella boriskipinum. Sambært lógarregluni verður kravt, at manningar- og verkskipanin skal fevna um teir, ið ábyrgd hava fyri einstøku høvuðssetningunum, tá umræður tryggum rakstri av útbúnaðinum. Neyvan er tørvur á einum fullfíggjaðum manningarlista yvir alla manningina. Hinvegin verður neyðugt í sambandi við góðkenning av manningar- og verkskipan eftir stk. 3 ella í reglum lýstum sambært § 24 av trygdarávum at seta krøv um tann førleika, ið teir, sum ábyrgdina hava av teimum einstøku høvuðssetningunum, mugu hava, eitt nú til manning av samskiftisútgerð, tyrludekki, bruna- og eyðflytingarútgerð v.m. Í hesum sambandi kann harumframt tørvur vera á at seta krøv um, hvussu nógv skulu arbeiða við teimum ymisku høvuðssetningunum og ávís krøv um útbúgving.

Sambært **stk. 3** kann landsstýrið krevja, at tann í stk. 2 nevnda skipan skal góðkennast. Góðkenningarmannagongdin verður kortini valla umfatandi, er manningar- og verkskipanin gjørd

samsvarandi teimum vanligu reglunum, sum landsstýrið kundi havt gjørt sambært § 24. Inntil tílíkar vanligar reglur eru gjørdar, mugu bæði verkskipanin og manningarreglunar verða góðkendar í hvørjum føri sær.

---

**§ 26.** Eigari ella brúkari av havstøð skal halda dygga tilbúgving til verju fyri vanlukku ella vanda, ið kunnu valda fólkaskaða ella deyða, umhvørvisdálking ella tingskaða. Eisini skal hann síggja til, at neyðug útgerð til eyðflytingar og bjargingar umframt ávaringar og fjarskifti er til taks. Hann skal í tílíkum førum skipa fyri neyðugum atgerðum at forða ella minka um fólkavanda og skaðafylgjur.
*Stk. 2:* Landsstýrið kann taka avgerð um ella áseta nærri reglur um tilbúgvingina, herundir um manning og útgerð, sum eigarin ella brúkarin skal hava til taks, hendir óhapp á støðini og um at fleiri loyvishavar skulu samstarva um tilbúgving. Í vanlukku- ella vandastøðu kann landsstýrið taka avgerð um at seta í verk bjargingartiltøk ella atgerðir at vinna á vanlukkuni og um, at aðrir skulu koma við neyðugari tilbúgvingarútgerð fyri eigarans ella brúkarans rokning.

---

*Viðmerkingar*
Sambært stk. 1 hevur loyvishavin, jbr. orðini "eigari ella brúkari av havstøð", skyldu at halda dygga tilbúgving, meðan stk. 2 heimilar landsstýrinum at seta ávís krøv til tilbúgvingina. Tilbúgvingin hjá loyvishavanum eigur at verða skipað á ein tílíkan hátt, at hon kann verða samskipað við landstilbúgvingina.
**Stk. 1** áleggur loyvishavanum skyldu at stovna, varðveita og menna dygga tilbúgving at tryggja eitt forsvarligt trygdarstig fyri fólk, umhvørvi og virði. Í hesum sambandi skal loyvishavin síggja til, at neyðturvilig eyðflytingar- og bjargingarútgerð er til taks, umframt hóskandi ávaringar- og samskiftiskervi. Sambært stk. 1, 2. pkt. hevur loyvishavin harumframt skyldu at seta í verk neyðug tiltøk at forða ella minka um fólkavanda og skaðafylgjur. Í hesum liggur m.a. skylda at eyðflyta manningina av havstøðini, er hetta neyðugt av trygdarávum. Hann hevur eisini skyldu at taka upp eftir oljuleka, ið hevur dálkað sjógv ella strond ella hótt við tílíkari dálking. Í skylduni at seta neyðug tiltøk í verk liggur eisini, at viðkomandi tilbúgvingarmyndugleikar verða boðsendir beinanvegin, hendir størri óhapp, og skylda at kunna myndugleikarnar regluliga og geva upplýsingar, tá biðið verður um tað, jbr. § 32.
Tilbúgvingarskipanin hjá loyvishavanum eigur at vera soleiðis háttað og útgjørd, at gingið kann verða dyggiliga ímóti vanda- og vanlukkuhendingum, ið kunnu volda manndeyða, fólkaskaða, dálking ella munandi tingsskaða.
**Stk. 2** heimilar landsstýrinum at taka avgerð um ella áseta gjøllari reglur um stovnan og varðveiting av eini tilbúgvingarskipan við neyðugari útgerð og manning.
Soleingi gjøllari reglur ikki eru ásettar, má roknað verða við, at krøvini til tilbúgvingarskipanina verða sett í einari tilbúgvingarætlan, ið loyvishavin letur gera at leggja fyri myndugleikarnar til góðkenningar, eitt nú tá søkt verður um borigóðkenning. Í hesum sambandi fer at bera til at seta ítøkiligar treytir til tilbúgvingarætlanina, eitt nú um at bjargingar- og basingarútgerð skal vera tøk á staðnum ella at hendur skal fáast á henni innan ávísa tíðarfreist. Landsstýrið kann krevja, at fleiri loyvishavar samstarva um tilbúgving. Tílíkt samstarv er vanligt í okkara grannalondum og hevur fyrimunir til pening og útgerð, eitt nú tá olja og/ella gass loypir ótamt ("blow out").
Harumframt kann landsstýrið í bráðkomnari vanlukku- ella vandastøðu gera av, hvørji bjargingar- ella basingartiltøk loyvishavin skal seta í verk at basa vandanum, avmarka og basa vanlukkuni og bøta um fylgjurnar. Her verður hugsað um hendingar sum eldsbruni, spreinging, herverk, ótamt oljulop, og sum á sjónum eru serliga hættisligar fyri mannalív, álvarsliga umhvørvisdálking og sera stóran fíggjarmiss fyri bæði havstøðina sjálva og samfelagið alt.

Tað verður tí hildið neyðugt, at landsstýrið kann gera av, hvørji tiltøk loyvishavin skal seta í verk, ger hann tað ikki av sínum eintingum.
Elva avgerðir landsstýrisins eftir hesi lógarreglu til krøv frá triðjamanni móti loyvishavanum fyri skaðar sambært § 34, kann aftursóknarkrav verða sett móti landsstýrinum, um vanligu endurgjaldstreytirnar eru loknar, eitt nú um mannagongdin hevur verið óforsvarlig.
Umframt heimildir landsstýrisins at gera av, hvørji tiltøk loyvishavin skal seta í verk í ávísari vandastøðu, má roknast við, at tað eisini verður neyðugt við samskipaðum avriki frá myndugleikunum, henda størri vanlukkur. Ein tílík samskipan av bjargingar- og basingartiltøkum myndugleikanna kann tryggjast við at landsstýrið uttan beinleiðis lógarheimild setir eina aktiónsnevnd til samskipingar. Gjørligt verður gjøgnum nevndina at tryggja at ymisku uppgávurnar verða raðfestar og nærri fastlagdar eftir sum óhappið krevur tað. Í Noreg og Danmark hava aktiónsnevndirnar ongan sjálvstøðugan myndugleika, men roknað má verða við, at nevndarlimirnir hvør í sínum lagi hava myndugleika.
At enda kann landsstýrið gera av, at aðrir koma við neyðugari tilbúgvingarútgerð fyri eigarans ella brúkarans (loyvishavans) rokning. Fortreytin er, at vanlukku- ella vandastøðan er bráðkomin, á sama hátt sum tá landsstýrið ger av, hvørji bjargingar- ella basingartiltøk loyvishavin skal seta í verk. “Aðrir“ merkir her aðrir loyvishavar og einhvør, ið hevur útgerð, sum kann brúkast í eini vandastøðu. Henda heimild eigur tó bert at verða brúkt móti øðrum enn loyvishavum um tað er alneyðugt. Tann, ið fær álagt at koma við útgerð, hevur krav um endurgjald.

---

**§ 27.** Rundan um havstøðir, tó ikki rørleiðingar, skulu vera trygdarøki. Landsstýrið ásetir víddina samsvarandi galdandi altjóða reglum og kann gera fyriskipanir um sigling, fiskiskap og flúgving á økjunum, herundir banna óviðkomandi skipum og flogførum at koma inn á økini.
*Stk. 2:* Landsstýrið kann av trygdargrundum áseta reglur um avmarkingar av uppankring og fiskiskapi við undirsjóvar rørleiðingar.

---

*Viðmerkingar*
Sambært **stk. 1,** 1. pkt. er tað skylda at hava trygdarøki rundan um havstøðir. Tað verður landsstýrið, ið tekur avgerð um trygdarøkini og í hesum sambandi, jbr. 2. pkt., ásetir víddina á økinum samsvarandi altjóða reglum. Landsstýrið kann harafturat gera forskriftir fyri sigling, fiskiskapi og flúgving á økinum.
Neyðugt er við tílíkum økjum, av tí at pallar og onnur virki tola lítið av, verða tey ásigld, og vandin fyri manningini og kolvetnislekum er stórur, hendir vanlukka. Harafturat kemur, at nógv skip og hjálparfør vanliga eru í økinum um sjálva havstøðina í oljuørindum. Tað hevur tí stóran týdning fyri trygdina, at før, sum einki hava við virksemið at gera, halda seg burtur.
Altjóða rættur heimilar strandalondum at skipa trygdarøki rundan um havstøðir, jbr. grein 5(2) í landgrunssáttmálanum, ið heimilar trygdarøki rundan um “installations and other devices“, ið neyðugar eru til leiting og gagnnýting av undirsjóvar náttúrutilfeingi. Í grein 60(4), jbr. grein 80, í havrættarsáttmálanum er samsvarandi heimild at skipa trygdarøki kring “artificial islands, installations and structures“. Ósemja er millum serfrøðingar í altjóða rætti, um nakar veruligur munur er á hesum báðum orðingunum, men hóast hesar ósemjur verður hildið, at tey kunna tulkast reiðiliga vítt, soleingi trygdarøkini eru sakliga grundað og ikki eru “unjustifiable interference“ fyri sigling, fiskiskap v.m., jbr. grein 5(1) í landgrunssáttmálanum. Tað er neyvan nakar ivi um, at havstøðir, jbr. § 2 litra b), koma undir orðingarnar í báðum sáttmálunum.
Altjóða rættur áleggur skipum úr øllum londum at virða trygdarøkini, og heimilar strandalandinum at seta í verk tiltøk í økinum, sum neyðug eru at tryggja havstøðirnar.

Hvat víddini av trygdarøkjunum viðvíkjur áseta bæði landgrunssáttmálin og havrættarsáttmálin størstu vídd til 500 metrar frá útsíðu at rokna. Havrættarsáttmálin loyvir tó víðari trygdarøkjum, er hetta í samsvar við alment viðurkendar altjóða reglur ella viðmælt av viðkomandi altjóða felagsskapi (IMO). Havandi í huga tað sum henda kann á hesum øki, er tað skilabetri, at tað er landsstýrið, ið ásetir víddina av trygdarøkinum, heldur enn at størsta vídd verður ásett í lógini.

Landsstýrið kann í almennari fyriskipan, ið heimilar ítøkiligum undantøkum, áseta vídd á trygdarøkjum, reglur um fiskiskap, sigling og flúgving á økinum. Tá hetta er gjørt, er einans tørvur á at almannakunngerða positiónina á havstøðunum, sohvørt tær verða lagdar út. Kunngerðin eigur at verða gjørd hóskandi tíð frammanundan.

Um gildi av føroyskum rætti á trygdarøkinum verður víst til § 3, stk. 2 við viðmerkingum.

**Stk. 2** heimilar landsstýrinum av trygdargrundum at avmarka rættin at ankra upp ella royna við undirsjóvarrørleiðingar.

Hildið verður ikki, at atljóða rættur heimilar standalandinum at skipa beinleiðis trygdarøki um rørleiðingar á sama hátt sum rundan um havstøðir, men hinvegin hindrar altjóða rættur ikki, at tiltøk verða sett í verk, sum eru neyðug av trygdarávum.

Avmarking ella møguligt bann móti fiskiskapi við undirsjóvarrørleiðingar, verða vanliga bert at galda fyribils, meðan rørleiðingin verður løgd. Tá rørleiðingarnar eru lagdar, kann fiskiskapur í flestu førum verða tikin uppaftur.

Annars verður víst til viðmerkingarnar til §§ 18 og 19.

---

**§ 28.** Er álvarslig vanlukka hend orsakað av virksemi, ið kemur undir hesa lóg, ella tilburður, ið kundi elvt slíka vanlukku, ella munandi tingskaða, ella sjódálking, kann landsstýrið seta skaðanevnd at kanna og meta um hendingina og skriva frágreiðing. Landsstýrið kann áseta nærri reglur um virksemi nevndarinnar.

*Stk. 2:* Skaðanevndin hevur loyvi at kanna havstøðina ella leivdirnar av henni.

*Stk. 3:* Skaðanevndin kann krevja, at bøkur og onnur skjøl, ið hava týdning fyri kanningina, verða framløgd, og kann avhoyra eigaran ella brúkaran av havstøðini, starvsfólk og hvønn tann, ið verður hildin at kunna koma við upplýsingum, ið hava týdning fyri kanningina.

*Stk. 4:* Skaðanevndin kann krevja avhoyring í rættinum sambært reglunum í rættargangslógini.

---

*Viðmerkingar*

**Stk 1** heimilar, at sett verður skaðanevnd, tá ið álvarsligar vanlukkur ella álvarsligur vandi hevur borist á av virksemi, lógin fatar um. Av orðingini skilst, at serliga verður hugsað um álvarsligar vandastøður og vanlukkur á havstøðum. Tað kemur sostatt neyvan fyri, at skaðanevnd verður sett í sambandi við vanliga arbeiðsvanlukku, hóast hon hevur kravt mannalív ella volt stóran mannskaða. Roknað verður við, at løgreglan í samstarvi við trygdarmyndugleikarnar kannar arbeiðsvanlukkur, og endamálið við skaðanevndini er ikki at koma ístaðin fyri hetta kanningararbeiðið.

Meðan ein løgreglukanning vanliga miðar ímóti at uppklára møgulig revsiverd viðurskifti, verður uppgávan hjá skaðanevndini at avdúka, hví vanlukkan hendi. Harafturat fer nevndin at kortleggja hendingarrøðina, herundir atburð og avrik hjá loyvishava, fyristøðufelagi, arbeiðstakarum o.ø. at hindra ella avmarka skaðan ella vandan. Harafturat verður tað setningur nevndarinnar at meta um og síggja hesi viðurskifti í heild við almenna trygdareftirlitið, regluskipanina, innaneftirlitsskipan loyvishavans v.m. og koma við uppskotum um møguligar ábøtur. Hinvegin tekur nevndin ikki støðu til møguliga revsiábyrgd.

Kanningarnar og niðurstøðurnar hjá skaðanevndini hava sostatt ikki bindandi próvvirði og ákæruvald, dómsstólar, umsitingarvald o.o., ið brúka frágreiðingina frá skaðanevndini, gera tað bert

í tann mun, hon er sannførandi. Tað er sostatt bert talan um eina tøkniliga/sakkøna uppfatan av eini hendingarrøð.

Tað hevur ikki verið hildið at vera skilagott at koma við uppskoti um at seta fasta skaðanevnd sum er. Tær álvarsligu vanlukkur og vandastøður, sum talan kann verða um, eru av sera ymiskum slagi, eitt nú ótamt oljulop, eldsbruni, spreinging, byggibrek v.m. Neyðugur serkunnleiki at meta um viðurskiftini í sambandi við eina vanlukku ella vandastøðu, verður tí so ymiskur alt eftir slag og stødd av vanlukkunum. Sakkunnleiki um boritøkni, jarðfrøði, sigling og flúgving verður tó helst umboðaður.

Skotið verður upp, at landsstýrið fær heimild at áseta gjøllari reglur fyri virksemi nevndarinnar.

Sambært **stk. 2 og 3** kann skaðanevndin gera neyðugar kanningar, eitt nú av einari havstøð, og skipa fyri avhoyringum av øllum sum mugu haldast at hava upplýsingar av týdningi fyri kanningina.

**Stk. 4** loyvir nevndini at krevja avhoyringar í rættinum, av tí at tað verður hildið skilagott at nevndin kann fáa fólk avhoyrd innanrættar við vitnisábyrgd, jbr. § 1018 í rættargangslógini, hóast óformligar avhoyringar í nevndini helst verður tað vanliga.

---

**§ 29.** Landsstýrið kann áseta gjøllari reglur um virksemi sambært loyvum eftir §§ 4, 6, 18, 19 og 20.

---

*Viðmerkingar*

Tað verður hildið at vera skilagott at hava heimild at áseta gjøllari fyriskipanir um kolvetnisvirksemið eftir §§ 4, 6, 18, 19 og 20. Talan er her um eina reglu, sum kemur afturat øðrum serligum heimildum at áseta gjøllari reglur, sum t.d. § 5, stk. 2 og § 24, og § 29 er sostatt bert ætlað sum ískoytisheimild til at áseta neyvari reglur um virksemi eftir lógini, t.d. reglur um tulking av fyriskipanum og øðrum reglum, ið kunngjørdar eru sambært serligu heimildunum.

---

**§ 30.** Landsstýrið savnar allar tøkar upplýsingar um undirgrundina, ið fáast til vega í virksemi eftir hesi lóg.

---

*Viðmerkingar*

Endamálið við hesi reglu er at tryggja, at allar upplýsingar um undirgrund Føroya, sum verða savnaðar í sambandi við virksemi eftir hesi lóg, jbr. m.a. § 11, verða latnar landsstýrinum við tí í hyggju at røkja og framhaldandi byggja upp ein upplýsingarbanka um undirgrundina. Eftir at ávís freist er farin, kann almenningurin vanliga fáa atgongd til upplýsingarnar í bankanum. Freistin er vanliga 5 ár eftir at upplýsingarnar eru latnar inn.

---

**§ 31.** Landsstýrið hevur eftirlit við, at lógin og reglur og treytir settar sambært lógini verða hildnar.

*Stk. 2:* Landsstýrið kann áseta nærri reglur um eftirlit, góðkenning av stakroyndum og øðrum prógvum fyri, at reglur um trygd, heilsu og umhvørvi eru hildnar.

*Stk. 3:* Landsstýrið kann heimila lands- og øðrum almennum stovnum at umsita heimildir, ið lógin gevur landsstýrinum.

*Stk. 4:* Loyvishavarnir rinda útreiðslurnar av viðgerð myndugleikanna av málum um loyvi og góðkenning v.m. til virksemi eftir hesi lóg, og av eftirlitinum eftir stk. 1 sambært reglum, ásettum av landsstýrinum.

---

*Viðmerkingar*
Eftirlit er týðandi partur av landsstýrisins arbeiðssetningi í sambandi við hesa lóg og við reglur og treytir, gjørdar eru sambært lógini. Arbeiðið hjá eftirlitinum er at fylgja við virkseminum hjá loyvishavanum og at síggja til, at bæði forkanningar, leiting og framleiðsla fara forsvarliga og skynsamiliga fram, jbr. § 13, ikki minst við atliti at trygd og arbeiðsumhvørvi. Harumframt skal verða ansað eftir, at loyvishavarnir halda treytir og ásetingar, settar eru í loyvunum.
At landsstýrið sambært **stk. 2** m.a. kann áseta reglur um góðkenning av stakroyndum og aðrari skjalfesting fyri, at fyriskipanir um trygd, heilsu og umhvørvi eru fylgdar, tryggjar at skjalfesting frá eitt nú klassafeløgum kann verða tikin við av eftirlitsmyndugleikunum í sambandi við viðgerð av umsóknum. Myndugleikarnir kunnu treyta góðkenning av, at nóg góð skjalfesting er útvegað av hesum feløgum til uppfylling av trygdarkrøvum.
**Stk. 3** heimilar at lata øðrum almennum stovnum upp í hendur at standa fyri eftirlitinum.
Í **stk. 4** verður staðfest, at loyvishavarnir skulu gjalda útreiðslur hjá tí almenna, ið standast av málsviðgerðini viðvíkjandi loyvum og góðkenningum, og fremjan av eftirlitinum. Hesar útreiðslurnar kunnu verða kravdar endurgoldnar í tann mun tær kunnu skuldskrivast hvørjum loyvishava sær.

---

**§ 32.** Loyvishavar, eigarar ella brúkarar av havstøðum skulu lata allar upplýsingar, landsstýrið heldur vera neyðugar til eftirlitið við virksemi teirra eftir hesi lóg.
*Stk. 2:* At fremja eftirlitið kann landsstýrið áleggja loyvishava at lata inn stakroyndir, rátilfar, viðgerðarúrslit, tulkingar og metingar umframt tøkniligar og búskaparligar upplýsingar.
*Stk. 3:* Har tað er neyðugt til eftirlits, hava starvsfólk eftirlitsmyndugleikans til hvørja tíð, uttan dómsúrskurð móti neyðugum samleikaprógvi atgongd til allar partar av fyritøku, har virksemi er eftir hesi lóg.
*Stk. 4:* Tað liggur á eigara ella brúkara av havstøð eins og teimum, ið virka teirra vegna, at geva starvsfólki eftirlitsmyndugleikans alla neyðuga hjálp í kanningarvirksemi teirra.
*Stk. 5:* Umboð fyri eftirlitsmyndugleikan hava rætt at taka lut sum eygleiðarar á fundum í samstarvsnevndum hjá loyvishavum, sum í felag hava fingið loyvi eftir § 6.

---

*Viðmerkingar*
Grein 32 tryggjar, at eftirlitsmyndugleikin í verki kann hava umsjón við, at lógin og treytir ásettar í sambært lógini verða hildnar.
Sambært **stk. 2** kann eftirlitsmyndugleikin geva boð um, hvørjar upplýsingar skulu latast inn, nær og til hvønn. Verða tílík boð ikki fylgd, kann revsing áleggjast sum bót ella hefti, jbr. § 43, stk. 1, litra d.
**Stk 3,** sum er ískoyti til stk. 1. og 2, gevur eftirlitsmyndugleikanum atgongd til allar partar av fyritøkuni, har virksemi sambært hesi lóg gongur fyri seg, í tann mun tað er neyðugt til eftirlits, uttan at neyðugt er við dómsúrskurði. Endamálið er serliga at fáa atgongd til tann útbúnað, ið lógin fevnir um, at gera kanningar, har sum eftirlitið ikki kann verða framt bert við innsending av upplýsingum. Tað verður bert í undantaksførum neyðugt at krevja atgongd til umsitingarhøli o.l.

**Stk. 4** ásetir á sama hátt sum § 13 stk. 4 í lóg um skipatrygd v.m., at eigari ella brúkari av havstøð umframt einhvør, ið virkar teirra vegna, hevur skyldu at geva starvsfólki eftirlitsmyndugleikans alla neyðuga hjálp í kanningarvirksemi teirra.

Endamálið við **stk. 5**, sum er eitt ískoyti til hinar reglurnar í § 32, er at tryggja alment innlit í leitingar- og framleiðsluvirksemið, umframt at fáa gott samband við loyvishavarnar. Við samstarvsnevndir verður m.a. hugsað um "joint operating committees" í samarbeiðsfeløgunum (joint ventures) hjá oljufeløgunum.

---

**§ 33.** Eftirlitsmyndugleikin kann geva boð um, at viðurskifti, ið eru ímóti lógini ella reglum og avgerðum sambært lógini, verða fingin í rættlag beinanvegin ella innan nærri ásetta freist.
*Stk. 2:* Metir eftirlitsmyndugleikin, at tað er neyðugt til tess at forða hóttandi stórvanda fyri starvsfólksins ella annara trygd ella heilsu ella fyri umhvørvisdálking, kann hann geva boð um, at beinanvegin skal verða gingið ímóti vandanum, herundir at arbeiðið verður steðgað.

---

*Viðmerkingar*
Eftirlitsmyndugleikin kann geva boð um, at viðurskifti, sum eru ímóti lógini ella ímóti reglum ella avgerðum sambært lógini, verða fingin í rættlag beinan vegin, ella innan nærri ásetta freist. Tá vandarnir við leitingar- og framleiðsluvirkseminum verða havdir í huga, hevur tað harafturat verið hildið at vera skilagott, at eftirlitsmyndugleikin í teimum førum, nevnd eru í stk. 2, kann steðga arbeiðinum heilt. Verða boðini frá eftirlitsmyndugleikanum ikki fylgd, kann revsing verða áløgd sum bót ella hefti, jbr. § 43, stk. 1, litra d.

## Kapittul 7
## Endurgjald og serligar reglur um skaðabøtur til fiskimenn

*Viðmerkingar*
Í hesum kapitli eru bæði vanligar reglur um endurgjald, har tann, ið skaðan gjørdi, skal rinda endurgjald um ábyrgdargrundarlag er, og reglur um skaðabøtur eftir meting.
Sambært § 34 er partleys (objektiv) ábyrgd fyri skaðum, voldir í virksemi eftir loyvinum. Tað er møguligt at lækka endurgjaldið ella lata tað fella burtur, um hann, ið varð fyri skaða, medvirkaði tilætlað ella av grovum ósketni. Dálkingarskaðar eru, í teimum førum tá skaðavoldarin er kendur, eisini undir teirri strongu ábyrgdarregluni, men møguligt er at lække endurgjaldið ella lata tað fella burtur, tá talan er um *force majeure.*
Semjast skaðavoldari og tann skaddi ikki um endurgjaldið, verða mál eftir § 34 avgjørd av vanligu dómstólunum.
Royndir vísa, at kolvetnisvirksemi kann elva til trupulleikar fyri fiskiskap, uttan at tað ber til at finna tann, ið skaðan voldi. Hetta kemur serliga fyri, tá skip fáa lutir, ið stava frá kolvetnisvirksemi, í fiskireiðskapin. Tað verður tí skotið upp í § 35, at loyvishavarnir hava samábyrgd fyri skaðabótum fyri tílíkan skaða á fiskireiðskap, fiskiskip umframt veiðimiss og mista fiskitíð. Tað er ein treyt fyri skaðabótum eftir hesi reglu, at tær upplýsingar, ið eru til taks tala fyri, at tapið stavar frá kolvetnisvirkseminum. Ein serlig skaðabótanevnd ásetir skaðabøtur eftir hesi reglu, jbr. § 37.
Kolvetnisvirksemið kann, umframt beinleiðis skaða og tap, verða fiskiskapinum til bága, av tí at roknast kann við, at leiðir, har vinnuligur fiskiskapur hevur verið rikin, fara at verða brúktar í oljuvirkseminum. Rætturin at reka fiskiskap er ikki vardur av vanligum endurgjaldsreglum í teimum førum, tá veiðumøguleikarnir á royndum leiðum verða skerdir. Tí verður skotið upp í § 36, at landsstýrið í sambandi við góðkenning av leiðbygging, legging av rørleiðing ella avrigging av oljuleið, *annaðhvørt* hevur tikið støðu til spurningin um skaðabøtur *ella* hevur sent skaðabótanevndini málið til avgerðar, jbr. § 37. Tá støða verður tikin til mál eftir § 36 skal dentur verða lagdur á, um kolvetnistiltøkini eru til hindurs ella tarn fyri vinnuligan fiskiskap, har á leiðini, og um inntøkumøguleikarnir hjá fiskimonnum verða skerdir.
Grein 37 sigur, hvussu skaðabótanevndin verður vald og heimilar landsstýrinum at gera reglur um skaðabótagjald, útreiðslurnar av skaðabótanevndini og um málsviðgerðina. Tað eru loyvishavarnir, ið gjalda bæði skaðabøtur og nevndarútreiðslur.

---

**§ 34.** Loyvishavin skal endurgjalda tap, ið stendst av skaða, dálkingarskaði íroknaður, elvdur av virksemi sambært loyvinum, hóast skaðin stendst av tilvild.
*Stk. 2:* Hevur tann, ið varð fyri skaða, tilætlað ella av grovum ósketni, medvirkað til skaðan, kann endurgjaldið verða lækkað ella fella burtur.
*Stk. 3:* Endurgjald fyri dálkingarskaða kann verða lækkað ella fella burtur, verður tað prógvað, at náttúruhending, ið ikki slapst undan, krígs- ella yvirgangsatgerð ella líkar tvingandi umstøður (force majeure) munandi hava medvirkað til ella økt um skaðan undir umstøðum, ið ikki kundi roknast við fóru at henda, og sum loyvishavin ikki hevði ræði á.
*Stk. 4:* Við dálkingarskaða skilst í hesi lóg skaði ella tap orsakað av dálking, elvdari av kolvetnisfloymi ella -leka úr virki, borihol íroknað, og útreiðslur til rímilig tiltøk at forða ella avmarka tílíkan skaða ella tap, umframt skaða ella tap, ið standast av tílíkum tiltøkum. Skaði ella tap, sum eigarar, reiðarar og manning á fiskiskipum hava verið fyri orsakað av skerdum fiskimøguleikum, verða eisini mett at vera dálkingarskaði.

---

*Viðmerkingar*

**Stk. 1** svarar til § 4, stk. 1 í forkanningarlógini, tó er skoytt uppí fyri at eingin ivi skal vera, at dálkingarskaðar, jbr. stk. 4, koma undir regluna. Reglan ásetir, á sama hátt sum gjørt varð í § 10 í undirgrundarlógini frá 1950, partleysa ábyrgd (objektiva) fyri skaðar voldir í virksemi eftir loyvum sambært lógini. Skotið verður upp, at ábyrgdin verður víðkað, soleiðis at ábyrgd bæði er fyri skaða voldum uttanfyri standandi fólki og annanmans ogn og eisini fyri skaða á fólk, sum ikki kunnu metast at vera uttanfyri standandi (starvssett, sáttmálapartar o.fl.).

Loyvishavi kann ikki í avtalum við arbeiðstakarar, útvegarar o.fl. fráleggja sær ábyrgd sína sambært hesi reglu. Ábyrgdarreglan tryggjar tí, ið varð fyri skaða, soleiðis at hann kann halda seg til loyvishavan, eisini í førum har skaðin í roynd og veru er voldur av eitt nú einum undirarbeiðstakara. Tað fylgir við øðrum orðum av regluni, at loyvishavin, í teimum førum hann ikki sjálvur hevur volt skaðan, hevur samábyrgd við sínum sáttmálapørtum v.m. Reglan tekur hinvegin ikki støðu til eina møguliga seinni aftursóknaruppgerð millum loyvishavan og veruliga skaðavoldaran. Ein tílík uppgerð skal tí verða gjørd samsvarandi tí, sum avtalað er partanna millum og/ella vanligum endurgjaldsreglum.

Partleysa og óavmarkaða ábyrgdin hjá loyvishavanum kann ikki avmarkast eftir reglunum í sjólógini um avmarking av ábyrgd í førum, har virksemið stavar frá flytandi virki, sum sjólógin er galdandi fyri, serliga flótandi borireiðum.

Endurgjaldsábyrgd sambært § 34 er treytað av, at vanligar endurgjaldstreytir í aðrarmátar eru loknar, sum t.d. kravið um at tann skaddi skal prógva, hvør gjørdi skaðan. Reglan er eisini galdandi fyri skaða á eitt nú fiskireiðskap og fiskiskip um so er, at viðkomandi hevur sannað, hvør skaðan gjørdi og prógva, at skaðin stóðst av virksemi eftir hesi lóg.

**Stk. 2** svarar til § 4, stk. 2 í galdandi forkanningarlóg.

Sambært **stk. 3** kann endurgjaldið fyri dálkingarskaða, jbr. stk. 4, lækkast ella møguliga falla burtur, er talan um *force majeure*. Vanligar endurgjaldsreglur høvdu helst viðført, at endurgjaldið verður lækkað í tílíkum førum, men tá hugsað verður um, at talan er um partleysa ábyrgd og at dálkingarskaðar møguliga kunnu føra til stór endurgjaldskrøv, verður tað hildið best hóskandi við fyriliti fyri loyvishavanum, at tað fylgir av sjálvari lógini um kolvetnisvirksemi, at endurgjaldsábyrgdin kann lækkast, tá talan er um hendingar, sum nevndar eru í regluni.

Við “náttúruhending, ið ikki slapst undan“ verður hugsað um eina hending ella handling, sum loyvishavin (fyristøðufelagið) als ikki hevði kunnað fyribyrgt ella avmarkað fylgjurnar av, ella sum tað ikki var væntandi, at hann hevði fyribyrgt ella avmarkað, sjálvt um hetta fyri so vítt hevði verið gjørligt. Í hesum sambandi mugu strong krøv setast til tilbúgvingartiltøk loyvishavans (fyristøðufelagsins).

Við kríggj skilst eisini borgarakríggj, meðan yvirgangsatgerðir m.a. fevna um herverk og aðrar gerðir tilætlaðar at skaða loyvishavan og/ella útbúnað hansara. Líkar tvingandi umstøður fevna um aðrar ófyribyrgjandi hendingar ella gerðir, ið kunna javnmetast við frammanfyri nevndu.

Reglan í stk. 3 kann verða brúkt, sjálvt um force majeure hendingin bert var ein av fleiri medvirkandi grundum til skaðan ella støddina av skaðanum. Tað er tó ein fortreyt, at hendingin hevur havt týðandi ávirkan á, at skaðin hendi og at loyvishavin (fyristøðufelagið) ikki hevði ræði á hendingini.

Í **stk. 4** er gjøllari lýst, hvørjir dálkingarskaðar koma undir regluna í stk. 1.

Dálkingarskaðar eru skaðar og tap, sum eftir vanligari hugsan um tað, ið roknast kann við, kunnu metast at vera fylgjur av floymi ella leka. Við virki skilst allur tann útbúnaður, ið nýttur verður í sambandi við framleiðslu av kolvetni, eitt nú havstøðir, jbr. § 2 litra b), rørleiðingar, jbr. § 18, og møguligur útbúnaður og virki á landi, jbr. § 14, stk. 2. Sum reglan er orðað, koma borihol eisini

undir hugtakið virki, og floymur beinleiðis úr boriholi, er tí eisini dálkingarskaði. Við borihol skilst eisini brunnar, meðan teir verða boraðir.

Við kolvetni skilst í regluni tað sama sum í § 2 litra a), t.v.s. at leki av eitt nú einum oljuúrdrátti sum bunkringarolju úr boriskipi er ikki dálkingarskaði í lógarinnar merking, men *vanligur* skaði við partleysari ábyrgd eftir stk. 1. Av hesum fylgir, at stk. 3 um lækking ella burturfall av endurgjaldi í *force majeure* førum ikki er galdandi fyri tílíkan leka. Møguligur leki av eitt nú bunkringarolju ella borievnum koma sum nevnt undir ta vanligu partleysu ábyrgdina eftir stk. 1 í tann mun lekin er úr skipi ella palli fevnd av skilmarkingini av havstøðum, jbr. § 2 litra b). Avmarkingarreglurnar í sjólógini hava tí ikki týdning, meðan skipið ella pallurin verða brúkt til fyritakssemi, sum kemur undir hesa lóg.

Sermerktir dálkingarskaðar eru á dýra- og plantulív í sjógvi og á landi, umframt dálking av strond og fiskireiðskapi v.m. Vanliga er tað ein fortreyt, at skaðin ella tapið koma undir vanligar endurgjaldsreglur um samanhang millum gerð og fylgju, um hvat vanliga kann roknast við (adækvans) umframt at áhugamál hins skadda eru vard av endurgjaldsreglum. Lagt skal tó verða afturat, at útreiðslur hjá tí almenna og øðrum (eitt nú privatum jarðeigarum) til reinsing av strondini koma undir regluna sjálvt um strandareinsing ikki hevur beinleiðis fíggjarligt virði. Verja av náttúruumhvørvinum og endurskapan av umhvørvinum eftir at skaði er hendur munar meira í tílíkum førum enn vanligar endurgjaldsrættarligar metingar um, hvat kann skiljast sum fíggjarligt tap.

Útreiðslur av tiltøkum til fyribyrging ella avmarking av einum dálkingarskaða verða endurgoldnar javnt við dálkingarskaðar. Tílíkar útreiðslur verða bert endurgoldnar í tann mun tiltøkini eru *rímilig*, t.e. at tey, sum støðan var, við vanligum hygni máttu haldast at vera hóskandi at fyribyrgja ella avmarka skaðan ella tapið. Harafturat mugu útreiðslurnar av tiltøkunum standa í rímiligan mun til tey virði, sum ætlanin var at verja. Tað er ikki avgerandi um tiltøkini eydnaðust ella ikki. Tiltøk til tess at fyribyrgja ella avmarka dálking av fugli og tiltøk oljuplágaðum fugli til hjálpar koma eisini undir regluna.

Tap og skaðar, sum standast av omanfyri nevndu tiltøkum, koma eftir uppskotinum eisini undir regluna. T.d. er tað sostatt ikki eitt avgjørt krav, at skaðin ella tapið skal verða volt beinleiðs at kolvetnunum (olju ella gassi), men er tað nóg mikið, at skaðin er elvdur av evnum, ið verða brúkt at avmarka olju- ella gassdálking.

At enda verður ásett, at skaði ella tap, sum eigarar, reiðarar ella manning á fiskiskipum hava verið fyri orsakað av skerdum fiskimøguleikum eisini koma undir dálkingarskaða.

---

**§ 35.** Verða føroyskir eigarar, reiðarar og manning á fiskiførum fyri tapi, ið má metast at stava frá kolvetnisvirksemi til havs sambært hesi lóg, og ikki gerst av hvør skaðan voldi, jbr. § 34, skulu loyvishavarnir við samábyrgd veita skaðabøtur fyri skaða á fiskireiðskap, -skip, og -før umframt veiðumiss og mista fiskitíð. Sama er galdandi fyri mista fiskitíð í sambandi við merking, upptøku og uppskiping av lutum, ið stava frá virkseminum. Loyvishavar kunnu stovna skaðabótagrunn við tí endamáli at gjalda krøv eftir hesi reglu, áðrenn farast kann eftir loyvishavunum.

---

*Viðmerkingar*

Í vissan mun kann kolvetnisvirksemi darva fiskivinnuni ella volda henni trupulleikar, hóast tað ikki er gjørligt at finna hann, ið skaðan gjørdi. Her verður hugsað um, at fiskiskip fáa lutir, sum eingin kenst við, í fiskireiðskapin, men tað kortini reiðiliga vist kann verða sagt, at luturin stavar frá kolvetnisvirksemi.

Hildið verður rímiligt, at lógin veitir møguleika at gjalda fyri slíkan miss, tó at tað ikki er gjørligt at halda seg til “skaðaelvaran“. Grannalond okkara hava skipanir, sum miða ímóti at endurgjalda fiskimonnum fyri tap, sum við stórari vissu kann sigast at verða elvdur av kolvetnisvirksemi, tó at eingin veit, hvør ið skaðaelvarin er. Í Noregi eru reglurnar um skaðabøtur tiknar við í petroleumslógina, meðan viðurskiftini í Danmark og Noregi eru skipað í avtalum millum frálandsfeløgini og fiskimannafeløgini. Havandi týdningin, fiskiskapur hevur fyri Føroyar, í huga, verður tað hildið hóskandi, at hesar reglur koma við í kolvetnisvirksemislógina longu frá byrjan.

Grein 35 er um vinnuligan fiskiskap. Rætt at fáa skaðabøtur eftir hesi reglu hava tí eigarar/reiðarar av føroyskt skrásettum fiskiførum, sum hava loyvi frá landsstýrinum at reka vinnuligan fiskiskap (fiskiloyvi), og manningarnar. Roknað verður við at skaðabøturnar fyri mista veiðu og fiskitíð verða býttar millum eigara/reiðara og manning sambært sáttmálum millum reiðarfelagið og manningarfeløgini.

Av tí at § 35 ásetir, at skaðabøtur skulu veitast í førum, har skaðavoldarin sjálvur er ókendur, verður tað hildið at samsvara best við endamálið, at loyvishavarnir hava samábyrgd. Skotið verður eisini upp, at ábyrgdin samsvarandi regluni í § 34 er óavmarkað. Seinasta brotið í regluni ger tað tó møguligt, at loyvishavarnir á sama hátt sum í grannalondum okkara kunnu stovna ein grunn at gjalda skaðabøtur sambært § 35, t.v.s. at farast kann fyrst eftir grunninum. Grunnurin kann annaðhvørt verða stovnaður av loyvishavunum sjálvum, men kann eisini – eftir samráðingar við loyvishavarnar – hugsast at verða stovnaður sambært reglum, ið landsstýrið hevur lýst sambært § 37, stk. 2. Í hesum reglum kann verða ásett, at hann, ið krevur skaðabøtur, í fyrsta umfari skal venda sær til grunnin. Hóast grunnurin verður stovnaður hava loyvishavarnir framvegis samábyrgd og kann hann, ið krevur skaðabøtur, tí seta fram krav sítt beinleiðis móti einum ella fleiri av loyvishavunum, er ikki nóg mikið av peningi í grunninum.

Krav um skaðabøtur eftir § 35 kann ikki verða sett fram, um treytirnar at fáa endurgjald eftir § 34 eru til staðar. Skaðabótanevndin eigur tí at vísa honum, ið krevur skaðabøtur, til skaðavoldaran, er hann kendur. Verður hann, ið krevur skaðabøtur, vístur til skaðavoldaran, kann hann, hóast rættargangsfreistir í reglum givnum sambært § 37, stk. 2, seta krav sítt um skaðabøtur fram av nýggjum, hevur tað verið ógjørligt í samráðingum við skaðavoldaran ella undir rættarmáli við dómstólarnar at fáa endurgjald sambært endurgjaldsregluni eftir § 34. Tað er tó ein fortreyt, at kravánarin heldur seg kunna gera sannlíkt, at treytirnar fyri at veita endurgjald eftir § 35 eru loknar.

Undir regluna koma skaðabøtur fyri skaða og tap, sum er volt inni á føroyskum sjóøki og/ella innanfyri fiskimarkið, um tað má haldast, at skaðagripirnir stava frá kolvetnisvirksemi í gildisøki lógarinnar, jbr. § 1, stk. 1. Ikki kann verða roknað við skaðabótum í teimum førum, har skaðin ella tapið eru hend undir sigling ella fiskiskapi á bannaðum økjum, eitt nú trygdar- ella arbeiðsøkjum, á økjum, har ikki er loyvt at ankra upp ella á økjum, har ikki er loyvt at trola.

Sambært regluni kunnu skaðabøtur veitast fyri skaddan fiskireiðskap, skadd fiskiskip og -før, umframt mista veiðu og fiskitíð. Sama er galdandi fyri mista fiskitíð í sambandi við merking, upptøku og uppskiping av lutum, ið stava frá kolvetnisvirkseminum.

Við veiðumiss skilst tann fiskur, sum fingin var, tá skaðin hendi, men sum fer fyri skeyti ella minkar í virði orsakað av skaðanum.

Mist fiskitíð er rímilig tíð, ið neyðug er at fáa skadda skipið ella skaddu útgerðina í brúkiligan stand ella eyka reiðskap kláran at brúka. Tá støddin av skaðabótum fyri mista veiðutíð verður ásett skal havast í huga, um tað er vanligt at hann, ið krevur, hevur eykaútgerð umborð ella í landi.

Við merking, upptøku og uppskiping skal hann, ið krevur endurgjald, gera sannlíkt, at hetta var neyðugt at fyribyrgja hóttandi vanda fyri siglingartrygdina.

Landsstýrið kann við heimild í § 37, stk. 2 gera nærri reglur um mannagongd í sambandi við krav um skaðabøtur. Víst verður tí til viðmerkingarnar til § 37, stk. 2.

**§ 36.** Loyvi ella góðkenning eftir §§ 14, 18, 19 ella 20 til fyritakssemi á sjóøkinum og landgrunninum, sum verður til hindurs ella ampa fyri fiskiskapi, ið vanliga hevur verið rikin av føroyskum fiskiførum har á leiðini, verða ikki givin, uttan so at landsstýrið samstundis tekur avgerð um at loyvishavin veitir eigarum, reiðarum og manning, hvørs inntøkumøguleikar verða skerdir av fyritakseminum, skaðabøtur, ella landsstýrið hevur sent skaðabótanevndini eftir § 37 málið til avgerðar.

*Viðmerkingar*

Henda reglan viðgerð spurningin um skaðabøtur til eigarar, reiðarar og manning á fiskiførum, hvørs inntøkumøguleikar verða skerdir orsakað av forðingum ella trupulleikum av einari leiðbygging, rørleiðing ella avrigging av oljuleið. Havstøðir kunnu troðka fiskiskapin av miðunum. Hetta fer neyvan at ávirka mongdina av tí fiski, ið fæst, men kann fara at gera tað neyðugt at umleggja fiskiskapin. Ein tílík umlegging kann í ávísum førum føra til skerjing av veiðini ella gera fiskiskapin truplari og harav rakstrartyngri, og, tá ringast veit við, forða ávísum fiskiskapi heilt.

Grein 36 byggir á ta fortreyt, at hesar reglur eru neyðugar, av tí at rætturin at reka fiskiskap er ikki vardur av vanligum endurgjaldsreglum. Teir, ið reka fiskiskap, eiga ikki fiskin, sí § 2 í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap. Harafturat kemur, at fiskivinna sambært altjóða rætti ongan framíhjárætt hevur í mun til aðra lógliga troyting av tilfeinginum á landgrunninum. Gransking og gagnnýting av náttúruríkidøminum á landgrunninum mugu kortini ikki hava við sær óheimilaðar trupulleikar fyri sigling og fiskivinnu ella varðveitslu av heimsins livandi ríkidømi, jbr. landgrunssáttmálan grein 5(1).

Vanliga stendst ampin ella forðingin av, at havstøðir taka nógv pláss. Umframt plássið, sum støðin sjálv stendur á, má roknast við trygdarøkjum, jbr. § 27, stk. 1. Tílík trygdarøki eru ikki við rørleiðingar, men eisini í hesum førum kunnu ávísar avmarkingar verða gjørdar, jbr. § 27, stk. 2.

Sambært altjóða rætti eru trygdarøkini vanliga 500 metrar víð roknað frá útsíðuni av havstøðini. Harafturat kunnu avmarkingar uttanfyri trygdarøkini koma uppá tal, eitt nú bann móti fiskiskapi og uppankring ella á tann hátt, at fiskiskapur verður forðaður í royndum, t.d. orsakað av nógvari skipaferðslu til og frá støðunum ella tí at so stutt er millum trygdarøkini, at tað er ikki fiskandi.

Tey tiltøk, ið reglan vísir til, kunnu føra til, at tað ikki fiskast á einum øki í langar tíðir. Ein leiðbygging ger vanliga at framleiðslueindir, ið verða brúktar í áravís, krevja trygdarøki í tilsvarandi langa tíð. Hinvegin fara rørleiðingar í ávísum førum bert at føra til fyribils tarn ella trupulleikar hjá fiskiskapinum, av tí at rørleiðingarnar ikki vanliga forða fiskiskapinum. Sambært regluni kunnu ikki allir trupulleikar fyri fiskivinnuna fáa skaðabøtur. Treytirnar fyri at fáa skaðabøtur eru tvinnar:

1) tiltakið er til hindurs ella ampa fyri vinnuligan fiskiskap, ið vanliga hevur verið rikin á leiðini,
2) inntøkumøguleikarnir verða skerdir orsakað av tiltøkunum.

Av hesum fylgir at tað skal vera ógjørligt at fiska á ávísum øki ella munandi truplari, kann talan verða um skaðabøtur. Fiskivinnan noyðist sostatt at tola, at fiskiskapurin verður ávirkaður av oljuvinnuni í ávísan mun, og har ikki er talan um munandi ávirkan, verður hildið, at fiskivinnan noyðist at laga seg eftir broyttum umstøðum.

Hvussu høg g*áttin* verður, sum fiskivinnan má fara uppum uttan skaðabøtur, má verða avgjørt í hvørjum føri sær av landsstýrinum ella skaðabótanevndini. Í tílíkum metingum mugu verða havd í huga viðurskifti sum, hvat fiskað hevur verið á leiðini, stødd og slag av oljuvinnuni, veður- og streymviðurskifti, møguleikin hjá fiskiflotanum at troyta aðrar leiðir og alternativir fiskimøguleikar í viðkomandi øki. Tað hevur ikki verið hildið at vera skilagott at seta fastar og avgjørdar reglur

frammanundan fyri, um skaðabøtur eiga at verða veittar ella ei. Hesin spurningurin, eins og spurningurin um býtið av skaðabótunum millum ymiskar veiðuhættir og millum reiðarí og manning, má verða svaraður í teimum avgerðum, sum nevndin tekur í tílíkum málum.

Roknað verður við, at sum høvuðsreglu verður talan um eina upphædd einaferð, men eftir umstøðunum kunnu verða goldnar árligar upphæddir í eitt áramál. Tá gjaldshátturin verður ásettur, kunnu m.a. møguleikarnir hjá fiskiflotanum at leggja um til alternativa veiðu verða havdir í huga.

Tað fylgir av regluni, at landsstýrið ikki kann loyva ella góðkenna nøkur av umrøddu tiltøkum, uttan at støða samstundis verður tikin til skaðabótaspurningin. Hetta kann verða gjørt, annaðhvørt soleiðis at landsstýrið tekur avgerð um skaðabøtur ella vísir málinum til skaðabótanevndina, jbr. § 37. Royndirnar í Danmark, har ein lík skipan finst í lógini um havfiskiskap, vísa, at málini vanliga verða víst til nevndina, m.a. av tí at spurningurin um skaðabøtur ikki er nóg væl lýstur, tá loyvi ella góðkenningar skulu veitast. Verður málið víst til nevndina, kann loyvishavin fara undir ætlaða virksemið, samstundis sum fiskimenninir vita, at støða verður tikin til spurningin um skaðabøtur.

Reglan hindrar ikki loyvishavanum og avvarðandi fiskimonnum at gera avtalu sínamillum um skaðabøtur, og at fiskimenninir í hesum viðfangi frásiga sær rættin til at seta fram meirkrav eftir § 37 í lógini.

Tað er ein fortreyt, at teir fiskimenn, ið seta fram krav, skulu prógva, at treytirnar fyri at fáa skaðabøtur eru loknar. Í hesum sambandi er tað ikki óhugsandi, at eitt yrkisfelag tekur sær av málinum fyri limirnar, men hóast krav verður sett fram undir einum, má tað prógvast fyri hvørt reiðarí/skip sær, at treytirnar eru loknar.

---

**§ 37.** Ein skaðabótanevnd við 5 limum ger av um tap er ella verður volt, og um skaðabøtur eiga at verða veittar eftir § 35 ella, tá landsstýrið hevur sent nevndini mál til viðgerðar, eftir § 36. Loyvishavarnir uppnevna í felag 2 limir, meðan felagsskapir umboðandi føroyskar skipaeigarar, reiðarar og manning á fiskiførum í felag uppnevna 2 limir. Partsumboðini í nevndini uppnevna í felag nevndarformannin, ið skal lúka treytirnar fyri at gerast landsdómari. Fæst ikki semja um formannin, verður hann uppnevndur av sorinskrivaranum.

*Stk. 2:* Loyvishavarnir rinda útreiðslurnar til skaðabøtur og rakstur av nevndini sambært reglum, ið landsstýrið ásetir. Landsstýrið kann gera av, at gjald skal rindast fyri viðgerð av málum í nevndini. Í aðrar mátar er gerðarrættarlógin galdandi. Landsstýrið kann harumframt áseta reglur um skaðabótagrunn, jbr. § 35.

*Viðmerkingar*
**Stk. 1** ásetir, at mál um skaðabøtur eftir § 35 verða avgjørd av einari skaðabótanevnd. Sama er galdandi fyri mál eftir § 36, um landsstýrið hevur víst tílíkum máli til nevndina. Harafturat verður ásett, hvussu nevndin verður vald.

Sambært uppskotinum verða 5 limir í nevndini, tveir valdir av loyvishavunum og tveir av fiskivinnufeløgunum. Við loyvishavar skilst teir, ið loyvi hava eftir hesi lóg, t.e. forkanningarloyvi, leitingar- og framleiðsluloyvi, rørleiðingarloyvi og avriggingarloyvi eftir § 20.

Tað skilst av lógartekstinum, at fiskivinnusíðan eigur at verða umboðað av bæði eigarunum og manningarfeløgunum. Nevndu felagsskapir noyðast tí – á sama hátt sum loyvishavarnir – at semjast um at velja sínar 2 limir í nevndina.

Formaðurin í nevndini verður valdur av partsumboðunum í felag og skal hann lúka treytirnar í rættargangslógini fyri at verða útnevndur til landsdómara. Krøvini eru í høvuðsheitum, at hann skal hava verið býrættardómari, politimeistari, sakførari við rætti at møta fyri landsrætti ella vera løgfrøðingur, sum í 3 ár ella longri tíð hevur verið starvssettur í meginumsitingini sum fultrúi ella í hægri starvi. Semjast partarnir ikki um formannin, verður hann útnevndur av sorinskrivaranum.

**Stk. 2** ásetir, at loyvishavarnir rinda útreiðslurnar til skaðabøtur og rakstur av skaðabótanevndini. Landsstýrið kann áseta gjøllari reglur um útreiðslurnar av nevndini, herundir eisini reglur um avgjøld fyri mál, viðgjørd av nevndini.

Gerðarættarlógin, t.v.s. lóg nr. 181 frá 24. mai 1972, sum er sett í gildi fyri Føroyar við fyriskipan nr. 460 frá 9. september 1975 er annars galdandi fyri tey mál, ið viðgjørd verða av nevndini.

Landsstýrið kann harumframt áseta gjøllari reglur um málsviðgerðina í sambandi við mál, ið avgjørd verða av nevndini, her verður m.a. hugsað um reglur um fráboðan til fiskiveiðueftirlitið um skræddan reiðskap, fráboðanarfreistir v.m.

---

**§ 38.** Loyvi eftir hesi lóg eru undantikin rættarsókn og kunnu hvørki beinleiðis ella óbeinleðis avhendast uttan so at landsstýrið gevur loyvi til tess og góðkennir treytirnar.

---

*Viðmerkingar*
At loyvi eftir hesi lóg eru undantikin rættarsókn merkir, at úttøka ikki kann verða gjørd í loyvinum, og at loyvið ikki kemur undir trotabúarviðgerð. Fer loyvishavi á húsagang, kann loyvið verða tikið aftur, jbr. § 39, stk. 1, litra c.

Endamálið við kravinum um góðkenning av avhendingum er at tryggja, at loyvið bert verður avhent til fyritøkur, sum lúka krøvini eftir § 6 í lógini. At loyvið hvørki beinleiðis ella óbeinleiðis kunnu verða avhend uttan landsstýrisins samtykki merkir, at ikki bert avhendingar, ið formliga líkjast avhendingum krevja loyvi. Avhending kann verða gjørd óbeinleiðis sum avhending av partabrøvum, ið kunnu geva avgerandi ávirkan í felagnum ella sum avtalur, ið hava somu avleiðingar. Reglan er eisini galdandi fyri innanhýsis avhendingar millum fleiri, sum hava eitt loyvi í felag.

**§ 39.** Landsstýrið kann taka eitt loyvi aftur

a) verða lógin, reglur ásettar sambært lógini, treytir og boð brotin grovliga ella ferð eftir ferð,
b) verða í umsókn um loyvi givnar skeivar ella villeiðandi upplýsingar,
c) boðar loyvishavin frá gjaldssteðgi, biður um samráðingar um neyðskuldarsemju, fer á húsagang ella í likvidatión ella kemur í líka støðu.

*Stk. 2:* Fær loyvishavin bøtt fyri sær, tekst loyvið ikki aftur eftir stk. 1, litra a, fyrr enn landsstýrið hevur givið boð um at viðurskiftini skulu verða rættað innan ávísa freist, og boðini eru ikki fylgd.

*Viðmerkingar*

Sambært **stk. 1** kann landsstýrið m. a. taka loyvi aftur, um tær reglur, ásettar eru í lógini ella fyriskipanum sambært lógini, treytum ella boðum, ikki eru loknar. Í teimum førum, nevnd eru í stk. 1, litra a, kann eitt loyvi bert verða tikið aftur eftir stk. 2 um landsstýrið hevur givið boð um, at viðurskiftini skula vera rættað innan ávísa freist, og boðini eru ikki fylgd.

Er eitt loyvi givið fleiri feløgum, verður afturtøka galdandi fyri øll. Afturtøkan verður harafturat galdandi fyri alt økið, ið loyvið fevnir um.

Reglan í stk. 1 litra b hevur til endamáls at tryggja, at loyvi eftir lógini altíð verða veitt við grund í røttum upplýsingum.

**§ 40.** Í loyvi kann ásetast, at ósemja millum landsstýrið og loyvishavan um, hvørt reglur ella treytir sambært hesi lóg ella í reglum ásettum sambært lógini ella í loyvi ella góðkenning, eru loknar, kann verða løgd fyri gerðarrætt til endaliga avgerð.

*Viðmerkingar*

Sambært regluni er heimild at seta gerðarrættarreglur í tey loyvi, ið veitt verða sambært lógini.

Verður mál lagt fyri gerðarrætt fæst ofta skjótari avgerð og gerðarrætturin kann verða mannaður við serliga sakkønum. Nærri reglur um val av gerðarrættarlimum, myndugleika, málsviðgerð v.m. kunnu verða avtalaðar í hvørjum einkultum føri ella ásettar frammanundan í loyvunum.

**§ 41.** Tá ræður um reglurnar í sjólógini um avmarking av ábyrgd fyri flytandi havstøðir, ið sjólógin fatar um, ábyrgist reiðarin, um ábyrgd er avmarkað, við upp til 20 milliónum SDR, sama hvussu stór havstøðin er. Ræður um fólkaskaða verður hendan upphæddin hækkað við 12 milliónum SDR.

*Stk. 2:* Endurgjald fyri dálkingarskaðar av kolvetnisvirksemi hevur ikki sjóveð eftir reglunum í sjólógini.

*Stk. 3:* Hevur reiðarin loyvi eftir § 6 til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum, galda reglurnar um avmarking av ábyrgd reiðarans ikki.

*Viðmerkingar*

Reglan, sum bert er galdandi fyri flytandi havstøðir, ásetir serligar avmarkingar av ábyrgd reiðarans fyri skaðar, ið henda í sambandi við leitingar- og framleiðsluvirksemi frá tílíkum støðum, og ger harafturat av, at endurgjald fyri dálkingarskaðar orsakað av hesum virksemi ikki eru tryggjað við sjóveðrætti eftir reglunum í sjólógini. Hesar serligu reglur, ið galda fyri reiðaran av eini støð,

avmarka ikki skyldur loyvishavans sambært reglunum í kolvetnisvirksemislógini. Tað verður sostatt ikki gjørligt hjá einum reiðara, ið er loyvishavi eftir hesi lóg, og hvørs virksemi verður rikið eftir leitingar- og framleiðsluloyvi, at avmarka sína ábyrgd eftir sjólógini. Tilsvarandi reglur eru at finna í § 20 í donsku lógini um havstøðir og í § 507 í norsku sjólógini.

Tær í **stk. 1** nevndu avmarkingarupphæddir eru ikki galdandi fyri havstøð undir sigling og sleiping ella í heila tikið, tá havstøðin ikki kemur undir gildisøki, jbr. § 1, stk. 1, ella kemur undir regluna í § 2 litra b). Í hesum førum galda vanligu avmarkingarupphæddirnar í sjólógini.

Við SDR skiljast tey serligu dráttarrættindini, ið brúkt verða av altjóða valutagrunninum IMF. Í lógaruppskotinum eru ongar serligar reglur ásettar um tíðarskeiðið fyri umrokning av SDR til danskan pening. Umrokningin má tí verða gjørd samsvarandi teimum til hvørja tí í sjólógini galdandi reglunum.

Tá skaðaevni hjá støðini í boriskeiðnum ikki kann haldast at broytast við tonsatalinum, hevur tað verið hildið skilagott, at avmarkingarupphæddin ikki verður ásett við grundarlagi í veruliga tonsatalinum. Ístaðin fyri verður tí skotin ein føst avmarkingarupphædd upp ljóðandi uppá 20 milliónir SDR, ein upphædd sum er næstan 50% størri enn mesta markið fyri ábyrgd eftir 1969-sáttmálanum fyri ábyrgd tangaskipa fyri oljuskaðum.

Er mannskaði hendur verður skotið upp, at upphæddin verður hækkað við 12 milliónum SDR. Er serliga persónavmarkingarupphæddin á 12 milliónir SDR ikki nóg stór til at svara til krøvini orsakað av fólkaskaða, kann verða roynt at fáa tann ógoldna partin av mannskaðakrøvunum goldnar á jøvnum føti við tingsskaðakrøv av teimum 20 milliónunum SDR. Verða hjálpifør, eitt nú sleipibátar, nýtt í leitingar- ella framleiðsluvirkseminum, kemur eigarin av havstøðini undir ábyrgd eftir § 233 í sjólógini fyri skaðar, sum tílík hjálpifør veita.

**Stk. 2** ásetir, at endurgjald fyri dálkingarskaðar orsakaðir av leitingar- ella framleiðsluvirksemi eru ikki tryggjaðir við sjóveðrætti. Við sjóveðrætt skilst lógásettur veðrættur í skipi ella last. Sjóveðrættur í skipi kann ikki verða skrásettur í skipaskránni og hevur ta rættarstøðu, sum ásett er í sjólógini, sjálvt uttan skráseting. Haldast má, at sjóveðrættur til trygd av dálkingarskaðum orsakað av leitingar- ella framleiðsluvirksemi hevði gjørt tað munandi torførari at tikið lán við trygd í havstøðir v.m.

**Stk. 3** ásetir, at reiðarin ikki kann avmarka sína partleysu (objektivu) og óavmarkaðu ábyrgd sambært § 34 í hesari lóg, um hann sambært hesi lógini hevur loyvi til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum, og viðkomandi arbeiðir harafturat eru umfatað av loyvunum. Í hesum fylgir eitt nú, at ein loyvishavi, hvørs skip voldir skaða við arbeiði umfatað av lógini, ikki kann avmarka sína ábyrgd eftir reglunum í sjólógini um ábyrgdaravmarking.

---

**§ 42.** Landsstýrið kann sum neyðugt er loyva, at føst ogn verður ognartikin til virksemi eftir hesi lóg.

*Stk. 2:* Kanningar, ið ikki taka langa tíð, og sum hava til endamáls at fremja fyritakssemi eftir hesi lóg, kann landsstýrið loyva á annansmans ogn, hóast tað kann hava við sær skaða ella ampa, ið fult endurgjald verður at veita fyri.

*Stk. 3:* Ognartøka eftir stk. 1 verður framd sambært reglunum í lóg nr. 63 frá 7. mai 1881 um skyldu at lata lendi til almennar vegir, havnir og lendingar umframt almennar skúlar í Føroyum. Sama er galdandi fyri avgerðir eftir stk. 2, fæst ikki semja um endurgjaldið.

---

*Viðmerkingar*

Reglan í **stk. 2** hevur til endamáls at gera tað møguligt gera neyðugar tekniskar kanningar í førum, eitt nú sum við seismiskum kanningum, har ikki er neyðugt at taka lendið ella áleggja varðandi ræðisavmarkingar.

---

**§ 43.** Við bót ella hefti verður hann revsaður, sum

a) rekur virksemi nevnt í §§ 4, 6, 18 og 19 uttan loyvi landsstýrisins,
b) riggar virkið av uttan góðkenning landsstýrisins eftir § 20, stk. 1 ella letur ikki rættstundis inn nøktandi avriggingarætlan eftir § 20, stk. 3,
c) brýtur §§ 23, 25 ella 26, ella letur ikki inn stakroyndir og aðrar upplýsingar eftir § 11, ella forðar fyri kanning, nevndar í § 28, stk. 2,
d) aktar ikki boð, givin eftir hesi lóg ella fyriskipanir, ásettar við heimild í lógini.

*Stk. 2:*Verður § 23 brotin, kann arbeiðsgevari bøta, sjálvt um brotið ikki er framt tillætlað ella av ósketni.
*Stk. 3:* Í fyriskipanum, ásettum við heimild í lógini, kann ásetast revsing, sum bót ella hefti fyri brot av reglunum í fyriskipanunum. Eisini kann ásetast, at arbeiðsgevari, sum brýtur reglurnar, boð ella forboð sum ásett, kann bøta, sjálvt um brotið ikki er framt tilætlað ella av ósketni. Umskiftisrevsing verður ikki ásett fyri bót.
*Stk. 4:* Verður brotið framt av partafelagi, smápartafelagi, lutafelagi ella tílíkum feløgum, kann bótin verða kravd av felagnum sjálvum.

---

*Viðmerkingar*
**Stk 3** loyvir, at revsireglur verða ásettar í reglum lýstar sambært lógini. Stk. 3, 2. pkt. ger tað møguligt, eins og í § 21, stk. 2 í donsku lógini um havstøðir, at áleggja bót, men ikki hefti ella fongsul fyri brot móti reglum, sum eru lýstar sambært lógini, hóast arbeiðsgevarin ikki hevur borið seg óforsvarliga at (partleys ábyrgd). Tað er ein fortreyt, at henda ábyrgd bert verður áløgd í sambandi við ásetingar av reglum sambært tær reglur í lógini, sum hava størstan týdningin fyri trygd og heilsuviðurskifti á havstøðum.
**Stk. 4** ger tað møguligt at áleggja ábyrgdina, eisini í teimum førum har eitt felag (løgfrøðiligur persónur) er við í lógarbrotinum.

---

**§ 45.** Lógin kemur í gildi tann”
*Stk. 2:* Løgtinglóg nr. 179 frá 21. oktober 1993 um forkanningar o.a.m. av undirgrund Føroya verður sett úr gildi.

---

*Viðmerkingar*
Roknað verður við at kunngerð nr. 10 frá 15. februar 1996, sum broytt við kunngerð nr. 50 frá 9. mei 1997, ið er lýst við heimild í forkanningarlógini, verður verandi í gildi inntil hon verður broytt ella avtikin við nýggjari kunngerð.
Harumframt verða loyvi latin við heimild í forkanningarlógini og omanfyri nevndu kunngerð verandi í gildi, inntil tey ganga út eftir teimum reglum, sum standa í loyvunum. Galdandi forkanningarloyvi eru í gildi í eitt ár, roknað frá tí degi, tey vórðu latin, og loyvini, sum í løtuni eru í gildi, fara í flestu førum úr gildi tíðliga í 1998.